

RED: 10 X



Nasjonalbibliotek

Nasjonalbiblioteket
National Library of Norway
Rana Division
N-8607 Mo i Rana
Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12 2

LØGTINGS-TIDINDI

1951

LØGTINGSTÍÐINDI

1951

LANDSPRENTSMIÐJAN
TÓRSHAVN
1952

INNIHALD

ÓLAVSØKUTINGIÐ 1951

bls.

Tingmenninir 1
Tingsetingin 1
Tingnevndir 3

ALMANNAMÁL:

Frítíð við lön 32
Broyting í lóg um mægling i arbejdsstridigheder 45
Umsókn um styrk úr landskassanum 235
Lögtingslóg um broytingar í leigulógini 328
Vanlukkutrygging 160
Barnaheim 364

DOMS- OG LØGREGLUMÁL

Uppískoyti til lóg um brandverkið í Tórshavn 346
Broytingar í lógini um motorakför v. m. 368

LANDSUMSITINGIN:

Honorarviðbót til starvsfólk landsins 15
Bíðipeningur landsstýrismanna 33
Broytting v. m. í lögtingslóg um lön tænastumanna landsins 174
Landsstýrismál 178
Samskiping av lögtingsstovnunum 377

FIGGJARMÁL:

Rokuskapur og figgjarstandur landskassans og stovna ... ... skjal 1
Figgjarlögtingslög 1952/53 ... ... bls. 30
Figgjarlögtingslög 1952/53 30
Marshallhjálp til telefonverkið 39
Kanning av figgjarmegi Föroya 61
Álíkning á kommununum 1952 177
Broyting í happadráttalögini 186
Granskoðan av rokuskapum landsins 188
Broyting í toll-lögini 223
Nationalisering av bankalagnum 231
Avtöka á tolli á neyðsynjarvörum 234
Figgjarætlan fyri fátækragrunnin 1952/53 330
Figgjarætlan fyri kirkjugrunnin 1952/53 331
Marshallán til p/f Skipafelagið Föroyar 333
Hækking av vrakaragjöldum 344
Landsskattur 1952 347
Marshallhjálp til sjóvinnuna 373
Skattalóggávan 18
Landsbanki Föroya 53
Nationalisering av útgerð v. m. 231
Stuðlan av ídnaðarvirkjum 234
Lögtingslög um avtöku av fesfiskagjaldi v. m. 110

HEILSUMÁL:

Miðstöðusjúkrahús 31

KIRKJUMÁL:

Umsókn um studning til kirkju í Ritnvík 351
Umsókn um studning til kirkju í Miðvági 353
Reglur viðv. studningi til kirkjugarðar 374
Umsókn um studning til ymsur kirkjugarðar 375

KOMMUNAL MÁL:

Kommunalur jarðaskattur 112
Broyting í kommunalu skattalögini 216
Broyting í lög nr. 126 frá 27. mai 1908 um Tórshavns Styrelse 55
Lögtingslög um býarskipanir v. m. 129

LANDBÚNAÐARMÁL:

Jaktlögin 17
Royndarstöðirnar í Hoyvík og á Sandi 323
Búnaðarskúlamálið 257

LÁNSABYRGDIR OG LANDSKASSALÁN:

Garanti fyri láni til Kvívíkar kommunu 5
Keyp av lendi til landsins oljugoymslur í Søldarfirði 7
Lögtingslóg um veðhald fyri láni til Mikinesar kommunu 14
Veðhald fyri láni til Sunda kommunu 19
Lögtingslóg um lán til uhbakseinkarsöluna 21
Ábyrgd fyri láni til fiskivinnuna 25
Ábyrgdarpening í p/f Sjóvinnubankan 47
Ábyrgd fyri láni til Skúvoyar—Díminar kommunu 53
Ábyrgd fyri láni til vinnulánsgrunn Føroya lögtings 60
Finansiering av ravmagnsverkinum í Tórshavn 86
Lán til landshundilin 192
Lán til Froðbiar sóknar kommunu 236
Garanti fyri láni til p/f Færösit 248
Landsgaranti fyri láni til Froðbiar kommunu 250
Rekonstruktión av p/f Sjóvinnubankanum 273
Húsalánsgrunnur Føroya 18

POSTUR, TELEFON V. M.

Umnotnering av telefonstjóraembætinum v. m. 21
Útvarp 40
— 362
Radiotelefon til útheimin 43
Telefonverk Føroya lögtings 292

SAMFERÐSLUMÁL:

Vegir og lendingar 115

SJÓVINNUMÁL V. M.:

Nýskipan av siglingarlæruni 89
Broytingar í sjóvinnulógini 90
Figgjarbjarging fiskiflotans 195
Einkarrættur Føroya fiskasölu 198
Lögtingslóg um avrokning og lönjavningargrunn fiskimanna 208
Lögtingslóg um veð í veiðu 221
Endurnýgging av skipaflotanum 248
Loyvi til sölu av trolarum 291
Val av 2 limum í nevnd viðv. útgerðarlánum 314
Broytingar í reglunum um sjómarkið undir Føroyum 336
Broytingar í lögtingslóg um avrokning fiskimanna v. m. 261
Sildaveiða á firðum 338
Lönjavning og forskotsskipan 354

SKÓLAMÁL:

Kostskúli... 232

ÚTLENDIS MÁL:

Sínamillum sáttmáli Danmarkar og Bretlands ímillum um lógbundna vanlukku-trygging 9

VAL V. M.

Val av álitsmonnum og nevndum 179
Uppskot til samtyktar um nýval til lögtingið 53

VALUTA OG PRÍSIR:

Lögtingslóg um valuta og prísir 315
Prístalsnevndin 361

VERNDARMÁL:

Uppskot viðv. hernaðaratgerðum í Föroyum 29
Civil-verja 100
Havnar skansi 173

VÍSINDI BÓKMENTIR OG LIST:

Lögtingslóg um fornminnissavn 120
Lögtingslóg um landsbókasavn og landsskjalasavn 124

Ólavsøkutingið 1951.

Ár 1951, mánadagin 30. juli kl. 13 var Föroya lögting sett. Tingformaðurin, sum valdur varð í seinastu tingsetu Hákun Djurhuus tók formannsstólin og lýsti at ólavsökutingið 1951 var sett sambart bræv lögmannsins frá 16. juli 1951.

Tingmenninir eru hesir:

Hákun Djurhuus Klakksvík, ff.
Einar Waag, Klakksvík, jv.
S. P. Zachariasen, Klakksvík, sj.
O. F. Joensen, Klakksvík, sb.
Poul Petersen, Tórshavn, ff.
Jens Chr. Olsen, Toftum, sb.
Joh. M. Fr. Poulsen, Strondum, sb.
J. Fr. Øregaard, Götu, jv.
Johan Kallsoy, Eiði, sj.
Frederik Bláhamar, Vestmanna, ff.
Hans Iversen, Kvívík, sb.
Samuel Ellefsen, Miðvági, ff.
Daniel P. Danielsen, Miðvági, tf.
Sören Danielsn, Miðvági, sb.
Thorstein Petersen, Tórshavn, ff.
Richard Long, Tórshavn, í valb. v. ff.
Poul Niclasen, Tórshavn, sb.
Hanus við Högadalsá, Tórshavn, tf.
J. P. Henriksen, Tórshavn, jv.
Anth. Sörensen, Húsavík, ff.
J. P. Davidsen, Sandi, jv.
P. M. Dam, Tvöroyri, jv.
J. H. Danbjörg, Porkeri, jv.
Andreas Djurhuus, Vági, sb.
Martin Holm, Tórshavn, ff.

Tingformaðurin legði fram skriv frá Hinum föroyska fólkaflokkinum og sambandsflokkinum, d. 30. juli 1951 um, at teir eru gingnir saman um val av tingformanni.

Hann bað tingmenninar J. H. Danbjörg og Jens Chr. Olsen vera fyribils tingskrivarar.

So fór val fram av formannskapi.

Eftir uppskoti varð Hákun Djurhuus valdur formaður og J. F. Øregaard valdur varaformaður.

Til tingskrivarar vórn valdir: J. H. Danbjörg og Jens Chr. Olsen.

Tingformaðurin legði fram skriv, d. 18. juli 1951 og fjarrit frá sama degi frá tingmanninum Poul Niclasen, at hann vegna heilsu ikki kundi möta á tingi, og at Trygve Samuelsen heldur fram sum varamaður hansara.

1951, 15. september varð Johan Poulsen valdur tingformaður ístaðin fyri Hákun Djurhuus, sum á sama fundi varð valdur inn í landsstýrið, ístaðin fyri Th. Petersen, sum eftir kunngerð lögmansins hevði biðið seg frítiknan.

Tingformaðurin legði fram 20. februar 1952 skriv, d. 14. s. m. frá tingmanninum J. F. Øregaard, at hann vegna almenn örindi ikki kundi möta á tingi og bað um at næsti maður hansara mötti sum varamaður til hann kom heimaftur.

Tingið góðkendi síðani, at Cordon Midjord, Fuglafirði, tók sess á tingi sum varamaður J. F. Øregaards.

Fastar nevndir og aðrar:

Figgjarnendin: Martin Holm, Th. Petersen, A. Sörensen, Johan Poulsen, A. Djurhuus, P. M. Dam, og Johan Kallsoy.

Tiltaksmenn: P. Petersen, Fr. Bláhamar, S. Ellefsen, Tr. Samuelsen, Sören Danielsen, J. P. Henriksen og J. F. Øregaard.

Umsóknanevndin: P. Petersen, O. F. Joensen og J. H. Danbjörg.

Landsstýrismálanevndin: Martin Holm, H. Iversen og Einar Waag.

Kommunalanevndin: Hans Iversen, A. Sörensen, Fr. Bláhamar, J. P. Henriksen og S. P. Zachariasen.

Lógarnevndin: M. Holm, P. Petersen, Tr. Samuelsen, E. Waag og J. P. Henriksen.

Nevndin viðv. tingmáli nr. 13: H. Djurhuus, S. Ellefsen, P. M. Dam, J. Kallsoy, Tr. Samuelsen, Jens Chr. Olsen og H. við Högadalsá.

Nevndin viðv. tingmáli nr. 30: Th. Petersen, R. Long, J. H. Danbjörg, S. P. Zachariasen og Jens Chr. Olsen.

Havna- og veganevndin: S. Ellefsen, P. Petersen, J. H. Danbjörg, J. Kallsoy, H. Iversen, A. Djurhuus og Johan Poulsen.

Fiskivinnunevndin: Fr. Bláhamar, Jens Chr. Olsen, S. Ellefsen, P. M. Dam, og J. H. Danbjörg.

Telefonnevndin: M. Holm, A. Sörensen, H. Iversen, E. Waag og J. Kallsoy.

Búnaðarnevndin: P. Petersen, A. Sörensen, Sören Danielsen, J. P. Davidsen og J. F. Øregaard.

Kirkjunevndin: Fr. Bláhamar, S. Ellefsen, Johan Poulsen, J. H. Danbjörg og J. F. Øregaard.

Tingið var saman í 122 dagar, hevði 104 fundir og endaði 4. apríl 1952.

1. Garanti fyri láni til Kvívíkar kommunu.

1951, 1. august legði Th. Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 6. juli 1951:

Uppskot	*Forslag*
til	*til*
lögtingslóg um lán til Kvívíkar kommunu til bryggjubygging.	*Lagtingslov om lån til Kvívíkar kommune til kajbygning.*
Gr. 1.	§ 1.
Landsstýrið verður heimilað landskassans vegna at taka ábyrgd fyri sparakassaláni til Kvívíkar kommunu, stórt 50.000 kr., til bygging av kai á Válinum.	Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et sparekasalån til Kvívíkar kommune, stort 50.000 kr., til kajanlæg á Válinum.
Gr. 2.	§ 2.
Henda lóg fær gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Kvívíkar kommunustýri hevur í skrivi, dagfest 14. apríl 1951, sökt um loyvi at taka sparikassalán, stórt kr. 50.000,—, til byggjan av kai á Válinum og lögtingsábyrgd fyri hesum láni.

Málið hevur verið til ummælis hjá landsverkfröðinginum, sum í skrivi, dagfest 4. mai 1951, svarar soleiðis:

»Vísandi til skriv landsstýrisins J. 1951, no. VII-138.2 — dagsett 21. apríl 1951, viðvikjandi sparikassaláni — stórt 50.000 kr. — til omanfyri nevnda endamál, verður sagt frá, at Kvívíkar kommunu er undir játtanum til lendingar veitt:

í tingsetuni 1945/46 ¾ av kr. 3.100 gl. pr. —)	ca. kr.	30.000 n. pr.
í tingsetuni 1947/48 ¾ av kr. 7.200 gl. pr. —)		
í tingsetuni 1948/49 30.000 kr. um árið í 4 ár	- - -	120.000 n. pr.
Tilsamans ¾ av...	kr.	150.000 n. pr.

Søknarstýrið hevur latið fa. Kampmann, Kierulff & Saxild A/S gjört byggiætlan til nevndu bryggju og hevur 8. marts í ár accepterað boð, stórt o. u. kr. 170.000, frá nevnda firma fyri bygging av bryggjuni.

Bæði byggiætlan og boð eru góðkend hiðani.

Hiðani kann tí verða tilmælt, at kommununi verður givið loyvi til at taka nevnda lán, og at landsstýrið tilmælir lögtinginum at taka ábyrgd fyri tí.«

Upplýst er, at ognir kommununnar 31/12-1950 vóru:

innistandandi og kontantur peningur	kr.	17.953,75
eftirstöður	—	43.706,60
	kr.	61.669,35

og at kommunan onga skuld hevði.

Landsstýrið hevur viðgjört málið og samtykt at senda háttvirda lögtingi tað við tilmæli um at taka ábyrgd, soleiðis sum sökt er um.

1. viðgerð 3. august og 8. august legði kommunala nevndin fram soljóðandi:

Álit

Við skrivi av 6. juli í ár hevur landsstýrið sent tinginum uppskot til lögtingslóg um garanti fyri láni til Kvivíkar kommunu við viðmerkingum.

Kommunalanevndin, ið hevur fingið málið til viðgerðar, skal mæla tinginum til at greiða atkvöðu fyri uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 8. august og 3. viðgerð 10. august 1951.

Uppskot landsstýrisins samtykt 16 –0.

2. Keyp av lendi til landsins oljugoymslur í Søldarfirði.

1951, 1. august legði Th. Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 6. juli 1951:

Uppskot

til

lögtingslóg um keyp av lendi til landsins oljugoymslur í Söldarfirði v. m.

Gr. 1.

Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at keypa törvandi lendi til landsins oljugoymslur í Söldarfirði og at rinda böndunum afturfyri nýtsluna, í leigu og öðrum endurgjaldi, síðani landið tók við oljugoymslunum.

Gr. 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

Forslag

til

lagtingslov om köb af grundarealer til landets oljetankanlæg i Söldarfirði m. m.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at erhverve de nödvendige grundarealer til landets oljetankanlæg i Söldarfirði og at betale vedkommende fæstere for brugen såsom leje og anden erstatning, siden landets overtagelse af oljetankanlægget.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

29. marts 1947, jbr. lögtingstíðindi 1946, bls. 308, samtykti lögtingið at keypa oljugoymslurnar í Söldarfirði, Bretar bygdu undir krígnum. Keypspeningurin var 15.670 £. Yvirtökudagurin var 27. juli s. a.

Tey lendi, goymslurnar standa á, liggja við kongsfestini, sum Peter Weihe Lambauge og Peter Danielsen sita við.

Tað var bert sjálvar goymslurnar, lögtingið yvirtók og ikki grundstykkini undir teimum og uttanum. Landsstýrið hevur fört samráðingar við jarðarráðið um keyp av hesum grundstykkjum og um leigu frá yvirtökudegnum til festararnar. Annar festarin krevur eisini endurgjald fyri grundforbetring.

Lendini eru til stöddar 17.224 m², ávíst av landsverkfröðinginum og uppmáld av landsbúnaðarráðgevaranum.

Semja er nú komin í lag við jarðarráðið um fylgjandi:

1. *Keypspeningurin* verður settur til 3,50 kr. pr. m² ella tilsamans 60.284 kr.

2. *Leigan* til P. W. Lamhauge verður sett til 500 kr. um árið frá 27. juli 1947 ella 2.000 kr. og til P. Danielsen 1.000 kr. um árið frá nevnda degi ella 4.000 kr.

3. *Endurgjaldið fyri grundvirðisökina* til P. W. Lamhauge verður sett til 600 kr.

Í metingini, hvat prísur skal latast fyri lendini, er skilað til, at hesi festi ikki hava möguleikar fyri í bygdini at leggja inn traðir at fáa aftur innangarðslendi, tey her missa. Vanligur prísur hevði annars ligið um 2 kr. pr. m^2.

Fyri at sleppa undan at gjalda leigu fyri upp aftur longri tíð, hevur jarðarráðið goldið böndunum leiguna og endurgjaldið móti at fáa peningin aftur frá landskassanum. Freist er sett til 1. oktober 1951 fyri henda pening og keypspeningin.

Landsstýrið mælir hetvið háttvirda lögtinginum at samtykkja lógaruppskotið. Keypspeningurin v. m. verður so at játta á fíggjarlóg 1952/53.«

1. viðgerð 3. august og 6. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur við skriv av 6. juli í ár sent tinginum uppskot til lögtingslóg um keyp av lendi til landsins oljugoymslur í Söldarfirði við

Fíggjarnevndin skal, samstundis sum hon vísir á nevndu viðmerkingar, mæla tinginum til at greiða atkvöðu fyri uppskotj landsstýrisins.

2. viðgerð 9. august og 3. viðgerð 10. august 1951.

Uppskot landsstýrisins samtykt 15—0.

3. Sínámillum sáttmáli Danmarkar-Bretlands um lógbundna vanlukkutrygging.

1951, 1. august legði R. Long, landsstýrismaður, fram soljóðandi uppskot til millumlandasáttmála við viðmerkingum, d. 6. juli 1951:

Viðlagda uppskot til sinamillum sáttmála Danmark—Brettland um lógskylduga vanlukkutrygging er send lögting og landsstýri til ummælis áðrenn bindandi stöða verður tikin til, um Föroyar eisini skulu umfatast av sáttmálanum, jbr. gr. 7, 2. stk., í heimastýrislógini.

Aðalreglan í art. 3, ið sigur, at vanlukkuhending verður avgjörd eftir lógini í tí landi, avvarandi hevur arbeiði. Frá hesi reglu verður gjört undantak, eftirsum lög bústaðarlandsins verður brúkt, hóast avvarandi er í arbeiði í öðrum landi, tá ið avvarandi er tikin í arbeiði í bústaðarlandinum av felag, ið hevur virki sítt har, og tá ið ætlaða arbeiðstíðin er hægst 6 mánaðir og verunliga arbeiðstíðin ikki fer upp um 12 mánaðir, jbr. art. 4 (1). Arbeiðið í hesum förum verður viðgjört sum arbeiði í bústaðarlandinum.

Eisini verða í art. 4 (2) til (4) jbr. art. 5 givnar reglur, sum úttömandi gera av, hvör lög skal nýtast fyri persónar, ið hava arbeiði um borð á skipum. Manningin fellur inn undir lógina í tí landi, skipið er skrásett. Alt annað arbeiði á skipum verður viðgjört eftir lög bústaðarlandsins.

Við hesum viðmerkingum skal landsstýrið mæla háttvirda lögtinginum at góðkenna, at ætlaði sáttmálin eisini fær gildi fyri Föroyar.

AFSKRIFT

AGREEMENT PROVIDING FOR RECIPROCITY IN MATTERS RELATING TO THE PAYMENT OF COMPENSATION OR BENEFIT OF INDUTRIAL INJURIES (INCLUDING OCCUPATIONAL DISEASES) BETWEEN THE GOVERNMENT OF THE UNITED KINGDOM AND THE DANISH GOVERNMENT

, 1950

The Government of the United Kingdom of Great Britain and Northern Ireland,

and the Government of Denmark,

Desirous of guaranteeing the benefits of the law relating to the payment of compensation of benefit in respect of industrial injuries (including occupational diesases) in force in Great Britain and Denmark to the persons to whom those laws apply or have applied,

Have agreed upon the following preovisions:—

Article 1.

(1) In the present Agreement, unless the context otherwise requires

—»the Act in force in Great Britain« means the National Insurance (Industrial Injuries) Act, 1946 or the National Insurance (Industrial Injuries) (Isle of Man) Act, 1948, as the case may require;
»the Act in force in Denmark« means Act. No. 183 of May 20th 1933 concerning Insurance against the Consequences of Accidents; »Great Britain« means England, Wales and Scotland and the Isle of Man and does not include Northern Ireland or the Channel Islands; »Denmark« means Denmark apart in principle from the Faroe Islands and Greenland, provided that the Convention applies to Greenland to the extent to which the Danish Industrial Injuries Insurance Act Applied to it;
»country« means Great Britain or Denmark, as the case may requires and »compensation or benefit« includes any increase thereof or any additional allowance payable therewith.

(2) Reference in the present Agreement to the Act in force in a particular country shall be construed as references to the Act in forçes in Denmark, as the case may require.

(3) References in the present Agreement to any enactment shall include a reference to such enastment as amended by any subsequent, enactment, regulation or order.

Article 2.

The present Agreement shall apply to any person who is a citizen of the United Kingdom and Colonies or a Danish National, and any reference to »person« in the present Agreement shall be construed accordingly.

Article 3.

Subject to the following provisions, the Act in force in Great Britain shall apply in the case of any person in employment in Great Britain, and the Act in force in Denmark shall apply in the case of any person in employment in Denmark.

Article 4.

(1) Subject to the provisions of the next succeeding paragraphs of this Article, where a person is ordinarily resident in one contry (hereinafter referred to as »the country of residence«) and is in employment in the other country (hereinafter referred to as »the country of employment«), that employment shall, in respect of any period occuring before the expiration of twelve months from the commencement thereof, be treated, for the purposes of the Act in force in Great Britain and the Act in force in Denmark, as if it were employment in the country of residence, if the following conditions are satisfied in relation thereto—

a) the contract of employment is entered into in the country of residence;
(b) the employer has a place af business in the country of residence;
(c) the employment would have been employment in respect of which compensation or benefit would have been payable for industrial injuries

(including occupational diseases) under the Act in force in country of residence if it had been employment in that country;

(d) the duration of such employment in the country of employment is not intended at the commencement thereof to exceed a period of six months.

(2) The provisions of the last foregoing paragraph shall not apply to a person who is ordinarily resident in one country and is employed on board any ship or vessel whose port of regitry is a port in the other country or on board any aircraft registered in the other country but that person, unless he is a person to whom the next succeeding paragrahs applies, shall, in respect of that employment, be subject to the Act in force in the other country, and that Act (including any special provisions relating to persons on ships or aircraft) shall apply to him as if any special conditions therein relating to nationality, domicile or residence were satisfied in this case.

(3) Where a person, being ordinarily resident in one country and employed on board any ship or vessel whose port of registry is a port in the other country or on board any aircraft registered in the other country, is paid remuneration in respect of that employment by some person other than the owner of the ship or vessel or aircraft, then, if the conditions set out in the next succeeding paragraphs are satisfied in relation to that employment—

(a) that person shall, in respect of that employment, be subject to the Act in force in the country of residence, and that Act (including any special provisions relating to persons on ships or aircraft) shall apply to him as if the port of registry of the ship or vessel were a port of registry in that country or as if the aircraft were registered in that country, as the case may be;

(b) the person by whom the said remuneration is paid shall be treated, for the purposes of the Act in force in Great Britain and the Act in force in Denmark, as the insured person's employer;

(4) The conditions referred to in the last foregoing paragraph are:

(a) that the person by whom the said remuneration is paid has a place of business in the country of residence; and

(b) the contract under which the remuneration is payable is intered into in the country of residence.

Article 5.

(1) Where by virtue of paragraph (1) of the last foregoing article the employment of any person is treated as if it were employment in the country of residence, compensation or benefit shall be payable in accordance with the Act in force in that country in respect of any accident happening to, or any disease or injury contracted or received by that person, whilst he is in the country of employment, subject to the same terms and condisions as would have been applicable under that Act if the accident had happened or the disease or injury had been contracted or received in the country of residence.

(2) Where by reason of the application of paragraph (2) or paragraph (3) of the last foregoing Article a person employed on board any ship or vessel or on board any aircraft is insured by virtue of any provisions of the Act in force in either country, compensation or benefit shall be payable in respect of any accident happening to or any disease or injury contracted or received by that person while he is employed as asforesaid subjeet to the same terms and and conditions as would have been applicable under that act if that person had been insured by virtue of such provisions in respect of that employment apart from the application of the said paragraph (2) or the said paragraph (3).

Article 5.

(1) Where a person would be entitled to compensation or benefit undder the Act in force in one country but for any provisions of that Act relating to absence from that country, that person, whilst in either country, shall, notwithstanding any such provisions, be entitled to and may receive such compensation or benefit in respect of any period during which that person, or the wife or husband of that person, as the case may be, is in either country, subject, to the same terms and conditions as would have been applicable under that Act if that person, or the wife or Husband of that person, had been in the first mentioned country.

(2) For the purpose of the right of any person to compensation or benefit under the Act in force in either country, in respect of a child, and for that purpose only, the absence of a child from that country shall be disregarded for any period during that ehild is in the other country.

Article 7.

(1) A person who is a national of one country shall, for the purpose of any right to compensation or benefit under the Act in force in the other country, be treated as if he was a national of that other country.

(2) For the purposes of the foregoing paragraph of this Article, the expression »a national of one country« means in relation to Great Britain a citizens of the United Kingdom and Colonies, and in relation to Denmark, a Danish national.

Article 8.

The Minister of National Insurance of Great Britain and the Danish Minister of Social Affairs shall from time to time determine the procedure appropriate for the purposes of the present Agreement, and all matters of an incidental and supplementary nature which in their opinion to terminate the present Agreement.

Provided that notwithstanding the termination of the present Agreement in accordance with the provisions of this paragraph, it shall continue to apply to cases to which it would have applied if it had not been so terminated, being cases where at right to compensation or benefit arises in respect of employment before the date on which it is so terminated.

Article 10.

Nothing in the present Agreement shall confer a right to double benefit.

In witness whereof the undersigned duly authorised by their respective Governments, have signed the present Agreement and affixed their seals thereto.

Done in duplicate at the day of , 1950 in English and Danish, both texts being equally authoritative.«

1. viðgerð 3. august og 7. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

»Málið er av landsstýrinum lagt fyri tingið við skriv, dagf. 6. juli í ár. Málið er at skilja sum eitt stig fram á vegin til at skapa felags lóggávu landanna millum á ymikum ökjum, har viðurskiftini eru sovorðin, at tílík lóggáva kann ætlast at vera hóskandi. Sum dömi uppá lond, ið eru langt frammi viðvíkjandi felags lóggávu á ymiskum ökjum, serliga tí sociala, kunnu nevnast Norðanlondini. Tíverri fyriliggur sáttmálin einans á enskum máli, men í landsstýrisins fylgibrævi er givin ein stutt frágreiðing viðvíkjandi innihaldinum av teimum ymisku greinunum í sáttmálanum. Landsstýrið mælir tinginum til at góðkenna, at ætlaði sáttmálin eisini fær gildi fyri Föroyar.

Av tí at sáttmálin hevur til endamáls at tryggja ríkisborgarum í báðum londum javnbjóðis rættindi til endurgjald fyri vinnuligar skaðar og vinnuligar sjúkur hvört hjá öðrum, og so statt í grundini bert er ein víðkan av her galdandi lóggávu, skal fíggjarnevndin eins og landsstýrið mæla tinginum til at góðtaka sáttmálan.

Uppskot.

Tingið mælir til, at »Sínámillum sáttmáli Danmark-Brettland um lógskylduga vanlukkutrygging« eisini kemur at umfata Föroyar.«

2. viðgerð 9. august 1951.

Uppskot fíggjarnevndarinnar samtykt 21—0.

4. Veðhald fyri láni til Mikinesar kommunu.

1951, 2. august legði Th. Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 26. juli 1951:

»Kommunustýrið í Mikinesi hevur í skrivi, dagfest 13. mai í ár, sökt um lögtingsábyrgd fyri láni í sparikassanum kr. 12.000 at afturrinda í 20 ár til útvegan av kommunalari vatnveiting í bygdini.

Kommunutýrið upplýsir, at rör og annað tilfar til vatnveitingina fer at kosta 12.000—15.000 kr. Herav er monierjarn til brunnin, sement, nakað av sandi og ein partur av rörunum goldið. Higartil hevur kommunan lagt út um 6.000 kr. fyri hetta tilfar.

Við árslok átti kommunan:

í sparikassa	kr.	20,58
kontantum peningi	—	9.774,36
skattaeftirstöðum	—	2.861,27
tilsamans...	kr.	12.656,21

og onga skuld.

Landsstýrið hevur viðgjört málið og samtykt at tilmæla tinginum at taka ábyrgdina av umsökta láni og setir tí fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um landskassans veðhald fyri einum láni til Mikinesar kommunu.

Gr. 1.

Landsstýrið er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri sparikassaláni uppá kr. 12.000 til legging av kommunalari vatnveiting í Mikinesi.

Gr. 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov om Landskassens garanti for lån til Mikinesar kommune.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for sparekasselån, stort kr. 12.000 til anlæg af kommunal vandledning i Mikinesi.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

1. viðgerð 6. august og 8. august legði kommunala nevndin fram soljóðandi

Álit

Við skrívi av 26. juli í ár hevur landsstýrið sent tinginum uppskot til lögtingslóg um veðhald fyri láni til Mikinesar kommunu við viðmerkingum.

Kommunalanevndin, ið hevur fingið máli til viðgerðar, skal vísa til viðmerkingina og mæla tinginum til at greiða atkvöðu fyri uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 9. august og 3. viðgerð 10. august 1951.

Uppskot landsstýrisins samtykt 18—0.

---

5. Honorarviðbót til starvsfólk landsins.

1951, 2. august legði Th. Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 26. juli 1951:

Uppskot

til

lögtingslóg um viðbót til honorarlönt starvsfólk landsins.

Gr. 1.

Dýrtíðarviðbótin til honorarlönt starvsfólk landsins verður hækkað frá 60 % til 70 % virkandi frá 1. april 1951.

Gr. 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin, og samstundis fer úr gildi lögtingslóg nr. 82 frá 19. desember 1950.

Lagtingslov om tillæg til landets honorarlönnede bestillingsmænd.

§ 1.

Dyrtidstillægget til honorarlönnede bestillingsmænd i landets tjeneste forhöjes fra 60 % til 70 % fra 1. april 1951 at regne.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks, og samtidig ophæves lagtingslov nr. 82 af 19. december 1950.

1. viðgerð 6. august og 7. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Viðmerkingar:

Dýrtíðarviðbótin fyri honorarlönt starvfólk hevur higartil fylgt teimum broytingum, ið danski staturin hevur sett í gildi fyri ríkisins starvfólk, og er hetta nátúrligt um annars prísviðurskiftini broyta seg nakað eins í danska ríkinum og í Föroyum.

Fyrsta broytingin aftaná krígslok varð gjörd virkandi frá 1. januar 1948, har dýrtíðarviðbótin varð broytt frá 50 % til 55 %. Tá var prístalið í Danmörk 175 og her 259. Frá 1. apríl 1950 kom næsta broytingin í gildi, og tá vóru prístölini broytt til atvikavíst 183 og 267, altso 8 stig í báðum stöðum. Og varð dýrtíðarviðbótin hækkað við 5 til 60 %.

Tann 1. apríl í ár vóru prístölini atvikavíst 208 og 284, tað vil siga hækkan í Danmark uppá 25 stig og her uppá 17 stig. Ein eigur at leggja til merkis, at prístalið í Föroyum tann 1. juli 1951 hækkaði 10 stig aftrat; prístalið fyri Danmark var ikki komið, tá hetta varð skrivað.

Av tí, at tað er best, um tað starvsfólk, ið er í landsins tænastu fær sama dýrtíðarviðbót sum ríkisins starvsfólk í Föroyum, og tá munurin millum broytanina í prístalinum er so lítil, vil landsstýrið mæla tinginum til at samtykkja frammanfyri standandi uppskot.

1. viðgerð 6. august og 7. august legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur við skriv av 26. juli í ár sent lögtinginum uppskot til lögtingslóg um viðbót til honorarlönt starvsfólk landsins. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið greiðir landsstýrið frá, at dýrtíðarviðbótin fyri honorarlönt starvsfólk í Föroyum higartil hevur fylgt teimum broytingum ið staturin hevur sett í gildi fyri ríkisins starvsfólk, eins og tað verður givið eitt yvirlit yvir prístalsvökturin atvikavíst í Danmark og Föroyum, og sýnir hetta, at vöksturin her og har aftaná heimsbardagan so at siga hevur verið javnstórur.

Landsstýrið mælir til, at dýrtíðarviðbótin verður hækkað frá 60 % til 70 %virkandi frá 1. apríl 1951.

Av tí, at dýrtíðarviðbótin er ein samsýning fyri dýrtíðarvöksturin og veksur ella minkar samsvarandi galdandi prístal, skal fíggjarnevndin mæla tinginum til at samtykkja uppskotið frá landstýrinum.

2. viðgerð 9. august og 3. viðgerð 10. august 1951.

Uppskot landsstýrisins samtykt 15—0.

6. Jaktlógin v. m.

1951, 3. august legði lögmaður fram soljóðandi skriv, d. 27. juli:

1951, 13. marts, samtykti tingið at skjóta hetta málið til ólavsökutingið 1951.

Landsstýrið loyvir sær so statt at leggja málið fyri aftur tingið vísandi til framlöguskriv frá 21. februar og álit, dagfest 9. marts 1951, í tingmáli nr. 44/1950.

Um so verður, at tingið er sinnað til at samtykkja broytingar í galdandi lóg, so sum skotið upp í nevnda áliti, vildi landsstýrið hildið tað verið greiðari at skriva,ið hvussu er lógarinnar gr. 18 um, soleiðis at reglan verður at allur fuglur er friðaður, og at teir, sum skjótast kunnu árið runt ella part av árinum, verða roknaðir upp í lógargreinini.

1. viðgerð 6. august og 10. august legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Hetta mál varð lagt fyri tingið í seinastu tingsetu, men varð eingin endalig stöða tikin til tey uppskot um broytingar í jaktlógini,ið tá lógu fyri. Lögtingið samtykti 13. marts 1951 at skjótu málið út til ólavsökutingið 1951.

So statt hevur landsstýrið lagt málið aftur fyri tingið, og tingið hevur beint málið í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og skal föra fram:

Soleiðis sum tann núgaldandi Lov for Færöerne (nr. 101) om jagt, fuglefangst m. v. av 4. april 1928 er orðað er reglan tann, at bert tann fuglur ella annað,ið serliga er nevnt, er friðað. Hövuðsreglan er, at frítt er at skjóta og jakstra tað, ið ikki beinleiðis er undantikið, og har, ið lógin annars fyrisetur mark fyri jakt. Friðingarreglurnar fyrisetast í kap. 4. serliga gr. 18.

Aðrastaðni, sum t. d. í Danmark, er hövuðsreglan tann, at allur fuglur er friðaður, ið ikki beinleiðis er undantikin í lógini, sbr. Lov om jagten, (nr. 279) av 30. juni 1922 gr. 18.

Nevndin heldur, at beinast er at ganga hendan vegin og skal tí mæla til, at tær neyðugu broytingar í okkara jaktlóg verða gjördar, soleiðis at hövuðsreglan er friðingin, og at tað verður sett í lógini, hvörjir fuglar eru undantiknir.

Nevndin mælir tinginum til at samtykkja, at biðja landsstýrið gera

uppskot til tær neyðugu broytingar í jaktlóg av 4. april 1928 samsvarandi tí frammanfyri framförda, og leggja uppskot fyri tingið.

2. viðgerð 5. desember 1951.

Uppskotið nevndinnar samtykt 16—0.

---

7. Húsalánsgrunnur Føroya.

1951, 2. august legði Th. Petersen, landsstýrismaður, málið fram við soljóðandi skrivi, d. 31. juli s. á.

Á vetrartingi, 12. februar, legði tjóðveldisflokkurin fram uppskot til húsalánsgrunn við fylgisskrivi, dagfest sama dag.
Hvör tingmaður fekk sítt eintak av málinum og vísandi til tess, loyvir landsstýrið sær at leggja málið fyri aftur á tingi.

1. viðgerð 6. august. Málið heint til figgjarnevndina.

---

8. Skattalóggávan.

1951, 2. august legði Th. Petersen, landsstýrismaður, málið fram aftur við soljóðandi skrivi, d. 31. juli 1951:

Á vetrartingi 1949 legði landsstýrið fram á ting:

1) Uppskot til landsskattalóg við viðmerkingum og skattatalvum.
2) Uppskot til kommunala skattalóg við viðmerkingum. Fylgiskrivið er dagfest 20. oktober 1949.

Uppskotini vóru bert á danskum og hvör tingmaður fekk sítt eintakið.

Á ólavsökutingið 1950 legði landsstýrið fram lógaruppskotini í føroyskum teksti við orðalista. Hvör tingmaður fekk sítt eintakið av hesi framlögu.

Á vetrartingi 4. december 1950 legði landsstýrið málið fram aftur.

Teir nývaldu tingmeminnir fingu hvör sítt eintakið av öllum málinum.

Landsstýrið loyvir sær at leggja hetta málið fram aftur á ting vísandi til tað, sum hígartil er farið fram í málinum (smbr. álit í tingmáli nr. 14/1949, dagfest 8. februar 1950).

1. viðgerð 7. august. Málið beint til figgjarnevndina.

---

9. Veðhald fyri láni til Sunda kommunu.

1951, 4. august legði Th. Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 1. august 1951:

Uppskot
til
lögtingslög um landskassans veðhald fyri láni til Sunda kommunu til breiðkan av brúgv á Oyri.

Gr. 1.

Landsstýrið er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni til Sunda kommunu, stóri 11.250 kr., til breiðkan av brúgv á Oyri.

Gr. 2.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

Forslag
til
lagtinglov om garanti for lån til Sunda kommune til udvidelse af bro á Oyri.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån til Sunda kommune, stort 11.250 kr., til udvidelse af bro á Oyri.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sunda kommuna hevur í skrivi, dags. 27. juli 1951, vent sær til lögtingið við áheitan um at fáa loyvi at taka upp lán í sparikassanum kr. 11.250,00 og um landskassans veðhald fyri hesum láni.

Sparikassin hevur játtað lánið, treytað av nevnda veðhaldi. Av umsókninni framgongur, at lánið skal verða afturrindað í apríl mánaða 1952 við tí studningi, kommununi er játtaður frá landskassanum til breiðkan av brúnni norðuri á Oyri, og sum fellur til gjaldingar í apríli 1952 við tí seinni helvtini. Ta fyrru helvtina av studninginum hevur kommunan fingið í fíggjarárinum 1951/52.

Kommunan hevur upplýst, at arbeiðið er liðugt, men restar enn peningur fyri at fáa alt tilfarið og arbeiðið goldið, og er henda skuldin um somu hædd sum studningurin.

Annars vísur fíggjarstandur kommununnar, at kommunan tann 31/12 1950 átti tökan pening ..... kr. 1.477,45
og eftirstöður ..... — 9.426,17

tilsamans: kr. 10.903,62

og var skuldin eingin.

Landsstýrið hevur viðgjört málið og samtykt at tilmæla háttvirda lögtingi at játta umsóknina og setur landsstýrið tí fram uppskot sum omanfyri tilskilað.

1.viðgerð 8. august og 10. august legði kommunala nevndin fram soljóðandi

Álit

Við skrivi, dagf. 1. august 1951, hevur landsstýrið sent tinginum uppskot til lögtingslóg um garanti fyri láni til Sunda kommunu við viðmerkingum.

Kommunala nevndin, sum hevur havt málið til viðgerðar, skal vísa til viðmerkingarnar og mæla tinginum til at greiða atkvöðu fyri uppskoti landsstýrisins.

2. viðgerð 10. august og 3. viðgerð sama dag 1951.

Uppskot landsstýrisins samtykt 19—0.

10. Umnormering av telefonstjóra-embætinum.

---

11. Løgtingslóg um lán til tubbakkshandilin.

1951, 4. august legði Th. Petersen, landsstýrismaður, fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum og skjali, d. 1. august s. á.

Uppskot
til
lögtingslóg um lán til tubbaks-einkarhandilin.

Gr. 1.

Landsstýrið er heimilað landskassans vegna at taka lán uppí 2 mill. krónur til rakstrarpening til einkarhandilin við tubbakki.

Gr. 2.

Hendu lóg fær gildi beinan vegin.

»Frá degi, sum landsstýrið ásetur« í staðin fyri »Frá 1. apríl 1951«.

Forslag
til
lagtingslov om lån til tobaks-enehandelen.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage et lån indtil 2 mill. kr. som driftskapital til enehandelen med tobak.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

»Fra en af landsstyret angiven dato« i staðin fyri »Fra 1. april 1951.«

Viðmerkingar:

Lögtingið samtykti í seinastu tingsetu lóg um einkarhandil við tubbakki. Lógin fyriskipaði, at einkarhandilin skuldi leggjast undir Landshandilin, og at byrjast skuldi 1. apríl 1951.

Tann 17. marts 1951 sendi lögmaður formonnunum fyri teim ymsu tingflokkunum soljóðandi bræv:

»Vísandi til tað, sum frá landsstýrisins síðu bleiv sagt undir viðgerðini av málinum um einkarsölu av tubbakki, verður hervið gjört kunnugt, at

landsstýrið er av tí áskoðan, at tað er ógjörligt at seta tubbaksmonopol á stovn til tann 1. apríl komandi av tí, at tað kemur at taka longri tíð til at fyrireika hóskandi goymslurúm, neyðturvilig lán, banderolering, samráðing við ymiskar störri tubbaksleverandörar og reglugerð um tann innlendis tubbakshandilin o. m., og vil landsstýrið soleiðis stuðga við at staðfesta lógina um einkarhandil við tubbakki, til tær nevndu fyrireikingar eru loknar.«

Landsstýrið hevur so biðið landshandilin um at kanna málið, landshandilsstjórin hevur sagt stýrinum frá sínum kanningum og vil vera til reiðar, tá lögtingsnevnd ynskir at tala við hann. Landsstýrið skal siga tinginum frá, hvussu málið í hövuðstættinum liggur fyri í lötuni.

Goymsluviðurskifti: Landshandilin hevur í boði at leiga hús í tveimum hæddum, stödd 10×17 metrar, við hitaverki til ovaru hædd. Hesi hús hóskandi og kunnu fáast uppá tað áramál, sum ynskt verður. Leigan av hesum húsum hevur higartil verið 750 kr. um mánaðin. Tað, ið skal gerast fyri at taka hesi hús í brúk, er at seta jarnstengur fyri vindeygu, gera hillar og einstök skilarúm.

Tubbakk á goymslu o. a.: Eftir kanningum má ein rokna við, at ársnýtslan vil verða 850.000—1.000.000 kr. fob. frá Danmörk og 200.000 - 300.000 kr. frá Bretlandi og Hálandi eisini fob. Tollurin fyri ársnýtsluna má roknast at verða um leið 2.000.000 kr. Um hvussu nógv skal vera á goymslu til eina og hvörja tíð, er ilt at ætla bindandi um, áðrenn ein hevur royndir at halda seg til. Tó kann tað sigast, at av sigarettum av teimum mest nýttu merkjum eigur tað at vera nóg mikið at hava á goymslu fyri tveir til tríggjar mánaða nýtslu, men fyri sigarir, ymis slög av tubbakki og einstök slög av sigarettum, serliga teimum dýraru, má ein rokna við at hava á goymlu um leið 6 mánaða nýtslu ella meira. Tann peningur, ið má vera tökur hjá hesum stovni, metir landsstýrið tí at vera 1½ millión krónur og helst 2 millión krónur.

Vinningur: Tað hava samráðingar farið fram við tey störru tubbaksfelögini í Danmark, fyri at fáa at vita, hvörjar treytir ein einkarsöla kundi fingið. Felögini hava ikki viljað komið beinleiðis inn á bindandu avtalur, áðrenn málið var komið so langt, at ein var vissur í, at tað kom í gongd og nær. Roknað má tí verða við einum bruttovinningi uppá 9—10 % ella 300.000 kr., og vil hetta geva um leið 200.000 kr. í nettovinningi til landskassan. Her má tó sigast aftrat, at samstundis falla landsins skattainntökur við minkandi inntökum hjá teimum núverandi heilsölumonnum, og av tí at hetta alt fer av inntökum, ið skatta eftir teim hægru skattastigum, kann tað væl verða, at mesta av heilsöluvinninginum hjá einkarsöluni fer út aftur.

Peningastöðan: Landshandilin hevur eisini umhugsað og samráðst um, hvussu peningurin kann skaffast til vegar. Úrslitið er tað, at ein ikki kann rokna við at fáa lán til hesa fyritöku í peningastovnum her á landi. Tað má tí roynast eftir lánum uttan fyri Föroyar, og tað er landsstýrinum kunnugt, at hetta er trupult í lötuni. Eftirsum landskassaveðhald fyri tílíkum láni verður kravt í hvussu er, setur landsstýrið uppskot um lóg um heimild til, at stýrið tekur upp neyðturvilig lán uppí 2 milliónir krónur.

Landsstýrið hevur fingið hjálagda mótmælisskriv frá herverandi handilsfelögum og vil gera tinginum hetta kunnugt.

Til Föroya Landsstýri.

Í sambandi við samtykt Föroya Lögtings um yvirtöku og monopolisering av tubbakshandlinum í Föroyum skulu undirskrívaðu felög handilsstættarins í Föroyum her koma fram við MÓTMÆLI móti hesi samtykt umboðsmanna fólksins.

Handilfólkinum fellur tað tungt fyri bróstið, at tað einahandilsokið, sum forfedrar okkara fyri 100 árum síðani bardust fyri at bróta, og sum tað eisini eydnaðist fólkinum at rista av sær, í dag av landsins tingi aftur skal verða lagt á hetta fólk. Handilsstætturin mótmælir einahandilsleiðini og serstakliga, at slíkar avgerðir skulu kunna troðkast inn á fólkið, uttan at teir, hvörs lív og lagnu slíkar avgerðir ávirka, og hvörs áhugamál tær skerja og týna, ikki skulu verða tiknir við á mál fyri at kannað kann verða um líkindi, fyrimunir og gagn av slíkum samtyktum og fyriskipanum.

Vit biðja hitt háttvirda Landsstýrið fyrigeva okkum, at vit — hóast vit ikki hava verið atspurdir — sjálvkravdir loyva okkum í hesum serstaka máli at vísa á trupulleikar og vatnsar, ið slík yvirtöka av tubbakshandlinum má föra við sær:

1. Til at skipa slíka landssölu krevst eitt upplag av tubbaksvörum uppá 900.000—1.000.000 kr. + toll, ið má metast til 1.500.000—2.000.000 kr.

2. Goymsluviðurskiftini er ein sera týdningarmikil spurningur. Sum nú er, verða vörurnar, har tær liggja á teim ymisku goymslunum, nærsagt lyftar og lættar hvönn einasta dag, ansað má verða eftir luftskifti, fuktkannan og hitaeftirlit stöðugt fara fram. Hetta kann verða gjört nú, ið landsupplagið er spjatt millum ymsar handlar; men til eitt samlað landsupplag vil tað krevja eitt upplagshús, ið er serstakliga bygt til endamálið. Tubbak er so viðbrekin vöra, at hon kanska er mest at samanbera við frukt og grönmeti. Hugsi ein sær landsupplag av grönmeti — tá er samanburðurin ikki av leið.

3. Umfram hetta er so mangt, ið spælir inn. Hvussu fullfíggjað úrval vil ein einasöla hava? Sum nú er rökja tubbakshandlarnir nær sagt hvönn einstakan kunda og liggja tessvegna stundum áravís við vissum tubbaksslögum — við tollinum frammanundan goldnum. Viðari er spurningurin um tey vöruupplög, ið eru hjá heilssölumonnunum tann dagin, ið einahandilin tekur við. Tað er ein spurningur, ið eigur at liggja fullkomiliga greiður, soframt hendan samtykt verður sett í verk.

4. Nakað heilt annað er, at soleiðis sum vinningurin í dag er býttur millum heilsölu og smásölu, vil gjögnumförslan av hesi samtykt föra við sær, at teir smásöluhandlar, ið einans selja tubbak, verða at halda uppat tann dag, teir einans skulu liva av smásöluni, soframt hin loyvdi vinningurin ikki verður settur nógv upp.

Til gjöllari útdýpan av hesum spurningum og öðrum við — t.d. kredittveiting einasölunnar — vilja vit her biðja hitt hátivirda Landsstýrið um eina samráðing, so skjótt sum tað er gjörligt. Vit vóna, at stýrið ikki vil sýta okkum hetta og vænta at frætta aftur.

Tórshavn, hin 28. apríl 1951.

Heilsölumannafelagið

Ludv. Breckmann.
A/S Charles Mauritzen & Co.
R. Brockie.
N. S. Johannesen's Eftf.
Johannesen.
A/S Balslev & Co.
K. Winther.
Jákup á Dul.

Detailhandlarafelagið

A. M. Restorff.
Chr. Dahl-Restorff.
Oscar Arge.
V. Dal-Christiansen.

Keypmannafelagið

Arthur Brend.
J. Slettenæs.
Mogens Lützen.

1. viðgerð 8. august og beint til fíggjarnevndina.

12. Ábyrgd fyri láni til fiskivinnuna.

1951, 4. august legði lögmaðnr fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum d. 3. august 1951:

Uppskot
til

Lögtingslóg
um ábyrgd fyri láni til fiskivinnuna.

gr. 1.
Landsstýrið er heimilað landskassans vegna at taka ábyrgd fyri láni uppí fýra milliónir krónur frá donskum bankum til föroyskan banka. Landsstýrið góðkennir lánitreytir og fyrisetur reglur fyri eftiransan, soleiðis at hesin peningur kemur tí föroysku fiskivinnuni til góðar.

gr. 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov
om garanti for lån til fiskerierhvervet.

§ 1.
Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at meddele garanti for lån op til fire millioner kroner fra danske banker til færösk bank. Landsstyret godkender lånebetingelserne og fastsætter regler for tilsyn, således at disse penge kommer det færöske fiskerierhverv til gode.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við lögtingslóg nr. 22, dagfest 15. marts 1951, varð givin landsstýrinum heimild at taka ábyrgd fyri láni upp til 10 mill. kr. til I/f Föroya Fiskasölu. 6 mill. kr. eru læntar frá tveimum donskum bankum til teir föroysku bankarnar til hetta endamál, og eru tey tikin undir landskassans ábyrgd og statsábyrgd. Felagið S. E. V. hevði fingið játtað eitt sparikassalán uppá 2 mill. kr., og varð lánið upptikið, tó at peningurin eftir ætlanini fyrst skal nýtast í 1953. Eftir samráð við sparikassan eru hesar 2 mill. kr. læntar I/f Föroya Fiskasölu við landskassaábyrgd eftir nevndu lóg og skulu afturgjaldast 31. desember 1952.

Av tí játtaðu ábyrgd uppá 10 mill. kr. eru soleiðis 2 mill. kr. enn ónýttar.

Tað hevur leingi verið öllum, ið hava við fiskivinnuna at gera, greitt, at peningaorka landsins var ikki til at tey nýkeyptu för, trolarar, snurruváðsbátar og skonnartir kundu fáa góð rakstrarlíkindi. Tá ið fiskivinnan av ymsum orsökum legði um mest til saltfisk, vaks virðið á goymslufiskinum so ögiliga, at peningurin í landinum als ikki munaði.

Í 1950 fekst í lag ein skipan, soleiðis at I/f Föroya Fiskasöla fekk lænt

6 mill. kr. uppá fisk á goymslu, og hjálpti hetta munandi, tó at tað var ikki nógmikið.

Í 1950 fingu nógv av okkara skipum dyggan skelk av gulum og spiltum fiski, so peningastöðan hjá fiskivinnuni í síni heild má sigast at hava versnað munandi í hesum ári. Um nýggjársleið kom steðgur í av streiku, og tað lítla, sum fiskað er av várfiski, er mest alt lagt upp til turkingar. Eisini má nevnast, at tann ovurhonds stóra hækkingin í kolaprísinum — um 80 kr. meira pr. ton enn í fjör — hevur gjört sítt til peningatrupulleikarnar.

L/f Grönlandsfelagið hevði í fjör selt lastina av »Oyrnafjalli«, soleiðis at peningur var goldin, so hvört sum innskipað var, og annars landaðu skipini til onnur skip, sum Grönlandsfelagið ikki hevði við at gera. Peningaliga byrðan var tí nógv minni í fjör enn í ár, nú felagið aftrat »Oyrnafjalli« hevur noyðst at gera sáttmála við tvey skip aftrat, annað til tveir túrar.

Undir hesum umstöðum er tað ikki at undrast á, at landsins peningaorka, sum ár um ár hevur verið minkandi, kom til at tróta, og Grönlandsfelagið saman við Fiskasöluni, tað einasta stað felagið kann fáa pengar inn frá, vendi sær til landsstýrið fyri at siga frá, at um ikki tökur peningur kom til vega, so kundi felagið ikki gera sína skyldu og taka móti fiskinum í Grönlandi, ei heldur skaffa skipunum olju, salt og agn ella klára upp við skipini, ið send vóru at taka fisk. Her mátti handlast beinan vegin, og eftir tilmæli og viðmæli frá landsstýrinum fóru umboðsmenn at samráðast við ríkissstovnar um stöðuna. Umboðmaður fyri banka var við, og Eken bankaeftirlitsmaður, sum beint tá hevði verið í Föroyum og kanna bankviðurskiftini, var við í ferðini og segði seg til reiðar av öllum alvi at virki fyri skjóta likviditetshjálp, nú tað var greitt, at fíggjarorkan hjá landsins peningastovnum kundi ikki halda raksturin galdandi.

Úrslitið av hesi ferð var, at Handelsbanken og Landmandsbanken í Keypmannahavn góvu játtan til gjögnum Sjóvinnubankan her at lata vinnulívið fáa til láns 4 mill. kr., soleiðis at ikki steðgur kom í. Treytirnar vóru Landsstýrið varð spurt við fjarriti og svaraði, at sum umstöðurnar vóru, fyrst ábyrgd frá danska statinum og síðani ábyrgd frá Föroya Lögtingi, helt stýrið seg kunna ganga inn fyri tílíkari ábyrgd, tí ein steðgur í Grönlands fiskiskapinum nú mitt í veiði vildi ráma landið harðari enn nakað.

Landsstýrið setur tí fram hetta lógaruppskot, ið gevur stýrinum heimild til bindandi at vátta tað her ummældu ábyrgd.

Landsstýrið skal leggja aftrat, at avtala er, at hesi eykalán uppá 4 mill. kr. skulu afturgjaldast innan 31. oktober 1951, soleiðis at hetta skal greiðast av teimum allarfyrstu fiskaavkipingum. Tá ið tað í lógaruppskotinum er sett, at landsstýrið skal seta reglur fyri eftiransan, so er hetta ikki einans meint við, at ansast skal eftir, at peningurin verður nýttur at bjarga fiskivinnuni undan steðgi, men eisini, at ansast skal eftir, at alt, ið gerast kann, verður gjört fyri at hetta eykalánið kann verða fult afturgoldið til fyrisettan dag.

Landsstýrið mælir háttvirda tinginum til at geva málinum skjóta og vælvilduga viðgerð, og setur fram frammanundan nevnda lógaruppskotið, ið landsstýrið mælir háttvirda tinginum til at samtykkja.

I. viðgerð 6. august og 10. august legði fíggjarnevndin fram soljáðandi

Álit

Landsstýrið hevur við skrivi, dags. 3. august í ár sent tinginum uppskot til »Lögtingslóg um ábyrgd fyri láni til fiskivinnuna«.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið gevur landsstýrið eitt yvirlit yvir stöðuna viðvíkjandi financieringini av okkara fiskivinnu. Her skal verða nevnt, at tað í hesum sambandi umrödda lán er uppá 4 mill. kr., rentan er 5½ %, og skal lánið verða afturrindað innan 31. oktober 1951, eins og fíggjarnevndin skal vísa á tað skrivligu frágreiðing, I/f Föroya Fiskasöla hevur sent tinginum viðvíkjandi nýtsluni av teimum í landsstýrisins frágreiðing nevndu lánum.

Ein meiriluti av fíggjarnevndini (J. Poulsen, A. Djurhuus, M. Holm, A. Sörensen og Hákun Djurhuus) mælir tinginum til at samtykkja landsstýrisins lógaruppskot um at heimila landsstýrið til at taka ábyrgd fyri áðurnevnda láni, samstundi sum nevndin úttalar, at landsstýrið má gjölla eftiransa, at hesin peningur einans verður nýttur fikivinnuni til frama.

Minnilutin (Joh. Kallsoy og P. M. Dam) ásannar, at peningaviðurskiftini í dag eru mikið hættislig.

Okkara sjóvinna og vinnulív sum heild tikið er í so stórum peningatroti, at vanda er fyri, at steðgur verður í vinnuni. Hetta er einki minni enn eitt deyðakast (katastrofa) fyri okkara land og fólk.

Royndir til at fáa virkispening mega tí verða gjördar av öllum mannum, ið hava ábyrgd fyri okkara vinnulívi og samfelagi, men tað er greitt, og má verða ein ófrávíkilig mannagongd, at menn, ið hava ábyrgd fyri tí almenna, mega í sínum arbeiði, fyri at fáa henda virkispening falan, fara fram á demokratiskan hátt, leggja fram verunleikan, sum hann er, so allir partar, ið stöðu skulu taka, eru fullkomiliga greiðir yvir, hvussu landið og vinnulívsins heildarmynd liggja fyri.

Minnilutin kann ikki halda, at henda demokratiska mannagongdin er fylgd av landsstýrinum og stjórnarflokkunum í tí máli, sum her liggur fyri.

Fyrst er at siga, at tað er ikki bara ódemokratiskt og óvanligt, men eitt brot ímóti tí rætti, sum mótmælisflokkarnir í einum demokratiskum samfelag eiga, tá ið landsstýrið og stjórnarflokkarnir hava loyvt sær uttan eitt einasta orð til mótmælisflokkana formenn og uttan fyrileggging av málinum fyri fíggjarnevndina landsins vegna at veðhalda fyri hesi milliónlán til bjargingar fyri ein banka.

Minnilutin átalar hesa mannagongd. Serliga verður átalað landsstýrisins og fíggjarnevndarinnar meiraluta royndi at fjala sannleikan viðvíkjandi málsins sonnu náttúru, tí tær upplýsingar, sum landsstýrið og fíggjarnevndarinnar meiriluti hava lagt við málinum, geva skin av, at tað er einans vinnu-

lívsins peningatrot og ikki somikið ein neyðstöða hjá einum banka, sum leikar á.

Sambart tí, sum nú er vorðið minnilutanum kunnugt, er sannleikin tann, at hesar 4 milliónirnar í fyrstu syftu ern veittar til vega fyri Sjóvinnubankan. At tær verða nýttar til fíggjan av vinnulívinum verður sagt, at bankaeftirlitsmaður og skrivstovustjóri lögtinsins skulu ansa eftir, men fyri minnilutan er ikki lögd frágreiðing og ætlan um, á hvönn hátt. Hesum finst minnilutin at.

Minnilutin er vitandi um, at fyrsta fíggjanin av vinnulívinum við hjálp av danska stati — 6 milliónir — varð býtt líka millum báðar teir föroysku bankarnar. Hetta varð rímiligt gjört í ásannan av, at báðir bankarnir áttu sama rætt og hövdu nakað líkar uppgávur at loysa — tað er minnilutanum sagt, at Föroya Banki hevur um 60 % av grönlandsskipunum at financiera.

Næsta eykafíggjanin — tær 2 S. E. V. milliónirnar — verður býtt soleiðis, at Föroya Banki fær einans 600.000 kr., meðan hin bankin fær 1.400.000 kr. av peninginum. Hetta misbýti fellur minnilutanum merkiligt í mun til bankanna fíggjaruppgávu.

Og so er tað henda seinasta fíggjanin — 4 milliónir kr. — ið öll verður givin Sjóvinnubankanum, meðan hin bankin ikki smyr knívin. Hetta tykist órættvíst samfelagsliga sað, tí tað er minnilutanum kunnugt, at tann partur, sum landsstýrið og stjórnarflokkarnir siga skal fíggjast av hesum peningi, nevniliga Grönlandsfelagið og Föroya Fiskasöla, higartil er vorðin fíggjaður av Föroya Banka.

Málið er av landsstýrinum og stjórnarmeirilutanum í fíggjarnevndini so lítið upplýst, at tað sakliga sað ikki hjá nökrum fíggjarnevndarlimi ber til út frá vitan og persónligari metan av tí at góðkenna landsstýrisins avgerð.

Ein mögulig góðkenning av tinginum kann tí bert fara fram í treysti til ministeriisins stöðu og kunnleika til viðurskiftini í Föroyum; men hetta er veikt fyri Föroya lögtingsmenn at byggja sína stöðu á og má haldast at vera at handla meira ella minni í blindum; men tá tað annars er minnilutanum kunnugt, at umtalaði peningur longu er nýttur, og landsstýrið og stjórnarflokkarnir hava loyvt sær at handla og nýta peningin, áðrenn minnilutin hevur havt hövi til at viðgera málið og taka stöðu, heldur minnilutin seg einki at hava at gera við málið, nú eingin broyting er gjörlig.

Eftir öllum tí, sum fyriliggur, ber tað ikki minnilutanum til at seta fram nakað uppskot, men mótmælir tí ódemokratisku mannagongd, sum her er farin fram, og tí eyðsýniliga mannamuni, ið gjördur er.

2. og 3. viðgerð 10. august. Uppskotið samtykt 15—0.

13. Uppskot til samtyktar viðv. hernaðarligum atgerðum í Føroyum.

1951, 3. august legði tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

Föroya lögting samtykkir, at Föroyar eru uttanfyri millumlanda stríð og hava onga vápnaða verju.

Hernaðarligar atgerðir ið Danir fyrireika í Föroyum við landsstýrisins vitandi verða steðgaðar.

Landsstýrið ger Danir kunnugar við hesa samtykt beinan vegin.

Tað hevur verið siður og óskrivað föroysk lög upp gjögnum öldir, at Föroyar hava onga hernaðarliga útgerð og Föroyingar hava ikki havt hertænastu. Á vári 1940 tók Föroya lögting ta stöðu »at halda Föroyar uttanfyri bardagan og ósemjuna landanna millum.«

Heimastýrislögin ið síðan er komin í gildi sigur ikki við einum orði, at broyting verður í hesum.

Tað er brot bæði móti föroyskum siði og móti óskrivaðum lögum og móti heimastýrislögini (smb. serstakliga 7. gr.) nú Danir gera hernaðarlig tiltök í landinum, uttan samtykt Föroya lögtings.

Ríkisumboðsmaður Danmarkar, ið umboðar hitt danska valdið her, segði á Föroya lögtingi, afturkomin av Keypmannahavnarferð, at »eg havi givið landsstýrinum frágreiðing. Tað og tingið eiga nú at geva álit í málinum.«

So er ikki gjört. *Landsstýrið, ið uttan tingsins vitandi hevur vent sær til danskar myndugleikar um öking av sjóverjuni,* og nú lýsir at donsk sjóverjustöð verður skipað, hevur brotið föroyskan sið, óskrivaða föroyska lög og lög, teir sjálvir eru gingnir undir, heimastýrislögina.

1. viðgerð 8. august og málið beint til serstaka 7 mannanevnd (Hermálanevndina).

14. Fíggjarløgtingslóg 1952/53.

1951, legði Th. Petersen, landsstýrismaður fram uppskot til fíggjarlögtingslóg fyri fíggjarárið 1. apríl 1952 til 31. mars 1953, d. 6. august s. á. við fylgiskjölum.

1. viðgerð 10. august.

24. mars 1952 legði fíggjarnevndin fram álit við broytingum til landsstýrisins uppskot.

Sí skjal nr. 2.

2. viðgerð 26. mars og 3. viðgerð 28. mars.

I.	Uppskot nevndinnar	gr. 1— 3	... ...	samtyktar 18—0.
	—	gr. 4—14	... ...	samtyktar 19—0.
II.	—	gr. 15—17	við viðm. ...	samtyktar 19—0.

Broytingaruppskot frá J. Fr. Øregaard til gr. 18.2 og gr. 23.8:

Gr. 18 og gr. 23 verða broyttar soleiðis:

Gr. 23.8. studningur til neyðsynjarvörum v. m. kr. 808.500,— verður broytt til kr. 708.500,—.

Viðmerkingar: til hesa gr. verða at broyta soleiðis, at til handilsfóður verður játtað kr. 110.000,—. Tær spardu kr. 100.000,— verða at nýta til havnagerð, soleiðis at tær havnir, sum hava fingið játta lögtingstudning kunnu halda áfram við arbeiðinum.

Gr. 18.2. Í staðin fyri kr. 1.050.250,— verður sett kr. 1.150.250,—.

fall 4—0.

Broytingaruppskot frá S. Danielsen o. fl. til gr. 18.2:

Til viðmerkingar:

Til gr. 18. 2 verður sett sum nýtt petti 3:

a) Játtanin frá 1945 til veg Fútaklett—Oyragjógv, kr. 16.000,— verður nýtt til lending í Miðvági.

b) Harumframt verða kr. 14.000 játtaðar til sama endamál.

Peningurin verður at nýta eftir samráð við landsverkfröðingin.

ud Anmærkninger.

Til § 18, 2 tilföjes som nyt punkt 3:

a) Bevillingen frá 1945 til vejen Fútaklett—Oyragjógv kr. 16.000,— anvendes til landingssted i Miðvági.

b) Derhos bevilges kr. 14.000,— til samme formål.

Bevillingen anvendes efter samråd med landsingeniören.

samtykt 14—0.

Viðmerking til gr. 18. 2. petti I var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: Jens Chr. Olsen, P. Petersen, M. Holm, Tr. Samuelsen, Hans Iversen, Johan Poulsen, O. F. Joensen, A. Djurhuus, S. Ellefsen, Fr. Bláhamar, A. Sörensen, R. Long, Th. Petersen, S. Danielsen og H. Djurhuus.

Nei atkvöddu: J. H. Danbjörg, J. F. Øregaard, J. Kallsoy og J. P. Davidsen.

Atkvöddu ikki: S. P. Zachariasen, J. P. Henriksen, E. Waag, H. við Högadalsá og D. P. Danielsen.

Burtur: P. M. Dam.

samtykt 15—5.

Viðmerking til gr. 18. 2 petti 2 samtykt ... ... 18 0.

Gr. 18 petti 1—4 soleiðis broytt samtykt ... ... 17—0.

Broytingaruppskot frá O. F. Joensen og fl. til gr. 18.4.4.:

Orðini »og selja hann« ganga út, og í staðin verður sett: »karma mögaleikarnar fyri at selja hann og leggja málið aftur fyri á komandi Ólavsökutingi«.

samtykt... 15—0.

Viðmerking til gr. 18. 4 so broytt samtykt ... ... 15—0.

Uppskot nevndarinnar gr. 19 petti 1—5 samtykt ... ... 14—0.

Viðmerking til p. 6 fall ... ... 5 0.
Petti 6 samtykt ... ... 13—0.
Petti 7 og 8 samtyktar ... ... 14—0.
Gr. 20 petti 1 og 2 samtykt ... ... 17—0.
Viðmerking 3. 4. ... ... 16—0.
Petti 3 við viðm. ... ... 17—0.
Petti 4 og 5 ... ... 17—0.
Viðmerking til p. 5 og p. 6 ... ... 16—0.
Petti 7 ... ... 14—0.
Gr. 21, petti 1 við viðm. ... ... 17—0.
— 2 og 3 ... ... 18—0.
— 4 við viðm. ... ... 17—0.
— 5 og 6 ... ... 17—0.
gr. 22 ... ... 18—0.
gr. 23 viðv. til petti 6 ... ... 16—0.
gr. 23 við viðm. ... ... 17—0.
gr. 24—34... ... ... 19—0.
Viðm. til gr. 35, petti 1 ... ... 17—0.
gr. 35 við viðm. ... ... 18—0.
gr. 36 og 37 ... ... 19—0.

Lógaruppskotið sum heild so broytt samtykt... ... ... 19—0.

15. Frítíð við løn.

1951, 8. august legði R. Long, landsstýrismaður, fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 6. august 1951:

Uppskot

til lögtingslóg um avtöku av kunngerðum nr. 28, frá 20. september 1940 og nr. 40, frá 11. desember 1944 um frítíð við lön.

gr. 1.

Kunngerðir nr. 28, 20. september 1940, og nr. 40, 11. desember 1944, verða avtiknar.

gr. 2.

Henda lóg fær gildi 1. oktober 1951.

Forslag

til lagtingslov om ophævelse af kundgörelser nr. 28, 20. september 1940, og nr. 40, 11. desember 1944, om ferie med lön.

§ 1.

Kundgörelse nr. 28, 20. september 1940, og nr. 40, 11. desember 1944, ophæves.

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. oktober 1951.

Viðmerking:

Í nevndaráliti d. 12. mars 1951 í tingmáli nr. 39/1950 um frítíð við lön stendur sum viðmerking til gr. 9: »Núgaldandi frítíðarlóg verður sjálvandi at nýta í hesum ári, men eigur at verða sett úr gildi 20. september 1951. Uppskot um hetta eigur at verða sett fram av landsstýrinum á Ólavsökutingi komandi.«

Landsstýrið loyvir sær at seta fram uppskot samsvarandi hesum.

1., 2. og 3. viðgerð 10. august 1951.

Uppskot landsstýrisins samtykt 19—0.

16. Biðipeningur landsstýrismanna.

1951, 8. august legði Th. Petersen, landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 6. august 1951:

Uppskot

til lögtingslóg um broyting í lögtingslóg nr. 28, 17. mai 1951, um samsýning landsstýrismanna.

gr. 1.

Í gr. 1, 2. petti og 2. reglu í lögtingslóg nr. 28, 17 mai 1951, um samsýning landsstýrismanna gongur orðið »ikki« út.

gr. 2.

Henda lógarbroyting fær gildi beinan vegin.

Forslag

til lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 28, 17. mai 1951, om landsstyresmændenes lönninger.

prg. 1.

I prg. 1, 2. stk., 3. linie i lagtingslov nr. 28, 17. mai 1951, om landsstyresmændenes lönninger udgår ordet »ikke«.

prg. 2.

Denne lovændring træder i kraft straks.

Viðmerking:

Í lógaruppskotinum í tingmáli nr. 64/1951, álit d. 12. mars 1951 er orðið »ikki« í gr. 1, 2. petti og 2. regla í föroyska tekstinum og »ikke« í 3. reglu í somu grein í danska tekstinum komið inn vegna feilskriving.

Landsstýrið loyvir sær at leggja málið fyri aftur tingið til rættingar.

1., 2. og 3. viðgerð 10. august 1951.

Uppskot landsstýrisins samtykt 20—0.

17. Miðstøðusjúkrahúsið.

1951, 8. august legði R. Long, landsstýrismaður, fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 8. august s. á.

Viðvíkjandi tingviðgerð frammanundan verður víst til Lögtingstíðindi 1950, bls. 185, 1947 (heildarætlan bls. 78.)

Í seinastu tingsetu (14. mars 1951) samtykti tingið uppskot frá landsstýrinum, at miðstøðusjúkrahús eigur at verða bygt í Sandagerði í Tórshavn eftir uppskotinum frá Salling Mortensen, byggimeistara, fó við fyrivarni viðvíkjandi støddini av sjúkrahúsdeildunum. Landsstýrið varð biðið fyrireika uppskot á ólavsökutinginum til tingsins peningaíleggjan til hesa bygging.

Í teim samráðingum, sum síðan fóru fram hesum máli viðvíkjandi millum landsstýrið og sjúkrahússtýrið, tók landsstýrið frá fyrsta degi ta töðu, at kostnaðurin mátti minkast so mikið, at Föroya partur — um roknað verður við helvt úr landskassanum og helvt úr ríkiskassanum — ikki fer upp um 3 milliónir kr. Neyðugt var tí at beita á Salling Mortensen um nýtt uppskot. Meginluti hospitalsstýrisins mælti eftir uppskoti frá landslæknanum og P. Dahl yvirlækna til at fara heilt burtur frá Salling Mortensens fyriliggjandi uppskoti og fáa sum mest mögiligt burturúr eini umbötan av núverandi sjúkrahúsi, soleiðis at t. d. skurðstovan har framvegis skuldi verða nýtt og röntgendeildin kom at vera í kjallaranum har hetta vildi spart tvær hæddir í nýbygninginum. Somuleiðis átti einki nýtt vaskihús at verða bygt, men vælt um tað, sum nú er. Samráðingar við Havnar kommunu, sum ynskti sjúkrahúsið, um tað verður bygt í nánd av Sandagerði, bygt norðan fyri vegin. Hospitalsstýrið og landsstýrið vóru samd um, at byggjast má beint við núverandi sjúkrahús, um kostnaðurin skal kunna vera eftir peningavánunum, og at skotið verður til Salling Mortensen at gera av, um bygt eigur at verða norðan fyri vegin ella sunnan fyri.

Í Keypmannahvn fóru samráðingar fram við Salling Mortensen og umboðsmenn fyri ávarandi donsku myndugleikar. Úr Föroyum luttóku í teim fyrstu samráðingunum: fyri sjúkrahússtýrið Vagn Hansen, ríkisumboðsmaður og H. Debes Joensen landslækni, fyri landsstýrið: R. Long. Salling Mortensen upplýsti, at kostnaðurin av tí uppskoti, sum lögtingi í mars mánaði hevði viðgjört, og sum tá víar ætlaður til 8,5 milliónir, nú var ið hvussu er 10 milliónir. Hann lovaði at gera nýtt uppskot.

H. D. Joensen landslækni og R. Long landsstýrismaður hövdu síðan fund við K. Warming sjúkrahússtjóra og umboðsmenn fyri innanríkisráðið og heilsustjórnina og varð har viðgjört sjónarmiðið fyri eini minkan av tí byggiætlan, sum lá fyri. Salling Mortensen varð gjördur kunnugur við tær ætlaðu broytingar og lovaði at skunda undir nýggja tekning.

Í juni mánaði hevði hann gjört 2 nýggj uppskot, sum vórðu viðgjörd á

fundi í statsministeriinum og her verða lögd fyri Lögtingið. Á fundinum í statsministeriinum vóru menn mest hugaðir fyri uppskoti II, um annars tað verður góðtikið av sjúkrahússtýri og Lögtingi.

Sjúkrahússtýrið hevur viðgjört málið og mælir til at bygt verður eftir uppskoti II; landsstýrið ger somu tilmælan. Læknarnir í sjúkrahússtýrinum halda fram, at læknaliga sæð kann ikki verða viðmælt at skerja byggiætlanina meira enn her er gjört, tá ið byggjast skal fyri eina rúma tíð frameftir. Viðmælt má vera at fylgja Salling Mortensens ráðum, ikki at býta byggingina sundur, men halda á fram byrjan til enda, tí öll sundurbýtan fer at ökja um kostnaðin. Eftir uppskoti frá Warming sjúkrahússtjóra í Gentofte, sum hevur verið ráðgevari landsstýrisins og sjúkrahústýrisin í heum máli, er at minka um sjúkrasystrabústaðirnar í mun til fyrra uppskotið og roknar við, at her eigur at verða gingið somu leið sum nú í Danmark, at sjúkrasystrarnar fyri ein part fáa bústað í býnum.

Viðlagt málinum eru teknningarnar og frágreiðing til bæði uppskotini frá Salling Mortensen byggimeistara og mælir eisini landsstýrið til, at bygt verður eftir uppskotið II, um hetta fæst bygt fyri ein kostnað, sum frammanundan av landsstýrinum tilmælt. Fíggjarmegi Föroya er tíverri í lötuni so veik, at landsstýrið torir ikki mæla til at seta stóra peningajáttan í fíggjarlógini til hetta endamál, men av tí tað er átroðkandi neyðugt, at byggingin fer fram so skjótt sum gjörligt, verður tingið biðið geva landsstýrinum heimild at taka neyðturviligt lán til sjúkrahúsbyggingina upp í 3 milliónir, um tao fæst við lagaligum troytum.

Uppskot.

1. Tingið samtykkir at byggingin av miðstöðusjúkrahúsi í Sandagerði skal fara fram eftir uppskoti II frá Salling Mortensen byggimeistara og at roynt verður at stíla soleiðis fyri, at Föroya partur av byggikostnaðinum fer ikki upp um 3 milliónir krónur.
2. Staturin verður biðin lata helvt av byggikostnaðinum.
3. Landsstýrið verður heimilað at taka lán til Föroya part av byggingini.

Uppskot

til

Lögtingslóg um lántöku til sjúkrahúsbygging.

Gr. 1.

Landsstýrið verður heimilað tingsins vegna at taka lán upp í 3 milliónir krónur til bygging av miðstöðusjúkrahús í Tórshavn.

Gr. 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

Forslag

til

Lagtingslov om optagelse af laan til oprettelse af sygehus i Tórshavn.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til paa tingets vegne at optage laan indtil 3 millioner kroner til opförelse af sygehus i Tórshavn.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

FYLGISKJØL *(Byggingar- og kostnaðarætlan frá Salling Mortensen).*

I henhold til aftale paa mödet i Statsministeriet 9.5.51 har jeg udarbejdet vedlagte to alternative forslag til udbygning af et landssygehus paa Færöerne.

Forslagene bestaar, som det oprindelige, af en kombineret patient- og behandlingsbygning indeholdende röntgenafdeling, operationsafdeling og to patientafsnit, samt, i modsætning til det oprindelige, med kedelhus, kökken og spisestuer placeret helt indenfor patient- og behandlingsbygningens rammer i forslag 1, medens disse funktioner i forslag 2 sammen med vaskeriet kun delvis ligger i patient- og behandlingsbygningen, hvilket vil sige, at der her stadig findes ökonomiflöj omend mindre end den oprindelige.

Medens patiensafsnittenes oprindelige dimensionering var paavirket af operationsafdelingens maal og störrelse, er operationsafdelingen i nærværende forslag tilpasset efter patientafsnittet, d. v. s. at korridorbredden er reduceret fra 3.00—2.50 m, birummene er blevet færre og mere sammentrængte, endvidere har man i patientafsnittet undladt liggealtan og undersögelsesstue, den ene baareelevator samt et redskabsdepot..

Udover den indvirkning bygningens mindre maal har paa röntgenafdelingen er denne yderligere reduceret ved, at den oprindelige udbygning mod öst er undladt. I forslag 1 vil den dog have samme antal omend mindre behandlingsrum, hvorimod afdelingen i forslag 2 er reduceret til kun at omfatte 1 diagnostikrum og 1 terapirum, idet kontorerne »midlertidige« er foreslaaet placeret i samme etage, hvorved afdelingen faar en störrelse, der svarer til hvad der kan opnaas ved placering af afdelingen i den gamle bygnings kælder. Ved senere flytning af kontorene vil man kunne opnaa en udvidelse med 1 diagnostikrum.

I forslag 1 er kökken, spisestuer og kedelrum, som tidligere omtalt, placeret helt indenfor bygningens rammer, medens det nuværende vaskeri er tænkt udvidet med en tilbygning. I dette projekt vil alle rum være optaget, og man vil savne depotplads for de nödvendigste ting.

I forslag 2, hvor vaskeri og kökken kun delvis optager rummene i pa-

tient- og behandlingsbygningen, er der lidt rigeligere plads til dækning af behovet for udenomplads.

I vedlagte foreløbige dispositionsplaner over etagernes udnyttelse i forslag 2 er vaskeriets rullestue placeret i selve patient- og behandlingsbygningen, medens vaskehal og kedelhus er placeret i den tilbyggede flöj. Jeg maa i denne forbindelse nævne, at direktör K. Warming ved en gennemgang af planerne har udtalt sig mod denne placering, hvorfor man formentlig ved en eventuel projektering bör flytte kedelrummet ind under huset og placere vaskeriet helt i tilbygningen.

Begge forslagene er tænkt korridorforbundet med det nuværende sygehus, hvilket for transport af patienter synes være meget önskeligt under hensyn til det haarde klima; men saafremt man ikke skulle have penge til overdækket forbindelse, vil man kunne udskyde opförelsen heraf til et senere tidspunkt.

Selvom projektet i den foreliggende form er stærkt beskaaret vil jeg dog under hensyn til de ökonomiske forhold mene, at det vil være forsvarligt at söge sygehuset realiseret efter forslag 2, der vil kunne opfylde de allernödvendigste krav til rumantal og rumstörrelse og tillige vil være et grundlag for videre udbygning.

I nedennævnte overslag er der i lighed med det tidligere ikke regnet med udgifter til ændringer og modernisering af det bestaaende sygehus, hvilke arbejder man formentlig stadig kan tænke sig at udföre succesivt med udgifterne afholdt over driftsregnskabet.

De anslaaede udgifter ved gennemförelse af forslag 1 og forslag 2 er henholdsvis ca. kr. 4.500.000,— og kr. 4.900.000,— exclusive funktionærboliger, hegn og havearbejde samt eventuel nye hovedtilförelser for vand og elektricitet, montering med senge, linned, brugsgenstande, instrumenter o. lignende.

Funktionærboligen foreslaas kun opfört i det nödvendigste omfang indenfor et belöb af ca. 800.000,— regnet efter byggeprisen paa Færöerne, hvorefter man fortrinsvis maa söge at faa funktionærerne til at bo udenfor sygehuset.

Byggeudgifterne er regnet efter index 254. Det sidst opgivne index for maj maaned er paa 262.

Angaaende en eventuel etapevis udförelse af byggearbejdet maa man være opmærksom paa, at der i hovedsagen kun er to strenge at spille paa — sygehusbygningen paa den ene side og funktionærboligerne.

Da begge ting trænger sig lige haardt paa, er det vel vanskeligt at finde nogen vej ud her.

Den normale byggetid vil formentlig for sygehusbygningen paa Færöerne være ca. 2½ til 3 aar, hertil kan lægges projekteringstiden ca. 1 aar, saaledes at man fra vedtagelsen af projektet for sygehusets opförelse til færdiggörelsen af dette skal regne med, at der hengaar ca. 3½ til 4 aar.

En udstrækning af byggetiden herudover vil medföre en forögelse af administrationsomkostningerne, konduktör m. v.

For ikke at faa större anlægsudgifter end allerhöjst nödvendigt, vil det

maasko være i alle parters interesse, saafremt man fra færösk side ikke vil kunne fremskaffe bevillingerne i takt med byggeriet, da at söge et kortfristet laan etableret fra Danmark, saaledes at byggeriet kan gennemföres paa den kortest mulige tid.

Kalkulatorisk overslag efter byggeindex 254 over byggeudgifter ved forslag 1.

Patient- og behandlingsbygning		
12 × 47 × 18,5 = 10.400		
kedel 800 11.200 á kr. 160		kr. 1.790.000
+ 70 pCt.		- 1.250.000
tillæg for kökken og kedelrum c. 1000 m³ á 40 kr. + 70 pCt.		- 70.000
forbindelsesgang m/ indgang c. 50 lb.m á 1500 kr. + 70 pCt.		- 130.000
terrænarbejder		- 100.000
vej 130 lb.m á 320 kr + 70 pCt.	ca.	- 70.000
kedel og hovedledning		- 150.000
inventar		- 420.000
vaskeriudvidelse		- 200.000
kloakstik		- 150.000
tillæg af röntgen		- 100.000
udvidelse af kontorer		- 60.000
		kr. 4.490.000
disponibelt for funktionærboliger		
7000 m³ á kr. 115 = kr. 800.000 efter dansk pris		
+ 70 pCt.		kr. 1.360.000
samlet sum		kr. 5.850.000

Kalkulatorisk overslag efter byggeindex 254 over byggeudgifter ved forslag 2.

Patient- og behandlingsbygning		
12 × 47 × 18,5 = 10.400		
Kedelrum og vaskeri i patientflöjen		
410 m² á 3,5 m = ca. *1.400* 11.800 á kr. 160		kr. 1.900.000
+ 70 pCt.		- 1.320.000
Udbygning for kökken og vaskeri		
12 × 12 × 8 = 1920 m³ á kr. 200		- 384.000
+ 70 pCt.	ca.	- 269.000

terrænarbejder og vej	-	100.000
kedel og hovedledninger	-	150.000
tunnel 35 lh.m á kr. 1500 + 70 pCt.	-	90.000
tillæg for röntgen	-	100.000
inventar	-	450.000
kloakstik	-	150.000
	kr.	4.913.000
disponibelt for funktionærboliger ca. kr. 700.000 efter dansk pris + 70 pCt.	kr.	1.187.000
samles sum	kr.	6.100.000

1. viðgerð 10. august. Málið beint til fíggjarnevndina.

---

18. Marshallhjálp til Telefonverkið.

1951, 9. august legði R. Long, landsstýrismaður, fram soljóðandi uppskot við skjölum, d. 9. august 1951:

Sí skjal 5.

1. viðgerð 10. august og sama dag legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Landsstýrið hevur lagt fyri tingið frágreiðing viðvíkjandi peningatroti, sum telefonverkið er komið í. Málið er beint til fíggjarnevndina. Av frágreiðingini sæst tað at vera átroðkandi neyðugt beinan vegin at útvega tann neyðturviliga pening til at böta um fíggjarvanda telefonverksins, so at ikki alt har skal steðga og landsstýrið koma undir sakarmál vegna vantandi gjöld fyri útint arbeiði og latið tilfar.

Hóast fíggjarnevndin longu áðrenn tingseturna av landsstýrinum er gjörd kunnug við at peningatrot fór at vera viðvíkjandi tí nýgerð, sum fer fram telefonini viðvíkjandi, má nevndin siga seg at vera ovfarin, nú hon verður gjörd kunnug við veruligu stöðu.

Nevndin biður tí landsstýrið, samtíðis sum tingið av neyð játtar landsstýrisins uppskot, hava gjölla eftirlit við öllum, sum nú fer fram har, inntil tingið so skjótt sum gjörligt, fær endaliga frágreiðing um standin og uppskot um gjögnumgripandi umbötur og ætlan um ein framtíðarrakstur, sum kann bera seg.

So statt biður fíggjarnevndin tingið samtykkja landsstýrisins uppskot.

2. viðgerð 10. august og 3. viðgerð 11 .august 1951.
Uppskot landsstýrisins samtykt 19—0.

---

19. Útvarp.

1951, 9. august legði R. Long, landsstýrismaður, fram soljóðandi uppskot við viðmerkingum, d. 8. august 1951:

Í 1943 samtykti tingið at veita úr tiltaksgrunninum 30.000 kr. at leggja í ein útvarpsgrunn, miðandi ímóti at seta á stovn eina útvarpsstöð í Föroyum.

Í 1944 vórðu aftur latnar 30.000 kr. í grunnin.

Í 1945 beitti javnaðarflokkurin á tingið at ökja útvarpsgrunnin og fáa í lag útvarp í Föroyum. Málið varð ikki viðgjört fyrr enn í 1946 (tingtíðindi bls. 52—58).

Upplýst var, at ein útvarpsstöð, ið skuldi rökka alt Ísland og vesturstrond Europa, fór at kosta 10 mill. kr., ein 2 kw. sendari 175.000 kr. og ein 5 kw. sendari 250.000 kr.

Samtykt varð at seta eina millumtinganevnd at kanna möguleikan fyri 1) at stovna útvarp í Föroyum, 2) stovna strandarstöð, 3) fáa radiotænastu í Suðuroy inn undir hesa skipan.

Málið skuldi verða lagt fyri tingið 1947.

Síðan varð samtykt:

Lögtingið úttalar, at tingið er vel hugað fyri, at loyvi verður givið at byggja og dríva radioútvarpsstöð í Föroyum, og at tingið er til reiðar at geva neyðturvilig loyvi, um tær tilstundandu samráðingar við ríkisstjórnina geva tinginum ein slíkan myndugleika.

Nevndin, sum sett varð viðvíkjandi útvarpi og strandarstöð, fekk heimild at samráðast við menn og felög, sum vildi sökja um loyvi at byggja útvarpsstöð í Föroyum.

Í 1947 var á tingi framlögd umhugsan (tingtíðindi bls. 51—52), har greitt er frá tilboðnum um at seta útvarp á stovn í Föroyum. Nevndin helt einki tilboð vera vert at taka. Vald varð millumtinganevnd »at taka sær av

tingingunum um radioútvarpsspurningin, til föroyskt stýri tekur sær av málinum«.

Álagt varð landsnevndini ella landsstýrinum at siga upp sáttmálan við St. N. T. S. innan 1. april 1948.

Í 1948 (tingtíðindi bls. 171—176) viðgjördi tingið radiotarnastu 1) radiotelefon oyggjanna millum, 2) útvarp og 3) strandarstöð).

Viðvíkjanddi 1) varð samtykt:

Lögtingið úttalar, at rætturin til at hava radiotelefon oyggjanna millum eigur at falla inn undir tingsins onkarrætt til at reka telefonir í Föroyum.

Viðvíkjandi 2) varð samtykt:

Telefonverkið verður biðið í samráð við landsstýrið at eftirkanna líkindi fyri at seta í verk eitt föroyskt radioútvarp og at leggja málið aftur fyri Ólavsökutingið.

Viðvíkjandi 3) varð samtykt:

Lögtingið úttalar, at tað seinni ætlar sær at hava og seta á stovn strandarstöð og biður ríkisstýrið halda fram við teirri verandi strandarstöð, til hetta málið er avgjört.

Í 1949 (tingtíðindi bls. 49) varð samtykt at gera tráðleyst telefonsamband Tórshavn—Suðuroy, Tórshavn—Sandoy og Tórshavn—Klakksvík.

Einki varð rött um útvarp.

Í 1948 sókti telefonverkið um og fekk loyvi við sínum radiosendara at lata fólk á landi föra samtalur við skip. Hetta hevur síðani verið gjört, men nakað loyvi til regluligt útvarp hevur telefonverkið ikki havt. Við bráðfeugis loyvi frá ríkisumboðsmanninum er í einstökum útvarpað ymist sum valúrslit og valfundir, í seinastu tíðini eisini gudstænastur og koncertir, men sendarin, sum hert er ein telefonisendari uppá 75 w., er bæði ov veikur og heldur ikki góður til tónleik og sang.

Í mai mánaði 1950 fekkst sum ein royn í lag föroyskt útvarp úr Keypmannahavn. Tað var dansk-færösk komité, sum við statsministerisins hjálp fekk statsradiofoniina donsku at varpa út á stuttbylgju 20 minutt gerandisdagar og 1 tíma sunnudag. Hetta helt við til 15. juni 1951. Samráðingar um hetta útvarp fóru fram í Keypmannahavn í mai mánaði í ár eftir áheitan frá statsradiofoniini, sum kravdi, at annaðhvört varð goldið fyri hetta útvarp av statsministeriinum ella úr Föroyum. Úrslitið av samráðingunum var, at tatsradiofoniin heldur fram vi ðtí föroyska útvarpinum 1 tíma hvönn sunnudag uttan útreiðslu fyri Föroyar.

Á sama fundi varð viðgjört málið um útvarp í Föroyum og radiotelefon millum Danmark og Föroyar.

Útvarpinum viðvíkjandi varð upplýst, at ein sendari uppá 250 w. í löturi kostar o. u. 75.000 kr., ein uppá 2 kw. o. u. 200.000 kr. og ein uppá 5 kw. 300—350.000 kr. umframt hús. Ein sendari uppá 2 kw. man kunna hoyrast um allar Föroyar undir vanligum líkindum, men Föroyum er undir seinastu alheims radiosamráðingum vissað rætt til upp í 5 kw. sendara á millumbylgjuni, sum telefonstöðin hevur nýtt.

Síðan hevur verið samráðst víðari við statsministeriið, undirvísingar-

ministeriið og generaldirektoratet for telegraf um föroyskt útvarp, og liggur nú soleiðis fyri, at um úr Föroyum verður biðið um, at útvarp verður föroyskt sermál, eru donsku myndugleikarnir sinnaðir at ganga hesum á móti sjálvari útvarpinginí viðvikjandi, meðan generaldirektoratið hevur umsjón við tí teknisku driftini.

Um hetta skrívar statsministeriið í brævi, dagf. 20. juli í ár:

»I henhold til lov om radiospredning af 30. marts 1946 varetages oprettelsen og teknisk drift af stationer for statens radiospredning af ministeren for offentlige arbejder, medens alle övrige sager vedrörende radiospredning varetages af radiorådet under undervisningsministeriets ansvar. En række forhold vedrörende den tekniske drift af radiospredningsstationer, der befinder sig indenfor det danske riges territorium, er underlagt de i den internationale telekommunikationskonvention med tilhörende radioreglement fastsatte bestemmelser samt de af Danmark tiltrådte internationale aftaler, der navnlig angår sendernes maximale effekt, frekvenser og andre tekniske krav vedrörende radiospredningsstationerne, der har relation til de forstyrrelser, stationen kan forårsage internationalt. Da de tekniske forhold vedrörende radiospredning, for hvilke ministeren for offentlige arbejder er ansvarlig, således i væsentlig grad er sammenknyttet med forholdet til udlandet, vil man anse det for nödvendigt, at disse spörgsmål fortsat bevares under ministeriet for offentlige arbejder, medens man intet finder at erindre imod, at spörgsmålet vedrörende udsendelsernes program og radioafgift overgår til en selvstændig færöisk radiofoni.«

Möguleiki er fyri, ið hvussu er eina tíð, at leiga ein sendara uppá 2 kw. Mastur og hús fer at kosta 70—80.000 kr. Í útvarpsgrunninum eru 60.000 kr. Játtaðar eru til útvarpsroyndir í fjör 12.000 kr., og sami peningur er skotin upp á fíggjarlógaruppskotinum til næsta fíggjarár. So statt skuldi verið nógmikil peningur til at seta útvarp á stovn, um landsins peningaatstöður annars mæla til hesa peningaíleggjan. Eitt avgjald uppá 15 kr. av hvörjum lurtitóli man geva 45.000—60.000 kr., og er hesin peningur nógmikil til at greiða útreiðslurnar av útvarpi nakrar tímar um dagin.

So statt setur landsstýrið fram hetta

Uppskot.

1. Tingið samtykkir at heita á ríkisstýrið, at radioútvarp, sum nú fellur undir tey mál, sum nevnd eru í deild B eftir heimastýrislógini, hereftir verður föroyskt sermál.
2. Landsstýrið verður heimilað til at nýta peningin í útvarpsgrunninum og av tí til radioroyndir játtaða pening til at seta föroyskt útvarp á stovn.

1. viðgerð 10. august og sama dag legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Ein meiraluti (M. Holm, A. Sörensen, H. Djurhuus, J. Kallsoy, J. P. Henriksen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Andr. Djurhuus og Johan Poulsen) setur einki uppskot.

2. viðgerð 11. august 1951.

Uppskot landsstýrisins petti 1 var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: J. H. Danbjörg, P. Petersen, S. P. Zachariasen, M. Holm, J. Kallsoy, S. Ellefsen, J. P. Henriksen, F. Bláhamar, A. Sörensen, R. Long, Th. Petersen, H. við Högadalsá, D. P. Danielsen og H. Djurhuus.

Atkvöddu ikki: J. Chr. Olsen, Tr. Samuelsen, Johan Poulsen, O. F. Joensen, A. Djurhuus, J. P. Davidsen, H. Iversen, E. Waag og S. Danielsen. Burturstaddur: Dam og Øregaard.

Landsstýrisins uppskot petti 1 samtykt 14—0.
— — 2 samtykt 13—0.

---

20. Radiotelefon til útheimin.

1951, 11. august legði R. Long, landsstýrismaður, fram soljóðandi uppskot, d. 9. august:

Sum tíðin líður verður meiri og meiri átroðkandi eisini her í Föroyum at fáa radiotelefonsamband við útheimin. Tann harða kappingin, tað vaksandi söluútboð og tær minkandi keypivánir um allan heimin ger tað alt truplari hjá Föroyum, sum einsamallar av öllum londum her um leið eru uttan telefonsamband við onnur lond, at troyta sölu- og keypimöguleikar, sum okkum er törvur á. Ofta hevur verið tosað í Föroyum um tað henta í at hava telefonsamband við keypi- og sölulond okkara, og ofta hava útlendskir keyparar og seljarar gramt seg um, at ikki fekst telefonerað higar, so mangur handil fór fyri skeyt, sum annars kundi verið gjördur, men enn er einki komið í lag.

Í 1948 og 1949 reisti táverandi landsstýrismaður L. Zachariasen hetta mál yvirfyri generaldirektoratinum fyri post- og telegraf og skeyt upp, at byggikostnaður og rakstrarútreiðslur av radiotelefonsambandi verð býtt javn uppá Föroyar og Danmark. Byggikostnaðurin var já roknaður til 210.000 kr. fyri stöðina í Danmark, 220.000 kr. fyri stöðina her umfram kostnaðurin av húsum, leidningar til kontrolterminal, streymveiting og grundöki. Einki varð burturúr, tí post- og telegrafverkið vildi ikki luttaka, fyrr enn meiri klárleiki var komin um, hvussu radioviðurskiftini í Föroyum (strandarstöð, radiotelefon Tórshavn—Suðuroy og útvarp) fóru at legna seg.

Radiotelefonsambandið Tórshavn—Suðuroy, eins vel og Tórshavn—Klakksvík og Tórshavn—Sand er nú í hondum telefonverksins, og undir samráðingunum í summar um útvarp í Föroyum varð eisini radiotelefon til útheimin havdur til viðgerðar. Í dag er dýrari at seta hetta á stovn enn fyri trimum árum síðan, o. u. 750.000 kr., men so eru eisini tólini kanska ein mun betri. Øðrvísi er við Föroya peningaorku, hon er lítil í dag móti tí, hon var tá, og landsstýrið hevði ikki í dag torað mælt til at lagt helvtina út av kostnaðinum av bygging og rakstri.

Nú er so vorðið, at danska telegrafverkið hevur sagt seg at vera til reiðar at bera allan kostnaðin av bygging og rakstri av hesari radiotelefon, av tí teir ætla at binda hana saman við radiotelefon til Suðuramerika; teir vilja á tann hátt spara útlendskt gjaldoyra, og til Föroyar kann telefonerast ta tíð, ongar samtalur kunnu fara fram til Suðuramerika.

Landsstýrið heldur seg ikki kunna forsvara ikki at gera tingið kunnugt við hendu möguleika, og sum líkindini eru í Föroyum í lötuni og út frá tí trongd, sum nú meir enn nakrantíð er til hettu radiosamband, leggur landsstýrið málið fyri tingið o gbiður um viðmæli at fáa radiotelefonsamband sett í verk.

Sama dag lögdu Joh. M. Fr. Poulsen, R. Long og J. P. Davidsen fram soljóðandi greint uppskot til avgerðar:

Undir nevndarviðgerð av øðrum máli hevur landsstýrið greitt frá, at möguleiki er fyri, at av statsávum kann verða sett á stovn radiotelefonsamband millum Föroyar og útheimin. Við tað at tíðin er so útliðin, at stundir eru ikki til nevndarviðgerð, verður her sett fram hetta

uppskot til avgerðar:

Tingið biður landsstýrið reika fyri, at radiotelefonsamband við útheimin fæst í lag so skjótt sum gjörligt.

Ein viðgerð fór fram sama dag og uppskotið samtykt 20—0.

21. Broyting í lóg um mægling i arbejdsstridigheder.

1951, 30. oktober legði R. Long, landsstýrismaður, fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 20. september:

Lögtingslóg um broyting í lóg fyri Föroyar nr. 86. 31. marts 1928, om mægling i arbejdsstridigheder.

gr. 1.

1. Aftaná 1. punktum í lógarinnar gr. 6 verður skotið inn: «Hvör atkvöðugreiðsla um semingsuppskotið skal fara loynliga og skrivliga fram. Semingsmaðurin kann krevja uratkvöðu, tá hann heldur góðar grundir vera til tess.«
2. Í lóginnar gr. 6 verður skotið inn sum nýtt petti 2:
»Uppgerðin av úrslitinum av eini uratkvöðu fer fram eftir hesum reglum:
Eitt semingsuppskot er felt, tá yvir 50 % av atkvöðulut-takandi hava greitt atkvöðu ímóti uppskotinum og minst 75 % av teim limum, sum atkvöðurætt eiga, hava luttikið í atkvöðugreiðsluni. Fyri hvört procenttal (stig), sum luttökuprosentin er undir 75, skal tað prosenttal av givnu atkvöðunum, sum neyðugt er til fellingar, setast upp við ½. Hevur atkvöðuluttökan ikki verið 25 pst. av teim, sum atkvöðurætt eiga, má uppskotið ætlast at vera samtykt.
Blankir og ógildir atkvöðu-

lagtingslov om ændring i lov for Færöerne nr. 86 af 31. marts 1928 om mægling i arbejdsstridigheder.

§ 1.

1. Efter 1. punktum i lovens § 6 indsættes:
»Enhver afstemning om mæglingsforslaget skal foregå hemmeligt og skriftligt. Forligsmanden kan forlange urafstemning, når han skönner, at der er rimelig grund hertil.«
2. I lovens § 6 indsættes som nyt stk. 2:
»Opgörelsen af resultatet af en urafstemning finder sted efter nedennævnte regler:
Et mæglingsforslag anses forkastet, når over 50 pct. af de stemmedeltagende har stemt imod forslaget og mindst 75 pct. af de stemmeberettigede medlemmer har deltaget i afstemningen. For hver procent (point), hvorned stemmeafgivningsprocenten ligger under 75, skal den til forkastelse nödvendige procent af de afgivne stemmer forhöjes med ½.
Har stemmedeltagelsen ikke andraget 25 pct. af de stemmeberettigedes antal, anses for-

seðlar verða ikki taldir uppí í uppgerðini.«

3. Í lóginnar gr. 6 verður skotið inn sum nýtt petti 3:
»Eínki má gerast almannakunnugt, og eingin frásögn má gevast um atkvöðuúrslitini, soleiðis sum tey koma fram í felagnum ella meginfelagnum, fyrrenn semingsmaðurin hevur kunngjört hövuðsúrslitið.«

gr. 2.
Henda lög fær gildi beinan vegin.

slaget som vedtaget.
Blanke og ugyldige stemmesedler medregnes ikke ved opgörelsen.

3. I lovens § 6 indsættes som nyt stk. 3:
»Om stemmeresultaterne, således som de fremkommer i foreningerne eller hovedorganisationerne, må intet offentliggöres eller meddeles, för forligsmanden har offentliggjort hovedresultatet.«

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sum lögin nú er orðað, er ivasamt, um semingsmaðurin hevur rætt at krevja, at semingsuppskot skulu setast undir uratkvöðugreiðslu.

Eftirsum tað fyri samfelagið er týðningarmikið, at ikki verður arbeiðssteðgur av störri umfatan, eigur lóggávan, uttan hon so nertir við rætt arbeiðaranna til verkfall og lockout, at vera so skipað, at semingsroyndir kunnu krevjast lagdar fyri teim einstöku limunum í felögunum. Henda vegin verða möguleikar gjördir fyri at fáa stöðu limanna fram og hjá semingsmanninum at fáa beinari bilæt av stöðu felaganna enn við atkvöðugreiðslu í nevndunum.

Afturat verður hildið, at atkvöðugreiðsla limanna eigur at fylgja teim reglum sum nú er grundarlagið undir demokratiskum skipanini, nevniliga loynilig og skrivlig atkvöðugreiðsla. Fyri eisini her at verja samfelagið móti skaða, ið stendst av arbeiðssteðgi, eigur semingsuppskot bert at kunna forkastast, tá ið kvalifiseraður meiriluti atkvöður ímóti. Hesi sonu sjónarmið eru lögd til grund fyri núgaldandi dansku lög um semingsroyndir í arbeiðsósemju, jfr. gr. 10 í lög nr. 603, 21. desember 1945.

Til gr. 1. 2: Dömi.

Fer luttökan niður í 60 % ella 45 %, stígur talið av neiatkvöður við 7,5 og 15 %, soleiðis at felling törvar ein meiriluta uppá 57,5 og 65 % av givnum atkvöðum:

$$75 \div 60 = 15 : 2 = 7{,}5.$$
$$75 : 45 = 30 : 2 = 15.$$

I. viðgerð 1. november og 10. desember legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið, og tingið hevur beint tað í lógarnevndina.

Lógarnevndin hevur viðgjört málið. Nevndin hevur sent málið til ummælis hjá Föroyaarbeiðarafelag, Föroya arbeiðisgevarafelag, Suðuroyar fiskimannafelag, Föroya skipara- og navigatörfelag, Færöerenes Rederiforening, Felag för. trolaraeigara og Föroya motorpassarafelag. Bert Föroya arbeiðisgevarafelag hevur svarað, og hava teir ongar störri atfinningar at gera.

Ein meiriluti (Martin Holm, Poul Petersen og Trygve Samuelsen) mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrissins. Tey sjónarmið, ið uppskotið er grundað uppá, eru tey somu, sum eru lögd til grund fyri núgaldandi dansku lög um semingsroynd í arbeiðsósemju, sbr. gr. 10 í lög nr. 603, 21. desember 1945, og er uppskot landsstýrisins soleiðis ein a jourföring av teim lógarreglum, ið galda fyri Föroyar.

Minnilutin (J. P. Henriksen og Einar Waag) halda ikki, at tað í löturi er neyðugt at gera hesar broytingar í galdandi lög fyri Föroyar, og seta tí einki uppskot fram.

Uppskot

frá

meirilutanum (Martin Holm, P. Petersen og Trygve Samuelsen).

Tingið samtykkir uppskot landsstýrisins um broyting í lög fyri Föroyar nr. 86, 31. marts 1928 »om mægling i arbejdsstridigheder«.

2. viðgerð 12. desember og 3. viðgerð 20. desember 1951.

Lógaruppskotið samtykt 16—0.

---

22. Ábyrgdarpening í P.f Sjóvinnubankan.

1951, 10. september legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 10. september:

Uppskot

til

Lögtingslóg um ábyrgdarpening í p/f Sjóvinnubankin.

gr. 1.

Landsstýrið er heimilað landskassans vegna at taka upp 2 mill. kr. í láni at seta sum ábyrgdarpening í p/f Sjóvinnubankan.

gr. 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov om garantikapital i p/f Sjóvinnubankin.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage et lån på 2 mill. kr. at indsætte i p/f Sjóvinnubankin som ansvarlig indskudskapital.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Eg vendi mær við hesum til tað heiðraða lögting við omanfyristandandi lógaruppskoti. Burtursið frá innihaldinum av hesum uppskoti tori eg siga, at hetta uppskot verður sett fram undir umstöðum, sum eru nakað útyvir vanligu í Föroyum. Sinnini hava serliga teir seinastu dagarnar verið uppskakað, leysasögur hava malið, ja, tað óvanliga er hent, at internationala pressan hevur lagt seg út í föroysk viðurskifti. Eitt skuldi trú, at tað, sum hent er um peningakreppuna, er heilt óvanligt, og at hendingarnar eru komnar sum snarljós av klárum himli. Einki kann vera meira skeivt — tað, ið hent er her, eru bert fylgjurnar av nökrum, sum fram er farið gjögnum eina langa tíð.

Aftaná kríggslok var trongdin eftir matvörum ovurhonds stór, prísirnir vóru högir, og sölumöguleikarnir stórir. Fyri eina fiskaframleiðandi tjóð sum Föroyingar var tað náttúrligt at sleppa sær inn á teir nýggju marknaðarnar. Fiskimenn okkara vóru raskir og könir, men skipafloti okkara hevði havt stór tap undir bardagnum. Við tí peningi Föroyingar hövdu standandi úti frá kríggstíðini, fóru teir nú undir at endurnýggja skipaflotan. Framleiðslan vaks í stórum, og Föroyingar vunnu ógviliga skjótt aftur teir marknaðar, teir hövdu havt undan bardaganum. Meðan fólkið í næstan öllum öðrum londum mátti sakna á ein ella annan hátt, hövdu vit her í Föroyum eina gylta tíð. Peningur og vöra streymaði inn í nögdum, sum vit ongantíð hövdu droymt um, og sum vit tí verri heldur ikki vóru förir fyri at kontrollera.

Soleingi sum fiskaprísirnir vóru högir, hövdu vit ongan ampa av hesari stöðu. Nógv arbeiði var — ja, eitt kann sigu ovmikið. Men so við og við fullu prísirnir á veraldarmarknaðinum, ikki minst tí tey lond, ið keypta fiskin frá okkum, og teir, ið konkurreraðu við okkum, öktu um fiskaframleiðslu sína. Hartil komu teir hækkandi innflutningsprísirnir, sum orsakað

av okkara stóra uttanríkishandli ráma okkum serliga hart. Krónuniðurskurðurin í Europa hevur væl eisini havt sín ávirkan, og serliga príshækkanin aftaná kríggið í Korea. Hetta eru umstöður, sum vit ikki hava verið harrar yvir, og sum vit tí ikki hava ábyrgd av. Tó kunnu vit ikki á henda hátt vísa frá okkum ábyrgdina av öllum tí,ið hent er.

Okkara investeringar hava ikki allar staðið mát. Nógv av teimum skipum, vit settu pening í, hava ikki verið tað, vit væntaðu. Í nógvum förum hava vit verið óansnir við hvörji skip, vit setti pening í.

So við og við sum kostnaðin av fikivinnuni vaks, versnaðu umstöðurnar í hvörjum. Tíverri eru vit her í Föroyum í lötuni ikki förir fyri at eftirkanna hesar skeivleikar, og har aftrat kemur, at tey politisku viðurskiftini hava ikki gjört tað mögguligt at útinna eina veruliga sanering av vinnulívinum. Vit hava hildið, at landsins innlögumöguleikar hava verið nóg stórir til at rinda okkara innflutning og har aftrat finansiera tær törvandu uppleggingar av salt- og klippfiski. Hetta hevur víst seg ikki at vera beint.

Fyri at eftirkanna hesi og onnur viðurskifti í vinnulívi okkara fer í lötuni ein kanning fram her á landi. Tað er ætlanin við hesi kanning og við kanningum framvegis at gera eina royna at kortleggja okkara fíggjarligu viðurskifti, soleiðis at vit í framtíðini kunnu vera förir fyri eftir berokningum og ikki uppá gjöl at taka avgerðir okkara.

Sum lið í nevndarinnar kanningum — og bert sum eitt lið — skuldu viðurskifti bankanna kannast — har uppií serliga ein meting av peningaorku teirra. Tað hevur longu eina tíð verið skilligt, at bankarnir ikki vóru förir fyri at halda fiskivinnuna við tökum peningi. Hetta hevði við sær, at tað gjördist neyðugt at taka lán í Danmark, fyrstu ferð fyri einum ári síðani, tá 6 mill. kr. vóru læntar til helvtarbýtis bankanna millum. Hesin peningur hevur tó víst seg ikki at vera nóg mikil, og törvurin eftir tökum peningi vaks í vár, táið tær fyrstu landingarnar komu. Haraftrat kom, at fiskaavskipingarnar til keypslondini ikki fóru fram so skjótt sum ynskiligt. Tað var tí neyðugt útyvir nýjáttaðar 6 mill. kr. í láni til föroysku bankarnar frá donskum bankum at taka lán í Danmark. Lánið — 4 mill. kr — varð givið av landmandsbankanum og handilsbankanum í felag við stats- og landskassaveðhaldi. Hesin peningur varð latin Sjóvinnubankanum til nýtslu sum stuttfreistað lán. Afturrindingin varð bundin til fikaavskipingar, soleiðis at avdráttur skuldi rindast, so hvört sum remboursar gingu inn. Lánið skuldi vera afturrindað innan 31. oktober. Rörslan í fiskaprísinum og framvegis stígandi útreiðslur hava vaksið um krövini til bankarnar, samstundis sum evnini til at halda lánitreytirnar eru viknaði. Nú kundi verið spurt, um viðurskiftini hövdu verið hjálpin, um fiskaavskipingarnar kundu verið skjótari, og eg skal sjálvsagt ikki nokta, at peningamyndin, sum vit í lötuni hava fyri okkum, ikki hevði verið so döpur, um vit ikki hövdu so stórar fiskanögdir at finansiera. Men eingin má trúgva, at allir spurningar vóru loystir, um vit vóru sloppnir frá fiskinum nú. Bert tann verunleiki, at vit ikki longur *einsamallir* eru förir fyri at finansiera okkara fiskalandingar, gevur okkum nakað at hugsa um. Tað tykist átroðkandi

neyðugt, at spurningurin um okkara ov höga útreiðslutal verður tikin upp til grundigar kanningar, og at farið verður undir törvandi sanering av fiskivinnuni.

Tað er skilligt, at serliga tann banki, sum í stórum hevur finasierað hesa vinnu, kemur undir trupulleikarnar. Eg skal ikki her nema við Sjóvinnubankans serstöku dispositiónir. Tær hava óivað í mongum föri verið ovmikið optimistiskar, og tað er ein verunleiki, at bankin longu hevur havt so stór tap, at ein stimbring er neyðug. Øsingin í fólkinum hevur serliga lagt eftir teim dispositiónum, sum bankans ovasta leiðsla hevur tikið í egnari lángávu. Tað er skeivt, at leiðslan av einum banka nýtir hetta veldi sítt í egnum endamáli. Men hvörvítt hesar dispositiónir vilja hava tap við sær, velst um tann ætlaða sölan av »Nólsoyar Pálli«, »Jóannesi Paturssoni« og tveimum teim störstu hvalabátunum kann útinnast vel. Viðmerkjast skal tó, at roynt verður at selja »Jóannes Paturssoni« í Föroyum. Um hesi viðurskifti serstakliga og bankans viðurskifti annars yvirhövur er tað enn ovtíðliga at geva eina fullfíggjaða og haldgóða frágreiðslu, so leingi nevndin ikki hevur avrikað sítt arbeiði.

Sjóvinnubankans likviditetstrupulleikar hava sum fyrr nevnt verið stóreir teir seinastu mánaðarnar, og roynt varð so líðandi at fáa skil aftur á hesum, uttan at bankans arbeiði skuldi tarnast av misálitisgitingum. Tað er öllum greitt, at föroyska samfelagið ikki kann haldast uppi við bert einum banka. Tað kom tí öllum sum eitt skot, tá ið danska útvarpið fríggjakvöldið 31. august bar út tíðindini um bankans interna viðurskifti.

Hesi tíðindi skerdi ógviliga skjótt bankans álit úti millum manna, soleiðis at ein stimbring av bankans viðurskiftum mátti fremjast beinan vegin.

Danska ríkisstýrið var eisini av somu uppfatan, og longu leygardagin seinrapartin segði tað frá í fjarriti, at eitt flogfar var útvegað til ferð til Keypmannahavnar til tingingar.

Ríkisstýrið sýndi stóra vælvild viðvíkjandi ynskjum okkara um fullfíggjaða og skjóta stimbring av bankanum, og tingingarnar hövdu til úrslit, at landsstýrið við lögtingsins góðkenman kundi læna 2 mill. krónur frá danska ríkiskassanum. Hesin peningur skuldi skjótast inn í bankan sum ábyrgdarpeningur. Lánið skuldi afturrindast, so hvört sum bankans avlop ger tað möguligt, og rentan er sett til 5 %. Lánið verður veitt við teimum treytum, at nýggjur parlapeningur uppá 700.000 kr. verður útvegaður í Föroyum, og so leingi sum lánið ikki er afturrindað, má vinningsbýti ikki fara upp um 6 %. Frá föroyskari síðu kom fram ynski um at knýta danskan bankamann sum kommitteraðan til ta nýggju nevndina, sum veljast skal í samband við stimbringini. Ætlanin við hesum var, at tað var hildið neyðugt, at bankin, í hvussu er í fyrstuni aftaná stimbringina, kundi vinna aftur álit bæði innan- og uttanlanda:

Eftir fjarriti frá 8. september hevur ríkisdagsins fíggjarnevnd tiðið undir láninum, sbr. soljóðandi fjarrit:

»FINANSUDVALGET TILTRÅDT LÅNT AF STATSKASSEN TIL LANDSSTYRET 2 MILL. KRONER TIL ANSVARLIG INDSKUDSKAPITAL SJÓVINNUBANKIN Á RENTE 5% OG TILBAGEBETALING EFTERHÅNDEN SOM BANKENS OVERSKUD MULIGGØR DET STOP UDVALGET FORUDSÆTTER SØGES TRUFFET ORDNING HVOREFTER UDBYTTE IKKE UDBETALES GAMLE AKTIONÆRER FØR INDSKUDSKAPITALEN TILBAGEBETALT.«

Treytin, sum framsett er í fjarritinum, at tann gamli partapeningurin ikki fær vinningsbýti, so leingi lánið ikki er afturrindað, kann ikki koma nökrum dátt við, eftirsum tann nýggji partapeningurin í tílíkum förum vanliga fær fyrimun. Aðrar treytir verða ikki lagdar, og fær ríkisstýrið ikki hervið ávirkan á leiðslu bankans.

Eg vóni, at tað við hesi frágreiðing hevur eydnast mær at gera tað skilligt, at stimbringin av bankanum má fremjast beinan vegian, og at eisini ríkisstýrið, sum við sínum stuðuli hevur gjört tað möguligt, at stimbringin yvirhövur kann fara fram, hevur hesa uppfatan. Eg vóni, at tað heiðraða tingið hevur somu uppfatan sum eg, og mæli til, at tað lógaruppskotið, sum liggur fyri, verður framt so skjótt sum yvirhövur möguligt.

1. viðgerð 11. september og 15. september legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Málið er tann 11. h. m. beint til viðgerðar í fíggjarnevndini. Nevndin hevur havt fleiri fundir til nærri kannan av málinum, harímillum samráðingar við bankaeftirlitsmann Eken. Nevndin skal, samstoddis sum hon vísir á lögmannsins frágreiðing av 10. h. m. í málinum, úttala fylgjandi:

Nevndin er greið yvir, at fanu kreppan, vit eru í í lötuni og ætlandi framyvir, ikki einans kann viðföra trupulleikar fyri einkuftar peningastovnar, men er av so djúptgangandi náttúru, at hon vil ávirka heila okkara samfelags fíggjarlív. Sjóvinnubankin, ið er fyrsti stovnur, sum er áti fyri hesum ágangi, er bert eitt lið í okkara fíggjarlívi, um nokk eitt týdningarmikið lið.

Sambart teim upplýsingum, nevndin hevur fingið, eru allir bankans reservagrunnar burtur, og einans partapeningurin 300.000 kr. er ætlaður at vera í behold. Tað er greitt fyri hvörjum manni, at tað vil vera ein fíggjarlig ólukka fyri okkara samfelag, um Sjóvinnubankin fer á húsagang, tí tað vil ikki einans vera bankin sum sovorðin, ið rýkur, men nógvar aðrar týðandi fyritökur vilja óumgangiliga fara sama veg, fyritökur, sum undir vanligum umstöðum hövdu allar möguleikar fyri at hildið fram á einum sunnum grundarlagi. Nevndin sær tí soleiðis uppá málið, at sum umstöðurnar eru í dag, er tað eitt samfelagsligt krav, at Sjóvinnubankin verður bjargaður.

Tann vælvild donsku myndugleikarnir hava sýnt við viðgerðina av málinum, hevur gjört hetta möguligt, og teirra skjóti viðgerðarháttur sýnir, at eisini teir halda, at málið hastar.

Sambart lögmannsins frágreiðing er tað soleiðis skipað fyri, at landsstýrið við lögtingsins góðkennan kann læna 2 mill. kr. frá danska ríkiskassanum. Hesin peningur skal skjótast inn í bankan sum ábyrgdarpeningur. Lánið skal afturrindast, so hvört sum bankans avlop ger tað möguligt, og rentan er sett til 5 %. Lánið verður veitt við teimum treytum, at nýggjur partapeningur uppá 700.000 kr. verður útvegaður í Föroyum, og so leingi sum lánið ikki er afturrindað, má vinningsbýtið ikki fara upp um 6 %.

Tann nýggi partapeningurin er tryggjaður við tað, at Tryggingarsambandið Föroyar og Föroya Fiskasöla vilja tekna tær kravdu 700.000 kr. sum partapening.

Fíggjarnevndin er samd um at mæla tinginum til at taka ábyrgdina av einum láni uppá 2 mill. kr. at seta sum ábyrgdarpening í p.f Sjóvinnubankan, tó við hesum fyrivarni:

1. At tann sitandi nevndin fyri Sjóvinnubankanum á komandi aðalfundi tann 24. h. m. fer frá, og at í minsta lagi 700.000 kr. verða teknaðar sum nýggjur partapeningur.
2. At tað sum eftirlitsmaður (»Kommitteret«) verður settur ein könur bankamaður, ið kann góðtakast av bankinspektörinum.
3. Roknað verður við, at tann nýggi partapeningurin 700.000 kr., sum í fyrstu syftu verður teknaður av Tryggingarsambandinum Föroyar og Föroya Fiskasölu, seinri verður útboðin til almenna tekning.
4. So leingi sum ábyrgdarpeningurin 2 mill. kr. ikki er afturgoldin, skal bankin hvönn mánað senda fíggjarnevndini mánaðarjavnvág og hvönn ársroknskap.

Við hesum fyrivarni mælir fíggjarnevndin tinginum at greiða atkvöðu fyri tí av lögmanni framsetta lógaruppskoti í hesum máli.

2. og 3. viðgerð sama dag 15. september 1951.

Lógaruppskotið samtykt 23—0.

23. Landsbanki Føroya.

1951, 11. september legði tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi:

Uppskot til samtyktar

Lögting Föroya samtykkir at reisa Landsbanka Föroya.

Lögting Föroya velir 5-mannanevnd til at fyrireika reising av Landsbanka Föroya og at taka upp samráðingar við p/f Sjóvinnubankan um yvirtöku.

Málið beint til fíggjarnevndina.

---

24. Nýval til løgtingið.

1951, 11. september legði tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi

Sambart 9. grein í lögtingslóg um stýrisskipan Föroya í sermálum samtykkir lögting Föroya, at tingið verður at uppleysa og nýval útskrivað.

Uppskotið fall 6—0.

---

25. Ábyrgd fyri láni til Skúvoyar-Dímunar kommunu.

1951, 30. oktober legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 25. september:

Kommunustýrið fyri Skúvoyar-Dímunar kommunu hevur í skrivi, dags. 20. juli 1951, sökt um loyvi at taka upp lán í Færö Amts Sparekasse

kr. 10.000 til gerð av vatnveiting í Skúvoy og biður lögtingið um at taka ábyrgd av hesum láni.

Sparikassin hevur játtað lánumsóknini og vil lána kommununi hesar 10.000 kr. at afturrinda í 10 ár og við 5 % í rentu umframt 1 % í provision, tá lánið verður tikið.

Kommunustýrið greiðir í umsóknini frá, at í bygdini eru 6 privatar vatnveitingar, men at vatnið er bæði lítið og ringt, og hava læknar átalað tað sum heilsuskaðiligt.

Kommunustýrið hevur tí samtykt at fara undir at gera nýggja vatnveiting fyri alla bygdina undir einum og frá keldum, har nóg mikið er av góðum vatni, og roknar við, at hetta kemur at kosta um 20.000 kr. Av hesum hevur kommunan 10.000 kr. sjálv og biður tí um lánloyvi við lögtingsábyrgd fyri hinum 10.000 kr.

Figgjarstaður kommununar 31/12-1950 er hesin:

Kassapeningur	kr.	4.624,86
Eftirstöður	—	7.409,57
	kr.	12.034,43
og skuld til sjúkrakassan	kr.	1.000,00

Landsstýrið hevur viðgjört málið og samtykt at viðmæla umsóknini og stuðla tinginum at taka ábyrgd av umsókta láni og setur tí fram soljóðandi

Uppskot

til

lögtingslóg um ábyrgd fyri láni til Skúvoyar—Dímunar sóknar kommunu til vatnveiting í Skúvoy.

gr. 1.

Landsstýrið verður heimilað landskassans vegna at taka ábyrgd av sparikassaláni til Skúvoyar—Dímunar sóknar kommunu, 10.000 kr., til gerð av vatnveiting í Skúvoy.

gr. 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til Skúvoyar—Dímunar sogns kommune til vandledning i Skúvoy.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på lagtingets vegne at garantere for sparekasselån til Skúvoyar—Dímunar sogns kommune, 10.000 kr., til anlæg af vandledning i Skúvoy.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

1. viðgerð 1. november og 12. november legði kommunala nevndin fram soljóðandi

Nevndarálit.

Málið hevur verið til viðgerðar í kommunalu nevndini og 10. november samtykti hon at mæla tinginum til at samtykkja landsstýrisins uppskot.

2. viðgerð 13. november og 3. viðgerð 16. november 1951.

Lógaruppskotið samtykt 19—0.

---

26. Broyting í lóg nr. 126, 27. mai 1908 om Byen Thorshavns Styrelse.

1951, 30. oktober legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 27. oktober:

lögtingslóg um broyting í lóg nr. 126, 27. mai 1908, »om byen Thorshavns betyrelse.«

gr. 1.

Í lóg nr. 126, 27. mai 1908, »om byen Thorshavns styrelse« verða gjördar hesar broytingar:

Í gr. 25, 3. stk., 3. reglu verður »kalenderär« broytt til »finansär«.

Í gr. 29, 1. stk., verður »kalenderåret« broytt til »finansåret 1. april til 31. marts«.

Í gr. 29, 2. stk., 1. reglu, verður »1. oktober« broytt til »15. januar«.

Í gr. 29, 2. stk., 2—3. reglu verður »næste år« broytt til »næste finansår«.

Í gr. 29, 2. stk., 8. reglu, verður »års« broytt til »finansårs«.

lagtingslov om ændring i lov nr. 126, af 27. maj 1908 om byen Thorshavns Styrelse.

§ 1.

I lov nr. 126 af 27. maj 1908 om byen Thorshavns styrelse foretages følgende ændringer:

I § 25, 3. stk. 3. linie ændres »kalenderär« til »finansår«.

I § 29, 1. stk., ændres »kalenderåret« til »finansåret 1. april til 31. marts«.

I § 29, 2. stk., 1. linie, ændres »1. oktober« til »15. januar«.

I § 29, 2. stk., 2—3. linie, ændres »næste år« til »næste finansår«.

I § 29, 2. stk., 7. linie, ændres »års« til »finansårs«.

Í gr. 29, 2. stk., 9. reglu, verður »1. november« broytt til »1. februar«.

Í gr. 44, 1. stk., 3. reglu, verður »april måned« broytt til »juli måned«.

Í gr. 45, 1. reglu, verður »30. september« broytt til »30. november«.

Tann í hesari lóg nevnda umsjón, sum higartil hevur ligið hjá ríkisstýri og fúta, gongur yvir til landsstýrið.

I § 29, 2. stk., 9. linie, ændres »1. november« til »1. februar«.

I § 44, 1. stk., 3. linie, ændres »april måned« til »juli måned«.

I § 45, 1. linie, ændres »30. september« til »30. november«.

Det i nærværende lov nævnte tilsyn, der hidtil har været underlagt regeringen og landfogeden, overgår til landsstyret.

gr. 2.

Fyri tíðarskeiðið 1. januar 1952 til 31. marts 1952 verður kommununi heimilað at uppkrevja ein fjórðing av ársskattinum fyri skattaárið 1951.

§ 2.

For tidsrummet 1. januar 1952 til 31. marts 1952 hemyndiges kommunen til at opkræve en fjerdedel af årsskatten for skatteåret 1951.

gr. 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tórshavnar býráð hevur sent landsstýrinum soljóðandi skriv, dagsett 18. juli í ár:

»Tórshavnar býráð hevur samtykt, at høvuðs- og skattarokuskapurin hjá Tórshavnar kommunu verður umlagdur eftir »Ruff bókhaldssystemínum«, og fyrireikingar til eina slíka umlegging verða nú gjördar.

Fyri at henda umlegging kann koma at verða til fulla nyttu fyri kommununa og skattaborgararnar, er tað neyðugt, at eisini sjálvt roknskaparárið hjá kommununi verður broytt, og umleggingin av roknskaparárinum byggir tí eisini á hesum grundarlagi.

Sum nú er fer líkningin hjá Tórshavnar kommunu fram í januar og februar mánaðum, og skattalistin kann ikki roknast at liggja frammi til almenna eftirhyggjan fyrr enn fyrst í mars mánað — ein heilan mánað aftaná at skatturin fyri fyrsta ársfjórðing er fallin til gjaldingar — og skattaborgarin er soleiðis frá byrjan av komin 3 mánaðir í afturhond við at gjalda sín kommununskatt.

Hetta má sigast at vera ein heldur ótíðarhóskandi skipan.

Býráðið loyvir sær tí at heita á landsstýrið við bön um, at lógin frá

1908 um »stjórnan av Tórshavnar býi« gr. 29, verður broytt soleiðis, at roknskaparárið hjá Tórshavnar kommunu, sum nú er kalendarárið, frá 1. apríl 1952 at rokna kemur at fylgja fíggjarárinum 1/4—31/3, soleiðis at nýggjur skattur kann verða álíknaður og skattalistin framlagdur, áðrenn skatturin fellur til gjaldingar.

Ætlanin er so at krevja skattin inn í 10 gjöldum soleiðis:

Skatturin fellur til gjaldingar:		(Seinasti dagur fyri rentufrítt gjald)
1. gjald:	1. apríl 1952	20. apríl 1952
2. —	1. maí 1952	20. maí 1952
3. —	1. juli 1952	20. juli 1952
4. —	1. aug. 1952	20. aug. 1952
5. —	1. sept. 1952	20. sept. 1952
6. —	1. okt. 1952	20. okt. 1952
7. —	1. nov. 1952	20. nov. 1952
8. —	1. jan. 1953	20. jan. 1953
9. —	1. febr. 1953	20. febr. 1952
10. —	1.marts 1953	20. marts 1953

Landsstýrið verður biðið um at gera alt sum gerast kann fyri, at henda lógarbroyting kann fáast í lag skjótast gjörligt, soleiðis at allir neyðturviligir formularir kunna sendast til prentingar í góðari tíð, og takast í nýtslu, summir longu í november mánaða.«

Landsstýrið hevur viðgjört umsóknina og heldur hesa umskipan av roknskapar- og skattaári Tórshavnar kommunu verða at geva umsitingini stórar fyrimunar, mett við ta gomlu skipanina.

Skattaálíkningin verður framd eftir skattalógini, sum ikki nýtist nakra broyting í samband við hesum máli, og kann álíkningin nú vera liðug, tá nýggja fíggjarárið byrjar, og skatturin falla beinan vegin og í smærri hæddum, ið koma at liggja fyri hjá fólki yvirhövur at rinda rættstundis. Gjaldingarnar eru lagdar soleiðis til rættis, at allur skatturin fellur til gjaldingar innanfyri fíggjarárið og í 10 pörtum.

Landsstýrið hevur yvirfyri hýráðnum reist spurningin, um ikki eisini broyting skal verða gjörd í skipanini um uppsetting av fíggjarætlanini fyri næstkomandi rakstrarár, soleiðis, at tað, tey ár, nýval hevur verið, verður tað nýggja býráðið, ið kemur at gera ætlanina, í staðin fyri sum fyrr: tað gamla býráðið. Hetta hevur býráðið sagt seg samsint í og skotið upp, at fíggjarætlaninin í staðin fyri sum eftir gomlu reglunum at verða gjördar í oktober, verður gjörd í januar mánað.

Tá roknskaparár havnarlagsins fylgir roknskaparári býráðsins, verður neyðugt at gera broyting í fyriskipan frá 21. juli 1930, soleiðis at hon kemur at fylgja lógini um umsitingina av Tórshavnar býi; hetta kann gerast av landsstýrinum. Býráðið er samsint í hesum og hevur sagt frá, at roknskapur elektricitetsverksins verður eisini umskipaður samsvarandi kommunuroknskapinum.

Landsstýrið ásannar samstundis, at henda broyting kann verða gjörd uttan at nerva hinar kommunurnar í landinum, eftirsum Tórshavnar býur hevur serstaka lógarskipan.

Um nú roknskaparárið verður umlagt, soleiðis sum sökt er um, soleiðis at nýskipanin kemur í gildi frá 1. april 1952, og skattaárið skal fylgja roknskaparárinum, verður eitt millumbil, frá gamla skattaárið gongur út tann 31. desember 1951, til tað nýggja tekur við tann 1. april 1952. Fyri at kommunan skal ikki standa uttan inntökur í hesum tíðarskeiðinum, verður skotið upp, at kommununi í yvirgangstíðini verður loyvt at krevja fjórðingin av ársskattinum fyri 1951.

Somuleiðis verður roknskaparárið 1951 broytt til at vera fyri 5 ársfjórðingar frá 1. januar 1951 til 31. marts 1952, og verður býráðið innan 1. januar 1952 at gera eina uppískoytisfíggjarætlan fyri tíðarskeiðið 1. januar—31. marts 1952.

Landsstýrið skal leggja aftrat, at í uppskoti til nýggja skattalóg, sum liggur hjá lögtinginum, er skotið uppá hesa somu broyting í roknskapar- og skattaári hjá öllum kommunum landsins, soleiðis at Tórshavnar kommuna við hesari broyting bert verður eitt sindur frammanundan hinum kommununum hesum spurningi viðvíkjandi.

Landsstýrið kann tilmæla háttvirda lögtingi, at kommununi verður loyvt hesa broyting, men vil samtundis biðja lögtingið taka til umhugsunar, um ikki best verður samstundis at gera tær formellu broytingarnar í lógini um umsiting av Tórshavnar býi, sum koma av, at býurin nú sambart heimastýrislógini er ikki meira undir umsjón ríkisstýrisins, men landsstýrisins.

1. viðgerð 1. november og 19. november legði kommunala nevndin fram soljóðandi

Nevndarálit.

Undir viðgerðini av umsóknin frá Tórshavnar kommunu um loyvi at leggja um roknskapar- og skattaárið hevur kommunala nevndin hildið fyri, at 2. gr. í uppskotinum til lógarbroytingina kemur at virka órettvíst, um skatturin fyri januar ársfjórðing 1952 verður roknaður við ¼ av ársskattinum fyri skattaárið 1951, ið er mettur eftir inntökuni í 1950, tá inntökan hjá flestu skattaborgarum í Tórshavn í 1950 liggur vel yvir ta inntökuna, sum hevur verið í 1951, og heldur nevndin tí, at skatturin fyri nevnda ársfjórðing rkal verða mettur eftir inntökunum hjá skattagjaldarunum í 1951.

Nevndin hevur gjört Tórshavnar býráð hetta kunnugt, og hevur býráðið sett fram uppskot um, at broytingin av skattaárinum verður gjörd soleiðis, at álikningin í februar 1952 verður roknað av inntökuni í 1951, sum vanligt, men at skatturin verður roknaður fyri 5 ársfjórðingar, nevniliga fyi tíðarskeiðið 1. januar 1952 til 31. marts 1953, og verður hann

kravdur í 10 pörtum, sum ávíst í umsókninni. Frá 1. apríl 1953 verður skattaárið at falla saman við fíggjarárinum.

Tá kommunan annars heldur seg kunna útvega neyðturviligan pening til raksturin fyri januar ársfjórðing 1952, skuldi hetta væl verið gjörligt, og verður tí sett uppskot til broyting av 2. gr. í tí upprunaliga uppskotinum, samsvarandi frammanfyri ávísta.

Fyri ikki at fáa misskiling í lógarbroytingina er her samstundis sett fram lógaruppskot um, at roknskaparár Tórshavnar kommunu í yvirgangstíðini verður at rokna frá 1. januar 1951 til 31. marts 1952, t. v. s. fyri 5 ársfjórðingar.

Nevndin mælir sostatt til, at uppskot landsstýrisins verður gótikið, tó soleiðis at 2. gr. verður orðað soljóðandi:

gr. 2.	§ 2.
Roknskaparár Tórshavnar kommunu fyri 1951 verður broytt til at umfata tíðarskeiðið 1. januar 1951 til 31. marts 1952.	Tórshavnah kommunes regnskabsoden 1. januar 1951 til 31. marts år 1951 ændres til at omfatte peri- 1952.
Skattaárið 1952 verður, Tórshavnar kommunu viðvíkjandi, broytt til at umfata tíðarskeiðið 1. januar 1952 til 31. marts 1953, og verður skattaálíkningin aftaná henda dag at falla saman við fíggjarárinum 1. apríl til 31. marts.	Skatteåret 1952 ændres for Tórshavnar kommunes vedkommende til at omfatte perioden 1. januar 1952 til 31. marts 1953, efter hvilket tidspunkt skattepåligningen falder sammen med finansåret — 1. april til 31. marts.

2. viðgerð 20. november og 3. viðgerð 23. november 1951.

Uppskot nevndarinnar og uppskot landsstýrisins so broytt *samtykt 16—0.*

27. Ábyrgd fyri láni til Vinnulánsgrunn Føroya Løgtings.

1951, 30. oktober legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 27. oktober:

lögtingslóg um ábyrgd fyri láni til Vinnulánsgrunn Föroya Lögtings.

gr. 1.

Fyri at trolarin »Jóannes Paturssson« ikki verður seldur út av landinum, er landsstýrið landskassans vegna heimilað at taka ábyrgd fyri kr. 600.000,— í láni frá Tryggingarsambandinum Föroyar til Vinnulánsgrunn Föroya Lögtings.

gr. 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til Vinnulánsgrunn Föroya Lögtings.

§ 1.

For at undgå at trawleren »Jóannes Patursson« bliver solgt til udlandet, bemyndiges landsstyret på landskassens vegne til at garantere for kr. 600.000,— som lån fra Tryggingarsambandinum Föroyar til Vinnulánsgrunn Föroya Lögtings.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

P/f »Ilvak« sendi 5. september í ár umsókn til landsstýrið um útflutningsloyvi til sölu av trolaranum »Jóannes Patursson«. Felagið fekk umsökta útflutningsloyvi, men varð hetta treytað av, at sóluprísurin ikki fór niður um £ 80.000, og at tað fyrst varð royndt at selja trolarin í Föroyum.

Fíggjarnevndin og landsstýrið vóru longu stutt aftaná at tingið kom saman á Ólavsvöku, gjörd kunnug við, at tað fíggjarliga fór at sansa so at, at vit kanska fóru at verða noyddir at selja nökur av veiðiförum okkara fyri at böta um likviditetsstöðuna. Men bæði tingmenn og fíggjarnevnd mæltu landsstýrinum til um gjörligt at royna at fyribyrgja, at góð veiðiför vórðu seld av landinum.

Tá málið um likviditetstrongd »Sjóvinnubankans« kom fyri og varð viðgjörd, vísti tað seg, at bæði trolarin »Nólsoyar Páll« og trolarin »Jónnes Patursson« máttu verða seldir. »Nólsoyar Páll« stóð ikki til at bjarga, men til keyp av »Jóannes Paturssyni« eydnaðist at fáa keypara í Föroyum. P/f J. F. Kjölbro, Klakksvík, helt seg til at keypa trolarin fyri tað sama, ið boðið var fyri harm uttan fyri Föroyar.

Til hetta keyp veitti Nationalbankin um föroyskan banka p/f J. F. Kjölbro, 1 milj. kr. í láni móti góðtiknum veðhaldi, og Tryggingarsam-

bandið Føroyar játtaði um Vinnulánsgrunnin kr. 600.000,— í lán móti landskassaábyrgd til sama endamál.

Tá avgerð í hesum máli hevði skund, lovaði landsstýrið at seta fram lógaruppskot um landskassaábyrgd, men samráddist fyrst við flokksformenn og fíggjarnevnd um möguleika fyri meiraluta fyri uppskoti landsstýrisins um landskassaábyrgd og tóku allir undir við landsstýrisins stöðu.

Sostatt loyvir landsstýrið sær at seta fram hetta lógaruppskot.

1. viðgerð 2. november og 9. november legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit.

Málið var til viðgerðar í fíggjarnevndini og samtykti 8. november at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 10. november og 3. viðgerð 13. november 1951.

Lógaruppskot landsstýrisins *samtykt 15—0.*

---

28. Kannan av fíggjarmegi Føroya.

1951, 29. oktober legði lögmaður fram soljóðandi framlöguskriv d. 27. oktober s. á.:

Sum fyrr frágreitt hevur landsstýrið samtykt at biðja ríkisstýrið saman við landsstýrinum seta nevnd av könum monnum til kannan av rentabilitetinum og likviditetinum í föroyska vinnulívinum.

Frá föroyskari síðu vórðu hesir útpeikaðir:

1) Johan Danielsen, postmeistari, sparikassastjóri,
2) P. S. Hansen, bankastjóri,
3) Róland Hansen, bankastjóri, og
4) Jens Chr. Johannessen, stjóri Føroya Fiskasölu.

Eftir ynsks frá ríkisstýrinum vóru hesir menn saman við lögmanni til tær fyrstu samráðingarnar við ríkisstýrið í dögunum 15. til 25. august, lögmaður tó bert til 18. august, har arbeiðisreglur fyri kanningar vórðu samtyktar.

Allir vóru á einum máli um, at roynt skuldi verða at fáa so greitt yvirlit yvir okkara fíggjarligu viðurskifti, at vit í framtíðini kunnu gerast förir fyri eftir berokning og ikki uppá gjöt at taka okkara fíggjarligu avgerðir.

Sum fört fram í skrivi til lögtingið, dagfest 19. september 1951, eru bankar okkara ikki longur förir fyri at veita fiskivinnuni neyðturviligan pening, og hevur tað tí verið neyðugt at læna pening uttaníframá. Somuleiðis hevur tað víst seg landskassanum og kommununum ógjörligt uttan hjálp frá ríkiskassanum at greiða til vegar allan tann pening, ið krevst til at fremja onnur yvirtikin mál, t. d. el-málið.

So statt var tað neyðugt, at kanningin ikki bert kom at umfata vinnulívið og peningastovnarnar, men eisini tann almenna raksturin.

Við hjálp av tænastumonnum, útpeikaðum av ríkisstýrinum, er kanningin farin fram, og liggur nú fyri ein frágreiðing uppá 153 blaðsíður umfrant tilhoyrandi skjöl.

Henda frágreiðing verður nú býtt út til allar tingmenn.

Tað verður í frágreiðingini undirstrikað, at tann stutta tíð, sum kanningarnevndin hevur havt til starv sítt, hevur ikki gjört tað mögulligt at fáa viðgjört öll viðurskifti; men má tað annars sigast, at tað tilfar, sum nevndin hevur fingið til vegar og viðgjört, er ógviliga umfatandi og gevur eina greiða mynd av teim viðurskiftum, sum umrödd eru.

Frágreiðingin hevur fylgjandi deildir:

1. Fiskivinna.
2. Landbúnaður.
3. Onnur föroysk vinna.
4. a. Almenn peningaílegging aftaná kríggslok.
   b. Privat peningaílegging í sama tíðarskeiði.
5. Arbeiðis-, lön- og prísviðurskilti.
6. Peningaviðurskifti.
7. Almennu peningaviðurskiftini.
8. Yvirlit yvir Föroya handil og gjaldjavnvág við umverðina.
9. Stutt samandrag av tí, ið umrött er undir 1—8.

Til tær ymisku deildirnar skal stutt viðmerkjast:

ad 1. Fiskivinnan.

Fiskaflottningur okkara hevur síðani 1945 verið:

	Ísfiskur		Salt- og klippfiskur		Saltsild	
	tons	1000 kr.	tons	1000 kr.	tons	1000 kr.
1945	25.000	28.700				
1946	31.560	23.900	7.000	11.000		
1947	26.741	19.300	22.420	37.500		
1948	24.122	20.500	29.500	50.600		
1949	10.663	8.600	30.097	47.576	950	800
1950	3.355	2.936	34.823	58.311	1.000	1.059
1. hálvár 1951	5.234	3.719	13.599	25.187	262	156

meðan heimaforbrúkið av fiski verður mett til ið hvussu er 800.000 kr. um árið.

Tað, sum verður nýtt um árið av föroyskari agnsild, kann mestast til um 2 mill. kr. í virði.

Av frammanfyri standandi tölum sæst, at salt- og klippfiskaframleiðslan aftaná 1948 hevur verið tann týdningarmesta, og hevur henda framleiðslan verið um 4 ferðir størri enn undan 1940.

At framleiðslan er gingin meira yvir til saltfisk og klippfisk, krevur nógv størri pening til at halda vinnuni uppi. Sum kunnugt gongur long tíð, frá tí saltfiskurin er veiddur, til hann verður útfluttur, annaðhvört sum rávöra ella sum klipfiskur.

Sum dömi kann nevnast, at í august 1950 lógu á goymslu um 16.000 tons av saltfiski og 1500 tons av klipfiski til virði um 27 mill. kr.

Tey seinastu árini hevur klipfiskurin verið í góðum prísi, og hevur hetta havt sín stóra týdning fyri klipfiskaframleiðsluna.

Hetta kann lýsast við fylgjandi tölum:

Í 1938 var munurin millum prísin á saltfiski og klipfiski sum 3—5, meðan munurin í 1950 var sum 1—2, ella við öðrum orðum: klipfiskurin liggur uppá seg hægri nú enn í 1938. Viðmerkjast má tó, at klipfiskaprísurin í 1938 var prísur í fríari kapping, meðan hann í 1950 í Spanien, sum tekur mesta okkara fisk, er nógv hægri enn prísur, sum kann fáast aðrastaðni.

Ífall hesin prísmunurin ikki var, hevði tað heldur ikki latið seg gjört at virka klipfisk við tí högu arbeiðislönini.

Fiskasölan lænir fyri fisk á goymslu upp í 50 % av virðinum.

Sum kunnugt hevur Fiskasölan fingið eitt lán uppá 6 mill. kr. við ríkis- og löglingsábyrgd til lán til fisk á goymslu. Hesin peningur skal verða afturgoldin innan 1. apríl. 1952.

Umframt er gjögnum Sjóvinnubankan við ríkis- og löglingsábyrgd lænt 4 mill. kr., sum skulu afturgjaldast 31. oktober í ár, og 2 mill. kr. frá S. E. V., sum skulu afturgjaldast innan 1. januar 1953.

Ta tíð, Föroyar liggja við fiski á goymslu til eitt virði av millum 25

og 30 mill. kr., krevst stórur peningur til financiering, umfram hvat krevst til útgerðarlán (upp í einar 12 mill. kr.).

Ein lætti í financieringini hevði tað verið, um flest allir trolarar um veturin og várið skiftið yvir frá saltfiskaframleiðslu til feskfiskaframleiðslu (ísfisk), og at motorskip lögdu um til sildaveiði ta tíð av árinum, tá ið sildin stendur nóg nær Föroyum.

Av kanningunum framgongur, at útreiðslutalið fyri fiskivinnuna, alt roknað sum heild, liggur so högt, at raksturin gevur undirskot í lötuni.

Eftir einari kannan av roknskapum 1950 fyri 64 ymis skip hevur raksturin í 1950 givið fylgjandi hall í miðaltali, roknað av bruttoinntöku:

a. sluppur (uppí 100 tons) snöri	5,9 pct.
b. — (— —) lína	15,6 pct.
c. skip (100 200 tons)	1,7 pct.
d. snurrarar	19,1 pct.
e. trolarar	3,0 pct.

og hevur rentabiliteturin 3 tey seinastu árini stöðugt verið í afturgongd. Einans tey fáu (5) stóru skipini (skonnartur) yvir 300 tons bóru seg: 2,7 %.

Annars skal viðmerkjast, at tá ið hvört skip verður tikið sær, so er munurin ógviliga stórur frá skipi til skip, sum annars skuldu havt somu veiðievnir. Her er tað dugnaskapur og rökiskapur hjá teimum einstöku skiparunum og reiðaríunum, sum spæla avgerandi inn.

Við finansiering av fiskiflotanum í framtíðini verður tað, meira enn tað higartil hevur verið gjört, neyðugt at kanna hvört einstakt skip, hvör skipari er, hansara dugnaskap, og hvussu reiðaríið hevur greitt umsitingina.

Eitt, sum eisini hevur vist seg at hava haft ovurhonds stóran týdning fyri raksturin av fiskiflotanum, er hvussu dugandi og rökin maskinmeistarin er. Her er munurin í útreiðslum til maskinina og serstakliga til umvölingar ógviliga stórur frá trolara til trolara.

Í tabel 4 a (fyri 15 trolarar) sæst m. a., at útreiðslur til reiðskap hjá teim vánaligu trolarunum liggur uppá 11,7 pct. av tryggingartalinum, meðan talið hjá teim miðalgóðu og bestu er atvikavíst 9,7 og 11,0 %. Til viðlíkahald eru tölini atvikavíst 13,8, 8,1 og 8,3 %.

Roknskapurin 1950 fyri 15 trolarar vísir, at 5 teir vánaligastu góvu rakstrarhall uppá 436.000 kr.; 5 miðalgóðir rakstraravlop uppá 286.000 kr. og 5 teir bestu eitt rakstraravlop uppá 745.000 kr.

Kanningin vísir annars, at inntökurnar av fiskivinnuni hava verið minkandi tey seinastu árini orsakað av lægri prísum og lægri útreiðslum, sum fylgjandi töl vísa:

	1948 kr.	1949 kr.	1950 kr.
Samlað inntöka...	71 mill.	63 mill.	54 mill.
Nettoinntöka	33 -	23 -	20 -
Útreiðslur til kol, olju o. t.	7,6 -	8,3 -	8,6 -

Inntökurnar í 1950 framkoma soleiðis:

Trolarar (34)...	29 mill. kr.
Sluppur undir 100 tons (83)	11½ - -
— 100—200 tons (27)	6½ - -
— yvir 200 tons	3½ - -
Onnur skip	3½ - -

Av hesum inntökum er farið til:

hýrur	18,6 mill. kr.
kol, olju o. t.	8,6 - -
ís, salt o. t.	5,1 - -
viðlíkahald	5,1 - -

Av tabel 8 framgongur, at fiskiflotin sum heild tikið í 1950 verður mettur at hava givið eitt rakstrarhall uppá 2.657.000 kr.

ad 2. Landbúnaðurin.

Inntökurnar kunnu eitt miðalár við teim núgaldandi prísum roknast til:

a. seyðabrúkið	3 mill. kr.
b. neytahaldið	3,5 - -
e. eplir o. a.	0,5 - -
tilsamans...	7,0 mill. kr.

og eru útreiðslur til handilsfóður frároknaðar.

ad 3. Onnur vinna.

a. Kolagrevstur.

Sum kunnugt fer kolagrevstur fram í Hvalba, Trongisvági og Fámjin, og kann hesin grevstur lætliga halda Föroyar við húsabrenni.

Prísurin ab Hvalba er nú 87 kr. pr. ton.

Í verkfröðingi Marstranders rapport frá 1950 verður roknað við, at kolið kann framleiðast til kr. 28,50 við eini framleiðshu uppá 200.000 til 300.000 tons pr. ár; tó krevst ein peningaílegging uppá minst 8½ mill. kr.

b. Færösit.

Framleiðslan av royðugróti hevur ikki higartil havt størri týdning, men tykist nú at kunna fáa almikið at týða við tað, at royðan aftaná ymsar royndir tykist at kunna verða kappingarför við onnur grundevni til máling.

Eitt ton av royðu, tá ið hon er malin, hevur kunnað selst fyri 700 kr. og kostar í framleiðslu:

Til úthögging pr. ton...	96 kr.
- máling pr. ton	200 -
- farmagjald pr. ton	35 -

So har skuldi verið ein rættiliga góður vinningur, um tað eydnast at framleiða eina álítandi góðsku.

c. Grótvirkið.

Royndir hava víst, at tað föroyska grótið er vael nýtiligt til plátur, umfram at tað er sera vakurt til gravsteinar o. t. Pláturnar verða nýttar til gólv og til at klæða hús við.

d. Handil og ídnaður.

Meginparturin av okkara ídnaði er knýttur til fiskivinnuna, og er tað her talan um:

1) turkihús,
2) ísvirki og kölihús,
3) flakavirki,
4) konservesvirki,
5) lýsismeltari,
6) tilgerð av fiskiamboðum.
7) Hartil kemur so ídnaður í samband við hvalaveiði,
8) margarinvirki,
9) ullspinnari.

Umsóknir eru komnar inn um lán til tey undir 1, 2, 3 og 7 nevndu virki.

Av öðrum ídnaði kann nevnast maskinvirki, skipasmíð, snikkaravirki, bryggivirki, og liggja fyri umsóknir um lán til bryggivirki.

ad 4. Peningaílegging síðan kríggslok.

a. Almenn.

Hendan peningaílegging er gjörd soleiðis upp:

		1000 kr.
1)	Havnabygging...	13.137
2)	Lendingar	2.100
3)	Vegir	2.400
4)	Elektricitetsverk	7.400
5)	Oljugoymslur	1.000
6)	Telefonverkið	2.000
7)	Peningaíleggingar landsstýrisins í hús v. m.	0.620
8)	Peningaíleggingar uttan fyri Föroyar...	0.335
9)	Skúlar...	1.500
10)	Prestahús	0.427
11)	Sjúkrahús	1.191
12)	Vitar	0.815
	Tilsamans...	32.665

b) Privat.

Henda peningaílegging er soleiðis uppgjört:

1)	Húsabygging	30.000
2)	Skip	44.000
3)	Ídnaðarvirki, handverk v. m.	8.000
4)	Hvalastöðir	2.000
5)	Landbúnaður	2.000
6)	Motorakför	4.000
	Tilsamans...	90.000

Henda peningaílegging gevur tilsamans um 125 mill. kr.,eitt stórt tal fyri eitt so lítið fólk, sum tað föroyska.

Umframt tað, sum longu er bygt fyri almenna rokning, restar í at gera:

a. av 10-ára havnaætlanini 1943-52 ... ... 1.317.250 kr.
b. av 10-ára havnaætlanini 1948-57 ... ... 21.237.750 kr.

Sum viðurskiftini eru í lötuni, verður tað neyðugt at steðga við einum parti av tí tilætlaðu bygging, inntil tökur peningur kann fáast til vega.

Við framtíðarjáttan til havnabygging má tað við statistiskum frágreiðingum prógvast, at avvarðandi havnaverk er neyðugt at útbyggja.

Bankarnir og sparikassarnir hava bundið um 85 mill. kr. í hesar peningaíleggingar.

ad 5. Arbeiðs, lön- og prísviðurskifti.

Tey fyrstu árini eftir kríggslok var meira at vinna á sjónum fyri tann meiniga mannin enn við arbeiði á landinum. Hetta er broytt tey seinastu árini.

Fiskivinnan hevur haft minkandi inntökur, meðan arbeiðislönin á landi hevur vaksið samsvarandi prístalinum umframt eykaviðbót.

Fiskimanninum hevur tí verið tryggjað ein minstalön uppá 500 kr. um mánaðin, sbr. lögtingslóg, 21. desember 1949.

Landskassin hevur fingið ábyrgd av einum parti av hesum gjöldum, og má tað roknast við, at landskassin kemur at gjalda einar 300.000 kr. fyri lönjavningargrunnsins rakstrartrot.

Við tað at eingin játtan er á fíggjarlógini til hetta, má umhugsast, annaðhvört at broyta lógina, soleiðis at grunnurin kann hvíla í sær sjálvum við tí gjaldi, hann fær (hesum gjaldi kann so tryggjast ein frammíhjárætt), ella at veita eina peningajáttan av nýggjum, sum samstundis krevur nýggja skattainntöku.

Tað beinasta man vera, at grunnurin hvílir í sær sjálvum og möguliga verður broyttur soleiðis, at lönjavnan bert verður latin til forsyrgjarar, sum vegna sjúku ella skipshavarí vinna minni enn eina ávísa mánaðarlön. Ein tílík skipan verður meira í tráð við ta upprunaligu ætlanina við lógini.

Forskotsskipanin kann eisini roknast at föra störri byrðir við sær fyri landskassan, enn kassin í lötuni er förur fyri at klára. Lán uttan fyri landskassan kann ikki væntast.

Henda skipanin kann í vissum förum eisini geva tap til grunnin og avvarðandi reiðara.

ad 6. Peningaviðurskiftini.

Í 1945 hövdu teir föroysku bankarnir eitt innlán uppá 43,4 mill. kr., meðan útlánið bert var 10,3 mill. kr.

Munurin millum innlánini og útlánini stóð fyri största partin í útlendskum (bretskum) gjaldoyriságóða.

Hesin ágóði varð tey fyrstu árini aftaná kríggið fyri meginpartin brúktur til skipa- og vörukeyp og fyri ein part fluttur til danskar krónur, sum so seinni eisini eru brúktar.

Í desember 1945 hövdu teir föroysku peningastovnarnir tilgóðar uttanlanda 52 mill. kr. Ultimo august í ár var ein hallarmunur uppá 4,1 mill. kr.

Tann kontanti peningurin hjá fólki er ikki minkaður. Peningastovnarnir hava ökt um teirra útlán frá 17 mill. kr. í 1945 til 85 mill. kr. ultimo august í ár.

Fylgjandi skjöl vísa, hvussu valutareservir, útlán og innlán eru broytt ár undan ári.

Mill. kr.

	Peningastovnanna				*Innskot í peningastovn.*		
	Nettostöða (incl. seðlanögd) uttanf. Föroyar	Útlán í Föroyum	Seðlanögd incl. postv. partvís setlað	Seðlaumfar uttanf. peningastovnanar	Stuttfreistað	Uppá uppsögn	Tilsamans
ult. 1945	51,7	16,6	2,5	10,9	59,8	6,9	66,7
- 1946	38,1	24,6	2,6	9,8	52,3	7,5	59,8
- 1947	36,5	34,5	2,6	11,6	58,9	7,5	66,4
- 1948	42,9	38,4	3,3	13,0	67,6	8,6	76,2
- 1949	22,8	56,2	2,8	12,7	66,0	9,0	75,0
- 1950	9,2	70,5	2,4	12,3	62,1	13,1	75,2
- august 1951	+4,1	85,3	2,2	8,9	63,9	14,9	78,9

Tað kann við öðrum orðum sigast, at peningastovnarnir hava umbýtt teirra valutareservir — sum eru nýttar til peningaíleggingar, serstakliga skipakeyp — við útlán í Föroyum.

Tað minkaða seðilumfarið vísir, at tann peningur, fólk hevur ligið við heima, er minkaður.

Tann minkan av valutareservum, sum er farin fram gjögnum tey seinastu árini, er ikki störri í ár enn í 1950 og 1949, men av tí, at peningastovnarnir ikki longur hava verið förir fyri at ökt um útláni samsvarandi valutanýtsluni, eru likviditetstrupulleikarnir ikomnir.

ad 7. Tey almennu peningaviðurskiftini.

a) Landskassin.

Higartil hevur landskassin havt yvirskot av sínum raktri, hvat fylgjandi töl vísa:

Útreiðslur og inntökur landskassans 1945—1950/51:

	Inntökur *1000 kr.*	Útreiðslur *1000 kr.*	Yvirskot *1000 kr.*
1945	5.397	5.214	183
1946	6.194	4.687	1.507
1947	5.468	4.869	599
1948/49	9.436	8.384	1.052
1949/50	9.765	8.468	1.297
1950/51	9.196	8.860	336
1951/52	8.877[1])	8.432[1])	445[1])

[1]) Tölini eru frá fíggjarlögtingslögini 1951/52.

Hetta gevur eitt samlað yvirskot uppá 5 mill. kr., men av hesum standa um 3 mill. kr. úti í eftirstöðum, meðan vinnulánsgrunnurin hevur fingið sum studning 1,8 mill. kr.

b) Kommunur.

Tikið sum heild hava tær föroysku kommunurnar havt rakstraravlop í teim farnu árunum aftaná kríggið. Einstakar kommunur standa væl í tí, meðan aðrar hava stóra skuld, men fyri mest sum allar kommunur ger seg galdandi, at rakstraravlopið og meira aftrat stendur úti í eftirstöðum.

Løgtingið hevur tikið ábyrgd fyri stórum lánum til tær störri kommunurnar, vinnulánsgrunnin, S. E. V. og Fiskasöluna.

Í lötuni er hendan ábyrgdin 29 mill. kr. umfram tær 4 mill. kr. til Sjóvinnubankan, sum skulu afturrindust tann 31. oktober í ár, og tær 2 mill. kr. sum ábyrgdarpening.

ad 8. Föroya handil og gjaldjavnu við umverðina.

Tann statistikkur, sum fördur er yvir okkara innflutning og útflutning, hevur víst, at okkara útflutningur hevur verið væl störri enn innflutningurin.

Tær kanningar, sum nú eru farnar fram, vísa, at hetta er skeivt; vit hava tey seinastu árini brúkt væl meira, enn vit hava vunnið, sum særst av fylgjandi tölum:

	Hall á vörum og arbeiði mill.	Studningur frá statinum mill.	Hall á leypandi postum[1] mill.
1946	18	2	16
1947	5	3	2
1948	+ 2	4	− 6
1949	26	4	22
1950	19	7	12
1. helvt 1951	16	5	11
Tilsamans 1/1-1946 til 30/6-1951	82	25	57

Soleiðis hevur verið eitt samlað hall uppá 82 mill. kr., barav staturin við studningi hevur goldið 25mill. kr., soleiðis at tað veruliga hallið er 57 mill. kr.

Við öðrum orðum: Vit hava brúkt meira, enn vit hava vunnið. Hetta

[1]) samsvarandi avlopi av kapitalpostum.

kann ganga til eina tíð, soleingi sum uppspardur peningur er til, men tá ið hann er brúktur, steðgar alt.

Viðmerkjast skal, at prísurin á okkara útflutningsvörum hevur verið nakað minkandi, meðan innflutningsprísurin hevur verið vaksandi, í summum förum heilt nógv, og hevur hetta ökt um skeivleikan og skundað undir likviditetskreppuna.

Vit hava sum frammanfyri greitt frá lagt stóran pening í almenna og privata útbyggjan, men umframt hetta hava vit havt ein ovurstóran innflutning, sum hevur sett okkara livifót hægri upp enn í at kalla öllum öðrum londum í Europa og munandi hægri, enn vit hava havt ráð til.

Innflutt hevur verið neyðugt og óneyðugt, nyttugt og ónyttugt.

Umframt at umhugsa, hvussu tann almenna peningaíleggingin má minkast, verður eisini neyðugt at umhugsa, hvussu innflutningurin av luksusvörum skal avmarkast, við tolli ella á annan hátt. Lögtingið hevur í seinastu tingsetu samtykt ymsan cykatoll, og tykist hetta at hava virkað minkandi um innflutningin.

ad 9. Stutt samandrag.

Sum frammanfyri greitt frá eru tær samlaðu peningaíleggingarnar síðan 1945 uppgjördar til 125 mill. kr., og er hesin peningur framkomin soleiðis:

a. Valutaágóði	60	mill. kr.
b. Statsstudningur	25	— -
c. Egin uppsparing	40	-

Okkara fiskaframleiðsla er vaksin við virði um 10 ferðir av tí, hon var undan krígnum. Tað krevur stóran pening at halda framleiðslina gangandi og hava fisk á goymslu.

Tað hevur verið nógv funnist at, at okkara salt- og klippfiskur liggur ov leingi á goymslu, men tað má minnast til, at skal arbeiðast við tí fyri eyga at fáa besta marknaðarprís, er tað eisini neyðugt at steðga við at taka við hvörjum tilboði, sum kemur fram. Vit kunnu möguliga vera so peningaveikir, at vit noyðast at selja okkara fisk bíliga fyri bert at sleppa av við hann, men slíkt vil ikki verða nökrum til gagns. Arbeiðast má fyri at fáa tann pening til láns, sum skal til fyri at virka saltfisk til klippfisk, og fyri annars at halda fiskin á goymslu, umframt hvat krevst til útgerð av fiskiflotanum. Okkara peningastovnar hava ikki nóg mikið av peningi til vinnuna, og hevur tí lögmaður saman við kanningarnevndini samráðst um at læna pening uttan fyri Föroyar.

Nú liggur kanningartilfarið á tingborði, og vísir tað gjölla, hvussu neyðugt tað er, at driftirnar í Föroyum fáast at svara seg.

Sum *fyribils uppskot* skal landsstýrið seta fram:

I. *Financiering av fiskivinnuni.*

1) *Fiskur á goymslu.*
Sum frágreitt hevur fiskur ligið á goymslu til eitt söluvirði uppá 27 mill. kr.
Samráðing eigur at fara fram við ríkisstýrið um eina skipan, soleiðis at lán kann verða tikið uppá tilíkan fisk við 75 % av söluvirðinum, at afturrinda so hvört sum fiskur verður eksporteraður frá goymslu.

2) *Útgerðarlán.*
Hertil krevjast í minsta lagi 11—12 mill. kr., sum verða afturgoldnar gjögnum tey undir pkt. 1 nevndu lán.
Teir föroysku bankarnir verða förir fyri at greiða hesi lán, ffall teir kunnu frígerast fyri tey til kommunurnar givnu lán. Hesi lán eru í lötuni fyri báðar bankarnar um 5½ mill. kr.
Landsstýrið verður heimilað eftir samráð við ríkisstýrið at fáa eina skipan í lag, soleiðis at lánini til kommunurnar verða avloyst av öðrum lánum við ábyrgd frá ríkisstýri og lögtingi.

II. *Fiskaídnaður.*

1. Fiskaflök og fiskamjöl.
2. Kölihús.

Landsstýrið verður biðið at samráðast við ríkisstýrið um neyðturviliga financiering.

III. *Onnur föroysk vinna.*
Danmarks geologiske undersögelser verður umbiðið skjótast gjörligt at kanna og kortleggja, hvat royðugrót í Föroyum kann nýtast til útflutning.

IV. *Peningaílegging.*

a. *Almenn.*
Tær ætluðu havnabyggingar, sum ikki eru í gerð, verða at steðga fyribils.

b. *Privat peningaílegging.*

Landsstýrið roynir í samráðing við ríkisstýrið at stovna ein lánigrunn til húsabygging.

Av tí tey flestu plássini í Föroyum enn eru ómatrikulerað, verður tað ikki gjörligt enn í nógv ár at fáa kreditskipan fyri húsabygging umfatandi alt landið. Neyðugt verður tí at royna at fáa ríkisstýrið undir samráðingunum um pkt. II at hjálpa til, so langt neyðugt er, at avloysa so mikið av teim kommunulánunum, sparikassarnir hava latið, at hesir stovnar verða förir fyri, so leingi nevnda kreditskipan ikki er komin í gildi, at styðja húsabyggini í störri mun enn í lötuni. Uppskot til byggilóg verður nú framlagt.

V. *Tey almennu peningaviðurskiftini.*

Lögtingið hevur tikið sær uppá so nógva ábyrgd fyri ymsar kommunur, sum ikki allar kunna greiða rentur og avdrátt. Hertil kemur skuld vinnulánsgrunnsins, sum landskassin heftir fyri og kemur at gjalda ein stóran part av, við tað at vinnulánsgrunnurin stendur yvirfyri stórum missi. Eisini má roknast við, at landskassin kemur at rinda stóran pening til lönjavningargrunnin, um skipanin ikki verður broytt.

Neyðugt verður tí at fáa pening til hesar útreiðslur, fyri ein part við nýggjum skatti, herundir benzingjaldi, og fyri ein part við at minka um aðrar útreiðslur sum nevnt undir pkt. IV.

VI. *Föroya handil við umverðina.*

Fyri at minka um innflutningin av luksusvörum og samstundis fáa inntökur til tað almenna cfr. punkt V, verður umhugsað at hækka tollin á luksusvörum.

VII. *Til nýggja peningaílegging.*

Umfram tað, sum verður kravt í lötuni, verður tingið núnt á, at peningur eisini krevst til ymsar útbyggingar; nakrar mugu fremjast skjótt, meðan aðrar kunnu gerast so við og við:

1)	Kostskúli, ætlaður at kosta	6.800.000 kr.
2)	Umbygging av landssjúkrahúsinum, ætlað	6.000.000 -
3)	Landbúnaðarskúli, ætlaður at kosta	600.000 -
4)	Föroya Sjómannaskúli, ætlaður at kosta	2.000.000 -
5)	Nýtt lögtingshús, ætlað at kosta	1.000.000 -
6)	Elverk í Suðuroy, ætlað at kostað	5.000.000 -

1. viðgerð 6. november og 17. desember legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Á miðum summri 1951 kom í ljósmála, at likviditetur bankanna og landskassans var vorðin so trongur, at um peningur ikki heilt skjótt varð fingin til vega uttanífrá, var vandi fyri, at hövuðsvinna okkara, fiskivinnan, *fór at steðga.*

Menn hövdu leingi havt illgrunan um, at ikki stóð so væl til við fíggjarstöðu okkara. Veruligt hagtal yvir peningaílegging og rentabilitet í vinnum okkara hava vit ikki, og fer tí peningaíleggingin meira og minni fram eftir fummum. Tað sindri av hagtali, sum vit hövdu viðvíkjandi út- og innflutningi, sýndi, at útflutningur okkara var væl störri enn innflutningurin. Kom henda likviditetskreppa okkum tí dátt við.

Tað varð í stórum skundi sett niður kanningarnevnd av Föroyingum og Dönum, sum til viðgerðar skuldu taka alt okkara húsarhald.

Úrdráttur úr hesum tilfari uppá 153 blaðsíður skiftur sundur í 9 deildir við viðmerkingum og uppskotum frá landsstýrinum er lagdur fyri fíggjarnevndina, sum hevur fingið til uppgávu at seta fram uppskot, ið miða ímóti:

1. störri sparsemi á öllum ökjum,
2. störri útflutningi,
3. minni innflutningi.

I. Fiskivinnan:

Kanningartilfarið sýnir, at hövuðsorsökin til, at fiskivinnan fíggjarliga er komin so illa fyri, er tann, at útgerðin: kol, salt, olja, agn og fraktir er dýrkað munandi seinastu 3 árini, og fiskaprísurin hevur staðið við og minkað.

Hesi viðurskifti verða lýst við hesum tölum:

	1948	*1949*	*1950*
Samlað inntöka	71 mill.	63 mill.	54 mill.
Netto-inntöka	33 -	23 -	20 -
Útreislur til kol, salt og olju	7,6 -	8,3 -	8,6 -

Prógvað verður, at allir fiskiflotin í 1950 hevði eitt rakstrarhall uppá 2.657.000 kr. Hetta er tann dapra heildarmyndin, men kannar tú hvört einstakt skip, er lætt at síggja, at störur munur er á útreiðslunum hjá skipum eins til stöddar og í somu veiðu.

Tær ovurhonds stóru útreiðslur, sum einstök skip hava til agn og umvælingar av maskinu og skrokki burtursæð frá óhappi, stava ofta frá

oyðslusemi og óvandaligari viðferð. Fíggjarnevndin er tí á einum máli landsstýrið, tá tað viðmerkir: Við finansiering av fikiflotanum í framtíðini verður tað, meira enn tað hevur verið gjört, neyðugt at kanna hvört einstakt skip, hvör skipari og maskinmaður er, teirra dugnaskap, og hvussu reiðaríið hevur greitt umsitingina.

Av tí vit, tvungnir av umstöðunum, meira og meira eru gingnir burtur frá ísfiskaveiðuni og hava lagt okkum eftir salt- og klippfiskaframleiðslu, törvar okkum meira tökan pening. Til dömis lógu vit í august 1950 inni við fiski í virði 27 mill. kr. Hartil kemur útgerðarlán úr bankunum 12—17 mill. kr. Hetta eru so stórar peningahæddir, at fiskasölan og bankarnir ikki eru förir fyri at finansiera fiskivinnuna, serliga tí teir eisini finansiera kommununrnar við 5,5 mill. kr.

Tekur tí fíggjarnevndin undir við landsstýrisins uppskoti um at fáa í lag skipan við ríkisstýrið soleiðis, at lán kann verða upptikið uppá fisk á goymslu við 75 % av söluvirðinum, at afturrinda so hvört sum hann verður avskipaður av goymslu, og at landsstýrið í samráð við ríkisstýrið fær skipan í lag soleiðis, at bankalánini til kommunurnar verða avloyst av öðrum lánum við ábyrgd frá ríkisstýri og lögtingi, so bankarnir betri orka at finansiera útgerð fiskiflotans.

Átroðkandi er spurningurin um, hvussu skipast skal so fyri, at fiskimaðurin ikki skal bíða hálv til heil ár eftir sínum peningi fellur saman við umskipanina av fiskasöluni, og verður tí ikki umröddur her.

Menn vilja vera við, at minstalönin, sum sett varð í verk í 1947 sum neyðhjálp, ikki eggjar monnum til at kappast, men lívgar um tann minni hugaða sjómannin og tekur hugin frá tí nærlagda manninum. — Lönjavningin var mest hugsað sum neyðhjálp til menn, sum vórðu sjúkir umborð og av havarí ella öðrum umstöðum vóru tarnaðir so mikið í fiskiskapinum, at fiskiskapurin varð minni enn fyrisetta minstalönin.

Kortini er fíggjarnevndin ikki hugað til á hesum sinni at taka lógina av, men vil mæla til slíkar broytingar, ið miða ímóti at hindra misbrúki av lógini.

Av tí tað áðrenn jól verður lagt fyri tingið uppskot til nýggja lög um lönjavning, setur fíggjarnevndin eiki uppskot fram til broytingar í gomlu lógini.

Hvussu stórar útreiðslur til komandi ár verða til kol, olju, salt og agn, er ilt at siga. — Stjórin fyri Grönlandsfelagnum upplýsir, at valla verða prísirnir minni enn seinasta ár — heldur verða teir störri; men fyri Grönlandsfiskiskapin skuldi rentabiliteturin ikki verið verri, av tí Grönlandsfelagið leggur útgerðina saman við Norðmonnum og Dönum, og skuldi tatm fyrimunur, sum stórdriftin ber í sær, komið okkum til góðar. Til dömis fáa okkara fiskimenn agnið úr kölihúsi komandi ár.

Tær royndir, sum í heyst vórðu gjördar eftir sild, eydnaðist vel, og ikki kann hugsast annað, enn eftir sum tað eydnast betri og betri at kortleggja sildagongdina og fylgja sildini, eru góðir mögnleikar fyri at Föroyingar á sildaveiðini fáa lönandi vinnu.

Vit eru lítið royndir á hesum öki; heldur vita vit eiki vist um silda-

gongdina enn, so ikki ber til hjá fíggjarnevndini at mæla til stóra peningaíleggjan her. Tó eru stig tilikin til at fáa til vega sildatunnur og rökja okkara sildamarknaða í Svöríki.

Virði av fiskaframleiðslu okkara er nú 6—7 ferðir so stórt sum undan seinna heimsbardaganum. Við öktari sildaveiði hava vit líkindi til at ökja enn meira um framleiðsluvirðið.

Hövuðsorsökin til, at úrslitið av okkara fiskivinnu í 1950 var so út av lagi ringt, var tann, at fiskurin lá so leingi á goymslu, at nógvur fiskur, sum ikki av spiltum salti var óný̆tiligur sum söluvöra, bleiv tað av langari goymslutíð. Hesi longu goymslutíð funnust menn nógv at, tí hon hevur verið mongum smáfelögum at bana. Til tað sigur fiskasölan, at fyrimunur einkarsölunar er júst tann, at möguleiki so er fyri at goyma fiskin og fáa besta prísin og ikki taka við fyrsta boði.

Hetta sjónarmið er ikki torskilt, men tapini vóru so stór á goymslu, at ein má biðja fiskasöluna hugsa, um tann meiraprísur, hon fekk til vega, vigaði upp ímóti teimum tapum, sum stóðust av at bíða.

Tann 19. november vóru 10 skip lýst til tvangsölu og vóru 8, sum skuldu lýsast, flest öll statsskip. Í hesi 10 kip hevur vinnulángrunnurin sett kr. 627.633,00, og um grunnurin skal orka at keypa tey, törvar honum 147.000 kr.

Fyri fíggjarnevndini stendur tað greitt, at lítil bati er í at leggja ráð saman um, hvussu vit skulu fáa til vega pening til útgerðarlán o. a., um vit ikki kunnu bjarga förunum. Stórir trupulleikar standast av, at lán grunnsins eru so stuttfreistaði, at afturrindingartíðin fyri teimum lánum, sum grunnurin veitir, mangan er longri enn afturrindingartíðin fyri grunnsins egnu lánum. Til gagn fyri likviditet vinnulánsgrunnsins hevði tað verið, um lánisátlmálarnir vórðu broyttir.

Av tí Fiskeribanken og fíggjarmálaráðið danska krevja statsskipini til tvangsölu, so skjótt tey ikki svara sína skyldu, tók nevndin upp tingingar við ríkisumboðsmannin. Henda mannagongd er »forretningsmæssig«, upplýsti ríkisumboðsmaðurin. Vinnulánsgrunnurin veit mangan ikki av, hvussu fíggjarstöðan er hjá teim einstöku skipum, fyrrenn tey eru lýst til tvangsölu av umboðsmonnum fyri Fiskeribanken og fíggjarmálaráðnum danska ið eru atvikavist ríkisumboðsmaðurin og Kehler & Lützen, sakförarar.

Í hesum sambandi minna vit á, at 30 tons bátarnir skuldu upprunaliga kosta 120.000 kr., men prísurin varð um 150.000 kr., og 80 tonsbátarnir skuldu kosta 280.000 kr., men prísurin varð 350.000 kr. Skipini standa nú í so högum prísi, at trupult er at fáa menn til at yvirtaka tey bert fyri 1. og 2. veðhald. Av hesum stendst tað, at um donsku stovnarnir, ið hava bæði 1. og 2. veðrætt, ikki vilja minka um kröv sínu, verður vinnulánsgrunnurin at missa allan sín pening. Nevndin heldur, tað er neyðugt at taka upp tingingar um henda spurning, tí ta ðer neyðugt og heldur ikki órímiligt, av tí vinnulánsgrunnurin varð trýstur inn við 3. veðhaldi aftaná at 1. og 2. veðhald varð komið so högt upp, at báðir partar skarva lutfallsliga av. Tað er ikki at ivast í tí, at vit eiga at leggja okkum meira eftir útróðri og til tað brúk eru 30 tons bátarnir vel nýtiligir. — Fyri at gera

hesa vinnu so lönandi sum möguligt og skaffa arbeiði til fleiri hendur mugn vit fáa á fötur kölihús og flakavirki.

Her eru tað mest statsskipini, ið viðgjörd eru, men hin parturin av fiskiflotanum er fíggjarliga lítið mætari fyrikomin, bæði hvat viðvíkir sjálvum skipunum, umsitingini, rakstrinum og harav rentabilitetinum. Áböturnar ið neyðugar eru, krevja so stórar fyrireikingar bæði av fíggjarnevnd og vinnulívsmonnum, at tær ikki kunnu greiðast í hesum máli. Tí má serstök nevnd taka skipaflotan til viðgerðar.

II. Handilsviðurskiftini.

Sum áður nomið við var tað sindrið av hagtali, sum vit hövdu, ikki álítandi. — Av kanningunum siggja vit, at í tíðarskeiðinum 1946 til 1951 hava vit brúkt 82 mill. kr. meira, enn vit hava vunnið.

Seinastu árini er samlaði innflutningurin vaksin uttan munandi eftirlit við slíkari ferð, at hann má sigast at vera ein hövuðsorsökin til ta peningatrot, vit eru komnir í.

Henda talva, ið lýsir innflutningsvirðið í 1000 kr. í tíðarskeiðinum 1938 og 1946—51, sigur frá:

	1938	1946	1947	1948	1949	1950	1. hálvár 1951
Danmark	6.496	13.529	19.596	31.388	46.753	52.269	30.200
Bretland	1.798	21.192	23.438	18.445	11.797	11.427	4.393
Øðrum londum	942	440	848	488	1.152	1.914	1.132
	9.236	35.161	43.882	50.321	59.702	65.610	35.725

Veruleikin er tann, at afturat ov váðiligari, bæði privatari og almennari peningaílegging hevur fólk ikki dugað at havt pening millum hendur og hevur so statt ikki tolt avmarkaðan innflutning.

Niðanfyri standandi talva sýnir, hvussu stórt fallið í innflutninginum bleiv, tá keypikraftin av minni inntökum og hækkandi tolli minkaði.

Virðið av innflutninginum úr Danmörk í 1000 kr. í tíðarskeiðinum januar—oktober 1951:

Januar	3.760
Februar	4.274
Marts	4.342
April	6.054
Mai	2.317

Juni	5.157
Juli	4.249
August...	3.322
September...	3.177
Oktober	3.307
	39.959

Tölini fyri november og desember eru tíverri ikki tök enn, men heldur gjaldstovan, at tey vísa enn meira niðurgongd, og at innflutningurin úr Bretlandi er ikki vaksin tilsvarandi.

Av tí menn eru ójavnir á máli um ta ávirkan, postpakkarnir hava á okkara handilsjavnvá, seta vit upp talvur yvir innflutningsvirðið av postpakkum — gávupakkum ikki við — í apríl 1950 og apríl 1951:

	apríl 1950	*apríl 1951*
Tórshavn	296.648,96 kr.	705.461,59 kr.
Tvöroyri	42.077,96 —	85.751,11 —
Vág...	55.407,74 —	104.358,16 —
Klakksvík	60.015,00 —	100.227,69 —
	454.149,66 kr.	1.055.798,55 kr.
Tollur	44.931,91 kr.	125.867,03 kr.

Borið saman við mánaðaryvirlitið omanfyri sigur postpakkayvirlitið, at tá tölini fyri apríl 1951 eru nógv störri, er tað ikki, tí innflutningurin er vaksandi, men at tað ikki bert eru húsmöður, men eisini handilsmenn, sum *nú* flyta inn postvegin.

Gjaldstovan vil vera við, at virðið av privatum postpakkum liggur um 100.000 kr. um mánaðin nú, sum tað lá í apríl 1950.

Heildarmyndin av tí, vit her hava flutt fram, er tann, hóast vit her hava hildið okkum til innflutningsvirðið, og so statt ikki tikið tann stóra prísvökstur upp í myndina, at innflutningurin er nógv minkandi.

Fyri komandi ár kunna vit ikki lata henda bata — íkomnan av peningatroti — sissa okkum til at reka sama handilsskap sum farnu árini, men mugu longu frá nýggjári vera greiðir yvir mál og mið okkara, sum mugu vera at leggja loft yvir innflutningin og ökja mest möguligt um útflutningin.

Við hesum í huga seta vit upp hesi töl:

Innflutningur.

Samlaði innflutningurin fyri álmanakkaárið 1952 verður ialt 46,8 mill. kr.

Útflutningur.
1952.

Fiskur	59,0	mill. kr.
Lýsi	3,0	— -
Tvöst	0,8	— -
Skinn og ull	1,0	— -
Hvalaolja	4,0	— -
ialt	67,8	mill. kr.
Skipaútreiðslur ÷	12,6	— -
	55,2	mill. kr.

Eftir hesum út- og innflutningstölum skuldu vit komandi ár kunnað bjargað einum útflutningsyvirskoti uppá 55,2 ÷ 46,8 = 8,4 mill. kr.

Sjálvandi er ilt at siga, hvussu hesi töl koma at halda, tí hvat árið vil geva okkum av bakbrestum, vita vit lítið um, men útflutningstölini eru eftir uppgávu frá fiskivinnuskrivstovuni og l/f Föroya fiskasölu, og innflutningstölini eru ikki minkaði meira, enn hvat forsvarligt er, tá vit hava í huga ta álvarsomu kreppu, vit eru í.

III. Landbúnaður.

Tað loft, sum fíggjarnevndin vil mæla til verður lagt uppyvir innflutninginum, eigur at virka eggjandi bæði uppá eplaframleiðaran og seyðabrúkið, tí stríð teirra móti innfluttum vörum verður lættari. Jarðaráðið tekur væl undir við mannum, ið nýta vilja nýggj veltingaramboð.

Best hevði verið fyri allar partar, um landbúnaðurin hevði so góðar umstöður, at lögtingsstudningur ikki var honum neyðugur. Sum prísirnir nú eru, er samlaða inntökan av seyðabrúki, neytahaldi og eplaframleiðslu um árið 7,0 mill. kr., og mál okkara má vera ikki at koma undir, men upp um hetta tal.

Flest allir menn eru samdir um, at í lötuni hava vit samanborið við útreiðslurnar lítla nyttu av royndarbrúkunum. Tað ber til at taka tey av, men tann maður, sum hevur Hoyvíksbrúkið í hondum, eigur so at hava rættin til at leiga brúkið og sita á tí sum uppsitari. Viðvíkjandi brúkinum í Traðardali, har eingin leiðari er í lötuni, reikar landsstýrið so fyri, at einkjan ikki verður svikin.

IV. Vinnur sum kolahögging, royðuhögging í samband við málingavirki og grótídnaði eru vinnuvegir, sum kundu komið landshúsarhaldinum vel við.

Av royðu- og grótídnaðinum hava vit nú í fleiri ár væntað okkum verulig peningalig útslit, tí möguleikarnir fyri lönandi framleiðslu hava altíð verið lýstir sum sera góðir og ongantíð so góðir sum nú, men enn hevur landskassin bert havt útreiðslur. Ilt er hjá nevndini at siga, hvat bagir, men sleppa hesum ídna av tonkum kunnu vit ikki.

Viðvíkjandi kolaframleiðsluni er at siga, at vit kunnu framleiða alt tað húsbrenni, Föroyum törva, men kortini flyta vit inn fyri 1,5 mill. av útlendskum koli og koksi. Hetta kann ikki vera beint atborið. Ein hl av koksi kostar 14 kr., og útlendskt kol kostar 9,75 kr. fyri sekkin, og föroyska kolið kostar kr. 7,10 fyri sekkin. So hóast brennivirðið er minni í föroyska kolinum, verður hetta mest sum uppvigað av hægra prísinum.

Sum fíggjarstöða okkara er í lötuni, eru möguleikarnir fyri við egnari megi at fara undir Marstrander-ætlanina, ið krevur eina peningaílegging, uppá 8½ mill. kr. at kalla eingir, men at vit ikki eiga at flyta meira útlendskt brenni inn, enn tað ídnaðurin krevur, er eyðsæð.

Tað má annars haldast, nú kolatrotið er so stórt í heiminum, at tað má vera ein uppgáva hjá E. C. A. at fáa á gongd föroysku kolaframleiðsluna við útflutningi í hyggju. Tó ásanna vit, at tað frá föroyskari síðu ikki er möguleiki fyri stuðli hvörki fyri stovnan ella rakstri.

V. Hagtal.

Fyri at vit ikki í framtíðini vinnuliga og handilsliga skulu trilva okkum fram og ikki til einahvörja tíð vita, hvussu úrtökan er í teim ymsu vinnunum og uttanlanda handli, verður neyðugt at seta á stovn hagstovudeild sum skjótast.

VI. Hvar vit kunna spara:

1. Við at selja »Smiril« og loyva privatum felögum at rökja Suðuroyarsiglingina saman við »Ternuni« til hóskandi dieselskip fæst til vega, spara vit um árið ... ... kr. 150.000,00

2. Vit skjót út alla havnabygging, sum ikki er komin í gerð, og í sementi og jarni minkar landið um peningaíleggingina tey komandi 5 árini við ... ... kr. 1.713.750,00
og í lögtingsstudningi sleppa vit í sama tíðarskeiði undan kr. 1.941.000,00

3. Tá álagt verður landsstýrinum ikki at ávísa til gjaldingar nakra rokning fyri ferðaútreiðslur frá landsins tænastumonnum ella umsjónarmonnum, uttan teir við kvittan prógva teirra útreiðslur, og alt prentingararbeiði so væl sum umvælingar av öllum slag meira enn higartil verður útboðið, verða vit at spara uppá umsitingarútreiðslurnar.

4. Hesir stovnar liggja beinleiðis ella óbeinleiðis undir lögtinginum:

Skipafelagið,
Farmur,
Vinnulánsgrunnurin,
Lönjavningargrunnurin,
Tryggingarsambandið,
Prísráðið,
Grönlandsfelagið,
Föroya Fiskasöla,
Jarðaráðið,
Valutamiðstöðin,
Vanlukkatryggingarráðið,
Sjúkrahúsnevndin,
Brunatryggingin,
Happadráttanevndin,
Föroya Vanlukkutrygging,
Skattanevndin,

og kosta teir um ikki beinleiðis allir lögtinginum so tó landshúsarhaldinum í nevndarsamsýning um 60.000,00 kr.

5. *Bróstsjúkrahúsið.*

Frá 1. januar 1952 eru tað ætlandi bert 21 sjúklingar á Bróstsjúkrahúsinum og verður tá nýggi bygningurin partvís stongdur, eisini hetta skuldi spart nakað.

6. Leggja vit niður royndarbrúkini og leiga tey út til uppsitara spara vit í fyrsta umfari ... ... kr. 57.000,00
og vinna í leigu ... ... kr. 2—4.000,00

7. Fiskivinna okkara má gjalda 3—4 oyru fyri at fáa 1 kg av fiski landað úr skipi í pakkhús. Hetta sama arbeiði kostar norsku fiskivinnuni 0,8 oyru.

Hondfara vit við landing og á annan hátt 35.000 t av fiski um árið, kostar tað okkara fiskivinnu ... ... kr. 1.225.000,—
Sama arbeiði ger norski fiskimaðurin fyri ... ... 280.000,—

So statt setur fíggjarnevndin fram hetta uppskot:

1. Lögtingið biður landsstýrið saman við kanningarnevndini taka upp tingingar við ríkisstýrið um eina skipan, soleiðis at lán kann verða tikið uppá fisk á goymslu við 75 % av söluvirðinum, at afturrinda

so hvört sum fiskurin verður avskipaður. Eisini eiga samráðingar at fara fram um at fáa til vega pening til niðurskrivingar av fiskiflotanum.

II. Útgerðarlán úr föroyskum bankum verða aftur goldin av tí undir I nevnda láni.

III. Álagt verður Valutaráð Föroya at skipa so fyri, at innflutningur okkara ikki fer upp um 46,8 milliónir komandi álmanakkaár.

IV. Landsstýrið biðist fyrireika at skipa álítandi lagtal frá 1. januar 1952.

V. Landsstýrið verður biðið um undir tingingunum við ríkisstýrið at fáa í lag finansiering av tilætlaðu landsskúla- og landssjúkrahúsabyggingini, hartil eina skipan, sum kann sleppa föroysku bankunum um neyðugt eisini sparikassanum undan kommunulánunum, so teir betri orka at finansiera fiskivinnuna.

VI Lögtingið samtykkir:

1. *At* lögtingsins búnaðarnevnd skal taka upp spurningin um niðurlögu av royndarbrúkunum í Hoyvík og Traðardali.

2. *At* geva landsstýrinum heimild til at selja »Smiril« og geva privatum felögum loyvi at rökja Suðuroyarsiglingina saman við »Ternuni«, inntil hóskandi dieselfar fæst til vega.

3. Fyribils at skjóta út allari ætlaðari havnabygging, sum ikki er komin í gerð.

4. *At* álagt verður landsstýrinum ikki at ávísa til gjaldingar nakra rokning fyri innanlanda ferðaútreiðslur hjá landsins tarnastumonnum ella umsjónarmonnum, uttan teir við kvittan prógva teirra útreiðslur, og tær ikki fara upp um ásetta dagpeningin fyri samdöguröi.

5. *At* álagt verður landsstýrinum at bjóða út alt prentingararbeiði so vel sum umvelingar av öllum slag.

6. *At* biðja landsstýrið heita á allar teir í álitinum undir VI nevndu stovnar um at gera umsitingina so bíliga sum möguligt.

VII.

Lögtingslóg um lán til finansiering av fiskivinnuni.

gr. 1.

Landsstýrinum er í samráð við fíggjarnevnd lögtingsins heimilað landskassans vegna at taka upp ella veðhalda fyri láni uppí 20 mill. kr. til finansiering av fiskivinnuni.

gr. 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

Lagtinglov om finansiering af fiskerierhvervet.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til i samråd med lagtingets budgetudvalg at optage eller garantere for lån indtil 20 mill. kr. til finansiering af fiskerierhvervet.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Uppskot
minnilutans (J. Kallsoy og P. M. Dam), við annars vísa til skrivu teirra dagfest 8 12 1951 og munnliga frágreiðing í tingsalinum.

1. Valdur verður umboðsmaður fyri hvönn tingflokk til saman við landsstýri og ríkisdagsmonnum okkara at arbeiða fyri at fáa til vega neyðturviligan pening til at endurreisa okkara fiskivinnu soleiðis:

a. Bankar verða gjördir förir at veita fiskivinnuni neyðug útgerðarlán.

b. Skipað verður fyri, at lænt kann verða uppá fisk á goymslu upp til 75 % av söluvirðinum.
Útgerðarlán verða fyrst at afturrinda av hesum peningi.

c. Við eykamarshallhjálp ella á annan hátt verður peningur fingin til ídnað í sambandi við fiskivinnuna, sum t. d. kölugoymslur og frystivirki, flakavirki, fiskamjölsvirki, konservesvirki, sildavirki, tog- og onnur útgerðavöruvirki o. a.

d. Landshandlinum verður veittur neyðturvuligur rakstrarpeningur til keyp av teimum ymisku útgerðarvörunum.

e. Við eykamarshallhjálp ella á annan hátt verður peningur fingin til vega til bjarga skipaflota okkara frá at gleppa okkum av hondum og til at seta hann í besta veiðiföra stand, so at framleiðslan og lívsevni okkara kann ökjast mest möguligt.

f. Heitt verður á Fikeribanken og á stats- og finansministeriini, okkara

bankar og aðrar peningastovnar, útgerðarmenn og teir ymsu kreditorar hjá skipaeigarum og skipadriftum ikki at leypa á skipaeigarar og fiskivinnufelög og volda teimum steðg og húsagang, meðan samráðingar fara fram millum ríkisstjórn og landsstýri og löglingsins valdu umboðsmenn.

II. Viðvíkjandi skipanini og umsitingini av teimum ymsu tættunum verður tingið at viðgera hvönn sær.

2. viðgerð og 3. viðgerð 20. desember 1951.

Uppskot minnilutans (Dams og Kallsoys):

I: fall	8—0.
I: a—b fullu	8—0.
c fall	9—0.
d —	9—0.
e —	10—0.
f —	10—0.
II: fall	11—0.

Uppskot meiralutans (M. Holm o. fl.):

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot til meirilutans uppskot I: (frá Hákun Djurhuus o. fl.):

Í meirilutauppskotinum

I. Í fyrstu reglu millum orðini »kanningarnevndini« og »taka upp« verðum skotið inn: »og teim föroysku ríkisdagsmonnum og fíggjarnevndarformanninum.«

Broytingaruppskotið	samtykt	20—0.
I: soleiðis broytt	—	23—0.
II:		23—0.
III:	—	14—0.
IV — V	—	23—0.
VI — 1	—	17—0.

VI — 2 var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: Jens Chr. Olsen, P. Petersen, M. Holm, Tr. Samuelsen, J. Poulsen, H. Iversen, S. Ellefsen, Fr. Bláhamar, A. Sörensen, R. Long, Th. Petersen og H. Djurhuus.

Atkvöddu ikki: P. M. Dam, S. P. Zachariasen, Øregaard, Kallsoy, O. F. Joensen, A. Djurhuus, Henriksen, E. Waag, H. v. Högadalsá og D. P. Danielsen.

Nei atkvöddi: J. H. Danbjörg, Davidsen og S. Danielsen.

Uppskotið fall 12—3.

VI — 3 var sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: Jens Chr. Olsen, P. Petersen, M. Holm, Tr. Samuelsen, J. Poulsen, A. Djurhuus, H. Iversen, Fr. Bláhamar, A. Sörensen, R. Long, Th. Petersen og H. Djurhuus.

Atkvöddu ikki: J. H. Danbjörg, P. M. Dam, S. P. Zachariasen, Øregaard, Kallsoy, O. F. Joensen, J. P. Davidsen, S. Ellefsen, Henriksen, E. Waag, S. Danielsen, H. v. Högadalsá og D. P. Danielsen.

Uppskotið fall 12—0.

VI 4—6 samtykt 19—0.

VI 6 samtykt 23—0.

Lógaruppskotið samtykt 23—0.

29. Finansiering av motorravmagnsverkinum í Tórshavn.

1951, 30. oktober legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Lagtingslov om garanti for lån til Tórshavnar kommune.

gr. 1.

1. Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri kr. 1.000.000,— í láni til nýggja motorravmagnsverk Tórshavnar kommunu.

gr. 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Lögtingslóg um veðhald fyri láni til Tórshavnar kommunu.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges på landskassens vegne at garantere for kr. 1.000.000,— som lån til Tórshavns Kommunes nye motorelektricitetsværk.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

II. Lögtingið biður landsstýrið viðmæla, at ríkiskassin, til financiering av nýggja motorravmagnsverkinum, veðheldur fyri kr. 1.000.000,— í láni til Tórshavnar kommunu við landskassanum sum fyrsti veðhaldari.

Viðmerkingar:

Tórshavnar býráð hevur í brævi 13. juli 1951 til statsministeriið sökt um veðhald statsins fyri kr. 1.000.000,— í láni til financiering av nýggja motorravmagnsverki kommununar. Lánið ætlast upptikið í almennum donskum stovni sum veksulerara R. Henriques, jr., København. Samstundis sökir býráðið um veðhald landskassans fyri hesum láni og statsministeriið biður um ummæli landsstýrisins til umsóknina um statsveðhald.

Samlaði byggikostnaður viðvikjandi ravmagnsverkinum er ætlaður soleiðis:

Byggiútreiðslur	kr.	950.000,—
Maskinur og onnur ravmagnsútgerð	-	1.000.000,—
Háspenningarlinja og transformatorstöðir	-	800.000,-
Umbygging av láspenningarnetinum	-	800.000,—
Nýggir metarar	-	200.000,—
Rentir í byggitíðini	-	250.000,—
um	kr.	4.000.000,—

Verikð við maskinum v. m. og háspenningarlinjum er liðugt, meðan bert ein partur av láspenningarnetinum er gjördur. Samlaðar útreiðslur eru í dag um kr. 3.150.000,—. Verkið er financierað soleiðis:

Lán frá Færö Amts Sparekasse (rentað og afturgjaldast við 7 % p. a. í 30 ár)	kr.	1.000.000,—
Lán frá Statsanstalten for Livsforsikring (rentað við 5½ % p. a. og afturgjaldast yvir 30 ár)	-	500.000,—
Lán frá tryggingarfelagnum Nye Danske (rentað við 5% og afturgjaldast yvir 25 ár)	-	250.000,—
Kassakredit í Föroya Bankan (afturgjaldast innan 31. december 1951	-	1.000.000,—
Uppspardur peningur frá gamla ravmagnsverkinum ...	-	500.000,—
Marshallstudningur ætlaður til 20 % av byggipeninginum (studningsmálið er ikki greitt enn)	-	800.000,—
	kr.	4.050.000,—

Tað er upplýst, at kr. 1.000.000,— í havnaláni veitt kommununi í Föroya Banka stendur sum veð fyri frammanfyrinevnda kassakreditti; kommunan fær tí ikki havnalánið tökt fyrr enn hesin er afturgoldin.

Av tí at lögtingið í juni 1948 gjördi viðtöku um sambart heimastýrislógina at leggja málökið ravmagnsverk undir föroyska heimastýrið, og landsstýrið ikki seinri hevur mótmælt hesum, er hetta málökið vorðið föroyskt sermál. Landsstýrið heldur seg tí ikki kunna viðmæla statsveðhald fyri láni til Tórshavnar kommunu uttan lögtingið í eini viðtöku biður landsstýrið um at gera tað sambart S. E. V. málið.

Fíggjarliga treingir kommunan til umsökta lán, sum ikki fæst undir öðrum treytum enn við stats- og landskassaveðhaldi. Eisini verður kommununi neyðugt at fáa einar kr. 800.000,— í Marshallstudningi.

Landsstýrið mælir lögtinginum til at samtykkja tey tvey uppskotini frammanfyri.

Lagt verður aftrat, at ábyrgdir landskassans pr. 11. juni 1951 fyri lán til Tórshavnar kommunu vóru:

Lángevari:	*Lániár:*	*Uppr. stódd*	*Pr. 11/6 1951*
Færö Amts Sparekasse	1950	400.000 kr.	393.884,50 kr.
Nye Danske af 1864	1950	250.000	250.000,00 —
Nye Danske af 1864	1950	60.000 —	60.000,00 —
Bikuben	1950	1.000.000 —	1.000.000,00 —
Statsanstalten for Livsforsikring	1951	500.000	500.000,00 —
Ríkiskassin	1930	?	452.645,11 —
A/S Föroya Banki	1951	1.000.000 —	975.000,00 —
		Tilsamans	3.631.529,61 kr.

1. viðgerð 2. november og 9. november legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit.

Tingsins ábyrgd fyri lánum kommunanna er öllum tingmonnum kunnug og fýsir fíggjarnevndini tí lítið at vaksa um hana, men nevndin ásannar, at Tórshavnar kommuna er illa fyrikomin av tí, motorravmagnsverkið kom at kosta so nógv meira enn ætlað, og at eitt slíkt verk fyri ein part fíggjarliga hvílur í sjálvum sær. Annars verður fíggjarstöðan hjá Tórshavnar kommunu kannað í lögtingsmáli nr. 28/1951. Mælir tí fíggjarnevndin lögtinginum til at samtykkja bæði uppskot landsstýrisins.

2. og 3. viðgerð 9. november 1951.

Uppskotini I og II samtykt 19—0.

30. Nýskipan av siglingarlæruni.

1951, 31. oktober legði R. Long, landsstýrismaður, fram soljóðandi framlöguskriv frá s. d.:

20. september 1949 setti löglingið fimm-mannanevnd at fyrireika uppskot til nýskipan av læruni til tey ymsu prógv,ið tikin hava verið á sjómannaskúlanum, fyrst og fremst í siglingarkunnleika, men eisini prógv fyri motormenn og maskinistar. Í nevndina valdi tingið Jens Paula í Dali, sjómannaskúlastjóra, Tórshavn, Fischer Heinesen, sjómannaskúlastjóra, Klakksvík, Hans Sundstein, sjómannaskúlalærara, Tórshavn, Peter Dahl, maskinmeistara, Tórshavn og Esmar Fuglö, skipara, Tórshavn.

Nevndarumhugsan varð send landsstýrinum í desember mánaði 1950, og eftir at vera prentað varð hon í mai mánaði í ár send hvörjum tingmanni, umframt at hon er prentað í lögtingstíðindi 1950, sum tingmenn líkaleiðis hava fingið. Landsstýrið loyvir sær við hesum at leggja málið fyri tingið til viðgerðar, og viðleggur nevndarfundarbókina og tær í umlugsanini nevndu lógir og reglugerðir.

Nevndin hevur ikki kunnað samst um eittans uppskot, men hevur býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar, sum seta fram hvör sítt uppskot.

Meiriluta (Fischer Heinesen, Peter Dahl og Esmar Fuglö) seta fram uppskot til *Lóg um sjóvinnu og reglugerð* samsvarandi. Lógaruppskotið umfatar, hvat ið teir meina eigur at verða kravt av lærdómi til tey ymsu prógv fyri skiparar (strandfaraskiparar, skiparar (nakað minni prógv enn stýrimenn nú) og langfaraskiparar) (nakað sum skipsförarar nú)), hvörja siglingartíð eigur at vera kravd fyri at fáa viðkomandi starvsbröv, og hvörjar yvirmenn skip av ymsari stödd skulu hava. Somuleiðis uppskot um krav til motorpassaraprógv, maskinistprógv, maskinmeistaraprógv, handverkaraprógv (2) og kokkaprógv, og hvat ið má krevjast til at fáa tilsvarandi starvsbröv.

Lógaruppskotið svarar til ríkislógirnar um siglingarlæru, maskinistlæru, sjóvinnustarv og til partar av sjómannalógini.

Minnilutin, Hans Sundstein, setur uppskot fram til fullfíggjaða *Manningarlóg fyri föroysk skip*, sum tilskilar harði tal á undirmonnum og yvirmonnum á teim ymssu skipunum eftir stødd og maskinkraft og eisini treytir fyri at kunna mynstra ella kunna fáa starvsbrev, og uppskot til *Lóg um mannalæru og sjómannaskúlar*, sum tilskilar lærugreinir, tímatal teirra og karaktergávu til tey ymsu prógvini.

Uppskotið frá meirilutanum tilskilar upptökuroynd til sjómanaskúlar, har næmingsins kunnleiki til vanligt sjómannsarbeiði verður kannaður.

Uppskotið frá Hans Sundstein mælir til at seta á stovn sjómannaskeið, har teir ungu, áðrenn teir mynstra út fyrstu ferð ella í seinasta lagi, áðrenn teir mynstra sum dekksmenn (t. v. s. hava fylt 17 ár og hava siglt minst 12 mánaðir) kunna fáa skeið í nyttugari uppvenjing til sjólívið.

Minnilutin, Jens Pauli í Dali, setur fram uppskot til *Lógtingslóg um strandfaraskiparaprógv og fiskiskiparaprógv*, sum hann ynskir skipa við dyggum praktiskum kunnleika til veiðihættir og veiðimöguleikar. Farmasiglingarlærurna mælir hann til fyri fyrst at hava sum er (núverandi stýrimannaprógv).

Landsstýrið vil ikki her taka dagar ímillum tey ymsu uppskotini, við tað at endalig stöða til teirra kann ikkiverðatikin, fyrr enn greitt er viðvíkjandi skipan av starvsrættindum samsvarandi sjóvinulóggávuni, men viðkomandi landsstýrismaður hevði fegin viljað luttikið í nevndarviðgerðini av hesum máli.

1. viðgerð 3. november og beint til serstaka 5 mannanevnd.

---

31. Broytingar í sjóvinnulóggávuni.

1951, 31. oktober legði R. Long landsstýrismaður fram soljóðandi d. 31. oktober við skjali:

Sí skjal 8.

Starvsrættindi í sambandi við ymirtöku av sjóvinnumálum.

Í bardagatíðini 1940-45 og síðan til henda dag er prøvtökan á sjómannaskúlanum her farin fram fyri prøvdómarum, settir, fyrst av bardagaávum av amti, seinni sum frambald av bráðfengisskipanini av landsstýri. Prógvini, sum hava verið tikin, hava sum áður verið: setiskiparaprógv, grönlandsskiparaprógv, stýrimannaprógv, motorpassaraprógv, maskinpassaraprógv, og makinistprógv. Tey til hesi prógv svarandi starvsbröv, ið geva rættindi til at starvast sum setiskipari, stýrimaður, maskinmeistari o. s. fr., hevur fútin givið til og við í ár, hóast prøvtökan hevur farið fram fyri prøvdómarum, sum hava ikki verið settir av navigatiónsstjóranum ella

maskinistlærustjóranum, sum lógirnar um siglingarlæru og maskinistlæru krevja. Hesar lógir eru ikki tiknar úr gildi Föroyum viðvíkjandi.

Við heimastýrislógini gjördust sjómannaskúlar (navigatiónsskúlar) og vinnumál föroysk sermál, og varð hetta í Föroyum yvirhövur fatað soleiðis, at alt, sum viðvíkir sjóvinnu, siglingarlæru og saman við heni motormanna- og maskinistlæru, var nú undir lóggávu lögtingsins. At táverandi landsstýri eisini hevði hesa fatan, framgongur av uppskotinum til lóg um navigatiónsskúlar, sum framsett varð í februar 1949, har landsstýrið tekur til, at saman við lóggávuökinum »navigatiónsskúlar« eru sjóvinnulóggávan og eisini maskinistlóggávan vorðnar föroysk sermál. Undir viðgerðini á tingi broytti landstýrið stöðu sína til tess, at maskinistlóggávan enn var felagsmál, og tá ið uppskot um yvirtöku av hesum máli varð sett fram á tingi, fall tað.

Ífjör og í ár hevur handilsráðharradeild ríkisstýrisins, ið umsitur siglingarlæruna og sjóvinnumálini, ikki beinan vegin vilja góðtikið sjóvinnuprógv, tikin í Föroyum, til at veita rættindi til tilsvarandi starvsbröv, galdandi bæði í Föroyum og í Danmark, vísandi til, at prógvtökan er farin fram uttan um teir fyriskipandi stovnar, sum galdandi ríkislóg tilskilar. Meðan linliga hevur verið tikið uppá starvsbröv til veiðisigling, hevur verið öðrvísi við stýrimannastarvsbrövum, og er stýrimannaprógv, tikið í Föroyum í ár, ikki góðtikið til at kunna fáa danskt stýrimannastarvsbrev uppá; tó hava föroyskt lærdir stýrimenn fingið loyvi á donskum sjómannaskúla at taka skipsföraraprógv, men hava enn ikki kunnað fingið starvsbrev sum skipsförarar.

Í summar hava samráðingar farið fram millum landsstýrið og viðkomandi ríkisstovnar til at fáa greitt teir vansar, sum eru komnir av ógreiðu um, hvussu umfatandi föroysk yvirtöka av higar hoyrandi málum er.

Úrslitið úr samráðingunum var, at handilsráðharradeildin yvirfyri statsráðharradeildini vildi siga seg foreinta við, at sjómannalæruviðurskifti og sjóvinnuviðurskifti verða föroysk sermál, og at úr Föroyum skal koma uppskot um framtíðarskipanina.

Tey umhvörvi, sum her verða at taka stöðu til lóggávuna um, eru helst:

1) Sjómannalæra,
2) starvsrættindi knýtt til sjómannalæruprógv,
3) manningarviðurskifti og
4) starvsviðurskiftiá skipum.

Hetta eru víða umfatandi mál, og krevja tey gjölla viðgerð, áðrenn endaligar broytingar í lógarfyrisetingunum verða gjördar, men av tí ógreiði, sum er komin á starvsrættindunum, knýtt serliga til stýrimannaprógv og maskinistprógv, sum tikin eru í Föroyum, síðan heimastýrislógin kom í gildi, er neyðugt, at tann flökjan verður greidd sum skjótast · frá danskari síðu verður ynskt innan nýggjár 1952.

Frá danskari síðu verður hildið fram, at stýrimannaprógv tikið í Föroyum uttan um ta donsku prógvdómsnevndina, kunna ikki veita danskt

starvsbræv sum stýrimaður. Harímóti vilja teir, um vissa er fyri, at föroyska stýrimannaprógvið í virði svarar til tað danska, loyva föroyskt lærdum stýrimonnum at læra til skipsförara á donskum skúlum, og skulu teir, táið teir hava tikið prógv har, kunna fáa starvsbræv sum danskir skipsförarar. Tað sama skuldi goldið monnum, sum tóku fyrra meistaraprógvið í Föroyum uttanum donsku próvdómsnevndina. Sum áður nevnt er maskinistlæran ikki enn föroyskt sermál. Landsstýrið hevur spurt maskinistfelagið, um tað ynskir málið yvirtikið, og hevur fingið tað svar, at felagið ynskir yvirtöku men soleiðis at prógvini geva sama rætt til starv í Danmark sum higartil.

Landsstýrið vildi fegið luttikið í nevndaarviðgerðini av málinum.

SKJAL

I tilslutning til forhandlingerne i sommer i anledning af navigationsområdets og sönæringsområdets overgang til særanliggende under hjemmestyret udtaler lagtinget, at man har opfattet hjemmestyreordningen som et udtryk for en villighed både fra færøsk og dansk side til gensidig imödekommenhed og forståelse ud fra anerkendelsen af den nationale egenart, der er baggrunden for nyordningen. Man har derfor både håbet på og regnet med, at der også efter hjemmestyreordningens ikrafttræden kunde opretholdes en samvirken og gensidighed på sönæringens område, selv efter dennes overgang til særanliggende, og det vilde være muligt ved et forstående samarbejde at bevare eller godkende de nuværende og fremtidige eksaminers værdi i et sönæringsmæssigt fællesskab. Dette mente man var let görligt, selvom Færöerne overtog driften af navigationsskolen, eksamensordningen og eksamensafholdelsen , når man holdt sig på linje med den rigsdanske eksamenskommission, og der gennem samarbejde skabtes betryggende kontrol.

Idet man henviser til § 10 i hjemmestyreloven, hvori det bestemmes, at udover mulige tilfælde vedrörende valg til offentlige organer under hjemmestyret, hvor fast bopæl på Færöerne kan blive gjort til betingelse for opnåelse af valgret, må der hverken i lovgivning ella administration göres forskel på Færinger og andre danske rigsborgere, udtaler man önsket om, at der skabes nödvendigt samarbejde til at gennemföre gensidighed i benyttelsen af höjere sönæringsbeviser, der opnås i tilknytning til eksaminer bestået ved dansk og færösk navigationsskole.

Man vil derfor foreslå, at den lösning, der for styrmandseksamens vedkommende under forhandlingerne i sommer blev opstillet som nr. 2: Undervisning på Færöerne og eksamination der af en færösk eksamenskommission, der er suppleret med et medlem af den rigsdanske eksamenskommission, gennemföres, det man med hensyn til den förste mod denne ordning rejste indvending — sprogvanskeligheder — fremhæver, at efter hjemmestyreloven kræves der forsvarlig undervisning i dansk i den fær-

öske folkeskole, og med hensyn til den anden indvending: muligt opstående kompetencespörgsmål, mener, at disse må kunne undgås, når ordningen så stærkt fra færösk side, ikki mindst af unge sömænd. Styrmandseksamen taget her efter undervisning her og aflagt for den færöske eksamenskommission skulde altså være gyldig til rigsdansk sönæringsbevis, når eksamenkommission er suppleret med et medlem af den rigsdanske eksamenskommission.

Færösk har i en årrække været fag til realeksamen, præliminereksamen og studentereksamen her udover de samme fag og samme pensa, som kræves til disse eksaminer ved rigdanske skoler. I de senere år har færösk været fag til alle andre eksaminer, der tages her, også navigationseksaminerne og eksaminerne under maskinistundervisningen uden dog at kravene i de andre fag er nedsat. Man håber, at den forståelse, der er blevet vist ved fortsat anerkendelse af de först nævnte eksaminers værdi udenfor Færöerne, efter at fagene er föröget med færösk, også vil blive vist overfor styrmandseksamen og maskineksaminer.

Da denne ordning, selvom den ved forhandlingerne i sommer blev skudt til side, er fuldt ud i tråd men ånden i hjemmestyreloven, håber man, at den vil kunne gennemföres, og at et forstående og samarbejdende princip lægges til grund for fremtidig bedömmelse af værdien af arbejdet indenfor sönæringens skoleformer indenfor riget.

Med hensyn til de styrmandseksamener og maskinisteksamener,der er taget på Færöernes Navigationsskole under og efter krigen udenom den rigsdanske eksamenskommission, men i god tro på, at de ville give adgang til rigsdanske sönæringsbeviser, idet man bestræbte sig på at stille samme krav og anlægge samme bedömmelsesmålestok som för krigen, henstiller man, at de anerkendes til opnåelse af rigsdanske sönæringsbeviser, og at det samme må gælde skibsförereksamen bestået ved rigsdansk skole med færösk taget styrmandseksamen som grundlag, når iövrigt alla andre krav ov fartstid, vandel og synspröve er opfyldt.

Da lagtingisarbejdet på grund af tvingende omstændigheder har været stærkt hæmmet i sommer og efteråret, har sagen ikke kunnet blive behandlet så hurtigt som önskeligt, og man henstiller derfor, at den skæringsdato for en endelig ordning, der ved forhandlingerne i sommer foresloges at skulle være 31. december 1951, udsættes til 1. marts 1952, da eksaminationerne ved navigationsskolen her ikke vil være af sluttet för ind i marts 1952.

1. viðgerð 3. november og 19. desember tegði serlig 5 mannanevnd fram soljóðandi

Umhugsan

Í samanhang við framlöguskriv landsstýrisins setir nevndin fram hesar viðmerkingar og uppskot:

Tá ið ógreiði er komin viðvíkjandi yvirtöku heimastýrisins av sjóvinnumálum, er tað av tveimum hövuðsgrundum:

1) Samtíðis sum landsstýrið í staðin fyri sum áður navigasjónstjórin setti prövdómarar til siglingarlæruprögv, ið tikin vórðu her, og prövskjölini vórðu undirskrivað av landsstýrismanni í staðin fyri av navigasjónsstjóranum ella manni, um settur var í hansara stað, varð lögin um siglingarlæru ikki broytt samsvarandi, ei heldur var orðaljóðið á prövskjölunum broytt, tí roknað varð við, at tey vórðu framvegis góðtikin til at veita ríksdonsk starvsrættindi, til samráðing um hetta mál, sum byrjað var, var förd til endaliga avgerð.

2) Orðið *sjóvinna* (sönæring) er ikki nevnt í listanum yvir felagsmál og sermál í heimastýrislögini, hvörki undir A-málum ella B-málum, harímóti eru undir A15 nevnd *vinnumál* (næringsvæsenet) sum av lögtinginum seinni eru tikin sum sermál undir heimastýrinum (13. mai 1948). Av ógreiðini sum nevnd er undir 1), var handilsmálaráðdeildin farin at ivast, um lögtingið hevði roknað sjóvinnumál sum lögd undir heimastýrið saman við vinnumálum.

Til 1) er at siga, at á lögtingi var tað mannum greitt, at broytingin í siglingarviðurskiftunum, sum var farin fram í Föroyum í bardagatíðini og aftan á heimastýrislögina, var ikki í lagi, fyrr enn lögin um siglingarlæru var broytt samsvarandi, og tingmaðurin R. Long setti undir nevndarviðgerðini av hesum máli ífjör fram uppskot til lögtingslög hesum viðvíkjandi, men tók tað aftur, tí landsstýrið gjördi hann kunnugan við, at samráðingar fóru fram skrivliga um hetta mál, og at væntandi var, at málið kom í rætt lag, innan prövtökan í februar 1951 fór fram. So var nú ikki, og henda prövtökan fór fram sum síðan 1949 við prövdómarum settum av landsstýrinum og prögvunum undirskrivað av landsstýrismanni. Öll lærukröv og dómsstrangleikin var tá sum alla tíðina tey somu sum fyri bardagana, og tær skrivligu uppgávurnar vóru eisini hetta árið, eins og öll árini síðan bardagin hasaði av í 1945, tær somu sum til tilsvarandi prövtöku í Danmark og vóru sendar higar av navigasjónsstjóranum.

Til 2) er at siga, at eingin tingmaður man nakrantíð hava hugsað annað, enn at sjóvinnan er hövuðsvinna Föroyinga, og at tí sjóvinnumál eru týðningarmesti táttur av vinnumálum her á landi. Hóast heimastýrislögin ikki heinleiðis vissar Föroyingum sama virkisrætt í Danmark sum Dönum í Föroyum, tilskilar hon í gr. 10, at í lóggávu ella umsiting kann ikki verða gjördur munur á Föroyingum og öðrum donskum ríkisborgarum, og mundi tí eingin hugsa annað her, enn at sjóvinnuprögv, tikin her við somu lærukrövum sum í Danmark, mundu geva starvsrætt í báðum londum. Vit hava fyri alt tað eisini læraraskúlaprögvini at meta okkum eftir: studentaprögv, realprögv og preliminerprögv, sum hava verið góðtikin til fult virði í báðum londum, eisini tey, sum hava verið tikin við prövdómadum settum ikki bein-

leiðis av teim tilskilaðu myndugleikunum. Úrslitið av samráðingunum í summar var, at handilsmálaráðdeildin góðtók tað sónarmiðið, at sjóvinnumál í Föroyum eru at rokna undir lóggávuökið vinnumál, og tí eins og siglingarviðurskiftini er sermál.

Nevndin er samd um, at Föroyingar yvirhövur, sum er, ynskja at uppihalda teim starvsrættindum, teir higartil hava havt í Danmark eisini í sjóvinnuni, og leggur hetta sjónarmið til grund fyri nevnddarviðgerðini av hesum máli.

Tey læruprógv, sum higartil hava verið tikin í Föroyum sjóvinnuni viðvíkjandi eru:

1. heimaskipara (kystskipper) prógv,
2. setuskiparaprógv,
3. grönlandsskiparaprógv.
4. stýrimannaprógv,
5. motorpassaraprógv,
6. maskinpassaraprógv,
7. maskinistprógv (1 ferð seinast i bardagaárunum og 2 ferð seinni).

Heimaskiparaprógvið hevur ikki verið tikið uttan av hendinga manni. Setuskiparaprógvið hevur verið vanliga fiskiskiparaprógvið í Föroyum, men so við og við sum skipini leita longur burtur enn til Íslands, verður meir og meir átroðkandi at hava dyggari siglingarkunnleika, og grönlandsprógvið verður tí nú tikið av öllum teimum, sum vilja eiga rætt at sigla allan sjógv. Hesi trý prógvini eru í roynd og vern fiskiskapsprógv, og tey rættindi, tey geva í farmasigling, eru so lítið týðandi, at menn leita neyvan burtur hiðani við teimum. Stýrimannaprógvið gevur (helsi saman við skipsföraraprógvi) rætt at vera stýrimaður (og förari) í farmasigling, og eru av teimum 160 Föroyingunum, sum til henda dag hava tikið stýrimannaprógv í Föroyum, 30 farnir burtur at sigla. Umfram teir 160 Föroyingarnar hava 1 Dani og 2 Norðmenn tikið stýrimannaprógv her.

Maskinmannalæruni viðvíkjandi eru motorpassara- og maskinprógvini næstan bert nýtt í veiðisiglingini, meðan maskinistprógvið veitir atgongd til starvsbræv sum meistari í (störri) farmaskipum. Maskinistlæran er ikki sermál, so henni viðvíkjandi er stöðan, sum hon hevur verið.

Nevndin heldur, at tey ivamál, sum framkomin eru um ríkisdonsk starvsrættindir í samanhang við siglingarlæruprógv og maskinistprógv tikin í Föroyum, lýsist greiðast við hesum úttalilsum frá samráðingunum um hetta mál í mai mánaði í ár, sum nevndin hevur fingið loyvi at taka upp:

»..... fremhævede, at den ordning, der var praktiseret under krigen, var opstået af en nödsituation, og den kunde ikki anses for

grundlag ved den fremtidige tilrettelæggelse. En ordning, hvorefter de omhandlede områder blev betragtet som færöske sværanliggender, havde den fordel at være ganske klar, men det var fremdeles et aktuelt spörgsmål, hvorledes færöske styrmænd skulde kunne göre tjeneste i rigsdanske skibe, og der måtte formentlig derfor træffes en særordning for sådanne styrmænd. Fölgende tre forslag til en særordning kunde overvejes:

1. Undervisning på Færöerne, men eksamen ved en dansk skole.
2. Undervisning på Færöerne og eksamination dér af en færösk eksamenskommission, der var suppleret med et medlem af den rigsdanske eksamenskommission.
3. Den færöske styrmandseksamen i forbindelse med senere forberedelse til skibsförereksamen ved en dansk skole og bestået af denne eksamen for den danske eksamenskommission.

Den förste lösning vilde formentlig vise sig uheldig derved, at de pågældende færinger i mange tilfælde ved eksaminationen vilde være hæmmet af sprogvanskeligheder.

Lösning nr. 2 vilde sikkert også være uhensigtsmæssig, dels som fölge af sprogvanskeligheder og dels på grundlag af de kompetencespörgsmål, der uden tvivl vilde rejse sig.

Derimod forekom den tredje lösning at være anvendelig, og det måtte herved erindres, at færöske styrmænd som regel alligevel tog den danske skibsförereksamen, inden de fik ansættelse i danske skibe. Ordningen måtte dog forudsætte en ændring i loven, der gav færöske styrmænd ret til at erhverve dansk sönæringsbevis efter bestået eksamen, og det måtte formentlig herved stilles som betingelse (også for optagelse i dansk skoles skibsförerklasse), at de sædvanlige krav med hensyn til fartstid, vandel, synspröve og alder var opfyldt. Endvidere måtte der tilvejebringes en vis sikkerhed for, at den færöske styrmandseksamen som grundlag for optagelse som elev i en skibsförerklasse var af tilsvarende kvalitet som en eksamen bestået ved de övrige skoler.

.....

..... oplyste, at sönæringslovens betingelser om sejlads i sejlskibe også her (i Danmark) voldte vanskeligheder, og at man havde indföet en fast dispensationspraksis. Det kunde også forventes, at den ny sönæringslov, der var under forberedelse i söfartskommissionen, vilde indföre radikale ændringer med hensyn til fartsbestemmelserne.

Det kunde imidlertid fastsläs, at de forslag fra kommissionens side, der til den tid vilde fremkomme, på ingen måde vilde indeholde bestemmelser, der kunde stille sig hindrende i vejen for gennemförelsen af den skitserede særordning for færöske skibsofficerer, der vilde söge ansættelse i danske skibe.

.....

..... forespurgte, om det var tanken, at de »mindre« færöske sönæringsbeviser skulde give umiddelbar adgang til at göre tjeneste i danske skibe.

.....

..... udtalte, at der formentlig kun i sjældne tilfælde blev tale om, at færinger med de mindre nautiske og maskinisteksaminer önskede at göre tjeneste i rigsdanske skibe, men i sådanne tilfælde måtte ordningen være den samme som foreslået med hensyn til erhvervelse af dansk sönæringsbevis som maskinmester eller styrmand.

.....

..... fandt, at det måtte betragtes som en selvfölge, at den ny ordning ikke bevirkede nogen gradsforskel mellem de eksaminer, der blev aflagt på Færöerne og i det egentlige kongerige.

Iövrigt kunde man spörge om, hvilke bestemmelser der skulde gælde for danske, der vilde göre tjeneste i færöske skibe. Her måtte formentlig gælde en ganske tilsvarende ordning således, at færösk sönæringsbevis måtte erhverves efter bestået eksamen på Færöerne.

.....

..... udtalte, at dette spörgsmål formentlig kunde overlades til færösk afgörelse i den kommende særlovgivning.

.....«

Nevndin heldur, at ein skipan, sum tann, ið er nevnd sum annar möguleikin undir samráðingunum í Keypmannahavn, var tann, sum flestir föroyingar vildu ynskt, og mátti hon beinan vegin kunnað tikið allar trupmlleikar viðvíkjandi rætti til danskt ella föroyskt starvsbræv burtur. Nevndin kann illa hugsa sær, at málsligir tvörleikar skuldi kunnað forðað prövtökuni, so leingi danskt eftir heimastýrislógini skal lærast væl og virðiliga í föroykum barnaskúla, og skuldi onkur næmingur ikki ynskt at vinna sær rætt til danskt starvsbræv, má tað standa honum frítt fyri, og hann kann taka prógv til föroyskt starvsbræv í staðin. Nevndin mælir tí tinginum til í fyrstu syftu at viðmæla hesa skipan og annars, um hon fæst ikki í lag, ta av ríkisstýrinum tilskilaðu skipan.

Frá handilsmálaráðharradeildini er bildið fram, at meðan tað er natúrligt, at læran til fiskiskipsprógv ikki nýtist at vera tann sama í Föroyum og í Danmark, tí veiðihættirnir og veiðiplássini eru so ymisk, er öðrvísi við farmasiglingarlærnni, og har vilja teir ikki góðtaka t. d. prógv til stýrimannsigling við minni lærdómi og öðrum treytum, enn teir hava sjálvir. Um föroyskt stýrimannaprógv tí skal kunna verða góðtikið til danskt starvsbræv, sum Föroyingar yvirhövur ynskja, má danska sjómannalærustjórnin fáa kunnleika til virðið av sjómannalæruprövtökuni (fyrst og fremst stýrimannsprógvtökuni) her og kann gerast kunnug við lærukröv, yvirhoyringarhátt og dómsstrangleikan á Föroya Sjómannasskúla. Hetta heldur nevndin vera rímiligt krav og mælir tinginum til at biðja landsstýrið venda sær

til ríkisstýrið og biðja um, at maður verður sendur higar at kanna dygdina av prøvtøkuni á sjómannaskúlanum, og at føroyskur prøvdómari fær høvi at gera seg kunnugan við dómsstrangleikan, sum hann er nú við prøvtøku í siglingarlæru í donskum siglingarlæruskúlum.

Viðvíkjandi teimum, sum hava tikið stýrimannsprógv ella maskinistprógv í Føroyum higartil, mælir nevndin til at fáa semju um, at starvsbrævi, galdandi bæði í Føroyum og Danmark, skal kunna fáast uppá prógv, sum tikin eru í seinasta lagi í ár, uttan mun til, hvussu skipanin verður eftir 1. januar 1952. Av tí at tingsstarvið í ár hevur verið so ógviliga nógv tarnað av teim nógvu kanningum og fyrireikingum, sum vinnu- og peningakreppan hevur fört við sær, mælir nevndin til at biðja um, at hesum prógvum viðvíkjandi verður freistin fyri at skula hava fingið sær starvsbrævi sett til 1. juni 1952.

Út frá tí frammanundan framførda setur nevndin fram hetta

uppskot.

Út frá samráðingunum í summar í samanhangi við yvirtøkuna av siglingarmálum og sjóvinnumálum til sermál úttalar løgtingið, at í Føroyum hevur heimastýrisskipanin verið fatað sum ein vilji bæði frá føroyskari og danskari síðu til hvør at koma øðrum á møti og fata hvønn annan út frá tí viðurkenning av tjóðskapareyðkennum, sum nýskipanin byggir á. Tí hevur bæði verið vónað og litið á, at eisini eftir tað, heimastýrisskipanin er komin í gildi, kundi haldast fram samstarv og samrættindi í sjóvinnumálum, um tey so eru sermál, og at tað fór at vera møguligt í góðviljaður samstarvi at uppihalda ella góðtaka virðið av teim núverandi og framtíðarligu prøvtøkunum í sjóvinnuligum felagsskapi. Hetta varð hildið at vera lætt gjört, um so Føroyar tóku sær uppá rakstur sjómannaskúlans, prøvtøkuskipanina og sjálva prøvtøkuna, tá ið lögd varð sama kós sum við danskari prøvtøku og prøvdømingini, sum hon fer fram frá ríkisdonsku prøvtøkunevndini, og um tryggjandi kunnleiki til hesi viðurskifti fekst við gott samstarv.

Vísandi til grein 10 í heimastýrislógini, sum fyrisetur, at útum tað, sum møguliga kann verða fyriskipað viðvíkjandi vali til almennar stovnar undir heimastýrinum, at valrætturin kann verða treytaður av føstum bústað í Føroyum, má hvørki í lóggávu ella í umsiting verða gjørdur munur á Føroyingum og øðrum donskum ríkisborgarum, verður úttalað ynski um, at íbirt verður tað neyðuga samstarv til at vinna eins rættindir í nýtsluni av sjóvinnustarvsprógvum, sum verða fingin aftaná prøvtøku á donskum og føroyskum sjómannaskúlum.

Tí verður skotið upp, at fyrisett verður tann skipan, sum stýrimannaprógvi viðvíkjandi undir samráðingunum í summar varð skotin upp sum nr. 2: skúlagond í Føroyum og prøvtøka har fyri føroyskari prøvtøkunevnd, sum er víðkað um við einum limi úr donsku prøvtøkunevndini, og verður til

ta fyrru atfinning at hesari skipan — málsligir trupulleikar — at siga, at eftir heimastýrislógini verður jú kravt, at danskt mál verður lært væl og virðiliga í föroyskum barnaskúla, og viðvíkjandi aðru atfinning — möguligur dráttur um myndugleika — verður hildið, at slíkum man kunna komast undan, tá ið skipanin er so nógv eftirynskt av Föroyingum, ikki minst av ungum sjómonnum. Stýrimannaprógv, sum er tikið her eftir skúlagongd í Föroyum og dömt av föroysku prövtökunevndini, skuldi á tann hátt veitt rætt til ríkisdanskt sjóvinnu-starvsbrev, tá ið viðkað er um hana við einum limi úr dansku prövtökunevndini.

Föroyskt hevur nú í rættiliga langa tíð verið lærugrein til realprógv, preliminerprógv og studentsprógv her út um tær somu lærugreinir og tey somu lærukröv, sum verða kravd til hesi prógv í ríkisdonskum skúlum. Tey seinastu árini hevur föroyskt verið lærugrein til öll onnur prógv, ið verða tikin her, eisini siglingarlæruprógv og prógvini bundin til maskinlæruna, uttan so at lætt er um krövini í hinum lærugreinunum. Tað er tingsins vón, at tann vælvild, sum er víst við viðvarandi at góðtaka virðið av hesum prógvum uttan fyri Föroyar, eftir at Föroyskt er komið uppí lærugreinirnar, verður eisini víst viðvíkjandi stýrimannsprógvi og maskinlæruprógvum.

Av tí henda skipan (nr. 2), hóast hon undir samráðingunum í summar varð skotin til viks, til fulnar er út frá andanum í heimastýrislógini, er tað tingsins vón, at hon fæst í lag, og at vælvilji og samstarv verður lagt til grundarlag undir virðismetanini í framtíðini av arbeiðinum í sjóvinnuskúlunum í Föroyum og í Danmark.

Viðvíkjandi teimum stýrimannaprógvum og maskinlæruprógvum, sum tikin eru á Föroya Sjómannaskúla í bardagatíðini og seinni uttanum ríkisdonsku prövtökunevndina, men í góðari trúgv, at tey fóru at veita rætt til ríkisdonsku sjóvinnustarvbröv, og varð tí veruliga roynt at halda uppi somu lærukrövum og sama dómsstrangleika sum fyri bardagan — verður biðið um, at tey verða viðurkend til at kunna veita ríkisdonsk starvsbröv, og at somuleiðis má vera við skipsföraraprógvum, sum eru tikin á donskum skúla við stýrimannaprógvi tiknum í Föroyum sum grundarlag, tá ið annars allar aðrar treytir viðvíkjandi siglingartíð, umdömi og sjónarprógvi eru loknar.

Av tí at lögtingsarbeiðið vegna tvingandi umstöður hevur verið ógviliga nógv tarnað í summar og í heyst, hevur málið ikki kunnað verið viðgjört so skjótt, sum eftirynskjandi var, og skotið verður tí upp, at skiftidagurin fyri endaliga skipan, sum undir samráðingunum í summar var borin uppá mál at skulla vera 31. december 1951, verður skotin út til 1. marts 1952, við tað at prövtökan á sjómannaskúlanum her verður ikki lokin fyrr enn inn í marts mánað 1952.

Minniluuálit (frá Danbjörg)

Minnilutin (Danbjörg) er av teirri áskoðan, at tað ræður um at fáa hetta mál í rætt lag beinan vegin.

Her á landi er ikki og verður neyvan tey fyrstu árini arbeiði fyri öll-

um teim monnum, sum hava tikið ella taka prógv við föroysku navigatiónsskúlarnar, og tí ræður um at fáa samráðingar við donsku myndugleikarnar so skjótt sum gjörligt við tí fyri eyga at fáa tað skipað soleiðis, at menn við prógvi frá föroysku navigatiónsskúlunum kunnu fáa rætt at sigla sum yvirmenn við donskum skipum.

Best var, um somu tingingar fóru fram við aðrar norðurlandatjóðir eisini, men fyrst og fremst við danskar myndugleikar, og sambært hesum setur minnilutin fram hetta

uppskot.

Tingið viðtekur at velja eina 3-mannanevnd til at samráðast við danskar myndugleikar so skjótt sum gjörligt við tí fyri eyga at fáa teim monnum, sum taka ella hava tikið prógv við föroysku navigatiónsskúlarnar, sama rætt at sigla sum yvirmenn við donskum skipum, sum teir hava, ið hava tikið ella taka prógv á donskum navigatiónsskúlum.

2. viðgerð 20. desember 1951.

Minnilutauppskotið fall 6—0.

Uppskot meirilutans samtykt 23—0.

---

32. Civilverja.

1951, 30. oktober, legði lögmaður fram soljóðandi framlöguskriv

Í lögtingsmáli nr. 12/1950: Civilverja varð fylgjandi samtykt:

»Lögtingið biður landsstýrið beinan vegin fara undir at fáa tilvegar upplýsing um, hvörji tiltök sakkönir menn halda Föroyingar eiga at fara undir longu nú í spurninginum: Civilverju, og síðani föra samráðingar við fíggjarnevndina um spurningin. Um útreiðslur, t. d. til ferðir, skulu standast av hesum, er landsstýrið eftir samráð við fíggjarnevndina heimilað at ávísa hetta í treysti til, at tað verður játtað á komandi fíggjarlóg 1951/52.«

Sum samtykt kannaði landsstýrið möguleikarnar fyri sakköknari hjálp í hesum spurningi og vendi sær til ríkisstýrið.

Ríkisstýrið hevur so biðið Arthur Dahl, civilverjustjóra, um at vera heimastýrinum til hjálpar í hesum máli. Civilverjustjórin er í lötunj í Föroyum og vil fegin geva háttvirda lögtingi munnliga frágreiðing.

Landsstýrið mælir til, at civilverjustjórin fær hövi til at greiða frá málinum, og at tað síðani verður sett serlig nevnd til gjölla viðgerð av spurninginum.

Í viðgerð 3. november 1951 og 13. mars 1952 legði fíggjarnevndin fram soljóðani

Álit.

Tann 1. apríl 1949 varð fyri Danmark sett í gildi lög nr. 152 um sivilverju.

Í grein 45 verður sagt, at hon ikki er galdandi fyri Föroyar, men broytt til at hóska til föroysk viðurskifti, kann hon við kgl. fyriskipan setast í gildi fyri Föroyar.

Fíggjarnevndin, ið viðgjört hevur málið og broytt lógina soleiðis, at hon er hóskandi fyri okkara viðurskifti, setur fram hetta

Uppskot.

Löglingið samtykkir, at lógin í hesum skapi verður gjörd galdandi fyri Föroyar.

Anordning

hvorved lov nr. 152 af 1. april 1949 om civilforsvaret sættes i kraft på Færöerne.

I henhold til den regeringen ved § 45 i lov nr. 152 af 1. april 1949 givne bemyndigelse sættes herved nævnte lov i kraft på Færöerne i følgende skikkelse.

Kapitel 1. CENTRALSTYRELSEN

§ 1.

Det er civilforsvarets opgave at træffe foranstaltninger til at forebygge og afböde fölger af krigshandlinger, i det omfang, disse foranstaltninger ikke henhörer under de militære værn.

§ 2.

Stk. 1. De i § 1 omhandlede opgaver varetages under indenrigsministeriet, der udöver sine beföjelser gennem chefen for civilforsvarsstyrelsen. Efter indenrigsministerens bestemmelse varetages civilforsvarets sanitettjeneste helt eller delvis af sundhedsstyrelsen.

Stk.2. Det påhviler chefen for civilforsvarsstyrelsen at organisere og opretholde de statslige civilforsvarsforanstaltninger, herunder de offentlige beskyttelsesrum, samt i det hele at forestå landets civilforsvar efter nærmere af indenrigsministeren givne retningslinier.

Stk. 3. De kommunale civilforsvarsforanstaltninger organiseres og opretholdes af de i § 10 omhandlede civilforsvarskommissioner i overensstemmelse med de af indenrigsministeren fastsatte retningslinier.

§ 3.

Indenrigsministeren, landsfogeden eller civilforsvarskommissionen er bemyndiget til såvel hos offentlige myndigheder som hos private personer og virksomheder at kræve oplysninger om, hvilke civilforsvarsforanstaltninger der er truffet eller agtes udfört, samt iövrigt sådanne oplysninger, som skönnes nödvendige til lösning af spörgsmål, der står i forbindelse med civilforsvaret.

§ 4.

Stk. 1. Forsåvidt udförelsen af de i denne lov omhandlede foranstaltninger m. v. berörer en anden ministers eller landsstyrets sagområde, træffes de nærmere bestemmelser efter forhandlingr med disse myndigheder.

Stk. 2. Indenrigsministeren kan med en anden minister eller landsstyret træffe aftale om, at visse foranstaltninger træffes af disse myndigheder.

§ 5.

Stk. 1. Til bistand ved gennemförelsen af denne lov nedsætter indenrigsministeren med chefen for civilforsvarsstyrelsen som formand et civilfor-

svarsråd bestående af sagkyndige fra politi, brandvæsen og sundhedsvæsen, sagkyndige i tekniske spörgsmål samt repræsentanter for indenrigsministeriet, kommunerne, de militære værn og sådanne frivillige organisationer, som indenrigsministeren har truffet aftale med, samt i fornödent omfang for de i § 4 omhandlede ministerier. Til behandling af spörgsmål vedrörende civilforsvarsforanstaltninger på Færöerne tiltrædes civilforsvarsrådet af en repræsentant udpeget af det færöske landsstyre.

Stk. 2. De nærmere regler for rådets virksomhed fastsættes af indenrigsministeren.

Kapitel II.

DET LOKALE CIVILFORSVAR

§ 6.

Landfogeden på Færöerne (politimesteren) er civilforsvarschef.

§ 7.

Stk. 1. Det påhviler civilforsvarschefen efter nærmere af indenrigsministeren og efter samråd men landsstyret givne retningslinier at varetage följende opgaver:

1) Evakuering,
2) varsling af civilbefolkningen,
3) tilsyn med bedriftværn (§ 19) udenfor civilforsvarsområderne,
4) tilsyn med frivilligordninger udenfor civiforsvarsområderne,
5) udrömning af befolkningen i tilfælde af bombeskader o. l.,
6) afspærring,
7) bevogtning,
8) den til disse opgavers lösning fornödne meldingstjeneste, samt
9) andre opgaver efter indenrigsministerens nærmere bestemmelse efter samråd med landsstyret.

Stk. 2. De i stk. 1 nr. 3 og 4 omhandlede bedriftsværn og frivilligordninger står i katastrofetilfælde under civilforsvarschefens ledelse.

§ 8.

Det påhviler enhver kommune at medvirke ved tilrettelæggelsen af en evakuerings- og indkvarteringsordning i overensstemmelse med de herom gældende regler.

§ 9.

Stk. 1. Enhver köbstad udgör et civilforsvarsområde.

Stk. 2. Andre bymæssigt bebyggede områder kan af landsstyret udpeges til civilforsvarsområder.

Stk.3. Såfremt det på grund af det bebyggede områdes udstrækning skönnes hensigtsmæssigt, kan landsstyret bestemme, at et civilforsvarsområde kal omfatte flere kommuner eller dele deraf.

§ 10.

Stk. 1. I hvert civilforsvarsområde nedsætter kommunalbestyrelsen en civilforsvarskommission bestående af följende medlemmer:

Byrådsformanden (forstanderskabsformanden), formand,
civilforsvarschefen, udenfor Thorshavn vedkommende sysselmand eller sognefogden i Våg på landfogdens vegne,
den daglige leder af hjælpetjenesten m. v. (§ 12, stk. 2),
2 medlemmer udpeget af kommunalbestyrelsen,
indtil 2 medlemmer udpeget af sådanne frivillige organisationer, med hvilke landsstyret måtte have truffet aftale, jfr. § 26.

Stk. 2. Såfremt civilforsvarsområdet omfatter flere kommuner eller dele deraf, nedsætter kommissionen af kommunalbestyrelsen i den efter folketal störste kommune i området, men der udpeges da yderligere en repræsentant til kommissionen af kommunalbestyrelsen i den anden kommune, eller, hvis der i området indgår mere end 2 kommuner eller dele deraf, af de andre kommuner i forening.

Stk. 3. Omfatter civilforsvarsområdet udelukkende landskommuner, udpeger kommunerne i forening den af forstanderskabsformændene, der skal være formand, samt udpeger endvidere et medlem for hver af de kommuner, hvoraf civilforsvarsområdet består. I tilfælde af at kommunerne ikke kan blive enige om at udpege formanden, udpeges denne af landsstyret.

§ 11.

Det påhviler civilforsvarskommissionen efter nærmere af indenrigsministeren efter samråd med landsstyret givne retningslinier at varetage följende opgaver:

1) Organisering af hjælpetjenesten. Det påhviler herunder kommissionen i fredstid bl. a. at organisere og opretholde enkelte eller flere af följende opgaver: En brandtjeneste, en teknisk tjeneste og rydningstjeneste, en sanitetstjeneste, en socialtjeneste og en beskyttelse af kommunale livs-

vigtige virksomheder, alt i et sådant omfang, at disse tjenestegrene med hjælp af frivillige er i stand til inden for området, dels at afböde följerne af krigshandlinger af begrænset omfang, dels at yde öjeblikkelig indsats ved mere omfattende krigsskader,

2) tilsyn med bedriftværnene,
3) tilsyn med den frivillige egenbeskyttelse (karréværn, villaværn o. l.)
4) den til disse opgavers lösning fornödne meldingstjeneste,
5) de offentlige beskyttelsesrum, jfr. § 13, stk. 1,
6) reservevandforsyningstjenesten, samt
7) andre opgaver efter landsstyrets nærmere bestemmelse.

§ 12.

Stk. 1. Hjælpetjenesten, bedriftværnene og den frivillige egenbeskyttelse, jfr. § 11 nr. 1—3 ledes i katastrofetilfælde af civilforsvarskommissionens formand.

Stk. 2. Civilforsvarskommissionens formand udpeger en i kommunens tjeneste ansat person — eller med landsstyrets samtykke, en anden dertil egnet person — til at varetage den daglige ledelse af de i § 11 omhandlede opgaver.

§ 13.

Stk. 1. Samtlige udgifter ved de i § 7 omhandlede foranstaltninger samt ved de offentlige beskyttelsesrum, jfr. § 11, nr. 5, afholdes af staten, der ligeledes bærer samtlige udgifter ved etablering og anskaffelser til sanitetstjenesten, gas- og fosfortjenesten og reservevandforsyningstjenesten, jfr. § 11, nr. 1 og 6, samt udgifterne ved den i § 11 nr. 4 omhandlede meldingstjeneste.

Stk. 2. Indenrigsministeren bestemmer med tilslutning fra begge rigsdagens finansudvalg, i hvilket omfang staten deltager i udgifterne ved de andre i § 11 omhandlede foranstaltninger. Udgifterne ved disse påhviler iövrigt vedkommende kommuner.

§ 14.

Stk. 1. Det påhviler samtlige sygehuse at forberede og gennemföre sådanne foranstaltninger, at de er i stand til under krigsforhold efter foretagelse af de fornödne sikringsforanstaltninger at modtage og behandle syge og tilskadekomne samt til at yde gensidig bistand og til at deltage i driften af hjælpesygehuse. De nærmere regler herfor fastsættes af indenrigsministeren.

Stk. 2. Udgifter til foranstaltninger, der efter påbæg af sundhedsstyrelsen eller chefen for civilforsvarsstyrelsen træffes udelukkende til opfyldelse af bestemmelserne i stk. 1 af staten efter nærmere af indenrigsministeren med tilslutning af begge rigsdagens finansudvalg givne regler.

§ 15.

Stk. 1. Det påhviler civilforsvarschefen, civilforsvarskommissionerne, samtlige kommuner og sygehuse i nærmere af chefen for civilforsvarsstyrelsen fastsat omfang at forunstalte övelser med civilforsvaret.

Stk. 2. Indenrigsministeren bestemmer med tilslutning fra begge rigsdagens finansudvalg, i hvilket omfang staten deltager i udgifter ved de i stk. 1 omhandlede övelser.

§ 16.

Stk. 1. Staten afholder samtli ge udgifter til aflönning af personale under civilforsvaret — herunder den kommunale hjælpetjeneste —, bortset fra kommunalt ansat personale, hvis funktioner i civilforsvaret helt eller delvis falder inden for dere normale tjenesteområde.

Stk. 2. Indenrigsministeren træffer med tilslutning af rigsdagens finansudvalg beslutning om, hvorvidt aflönning skal ske og efter hvilke nærmere regler.

Kapitel IV. ALMINDELIGE BESTEMMELSER

§ 17.

Enhver her på Færöerne bosat person er fra og med det kalenderår, i hvilket han fylder 16 år, til og med det kalenderår, i hvilket han fylder 65 år, pligtig at forrette tjeneste indenfor civilforsvaret (civilforsvarspligtig). De nærmere regler herfor fastsættes ved kgl. anordning. Civilforsvarspligten kan ikke göres effektiv, forinden der foreligger efter forud indhentet beslutning herom af Færöernes hjemmestyre.

§ 18.

Personer, der som tjenestemænd eller på anden måde er beskæftiget i statens, landsstyrets eller kommunens tjeneste eller i koncessionerede virksomheder, er pligtige at udföre de opgaver, som måtte blive dem pålagt til gennemförelse af civilforsvarsforanstaltninger.

§ 19.

Stk. 1. Det påhviler enhver offentlig og privat virksomhed, der indenfor et samlet område beskæftiger mindst 75 personer, efter nærmere af indenrigsministeren fastsatte regler at træffe foranstaltninger til virksomhedens beskyttelse under krigsforhold (bedriftværn). Den herved tilvejebragte hjælpetjeneste m. v. skal være således beskaffen, at virksomheden ved egen hjælpemidler umiddelbart kan bekæmpe virkningerne af begrænsede krigsskader.

Stk. 2. Landsstyret kan helt eller delvis fritage de nævnte virksomheder for at gennemföre de omhandlede foranstaltninger, ligesom landsstyret, hvor det på grund af forholdene skönnes påkrævet, kan bestemme, at bedriftværnsforanstaltninger skal gennemföres også i andre virksomheder end de i stk. 1 omhandlede.

§ 20.

Stk. 1. Landsstyret bemyndiges til at bestemme, at der i områder med tættere bebyggelse indenfor civilforsvarsområderne skal træffes foranstaltninger til egenbeskyttelse under krigsforhold (karréværn). Indenfor disse områder, hvis grænser fastsættes af landsstyret, påhviler der vedkommende bygningers ejere efter nærmere af indenrigsministeren fatsatte regler at tilrettelægge en hjælpetjeneste, således at beboerne selv umiddlbart kan bekæmpe virkningerne af begrænsede krigsskader.

Stk. 2. Landsstyret kan pålægge ejerne at anskaffe håndkraftsspröjte og andet nödvendigt materiel og kan om fornödent lade dette anskaffe for ejernes regning. Hvor et karréværn omfatter flere ejendomme, fordeler civilforsvarskommissionen udgifterne mellem de pågældende ejere. Beløbene kan inddrives ved udpantning. Med tilslutning fra begge rigsdagens finansudvalg kan indenrigsministeren dog bestemme, at staten helt eller delvis afholder udgifter ved anskaffelse af håndkraftspröjter og lignende materiel.

§ 21.

Stk. 1 Borgerne er pligtige med fuld erstatning at stille deres ejendom til rådighed for civilforsvaret.

Stk. 2. Indenrigsministeren fastsætter de nærmere regler for den i stk. 1 omhandlede overdragelse.

Stk. 3 Erstatningen fastsættes i mangel af mindelig overenskomst af en vurderingskommission, bestående af 3 medlemmer, nemlig sorenskriveren (dommeren) på Færöerne eller en af ham beskikket person, der opfylder betingelserne efter retsplejeloven for at beskikkes til dommer, som formand, et af indenrigsministeren udnævnt medlem samt et af vedkommende kommunalbestyrelse udnævnt medlem. Indenrigsministeren fastsætter de nærmere regler for vurderingskommissionernes virksomhed og omkostningerne herved.

Stk. 4. Vurderingskommissionens afgörelse kan af hver af parterne inden 6 uger indbringes for det i stk. 5 omhandlede vurderingsnævn.

Stk. 5. Vurderingsnævnet består af en af kongen udnævnt formand, der skal opfylde de i retsplejeloven foreskrevne betingelser for at beskikke til landsdommer, og 4 af indenrigsministeren udpegede medlemmer. Indenrigs-

ministeren fastsættes de nærmere regler for nævnets virksomhed og omkostningerne herved. Nævnets afgörelse er endelig.

Stk. 6. Bestemmelserne i stk. 1—3 kan om fornödent anvendes også med hensyn til rekvisition af befordringsmidler.

§ 22.

Stk. 1. Personel og materiel fra et civilforsvarsområdes hjælpetjeneste, jfr. § 11, kan, når forholdene gör det påkrævet, efter nærmere af landsstyret fastsatte regler kræves stillet til rådighed udenfor hjemstedskommunen.

Stk. 2. De herved forvoldte direkte udgifter afholdes af den myndighed, for hvilken det pågældende materiel og personel stilles til rådighed, dog at der i særlige tilfælde efter indenrigsministerens bestemmelse vil kunne ydes tilskud fra statskassen til disse udgifter. Indenrigsminiteren bemyndiges til at fastsætte nærmere regler for betalingen af de heromhandlede ydelser.

§ 23.

Stk. 1. Borgerne er pligtige at rette sig efter de påbud, som vedkommende myndighederne måtte udstede med henblik på civilforsvaret, herunder vedrörende dettes överlser.

Stk. 2. Det påhviler i katastrofetilfælde enhver på forlangende af civilforsvaret at yde hjælp til afværgelse og afhjælpning af skader, som han måtte være i stand til.

Stk. 3. Borgerne er ved ordre om evakuering pligtige til indenfor de givne frister at forlade hjemstedet og begive sig ad den anviste vej til de udpegede indkvarteringsområder. Borgerne er pligtige at stille deres boliger eller andre lokaler til rådighed for de evakuerede og om fornödent at yde dem bespisning. Indenrigsministeren fastsætter, hvilken godtgörelse der skal ydes herfor.

§ 24.

Stk. 1. Ved ordre til mörklægning er borgerne pligtige ufortövet at gennemföre denne i det af myndighederne angivne omfang.

Stk. 2. Det påhviler borgerne på egen bekostning at anskaffe og anbringe fornödent mörklægningsmateriel.

Stk. 3. Ansvaret for gennemförelsen af mörklægning påhviler den, der som ejer, lejer eller bruger har rådighed over den pågældende lyskilde.

§ 25.

Indenrigsministeren bemyndiges til at påbyde kontrol med i kongeriget Danmark eller fra udlandet indförte genstande eller midler bestemte til anvendelse i civilforsvarsöjemed samt til at foreskrive nærmere regler for og om fornödent udstede forbud mod handel og reklamering af sädanne midler.

§ 26.

Stk. 1. Landsstyret kan med organisationer og private personer træffe aftale om, at der overdrages dem opgaver, som står i forbindelse med nærværende lovs formål.

Stk. 2. Foreninger og organisationer, hvis virksomhed vedrörer lösningen af de i denne lov omhandlede opgaver, står i det omfang, i hvilket dette er tilfældet, under tilsyn af landsstyret og skal efterkomme de bestemmelser, der i så henseende måtte blive truffet.

§ 27.

Uberettiget benyttelse af civilforsvarets signaler eller benyttelse af signaler, der har en sådan lighed med disse, at en forveksling kan finde sted, straffes med böde eller hæfte. Under særlige forhold kan straffen stige til fængsel i indtil 2 år. Sagerne behandles som politisager.

§ 28.

Stk. 1. Overtrædelse af nærværende lov iövrigt samt overtrædelse af forbud eller undladelse af at efterkomme påbud, udstedt i medför af loven, straffes med böde eller hæfte, forsåvidt forholdet ikke efter sin beskaffenhed medförer höjere straf efter den övrige lovgivning.

Stk. 2. Under særlige forhold kan straffen stige til fængsel i indtil 2 år.

Stk. 3. Sagerne behandles som politisager.

§ 29.

Samtidig hermed ophæves lov nr. 180 af 29. april 1938 om beskyttelse af civilbefolkningen mod fölgerne af luftangreb.

2. viðgerð 14. mars 1952.

Formaðurin legði fram soljóðandi

Uppskot (frá tjóðveldisflokkinum):

Föroya lögting vísir frá sær uppskot fíggjarnevndarinnar um at seta danska lóg nr. 152 dagfesta 1. apríl 1949 om civilforsvaret í gildi í Föroyum.

Föroya lögting viðurkennir einki danskt sivilverjuligt ella hernaðarligt vald í Föroyum.

Föroya lögting samtykkir at skipa skaða- og sjúkrahjálp og aðrar hjálpartænastur til at böta um skaðar ið koma kunna í bardagatíð.

Landsstýrið ger fyri hesar hjálpartænastur fyriskipan, ið verður lögd fyri tingið til samtyktar.

3. viðgerð 24. mars 1952.

Uppskot tjóðveldisflokksins var sett undir atkvöðu við navnakalli.

Ja atkvöddu: Hanus við Högadalsá.

Atkvöddu ikki: J. H. Danbjörg, Jens Chr. Olsen, P. Petersen, S. P. Zachariasen, M. Holm, Øregaard, Kallsoy, Johan Poulsen, A. Djurhuus, J. P. Davidsen, H. Iversen, S. Ellefsen, J. P. Henriksen, E. Waag, Fr. Bláhamar, R. Long, Th. Petersen, S. Danielsen og H. Djurhuus.

Burtur: O. F. Joensen, P. M. Dam, Tr. Samuelsen, A. Sörensen og D. P. Danielsen.

Uppskotið fall 1—0.

Uppskot nevndarinnar samtykt 18—1.

---

33. Løgtingslóg um avtøku av feskfiskagjaldi v. m.

1951, 3. november legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 2. november:

Uppskot til Lögtingslóg um avtöku av feskfiskagjaldi v. m.	*Forslag til lagtingslov om ophævelse af ferskfiskeafgift m. v.*
gr. 1.	§ 1.
Kunngerð nr. 27 frá 24. juli 1944, broytt við kunngerð nr. 34 frá 19. desember 1947 um feskfiskasölu v. m. verður avtikin.	Kundgörelse nr. 27 af 24. juli 1944, ændret ved kundgörelse nr. 34 af 19. december 1947 om afgift ved ferskfiskesalg m. v. ophæves.

gr. 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir kunngerð nr. 27 frá 24. juli 1944, broytt við kunngerð nr. 34 frá 19. desember 1947, skulu öll skip undir 100 br. reg. tons rinda kr. 112 og skip yvir 100 br. reg. tons kr. 224 av hvörjari landing av feskum fiski í Bretlandi ella av öðrum útfluttningi um mánaðin (smbr. gr. 1 og 3).

Hetta gjald skal eftir gr. 1 leggjast í grunn, sum bera skuldi útreiðslurnar av vinnulívs sendimonnum í Íslandi og Bretlandi.

Eftir uppgávu frá Föroya gjaldstovu hevur hetta gjaldd givið í fíggjarárinum 1950/51 kr. 66.563,29 og í verandi fíggjarári pr. 23. oktober um kr . 20.000,00, meðan eftirstöðurnar pr. 5. oktober 1951 vóru kr. 48.806,00.

Sum tað sæst hevur hetta gjaldið iki so stóran fíggjarligan týdning, men tykist afturímóti at darva hesa vinnu, sum frammanundan er nógv ovbyrjað av dýrum útgerðarvörum.

Landsstýrið loyvir sær so statt at mæla tinginum at leggja hetta gjald niður, við hvussu er fyri fyrst, og setur fram lógaruppskot samsvarandi.

Nevndarálit

Fíggjarnevndini stendur tað greitt, at tað er hættisligt at taka inntökulógir av í hesum ringu tíðum, men aftaná gjöllari umhugsan og frágreiðing frá gjaldstovuni kom nevndin á samt um, at vinningurin — kr. 40.000. — um árið — er ivasamur, og at mæla tinginum til at samtykkja landsstýrisins uppskot við tað broyting, at gjaldið verður avlikið 1. oktober 1951 og eftirstöðurnar til 1. oktober verða innheimtaðar. Setur tí fíggjarnevndin fram hetta

Broytingaruppskot

til landsstýrisins uppskot:

Til gr. 2 aftaná »beinanvegin« og »straks« verður sett: »Gjaldið verður ikki kravt av skipum, sum landa aftaná 1. oktober 1951«. »Afgiften bliver ikke afkrævet skibe, der lander deres fangst efter 1. oktober 1951«.

2. viðgerð 10. november og 3. viðgerð 16. november 1951.

Uppskot landsstýrisins *samtykt 18—0.*

34. Kommunalur jarðaskattur.

1951, 5. november legði lögmaður fram soljóðandi uppskot við viðmerkingum:

Í lögtingssetuni 1948 var til viðgerðar uppskot til kommunalan jarðaskatt fyri tíðarskeiðið 1949/51 (lögtingsmál nr. 21/1948).

Undir viðgerðini helt kommunala nevndin fram, at tíðirnar vóru so broyttar nú, at hóskandi hevði verið at tikið av jarðaskattin við tað, at jörðin veruliga bar trídupultan skatt og heitti á landsstýrið at senda bræv til kommunurnar fyri at fáa at vita, um tær vóru sinnaðar at taka henda jarðaskattin av, og síðan leggja málið aftur fyri tingið.

Tann 23. september 1948 sendi landsstýrið skriv til allar kommunurnar við fyrispurningi um stöðu teirra til avtöku av jarðaskattinum. Svar er komið frá 42 kommunum, harav 19 eru fyri avtöku, meðan 23 eru ímóti; hinar hava ikki svarað.

Tá jarðaskatturin er ógvuliga ójavnur í teim ymisku kommununum — hann liggur frá 2,25 kr. til út við 100,00 kr. á hvörjari skattamörk — sendi landsstýrið aftur kommununum skriv tann 4. juni 1951 við fyrispurningi, líkindi hevði verið til, at jarðaskatturin var roknaður sum fast gjald á hvörja skattamörk, eins í öllum kommunum, og var skotið uppá einar 16,00 kr., sum seinasta ár var meðalgjaldið.

Higartil hava 28 kommunur svarað á henda fyrispurning, og eru av hesum 9, sum halda fast við gomlu skipanina, meðan hinar eru ógvuliga ójavnar í uppskoti teirra til tað fasta gjaldið, og liggur hetta í flestu förum um leið á somu hædd sum eftir gomlu skipanini.

Tá soleiðis liggur fyri, og nýggj skattalóg liggur hjá tinginum, har hesin skattur eisini er viðgjördur, heldur landsstýrið beinast vera at lata jarðskattin standa við nakað enn, og lata tær gomlu reglurnar framvegis vera galdandi og möguliga broyting stöðga, til nýggja skattalógin verður viðgjörd.

Landsstýrið vil halda, at avgerðin, um hvussu stórur partur av skattinum skal álíknast jörðini og hvussu stórur partur eftir ogn og förimuni, eftir heimastýrisskipanini liggur hjá landsstýrinum. Nú hevur lögtingið tó álagt landsstýrinum at leggja málið aftur fyri lögtingið, tá kommunurnar vóru spurdar, og skal tí verða lagt aftrat, at bert einstakar kommunur hava sett fram uppskot um, hvussu stórur partur av skattinum skal verða álíknaður jörðini. Eftir teim uppskotum, sum innkomin eru og teimum býtingartölum, sum kommunurnar hava nýtt seinasta ár, er tí her sett uppskot til sundurbýtingina av jarðaskattinum og inntökuskattinum fyri tíðarskeiðið 1952/54, og er landsstýrið sinnað til, um lögtingið ikki setur seg ímóti hesum, fyri komandi 3 árini at fastseta sundurbýtingina eftir hesum uppskoti.

	Sóknar kommuna	Galdandi 1949/51		Stig 1952/54	
		Markatal	Inntøku	Markatal	Inntøku
1.	Fugloyar	1/30	29/30	1/30	29/30
2.	Svínoyar	3/100	97/100	3/100	97/100
3.	Viðoyar	1/30	29/30	1/30	29/30
4.	Klakksvíkar	1/300	299/300	1/300	299/300
5.	Kunoyar	1/15	14/15	1/50	49/50
6.	Mikladals	1/20	19/20	1/20	19/20
7.	Húsa	1/100	99/100	1/100	99/100
8.	Elduvíkar	1/20	19/20	1/20	19/20
9.	Oyndarfjarðar	1/20	19/20	1/50	49/50
10.	Fuglafjarðar	1/100	99/100	1/100	99/100
11.	Lorvíkar	1/80	79/80	1/80	79/80
12.	Götu	1/35	34/35	1/35	34/35
13.	Nes	1/50	49/50	1/200	199/200
14.	Sjóar	1/40	39/40	1/75	74/75
15.	Sunda	1/40	39/40	1/40	39/40
16.	Eiðis	1/28	27/28	1/28	27/28
17.	Gjáar	1/25	24/25	1/25	24/25
18.	Funnings	1/15	14/15	1/15	14/15
19.	Haldórsvíkar	1/17	16/17	1/17	16/17
20.	Saksunar	1/10	9/10	1/10	9/10
21.	Hvalvíkar	1/70	69/70	1/70	69/70
22.	Kollafjarðar	1/50	49/50	1/50	49/50
23.	Kvívíkar	1/50	49/50	1/50	49/50
24.	Vestmanna	1/50	49/50	1/80	79/80
25.	Kaldbaks	1/50	49/50	1/50	49/50
26.	Havnar uttanb.	1/50	49/50	1/50	49/50
27.	Kirkjuböar	1/10	9/10	1/10	9/10
28.	Hests	1/15	14/15	1/15	14/15
29.	Nólsoyar	1/25	24/25	1/60	59/60
30.	Sandavágs	1/75	74/75	1/75	74/75
31.	Miðvágs	1/25	24/25	1/25	24/25
32.	Sörvágs (1939)	1/20	19/20	1/200	199/200
33.	Bíggjar	1/50	49/50	1/50	49/50
34.	Mikines	1/20	19/20	1/20	19/20
35.	Sands	1/40	39/40	1/40	39/40
36.	Skopunar	2½ %	97½ %	1/40	39/40
37.	Skálavíkar	1/20	19/20	1/20	19/20
38.	Húsavíkar	1/20	19/20	1/20	19/20
39.	Skúvoyar	1/10	9/10	1/10	9/10
40.	Hvalbiar	1/30	29/30	1/30	29/30
41.	Froðbiar	1/50	49/50	1/65	64/65
42.	Fámjins	1/10	9/10	1/15	14/15
43.	Hovs	1/9	8/9	1/15	14/15
44.	Þorkeris	1/40	39/40	1/40	39/40
45.	Vágs	1/80	79/80	1/80	79/80
46.	Sumbiar	7/100	93/100	1/20	19/20
47.	Hvannasund	1/30	29/30	1/60	59/60

1. viðgerð 14. november og 30. november legði kommunala nevndin fram soljóðandi

Álit

Kommunala nevndin hevur havt málið til viðgerðar og samtykt at mæla tinginum til at samtykkja landsstýrisins uppskot.

2. viðgerð 1. desember og 3. viðgerð 3. desember 1951.

Sama dag lögdu tingmenninir Fr. Bláhamar og A. Sörensen fram soljóðandi

Broytingaruppskot.

Til nr. 31, Miðvágs verður í staðin fyri »1/25—24/25« sett »1/50—49/50«.

Broytingaruppskotið samtykt 15—0.

Uppskot landsstýrisins so broytt *samtykt 15—0.*

35. Vegir og lendingar.

1951, 7. november legði R. Long, landsstýrismaður, fram soljóðandi mál:

Ummæli frá landsverkfröðinginum.

Sandavágs kommuna hevur í skrivi higar dagf. 5/10 í ár biðið um at fáa útstungið eitt strekki av vegnum Fútaklett/Oyragjógv, soleiðis at arbeiðið kann verða byrjað. Nakað av studningi, ¾ av kr. 17.000,— n. pr. varð í 1945 játtað kommununi til henda veg.

Undirritaði bað í brævi 29/10 h. á. kommununa um at bíða við hesum arbeiði, tí eg helt at málið átti at verða lagt fyri tingið aftur, tí ivingasamt var, um lögtingið nú var sinnað til at halda áfram við studningsveitan til henda veg.

Tá studningur í 1945 varð veittur til vegin Fútaklett/Oyragjógv, var tað út frá tí sjónarmiði, at sambandið millum Vágarnar og Havnina aftaná at vegurin Kvívík/Vestmanna var liðugur, fór at vera fyri størsta partin yvir land. Hetta sjónarmið kann tó ikki sigast at halda í veruleikanum uttanso at fasta rutusiglingin millum Havnina og Vágarnar verður lítil og eingin.

Sum umstöðurnar eru í lötuni við »Vesturleið« siglandi í fastari ferðaætlan 4 dagar um vikuna árið runt millum Miðvág og Havn og við einum av lögtingsins strandferðaskipum ein dag um vikuna er eingin ivi í, at fjöldin av ferðafólkinum fer sjóvegin: Ferðatíðin er um helvt og ferðapeningurin minni enn helvt. Hiðani er skrivað til avgreiðslurnar fyri ferðaskipini fyri at fáa tey röttu tölini; men er ikki svar komið enn.

Verður föst rutusigling eisini í framtíðini millum Tórshavn og Vágar, er neyvan grund til at gera um 3 km av vegi í framahldi av Fútaklettsvegnum og eina nýggja lending, tí tann bati sum verður vunnin, verður so lítil, at hann als ikki stendur í mun til útreiðslurnar.

Kostnaðurin fyri vegin og lendingina kann metast at liggja millum 300—400.000 kr.

1. viðgerð 13. november og 21. november legði havna- og veganevndin fram soljóðandi

Álit.

Nevndin hevur í samráð við landsverkfröðingin viðgjört framlögugevni í hesum lögtingsmáli: Vegin Fútaklett—Oyragjógv, eins og allar tær umsóknir um studning til ymisk vega- og lendingamál, ið innkomnar eru.

Nýggjar umsóknir um studning til vegir og lendingar hava verið 61 í tali, og hava tær verið viðgjördar saman við einstökum umsóknum, sum vórðu goymdar frá seinastu tingsetu. Tær á fíggjarlógaruppskotinum avmarkaðu upphæddir til vega- og lendingastudningar vóru ikki stórar; men nevndin heldur, at tingið við játtanum sbr. niðanfyri nevndu uppskotum veitir stuðul, har törvur er.

I. *Vegir.*

Tökur studningur til vegir er hesin:

Til dyrkingarvegir	¾ av o. u. kr. 448.000	= o. u.	kr.	336.000,—
— samferðsluvegir	¾ - o. u. — 740.000	= o. u.	—	555.000,—
		tilsamans	kr.	891.000,—

Herav studningur sbr. vegaætlanini 1935/40: ¾ av o. u. kr. 552.000 = o. u. kr. 414.000.

Tá er byggipeningurin í gomlum prísum sbr. vegaætlanini hækkaður samsvarandi prístalinum eins og aðrir vegstudningar, og roknað er við, at löglingið hevur átikið sær eisini tann partin, ríkiskassin skuldi gjalda sbr. nevndu vegaætlan.

Viðvíkjandi vegnum Fútaklett—Oyragjógv er nevndin eisini samd um, at eingin grund er til at fara undir hann, sum nú er. Umstöðurnar tala ikki fyri tí, og eisini eru so nógvir átroðkandi neyðugir samferðsluvegir í gerð, at tingið eigur við síni studningsveitan at miða ímóti at fáa nakrar av hesum vegum lidnar.

Skotið verður upp, at hesar játtanir verða samtyktar:

A. Kommuna	*Nýjáttanir til dyrkingarvegir:* studningurin er til	Studningur er ¾ av kr.
Svínoyar	1) O. u. 200 m framhald av vegnum yvir á Dal ¾ av kr. 4.000	
	2) O. u. 200 m framhald av vegnum í Handansgerði ..... - - — 2.000	
		6.000
Viðareiðis	Veg til nýggja kirkjugarð	2.000
Sjóar	Strendur: Eykastudningur til veg frá skúlanum til húsini hjá Dáva	1.500
Eiðis	Vegur til Ljósá	1.800

Funnings	O. u. 100 m framhald av dyrkingarvegi ...		5.000
	Til vegin eystur á Bö		5.000
Kaldbaks	Dyrkingarveg í Kaldbak (norðureftir)	¾ av kr. 3.000	
	Standandi studningur til vegin »frá A. Vesturskarð til B. Wang« verður fluttur til »vegin niðan í Gerðini«. Harumframt nýjáttan til seinast nevnda veg ...	- - — 1.000	
			4.000
Kirkjuböar	Velbastað: Veg gjögnum böin		6.000
Miðvágs	1) Veg norður í Illulág	¾ av kr. 5.000	
	2) Veg úti á Bakka	- - — 4.000	
			9.000
Sandavágs	Reststudningur ¾ av kr. 3.000 til veg í Ciljahaga verður fluttur til vegin »úti á Bakka«.		
	Nýjáttan til »vegin úti í Bakka«		8.000
Mikinesar	Framhald av hagavegi		3.000
		Tilsamans kr.	51.500

B. Kommuna	*Nýjáttanir til samferðsluvegir* studningurin er til		Studningur er ¾ av kr.
Viðareiðis	Framhald av breiðkan og umbygging av samferðsluvegnum við Leitið		15.000
Hvannasunds	Hvannasund—Viðareið ...	- - - 10.000	
	Fossá—Norðtoftir	¾ av kr. 5.000	
			15.000
Sjóar	Samferðsluvegir í kommununi. Um kommunan verður býtt í tvær kommunur, 15.000 til hvörja		30.000
Funnings	Funning—Eiðisvegin		10.000
Gjáar	Gjógv—Eiðisvegin		10.000
Hvalvíkar	Framhald av vegnu Hvalvík—Hósvík		30.000
Sörvágs	Vegin Sörvág—Bö		40.000
Sands	Umvæling av Skarvanesvegnum		3.000
Húsavíkar	Umvæling av Skarvanesvegnum		6.000
Sunnbiar	Víkarbyrgi—Vött, framhald		3.000
		tilsamans kr.	162.000

D. Teir undan tingsetuni 1946 til Húsavíkar kommunu játtaðu studningar til lendlingarbeiði verða at flyta og nýta til vegin Húsavík—Dals.

D. Farið verður ikki undir at byggja vegin Fútaklett Oyragjógv, fyrr enn tingið játtar tí.

E. *Frá minnilutanum* (J. Danbjörg og J. Kallsoy):
Álagt verður landsverkfröðinginum at skipa fyri, at Rangabotnsvegurin, ið játtaðar eru 150.000 kr. til, verður útstungin og kostnaðarmettur.

II. *Lendingar.*

Tökur studningur til lendingar er í lötuni umleið ¾ av kr. 970.000 = kr. 727.500. Av hesum eru tó o. u. ¾ av kr. 162.500 ikki tökar fyrr enn fíggjarárið 1952/53 og fylgjandi ár.

Í árunum frammanundan eru játtaðir hesir studningar fyri fíggjarárið 1952/53.

			¾ av kr.
Svínoyar	k.:	Lending í Svínoyarvík, 2 ára játtan í tings. 1950/51)	12.500
Húsa	-:	Lending á Syðradali (2 ára játtan í tingsetuni 1950/51)	20.000
Götu	-:	Brimgarð við Stórufles, Syðrugötu, (5 ára játtan í tingsetuni 1948/49)	30.000
Sunda	-:	Breiðkan av lendingarbrúnni á Oyri (2 ára játtan í tingsetuni 1950/51)	15.000
Kvívíkar	-:	Bryggja á Válinum (5 ára játtan í tingsetuni 1948/49)	30.000
Hóva	-:	Havnin í Hovi (2 ára játtan í tings. 1950/51)	25.000
		Tilsamans ¾ ab... kr.	132.500

Tilmældar nýjáttanir (sí uppskot) ..... ¾ av kr. 54.000

Fyri fíggjarárið 1952/53 soleiðis tilsamans ..... ¾ av kr. 186.5000

Skotið verður upp, at niðanfyri tilskilaðu nýjáttanir verða samtyktar:

A. *Nýjáttanir til lendingar eru*

Kommuna		studningur er ¾ av kr.
Mikladals	Eykajáttan til rennistrong og lendingarábötur á Tröllanesi	10.000
Götu	Stoyping undir Bakkan í Norðrugötu	5.000
Eiðis	Meirstudning til lendingararbeiði í Svínáum	14.000
Funnings	Leingjan av bátadrátti í Funningi	5.000
Kvívíkar	Eykastudning til bryggjuna á Válinaum ¾ av kr. 20.000 um árið í 2 ár	20.000
	tilsamans ¾ av kr.	54.000

2. viðgerð 21. desember 1951.

3. — 24. mars 1952.

I. Tey undir A nevndu mál samtykt 16—1.
— B — — — 16—1.
— C — — — 17—0.
— D — — — 13—0.

E var sett undir atkvöðugreiðslu við navnakalli:

Ja atkvöddu: Danbjörg, S. P. Zachariasen, Holm, Øregaard, Davidsen, Henriksen, Waag og S. Danielsen.

Atkvöddu ikki: J. Chr. Olsen, P. Petersen, J. Poulsen, A. Djurhuus, H. Iversen, S. Ellefsen, Bláhamar, A. Sörensen, R. Long, Th. Petersen, H. v. Högadalsá og H. Djurhuus.

Burtur: Dam, Tr. Samuelsen, O. F. Joensen og D. P. Danielsen.

Uppskotið fall 9—0.

II. Lendingar samtykt 15—0.

36. Løgtingslóg um fornminnissavn.

1951, 12. november legði R. Long, landsstýrissmaður, fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 12. november 1952:

lögtingslóg um fornminni.

gr. 1.

Í framhaldi av forngripasavninum sum Föroya Forngripafelag hevur sett á stovn og í 1946 hevur givið Föroya Lögtingi, verður gripasavnið at uppihalda sum mentunarstovnur fyri landskassans rokning undir navninum »Föroya fornminnissavn«.

Setur stovnsins er í Tórshavn, og starvsöki hansara eru allar Föroyar.

gr. 2.

Virkisevni stovnsins er:

1) at skráseta, kanna og hava eftirlit við jarðföstum fornminnum, sum lýst er í lögtingslóg um friðan av föstum fornminnum og byggningum.
2) at fyrireika og standa fyri útgrevstri av toftum, fornum búplássum og söguligum lendum.
3) at savna, skráseta og framsýna fornlutir og lutir frá nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan Föroyinga til ymsar tíðir ella eru knýttir til söguligar hendingar,
4) at hava í hondum savnan av staðarnövnum og munnliga goymdum söguminnum og hava hetta tilfar greitt til vitskapliga granskan.

lagtingslov om fortidsmindesamling.

§ 1.

I fortsættelse af museet, som Föroya Forngripafelag har oprettet og i 1946 overdraget Færöernes Lagting, vil samlingen herefter blive opretholdt som kulturel institution for landskassens regning under navnet »Föroya fornminnissavn«.

Institutionen er etableret i Tórshavn, og dens arbejdsområde er alle öerne.

§ 2.

Institutionens virkefelt er:

1) at registrere, undersöge og føre tilsyn med jordfaste fortidslevninger som angivet i lagtingslov om fredning af fortidsminder og bygninger,
2) at forberede og forestå udgravning af tomter, gamle pladser og historiske steder,
3) at indsamle, registrere og fremvise oldsager og ting fra nyere tid, der belyser Færingers levevæt, arbejdsforhold og kultur til forskellige tider, eller som har tilknytning til historiske begivenheder,
4) at forestå nedskrivning af stednavne og mundtligt overleveret tradition og holde dette materiale forberedt til videnskabelig forskning.

gr. 3.

Til at standa fyri tí í gr. 2 nevnda starvi setur landsstýrið undir tænastumannalógini ein antikvar, sum í sínum dagliga starvi stendur beinleiðis undir landsstýrinum.

Annað starvsfólk setur landsstýrið eftir uppskoti frá antikvarinum.

§ 3.

Til at forestå det i § 2 nævnte arbejde ansætter landsstyret under tjenestemandsloven en antikvar, der i sin daglige virksomhed er direkte underordnet landsstyret.

Andre funktionærer ansætter landsstyret efter forslag fra antikvaren.

gr. 4.

Eftirlit við fornminnissavninum verður at útinna av einari trímannanevnd. Í hana velur landsstýrið ein lim og Föroya Forngripafelag ein. Teir verða allir valdir fyri 3 ár.

Eftirlitsnevndin hevur til eina hvörja tíð rætt at gera seg kunnuga við tað dagliga starvið á fornminnissavninum og hevur skyldu eina ferð árliga (í mars mánaði) at geva landsstýrinum frágreiðing og uppskotini, eins og möguligar atfinningar ella uppskot, sum nevndin til einahvörja tíð hevði viljað gjört viðvíkjandi dagliga starvinum, verða at flýggja antikvarinum at beina víðari til landsstýrið.

§ 4.

Tilsyn med fortidsmindesamlingen udöves af et tremandsudvalg, hvoraf landsstyret vælger et medlem der er formand, lagtinget et medlem og Föroya Forngripafelag et medlem. De vælges alle for tre år.

Tilsynsudvalget har til enhver tid ret til at göre sig bekendt med samlingens daglige virksomhed og er pligtigt til i marts måned hvert år at indsende til landsstyret beretning og mulige forslag. Beretningen og forslagene, såvel kritik eller forslag, som udvalget til hvilken som helst tid kunne finde sig foranlediget til at fremsætte vedrörende det daglige arbejde, skal indgives til antikvaren til videre besörgelse til landsstyret.

gr. 5.

Um Föroya Forngripafelag gevst við starvi sínum, velur lögtingið tveir limir í eftirlitsnevndina.

§ 5

Hvis Föroya Forngripafelag ophörer med sin virksomhed, skal lagtinget vælge 2 medlemmer af tilsynsudvalget.

gr. 6.

Fyri dagliga starvinum á fornminnissavninum skipar landsstýrið við reglugerð.

§ 6.

For det daglige arbejde udsteder landsstyret et regulativ.

gr. 7.

Henda lög kemur í gildi beinan vegin.

§ 7.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Landsstýrið hevur biðið Sverra Dahl, fyristöðumann fornminnissavnsins, greiða frá sögu savnsins, og gevur hann hetta stutta yvirlit:

Forsögan.

1890 skrivar Jóannes Patursson grein í Föringatíðindi og mælir til at varðveita landsins forngripir.

1894 skrivar hann í sama blaði aftur grein um hetta mál, har hann beinleiðis setur fram uppskot um at fáa í lag eina föroyska forngripagoymslu.

1896 hevur Sverre Patursson hetta mál frammi á fundi í Sólarmagni, har tað seinri ofta er til viðgerðar og endar við, at »Sólarmagn« bjóðar til fundar í Havn á Ólavsöku 1898 »um föroyskt museum«. Úrslitið av hesum fundi er, at nevnd verður sett at fremja hetta arbeiði — 18 vóru í hesi nevnd, 2 úr hvörjum prestagjaldi, 4 úr Havn.

Stovnan.

Árið 1898 mega vit tí rokna Forngripasavnið stovnað.

Hövuðsmenninir öll tey fyrstu árini eru: A. C. Evensen, R. Rasmussen, A. Samuelsen, ið skrivar greinir í »Föringatíðindi«, »Fuglaframa« og í »Búreisingi«, ferðast um landið og savna forngripir, senda listar út í bygdir fyri at fáa gripir og peningagávur til arbeiðið o. a.

Studningur.

Árið 1900 veitir Föroya Lögting hesi nevnd 50 kr. og 1902 200 kr.

Forngripafelagið.

1916 tann 24. september var fundur hildin í Havn, har felag varð stovnað »til frama fyri forngripasakina«. Navn felagsins er: »Föroya Forngripafelag« og »tess endamál er at strevast fyri at savna saman og varðveita föroyskar fornpripir av öllum slagi, serliga við at halda uppi einum föroykum fornpripasavni (museum)«.

Fyrsti formaður var A. C. Evensen, prústur.

Felagsnevndin er um somu tíð stýri savnsins.

Höli.

Savnið hevur í teimum farnu árumhavt höli ymsar staðir, í tí gamla skúlanum í Havn, húsum J. P. Joensens á Landavegi, Mettustovu, Qullingsgarði og á landsbókasavninum, har tað er nú og eigur sínt egnu rúm.

Felagið samtykti á fyrsta fundi at keypa húsini (tröð) frá J. P. Joensen, prentara, men longu í 1923 varð avgjört á eykaaðalfundi at selja tey aftur og samráðast við nevndina fyri Færö Amts Bibliotek um höli í húsum tess. Hetta verður gjört, og peningurin, ið inn kom fyri ogn felagsins, varð so settur í byggigrunn bókasavnsins.

Föroya Forngripasavn eigur tí 8000 kr. í húsum landsbókasavnsins.

Stýri.

Eftir gerðabókini at döma er lítið hent frá 1923 til 1928, tá ið nýggj nevnd verður vald við M. A. Jacobsen sum formanni. Hann situr sum formaður til 1944, tá H. A. Djurhuus tekur viðtil sín deyð 1951.

Síðan 1928 er stöðugt hildið á við arbeiðinum; forngripatalið er nógv vaksið. Serliga hevur A. Weihe, kongsbóndi savnað og givið savninum ein hóp av lutum.

Studningar:

Til at arbeiða við hevur nevndin havt limagjald felagsins og atgongdarpeningin og studning frá Föroya Lögtingi frá 1928, ið tá var 200 kr., men síðan vaksin upp í 600 kr. Hesin peningur hevur verið nýttur til: hita, og ljós, reingerð, forngripakeyp og vaktarhald sunnudagar.

Umframt hevur lögtingið í 1941 veitt ein eykastudning til útgrefstur norðuri í Kvívík.

Lögtingið setti í 1944 nevnd til at savna staðanövn og arbeiða við fornrannsóknum og hevur latið hesi nevnd 5.000 kr. árliga til hesi arbeiði, ið sjálvsagt hava verið savninum at gagni.

Savnið.

Savnið hevur alla tíðina higartil verið stýrt av nevnd Forngripafelagsins og verið ogn tess heilt til ár 1946, tá ið nevndin eftir uppskoti frá H. A. Djurhuus samtykti at geva Föroya Lögtingi forngripasavnið sum landsogn, við áheitan um at byggja savninum nýggj tíðarhóskandi hús. Fyri at fremja hetta mál vildu hjúmini Djurhuus lata ogn teirra við Tinghúsveg sum gávu.

Föroya Lögting hevur á fundi 8. februar 1947 (lögtingstíðindi 1946, bls. 287) samtykt við tökk at taka ímóti hesum gávum, at seta av pening at byggja fyri og at keypa alla Debesartröð.

Föroya Forngripasavn og Föroya Forngripafelag eru soleiðis hvört sær í dag, men felagið vil tó sjálvsagt umfrant at rökja síni egnu sermál eisini í framtíðini eftir förinuni á ymsan hátt styðja arbeiði Forngripasavnsins.

Landsstýrið mælir til, at öll varðveitsla og umsitan av starvi við fortminnir, jarðföst og leys, eisini skrivað ella varðveitt í huganum sum t. d. staðanövn og fornsögur, eigur at verða lögd undir Fornminnissavnið og setur her fram uppskot sum omanfyri tilskilað.

1. viðgerð 14. november, 2. viðgerð 23. november og sama dag legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri lögtingið uppskot til lögtingslóg um fornminni.

Málið er beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og er samdum at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó við viðmerking, at fyristöðumaður savnsins — antikvarurin — ikki verður löntur sum tænastumaður undir tænastumannalógini, men sum higartil honorarlöntur á fíggjarlógini.

Samsvarandi besum setur nevndin fram fylgjandi

uppskot.

Tingið samtykkir uppskot landsstýrisins til lögtingslóg um fornminni tó við broyting í 3. gr., at orðini »undir tænastumannalógini« og »undir tjenestemandsloven« ganga út, og í staðin verður sett í 3. gr., 1. petti aftaná »landsstýrinum« og í donsku tekstini »landsstyret«: »Lön hansara verður fyrisett á fíggjarlógini« og »Hans Lön fastsættes på finansloven«.

3. viðgerð 26. november 1951.

Uppskot nevndarinnar og lógaruppskotið so broytt samtykt 19—0.

---

37. Løgtingslóg um landsbókasavn og landsskjalasavn.

1951, 12. november legði R. Long, landsstýrismaður, fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 7. november 1951:

Lögtingslóg um landsbókasavn v.m. *Lagtingslov om landsbibliotek m. v.*

Landsbókasavn.

§ 1.

Endamál landsbókasavnsins er:

Landsbibliotek.

§ 1.

Landsbibliotekets formål er:

a) at savna allar föroyskar bókmentir og so mikið sum gjörligt av bókmentum um Föroyar,

b) sum meginbókasavn við serfröðis fögrum og öðrum mennandi bókmentum at fremja útbreiðslu av kunnskapum og upplýsing í landinum,

c) at fáa til vega eitt savn av vitskapligum bókmentum.

§ 2.

Allar prentsmiðjur í landinum hava skyldu at lata landsbókasavninum fyri cinki uppí 8 eintök av öllum, sum prentað verður, stórum og smáum, eisini endurprentum og serprentum eftir landsstýrisins avgerð til cinahvörja tíð. Prentsmiðjurnar skulu senda landsbókasavninum fríeintökini og prentlutirnar so hvört, og við árs enda senda yvirlit yvir alt prentiarbeiði í árinum.

Undandráttur í avhendingarskyldu kann revsast við sektum, sum fara í landskassan.

Gr. 3.

Landsbókasavnið hevur fríeintökini í hondum. Tað skal rökja bókaskifti við útlendsk bókasövn og vitskapligar stovnar.

Gr. 4.

Landsbókasavnið liggur undir landsstýrinum. Hetta hevur eftirlit við tí, tess bygningum og ognum yvirhövur.

Gr. 5.

Landsstýrið setur bókavörðin. Hansara lön verður fyrisett í lönarlög landsins. Landsstýrið setur annað starvsfólk savnsins eftir tilskiling landsbókavörðans innanfyri figgjarætlan savnsins. Landsbókavörðurin hevur dagligu leiðslu savnsins (sbr. gr. 9).

a) at samle al færösk litteratur og så meget som muligt af litteratur om Færöerne.

b) som centralbibliotek gennem faglitteratur, skönlitteratur og anden almendannende litteratur at virke for udbredelse af kundskaber og oplysning i landet,

c) at få tilvejebragt en samling af videnskabelig litteratur.

§ 2.

Alle trykkerier i landet er forpligtet til at afgive til landsbiblioteket op til 8 fricksemplarer af alt, hvad der trykkes, stort og smät, ligeledes i optryk og særtryk efter landsstyrets bestemmelse til enhver tid. Trykkerierne har pligt til at aflevere fricksemplarerne og tryksagerne efterhånden, og ved årets slutning aflevere en oversigt over alt trykkeriarbejde i det forløbne år.

Vægring med hensyn til afleveringspligten kan straffes med böder, der tilfalder landskassen.

§ 3.

Landsbiblioteket forvalter fricksemplarerne. Det udförer bogbytning med udenlandske biblioteker og videnskabelige institutioner.

§ 4.

Landsbiblioteket sorterer under landsstyret. Dette förer tilsyn med biblioteket, dets bygninger og ejendele iövrigt.

§ 5.

Landsstyret ansætter landsbibliotekets lönningslov. Det övrige personale antages af landsstyret efter landsbibliotekarens indstilling. Landsbibliotekaren har den daglige ledelse af biblioteket (jfr. § 9).

Gr. 6.

Landsstýrið ger ætlan yvir savnsins árligu inntökur og útreiðslur eftir tilmæli landsbókavörðans. Hon gongur im sum deild í fíggjarætlan landskassans, hevur sama roknskaparár, endurlit og góðkenning.

§ 6.

Landstyret affatter overslag over bibliotekets årlige indtægter og udgifter efter indstilling af bibliotekaren. Det indgår i landskassens budget, har samme regnskabsår, revision og decision.

Gr. 7.

Landsbókavörðurin sendir fyri hvört roknskaparár landsstýrinum og Tórshavnar býráð frágreiðing um virki bókasavnsins.

§ 7.

Over landsbibliotekets virksomhed aflægger landsbibliotekaren for hvert regnskabsår beretning til landsstyret og Tórshavn byråd.

Onnur bókasövn.

Gr. 8.

Landsstýrið ger av, hvörjir studningar skulu veitast bókasövnum í Föroyum, og fyrisetur tær reglur, sum galda skulu fyri sövn, sum fáa studning. Landsbókavörðurin hevur fyri landsstýrið eftirlit við bökasövnum, sum fáa almennan studning, og veitir teim ráð og vegleiðing.

Andre biblioteker.

§ 8.

Landsstyret afgör, hvilke tilskud, der skal ydes biblioteker på Færöerne, og fastsætter de bestemmelser, som biblioteker, der oppebærer tilskud, skal være undergivet. Landsbibliotekaren förer på landsstyrets vegne tilsyn med de biblioteker, der får offentlige tilskud, og yder dem råd og vejledning.

Gr. 9.

Landsstýrið ger reglugerð um stýri og virki landsbókasavnsins, tess samvinnu við onnur bókasövn og um onnur törvandi viðurskifti.

§ 9.

I et regulativ fastsætter landsstyret de nærmere regler for landsbibliotekets ledelse og drift, dets samarbejde med andre biblioteker og andre nödvendige forhold.

Landsskjalasavn.

gr. 10.

Landsins almennu skjöl verða at varðveita í landsskjalasavninum.

Landsarkivet.

§ 10.

Landets offentlige dokumenter skal opbevares i landsarkivet.

gr. 11

Landsskjalasavnið liggur undir landsstýrinum. Hetta hevur eftirlit við tí og tess ognum yvirhövur.

§ 11.

Landsarkivet sorterer under landsstyret. Dette förer tilsyn med arkivet og dets ejendele iövrigt.

gr. 12.

Landsstýrið setur landsskjalavörðin. Hansara lön verður fyrisett í landsins lönarlóg. Landsstýrið setur annað starvsfólk savnsins eftir tilskiling landsskjalavörðans innan fyri fíggjarætlan savnsins. Landsskjalavörðin hevur dagligu leiðslu savnsins (smbr. gr. 15).

gr. 13.

Landsstýrið ger ætlan yvir savnsins árligu inntökur og útreiðslur eftir tilmæli landsskjalavörðans. Hon gongur inn sum deild fíggjarætlan landskassans, hevur sama roknskaparár, endurlit og góðkenning.

gr. 14.

Landsskjalavörðin sendir fyri hvört roknskaparár landsstýrinum og Tórshavnar býráði frágreiðing um virki skjalasavnsins.

gr. 15.

Landsstýrið ger reglugerð um stýri og virki landsskjalasavnsins og um onnur törvandi viðurskifti.

gr. 16.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og samstundis fara statutter for Færö Amts Bibliotek, staðfestar 16. oktober 1923, úr gildi.

§ 12.

Landsstyret ansætter landsarkivaren. Hans lön fastsættes ved landets lönningslov. Det övrige personale antages af landsstyret efter landsarkivarens indstilling. Landsarkivaren har den daglige ledelse af arkivet (jfr. § 15).

§ 13.

Landsstyret affatter overslag over arkivets årlige indtægter og udgifter efter indstilling af arkivaren. Det indgår i landskassens budget, har samme regnskabsår, revision og decision.

§ 14.

Over landsarkivets virksomhed aflægger landsarkivaren for hvert regnskabsår beretning til landsstyret og Tórshavn byråd.

§ 15.

I et regulativ fastsætter landsstyret de nærmere regler for landsarkivets ledelse og drift og andre nödvendige forhold.

§ 16.

Denne lov træder i kraft straks og samtidig bortfalder statutter for Færö Amts Bibliotek, stadfæstet 16. oktober 1923.

Viðmerkingar:

Í 1949 setti landsstýrið fram uppskot til lögtingslóg um bókasövn, landsskjalasavnið og Föroya forngripagoymslu (smbr. tingmál nr. 27/1951).

Málið fekk onga endaliga viðgerð á tingi tá.

Nú er tingsins stöða, at hesir tríggir stovnarnir skulu rökjast hvör sær, hevur landsstýrið sett fram lógaruppskot samsvarandi, í eini lóg um landsbókasavn og landsskjalasavn og onnur bókasövn og í eini aðrari um Föroya fornminnissavn.

Tað skal skilast til, at skylda prentsmiðjuna at lata inn frieintök er tikin upp her, eins og skotið var upp í 1949, mí landsbókasavnið sum meginbókasavn skal rökja bókabýti við onnur sövn og vitskapligar stovnar.

Sum tað sæst hava hesir stovnar onga lóggávu, og tað er tí neyðugt at lógfesta reglur um teir skjótast.

1. viðgerð 14. november, 2. viðgerð 23. november og sama dag legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur sett fram uppskot til lögtingslóg um landsbókasavn og landsskjalasavn.

Málið er beint í lógarnevndina. Nevndin hevur viðgjört málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, tó við — ikki verður löntur sum tænastumaður undir tænastumannalógini, men viðmerking, at fyristöðumaðurin fyri landsskjalasavninum — arkivarurin sum higartil honorarlöntur á fíggjarlógini.

Annars skal viðmerkjast til gr. 2, at fyrivarni verður tikið viðvíkjandi pliktlevering til Det Kgl. Bibliotek, soleiðis at reglan um skyldu at lata upp í 8 eintök av öllum,ið prentað verður, til landsbókasavnið er at fata soleiðis, at eingin broyting verður gjörd í tí núverandi skyldu at lata prentlutir til Det Kgl. Bibliotek, Universitetsbiblioteket og Statsbiblioteket í Århus, men soleiðis at hesir stovnar fáa eintök av hesum 8.

Samsvarandi tí omanfyri framförda setur nevndin fram fylgjandi

uppskot.

Tingið samtykkir uppskot landsstýrisins til lögtingslóg um landsbókasavn v. m., tó so, at orðið »serfröðis« í gr. 1, h) gongur út, og í staðin verður sett »nyttiligum«, og orðið »lönarlóg« í gr 12 í föroysku tekstini og »lönningslóg« í donsku tekstini gongur út, og í staðin verður sett atvikavist »fíggjarlóg« og finanslov«.

3. viðgerð 26. november.

Uppskot nevndarinnar og lógaruppskotið so broytt samtykt 19 -0.

38. Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

1951, 28. november legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum og fylgiskrivi frá 28. november s. á.:

Landsstýrið loyvir sær at framleggja viðlagda álit og uppskot til lögtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá serligari nevnd sett av Föroya landsstýri.

Álit.

Í apríl 1949 samtykti landsstýrið at seta nevnd at gera uppskot til byggilóg og lóg um býarskipanir.

Til nevndina skuldi landsstýrið velja 2 limir, Tórshavnar býráð 2 og Tórshavnar byggincvnd 1.

Hesir vórðu valdir:

Fyri landsstýrið: Johan Djurhuus, skrivstovustjóri og Aksel Kjær, landinspektörur.
Fyri býráðið: Hanus við Högadalsá, býráðslimur og Poul Guttesen, býarverkfröðingur.
Fyri bygginevndina: H. C. W. Tórgarð, býráðslimur, arkitektur.

Johan Djurhuus varð av nevndini valdur formaður.

Áðrenn nevndin varð sett, hevði landsstýrið og Tórshavnar býráð vent sær til Ministeriet for Byggeri og Boligvæsen um at fáa tænastumann haðani, sum kundi vera stýrinum og býráðnum til hjálpar í arbeiðinum og at gera uppskot til byggi- og býarskipanarlóg fyri Tórshavn. Ministeriið setti Vagn Rud Nielsen, fulltrúa, cand jur. til hetta arbeiðið. Tá ið nevndin var sett og tók við arbeiðinum, varð Vagn Nielsen hjálparmaður nevndarinnar. Hann var í Föroyum í oktober 1949.

Longu í 1947 vóru framkomin ynski um at broyta galdandi byggilöggávu. Fröðhiar sóknar kommuna vendi sær í brævi 20. november 1947 til lögtingið við uppskoti til nýggja byggilóg. Uppskotið fyriskrivaði: reglur um bygging móti veg, brunaskjöldur og aðra verju móti eldsvanda, vatnleiðing, minstamark fyri hvussu nógv av byggilendum skal vera óbygt, verjutiltök av heilsuligum grundum, um byggihátt o. s. fr. Lögtingið samtykti tá at senda uppskotið til hinar kommunurnar, og lata byggiköntan mann geva ummæli sítt. Síðani skuldi so málið leggjast fyri lögtingið aftur, sambart Lgt. 1947, bls. 207. Málið varð sent kommununum, men bert heilt

fáar (5) sögdu sína stöðu; tær sum svaraðu vóru tó fyri uppskotinum ella ið hvussu so er fyri at broyta núgaldandi byggilóggávu sum ófullfíggjaða. Tórshavnar kommuna ynskti at fara eitt stig lougur enn henda tilælaða lóggávan, eftirsum kommunan sum frammanfyri umtalað eisini helt tað vera neyðugt at gera eina býarskipanarlóg.

Hövuðslógirnar í núgaldandi byggirætti er lóg frá 28. januar 1856« »um oprettelse af en bygningskommission for Thorshavn« og konglig fyriskipan frá 16. juni 1882 »om bygnings og brandvæsenet i de færöske landkommuner«, samhart gr. 18 í lóg frá 28. februar 1872 »om de færöske landkommuners styrelse«.

Lóg frá 28. januar 1856 fyri Tórshavn setir byggineynd, ið skal gera eitt yvirlit yvir, hvussu vegir, óbygd öki o. s. fr. býarins skulu leggjast, og skal henda ætlanin so við og við setast í verk. Til at nevndin kann ansa eftir, at ikki verður bygt móti ætlanini, skulu allar byggingar, umbyggingar o. t. verða tilmeldaðar nevndini og síðani góðtiknar av landsstýrinum. Lógin gevur nevndini víðar ræsur í síni ætlan, um bygging v. m. skal verða loyvd.

Sama skipanin við byggineynd verður eisini fyri bygdakommunurnar fyrisett við nevndu kongligu fyriskipan frá 1882. Her verður tó beinleiðis sagt, hvörjum sjónarmiðum nevndin skal arbeiða eftir. Hon skal ansa eftir, at ætlað bygging ikki kemur at forða fyri, at gjördir vegir kunna rökjast, at húsini verða sett hampuliga eftir hvörjum öðrum, og at vegirnir so við og við fáa eina hóskandi breidd í mun til hæddina av húsunum og onnur viðurskifti bygdarinnar. Coogur byggingin móti hesum sjónarmiðum, kann hon noktast, tó við rætti til kæru til landsstýrið.

Allar byggineyndir skulu ansa eftir, at byggingin er forsvarlig, tá ið hugsað verður um eldsvandan. Nevndirnar hava hesum viðvíkjandi yvirhövur kravi, at hús mugu ikki vera nærri marki enn 3 alin uttan so, at brunaskjöldur er móti markinum.

Tá ið talað verður, um hvörji mark lóggávan setur fyri bygging og fyri annað ræði yvir föstum ognum við tí endamáli, at almenningurin, her kommunurnar, kann fremja samfelagslig endamál t. d. bygging av vegum, skúlum o. ö. verður eisini víst til tær lógir, ið geva rætt til tvangtöku, lóg frá 7. mai 1881, um tvanstöku av lendum til vegir, havnir, lendingar og skúlar, lóg frá 1. apríl 1909 um vatnleiðingar, lóg frá 28. apríl um kirkjur og kirkjugarðar, 22 gr. í lóg nr. 147, 27. marts 1939 um útskifting 31, 32 og 36 gr. í jarðalógini nr. 174, 24. mai 1937 o. fl.

Felags fyri alla her umtalaðu lóggávu er, at kommunurnar taka ein meir ella minni átroðkandi spurning upp til viðgerðar fyri seg, meðan ein samlað býarskipan, sum inniber tey ymisku samfelagsligu rímiligu og neyðugu sjónarmið í eini heild kann ikki gjögnumförast. Øll henda lóggáva er gomul og tíðin nógv broytt síðani, og er hon gjörd í pörtum.

Nevndin hevur sostatt mett um trongdina til tíðarhóskandi býarskipanir og byggilóggávu fyri Tórshavnar bý og bygdirnar.

Nevndin er undir sínum kanningum komin til tað úrslit, at stórur törvur er á at fremja býarskipanir og eina byggilóggávu, sum tryggja eina skilagóða bygging.

Setúsa- og vinnulig bygging hevur livitíð í mannsaldrar. Skiping av býarlögum og av einstökum byggingum kann soleiðis ikki latast upp í hendurnar á teim einstöku, sum best ber til, men tað má krevjast, at tann einstaki byggningurin fellur inn í býarskipanina sum hon er, soleiðis at skilaloysi kann umgangast og hartil spell bæði í arbeiði og tilfari.

Törvurin at sleppa undan skilaloysi verður störri tess tættari og meira býarkend byggingin er.

Hinumegin eigur ein byggi- og býarskipanarlóg at skipast so, at hon ikki óneyðugt forðar eini rimuligari nýtslu av staðsins náttúrligu möguleikum.

Nevndin hevur fingið til handa upplýsingar um býarskipanar- og byggilóggávu í hinum norðurlondunum. Við hesum sum grundarlag verður hildið, at líkindi fyrst eiga at gerast fyri fremjing av býarskipan fyri Tórshavnar bý og störru bygdirnar, meðan ein nútíðar byggilóggáva, sum skal avloysa galdandi lóggávu og samtyktir, kann steðga til hesar býarskipanar eru framdar.

Tað er nevndarinnar ætlan, at törvandi byggireglur eiga at verða framdar skjótast til ber. Nevndin mælir tí til, at býarskipanarnevndin, möguliga ökt við limum, sum umboða bygda interessur, fáa heimild til at seta fram uppskot til almennar byggireglur.

Nevndin hevur fingið gjöllar upplýsingar um donsku býarskipanar- og bygilóggávuna.

Galdandi danska býarskipanarlógin nr. 181 frá 29. apríl 1938 sum broytt við lóg nr. 211 frá 23. apríl 1949 endurprentað sum kunngerð nr. 242 frá 30. apríl 1949 í lóg um býarskipanar fyrisetur, at hvör keðpstaður og hvör onnur heildarbygging, sum fyri mestapartin tænir öðrum endamáli enn landbúnaði og hevur meira enn 1000 í fólkatali, skal útvega sær býarskipan.

Haraftrat hevur húsaministeriet heimild til at treyta kommunustýrum at útvega býarskipan.

Í eini tílíkari býarskipan kunnu tær í lógini tilskilaðu reglur takast upp m. a. hvar vegir skulu liggja, hvörm veg teir skulu venda og breidd teirra, hvar torg skulu liggja, leidningar, almennir byggningar og lundir v. m. Eisini kann avgerð takast um slög av bygging, teirra býti eftir bygdarlögum og teirra sniði og varðveitslu eftir verandi eyðkenni í bygging og planting. Eisini kunnu reglur gerast um skiping av bygging í landbúnaðinum v. m. við tað, at fyri kann setast, at bert byggningar í tess endamáli kunnu loyvast bygdir.

Eftir býarskipanarlógini frá 1938, smbr. kunngerð 242 frá 30. apríl 1949, skulu býarskipanir aftaná at tær eru framlagdar til eftirlits, tinglesast.

Býarskipanarlógin frá 1938 hevur eisini ymsar reglur um samskiping av býarskipanum innanfyri umdömi, sum umfata fleiri kommunur og um ognartöku. Galdandi danska býarskipanarlóggáva inniheldur lóg nr. 148 frá 29. marts um byggilóg fyri staðin Köbenhavn, byggilóg fyri Frederiksberg kommunu frá 19. apríl 1890, smbr. lógarkunngerð nr. 212 frá 1. august

1912 og byggilógin fyri keypstaðirnar frá 30. desember 1858, smbr. lógarkunngerð nr. 210 frá 1. august 1912. Úti á landinum galda bert reglurnar í lóg nr. 174 frá 31. marts 1926 um brandpoliti úti á landinum, sum ' niheldur nakrar fáar byggireglur.

Eftir gr. 40 í byggilóg keypstaðanna og ymsum heimildarlógum, seinast lóg nr. 109 frá 23. apríl 1915 um aftrat at fáa til vega byggireglugerð fyri umdömi úti á landinum og byggireglur fyri keypstaðirnar og kommununa Köbenhavn smbr. gr. 75 eru tíðarhóskandi byggireglur framdar fyri keypstaðirnar og byggieglugerðir fyri sóknarkommununnar.

Býarskipanarlógin frá 1938 hevur til endamáls yvirhövur at leggja lag á byggingina og vökstur hennara, meðan teirra fremjan skulu fara fram eftir avgerðum sambart kommunalum samtyktum, eitt nú byggi-, vega- og heilsusamtyktum.

Eftir at býarskipanarlógin frá 1938 var framd hevur tað verið hildið, at regulerandi byggireglur, t. d. húsahæddir, kunnu takast uppí byggisamtyktir og reglugerðir við fullum gildi.

Sum vera man mugu býarskipanir miða langt frameftir, og tað má tí gerast neyðugt at rokna við framtíðarviðurskiftum, sum skulu rúmast innanfyri. Fyri at tær reglur í býarskipanum, sum tilevnaðar eru sum samtykt — hesar skulu tinglýsast — tí ikki skulu vera ov lítið sigandi, hevur ministerium hildið fram, at fremjingin av hundnari skipan um býarskipanir fyri býir við meira enn 1000 íbúgvarum er hildin fyri fyrst, um bert partvísar skipanir eru gjördar, tá fullfíggjað frágreiðing um kommununna ætlan yvirhövur verður send inn samstundis.

Ministerium hevur sambart hesum góðkent so nevndar býarætlanir fyri mangar býir.

Hesar býarætlanir innihalda hövuðsreglurnar fyri býarins ætlaða vökstur og sýna seg sum ein frágreiðing til ministeriið um tær ætlanir fyri býarins vökstri, sum kommunustýrið vil halda seg eftir í sínu mannagongd til fremjingar av býarskipanum.

Kommunustýrisins frágreiðing um framtíðar vökstur hevur sína grund í eini kanning av teim berandi faktorunum fyri býarins vökstur — teim sonevndu forarbeiði.

Undir einum er mannagongdin í danskari býarskipan tann, at hövuðsreglurnarfyri býarins vöksti leggjast í eini býarskipan og haraftrat tær almenun regluna um byggihædd, bygging, ljósrúmdir v. m. í byggireglugerðir og hinar meira einsæris reglurnar oftani servituttkendar í partvísar býarsamtyktir.

Eftir teim omanfyri givnu upplýsingum um danska mannagongd í býarskipanarviðurskiftum hevur nevndin aftrað seg at mæla til beinleiðis at nýta danska býarskipanarlóggávu sum fyrimynd fyri eini föroyskari.

Nevndin hevur tessvegna evnað til eitt uppskot til lögtingslóg um býarpskipan og byggisamtyktir sum eftir nevndinnar ætlan skulu verða dánnði til föroysk viðurskifti. Lógaruppskotið hevur í stóran mun sína grund í donsku býarskipannarlóggávuni, men nevndin hevur royndt at komið sær undan meinbogunum í henni.

Lógaruppskotið er soleiðis evnað til, at tað ber til beinanvegin sum lógin er komin í gildi at fremja býarskipan fyri Tórshavn og tær bygdir, sum landsstýrið heldur hava hetta fyri neyðini.

Haraftrat er uppskotið evnað so til, at tað er gjörligt at fremja byggisamtyktir við býarskipan- og byggikendum reglum, uttan at nýggj lóg skuldi verið neyðug.

Nevndin hevur hervið hildið seg hava eftirkomið trongdini til skjótt at fáa býarskipanir framdar, samstundis sum arbeiði til fremjingar av byggisamtyktum, sum ger býarskipan bindandi fyri tanu einstaka grundeigara og annars kann innihalda fyristílandi reglur, kunnu leggjast niður so vítt kommunalvald hava uppskot til býarskipanir í umbúna.

Nevndin vil fyri sítt viðkomandi leggja dent á, at tað ikki eftir lóggávuuppskotinum er neyðugt at fremja býarskipan fyri at byggisamtykt kann góðkennast.

Fyri smærri bygdir heldur nevndin ikki trongd vera sum er at fremja býarskipanir.

Nevndin vísi annars til viðmerkingarnar til hinar einstöku reglurnar.

Uppskot

til

Lögtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

gr. 1

1. partur. Landsstýrið kann, tá ið eitt kommunustýri (býráð ella sóknarstýri) mælir til tess, góðkenna býarskipan fyri hesa kommunu ella ein part av henni.

2. partur. Tórshavnar kommuna skal, áðrenn 3 ár eru liðin, aftaná at henda lóg er komin í gildi, hava fingið í lag eina býarskipan fyri Tórshavnar kommunu. Landsstýrið kann tó eftir áheitan frá Tórshavnar býráði, og um býarskipanarnevndin smbr. 2. gr. játtar tí, leingja hesa tíðarfreist.

3. partur. Tá ið annars hildið verður neyðugt at fáa gjörda býarskipan fyri eitt vist öki, kann landsstýrið, um býarskipanarnevndin tekur undir, fyriskipa tí ella teimum kommunustýrum at útvega eina býarskipan. Kortini kann ikki verða kravt, at kommunustýrið skal hava fingið býarskipan í lag við styttri enn 2 ára ávaring. Sonu treytir galda, tá ið hildið verður neyðugt at broyta eina áður góðkenda býarskipan.

4. partur. Til at ráðgerðir um býarskipanir fyri eitt óki, ið umfatar fleiri kommunur, kunnu verða samskipaðar, kann landsstýrið seta nevnd, ið skal vera kommunustýrinum til hjálpar í arbeiðinum við at fáa býarskipan í lag

fyri ökið alt. Koma hesar kommunur ikki ásamt um vídd ella innihald býarskipanar, avger býarskipanarnevndin trætuna og ásetur á hvönn hátt útreiðslurnar við samskipanini skulu verða býttar millum hesar kommunur.

5. partur. Verður ikki gjört eftir hesum skyldum og fyriskipanum, kann landsstýrið við undirtöku býarskiparnevndarinnar fáa til vega ella broyta eina býarskipan fyri ummælda öki. Kommunan, ella um so er kommunurnar, gjalda útreiðslurnar.

6. partur. Til at útvega ella broyta eina býarskipan samsvarandi 5. parti, hevur landsstýrið vald til at fremja öll mál, sum annars eftir hesi lóg og lóggávuni yvirhövur liggja undir kommunustýrinum.

Býarskipanarnevndin.

2. gr.

1. partur. Í býarskipanarnevndini sita 3 manns: ein formaður, sum Föroya lögting velur, og 2 limir, annar valdur av Föroya landsstýri, annar av Tórshavnar býráð.

2. partur. Landsstýrið kann umframt seta 2 í býarskipanarmálum serkönar menn í nevndina, men hesir hava ongan atkvöðuratt.

3. partur. Tiltaksmenn skulu verða valdir fyri formannin og hinar nevndarlimirnar.

4. partur. Allar avgerðir nevndarinnar verða tiknar við vanligum atkvöðumeiriluta. Tann kommuna, sum serligan áhuga hevur fyri tí máli, ið nevndin hevur til viðgerðar, hevur ratt til at senda umboðsmann, ið persónliga kann greiða nevndini frá sjónarmiðum kommununnar.

5. partur. Nevndin situr í 6 ár. Nevndin skal verða sett so skjótt sum tilber, aftaná at henda lóg er komin í gildi.

6. partur. Landskassin ber allar útreiðslur nevndarinnar, haruppí roknað samsýning til serfröðingarnar og til skrivara nevndarinnar.

Innihald, broytan og viðkan býarskipana.

3. gr.

1. partur. Í eini býarskipan skal verða greitt frá, hvussu ökið, ið skipanin umfatar, er vorðið í lötuni, og hvussu tað er ætlað skipað og bygt.

2. partur. Í býarskipan skal í minsta lagi verða greitt frá hesum her aftaru

nevndu umstöðum so gjölla, sum neyðugt er til at vissa hóskandi og haldgóða skipan fyri byggi-, vega-, og havnaviðurskiftum nú og í framtíðini:

1) Hvar ið vegir eru, leið og breidd teirra, byggilinjur, hvussu hornini eru sneidd, og hvussu og hvar vegir koma saman.
2) Hvar ið opin ökir og annað tílíkt, ætlað almennari ferðslu, eru.
3) Hvar ið vatnveitingar, frárennsl, ravmagns- og telefonveitingar og tílíkt liggja.
4) Hvar ið almenn hús, torg, leikvöllir, spæliplóss og annað havnaöki, viðalundir, kirkjugarðar eru.
5) Hvussu ökið er hygt, hvörji húsaslögini eru, og hvussu ökið er býtt teirra millum viðvíkjandi hædd og stödd, og um hygt er lágt ella högt og trunkað og viðvíkjandi nýtslu, um húsini eru setbús, krambúðir, virkishús (neyst og fiskaplóss uppítald) ella ökið er dyrkilendi (traðir uppítaldar).

3. partur. Býarskipanir skulu fylgja öll neyðug kort og flattekningar, sum har tað törvar, skulu merktar verða við hæddarmátum.

4. partur. Góðkend býarskipan kann verða broytt ella víðka eftir teim í 1. gr. ásettu reglum. Eitthvört kommunustýri hevur í umsiting síni yvirhövur skyldu at ganga fram eftir góðkendari býarskipan.

Byggisamtyktir.

4. gr.

1. partur. Tá ið eitt kommunustýri mælir til tess, kann landsstýrið góðkenna eina byggisamtykt fyri hesa kommunu ella part av henni.

2. partur. Hevur ein kommuna samsvarandi 1. gr. fingið í lag býarskipan, skal hon í seinasta lagi 1 ár aftaná, at henda býarskipan er góðkend, senda landsstýrinum til samtyktar uppskot til byggisamtykt fyri tað öki, býarskipanin umfatar. Landsstýrið kann tó loyva, at byggisamtyktin bara skal umfata ein part av býarskipanini.

3. partur. Landsstýrið kann annars, um býarskipanarnevndin tekur undir við tí, áleggja eini kommunu at útvega byggisamtyktir fyri kommununa ella part av henni, við tí í 5. gr 2., 3. og 5. parti nevnda innihaldi. Landsstýrið kann somuleiðis áleggja kommunu at broyta eina góðkenda byggisamtykt. Viðvíkjandi slíkum áleggingum og frama teirra galda reglurnar í 1. gr. 3., 4., 5. og 6 parti. Umframt kann landsstýrið seta tær við byggisamtykt unnröddu ætlanir í verk, so umfatandi sum neyðugt er, fyri kostnað kommununa.

Innihald byggisamtykta.

5. gr.

1. partur. Er ein samsvarandi 1. gr. góðkend býarskipan til skjals, skulu reglurnar í byggisamtyktini verða gjördar í samljóði við býarskipanina.

2. partur. Ein byggisamtykt skal annars so langt sum tær serligu sókna- og staðarumstöður gera tað ráðiligt, bera í sær reglur, ið royndst hava neyðugar at vissa hóskandi og haldgóða skipan fyri vega- og byggiviðurskiftum nú og í framtíðini.

3. partur. Í byggisamtykt, ið býti kann verða í tvær ella fleiri deildir, skulu við teimum í 2. parti nevndu reglum í huga verða tiknar fyriskipanir um hesi mál:

1) Byggivaldið og virki tess.
2) Um revsing fyri at broyta reglur byggisamtyktarinnar, um hvussu sakarmál um slík reglubrot skulu fara fram í rættinum, um broytan av ólógligum standum, og um hjálp frá politivaldinum til tess smbr. 22. gr.
3) Um undantökur og kærur viðvíkjandi avgerðum, ið byggivaldið hevur tikið.
4) Um eykagjald til byggivaldið fyri at viðgera byggimál og annað.
5) Um húsasmíð viðvíkjandi byggiháttí og bruna- og heilsuumstöðum o. s. fr. har nevnt skal verða, um rúmini eru ætlað at vera í, at arbeiða í ella at búgva í o. s. fr.
6) Um hvar ið vegir skulu verða, leið teirra og breidd og annað, samanber 3. gr., 2. part nr. 1, bæði viðvíkjandi vegum yvirhövur og viðvíkjandi einstökum vegum.
7) Um hvar ið opin öki og annað skulu verða, samanber 3. gr. 2. part nr. 2.
8) Um hvar ið veitingar skulu verða, samanber 3. gr., 2. part nr. 3.
9) Um hvar ið almenn hús, torg og annað skulu verða, samanber 3. gr., 2. part nr. 4.
10) Um húsaslögini, hædd teirra og nýtslu og hvar á lendinum hvört húsaslagi má verða bygt samanber 3. gr., 2. part, nr. 5.
11) Um hvussu stór og í hvörjum standi byggilendi skulu verða.
12) Um hvussu stórur partur av ökinum nýttur og bygdur skal verða.
13) Um hvussu langt skal verða millum hús á sama byggilendi, hvussu langt skal verða frá húsum til vegir ella byggilinjur og til mark grannans.

4. partur. Umframt tær í 3. parti í hesi grein nevndu reglur kann í byggisamtykt verða fyriskipað:

14) Hvussu langt og breitt byggilandi skal verða.
15) Hvussu hús skulu standa á byggilendi, og hvussu víða tey mega standa.
16) Hvussu húsini skulu síggja út viðvíkjandi samsvarandi hæddum, reisingum ella serligum klædningi og annað sovorðið.
17) Um og á hvörjum lendum bygt kann verða úr viði ella öðrum eldfimum tilfari.
18) Hvussu og við hvörjum gyrt skal verða og hvussu hög gyrðing eigur at vera.
19) Varðveitan av einum öki við teimum eyðkennum, tað higartil hevur havt annaðhvört viðvíkjandi byggihátti ella viða- og/ella plantuvökstri.

5. *partur.* Saman við byggisamtykt skulu liggja öll neyðug kort og flatteknigar, sum, har ið tað törvar, eiga at verða merktar við hæddarmátum.

6. *partur.* Ein góðkend byggisamtykt kann verða broytt ella víðkað við nýggjum og greiniligari reglum viðvíkjandi teim í 3. og 4. parti umröddu viðurskiftum eftir reglunum, sum settar eru fyri nýggjar samtyktir.

Kunngerð og framlöga byggisamtykta.

6. gr.

1. partur. Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrinum, skal tað verða lagt fram í minnsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framlögd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvört ökið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 3 mánaðir eru liðnir frá kunngerðardegnum.

2. partur. Innkomið mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki tekur við, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrinum til góðkenningar.

3. partur. Landsstýrið kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri fürum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í 1. parti.

4. partur. Somuleiðis kann kommunustýrið, tá ið tað, orsakað av innkomnum mótmælum ella broytingaruppskotum, hevur samtykt at broyta hitt upprunaliga uppskotið, fáa í lag, at uppskotið við hesum broytingum verður framlagt av nýggjum.

5. partur. Viðvíkjandi uppskotum, ið viðgjörd verða eftir reglunum í 4. gr., 3. parti, avger landsstýrið, nær og hvussu hesi uppskot skulu verða framlögd til eftirlitið umrött í hesi grein.

Kunngerð og tinglestur byggisamtykta.

7. gr.

1. partur. Beinan vegin byggisamtyktin er góðkend skal kommunan fyri egnan kostuað kunngera hetta á vanligan hátt.

2. partur. Umfatar byggisamtyktin fyriskipanir, ið bara viðkoma einum einstökum húsi ella eftir áskoðan kommunustýrisins nökrum fáum húsum, sammett annaðhvört við talið á teimum, ið byggisamtyktin umfatar ella við talið á öllum húsum í kommununi ella sum fastleggur, hvar ið serstakur vegur skal verða, leið og breidd hansara og so frameftir, ella hvar ið byggilinjan skal verða, hvar ið almenn hús, torg og tílíkt skulu verða, skal byggisamtyktin, so skjótt sum tilber, aftaná at hon er góðkend, verða tinglisin fyri kostnað kommununar.

3. partur. Vanligar reglur um, hvar ið vegir skulu verða, leið og breidd teirra o. s. fr., um býti av byggiháttum á einum öki, um hædd húsanna og annað, skulu vanliga ikki verða tinglisnar. Kommunustýrið kann kortini lata bæði hesar og aðrar reglur í byggisamtyktum tinglesa. Landsstýrið hevur rætt til fyri kostnað kommununar at lata tinglesa, tá ið stýrið heldur tað verða neyðugt eftir lógini ella gagnligt, tó at kommunustýrið ikki hevur tökt tinglestur verða kravdan ella neyðugan.

Fyribils forboð.

8. gr.

Tá ið eitt kommunustýri, ið hevur byggisamtykt í umbúnað, biður um tað, kann landsstýrið nokta fyri, at ein ogn, ið ætlandi kemur inn undir byggisamtyktina, verður nýtt á slíkan hátt, ið hildin verður ósamsvarandi byggisamtyktini. Slíkt forboð má bara galda eitt ár og kann ikki, uttan býarskipanarnevndin samtykkir, verða sett meira enn hesa einu ferð.

Virkan av uppskoti til byggisamtyktar.

9. gr.

1. partur. Beinan vegin kunngerðin, ið umrödd er í 6. gr., 1. parti, er vorðin lýst, má fyribils einki öki, ið samtyktin umfatar, verða bygt ella á annan hátt nýtt í mótstríði við hana samanber 10. gr., uttan loyvi frá teirri yvirvöld, ið gjört hevur hitt framlagda uppskoti. Sýtir kommunustýrið slíkum loyvi, kann málið verða lagt fyri landsstýrið.

2. partur. Er byggisamtyktin ikki vorðin góðkend, áðrenn eitt ár er liðið frá kunngerðardegnum, fellur henda umrödda virkan av kunngerðini burt-

ur. Landsstýrið kann leingja freistina, ið frammanfyri er nevnd til 6 mánaðar, tá ið hetta verður hildið ynskiligt til at fáa enda á viðgerðini av uppskotinum, ið liggur fyri.

Virkan av góðkendum byggisamtyktum.

10. gr.

1. partur. Góðkenda byggisamtykt skulu virða ikki bara teir, ið ogina eiga og nýta, men eisini teir, sum í henni eiga veð og aðrar sum rættindi í henni hava, uttan mark fyri, nær ið hesi rættindi eru fingin.

2. partur. Á einum øki, sum góðkend byggisamtykt umfatar, skal annars eingin ogn verða nýtt, verða bygd við nýggjum húsum ella verða umbygd ella sundurbýtt uttan samsvarandi byggisamtyktini.

Byggilinjur við akvegir.

11. gr.

1. partur. Heldur landsstýrið tað verða neyðugt fyri almennaferðslu at vissað verður vegi størri breidd til víðkunar ella til at fáa betri útlit yvir slíkan veg, kann landsstýrið eftir teimum í 6. og 7. gr fyrisettu reglum í eini samtykt gera av, hvussu byggilinjur fram við vegnum skulu vera.

2. partur. Ein byggilinja, ið er samtykt, hevur sama ávirkan sum tær í 10. gr. nevndu byggisamtyktir, at allar byggingar viðroknaðir septiktankar og annað skulu verða hildnar í minsta lagi so langt frá vegi, sum byggisamtyktin tilskilar ella frá miðlinjum vegsins. Er ivamál um, hvar miðlinjan er, avger landsstýrið tað.

3. partur. Á sama hátt verða 12.—14. gr. nýttar, tá ið hesir vegir verða víðkaðir, og tá ið goldið skal verða endurgjald, orsakað av byggilinjukravi, tó soleiðis at í hesum gr. skal verða lisið landsstýrið í staðin fyri kommunustýrið.

Ognartöka o. a.

12. gr.

1. partur. Grundir, hús, vötn og áir, brúgvar og annað, sum eru privat ogn, og sum neyðug eru til tey í góðkendari byggisamtykt ætlaðu tiltök, vegir, torg, leikvöllir, spælipláss, kirkjugarðar og til veitingar av ymsum slagi ella til at byggja á tey í samtyktini almennu hús og annað, ella til at útvega onnur byggilendi, ella sum tað annars hevur umráðandi týdning fyri hitt

almenna at hava ræði til at seta reglur í verk samtyktarinnar skulu, tá ið kommunustýrið krevur tað, verða latnar fyri endurgjöld eftir teimum fyriskipanum, sum henda lóg ásetir.

2. partur. Privatur servituttur ella nýtslurættindi, sum ikki verða hildin, verða úr gildi eftir 10. gr., 1. parti sum ósamsvarandi teimum í byggisamtyktini góðkendum reglum fyri, hvussu eitt öki skal verða bygt ella nýtt í framtíðini, men sum tað kortini hevur almiklan týdning fyri hitt almenna at ráða yvir til at kunna fremja eina byggisamtykt, kann kommunustýrið krevja latnar fyri endurgjald eftir reglunum í hesi lóg.

3. partur. Tann, ið eigur slíkt öki, ella hevur rættindi til tess, kann leggja spurningin, um tað er neyðugt samsvarandi hesi lóg at lata tað koma fyri landsstýrið, áðrenn 3 mánaðar aftaná almenna kunngerð, um avgerð kommunustýrisins. Umframt skulu, alt tað er gjörligt, ognarmaður ella hann, ið rættindi hevur, fáa beinleiðis boð um hesa avgerð.

13. gr.

1. partur. Tá ið tað samsvarandi byggisamtykt verður kravdur ein partur av eini ogn ella av rættindum í samband við hana, og tann parturin av ognini, ið eftir er, aftaná ta kravdu avhending, eftir ætlan metingarnevndarinnar fær slíka stödd, snið, legu og umstöður annars, at hann ikki longur vil kunna verða nýttur sum sjálvstöðug ogn, soleiði sum fyrr, kann ognarmaður, áðrenn 3 mánaðir eru liðnir, aftaná almenna kunngerð um avhending krevja, at kommunan tekur alla ognina fyri fult endurgjald. Henda samu rætt hevur ognarmaður, tá ið ognin hevur ligið saman við virki, sum hon ikki eftir metingarnevndarinnar ætlan rættiliga kann verða nýtt saman við, aftaná ta kravdu avhending av einum parti av ognini ella av rættindum, knýttum til hennara.

2. partur. Hevur kommunan kravt ogn avhendaða eftir hesum frammanfyri nevndu reglum, skal virðið við endurgjaldsútrokningini verða ásett eftir tí, ið ognin higartil hevur verið nýtt.

Endurgjald.

14. gr.

1. partur Tá ið eitt öki samsvarandi byggisamtykt er lagt av til almenn hús ella virki, ella er ætlað til vegir, torg ella annað sovorðið, og ognarmaður tess eftir meti metingarnevndarinnar smbr. 15. gr. missir möguleikan at nýta teir fyrimunir, ið ökið hevur rá rimiligan og forsvarligan hátt sammett við, hvussu grannaökini í royn verða nýtt, kann ognarmaður krevja, at kommunan skal taka ökið fyri endurgjald.

2. partur. Er ökið bara ein partur av ognini, og vil avhendingin fáa tað í 13. gr. nevndu ávirkan á tann partin, ið eftir er, kann kravið um ognartöku kommununar umfata alt öki, sum tað er.

3. partur. Ognarmaður kann umframt krevja, at kommunan tekur ogn hansara fyri endurgjald, um so er, at tær í eini byggisamtykt umröddu vega- og byggilinjur valda, at tann parturin av einum higartil óhygdum byggilendi, ið bygt kann verða á, verður so lítil ella soleiðis vorðin, at metingarnevndin metir hann vera hóskandi til húsagrund. Sama rætt hevur hann, ið eigur eitt lendi, ið higartil hevur verið bygt á annaðhvört aftaná at húsini eru niðurtikin, niðurbrend, ella á einhvönn hátt burturbeind, ella aftaná byggivaldið hevur avgjört, at ein ætlað bygging á lendinum tá ið hin núverandi bygging á lendinum er niðurbrotin ikki kann verða framd samsvarandi reglunum í byggisamtyktini.

4. partur. Krav um ognartöku eftir 1. parti kann verða sett fram nær sum helst. Krav um ognartöku eftir 3. parti skal vegna uppskots til vega- og byggilinjur, tá ið tað viðvíkjur einum óbygdum lendi, verða sett fram, áðrenn freistina, ið avmarkað er í 6. gr. Viðvíkjur ognartökan eina higartil bygda ogn, kann kravið eftir 3. parti verða sett fram, tá ið tann verandi byggingin er burturbeind, ella tá ið uppskot um nýggja bygging á lendinum kann ikki verða sett í verk.

5. partur. Krav um ognartöku eftir teimum reglum, ið nevndar eru í 1. og 3. parti, skal verða sett fram fyri ta kommunu, ið hevur beint málið til metingarnevndina.

6. partur. Metingarnevndin skal royna at böta um tær ónáðir, ið standast av hesum við býtum samsvarandi 20. gr.

7. partur. Tekur kommunan eitt öki ella eina ogn eftir reglunum í 1., 2. og 3. parti, skal virði ökisins ella ognarinnar verða sett í samband við tær umstöður, ið grunda kravið um ognartökuna, utan at farið verður eftir teirri í byggisamtykt ætlaðu nýtslu av ökinum ella ognini.

8. partur. Kommuna fær sloppið sær undan skylduni til at yvirtaka lendi ella ogn móti endurgjaldi við — í seinasta lagi 6 vikur aftaná at hon er vorðin kunnug við avgerð metingarnevndarinnar — at gevast við kravinum um avvarðandi tilætlanir.

Vanligar reglur um endurgjald.

15. gr.

Stöddin av tí endurgjaldi, sum ognarmaður eftir 12.—14. gr eigur at fáa, verður, tá ið annað ikki er tilskilað sett av eini metingarnevnd. Í hesi nevnd sita 2 manns, ið landsstýrið velur fyri 6 ár í senn, annar teirra skal

verða formaður nevndarinnar og tveir málinum óviðkomandi manns valdir av dómsvaldinum. Standa atkvöðurnar á jövnum, kemur sýslumaðurin í teirri sýslu, sum málið viðvíkir í nevndina sum avgerðarmaður. Tiltaksmenn skulu verða kosnir fyri hvönn nevndarlim.

16. gr.

Nevndin skal í öllum endurgjaldsmálum, ið viðgjörd verða samsvarandi hesi lóg, taka afturat sær serköna hjálp, ið skal verða við í öllum samráðingum, um tey endurgjaldsmál, ið liggja fyri og leiðbeina nevndina í öllum tekniskum spurningum, ið koma fyri í málinum, men atkvöðurætt eiga teir ongan. Landsstýrið skjýtur upp hesar serfröðingar so nógvar, at nevndin hevur 4 serfröðingar at velja ímillum.

17. gr.

Nevndin skal avgera á hvönn hátt, útreiðslur fyri viðgerð málsins skulu verða goldnar, eisini samsýning til nevndarlimir og til serfröðingar og kann krevja, at hann, ið reisti kærumálið hevur, sum trygging frammanundan skal seta í með vissa peninganögd til hesar útreiðslur. Tær útreiðslur, ið nevndin ásetir, kunnu verða pantaðar.

18. gr.

1. partur. Landsstýrið skrivar nevndini fyriskipan, hvussu útreiðslur fyri viðgerð av málum skulu verða greiddar, endurgjald útroknað o. s. fr.

2. partur. Í hesi fyriskipan kann verða tilskilað, at tá ið endurgjald verður ásett, skal virðisökingin, sum ognin verður mett at fáa av teimum gjördu tiltökum, verða frádrigin. Av hesum kann endurgjald heilt falla burtur, tá ið tey gjördu tiltök mett verða at geva ognarmanni störri fyrimun enn virði av tí latna öki ella rættindum er.

19. gr.

Endurgjald fyri veðbundna ogn verður, tá ið onnur avgerð er ikki gjörd, goldið millum veðeigararnar í teirri röð, ið bökur sorinskrivarans vísa veðrættindi teirra, og so nógv sum neyðugt er til fullnaðargjald veðeigarans fyri ta virðislækkan av veðtrygging teirra, ið ognartökan ella avhendingin voldu, meðan ognarmaður fær tað av endurgjaldinum ið loypir av, um so er.

Býti.

20. gr.

Metingarnevndin skal í teimum í 13. og 14. gr umræddu viðurskiftum, tá ið tað er gjörligt, fáa í lag býti annaðhvört við peningagjaldi ella við ognarbýti. Verður ikki semja um málið á vanligan hátt, kann metingarnevndin, tá ið staðarumstöðurnar tala fyri tí, krevja, at lendi, ið nevndin virðismetir til sama virði, skulu verða ognarbýtt.

Tiltök, sum nema tvær ella fleiri kommunur.

21. gr.

Trætumál millum tvær ella fleiri kommunur um, hvör ella hvörjar, ið gjalda skulu endurgjald ella útreiðslur við at fremja tey í byggisamtykt fyrikspaðu tiltök, avger býarskipanarnevndin.

Revsing, broyting o. a.

22. gr.

Í eini byggisamtykt kann verða tilskilað (sbr. 5. gr., 3. part nr. 2), at ólýdni móti reglum í hesi lóg og teimum í heuni settu fyriskipanir og forboð verður revsað við bót frá 40 kr., og at tann, ið brýtur hesa lóg, hevur skyldu at böta tann við lógarbrotinum ikomna stand, og soleiðis, at landsstýrið, tá ið serligar umstöður loyva tí, aftaná at hava fingið umnæli frá kommunustýrinum, kann gera undantak frá hesum, og at kommunustýrið kann krevja hjálp frá politivaldinum til at fremja tey boð, ið givin verða samsvarandi fyriskipanum í hesi lóg.

Sakarmál.

23. gr.

Sakarmál viðvikjandi einum um nýtslu lógarinnar reistum spurningi, sum umsitingarvaldið ikki eigur at avgera endiliga sjálvt, skal verða reist áðrenn 6 vikur eru lidnar, aftaná at kærumaðurin hevur fingið frásögn um ta avgerð, ið ynskt verður royndd.

Atgongd til máting.

24. gr.

1. partur. Ein og hvör ognarmaður hevur skyldu, aftaná í minnsta lagi viku ávaring at geva landsstýrinum ella kommununi atgongd til at útinna tey arbeiði, ið neyðug eru til at útvega ella endurkanna býarskipanir og byggisamtyktir, og at lata tey undir slikum arbeiðum sett merki verða órörd.

2. partur. Skulu hesi merki ikki bara standa heilt stutta tíð, skulu tey verða sett á girðing, hús ella nærhendis teimum ella niður í svörðin, soleiðis at tey ikki forða fyri, at ognin kann verða nýtt sum vant.

Gildi lógarinnar.

25. gr.

Henda lóg kemur í gildi tann .....

Avtöka av öðrum fyriskipanum.

26. gr.

1. partur. Landsstýrið fær vald til í hvörjum einstakum föri, tá ið byggisamtykt er góðkend, aftaná at hava fingið viðmæli frá tí kommunustýri, byggisamtyktin viðvíkjur, at avgera, hvussu umfatandi eldri byggilógir, fyriskipanir o. a. skulu verða í gildi saman við byggisamtyktini.

2. partur. Har tað í lóggávuni orðið »býarskipan« hevur verið nýtt, skal orðið »byggisamtykt« verða nýtt í staðin fyri ella javnhjóðis tí, tá ið lóggávan ikki skilliga tilskilar annað.

Lagtingslov

om byplaner og byggevedtægter.

§ 1.

Stk. 1. Efter indstilling af kommunalbestyrelsen (byrådet eller forstanderskabet) kan landsstyret godkende en byplan for vedkommende kommune eller en del af denne.

Stk. 2. For Thorshavns kommune skal der inden 3 år efter denne lovs ikrafttræden ved byrådets foranstaltninger tilvejebringes en byplan. Landsstyret kan dog efter andragende fra Thorshavn byråd og med byplannævnets jfr. § 2. tilslutning forlænge denne frist.

Stk. 3. Når det iøvrigt skönnes nödvendigt at tilvejebringe en byplan for et område, kan landsstyret med byplannævnets tilslutning pålægge den eller depågældende kommunalbestyrelser at tilvejebringe en byplan. Dte kan dog ikke pålægges en kommunalbestyrelse at tilvejebringe byplanen med kortere varsel end 2 år. Tilsvarende bestemmelser finder anvendelse, når det skönnes nödvendigt at ændre en godkndt byplan.

Stk. 4. For at fremme anordningen af byplanlægningen indenfor et område omfattende flere kommuner kan landsstyret nedsætte udvalg til at bistå kommunerne ved udarbejdelsen af en byplan for området. Såfremt der ikke opnås enighed om planens omfang eller nærmere indhold mellem de pågældende kommuner, træffes endelig afgörelse af byplannævnet, der tillige bestemmer på hvilken måde de med samordningen forbundne udgifter fordeles mellem vedkommende kommuner.

Stk. 5. Skulde de foran omhandlede forpligtelser eller pålæg ikke opfyldes, kan landsstyret med byplannævnets tilslutning foranledige tilveje-

bragt eller ændret en byplan for det pågældende område på kommunens eller vedkommende kommuners bekostning.

Stk. 6. Til tilvejebringelse eller ændring af en byplan i henhold til foregående stk., kan landsstyret udöve de kommunalbestyrelserne ved denne lov og lovgivningen iövrigt tillagte beföjelser.

Byplannævnet.

§ 2.

Stk. 1. Byplannævnet består af en af lagtinget udpeget formand og 2 medlemmer, hvoraf landsstyret og Thorshavn byråd hver udpeger et medlem.

Stk. 2. Landsstyret kan endvidere udpege 2 sagkyndige i byplanlægning til som medlemmer at indtræde i nævnet, men uden stemmeret.

Stk. 3. Såvel for formanden som for hvert af de övrige medlemmer udpeges en eller flere stedfortræder.

Stk. 4. Nævnets beslutning træffes med almindelig stemmeflerhed. En kommune, hvis interesser beröres af en nævnet forelagt sag, har ret til ved perligt fremmöde af en repræsentant at göre sine synspunkter gældende over for nævnet.

Stk. 5. Nævnets funktionstid er 6 år. Valg til Nævnet skal finde sted snarest efter lovens ikrafttræden.

Stk. 6. Nævnets udgifter, herunder honorarer til de sagkyndige medlemmer og nævnets sekretær, afholdes af landskassen.

Byplanernes indhold, ændring og udvidelse.

§ 3.

Stk. 1. En byplan skal indeholde en redegörelse for forudsætningerne for hovedlinierne i områdets nuværende og påtænkte ordning og bebyggelse.

Stk. 2. I byplanen skal der i alt fald redegöres for fölgende forhold i det omfang, som er nödvendigt for at sikre en hensigtsmæssig og tilfredsstillende ordning af nuværende og fremtidige bebyggeles- vej- og havneforhold.

1. Vejes beliggenhed, retning og bredde, byggelinier og hjörneafskæringer samt vejes indbyrdes tilslutning.
2. Beliggenheden af pladser og lignende, bestemte til almindelig færdsel.

3. Beliggenheden af ledningsanlæg såsom til drikkevand, spildevand, elektricitet og telefon.
4. Beliggenheden af offentlige bygninger og anlæg, derunder havnearealer, sports- og legepladser, parker samt kirkegårde.
5. Bebyggelsesarterne og deres fordeling på området, både i henseende til höjde og udstrækning, såsom til åben og lav bebyggelse eller höj og sluttet bebyggelse, og i henseende til benyttelse, såsom til bolig- forretnings-, industri-, (herunder möstepladser og fisketörringspladser) eller landbrugsformål (herunder tröer).

Stk. 3. En byplan skal være bilagt de nödvendige kort og plantegninger, om fornödent med höjdeangivelser.

Stk. 4. En godkendt byplan kan ændres eller udvides efter de i § 1 angivne bestemmelser. En kommunalbestyrelse er forpligtet til ved sin administration i det hele at fölge en godkendt byplan.

Byggevedtægter.

§ 4.

Stk. 1. Efter indstilling af kommunalbestyrelsen kan landsstyret godkende en byggevedtægt for vedkommende kommune eller en del af denne.

Stk. 2. For en kommune, for hvilken der i henhold til § 1 tilvejebringes en byplan, skal der senest 1 år efter byplanens godkendelse indsendes et forslag til en byggevedtægt for byplanens område til landsstyrets godkendelse. Landsstyret kan dog tillade, at bygevedtægten indskrænkes til kun at omfatte en del af byplanens område.

Stk. 3. Landsstyret kan iövrigt med byplannævnets tilslutning pålægge en kommune at tilvejebringe en byggevedtægt for vedkommende kommune eller del af denne, med det i § 5, stk. 2, 3 og 5 angivne indhold. Landsstyret kan på tilsvarende måde meddele pålæg om at ændre en godkendt byggevedtægt. Med hensyn til meddelelse af sådant pålæg og virkningerne heraf finder bestemmelserne i § 1, stk. 3, 4, 5 og 6, tilsvarnde anvendelse. Landsstyret kan desuden i fornödent omfang bringe de i byggevedtægten omhandlede anlæg til udförelse på vedkommnde kommunes bekostning.

Byggevedtægters indhold.

§ 5.

Stk. 1. Foreligger der en i medför af § 1 godkendt byplan, skal bestemmelserne i byggevedtægten udformes i overensstemmelse med byplanen.

Stk. 2. En byggevedtægt skal iövrigt i det omfang, som det pågældende områdes særegne kommunale og stedlige forhold gör tilrådeligt, indeholde bestemmelser, der efter den til enhver tid indvundne erfaring er nödvendige for at sikre en hensigtsmæssig og tilfredsstillende ordning af nuværende og fremtidige vej- og bebyggelsesforhold.

Stk. 3. I byggevedtægten, der kan opdeles i to eller flere afdelinger, skal der under hensyntagen til det i stk. 2 anförte optages bestemmelser om följende forhold:

1. Bygningsmyndigheden og dens udövelse.
2. Straf for overtrædelse af byggelovens bestemmelser, om behandlingen for retten af sager om sådanne overtrædelser og om omgörelse af retsstridige tilstande og om politiets bistand hertil, jfr. § 22.
3. Dispensation og om anke af de af bygningsmyndigheden trufne beslutninger.
4. Gebyrer for bygningsmyndighedens behandling af byggesager m. v.
5. Bygningers opförelse såvel i konstruktiv som brand- og sundhedsmæssig henseende, herunder om opholds- og arbejdsrum, beboelseslejligheder m.v.
6. Vejes beliggenhed, retning og bredde m. v., jfr. § 3, stk. 2, nr. 1, såvel for så vidt angår veje i almindelighed som af enkelte veje.
7. Beliggenhed af pladser m. v., jfr. § 3, stk. 2, nr. 2.
8. Beliggenhed af ledningsanlæg, jfr. § 3, stk. 2, nr. 3.
9. Beliggenhed af offentlige bygninger og anlæg, jfr. § 3, stk. 2, nr. 4.
10. Bebyggelsesarterne, höjde og anvendelse, og deres fordeling på området jfr. § 3, stk. 2, nr. 5.
11. Bygegrundes störrelse og beskaffenhed.
12. Bebyggelsesgraden (udnyttelsesgraden).
13. Afstanden mellem bygninger på samme grund og bygningers afstand til modstående vej- eller byggelinie og til naboskel.

Stk. 4. Endvidere kan der udover de i nærværende paragrafs stk. 3 nævnte bestemmelser i en byggevedtægt optages bestemmelser om:

14. Byggegrundens dybde og bredde.
15. Bebyggelsens beliggenhed og udstrækning på grundene.
16. Bebyggelsens ydre udformning i henseende til ensartede höjder, tagformer eller særlig beklædning og lignende.
17. Om og i hvilke områder bebyggelse må opföres af træ eller andet ikke brandsikkert materiale.
18. Arten og höjden af hegn.
19. Bevaring af et område i overensstemmelse med dets hidtidige karakter i henseende til bebyggelse eller beplantning.

Stk. 5. En byggevedtægt skal være bilagt med de nödvendige kort og plantegninger, om fornödent med höjdeangivelser.

Stk. 6. En godkendt byggevedtægt kan ændres eller udvides med yderligere bestemmelser vedrörende de i stk. 3 og 4 omhandlede forhold efter bestemmelserne om gennemförelsen af nye vedtægter.

Byggevedtægters bekendtgörelse og fremlæggelse.

§ 6.

Stk. 1. För et forslag til en byggevedtægt indsendes til landsstyret, skal det fremlægges til offentligt eftersyn på et for beboerne bekvemt sted i mindst 3 uger. Om fremlæggelsen skal der ske offentlig bekendtgörelse på den i kommunen sædvanlig brugte måde, og bekendtgörelsen skal angive forslagets område. Inden 3 måneder fra bekendtgörelsens dato skal indsigelser mod og ændringsforslag til forslaget fremsættes over for kommunalbestyrelsen.

Stk. 2. Fremkomne indsigelser og ændringsforslag, som ikke bliver taget til fölge af kommunalbestyrelsen, skal medfölge forslaget, når dette indsendes til landsstyrets godkendelse.

Stk. 3. Landsstyret kan, når det skönnes, at et foreliggende forslag bör ændres i en eller flere henseender forinden godkendelse meddeles, bestemme, at forslaget med de tilsigtede ændringer ved kommunalbestyrelsens foranstaltning på ny skal fremlægges til almindeligt eftersyn i forbindelse med offentlig bekendtgörelse herom efter reglerne i stk. 1.

Stk. 4. På tilsvarende måde kan kommunalbestyrelsen, når den på grundlag af fremkomne indsigelser eller ændringsforslag måtte beslutte at foretage ændringer i det oprindelige forslag, foranledige fornyet fremlæggelse af forslaget med ændringer.

Stk. 5. Med hensyn til forslag, der behandles efter reglerne i § 4, stk. 3, bestemmer landsstyret, hvornår og hvorledes de pågældende forslag skal fremlægges til det i nærværende paragraf omhandlede eftersyn.

Bekendtgörelse og tinglæsning af byggevedtægter.

§ 7.

Stk. 1. Umiddelbart efter at byggevedtægten er godkendt, skal meddelelse herom på kommunens bekostning bekendtgöres på den i kommunen sædvanlig brugte måde.

Stk. 2. For så vidt en byggevedtægt indeholder bestemmelser, der kun berörer en enkelt ejendom eller et efter kommunalbestyrelsens skön mindre antal ejendomme, set i forhold enten til antal af de indenfor kommunen beliggende ejendomme, eller som fastlægger beliggenheden, retningen og bredden m. v. af en bestemt vej eller byggelinie, beliggenheden af offentlige bygninger og anlæg og lignende, skal byggevedtægten på vedkommende kommunes bekostning snarest efter godkendelsen tinglæses.

Stk. 3. Almindelige bestemmelser om vejes beliggenhed, retning og bredde m. v. og bebyggelsesarternes fordeling inden for et område, om bygningers højde o. l. skal i almindelighed ikke tinglæses. Kommunalbestyrelsen kan dog lade baade saadanne og andre bestemmelser i byggevedtægter tinglæse. Landsstyret har adgang til på kommunens bekostning at lade foretage tinglæsning, hvor det efter dets skön er nödvendigt ifölge loven eller hensigtsmæssigt, uanset om kommunalbestyrelsen har fundet, at tinglæsning ikke skal finde sted.

Forelöbigt forbud.

§ 8.

Efter begæring af en kommunalbestyrelse, som er i færd med at udarbejde en byggevedtægt kan landsstyret nedlægge forbud imod, at en ejendom, der kan ventes at blive omfattet af byggevedtægten, anvendes på en måde, der må antages at komme i strid med vedtægten. Sådant forbud kan kun nedlægges for et tidsrum af et år, og kan ikke uden byplannævnets samtykke nedlægges mere end een gang.

Virkning af forslag til byggevedtægter.

§ 9.

Stk. 1. Så snart den i § 6, stk. 1 omtalte bekendtgörelse har fundet sted, må indtil videre intet areal, der er omfattet af vedtægten, bebygges eller på anden måde anvendes i strid med den, jfr. § 10, uden samtykke af den myndighed, der har udarbejdet det fremsatte forslag. En kommunalbestyrelses nægtelse af sådant samtykke kan indankes for landsstyret.

Stk. 2. Er vedtægten ikke godkendt inden et år fra bekendtgörelsens dato, bortfalder den her omhandlede virkning af bekendtgörelsen. Den nævnte frist kan dog af landsstyret forlænges med indtil 6 måneder, når dette må anses for önskeligt for at tilendebringe behandlingen af det foreliggende forslag.

Virkning af godkendte byggevedtægter.

§ 10.

Stk. 1. En godkendt byggevedtægt skal respekteres ikke alene af ejendommenes ejere og brugere, men også af panthavere og andre indehavere af rettigheder i ejendommen, ligegyldigt hvornår sådan ret over ejendommene er erhvervet.

Stk. 2. Inden for et område, der omfattes af en godkendt byggevedtægt, må iövrigt ingen ejendom anvendes, bebygges med ny- eller tilbygninger, ombygges eller udstykkes i strid med byggevedtægten.

Byggelinier ved trafikveje.

§ 11.

Stk. 1. Såfremt landsstyret af færdselsmæssige grunde finder det nödvendigt, at der sikres mulighed for udvidelse af en offentlig vej til en större bredde, eller for at skabe oversigt over en sådan vej, kan landsstyret under iagttagelse af den i paragrafferne 6 og 7 foreskrevne fremgangsmåde i en vedtægt træffe bestemmelse om byggelinier for vejen.

Stk. 2. En byggelinievedtægt har den i § 10 angivne virkning for byggevedtægter, således at alle bebyggelser, herunder septiktanke og lignende skal holdes i mindst den i vedtægten foreskrevne afstand fra vejen eller dennes midtlinie, hvis beliggenhed i tvivlstilfælde fastlægges af landsstyret.

Stk. 3. § 12—14 finder tilsvarende anvendelse ved udvidelse af de pågældende veje, og med hensyn til ydelse af erstatning som fölge af et byggelinie-pålæg, dog således at landsstyret indtræder i kommunalbestyrelsernes i paragraffernes angivne stilling.

Ekspropriation m. m.

§ 12.

Stk. 1. De private tilhörende grunde, bygninger, vandarealer, bolværker m. v., som er fornödne til anlæg af de i en godkendt byggevedtægt afsatte veje, pladser, kirkegårde og ledningsanlæg eller til opförelse af de i vedtægten afsatte offentlige bygninger eller andre anlæg, eller til fremskaffelse af byggegrunde eller som det iövrigt er af væsentlig betydning for det offentlige at råde over for at gennemföre vedtægtens bestemmelser, skal, når kommunalbestyrelsen derpå gör fordring, afstås mod erstatning efter denne lovs regler.

Stk. 2. Private servitutter og brugsrettigheder, som vel ikke kan anses for bortfaldne i henhold til paragraf 10, stk. 1, som uforenelige med de i byggevedtægten indeholdte bestemmelser om et områdes fremtidige bebyggelse eller benyttelse, men som det dog er af væsentlig interesse for det offentlige at råde over af hensyn til gennemförelsen af en byggevedtægt kan af kommunalbestyrelsen fordres afstået mod erstatning efter denne lovs regler.

Stk. 3. Spörgsmål om nödvendigheden af en i medför af dene paragraf fordret afståelse kan af vedkommende ejer eller berettigede indstilles til landsstyrets afgörele inden 3 måneder efter offentlig bekendtgörelse af kommunalbestyrelsens beslutning, endvidere skal der så vidt muligt gives vedkommende ejer eller berettigede dirkte meddelelse om denne beslutning.

§ 13.

Stk. 1. Når der i medför af en byggevedtægt fordres afståelse af en del af en ejendom eller af rettigheder knyttet til denne, og den tilbageblivende del af ejendommen efter den fordrede afståelse efter vurderingskommissionens skön ville få en sådan störrelse, form, beliggenhed eller beskaffenhed iövrigt, at den ikke mer vil kunne udnyttes som selvstændig ejendom i overensstemmelse med den af ejendommen hidtil gjorte brug, kan ejeren inden 3 måneder efter den offntlige bekendtgörelse om den fordrede afståelse begære hele ejendommen overtaget af kommunen mod erstatning. Denne ret tilkommer fremdeles ejeren, når ejendommen her været knyttet til en virksomhed, hvortil den efter den fordrede afståelse af en del af ejendommen eller af rettigheder knyttet til denne efter vurderingskommissionens skön ikke længere hensigtsmæssigt vil kunne benyttes.

Stk. 2. Når en ejendom begæres overtaget af kommunen efter foranstående regler, vil dens værdi ved erstatningsberegningen være at ansætte efter den af ejendommen hidtil gjorte brug.

Erstatning.

§ 14.

Stk. 1. Når et areal ifölge byggevedtægt er bestemt til offentlige bygninger og anlæg, eller er udlagt som vejareal, plads og lignende, og vedkommende ejer som fölge heraf efter vurderingskommissionens jfr. § 15 skön afskæres fra en efter ejendommens beliggenhed og övrige beskaffenhed ökonomisk rimelig og forsvarlig udnyttelse af arealet, svarende til den af andre tilstödende arealer faktisk stedfinddende udnyttelse, kan ejeren begære arealet overtaget af kommunen mod erstatning.

Stk. 2. Udgör arealet kun en del af ejendommen, og vil afståelsen medföre de i § 13 omhandlede följer for ejendommens restareal, kan kravet om kommunens overtagelse omfatte ejendommen i dens helhed.

Stk. 3. En ejer kan endvidere begære sin ejendom overtaget af kommunen mod erstatning, såfremt de i en byggevedtægt indeholdte vej- eller byggelinier bevirker, at den bebyggelige del af en hidtil ubebygget grund bliver så lille eller således beskaffen, at den efter vurderingskommissionens skön ikke hensigtsmæssigt kan anvendes til bebyggelse. Samme ret tilkommer en ejer af en hidtil bebygget grund, enten efter at bebyggelsen er nedbrudt, nedbrændt eller på lignende måde fjernet, eller efter at bygningsmyndigheden har truffet afgörelse af, at en projekteret bebyggelse på grunde, når den eksisterende bebyggelse på grunden er nedrevet, ikke kan gennemföres i overensstemmelse med byggevedtægtens bestemmelser.

Stk. 4. Krav om overtagelse af en ejendom i medför af stk. 1 kan fremsættes til enhver tid. Krav om overtagelse i medför af stk. 3. skal i anledning af forslag til vej- og byggelinier, når det drejer sig om en hidtil ubebygget grund, fremsættes inden udlöbet af den i § 6 omhandlede frist. For så vidt angår en hidtil bebygget ejendom kan krav i medför af stk. 3 fremsættes, når den eksisterende bebyggelse er fjernet, eller når forslag om ny bebyggelse på grunden ikke kan gennemföres.

Stk. 5. Begæring om overtagelse i medför af de i stk. 1 og 3 anförte bestemmelser skal fremsættes over for vedkommende kommunalbestyrelse, der foranlediger sagen forelagt for vurderingskommissionen.

Stk. 6. Vurderingskommissionen skal söge at afhjælpe de pågældende ulemper ved omdelinger ifölge § 20.

Stk. 7. I tilfælde af kommunens overtagelse af et areal eller en ejendom i medför af de i stk. 1, 2 og 3 anförte bestemmelser vil arealet eller ejendommens værdi være at ansætte i forhold til de omstændigheder, der begrunder kravet om overtagelse, uden hensyntagen til den ifölge byggevedtægten tilsigtede anvendelse af arealet eller ejendommen.

Stk. 8. Kommunen kan frigöre sig for en forpligtelse til mod erstatning at overtage et areal eller en ejendom, såfremt den frafalder kravet om gennemförelse af de pågældende dispositioner senest 6 uger efter at være gjort bekendt med vurderingskommissionens afgörelse.

Almindelige bestemmelser om erstatning.

§ 15.

Störrelsen af den erstatning, som tilkommer vedkommende ejer i henhold til § 12—14, fastsættes i mangel af mindelig afgörelse af en vurderingskommission bestående af 2 af landsstyret for 6 år valgte medlemmer, af hvilke den ene af landsstyret udpeges som kommissionens formand, samt af 2 af retten for den pågældende sag udmeldte uvildige mænd. I tilfælde af stemmelighed tiltrædes kommissionen af sysselmanden for vedkommende syssel som opmand. For hver af kommissionens medlemmer skal være udpeget en stedfortræder.

§ 16.

I alle sager angående erstatningskrav i medför af denne lov skal kommissionen antage sagkyndig medhjælp, der skal deltage i behandling af de fremsatte erstatningskrav og vejlede kommissionen med hensyn til sagens tekniske spörgsmål, men ikke deltage i kommissionens afstemninger. Disse sagkyndige udpeges af landsstyret, således at kommissionen kan vælge mellem 4 sagkyndige.

§ 17.

Kommissionen skal træffe afgörelse om afholdelse af sagens omkostninger, derunder honorarer til kommissionens medlemmer og sagkyndige, og kan af klageren i sagen kræve deponeret et belöb til bestridelse af disse udgifter. De af kommissionen ikendte omkostninger kan inddrives ved udpantning.

§ 18.

Stk. 1. Landsstyret udfærdiger en intruks for kommissionens afholdelse af sagens omkostninger, erstatningsberegninger m. v.

Stk. 2. Det kan i instruksen bestemmes, at der ved fastsættelse af en erstatning heri bliver at afkorte den forögelse i værdi, som ejendommen iövrigt skönnes at opnå ved de trufne foranstaltninger. Som fölge heraf kan erstatning ganske bortfalde, når foranstaltningerne skönnes at medföre större fordel for ejeren end værdien af den afståede grund eller rådighed udgör.

§ 19.

Erstatning vedrörende en pantebehæftet ejendom udbetales i mangel af anden aftale mellen panthaverne til disse i den orden, hvori de efter de af sorenskriveren förte tingböger er panteberettigede og i det omfang, som er fornödent til panathaverens fyldestgörelse for den ved ekspropriationen eller overdragelsen foranledigede forringelse af deres pantesikkerhed, medens den eventuelt resterende del af erstatningen udbetales til ejeren.

Omdelinger.

§ 20.

I de i § 13 og 14 omhandlede tilfælde skal vurderingskommissionen söge tilvejebragt hensigtsmæssige omdelinger enten ved overdragelsen mod vederlag i penge eller ved magelæg. I mangel af mindelig overenskomst kan vurderingskommissionen, når de stedlige forhold i væsentlig grad taler derfor, påbyde magelæg mellem jordstykker af samme værdi efter vurderingskommissionen ansættelse.

Anlæg, der berörer to eller flere kommuner.

§ 21.

Tvistigheder mellem to eller flere kommuner om, hvilken eller hvilke kommuner, der skal udrede erstatning eller afholde udgifter ved gennemförelsen af et i en byggevedtægt fastlagt anlæg, afgöres af byplannævnet.

Straf, omgörelse m. v.

§ 22.

Det kan i en byggevedtægt (jfr. § 5, stk. 3, nr. 2) fastsættes, at overtrædelse af bestemmelserne i denne lov og af de i medför heraf af de vedkommende myndigheder trufne afgörelser og nedlagte forbud straffes med böder fra 40 kr., og at den, som overtræder denne lov, er pligtig at omgöre den ved overtrædelsen skabte retsstridige tilstand, og således at landsstyret under særlige omtændigheder efter indhentet erklæring fra kommunalbestyrelsen kan göre undtagelser herfra, og at kommunalbestyrelsen kan fordre politiets bistand til gennemförelse af de pålæg, der måtte gives i overensstemmelse med denne lovs bestemmelser.

Sögsmål.

§ 23.

Sögsmål angående et ved lovens anvendelse opstået spörgsmål, der ikke er undergivet forvaltningens endelige afgörelse, skal anlægges inden 6 uger, efter at den afgörelse, der önskes prövet, er meddelt klageren.

Adgang til opmåling.

§ 24.

Stk. 1. Enhver grundejer er forpligtet til efter rimeligt varsel af mindst en uge at give landsstyret eller kommunen adgang til at foretage de til udar-

bejdelse af eller kontrol med byplaner og byggevedtægter fornødne arbejder og til at lade de under sådanne arbejder anbragte mærker urørte.
Stk. 2. Såfremt mærkernes anbringelse ikke er ganske kortvarig, skal den ske på hegn, huse eller i nærheden af disse eller i jordoverfladen, således at den ikke hindrer ejendommens sædvanlige benyttelse.

Lovens ikrafttræden.

§ 25.

Loven træder i kraft den

Ophævning af andre bestemmelser.

§ 26.

Stk. 1. Landsstyret bemyndiges til i hvert enkelt tilfælde, når en byggevedtægt er godkendt, efter indhentet erklæring fra vedkommende kommunalbestyrelse at træffe bestemmelse om, i hvilken omfang ældre bygningsmæssige lovbestemmelser, anordninger m. v. skal bevare deres gyldighed ved siden af vedtægten.

Stk. 2. Hvor der i lovgivningen anvendes ordet »byplan«, skal »byggevedtægter« træde i stedet eller betragtes som sideordnet, medmindre andet udtrykkelig fremgår af den pågældende lovgivning.

Viðmerkingar

til

til nakrar greinir í lógaruppskotinum.

Til 1. gr. Tá býarskipanir mugu legnast eftir landsins framburði yvirhövuð, verður tað hildið rímiligt, at góðkenningarvaldið liggur hjá hægsta umsitingarvaldi landsins, landsstýrinum. Tað fær tó undir sær eina býarskipanarnevnd, sum fær líkindi til meinkunnleika til kommunal viðurskifti.

Hvussu mikið landsstýrið fer at gera nýtslu av könari hjálp til metingar um innkomin uppskot, ella um tað vil gera nýtslu av tí kunnleika, sum býarskipanarnevndin fær hövi at taka sær, stendur opið.

Tað hevur ikki verið ætlanin at tilevna lógaruppskotið so, at allar bygdir yvir eina vissa stödd ella eitt nú tær, sum hava havn, neman Tórshavnar kommunu, skulu hava skyldu at fáa sær býarskipan. Men landsstýrið fær líkindi til eftir gjördum royndum at stíla so fyri, at tað verður treytað kommunum í törvandi muni at fáa sær býarskipan. Í 3. gr. er skilað til, hvat býarskipan skal innihalda.

Ætlingin við regluni í 4. petti um myndíng av eini samskipingarnevnd er, at hon skal nýtast, har býur liggur í 2 ella fleiri kommunum. Reglan kann eisini koma í nýtslu fyri störri öki, um so er, at royndir skuldu sýnt tað törvandi at skipa samlög, nevniliga býarskipanir fyri 2 ella fleiri kommunur, sum sína millum kunna hava áhugamál, hvör móti aðrari, skipast saman so nýtiligt úrslit kann fáast í bygging av havna- og samferðsluviðurskiftum innanfyri ökið.

Til 2. gr. Soleiðis sum skotið er upp at mynda býarskipanarnevndina, er tað ætlanin at fáa í henni umboð bæði fyri landsins og kommunana áhugamál.

Dentur eigur at verða lagdur á, at samanhangur eigur at vera í arbeiði nevndarinnar, og tí er virkisfið hennara sett til 6 ár.

Til 3. gr. Við hesi reglu trongist innihald býarskipanar til at innihalda viðurskifti, sum mugu ætlast at hava serligan týdning fyri býarins ella bygdanna vökstur. Ætlanin er, at bert tílíkar reglur um tey í hesi grein nevndu viðurskifti, í so miklum mani, sum tey kunnu hava týdning fyri vökstur býarins ella bygdanna, skulu takast við.

Er tað ikki neyðugt, skal býarskipanin minkast til bert at nema tílík viðurskifti.

Ein góðkend býarskipan er ein sáttmálabinding millum landsstýrið og ta kommunu um, at hon í síni umsiting yvirhövur vil fylgja teim reglum, sum settar eru í býarskipanini. Býarskipan verður bindandi fyri hvönn einstakan grundeigara, tá byggisamtykt er framd eftir 4. gr.

Til 4. gr. Har býarskipan er, má innihaldið av teim reglum, sum takast við í byggisamtyktini vera samsvarandi tí. Tað er byggisamtyktin, sum ger býarskipanina bindandi fyri tann einstaka grundeigarin.

So sum skilað til í inganginum verður tað ikki í öllum förum neyðugt at hava fingið sær býarskipan, áðrenn byggisamtykt er framd.

Tá byggisamtykt er góðkend, víkja allar higartil galdandi reglur av tilsvarandi slagi.

Til 5. gr. Reglurnar í 1. parti eru bert ætlaðar til leiðbeiningar. Vísir tað seg, at býarskipanin eftir at hon er góðkend, ikki er nóg álítandi sum grundarlag undir tilevning av byggisamtyktini, verður tað ikki torfört samstundis við byggisamtyktini at gera broyting í býarskipanini og senda landsstýrinum hana til góðkenningar. Dentur verður lagdur á, at byggisamtykt og býarskipan samsvara.

Um innihaldið í eini byggisamtykt annars geldur tað sama sum tilskilað er undir 3. gr. um innihaldið í einum býarskipan. Tað er ikki neyðugt, í byggisamtykt at taka upp reglur um öll tey í 3. parti undir nr. 1—13 nevndu viðurskifti. Men kommunustýrini mugu gjölla ætla um undir eftirkanning landsstýrisins, í hvussu stóran mun tey undir 2. parti nevndu viðurskifti gera tað neyðugt at taka upp positivar reglur eftir 3. parti.

Hövi til, so sum skotið upp í 3. parti, at liða byggisamtykt í 2 ella fleiri deildir fær ætlandi týdning, serstakliga tann vegin, at byggisamtykt verður gjörd, sum tekur meginpartin av teim reglum, sum eiga at galda fyri ein bý, meðan reglur, t. s. um nýggj vegalendi til almenna nýtslu verða tiknar upp í eina byggisamtykt fyri seg.

Her verður eisini víst til 7. gr. 2. og 3. part um tinglesing av konkretum reglum í byggisamtykt.

Tey undir nr. 1—13 í 3. parti nevndu viðurskifti falla í fylgjandi deildir eftir tí endamáli, teim er ætlað at tæna:

a: nr. 1—4 hava í hyggju at gera líkindi til at gera upp eina skilagóða umsiting og at tilevna tær formellu reglur í eini byggisamtykt eftir teim viðurskiftum, sum eyðkenna tey einstöku umdömi.

b: nr. 5 gevur hövi til eina tilevning av teim konstruktivu reglunum eftir gjöllari kanning av sögubundnum byggistíli og hóskandi byggihátti.

c: nr. 7—9 geva líkindi til deils at fyriseta, t. d. eina ella fleiri vegabreiddir yvirhövur og deils at vissa lendi í almennum endamáli.

d: nr. 10—13 gevur líkindi til fyri býarins vökstur so týdningarmikla skipan í bygging bæði í einum býti í ymiskar býlingar annaðhvört við högari ella lágari bygging, búsetur ella vinnulig viðurskifti og um fyriseting av tíðarhóskandi reglum um byggingarætig, ljósteinar v. m. Einki forðar fyri, at tílíkar reglur eru ymiskar fyri hinar einstöku býlinganar.

Í 4. parti er uppaftur givið einum kommunustýri líkindi til eina gjöllari skiping av byggingini.

Ætlingin hevur eisini verið í nr. 19 at geva líkindi til varðveitslu av virðismiklum býlingum ella ökjum, soleiðis at tað almenna hervið fær fylgt við í býarins vökstri yvirhövur.

Til 6. gr. Tá tað er av största týdningi fyri tann einstaka, at hann fær hövi til at gerast kunnugur við hær regulerandi reglur, sum ætlast framdar á ogn hansara, verður skotið upp, at víðgongdur almenningur um uppskot til byggisamtykt verður tryggjaður.

Lagt verður í geyma, at 3 mánaða frestin og haraftrat kommunustýrisins viðgerð av kærumálum og tí endaliga uppskotinum, kann gera tað torfört at halda 1 árs frestina eftir 4. gr., 2. parti. Bent verður tó á líkindi til at senda inn uppskot til býarlög og byggisamtykt samstundis.

Til 7. gr. Við hesi reglu, serliga 2. og 3. parti hevur verið roynt at útvega eina skipan, sum eftir teim í Danmark gjördu royndum fremur fyrilit fyri

tí einstaka borgaranum og interessuni í, at kommunurnar ikki ovbyrjast av útreiðslum og ómaki í tinglesing, hvörs virði, so vítt teim almennu reglunum viðvíkir, má ætlast heilt ivasamt.

Til 8. gr. Tá ein tíð má ganga, áðrenn ein byggisamtykt kann fremjast, verður tað hildið hóskandi at skjóta upp eina reglu, sum gevur kommununum hövi til í forhond at forða tiltökum, sum vilja koma í stríð við komandi byggisamtykt.

Til 9. gr. Í frambaldi av tí sum flutt er fram til 8. gr., verður tað hildið rímuligt, at ein grundeigari ikki í tíðarskeiðinum, sum má ganga millum kommunustýrisins samtykt av uppskoti til byggisamtykt og landstýrisins góðkenning, kann fremja tiltök, um eru í stríð við byggisamtyktar endamál og reglur.

Til. 11. gr. Við almennar vegir, sum liggja uttanfyri býaröki ella við tílík minni býaröki, har tað vil vera ivasamt, um byggisamtykt eigur at fremjast, kann tó trongd vera at tryggja tílíkum vegum víðkanir til mest möguligan tryggleika fyri ferðsluni, uttan at tað skuldi verið neyðugt fyri ein einstakan veg at fremja byggisamtykt fyri tað býaröki.

Til 12. gr. Tey seinnu árini hevur tað verið ringt at fáa byggilendi vegna stórar tilflytingar, serstakliga í Tórshavn og teim örru bygdunum. Tað hevur tí verið hildið neyðugt at geva líkindi til at fremja ognatöku til útveginga av byggilendi.

Hesin möguleiki er í grundini longu, nú 35. gr. í lög nr. 174 frá 24. mai 1937 om jordbrugets fremme loyvir bundna avhending av lendi til byggigrundir.

Til 13. gr. Henda reglan samsvarar við vanliga ognartöku manuagongd.

Til gr. 14. Henda regla gevur úttrykk fyri sama prinsippi, sum liggur undir 13. gr.

Hon hevur í hyggju at verja grundeigara móti, at kommunustýri við úlegging av ogn hansara ella öki av henni í almennum endamáli, avsker honum nýtsluna av ognini samsvarandi býarins vökstri yvirhövur.

Á sama hátt eigur grundeigari líkindi til endurgjald fyri missir vegna tess, at vegur ella byggilinja fer gjögnum ogn hansara, afturímóti ætlast grundir ikki at vera fyri endurgjaldi fyrr enn tann tíð kemur, at eigarin, um hann ikki kann gera nýtslu av hesi reglu, vildi liðið miss. Frestin í 4. parti er sett so, at kommunustýrið fær hövi til yvirlit, hvörjar peningaligar fylgir fremjingin av vegi ella byggilinju vil hava við sær.

Annars verður strika undir, at grundeigarin ikki fær endurgjald fyri reglur í byggisamtykt um nýtslu av lendi hansara ella um byggingarstig og tær ljósviddir, sum havast skulu fyri eygu við bygging, hóast reglan í sær hevur eina nýtsluskerjing.

Harafturímóti skal endurgjald sjálvandi veitast fyri veruligar ognar avhendingar.

Til 15. gr. Samansetingin av metingarnevndini, so sum hon er skotin upp, hevur verið roynt at gagna almennum og privatmanna interessum. Nú 2 av limunum framvegis skulu sita í nevndini, hevur verið roynt at útinna, at nevndin fær líkindi at vinna sær törvandi royndir av teim viðgjördu málunum, soleiðis at eins avgerðir kunnu fremjast í málunum.

Til 16. gr. Tá býarskiping er hildin fram sum eitt nýtt rættaröki, hvörs sjónarmið oftani mugu ætlast at hava serteknisk eyðkenni, hevur tað verið hildið neyðugt, at nevndin fær hövi til törvandi rættleiðingar.

Til 19. gr. Tær her uppskotnu reglur eru úttrykk fyri vanligum ognartökurætti.

Til 20. gr. Gjögnum tey umskifti, sum skotin eru upp, skuldu líkindi givist, at kommunur í summum förum kunnu fremja byggisamtykt við minni útreiðslum enn annars uttan at nerva reglurnar í byggisamtyktini.

Til 25. gr. Tá lögin um býarlög og byggisamtyktir bert er heimildarlög, sum ikki inniheldur posetivar reglur um byggingar, longd, skorsteinar v. m., er tað neyðugt, at higartil galdandi löggáva verður í gildi til byggisamtyktir eru framdar.

Tórshavn, hin 23. november 1951.

J. Djurhuus. Hanus við Högadalsá. P. Guttesen. A. Kjær. H. C. W. Tórgarð.

1. viðgerð 30. november, 26. mars 1952 legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Í 1949 lat landsstýrið seta eina 5-mannanevnd at gera uppskot til byggilög og lög um býarskipanir og byggisamtyktir og landsstýrið hevur lagt uppskotið fyri lögtingið, ið hevur beint málið í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og skal föra fram:

Okkara byggilöggávu törvar óivað eina munandi revisión. Hon er

gomul og ikki tíðarhóskandi fyri tær störru bygdirnar og Tórshavn, har byggingin er meira býarkend. Tað er soleiðis trongd til at henda lóggáva verður meira tíðarhóskandi.

Uppskotið gongur eitt stórt stig frameftir og hevur sína grund í donsku býarskipanarlóggávuni.

Áðrenn uppskotið verður gjört til lóg, heldur nevndin at uppskotið eigur at verða lagt fyri tær störru kommunurnar til unmælis og eisini fyri matrikulskrivstovuna og setur nevndin tí fram fylgjandi

uppskot.

Landsstýrið verður biðið um at senda uppskot til lögtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir til unmælis hjá teim störru kommununum og hjá matrikulskrivstovuni og leggja málið aftur fyri tingið.

2. viðgerð 27. mars 1952.

Uppskot nevndarinnar samtykt 15—0.

---

39. Vanlukkutrygging.

1951, 20. november legði R. Long, landsstýrismaður fram soljóðandi uppskot d. 20. november s. á.:

Í august 1949 skrivaði sosialministeriið landsstýrinum, at teir eftir áheitan vildu lata ein ella tveir av embætismonnum sínum vera til hjálpar til eina umbótanarviðgerð av lóggávuni um vanlukkutrygging í Föroyum og kanna, hvörjar útreiðslur fóru at vera av at lækka skaðabötur og forsyrgjaraendurgjald munandi ella til somu hædd, sum veitt verður eftir danskari lóg.

Vanlukkutryggingarstjórin Birkmose og Antonsen lulltrúi vórðu bidnir at gera uppskot, og vóru teir síðani í Föroyum og lögdu uppskotið fyri lands-

stýrið. Eftir at vera handfarið av nýggjum í sosialministeriinum er uppskotið við viðmerkingum sent landsstýrinum og hevur verið til ummælis hjá Föroya Vanlukkutrygging og vanlukkutryggingarráðnum.

Uppskotið, sum miðar ímóti at gera ta her galdandi lóg og kunngerð í mestum lutum samsvarandi tí í Danmark galdandi, verður her lagt fyri tingið við viðmerkingunum frá vanlukkutryggingarstjórnini donsku, og frá Föroya Vanlukkutrygging. Ummælið frá föroyska vanlukkutryggingarráðnum verður sent tinginum, so skjótt tað er komið landsstýrinum í hendi.

Eftir núgaldandi kunngerð (anordning for Færöerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde af 29. marts 1939) kann verða veitt hesar skaðabótur og forsyrgjaraendurgjald:

1) dagpeningur,
2) avlamisskaðabót,
3) endurgjald til eftirsitandi konu og börn (forsyrgjaraendurgjald),
4) jarðaferðastyrkur.

ad 1) Dagpeningur verður nú goldin við 6 kr. (hækkaður við bráðfengis lögtingslóg í 1944 og var áður 2,50 kr.). Dagpeningur verður ikki goldin, fyrr enn 13 vikur eru umliðnar frá skaðatilburðinum. Skotið verður upp, at dagpeningur verður goldin, tá ið vika er umliðin.

Meðan dagpeningur higartil hevur verið tann sami til öll tryggjað, verður skotið upp, at lata hann vera eftir árslön hansara, ið verður fyri skaða, $^3/_4$ av daglönini, ið verður at finna sum 1/300 av árslönini árið fyri skaðatilburðin. Ongin árslön skal til útroknan av skaðabót ella endurgjald kunna fara upp um 5000 kr.

ad 2) Núgaldandi lóg veitir einum tryggjaðum fólki í mun til mist arbeiðsföri eina árliga skaðabót, sum í mesta lagi (tá ið viðkomandi er heilt avlamin) er 3/5 av eini árslön uppá 1500 kr. (hækkað í 1944 frá 900 kr.). Skotið verður upp at rokna skaðabótina ella avlamisbótina út frá árslönini árið fyri við 5000 kr. sum hægsta mark og broyta 3/5 til 2/3.

ad 2) og 3) Sum heilt nýggja fyriskipan — ið ikki er í tí donsku lögini — verður skotið upp, at skaðabötur og forsyrgjaraendurgjald verður at veita fyri skaðatilburðir, ið berast á meðan viðkomandi er á veg til ella frá arbeiðisplássi, og ferðin er orsakað av arbeiði hansara ella er í samanhang við tað.

ad 3) Núgaldandi lóg veitir konu, ið situr eftir tryggjaðan mann, í forsyrgjaraendurgjaldi 5.400 kr., eftirsitandi barni upp í 2025 kr. Mesta endurgjald er nú 9450. Peningahæddirnar vórðu í 1944 við bráðfengis lögtingsfyriskipan hækkaðar frá ávikavist 3600 kr. og 1350 kr. Til eftirsitandi barn, sum frammanundan hevði mist mammuna, kundi veitast síðan

1944 4050 kr., áður 2700 kr. Hesar peningahæddir svaraðu til ávikavist 3, 6, 1,35 og 2,7 ferðir ta lógskilaðu árslön (fyrst 900 kr., seinni 1500 kr.,). Í 1948 eru í tí donsku vanlukkutryggingarlógini hesi faldingartöl broytt til ávikavist 4, 1,5 og 3 og endurgjaldið eins og eftir 1) og 2) at rokna út frá tí árslön, viðkomandi hevur haft árið fyri (upp í 5000 kr.) og ikki út frá einari lógtilskilaðari árslön. Mesta endurögjald (til konu og börn) er skotið upp at skulu kunna vera 7 ferðir árslönina.

ad 4) Skotið verður upp at veita í jarðaferðastyrk upp í 350 kr. í staðin fyri sum nú upp í 100 kr.

Hetta eru hövuðsbroytingarnar í uppskotinum, og orsaka tær, um tær verða samtyktar, at nógvar greinir mugu orðast um samsvarandi, sum tilskilað í uppskotinum. Umfram ymsar smábroytingar viðvíkjandi sjálvkravdum tryggingum o. a. verður skotið upp at hækka inntökumarkið fyri at kunna fáa statsstudning til premiugjaldið til 4200 kr. — Föroya Vanlukkutrygging greiðir frá, at statsstudningurin til premiugjald hevur ikki verið latin, síðan tryggingin fekk sína núverandi skipan fyri 25 árum síðan.

Viðmerkingar frá Föroya Vanlukkutrygging.

Inngangur:

De foreslåede ændringer sætter ind på 2 hovedpunkter, nemlig 1) *Lovlönnen*, 2) *Karenstiden i forbindelse med dagpengeydelsen.*

Lovlönnen (tann lön, sum lógin leggur til grund fyri endurgjaldið) indvirker såvel på den egentlige erstatningsudmåling som på dagpengeydelsen, det vil sige den godtgörelse, de tilskadekomne på visse betingelser har krav på, mens afgörelsen af invaliditetserstatningsspörgsmålet beror, nemlig til tilstanden er blevet stationær, således at ulykkestilfældets *endelige* följer lader sig overse med nogenlunde sikkerhed.

Forslaget bryder med det hidtil gældende princip, hvorefter alle ydelser ligger fast, idet dödserstatningerne overvejende er fastsat i aanordningen med bestemte beløb, medens invaliditetserstatningerne fastsættes på grundlag af en i anordningen fastlagt generel årslön, således at samme invaliditetsgrad bestandig giver samme invaliditetserstatning, ved for medhjælperforsikringens vedkommende at indföre en lovlön, varierende efter den individuelle faktiske indtægt for året umiddelbart forud for ulykkestilfældet indenfor et vist maksimum (5.000. — kr., henholdsvis 3.600. — kr.), i visse tilfælde efter Ulykkesforsikringsrådets skön.

Dette erpå linie med forholdene i de flests lande og synes at være det eneste rigtige, da hidtidig praksis har stillet de bedre lönnede ringere ved ulykkestilfælde, fordi f. e. dagpengenes relativt ringere störrelse for disses vedkommende bevirkede en större ændring i levefoden, således at de ikke i den henseende blev tilstrækkeligt forsikret mod fölgerne af ulykkestilfælde. Imidlertid bliver forholdet kompliseret ved forslagets indförelse af en sondring mellem medhjælperforsikring og egenforsikring, idet det hidtil gældende prinsip söges bibeholdt med hensyn til disse sidste, dog med mulighed for de frivilliges vedkommende for beregning efter en lavere årslön, når dette er aftalt i forsikringsbetingelserne.

Hvorvidt det er heldigt at indföre en sådan sondring, er et stort spörgsmål. Under alle omstændigheder burde kriteriet ikke være: Medhjælperforsikring eller egenforsikring, men: *pligtig* ulykkesforsikring (af medhjælp og egen person) eller *frivillig* egenforsikring. Man tænkte sig blot dette forhold: En skibsfisker pådrager sig om bord en skade, som bliver erstattet på grundlag af en lovlön på maksimum (5000 kr., alternativt efter forslaget 3600 kr.). En anden skibsfisker, der er gået i land, men tager ud med sin baad og pådrager sig en skade til samme invaliditet, vil kun kunne få knapt halvdelen, henholdsvis $^2/_3$ af, hvad skibsfiskeren opnåede i erstatning. Det vilde bestemt ikke blive gouteret. Men selv sondringen efter sidstnævnte kriterium vilde med gennemsnits-færingens meget lidt udviklede sans for ulykkesforikringens væsen og forståelse af dens problemer uvægerlig afstedkomme megen utilfredshed og dermed skabe forsikringen yderligere vanskeligheder. Også fra arbejdsgiverside kunde man tænke sig utilfredshed med at skulle holde medhjælpen forsikret höjere — og dermed dyrere — end hvad den samme arbejder har mulighed for at opnå i kraft af sin eventuelle sidelöbende frivillige egenforsikring.

ad 1). Karenstiden (tann dagpeningaleysa tíðin). I modsætning til lovlönnen, der har sin store betydning for de skader, der medförer en större eller mindre *livsvarig* invaliditet eller tab af menneskeliv, har karenstiden kun en relativt kortvarig rent ökonomisk betydning. Forkortelsen fra 13 uger til 1 uge vil naturligvis komme en 30—40 invaliderede til gode årlig, men vil betyde et rimeligvis langt större udlæg til en mængde personer med en kortere eller længere *forbigående* arbejdsudygtighed.

Også her indförer forslaget en sondring mellem medhjælperforsikring og egenforsikring, idet der for sidstnævntes vedkommende sikres dagpenge fra ugedagen efter ulykkestilfældet, hvorimod de frivilligt egenforsikrede normalt som hidtil först fra 14. uges begyndelse opnår dagpengeret, men dog har adgang til at sikre sig dagpenge fra et tidligere tidspunkt, tidligst fra ugedagen efter et ulykkestidfælde.

Foruden selve dagpengenes forskellige störrelse indeberer forslaget yderligere konfliktstof i selve det forhold, at det, hvor der er tale om den forkortede karenstid, bliver forsikringsselskabet, der bestemmer årslönnen, hvorefter dagpengenes störrelse beregnes, hvorimod det i alle tilfælde, hvor invalilitetserstatning skal ydes, er Ulykkesforsikrings-Rådet, der bestemmer

årslönnen. Det måtte derfor synes rimeligt, at oplysningerne om årslön indhentedes fra samme kilde, nemlig skattevæsenet i form af en attest, som det pålagdes den pågældende tilskadekomne at præstere som bilag til skadeanmeldelsen. En forudsætning herfor måtte da være, at udtrykket i forslagets § 44, stk. 1 »det år, der går forud for ulykkestilfældets dato« erstattedes med »det skatteår, der ligger umiddelbart forud for ulykkestilfældets dato«. I hvert fald må det være betænkeligt at indföre en bevægelig lovlön, uden at der samtidig skabes mulighed for kontrol mod misbrug ved urigtige indtægtsoplysninger.

ad 2) og 3). Til forslagets § 3, stk. 1, 3. punktum, *ulykkestilfælde på vej til og fra arbejdsstedet* bemærkes:

Der har hidtil på dette område gennemgående været fulgt de samme regler som i Danmark, men af og til anerkendt tilfælde, som formentlig ikke vildi være blevet det i Danmark, under hensyn til de særlige forhold her, dog (med en enkelt undtagelse) ved en ret vidtgående fortolkning af omfanget af den personlige forsikring, idet det efter forholdene her ofte er vanskeligt at gennemföre den i anordningens og forslagets § 55, 58 og 73 omhandlede gruppering af arbejder i praksis. Man har resonneret, at den mand, der har tegnet en personlig firsikring, og tillige er forsikret som medhjælp, har krav på, at disse forsikringers omfang supplerer hinanden så godt som overhovedet muligt, og betragtet f. eks. en fiskers rejse fra en bygd til en anden for at gå om bord i sit skib som faldende ind under hans personlige forsikrings område. Denne betragtning har Ulykkesforsikrings-Rådet (og direktoratet for ulykkesforsikringen som appelinstans) tiltrådt i enkelte tilfælde i andre tilfælde ikke. I nævnte undtagelsestilfælde, hvor en mand på vej fra en bygd efter week-enden tog over fjeldet til den hvalstation, hvor han arbejdede, og pådrog sig skade ved at blive blæst om af en kastevind, anerkendte rådet tilfældet, men som faldende ind under arbejdsgiverens forsikring, hvilket syntes ulogisk, eftersom rejsetiden jo ikke medregnes i den arbejdstid, arbejdsgiverens præmie beregnes efter. Derimod er tilfælde af lignende art stedse afvist, når der ikke har foreligget en personlig ulykkesforsikring.

Der synes herefter anledning til at föje følgende forbehold til det foreslåede 3. punktum til stk. 1: »landskassen, for så vidt disse ikke af rådet ses at påhvile Föroya Vanlukkutrygging i medför af anordningens almindelige bestemmelser«.

Ændringerne i brøken i § 32 fra $^3/_5$ til $^2/_3$ vil forhöje alle invaliditetserstatninger med $6^2/_3$ % på denne konto alene, men denne merudgift behöver isoleret ikke at medföre nogen præmieforhöjelse.

I bemærkningerne ad § 58 har der indsneget sig en misforståelse. Fra ældre tid, da fiskeriet med kuttere var sæsonfiskeri, og en skibsfisker i vinterhalvåret ofte drev selvstændigt bådfiskeri, som et betydeligt bierhverv, er det blevet en hævdvunden praksis, at skibsfiskerne — omend måske

med mindre og mindre berettigelse — er blevet henregnet under § 58, 1. stk., således at de ved at opföres på forstanderskabslisterne har kunnet drage fordel af en forsikring mod ethvert ulykkesforsikringsanordningen hörende ulykkestilfælde, jvfr. § 58, stk. 1, sidste punktum. Denne personlige præmie blev tidligere ved påmönstringen forudbetalt af rederiet på den enkelte fiskers vegne, men da rederierne i slutningen af tyverne kom ud i modvind og vanskeligt kunne påtage sig sådan forudbetaling, slog man ind på den praksis, at den enkelte fisker ved påmönstringen gav transport på sit fiskeriudbytte for præmien, som rederen senere tilbageholdt ved afregningen med fiskeren til indsendelse til forsikringsselskabet. Rederierne har således ikke selv betalt for fiskernes personlige forsikring. Ja, for visse dårligt körende rederier har forholdet været lige omvendt, idet de vel har tilbageholdt mandskabernes personlige præmier, men ikke viderebetalt dem til forsikringsselskabet, som netop på den konto har lidt adskillige tab, når fartöjerne er solgt ved tvangsauktion med en i reglen meget lille dividende til simple kreditorer. Ifölge bemærkningerne til § 58 skulde denne ordning aflöses af en ordning, hvorefter medbjælperen (fiskeren), hvis han har en egenforsikring, kun skal betale for den tid af året, han er beskæftiget i egen virksomhed. Dette er næppe nogen fordel, da forholdet i praksis må blive, at hann afkræves og betaler fuld præmie forud og derefter dokumenterer f. eks. ved afregninger fra rederier, hvor stor en del af årspræmien han skal have refunderet. Men samtidig vil forholdet blive, at skibsfiskerne i store skarer vil forsvinde som egenforsikrede, dels fordi de f. eks. som trawlfiskere er beskæftiget hele året eller som ikke drivende hjemmefiskeri ikke falder ind under § 58 og således ikke skal opföres på forstanderskabslisterne. Dette vil, hvor rigtigt det måtte være betyde foruden en betragtelig nedgang i forsikringsselskabets præmieindtægt, at en stor del af skibsfiskerne er uforsikrede i samme öjeblik, de går i land, i modsætning til hidtil, hvorefter de har været forsikret i medför af sidste punktum i § 58, 1. stk. efter en måske ikke i alle tilfælde fuldt berettiget tvangsforsikring. Den foreslåede ordning betyder således juridisk et reelt fremskridt, men i praksis et decideret tilbageskridt. Hvor meget der end har været anket over forsikringsbestemmelserne fra alle mulige sider, den ordning, at en fisker ved påmönstringen kræves personligt ulykkesforsikret for at være dækket, når han går i land fra skibet, har der aldrig været anket over, ikke en gang af dem, der har haft helårsbeskæftigelse om bord, bortset fra tiden mellem fisketurene.

Statstilskudsbestemmelserne må formentlig slöjfes, da det på forhånd må anses for udelukket, at landskassen vil indtræde i statskassens sted, bortset fra de i § 3 omhandlede tilfælde. Det tilföjes, at der ikke er sögt eller ydet statstilskud til præmier vedrörende tiden efter adoptionen af Föroya Vanlukkutrygging 1. januar 1926.

Præmiestigningerne vil formentlig blive følgende i hovedtrækkene:

	A (alene) årslön	*B* (alene) årslön	*C* (a.) Karenst.	A og C	B og C
Nuværende takst	til 5000 kr.	til 3600 kr.	1 uge	under eet	under eet
Rederipræmie for fartöjer over 20 reg. tons brutto:					
60.—	180.—	138.—	96.—	276.—	234.—
Rederipræmie for fartöjer 4—20 reg. tons brutto:					
36.—	108.—	84.—	60.—	168.—	144.—
Hjemmepræmier (§ 58, 1. stk.):					
9.—	27.—?	21.—?	15.—?	42.—?	36.—?
Frivillig personlig ulykkesforsikring:					
6.—	9.—	9.—	10.—	19.—	19.—
Medhjælpen på landjorden:					
6—45	18—135	14—100	10—75	28—210	24—175

Som tiderne er nu, kan man ikke se, hvorledes f. eks. fiskerierhvervet kan tåle en yderligere præmiebelastning af så gennemgribende art, som forslaget forudsætter. Erfaringen viser desuden, at de magtmidler, man råder over til præmiernes inddrivelse, ikke er tilstrækkelige i praksis. Men også sikringen af söpanteretten kan i sine konsekvenser let bringe forsikringen i en situation, hvorved den kan blive kastebold for politikerne, hvad der ikke er heldigt i betragtning af den indgroede antagonisme, der i forvejen hersker mod forsikringen. Alt i alt synes sagen at burde udsættes til bedre tider.

Landsstýrisins viðmerkingar:

Í viðmerkinguum frá vanlukkutryggingastjórnini donsku verður (til seinast) sagt:

Um endurgjöld, skaðabötur og dagpeningur verður latin eftir árlönini árið fyri við 5000 kr. (A) ella 3600 kr. (B) sum hargsta mark, tann dagpeningaleysa tíðin verður sett til eina viku, og árslön hjá teimum sjálvkravt tryggjaðu sett til 2400 kr., kunnu útreiðslurnar verntast at vaksa soleiðis:

av sjómonnum og fiskimonnum	(A)	 4,8	ferðir
- — - -	(B)	 3,7	—
- handverkarum og arbeiðarum í ídnað og handli	(A)	 6	-
- — - — - — —	(B)	 4,6	—
- jarðararbeiðarum	(A)	 4,8	—
- —	(B)	 3,7	—
- sjálvkravt tryggjaðum	(A)	 2,4	—
- — —	(B)	 2,4	—

Tá ið hesi töl verða mett saman við tað ætl um premiuhækkingarnar orsakaðar av teim tilskilaðu broytingum, sum frammanundan er gjört í viðmerkingunum frá Föroya vanlukkutrygging, má landsstýrið mæla tinginum til at vera varið við at samtykkja aðrar broytingar, enn ráð eru til í lötuni. Viðgangast má, at skaðabötur og endurgjöld í dag eru lág í mun til tær inntökur, sum hava verið, og til tann livikostnað, sum er, men óráð vil vera at spreingja tryggingina við at leggja störri útreiðslur á hana, enn inntökurnar svara til. At líta á landskassan í hesum föri er fáfongt, hann verður fyri tí ringa býtinum saman við sjóvinnuni, tá ið hon, sum er, ikki ber seg. Tá ið tí Föroya Vanlukkutrygging í viðmerkingum sínum viðvíkjandi skaðabótum og endurgjaldi fyri skaða, ið berst á á veg til ella frá arbeiðisplássinum, heldur, at landskassin má bera útreiðslurnar til hesi endurgjöld, um henda nýggja fyrisetingin (gr. 3, stk. 1, 3. punktum) verður samtykt, má landsstýrið mæla frá hesum. Kannað má verða, hvussu nógv premiurnar mugu hækkast av hesi broyting, og síðan stöða verða tikin til um líkindini eru til at hækka so nógv. Í viðmerkingunum frá vanlukkutryggingarstjóranum til gr. 3 verður sagt, at í Svöríki, hvar ein líknandi skipan er, eru útreiðslurnar av hesum ávum um 80 % av öllum vanlukkutryggingarútreiðslum. Tað er ikki landsstýrinum greitt, um parturin í Föroyum man fara at vera störri enn í Svöríki, minni verður hann helst ikki.

Dagpeninginum viðvíkjandi hevur landsstýrið samráðst við læknar um tey viðurskifti, sum mugu ætlast at elvast av eini lækkan av tí dagpeningsleysu tíðini niður í eina viku, og torir landsstýrið ikki mæla til at stytta so nógv. Av tí at læknarnir tilmæla ikki at stytta longur niður enn í 8, ið hvussu er ikki undir 6 vikur, og Föroya Vanlukkutrygging tekur avgjört somu stöðu, mælir landsstýrið tinginum til at fylgja hesari tilmæli.

Viðvíkjandi hækkanini av skaðabótum og endurgjöldum hevur landsstýrið spurt Föroya Vanlukkutrygging, hvussu vel premiurnar ganga inn, sum er, og fingið upplýst, at eftirstöðurnar eru ógvuliga stórar og javnt

vaksandi, nevniliga í 1948: kr. 440.000, í 1949: kr. 482.000, í 1950: kr. 533.120. Øll premiuinntökan var í 1950 kr. 260.173, altso helvt av útistandandi peningi. Tað eru tí óráð av tinginum at hækka skaðabötur og endurgjöld meiri enn roknast kann við verður av einari rímiligari premiuhækking, og má tí tingnevndin, sum fær hetta mál til viðgerðar, samráðast bæði við Föroya Vanlukkutrygging og við vinnufelög og starvsfelög um möguleikan fyri at fáa hækkaðar premiur at ganga inn og væl betur inn enn nú.

Kann tolulig vissa fáast fyri tí, vildi landsstýrið mælt til at lógfest eina árslön til útroknan av skaðabötum, endurgjöldum og dagpeningi eftir tvífalda hana, sum nú er (1500 kr.); tað hevði tvífaldað öll endurgjöld. Um tey premiutöl, sum Föroya Vanlukkutrygging ætlar at skula svara til eina hægstu árslön uppá 5000 kr. ella 3600 kr., halda, man tað ikki vera nógv skeivt til eina árslön uppá 3000 kr. at rokna við eini reiðarapremiu uppá 150—160 kr., tá ið tann dagpeningaleysa tíðin verður sett til 6 vikur. Landsstýrið mælir til ikki at hava meiri enn eina árslön tilskilaða í lógini og ongan mun gera tí viðvíkjandi millum tvuognar og sjálvkravdar tryggingar.

Landsstýrið vísir til, at tingmenn hava fingið ársfrágreiðing fyri árið 1950 frá Föroya Vanlukkutrygging við yvirliti yvir felagsins stöðu gjögnum 25 ár. Felagið er sínamillum felag, og verður tað avgerandi, hvörju stöðu teir luttakandi, tryggjarar og tryggjað, taka til premiugjaldingina.

R. Long,
landsstýrismaður.

J. Djurhuus.

Skaðatilburðir á veg til og frá arbeiðsplássnum.

Til gr. 3 í núverandi kunngerð um vanlukkutrygging er av vanlukkutryggingarstjórnini skotið upp at gera hetta uppískoyti sum 3. punktum:

»Endelig omfatter forsikringen ulykkestilfælde, der rammer den forsikrede på vej til eller fra arbejdsstedet, når hans færden foranlediges af og står i umiddelbar sammenhæng med sådant arbejde.«

Vanlukkutryggingarstjórin heldur, at útreiðslur av hesum eiga at berast av Föroya Vanlukkutrygging, meðan Föroya Vanlukkutrygging hevur ta áskoðan, at útreiðslurnar eiga at verða lagdar á landskassan. Landsstýrið mælir frá hesum seinna.

Eftir danskari áskoðan eru arbeiðstilburðir á veg til ella frá arbeiðsplássinum ikki tryggjaðir. Tað eru teir harímóti í meiri ella minni mun í ymsum londum, t. d. Svöríki, Týsklandi, Eysturríki, Finlandi o. ö.

Fyri at lýsa tey nógvu trætumál, ið kunnu koma av hesi lógarfyriseting, sum skotin upp er, verða her tikin nökur dömir ymsastaðni frá.

Fronsk lóg (ár 1898) gevur rætt til endurgjald fyri skaðatilburð á veg til ella frá arbeiðisplássinum, tá ið t. d. í arbeiðissáttmálanum verður tilskilað, hvat slag av flutningsfari *verður* at nýta. Øðrvísi er, um flutningsfarið bert er *loyvt*, ella um flutningurin er fríur og má roknast at vera eitt vild, ið er gjörd arbeiðaranum.

Eftir italskari lóg verður fyri skaðatilburð á veg til og frá arbeiðisplássinum bert veitt endurgjald, um arbeiðarin av tvingandi umstöðum, sum arbeiðið veldur, ella biðin av arbeiðisgevaranum, fer um tilskilaðu vandaleið ella skal nýta tilskilað flutningsfar.

Eina týdningarmestar at miða okkum eftir eru tær svensku fyrireikingarnar.

Her verður fyri at kunna fáa endurgjald fyri skaðatilburð sum áður nevnt kravt

1) skaðatilburðurin skal hava borist á á veg til ella frá arbeiðisplássinum.
2) Ferðin skal vera orsakað av arbeiðisviðurskiftunum.
3) Ferðin má hava beinleiðis samanhang við arbeiðið.

Hesar tríggjar treytir eru tó ikki skarpt avmarkaðar, men nema hvör við aðra.

1) *Ferð til ella frá arbeiðisplássinum.*

Meðan í Eysturríki bert ferð frá hústað til arbeiðispláss og umvent kemur undir trygging, verður í Svöriki einans kravt, at maður, ið verður fyri endurgjaldstryggjaðum skaða, er á veg til ella frá arbeiðisplássinum í örindum, orsakað av arbeiðinum.

2) *Ferðin skal vera orsakað av arbeiðisviðurskiftunum.*

Um maður verður fyri skaðatilburði á avveg til handils í egnum örindum, fær hann einki endurgjald. Men ein av arbeiðisviðurskiftunum orsakað ferð kann hugsast at loyva okkurt frávik frá beinari leið, uttan at endurgjaldsrætturin verður avtapaður.

Dömi: Maður, sum hevði koyrt töð á sleðu fyri annan mann, nevndan J, avtalaði við konu sína, at hon seinasta arbeiðisdagin eftir at hava verið örindi hjá einum granna hjá J, nevndum A, skuldi koma til garð J's, so tey kundu fylgjast heim. Henda dag hevði hann arbeiðisvogn at koyra sleduna heim á, tí ein partur av heimvegnum var nú táur. Eftir at hava verið hjá A, kom konan til J kl. 3½. Tá var arbeiðið liðugt,

og eftir at hava drukkið kaffi koyrdu tey heim kl. 4½ og lögdu leiðina fyrst til A eftir einum sekki við eplum. Hesturin loypst, maðurin datt av og doyði. Av tí hann dagin fyri hevði koyrt sama veg, tí eingin annar vegur var farandi við sledu, var veitt endurgjald.

3) *Ferðin má hava beinleiðis samanhang við arbeiðið.*

Her ræður eina mest um tíðina, sum ferðin tekur. Um maður t. d. er farin nakrar tímar fyrr heimani í egnum örindum, er einki beinleiðis samanhang við arbeiðið, fyrr enn hann aftur er á vanligum veg til arbeiðisplássið til eina tíð, sum svarar til, at hann kann vera á arbeiðisplássinum til röttu tíð. Ferð av arbeiðsplássinum eigur at verða byrjað so skjótt sum gjörligt, eftir tað arbeiðið er endað.

Um at besi dömi ikki beinan vegin sipa til Föroya, vísa tey tó at ivamál, sum mugu koma av eini sovorðnari lógarfyriseting. Í Föroyum verður tað um framt ta dagligu gongd ella ferðslu hjá arbeiðara til ella frá arbeiðisplássinum í stóran mun ferð fiskimanna til og frá skipinum, sum kann elva endurgjaldsskyldu. Umráðandi er at hugsa um endurgjaldsskyldu fyri skaðatilburðir, sum berast sjómanni á, tá ið hann er farin í land av inni liggjandi skipi í öðrum örindum enn skipsins.

1. viðgerð 22. november. 26. mars 1952 legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Eftir áheitan hevur socialministeriið latið gera uppskot til broytingar í galdandi lóg fyri Föroyar um vanlukkutrygging, soleiðis at lóggávan her verður meira samsvarandi tí í Danmark galdandi.

Landsstýrið hevur lagt uppskotið fyri tingið við ummælum frá vanlukkutryggingarstjórnini donsku og frá Föroya vanlukkutrygging.

Hövuðsbroytingarnar í uppskotinum ganga út uppá, at lata dagpening og endurgjöld rokna út frá árslönini, meðan dagpeningur higartil hevur verið tann sami til öll tryggjað og endurgjöld og skaðabötur hava verið útroknaðar út frá einari fastari lógbundnari árslön. Karenstíðin verður sett niður frá 13 vikum til 1 viku.

Tingið hevur beint málið í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjört málið og skal löra fram, at uppskotið í vissum förum avgjört er eitt framstig og at tað eigur at vera hugsað um at gera

tær í uppskotinum nevndu broytingar til núgaldandi lóg. Men tær föra stórar peningaligar byrðir við sær, eina nest fyri fiskivinnuna, og heldur nevndin tí, at tað ikki er tilráðiligt nú soleiðis sum tey fíggjarligu viðurskiftini eru í lötuni at gera hesar broytingar í löggávuni. Nevndin setir samsvarandi hesum fram fylgjandi

Uppskot

Tingið samtykkir ikki fyribils at gera tær í uppskotinum nevndu broytingar í »anordning for Færöerne om forsikring som fölge af ulykkestilfælde af 29. marts 1939.«

1. apríl legði P. M. Dam o. fl. fram soljóðandi

Broytingaruppskot.

lögtingslóg um broyting í kgl. fyriskipan fyri Föroyar nr. 161 frá 29. marts 1939 »om forsikring mod fölger af ulykkestilfælde«.

gr. 1.

Í staðin fyri og sum nýggj gr. 3 í kgl. fyriskipan nr. 161 frá 29. marts 1939 verður sett:

»Tryggingin umfatar allar vanlukkutilburðir, líka mikið undir hvörjum umstöðum, teir henda.«

gr. 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i kgl. anordning for Færöerne nr. 161 af 29. marts 1939 »om forsikring mod fölger af ulykkestilfælde«.

§ 1.

I stedet for og som ny § 3 i kgl. anordning nr. 161 af 29. marts 1939 indsættes:

»Forsikringen omfatter alle ulykkestilfælde uden hensyn til omstændighederne, hvorunder disse sker.«

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tað er ilt at siga, hvörjar eykaútreiðslur henda broyting vil bera við sær. Men tá ið vanlukkutryggingargrunnurin er vaksin upp ímóti 2 milliónum, og vit harafturat hava sosialgrunn uppá yvir milliónina, ber til við hesum grunnum at taka til at royna hesa broyting, áðrenn fastsettar verða nýggjar innlögur til vanlukkutryggingina.

3. apríl legði nevndin fram soljóðandi

Broytingaruppskot.

lögtingslóg um broyting í kgl. fyriskipan fyri Föroyar nr. 161 frá 29. marts 1939 »om forsikring mod følger af ulykkestilfælde«.

Gr. 25 í kgl. fyriskipan nr. 161 frá 29. marts 1939 verður broytt soleiðis:

»Dagpeningurin fyri árið 1952 er kr. 6,00 um dagin. Partvísur dagpeningur verður ikki veittur.«

lagtingslov om ændring i kgl. anordning for Færöerne nr. 161 af 29. marts 1939 »om forsikring mod følger af ulykkestilfælde«.

§ 25 i kgl. anordning nr. 161 af 29. marts 1939 ændres således:

»Dagpengene udgör for året 1952 kr. 6,00 daglig. Delvis dagpenge ydes ikke.«

3. apríl legði tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi

Broytingaruppskot.

Í kgl. fyriskipan fyri Föroyar nr. 161 frá 29. mars 1939 »om forsikring mod følger af ulykkestilfælde« verður sum nýtt 3. pkt. til 1. stk. í 3. gr. sett:

Endelig omfatter forsikringen ulykkestilfælde, der rammer den forsikrede paa vej til eller fra arbejdsstedet, naar hans færden foranlediges af og staar i umiddelbar sammanhæng med saadant arbejde.

3. apríl legði Th. Petersen v. fl. fram soljóðandi

Broytingaruppskot.

Heitt verður á Tryggingarsambandið Föroyar um at skipa eina deild fyri vanlukkutrygging uttanfyri tær vanlukkur, ið eru tryggjaðar av vanlukkutryggingini, tá maður bæði hevur goldið skipsgjald og heimagjald. Síðani verður heitt á Tryggingarsambandið um at fáa samvirki við vanlukkutryggingina, soleiðis at maður kann fáa fullla trygging undir einum.

3. viðgerð 1. og 3. apríl 1952.

Broytingaruppskot frá P. M. Dam v. fl.	fall	7—0.
— - tjóðveldisfl.	-	8—0.
— - Th. Petersen v. fl.	-	10—0.
Nevndaruppskotið, d. 21. mars	samtykt	14—0.
Broytingaruppskot nevndarinnar	—	19—0.

---

40. Havnar skansi.

1951, 22. november lögdu tingmenninir J. P. Davidsen, Tr. Samuelsen, Johan Kallsoy og J. P. Henriksen fram soljóðandi uppskot til samtyktar; 20/11:

Vegna tess at Havnar skansi liggur í órökt og treingir til umsitingar, og hetta plássið liggur væl fyri sjómonnunum at koma til, samtykkir tingið at heita á Landsstýrið og fyristöðumannin fyri sjóverjuna fyri Føroyar, at skrivstovan, vaktarhald og tílíkt fyri sjóverjuna verður lagt á Havnar skansa og ikki sum tilætlað nú uppi við Hoyviksveg.

1. viðgerð 17. desember 1951.

Atkvöðugreiðslan goymd.

41. Broytingar v. m. til løgtingslóg um tænastumanna landsins.

1951, 28. desember legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 28. s. m.:

Uppskot

til

Broytingar og uppískoyti til löglingslóg nr. 16, 28. marts 1949 um lön tænastumanna landsins, sum hon seinni er broytt.

§ 1.

Til 7. §.

1. 1. partur verður broyttur og orðaður soleiðis:
Fyristöðumaður: Grundlön 6.000 kr. árliga hækkandi við 700 kr. 3. hvört ár til 8.100 kr.
2. 4. partur verður 5. partur.

3. Sum nýggjur 4. partur.
Meðan tænastumaður er settur útskiftingarformaður fær hann 2040 kr. árliga í ikki eftirlöngevandi viðbót.

4. Sum nýggjur 6. partur.
Djóralæknin: Grundlön 5.700 kr. árliga hækkandi við 600 kr. 3. hvört ár til 8.100 kr. Tænastuviðbót 600 kr. árliga. Tænastualdur núsitandi djóralækna verður roknaður frá 1. apríl 1948.

2. §.

Hendu lóg fær gildi hin... ... ...

Ændringer i og og tilföjelser til lagtingslov nr. 16, 28. marts 1949 om lönregulering til landets tjenestemænd, som denne senere er ændret.

§ 1.

Til § 7.

1. 1. Stk. 1 ændres og formuleres således:
Forstander: Grundlön 6.000 kr. årlig stigende hvert 3. år med 700 kr. til 8.100 kr.
2. Stk. 4 bliver stk. 5.

3. Som nyt stk. 4.
Medens en tjenestemand er udpeget som udskiftingsformand får han 2040 kr. årlig i ikke pensionsgivende tillæg.

4. Som nyt stk. 6.
Dyrlægen: Grundlön 5.700 kr. årlig stigende hvert 3. år med 600 kr. til 8.100 kr. Tjenestetillæg 600 kr. årlig Nusiddende dyrlæge får tillagt lönningsanciennitet fra 1. april 1948 at regne.

§ 2.

Denne lov træder i kraft ... ...

Viðmerkingar:

Fyristöðumaður matrikulstovunnar hevur sökt um hægri normering fyri embætið og lönarskipan, sum veitir hægri lön fyri starvsfólkið. Djóralæknin sökir um at verða normeraður sum tænastumaður.

§ 1.

ad. 1. Fyristöðumaður útskiftingar- og matrikulskrivstovunnar er eftir galdandi lönarlóg normeraður í löndeildini 6.000—6.600 kr. Til sammetingar verður greitt frá nökrum lönardeildum í donskum stovnum, sum vanliga krevja, at tænastumenn hansara eru landinspektörar.

Matrikelvæsenet:

Ekspeditionssekretærer: 6.000—6.600 kr.
Arkivarer: 5.700—7.500 kr.
Amtslandsinpektörer: 6.900—8.100 kr.
Kontorchefer: 7.800—9.000 kr.
Direktörer (hægstur): 10.800—11.700 kr.

Geodætisk institut:

Afdelingsgeodæter: 5.700—7.500 kr.
Statsgeodæter: 6.900—8.100 kr.
Direktören (hægstur): 9.000—10.800 kr.

Núsitandi fyristöðumaður var »afdelingsgeodæt« í Geodætisk institut«, tá hann tók við embætinum. Hann sökir um at vera normeraður í lönardeildini 7.800—11.700 kr., sama lönardeildin sum galdandi er fyri landsskrivstovustjóran og landsverkfröðingin.

Fyristöðumaðurin hevur fyri landsstýrinum ábyrgdina fyri útskiftingini og matriklunum, eitt týdningarmikið og krevjandi arbeiði, sum krevur ikki lítið av starvsfólki, um tær útskiftingar, sum eru byrjaðar ella liggja fyri ,skulu fremjast. Landsstýrið heldur tí tað vera rímuligt, at arbeiðið verður hægri normerað.

ad 3. Eftirsum störri kunnleiki krevst og serliga tað, at störri ábyrgd verður lögd á tænastumeann, sum settur verður útskiftingarformaður, eigur formaðurin at fáa serliga samsýning útyvir sína fastu lön.

ad 4. Í 1918 samtykti lögtingið at seta djóralækna við 2.000.— kr. árliga í lön. Ríkisstýrið tók við hesi samtykt og at veita honum nevndu lön. Serligar reglur vórðu gjördar fyri rindan av árligu umreisunum og ferðakostnað, hesar tók tað almenna sær eisini av, meðan samsýning fyri privatar læknaferðir og fluttning í samband við hesar, skuldi hann gjalda, sum sendir boð eftir djóralæknanum, fyri hesi gjöld varð gjörd serlig reglugerð.

Djóralæknir C. J. Bech byrjaði praksis 18. mai 1918, og varð hann frá 1. november 1919 settur sum almennur djóralækni undir ríkisstýrinum. Í 1920 varð fasta lönin hækkað til 3.600 kr. og í 1930 til 5.500 kr. Somutíð játtaði lögtingið honum 1.000 kr. árliga í húsaleigustudningi.

Praksisinntökur djóalæknans hava í tíðini 1918—1939 í meðal verið 1.857 kr. Í 1939 varð studningurin til árligu umreisurnar settur til 1.700 kr. Í 1943 vórðu praksistakstirnir hækkaðir við 50 %. Síðani er fasta lönin hækkað til 6.000 kr., afturat hevur verið latið vanlig honorarviðbót. Tey 10 árini 1939—1949 hava praksisinntökurnar í meðal verið 2.503 kr. árliga.

Lön djóralæknans er í dag henda:

Grundlön...	kr. 6.000
Honorarviðbót (70 %)	kr. 4.200
Praksisinntökur ca.	kr. 2.500
	kr. 12.700

Heraftur letur tað almenna til djóralæknan:

Húsaleigustudningur...	kr. 1.000
Ferðaendurgjald	kr. 1.700
	kr. 2.700

Núgaldandi instruks djóralöknans er frá 5. mars 1932 við uppiskoyti frá 20. november 1935 og 17. oktober 1938 og broyting frá 1. januar 1944.

Motiveringin fyri at seta djóralæknan sum tænastumann er, at hann hevur ta sakkönu veterinæru ábyrgdina, og at hann ikki stendur frítt í sínum takstum, men má binda seg til takstreglugerð gjörd av landsstýrinum.

Tá ið djóralæknin fær tænastuviðbót, fellur húsaleigustudningurin burtur.

1. viðgerð 1. desember, 2. viðgerð 5. desember og 3. viðgerð 17. desember 1951.

Uppskot landsstýrisins samtykt 14—0.

---

42. Álíkning á kommunurnar fyri 1952.

1951, 3. desember legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit.

Fíggjarnevndin mælir til at líkna á kommununar til landskassan fyri 1952 eins og 1951 kr. 30.000,—.

Uppskot.

Fyri árið 1952 verða kr. 30.000,— at líkna á kommununar samsvarandi viðlagda uppskoti.

Sí skjal 3.

2. viðgerð 5. desember 1951 og 3. viðgerð 24. mars 1952.

Uppskot nevndarinnar samtykt 16—0.

---

43. Landsstýrismál.

1952, 1. apríl legði landsstýrismálanevndin fram soljóðandi

Álit

Sambart tingskipan lögtingsins grein 10, pt. 3, hevur nevndin viðvíkjandi kannan av landsstýrismálum kannað avrit av landsstýrisins gerðabók fyri tíðarskeiðið 17. august 1950 til 24. juli 1951.

Hópur av málum eru viðgjörd, og eitt og annað kundi verið at trivið í, men skal nevndin bert hefta se gvið tvinnar avgerðir.

Hin fyrra, tikin á landsstýrisfundi 26. mai 1951, setur danskan verkfröðing við telefonverkið við 5000 kr. í lön í 3 mánaðir og hartil frítt uppihald. Nevndin heldur hesa lön vera alt av höga.

Seinra avgerðin, tikin 2. juli 1951, Tá vóru hús Th. P. Christiansens keypt til íbúð fyri M. Helmsdal, landsverkfröðing. Prísurin var 95.000 kr. Ilt er at meta virði á fastognum, men henda prís heldur nevndin vera högan.

Hóast heosar viðmerkingar loyvir nevndin sær at seta fram hetta

Uppskot

Lögtingið góðkennir avgerðir, landsstýrið hevur tikið í tíðarskeiðinum 17. august 1950 til 24. juli 1951.

2. viðgerð 3. apríl 1952.

Uppskot nevndarinnar samtykt 14—4.

44. Val av álitismonnum og nevndum.

1952, 4. apríl stóð val av álitismonnum og nevndum:

1) FÓLKATINGSVALNEVND

A. Suðurstreymoyar prestagjald.

a. Fastir limir.

Arnold Egholm, kassameistari, Tórshavn, H. O. Hansen, direktörur, ibd., Th. J. Jacobsen, telegrafist, ibd., Carter Niclasen, bókhaldari, ibd., J. P. Henriksen, bókhaldari, ibd., Chr. Guttesen, málari, ibd., Ole Chr. Skaale, chaufförur, ibd.

b. Tiltaksmenn.

Oluf Nielsen, prentari, ibd., Clement Clementsen, keypmaður, ibd., Louis Höjgaard, kassameistari, ibd., Johs. Simonsen, múrari, ibd., Andor Eirikstoft, timburmaður, ibd., Johs. Weihe, stjóri, ibd., Joen Jacobsen, fiskimaður, ibd.

B. Norðstreymoyar prestagjald.

a. Fastur limur.

Aksel Hansen, prokuristur, Vestmanna.

b. Tiltaksmaður.

Hans Iversen, keypmaður, Kvívík.

C. Eysturoyar sýsla.

a. Fastur limur.

Sigurd Petersen, Fuglafirði.

b. Tiltaksmaður.

Joh. M. Fr. Poulsen, lærari, Strondum.

D. Norðuroya sýsla.

a. Fastur limur.

Sofus Larsen, bakari, Klakksvík.

b. Tiltaksmaður.

Einar Waag, bryggjari, Klakksvík.

E. Vága sýsla.

a. Fastur limur.

Poul Joensen, lærari, Sandavágur.

b. Tiltaksmaður.

Eli Lauritsen, Sörvági.

F. Sandoyar sýsla.

a. Fastur limur.

Gunnar Winther, revisor, Sandi.

b. Tiltaksmaður.

Hákun Dam, lærari, Sandi.

G. Suðuroyar sýsla.

a. Fastur limur.

Jasper Holm, Tvöroyri.

b. Tiltaksmaður.

J. Baia, bankastjóri, Tvöroyri.

2) LØGTINGSVALNEVND

A. Suðurstreymoyar prestagjald.

a. Fastir limir.

Thomas Jacob Jacobsen, telegrafistur, Tórshavn, H. O. Hansen, direktörur, ibd., Andor Eiríkstoft, timburmaður, ibd.

b. Tiltaksmenn.

Carl Jensen, direktörur, ibd., Ohr.Guttesen, málari, ibd.

B. Norðstreymoyar prestagjald.

a. Fastir limir.

Andreas Andreasen, lærari, Vestmanna, Poul Johs. Samuelsen, keypmaður, Haldórsvík, Haldor Olsen, Vestmanna.

b. Tiltaksmenn.

Samuel Jacob Egholm, kongsbóndi, Streymnes, Eyolvur á Heyguni, Vestmanna.

C. Eysturoyar sýsla.

a. Fastir limir.

Elieser Reynberg, Fuglafirði, Joh. M. Fr. Poulsen, lærari, Strondum, Jacob Simonsen, lærari, Götu.

b. Tiltaksmenn.

Johs. Petersen, træsmiður, Saltnesi, Samuel P. Hansen, Norðragötu.

D. Norðuroya sýsla.

a. Fastir limir.

Olaf Olsen, keypmaður, Klakksvík, Guttorm Matras, Klakksvík, Hans Biskopstöð, kongsbóndi, Klakksvík.

b. Tiltaksmenn.

Karl PJoensen, kongsbóndi, Klakksvík, Debes Christiansen, keypmaður, Norðdepli.

E. Vága sýsla.

a. Fastir limir.

D. Danielsen, lærari, Sörvági, D. P. Niclasen, keypmaður, Miðvági, J. H. Samuelsen, lærari, Miðvági.

b. Tiltaksmenn.

Sören Danielsen, brævsamlari, Miðvági, Th. J. Thomsen, fiskimaður, Sörvági.

F. Sandoyar sýsla.

a. Fastir limir.

Gunnar Winther, revisor, Sandi, Anthonius Sörensen, keypmaður, Húsavík, J. Kristen Joensen, keypmaður, Sandi.

b. Tiltaksmenn.

Kjartan Hentze, lærari Sandi, Johannes Dalsgaard, óðalsmaður, Skálavík.

G. Suðuroyar sýsla.

a. Fastir limir.

Johan Djurhuus, lærari, Vági, Jasper Holm, Tvöroyri, Gunnar Petersen, kontoristur, Tvöroyri.

b. Tiltaksmenn.

Daniel Oliver Holm, keypmaður, Hvalba, Samuel Johansen, lærari, Vági.

3) VØRUNEVNDIN

J. Fr. Øregaard, J. H. Danbjörg, S. Ellefsen, Fr. Bláhamar, A. Sörensen, H. Iversen, Sören Danielsen.

Tiltaksmenn: S. P. Zachariasen, Trygve Samuelsen, Poul Petersen, Th. Petersen, Martin Holm, Johan Poulsen, J. P. Henriksen.

4) KIRKJUSTJÓRNIN

S. Ellefsen, Johan Poulsen, J. Fr. Øregaard.

5) SKÚLASTJÓRNIN

P. M. Dam, Martin Holm, Johan Poulsen.

6) GRANNSKOÐARAR TIL FÆRØ AMTS SPAREKASSE

Ankjær Jensen, Keypmannahavn, Hákun Dam, Sand.
Tiltaksmaður: Solus Hvidsfeldt, Tórshavn.

7) NEVNDIN FYRI FØROYA REALSKÚLA

Johan Danielsen, Tórshavn, Jens Pauli í Dali, s. s., J. P. Henriksen, s. s.

8) NEVNDIN FYRI SKIPAFELAGIÐ »FØROYAR«

O. J. Jensen, Tórshavn, P. M. Dam, Tvöroyri.

9) UMBOÐSMAÐUR TINGSINS Á AÐALFUNDI SKIPAFELAGSINS »FØROYAR«

Tr. Samuelsen.
Tiltaksmaður: Jens Ohr. Olsen.

10) UMBOÐSMAÐUR TINGSINS Á AÐALFUNDI SJÓVINNUBANKANS

Tr. Samuelsen.

Tiltaksmaður: M. Holm.

11) GRANNSKOÐARAR FYRI VINNULÁNSGRUNNIN

J. H. Schröter, Tórshavn, Hákun Dam, Sandi.

12) STÝRIÐ FYRI MENTUNARGRUNN FØROYA LØGTINGS

P. M. Dam, Poul Petersen, Johan Poulsen.

Tiltaksmenn: S. P. Zachariasen, Martin Holm, Georg Lindenskov Samuelsen.

13) OYRNAFJALLSNEVNDIN

Th. Petersen, P. M. Dam, Poul Petersen P. H. Weihe og Johan Kallsoy.

14) NEVND VIÐVÍKJANDI GRØNLANDSFELAGNUM

J. Fr. Øregaard, Fr. Bláhamar og P. H. Weihe.

15) YVIRHEILSUNEVNDIN

J. P. Henriksen, Djóni Weihe og Sofus Dahl Christiansen.

16) NEVND VIÐV. NEVNINGAÁRSLISTANUM

Vilhelm Tórsheim og Johs. Weihe.

18) STÝRIÐ FYRI TRYGGINGARSAMBANDINUM FØROYUM

Joh. M. Fr. Poulsen og P. M. Dam.

19) YVIRBÚNAÐARSTEVNA

OLe Fr. Olsen, bóndi, Mikladali.

20) ÚTSKIFTINGARSTEVNA

Jens Chr. Olsen, Toftir.

21) BÚNAÐARNEVNDIR 3. deild:

Edvard Joensen, fiskimaður, Eiði.

22) YVIRPOLITIRÆTTURIN

Tr. Samuelsen og Edw. Mitens.

23) NEVND VIÐV. NEVNINGAGRUNDLISTUM

Hákun Dam, Sandi.

24) VEGSTÝRIÐ

Joen Rasmussen, Sörvági, Joen P. Hentze, Sandi og J. P. Davidsen, Sandi.

Tiltaksmenn: Hans Iversen, Kvívík, Sjúrður Patursson, Kirkjubø og P. M. Dam, Tvöroyri.

25) HOSPITALSSTÝRIÐ

Robert Joensen, Klakksvík.

26) LØNJAVNINGARGRUNNIN

Martin Holm.

---

45. Broytingar í happadráttarlógini.

1951, 5. desember legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 4. desember:

Uppskot

til

lögtingslóg um broytingar í lögtingslóg nr. 49, 15. juni 1950 um föroyskan happadrátt.

1. gr.

1. gr. b í lögtingslóg nr. 49, 15. juni 1950 um föroyskan happadrátt verður broytt og orðað soleiðis:

Innskotið í hvönn einkultan flokkin skal vera upp til 120 kr. fyri heilan lut. Lutirnir kunnu latast í heilum lutum ella smáum.

2. gr.

Henda lóg fær gildi 1. januar 1952.

lagtingslov om ændringer i lagtingslov nr. 49, 15 juni 1950 om et færösk klasselotteri.

§ 1.

§ 1 b i lagtingslov nr. 49, 15. juni 1950 om et færösk klasselotteri ændres og formuleres således:

Indskudet til den enkelte serie for et helt lod skal være indtil 120 kr. Lodderne kan udstedes både som hele og delte.

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1952.

Viðmerkingar:

Eftir galdandi lóg er innskotið fyri heilan lutaseðil í föroyska happadráttinum 240 kr. fyri hvönn einkulta flokkin.

Tveir teir fyrstu flokkarnir eru nú næstan lidnir, 6. dráttur í 2. flokki verður drigin 15. desember.

Lutaseðlarnir hava verið seldir heilir, hálvir, fjórðaparts, áttandaparts og tólvtaparts. Talið á lutum hevur verið 1.000 hvönn flokkin, soleiðis at samlaði innskotspeningurin var 240.000 kr. um allir seðlarnir vórðu seldir. Talið á vinningum hvönn flokkin hevur verið 260 við tilsamans 166.210 kr.

Happadráttarnevndin sigur frá, at í fyrsta flokki varð bert selt fyri 119.000 kr., meðan til annan flokk neyvan verður selt meiri enn 100.000 kr.

Nevndin mælir til, at innskotið fyri heilan lut komandi ár verður sett til 80 kr. fyri hálvan lut 40 kr. og fyri fjórðungs lut 20 kr., og at talið á lutum verður 1500, svarandi til 120.000 kr.

Tann lítla söla av lutaseðlum til 1. og 2. flokk happadráttarinnar í mun til samlaða innskotspeningin bevur ætlandi sína hövuðsorsök í, at seðlarnir eru ov dýrir. Tað vil tí vera vert at royna, um ikki sölan vil ökjast, tá innskotið verður sett lægri, og tá jú teir stóru vinningarnir verða óbroyttir. Talið á teim lægru má so minkast.

Lógin bindur innskotspeningin fyri heilan lut til 240 kr. Landsstýrið mælir tí til, at lógin verður orðað so, at tað er landsstýrinum gjörligt innanfyri hægstamark, at taka avgerð um hvussu stórt innskotið skal vera.

1. viðgerð 7. desember og 17. desember legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Av tí at happadráttarnevndin hevur sagt frá, at í fyrsta flokki bert er selt fyri 119.000 kr. og til 2. flokk valla verður selt meira enn fyri 100.000 kr., er man farin at kanna eftir, hvat orsökin kann vera.

Happadráttarnevndin heldur, at orsökin til hetta lítla salg í 1. og 2. flokki er tann, at innskotspeningurin fyri heilan lut — 240 kr. — er ov högur og mælir til at innskotið fyri heilan lut komandi ár verður 80 kr., men at talið á lutum verður hækkað frá 1000 til 1500, so at samlaða innskotið verður 120.000 kr.

Sum lógin nú er, bindur hon innskotspeningin fyri heilan lut til 240 kr., men landsstýrið heldur, at hentari hevði tað verið, um lógin var soleiðis orðað, at landsstýrið kann innanfyri eitt hægstamark avgera, hvussu stórt innskotið skal vera og hevur samsvarandi hesum sett fram uppskot til broyting í lógini, soleiðis, at hægsta markið fyri heilan lut verður 120 kr.

Fíggjarnevndin, sum viðgjört hevur málið, heldur tað er væl hugsandi, at henda skipan vil ökja um salgið. Yvirskotið frá seinasta ári var bert 21.000 kr., og sum salgið nú er, kann tað bera so á, at landskassin ístaðin fyri at hava vinning av happadráttinum kann fáa stórt hall.

So statt mælir fíggjarnevndin til, at landsstýrisins uppskot verður samtykt.

2. viðgerð 20. desember og 3. viðgerð sama dag.

Uppskot nevndarinnar samtykt 23—0.

46. Granskoðan av roknskapum landsins.

1951, 7. desember legði lögmaður fram soljóðandi framlöguskriv d. desember:

Sambart 22. gr. í lögtingslóg nr. 1, 13. mai 1948 um stýrisskipan Föroya í sermálum er tað lögtingið, sum setur roknskapargrannskoðarar landsins.

Sum lögtinginum kunnugt vendi landsstýrið sær í september 1949 til Revisions- og Forvaltningsinstitutet, København, um at gera uppskot m. a. um, hvussu grannskoðanin skuldi leggjast til rættis. Felagið tók við hesi uppgávu, og fleiri revisorar hava verið í Föroyum og sett seg inn í roknskaparföroluna hjá landskassa og öðrum landsstovnum. Felagið hevur eisini grannskoðað roknskapirnar fyri eitt ár hjá flestu landsstovnunum.

Við hesum kunnleika setir so felagið soljóðandi uppskot fram í brævi 24. oktober 1951:

»Under henvisning til de mellem landsstyret og vor revisor Helby förte mundtlige forhandlinger om, hvorledes der bedst kan tilrettelægges en revision i tilslutning til og som stötte for den (eller de) af lagtinget valgte revisorer ,har vi overvejet forskellige muligheder.

Den i revisionsmæssig henseende umiddelbart mest tiltalende lösning ville, blandt andet i betragtning af, at man på Færöerne endnu ikki har noget personale med egentlig revisionsmæssig uddannelse, være at antage en statsautoriseret revisor, som efter at have udfört sit arbejde kunne afgive rapport til de af lagtinget valgte revisorer og eventuelt til landsstyret. En sådan ordning viser sig imidlertid ved nærmere eftersyn at være behæftet med visse ret væsentlige ulemper. En af disse er, at den autoriserede revisor kun under sine mere eller mindre hyppige besög kommer i direkte kontakt med regnskabsforholdene, og i mellemrummene kan forbindelse med den autoriserde revisor være vanskelig at etablere, hvad der i nogen grad vil kunne komme til at gå ud over revisionens effektivitet. Ligeledes vil uanmeldte beholdningseftersyn være praktisk talt uigennemförlige. Arbejdet vil desuden blive så omfattende, at vi, og formodentlig også andre större autoriserede revisionsfirmaer, under den nuværende personaleknaphed kun med betænkelighed ville turde påtage os det. Hertil kommer, at en sådan ordning ville blive meget bekostelig, hvortil de talrige rejser og den mere eller mindre spildte arbejdstid under selve rejserne naturligvis bidrager.

Vi har derfor efter nöje overvejelse besluttet os til at foreslå, at arbejdet deles mellem en statsautoriseret revision og en intern revisionsafdeling, bestående af færösk personale som er bosat deroppe. Ganske vist må man,

dersom man vælger denne ordning, være forberedt på, at der som ovenfor bemærket ikke for tiden findes personale på Færöerne med den fornödne revisionsuddannelse; men da det arbejde, som skal udföres af den foreslåede revisionsafdeling, vil være af mindre krævende karakter end det, der skal udföres af den statsautorisede revisor, skulle det være muligt gennem nogen tids instruktion at give de personer, der ansættes hertil, så megen indsigt i, hvad det drejer sig om, at arbejdet, når den autoriserde revisor yder en vis indsats ved dets tilrettelæggelse og ved at före tilsyn med det, skulle det kunne blive nogenlunde tilfredsstillende og, efterhånden som personalet erhverver sig mere erfaring og indsigt, helt tilfredsstillende. Som forelöbig foranstaltning kunne man tænke sig ,at en eller to personer, som ansættes ved den foreslåede revisionsafdeling, kom til København for gennem praktisk arbejde under revisor Helby at få et vist indblik i principperne og fremgangsmåderne ved revision af den art, som der her er tale om. En anden udvej var det at antage dansk personale med nogen revisionsmæssig uddannelse, som vil bosætte sig på Færöerne, men vi tör ikke udtale os om, hvorvidt dette er muligt. Skulle man vælge denne udvej eller eventuelt en kombination af de to muligheder, er vi villige til at bistå ved udvælgelsen af de mest egnede ansögere, dog naturligvis uden ansvar for os.

For at sikre de i revisionsafdelingen arbejdende personer en uafhængig stilling, vil det være tilrådeligt at bestemme, at de antages af lagtinget og kun kan afskediges af dette, således at en eventuel revisionsmæssig kritik ikke kan undertrykkes eller afsvækkes ved at afskedige dem, der har fremsat den, eller gennem frygt for afskedigelse eller ökonomiske repressalier. (Tilsvarende skulle iövrigt gælde den autoriserede revisor).

Dersom man billiger det her fremsatte forslag, vil vi vejlede afdelingen med hensyn til ,hvilke områder dens arbejde skal omfatte, hvilke interne sikkerhedsforanstaltninger der skal tilrettelægges, og hvorledes arbejdet skal udföres. Når arbejdet hermed efter nogen tids forlöb er afsluttet, og revisionsafdelingens funktioner er kommet ind i en fast praksis, vil det måske være hensigtsmæssigt, at der udarbejdes en udförlig instruks for afdelingien.

Vi finder det mest naturligt, at revisionsafdelingen aflægger rapport om sit arbejde til den den statsautoriserede revisor, som jo i et vist omfang skal stötte sig på det, men revisionsafdelingen skal dog ikke være afskåret fra tillige at afgive direkte rapport til lagtinget eller dettes valgte revisor eller til landsstyret, hvor omstændighederne tilsiger sådant, hvilket f. eks. kunne være tilfældet, dersom man kommer under vejr med forhold, som kræver hurtig indgriben på tider, hvor den autoriserede revisor ikke er til stede.

Dersom man antager os som den autorisede revision, vil vi, når revisionen af det förste års regnskaber er afsluttet, afgive en beretning herom til den af lagtinget valgte revisor, hvoraf vil fremgå, hvilke områder vi har beskæftiget os med ,og hvilke vi har anset som liggende uden for vort område, samt de bemærkninger revisionen måtte have givet anledning til. På grundlag heraf kan der eventuelt optages forhandling om, hvorvidt der

skal ændres noget i revisionens omfang. Vi skal allerede nu bemærke, at det er vor hensigt i förste række at beskæftige os med regnskabernes rent regnskabsmæssige rigtighed, beholdningernes tilstedeværelse etc. og kun i ringe grad med dispositionernes lovmedholdighed og hensigtsmæssighed, idet dette formentlig först og fremmest må blive den eller de i henhold til lov nr. 1 af 13. mai 1948 valgte revisorers opgave.

For en ordens skyld bemærkes yderligere, at den her skitserede ordning naturligvis ikki skal være til hinder for, at den autoriserede revision afgiver indberetninger til landsstyret om sådanne forhold, som den finder det hensigtsmæssigt at underrette det om, eller som landsstyret selv önsker at få oplysning om.

Vi afventer nu meddelelse om, hvorvidt man kan akceptere vort forslag.

Med höjagtelse

REVISIONS- OG FORVALTNINGSINSTITUTET
AKTIESELSKAB

Niels Petersen. *V. Helby.*«

Landsstýrið mælir til, at grannskoðanin verður skipað sum av felagnum skotið upp.

1. viðgerð 12. desember og 13. mars 1952 legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Samsvarandi grein 22 í lögtingslóg nr. 1, 13. mai 1948 um stýrisskipan Föroya í sermálum er tað lögtingið, ið setur roknskapargrannskoðarar landsins.

Fyri at fáa haldgott stöði undir roknskapargrannskoðanina vendi landsstýrið sær í 1949 til Revisions- og Forvaltningsinstitutet, København, og bað tað gera uppskot til eina skipan. Felagið tók við uppgávuni og hava fleiri grannskoðarar verið í Föroyum og gjört seg kunnugar við roknskaparviðurskiftini hjá landsins stovnum.

Við tí kunnleika felagið á henda hátt hevur fingið til okkara viðurskifti, hevur tað sett uppskot fram um, hvussu man kann fáa í lag eina

grannskoðannardeild í Föroyum, sum tann ella teir lögtingsvaldu grannskoðararnir kunnu stuðla seg við.

Felagið sigur, at av tí vit enn ikki eiga fólk við nóg góðum kunnleika til grannskoðan, verður tað neyðugt at skifta arbeiðið sundur millum eitt statsautoriserað felag og eina föroyska grannskoðannardeild.

Statsautoriserai grannskoðarin vil at byrja við átaka sær tað torförasta arbeiðið inntil okkara deild er vorðin meira kunnug við arbeiðið.

Föroyska deildin skal senda statsautoriseraða felagnum frágreiðing frá starvinum og kann geva lögtingi, landsstýri og lögtingsvaldu grannskoðarunum frágreiðing. Ókravt skal autoriseraða felagið siga landsstýrinum frá, tá tað kemur fram á viðurskifti, ið hava landsstýrisins áhuga. — Annars verður landsstýrið at seta upp fasta reglugerð fyri mannagongdini.

Um leið 30 ár hevur Gunnar Winther verið lögtingsins grannskoðari og er tað enn. Hann er nú 73 ár gamal og hevur hug at leggja starv sítt niður.

Tað stendur fíggjarnevndini greitt, at slíka skipan sum her er uppsett fáa vit ikki ókeypis, men kemur at kosta um 50.000,— kr. Vit hava kannað útreiðslurnar sum nú standast av grannskoðan av hesum landsstovnum og liggja tær um 50.000,— kr. tá er ikki strandfarasiglings- og havnaroknskapini uppí.

Samsvarandi hesum setur fíggjarnevndin fram uppskot:

I. Landsstýrið verður heimilað til at fáa í lag skipan við G. Winther grannskoðara um fráfaringarháttin.

II. Lögtingið samtykkir:

1. At sett verður grannskoðannardeild við fyribils starvsfólki.
2. At valdur verður roknskapargrannskoðari sambart lögtingslóg nr. 1, 13. mai 1948 um stýrisskipan Föroya í sermálum, áðrenn tingið verður slitið. Lön hansara verður fastsett av landsstýrinum í samráð við fíggjarnevndina.

III. Landsstýrið verður heimilað til at taka upp ta í álitinum nevndu samvinnu við Revisions- og Forvaltningsinstitutet, Köbenhavn.

2. viðgerð 14. mars og 3. viðgerð 24. mars 1952.

Uppskot nevndarinnar samtykt 17—0.

47. Lán til landshandilin.

1951, 10. desember legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 10. s. m.:

Uppskot

til

Lögtingslóg um lán til landshandilin.

Gr. 1.

Landsstýrinum er himlað landskassans vegna at taka upp lán til landshandilin upp til 500.000 kr.

Gr. 2.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

Gr. 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage et lån til landshandelen på indtil 500.000 kr.

Gr. 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Landshandilin hevur 7. desember 1951 sent landsstýrinum soljóðandi bræv:

»Ávísandi tær samráðingar, vit fyrr hava haft við landsstýrið viðvíkjandi játtan av einum bankafresti (kredit) skulu vit haraftrat gera kunnugt:

Myndugleikarnir hava vilja havt og vilja framvegis, at landshandilin skal hava á goymslu hóskandi nögdir av neyðsynjarvörum. Ein 3 mör. nýtsla vildi givið hesi töl:

1.	Hveitimjöl	umleið	525	tons	pr.	kg	1/-	ella	umleið	525.000 kr.
2.	Rugmjöl	—	350	—	-	-	0/87	-	—	305.000 —
3.	Melis st.	—	200	—	-	-	0/88	-	—	176.000 —
4.	Melis hg.	—	50		-	-	1/03	-	—	52.000 —
5.	Klit	—	70	—	-	-	0/86	-	—	65.000 —
6.	Oljukökur	—	50	—	-	-	0/73	-	—	37.000
7.	Byggskrá	—	65	—	-	-	0/94	-	—	61.000 —
8.	Kaffi	—	24	—	-	-	11/40	-	—	274.000 —
9.	Te	—	18	—	-	-	10/20	-	—	184.000 —
										íalt umleið 1.679.000 kr.

Umfram hesar nevndu vörur hava vit á goymslu nakað av salti, jarni og öðrum vörum til eitt samlað virðið av umleið	89.000 kr.
somuleiðis kolagoymslu, virðið í lötuni mett til	160.000 —
props	62.000 —
	1.981.000 kr.
Tá eingin onnur saltgoymsla er í Havnini, mega vit eisini verða förir fyri at lata salt, tað vil siga útvega umleið 1000 tons á 1/50/-	150.000 —
Aftrat hesum koma skuldarar okkara, ið hava ligið umleið 1,5 miljón, í lötuni 1,05 miljón, men mega ikki roknast vanliga at verða undir	1.200.000 —
	3.331.000 kr.
Til rakstur av hesum hava vit Lögtingsins ohligatiónslán...	1.000.000 kr.
og eginognina umleið	1.100.000 —
	2.100.000 kr.

Av hesum sæst týðiliga, at okkum törvar ökta fíggjarmegi, um vit skulu verða förir fyri at halda goymslurnar so sum tað verður ynskt, samstundis sum keypt verður móti kontantrindan.

Viðvíkjandi tölunum frammanfyri skal viðmerkjast: Prísirnir roknað er við, eru okkara keypsprísir, frokna farmagjald út.

1. Hveiti: Hesin prísur er umfram föroyska studningin, við tað at mjölið má rindast við nevnda prísi, og studningurin fyrst verður goldin okkum 1 mánaða aftaná, og tá fyri ein mánað í senn.

2. Rugmjöl: Her ger tað sama seg galdandi sum fyri hveiti, bæði hvat viðvíkir tí danska og föroyska studninginum. Orsakað av at rugur ikki tolir at vera goymdur ov leingi, hevur landshandilin sjáldan meira enn nýtsluna fyri 2 mánaðar á goymslu.

Hvat viðvíkir punkt 3 — 4 — 5 — 6 — 7 vísa vit aftur til punkt 1.

Punkt 8 og 9: Landshandilin hevur ikki 3 mánaðar nýtslu á goymslu av hesum vörum, men vit hava vanliga bindandi sáttmálar til 2—3 mánaða nýtslu, tá vörurnar frá Ceylon og Brasiliu vanliga hava 2 mánaðar um ferðina.

Upprunaliga hevði landshandilin lán frá tinginum 1,5 miljón við tí í tíðini vunna peningi er tann ½ miljónin afturrindað. Við teim stöðugt hækkandi prísum, serstakliga á kaffi og te, teim krövum nögd av vöru á goymslu, haraftrat sergoymslu av kol, propsi og seteplum, er tað landshandlinum ógjörligt at klára hesi keyp við núverandi láni. Tessvegna mæla vit til, at landshandlinum verður veittur heimild til at taka »kassakredit« fyribils upp til kr. 500.000,00.

Sbr. 3. grein í reglugerð landshandilsins frá 25. oktober 1939 stendur landskassin til svars fyri skyldur landshandilsins.

Eftir seinasta rakstrarrokuskapi landshandilsins fyri tíðina 1. apríl 1950 til 31. marts 1951 hevur landshandilin eina nettovinning aftaná rentur og avskrivingar uppá kr. 102.702,64.

Landsstýrið mælir ávísandi til frammanfyri standandi háttvirda lögtingi til at samtykkja lógaruppskotið.

1. viðgerð 12. desember og 17. desember legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Av tí at landshandilin í neyðsynjarvörum, koli, jarni, propsi og eftirstöðum hevur standandi 3. 331.000 kr., og hann til rakstur av hesum bert hevur 2.100.000 kr. hevur stjórin havt tingingar við landsstýrið um upptöku av láni uppá kr. 500.000,—.

Samsvarandi hesum hevur landsstýrið sett fram uppskot til lögtingslög um lán til landshandilin.

Fíggjarnevndin hevur viðgjört málið og mælir tinginum til at samtykkja landsstýrisins uppskot.

2. viðgerð 20. desember og 3. viðgerð sama dag.

Uppskot landsstýrisins samtykt við 25 atkvöðum.

48. Fíggjarbjarging fiskiflotans.

1951, 10. desember legði P. M. Dam, löglingsmaður soljóðandi framlöguskriv, d. 8. desember 1951; frá javnaðar- og sjálvstýrisflokkinum:

Föroyingar liggja so fyri, at teir megu liva av sjónum.

Teir skulu hava för.

Farleysir eru teir lívleysir.

Hetta stendur fast og verður at galda, so leingi fólk býr á hesum klettum.

Í dag hava föroyingar hópin av veiðuförum. Men teir standa fyri at missa tey, um ikki eitthvört munandi verður gjört til bjarging.

Veiðufloti okkara er fjölbroyttur — trolarar, sluppir, snurrarar, snörisskip, línuför og skonnartir.

Tei ymsu veiðuháttir, hesi skip nýta, hava roynst ymist viðvíkjandi hvussu teir hava borið seg. Tað hava verið stór hall og hjá öðrum hampuligt yvirskot innanfyri allar veiðuháttir.

Kanningarnevndin, ið hevur lagt fram fyri tingið bók um fíggjarviðurskifti landsins, sigur frá, at skonnartirnar hava yvirhövur borið seg. Næstir teimum eru trolararnir. Men teir hava tó í meðalskurði hall, verst stendur til hjá línuskipum og snurrarum. Tó finnast sum sagt eisini innanfyri hesar veiðuháttir skip, sum hava staðið seg.

Tað kann so statt ikki verða vist á einstakan veiðuhátt, sum avgjört gevur vissu fyri, at hall ikki verður í rakstrinum.

Veruleikin er í dag, at okkara floti, sum kom so brádliga, ov brádliga fyri at fáa nóg mikið av fullkönum fólki til teir ymsu áður her á landi so lítið nýttu veiðuháttir, hevur verið fyri stórum óhappi, so stórum, at nú stendur sum sagt so hart á, at vandi er fyri, at vit missa mesta partin. Hendur tað, verður deyðin í durinum.

Eitthvört má nú verða gjört fyri at bjarga okkum undan hesi vanlukku. Og hetta má verða gjört beinan vegin, tí nú eru longu hópur av skipum undir höggum, og onnur standa fyri.

Her törvast ikki at fara út í ætir viðvíkjandi hvussu gingist hevur hvörjum skipi sær. Hetta má hava eina serliga viðgerð, tá ið stöða skal verða tikin til hvört einstakt skip ella felag, ið törvast skilabötur. Flest öll, ið hava fylgt við, eru greið yvir, hvussu tað kann gangast skipum og virkjum, hvaðani brestirnir kunnu stava, ofta av óvardum hendingum heldur enn av skilaloysi umborð og á landi, tó hetta mangan hevur verið uppi í.

Tá ið ein vinnukreppa hevur verið unrödd, hevur verið nortið við at ökja um toll og aðrar skattainnlögur landsins at nýta til hjálpar. Men hesin vegur er ov seinur at ganga og vil neyvan heldur muna, um bildið kundi verið út hjá einstökum felagi ella skipi enn eina stutta tíð, til eykainntökurnar vóru falar at nýta.

Hjálpin má sum nevnt koma beinanvegin.

Undirritaðu flokkar hava viðgjört henda vandaspurning og ásannað, at um bót skal fáast í framtíðini, má fiskivinnuumsitingin umskipast soleiðis, at tað eisini verður möguligt hjá einstökum monnum og smáfelögum at fáa lut í teimum fyrimunum, ið liggja í einari góðari financiering, bíligum innkeypum av útgerðarvörum, tilvirkning av fiskinum, so at hesir menn og felög kunnu fáa hægsta marknaðarprís o. s. fr.

Í havnarstöðunum, har ið umstöðurnar eru til tess, eigur at vera hjálpt fiskimonnum at fáa turkihús, tilvirkingarambo ð o. t. sum tog- og snörisvirki og alt, ið snýr sær at at fáa mest fyri fiskin og amboðini bíligast, samstundis sum arbeiði ökist í landinum.

Tað er ein royndur lutur — sum rímiligt kann vera — at menn, sum ikki hava fingist við handilsvirki og reiðaravirki, ofta duga illa at skipa seg, hvat ið viðvíkir rökisskapi, arbeiðsleiðslu og í heilataki fyrisæti av virkinum.

Hesum törva eina serköna hjálp.

Tað vil tí vera rætt, um landið fer undir eina skipan, sum kann veita monnum lut í nevndu fyrimunum, at settur verður könur umsjónarmaður við ikki bara skyldu til at veita góð ráð og vegleiðingar, men eisini við rætti til at krevja at gjögnumfördar verða tær umskipanir við leiðsluni, sum forrættningsliga eru neyðugar.

Hitt almenna má í heila tíkið hava eitt stórt orð í at siga, hvussuleiðis tað verður fyriskipað í framtíðarvinnu Föroya.

Tað ræður um at skipa verður so fyri, at tann peningur, ið verður veittur teimum ymisku skipum og felögum, kemur teimum at gagni.

Kanningarnar vísa á, at útgerðarspurningurin er avgerandi táttur í fiskivinnuni. Verður útgerðin ov dýr, ov ring, ov lítil ella ov illa umsitin, kann tað kollrenna eina drift, sjálvt um væl verður fiskað. Og hann, sum er armur, verður ofta at keypa ov dýrt, ov ringt og fáa ov lítið — har liggur hann so.

Vit hava ein landshandil við handilskönum manni á odda.

Tað liggur beint fyri at lata landsins handil keypa útgerðarvörur. Men skal hann tað, má hann sjálvandi verða drivin forrættningsliga soleiðis, at hann við rætti til hald í útgerðarlánum og öllum teim gjaldingarháttum, ið nýttir verða av privatum, vissar sær at fáa vörurnar goldnar. Verður talan um at veita einstökum felögum ella monnum serligar söndir viðvíkjandi útgerð, megu hesar verða givnar avvarandi av landsstýrinum av peningi, sum tingið hevur givið landsstýrinum at ráða yvir til tílík endamál.

Ein rakstrarumskipan, sum her er nevnd, krevur miklan pening. Her aftrat kemur, at mangar skipadriftir eru sum sagt komnar so fyri, at teimum törva mikla peningahjálp og mega sanerast, um tær skulu kunna halda fram. Allur hesin peningur kann neyvan fáast her á landi. Men um tjóð okkara skal verða lív lagað, má hann verða fingin til vega.

Okkum tykir, at sum landið liggur, er her talan um tvær leiðir at fara — og helst eiga báðar at verða royndar.

Onnur er at gera ríkisstjórnini fullkomuliga greitt, at lívið leikar á

hjá okkum at fáa pening til at sanera og endurreisa fiskivinnudriftina í öllum sínum tættum — tí á fleiri streingjum má verða spælt.

Tað vil verða dráp fyri okkum, um steðgur kemur í fiskivinnuna, og um skipini eitt fyri og annað eftir fara frá okkum.

Heitt má tí verða á ríkisstýrið um at veita Föroyum munandi pening til fiskivinnuna.

Hin leiðin tykist okkum at liggja líka fyri at gera av í tinginum. Tað er at nýta munandi part av marshallhjálpini, sum vit eiga á, til fiskivinnuna. Sum kunnugt er jú avgjört, at föroyingar skulu fáa ein part av næsta býtinum av marshallpeninginum. Her er sambart frásögn ábyrgdamanna í marshallmálinum talan um minst 5 milliónur krónur aftrat til Föroyar.

Grundin undir marshalltiltakinum er ynski um at styðja og ökja um framleiðsluna í teimum ymsu londunum, so tað verður liviligt hjá fólkinum.

Okkara framleiðsluöki er havið, og arbeiðstólini eru skip okkara. At fáa arbeiðstólini til vega, halda tey í góðum standi og hyrgja fyri, at tey fara okkum av hendi er treytin fyri, at framleiðslan kann halda fram og ökjast í hvörjum okkum og öðrum til gagns og lívsmegi.

Tá ið vit nú standa fyri so hörðum kreppuskákum, at vit eru við at missa okkara bestu för, og störsti parturin av fiskivinnu okkara er við at steðga, er tað eyðsæð, at marshallhjálpin er skorin og borin til at bjarga her.

Tað kann vera, at hesin her nevndi partur av marshallhjálpini ikki er falur at fáa í lötuni. Halda vit tí, at tað er neyðugt at samráðast við ríkisstýrið danska um annaðhvört at hjálpa okkum at fáa forskot goldið av marshallhjálpini ella at hjálpa okkum at fáa eitt bíligt kreppulán við veð í marshallpeninginum.

Sum tingmonnum kunnugt stendur tingið til svars fyri teimum lánum, Vinnulánsgrunnur Föroya Lögtings hevur átikið sær til fiskiförini. Grunnurin hevur einans 2. veðrætt í hesum förum, stendur tí fyri at missa meginpartin av hesum peningi, um skipini nú verða seld frá hond. Ikki minst hesin veruleiki má verða havdur í huga undir viðgerðini av hesum lívsmáli tjóðarinnar.

Tað er jú kunnugt, at grunnurin — t. v. s. hitt almenna — hevur longu verið fyri stórum tapi, og um ikki ein heildarskipan — sum frammanfyri ávíst — kemur í lag, verður at standa so hart á landskassanum, at ivasamt verður, um landið verður fört fyri at reisa vinnulánsgrunnin, sum eigur at vera merguin í sjóvinnuni, aftur á fötur.

Hesin her greindi kreppuspurningur er so týdningarmikil, at allir flokkar á tingi eiga at taka saman at loysa hann, og skjóta vit tí uppá, at nevnd verður sett, umboðandi allar flokkar, til saman við landsstýrinum beinanvegin at taka upp samráðingar við ríkisstýrið.

1. viðgerð 12. desember og beint til fíggjarnevndina.

49. Einkarrættur Føroya Fiskasølu.

1951, 17. desember legði H. Djurhuus, landsstýrismaður fram soljóðandi framlöguskriv, d. 11 s. m.:

Í eykatingsetuni apríl—mai 1948 fekk Föroya Fiskasöla einkarrætt til útflytan av salt- og klippfiskaframleiðslu Föroya.

Í tingsetuni 1949/50 varð málið um umboðan av veiðimannafelögunum í stýri Föroya Fiskasölu av Föroya Javnaðarflokki lagt fram á tingi, og tingið viðtók at senda soljóðandi áheitan til einkarsöluna:

Skotið verður upp, at felagslógarinnar gr. 17 verður broytt soleiðis:

Sum nýtt petti 2 verður sett:

Umboðsnevndin sambart gr. 17, petti 1, verður at ökja við 3 monnum, einum valdum av Föroya og Suðuroyar Fiskimannafelögum, einum valdum av Föroya maskinist og motorpassarafelag og einum av Föroya Skipara- og Navigatörfelag.

Ársaðalfundur Föroya Fiskasölu sýtti fyri at fylgja tingsins áheitan.

Í tingsetuni 1950/51 varð málið endurreist av Suðuroyar Fiskimannafelag og landsstýrið setti fyri tingið soljóðandi uppskot:

1. Tingið heitir á Föroya Fiskasölu at broyta lógir sínar á fyrsta reglulíga aðalfundi soleiðis, at av teim 5 monnum í stýrinum verða 3 valdir av Föroya Fiskasölu, 1 av fiskimannafelögunum og 1 av skipara- og og navigatörfelagnum, maskinistfelagnum og motorpassarafelagnum. Fyri hvönn stýrislim verður valdur ein tiltaksmaður.
2. Verður áheitanin ikki tikin til fylgju, fer landsstýrið undir kannan av, hvussu fiskasölan kann nýskipast á annan hátt. Umboðsmenn fyri veiðumenninar verða tilkallaðir til samráðingar. Málið verður so lagt fyri ólavsökutingið.

Uppskot landsstýrisins varð viðtikið.

Orsakað av, at aðalfundur Föroya Fiskasölu ikki var viðtökuföru til lógarbroyting kom áheitan tingsins ikki til atkvöðu, men setti fiskasölan nevnd til samráðingar við landsstýrið.

9. juli 1951 helt landsstýrið fund við útsendingum frá Föroya Fiskasölu.

16. juli varð fundur hildin við veiðumannafelögini og spurningurin

um fastan landingarpris, ið var reistur á fundinum 9. juli, var til viðgerðar.

25. september hevði landsstýrið fund saman við umboðsmonnum frá Föroya Fiskasölu og veiðumannafelögunum. Menn vóru hugaðir fyri föstum landingarprísi um ein financiering kundi fingist í lag, ið kundu veitt 75 % í lán til fiskakeyp.

Samtykt varð at samráðingarnar skuldu halda fram við landsstýrið av 6-mannanevnd: Föroya og Suðuroyar Fiskimannafelög 1, Föroya maskinist og motorpassarafelög 1, Föroya Skipara- og Navigatörfelög 1, Færöernes Rederiforening 1, Föroya trolarafelag 1 og Föroya Fiskasöla 1.

24. oktober hövdu felögini valt teirra umboð, og fundur varð settur. Fyri fiskimannafelögini var valdur Ingvard Jacobsen, felagsskrivari, Tórshavn, fyri reiðarafelagið, reiðari S. P. Petersen, Fuglafirði, fyri motor- og maskinistfelögini felagsformaður Jóhan P. Jacobsen, Klakksvík, fyri trolarafelagið reiðari Poul Hansen, Tórshavn, fyri skipara- og navigatörfelagið felagsformaður Debes Christiansen, Tórshavn, fyri Föroya Fiskasölu, felagsformaður Leif Waagstein og vegna landsstýrið, landsstýrismaður Hákun Djurhuus. Á fundi vóru eisini landsstýrismaður R. Long og skrivstovustjóri Jóhan Djurhuus.

Landsstýrismaður Hákun Djurhuus rekapituleraði tað, ið hent var í málinum og vónaði, at nevndin fór at verða för fyri at finna útveg úr tí trætu, sum í löturni er millum Föroya Fiskasölu og veiðumannafelögini. Tann formella orsökin til fundirnar, ið hava verið og verða er kravið frá veiðumannafelögunum um umboðan í Föroya Fiskasölu, men tann reella bakgrundin er tær seinu og lágu avrokningarnar.

Á hesum fundi vóru menn samdir um, at eydnaðist tað landsstýrinum at skipa so fyri, at 75 % finansiering fekkst í lag til fiskakeyp, vildi fastur landingarprísur verða möguligur, og vildi hetta föra stórar fyrimunar við sær fyri allar, ið luttaka í fiskivinnuni. Vist varð á tey ivamál, ið stóðu í sambandi við eina slíka skipan til dömi hvör, ið skuldi seta prísin. Eisini var fört fram, at klippfiskaturkingin hevði givið nógv av sær, og at tað var skeivt, at saltfiskaprísurin ikki neyt gott av hesum og harvið allur veiðumannastætturin og somuleiðis teir skipseigarar, ið sum nú stóð ikki fingu förini at bera seg.

Settir vóru fram 10 spurningar, ið umfataðu allar tær atfinningar móti Föroya Fiskasölu, ið hövdu gingið og gingu millum manna í löturni. Spurningarnir vóru hesir:

1. Hevur Föroya Fiskasöla heft söluna av föroyskum salt- og klippfi soleiðis, at menn mugu halda, at selt kundi verið skjótari og í störri nögdum, um hon ikki var?

2. Hevur Föroya Fiskasöla í umsitingini royndst órímuliga dýr, so at hetta hevur sett avrokningarprísin til sölu- og veiðumenn niður?

3. Hevur Föroya Fiskasöla disponerað í öðrum förum fleiri ferðir soleiðis, at hetta hevur skert avrokningarprísin?

4. Hevur Föroya Fiskasöla gjört mismun í sínum avskipingarjáttanum til limirnar?

5. Hevur Föroya Fiskasöla selt okkara fisk fyri minni pris enn aðrar tjóðir, ið arbeiða í somu vinnu sum vit, hava fingið fyri sín?

6. Er Föroya Fiskasöla í síni uppbygging soleiðis skipað, at tað nervar endamálið: söla av salt- og klippfiskaframleiðslu okkara til mest möguligan pris og til skjótast möguliga avskiping?

7. Er tað til fíggjarligan bata ella skaða samfelagsliga, at sölan av föroyskum salt- og klippfiski er heft av sölueinkarrætti?

8. Hevur tað royndst prishækkandi ella lækkandi í teim förum selt er uttanum Föroya Fiskasölu?

9. Um selt hevur verið gjögnum umboð, hvussu hevur hesin prísur ligið javnmett við tann pris, Föroya Fiskasöla hevur verið för fyri at fingið.

10. Hvat fyrimun vildi Föroya Fiskasöla fingið sum sölufelag viðvíkjandi hægri prísi og skjótari avskiping, um veiðumannafelögini vóru umboðaði í umboðs- og starvsnevndum?

Umboðsmaðurin fyri Föroya Fiskasölu varð biðin um skrivliga at svara.

Fyri at lögtingið kundi standa frítt í síni stöðutaka í hesum máli, uppsegði landsstýrið einkarrætt Föroya Fiskasölu til 1. januar 1952. 5ta treytin síðsti partur sigur: at einkarrætturin kann verða afturtikin við 3 mánaða ávaring til ein 1. januar.

Fundir vóru hildnir 29. og 31. oktober. Á hesum fundum vóru umrött ymisk viðurskifti innan fiskivinnuna og Föroya Fiskasöla framlegði hetta svar til teir 10 spurningarnar, ið vóru settir fram á fundi 24. oktober.

1. Hevur Föroya Fiskasöla tarnað söluni av föroyska salt- og klippfiskinum soleiðis, at menn mugu halda, at selt kundi verið skjótari og í störri nögdum, um hon ikki var?

Viðmerkt var undir samráðingunum í landsstýrinum, at orðið »heft« merkti »tarnað«.

Spurningurin má eftir okkara hugsan svarast avnoktandi.

Sum tað er nevndini kunnugt, eru útreiðslurnar í okkara fiskivinnu so stórar, at væl má ansast eftir, at serstakliga tann prísur, sum ein byrjar at selja til, verður so högur sum möguligt, av tí at hann oftani indicerar prísin seinni á árinum.

Tað er beint, at sölan av fiski tey trý seinastu árini (1949—51) ikki hava givið uppá seg so stóran vinning sum í 1948 og at heldur ikki hevur verið avskipað so skjótt.

Hetta stendst av, at prísurin uppá fisk yvirhövur er lækkaður, og samstundis hava keypararnir ikki verið fúsir at taka fiskin fyrrenn út á heystið, av tí teir vilja sleppa sær undan útreiðslunum við at goyma fiskin.

Spurt hevur verið, um tann sáttmáli, sum varð gjördur ffjör við ARCOBA, Italiu, hareftir henda samgonga av fiskakeyparunum fekk »exclusivtet« til 1. desember (sáttmálin varð gjördur 12. mai) ikki hevur minkað um nögdina og sett prísin niður í 1950.

Sáttmálin var uppá 12.000 tons, harav ca. 5.400 var fiskur í bulk úr Grönlandi. Prísurin fyri bulk-fisk 1,50 cif og fyri pakkaðan 1,56 fob. Av tí vit gjögnum henda sáttmála fingu fiskin í Grönlandi goldnan partvís, áðrenn farmaskipini fóru haðani, og at vit við at selja eina so stóra nögd vissaðu okkum, at prísurin um heystið fór ikki niður, halda vit, at sáttmálin var rættur. At ein fyri minni nögdir kanska kundi havi fingið eitt sindur meira í oktober/november 1950 er möguligt, men tað stendur fast, at vit við sáttmálanum hövdu stabiliserað prísin yvirhövur.

Viðmerkt verður, at Uniónin í Íslandi metti möguleikarnar á sama hátt sum vit, og tí gjördi ein líknandi sáttmála.

Leggjast má aftrat, at Fiskasölan sjálvandi má royna at útvega sölur skjótast gjörligt og somuleiðis avskipingar, men at marknaviðurskiftini, soleiðis sum tey veruliga eru og hvussu ein ætlar tey verða seinni á árinum hevur nógv at týða, tá ein skal taka stöðu til sölu. Prísurin kann vera í lægra lagi, og tað kann vera beint at selja, men sum oftast vil tað vera skeivt, tí missurin uppá fisk seinni á árinum — hóast ein roknar við rentutapi o. s. fr. — vil verða ov stórur. Um vit til dömi í ár hövdu sluttað við Italiu pakkaðan fisk vildu vit ætlandi fingið 10/15 oyru minni pr. kg, enn vit nú hava fingið í Grikkalandi fyri eina minni góða sortering.

2. Hevur Föroya Fiskasöla í umsitingini royns órímiliga dýr, so at hetta hevur sett avrokningarprísin til sölu- og vinnumenn niður?

Samstundis sum víst verður á hjálagda rokuskap (1949— og 1950) er umsitingin — viðmerkt verður, at vit bæði í handilssamráðingum og í dagliga arbeiði felagsins halda okkum hava verið förar fyri at fingið hampulig úrslit fram — eftir okkara hugsan ikki órímuliga dýr og heldur ikki dýr.

T. d. skal upplýsast, at eitt felag sum »Atlas« bert í Spaniu hevur 4—5 manns búgvandi fyri at umsita ein útflutning uppá 4—5 mill. kr., okkara seinasti sáttmáli er 27 mill. kr.

Í okkara arbeiði á marknaðum ætla vit ikki — um okkara felag í framtíðini skal halda fram við sínum virki — at gera minni burtur úr sölu- og »research« arbeiðinum. Tvörturímóti, Suðuramerika og Afrika eru lond, sum vit fyrr ella seinni skulu gera nógv burturúr, og tað krevur ein mann á hvörjum plássi og tær útreiðslur, tað förir við sær.

3. Hevur Föroya Fiskasöla disponerað í öðrum förum fleiri ferðir soleiðis, at hetta hevur skert avrokningarprísin?

Hesin spurningur gongur sambart við í nevndini út?

4. Hevur Föroya Fiskasöla gjört mismun í sínum avskipingarjáttanum til limirnar?

Vit hava fingið nógvar áhreiðslur fyri at gera mismun. Men tá ið vit hava biðið um dokumentatión, hava menn ikki kunna givið okkum hana.
Í förum, har roynt hevur verið at sað praktisk uppá smærri nögdir, hevur tað ikki verið minst skeivt.
Í lötuni er tað so, at vit, tá ið pakkiboð verða givin, ganga eftir einari »lineal« og starvsnevndin skal góðtaka pakkiboðini. Hóast so er, eru klagurnar komnar, eisini frá starvsnevndarlimum, so ein sær ikki, at rættvísi kann verða góðtikið, hvussu ein ber seg at.

5. Hevur Föroya Fiskasöla selt okkara fisk fyri minni prís enn aðrar tjóðir, ið arbeiða í somu vinnu sum vit, hava fingið fyri sín?

Tá ið vörubýtissáttmáli var galdandi millum Danmark og Italiu, var tann krónuprísur, sum vit í vissum förum fingu, neyvan lægri enn tann prísur, aðrir seldu fyri; um okkara prísur varð íttroknaður í fríum gjaldoyra aftaná clearing-sáttmálar eru vorðnir gjördir, hevur okkara prísur ikki ligið lægri, um ein sær burtur frá teimum trolaralastum, sum av neyð eru seldar til Danmarkar. Sum döni frá 1951 kann nevnast:

a) Klippfiskur til Portugal er seldur fyri sama prís sum Noreg hevur fingið.

b) Saltfiskur til Grikkaland varð sluttaður í summar. Vit seldu fyri sama prís sum Ísland og Noreg. Viðmerkt verður, at sölan varð gjörd cost and freight. So statt verður fraktin hjá Íslendingum hægri. — Fyri nökrum dögum síðani seldu vit — eisini canf 2500 tons fyri £ 93—10—0 pr. tons. Ísland fekk £ 89, og Grönland, har fraktin er væl hægri enn frá Föroyum, fyri £ 95, sum er væl minni, av tí at teir selja vaskaðan og pressaðan fisk.

c) Klippfiskur til Spaniu er öll árini seldur fyri hægri prís enn tann, sum Noreg og Ísland hevur fingið; í ár til dömis hava vit ikki í okkara sáttmála sett veraldarmarknaðarprísin sum grundarlag. Tað hevur Ísland gjört.

d) Noreg hevur selt Grönlandsfisk til Italin pakkaðan fyri 1,59 oyru cif útvegað vekt, vit 1,50 canf, hvat er betri prísur?

So statt má sigast, at vit yvirbövur hava fingið og fáa prís, sum ikki er lægri enn prísurin, sum granualondini fáa.

6. Er Föroya Fiskasöla í síni uppbygging soleiðis skipað, at tað nervar endamálið: sölu av salt- og klippfiskaframleiðslu okkara til mest möguligan prís og til skjótast möguligu avskiping?

Sagt hevur verið, at starvsnevndin er ov stór, soleiðis at tað tarnar söluarbeiðið og virki yvirhövur.

Aðrir mugu halda, at starvsnevnd okkara er ovlítil, tí krevja menn fleiri umboðsmenn í hesari nevnd afturat. So sum arbeiðið er skipað og við tí góða samarbeiði, sum er millum nevnd og stjórn, verða spurningar um sölur viðgjördar sum í einum hvörjum stórum handilsfelag.

Okkara konkurrentar eru eisini av tí uppfatan, at vit ikki standa so nógv aftan fyri teir. Könir Norðmenn hava sagt okkum, at teir halda vit í metan av sölumögulcikum, prísviðurskiftum o. s. fr. á teimum *ymisku* marknaðum hava betri yvirlit enn teir hava.

7. Er tað til fíggjarligan bata ella skaða samfelagsliga, at sölan av föroyskum salt- og klippfiski er heft av sölueinkarrætti?

Eingin av teimum limum, sum um 1930 og seinni hava sað hvussu selt varð til ymiskar prísir á somu tíð, og hvussu teir, sum stóðu nest illa í tí, indicerða prísin, eru í iva um, at ein samgonga av útflytarum við ella uttan einkarrætti hevur ómetaligan týdning.

8. Hevur tað roynst príshækkandi ella lækkandi í teimum förum, selt er uttanum Föroya Fiskasölu?

Hesin spurningur viðvíkjur bert fiski til Danmarkar. Fiskasölan kann til eina og hvörja tíð selja tær smáu nögdir av stórum fiski her er talan um til líka so góðar prísir sum ein hvör annar.

9. Um selt hevur verið gjögnum umboð, hvussu hevur hesin prísur ligið, javnnett við tann prís, Föroya Fiskasöla hevur verið för fyri at fingið?

Í Portugal, Spaniu og Grikkalandi verður selt til ein stovn í hvörjum landi. Sáttmálarnir verða gjördir av okkum sjálvum; í Portugal og Grikkalandi verður sumt arbeiði avrika av umboðsmanni og her er skipa so at ein skal hava eitt umboð, sjálvt um ta veruligu sölu.

Í Danmark nýta vit til at skriva sjálvan sáttmálan autoriseraðan vörumeklara.

Vit hava ikki sað dömir uppá, at veruligir agentar hava kunnað fingið hægri prísir.

10. Hvat fyrimun vildi Föroya Fiskasöla fingið sum sölufelag viðvíkjandi hægri prísi og skjótari avskiping um vinnufelögini vóru umboðaði í starvsnevnd og stjórn.

Spurningurin má svarast so, at tá ið vit hava biðið tey vinnufelög, sum ynskja umboðan í starvsnevnd, sagt okkum, hvönn fyrimun Fiskasölan vildi fingið av tí, hevur svarið verið, at tað kundi verið, at tað kundi ikki skaða.

At prógva hvussu tað gagnar sölufirslitinum prísum o. s. fr. má verða skylda vinnulívsfelaganina.

Spurningarnir og svar Fiskasölumar vóru viðgjörd á fundinum, og sum heild tikið fekk ein varhugan av, at andstöðan móti Föroya Fiskasölu fyri ein part hvíldi á ókunnleika um tey veruligu viðurskiftini. so ein málti ásanna orðini formaður Föroya Fiskimannafelags segði á fundi 9. juli, at nógvar av atfinningunum móti Föroya Fiskasölu vóru lítið undirbygdar.

Umboðsmenninir vóru nú samdir um at leggja fyri felagsstjórnir teirra spurningin um fastan landingarprís og varð næsti fundur settur til 14. november.

14. november komu umboðsmenninir aftur við felagsstöðunum. Poul Hansen segði frá reiðarafelagnum og trolarafelagnum, at hesi bæði felögini vildu taka undir við föstum landingarprísi, ásettur av prísásetingar-

nevnd. Debes Christiansen segði frá veiðumannafelögunum, at tey hildu fast um teirra krav um fasta umboðan í stýri Föroya Fiskasölu.

Tá partarnir stóðu so langt frá hvörjum öðrum, var fundurin lokin, og landsstýrið ásannaði, at semjuroynd um eina felagsstöðu var endað úrslitaleys.

Undirbonds varð landsstýrismaður Hákun Djurhuus av stjórnarlimum í veiðumannafelögum biðin um at royna á felagsfundi við stjórnirnar fyri öll veiðumannafelögini enn eina ferð at leggja málið fyri.

Hesin fundur var hildin 22. november.

Til umröðu vóru hesi grundsjónarmið:

1. Fastur landingarprísur og föst umboðan í stýri Föroya Fiskasölu lata seg ikki greipa.

2. Lóggávuvaldið hevur onga heimild at trýsta menn inn í eitt felagsstýri og har taka avgerðir um virðir, teir ikki eiga.

3. Möguleikin at gera nýggja almenna fiskasölu.

Spurdur um uppskot landsstýrisins svaraði landsstýrismaður Hákun Djurhuus, at landsstýrið vildi til tingið seta uppskot fram um, at Föroya Fiskasöla fekk sín einkarrætt aftur, men á hesum stöði:

1. Settur verður fastur landingarprísur av 5 manna nevnd 6 ferðir árliga, og um nevndin heldur tað verða neyðugt oftari.

2. Í prísásetingarnevndina velja veiðumannafelögini 2 limir, reiðarafelögini 2 limir og saman velja teir 5ta mannin, ið skal verða uttanveltaður. Koma teir ikki á samt, verður tað sorinskrivarin, ið velur 5ta mannin.

3. Limirnir hjá veiðumannafelögunum í prísásetingarnevndini eiga sess sum »observatörar« á starvsnevndarfundi Föroya Fiskasölu fyri altíð at hava fullan kunnleika til grundarlagið fyri rættvísari prísáseting. Teir hava í starvsnevndini ikki atkvöðurætt og eru ábyrgdarbundnir til tögnskyldu.

Viðvíkjandi vimingi av klippfiskasölu vildi landsstýrið í öðrum föri seta uppskot fram, so ein partur av hesum vimingi, kemur veiðumonnum til góðar.

Fundurin endaði við tí úrsliti, at menn tóku undir við landsstýrisins stöðu og hildu nógv vera vunnið, um ein skipan sum tann, ið var í uppskoti, kemur í lag.

Landsstýrið heldur tað vera umráðandi at koma burtur úr tí ólagi, avrokningarviðurskifti veiðumanna hava verið og eru í, og at hetta ikki gerst við fleiri lógum, ið kanska ger alt flóktari og arbeiðstyngri, men einans á tí greiða grundarlagi ein fastur avrokningarprísur er. Hetta hevur eink við sáttmálaásetingar at gera, men við fastari prísásetingarnevnd, ið til hvörja tíð skuldi kunna ásett rættvísan landingarpris, skuldi her verið skapt eitt »fríholt«, myndarliga sagt, ið hevur allar möguleikar til at verða eitt kyrrandi millumlið millum hövuðsbólkarnar í okkara fiskivinnu og harvið eisini framleiðsluökjaudi.

Um fastan landingarpris og prísásetingarnevnd vil landsstýrið seta uppskot fram í öðrum máli, men er í hesum máli uppskot landsstýrisins, at:

Lögtingið heimilar landsstýrið til at endurnýggja sáttmálan við Föroya Fiskasölu um einkarútflytingarrætt av salt- og klippfiski frá 1. januar 1952 við hesum treytum:

1. Landsstýrið hevur eftirlit við virki felagsins eftir nærri av landsstýrinum fyrisettum reglum.

2. Teir tveir limir veiðumannafelaganna í prísásetingarnevndini landingarprísi viðvíkjandi eiga sum observatörar sæti á starvsnevndarfundi Föroya Fiskasölu utan atkvöðurætt, men við ábyrgdarbundnari tögnskyldu.

3. Einkarrætturin kann verða tikin aftur um felagið ikki yvirheldur tær skyldur, sum hvíla á tí samsvarandi galdandi lógum, og annars kann einkarrætturin verða afturtikin við 3 mánaða ávaring til ein 1. januar.

I viðgerð 19. desember og 21. desember legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Álit.

Fiskivinnunevndin hevur fingið málið til umhugsnar 19. desember 1951.

Ein meiriluti (Jens Chr. Olsen, Fr. Bláhamar og S. Ellefsen) mælir til at samtykkja landsstýrisins uppskot.

Ein minniluti (P. M. Dam og J. H. Danbjörg) förir fram:

»Fiskivinnan er hövuðsvinnan og útflutningur av fiski útger um 9/10 av öllum okkara útflutningi.

Sambart galdandi sáttmálar eiga fiskimenn um helmingin av veiðuni.

Við tað at hetta er so týðandi táttur í framleiðslu okkara, er tað av största týðningi, at tað verður kyrra um tann stovn, sum skal skipa fyri hesum handli.

Síðan Föroya Fiskasöla varð stovnað hevur tað verið eitt krav frá veiðumannafelögunum at verða umboðaðir í stýrinum fyri hesum stovni, eitt krav, sum minnilutin heldur verða rætt og rímiligt.

Sambart hesum setir minnilutin fram fylgjandi

Uppskot.

Framhald av einkarrætti I/f Föroya Fiskasölu verður treytaður av, at felagið á fyrsta aðalfundi felagsins broytir lög fyri felagið soleiðis, at fiskimannastætturin fær 3 menn í umboðsnevndina og ein mann í starvsnevndina, sum skotið upp av Föroya Fiskimannafelag, Suðuroyar Fiskimannafelag, Föroya Skipara- og Navigatörfelag, Föroya Motorpassarafelag og Maskinistfelag.«

2. viðgerð 21. desember 1951.

Uppskot minnilutans fall 10—0.

— landsstýrisins samtykt 14—2.

50. Løgtingslóg um avrokning og lønjavningargrunn fiskimanna.

1951, 17. desember legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, 17. s. m.:

Uppskot

til

lögtingslóg

um

avrokning og lönjavningargrunn fiskimanna.

Bólkur 1.
Um avrokning av parti fiskimanna í fongi.

gr. 1.
Við fiskiskip eftir hesi lög er at skilja hvört fiskiskip, sum skrásett er í Föroyum.

gr. 2.
Petti 1. Tá ið fiskiskip, aftaná lidnan túr landar allan fongin í saltfiski í föroyskari havn, hevur manningin, haruppií skiparin, teir undantiknir, sum eftir mynstringarsáttmála krevja frábýti í fonginum, krav uppá kontanta avrokning av forvinningi sínum seinast 4 vikur aftaná at landingin er liðug. Kravið skal vera skrivligt og vera útgerðarmanni í hendi seinasta vikulagin aftaná at landingin er liðug. Forvinningurin verður rindaður viðkomandi fiski-

Forslag

til

lagtingslov

om

fiskernes afregning og lönreguleringsfond.

Kapitel 1.
Om afregning af fiskernes andel af fangsten.

§ 1.
Ved fiskeskibe forstås i denne lov et på Færöerne registreret fiskeskib.

§ 2.
Stk. 1. Når fiskeskib efter afsluttet tur lander hele sin fangst af saltfisk i færösk havn, har den påmönstrede besætning, herunder også skibets förer, dem undtagne, der, i henhold til mönstringskontrakt, kræver deres andel af fangsten fradelt, krav på senest 4 uger, efter at oplosningen er afsluttet, at få fortjenesten kontant afregnet. Kravet, der fremsættes skriftligt, skal være rederen i hænde senest ugedagen efter, at oplosningen er afsluttet. Fortjenesten udbetales til vedkommende fiskerforening

mannafelag við frádrátti av tí, sum latið kann vera í forskoti.

Petti 2. Er fongurin frá lidnum saltfiskatúri hjá fiskiskipi umskipaður í flutningsskip í fremmandari havn, og fiskurin síðani verður uppskipaður í föroyskari havn, koma reglurnar í petti 1 í hesi grein í nýtslu tilsvarandi.

Petti 3. Um so er, at partur av saltfiskafongi verður umskipaður í flutningsskip í fremmandari havn, og hesin fiskurin síðani verður uppskipaður í föroyskari havn, meðan tann eftirverandi parturin kemur heim í skipinum sjálvum, eiga fiskimenninir (manningin) ikki krav uppá avrokning av teirra forvinningi, fyrr enn allur fiskurin er uppskipaður. Annars koma reglurnar frammanfyri í nýtslu tilsvarandi.

Petti 4. Lf Föroya Fiskasöla hevur skyldu at nýta ávegis tann pening sum törvar til kontantu avrokningina av teim lánum, sum veitt verða henni við ríkisins og lögtingsins hjálp sum lán í fiski á goymslu.

gr. 3.

Petti 1. Koma menn til ósættis við avrokningina um prísin, verður hann fyrisettur av eini nevnd, sum hevur 5 limir, 1 valdur í felag av Föroya skipara- og navigatörfelag, Föroya maskinistfelag og Föroya motorpassarafelag og 1 valdur í felag av Föroya fiskimannafelag og Suðuroyar fiskimannafelag og 2 valdir av Færöernes rederiforening og Felag föroyskra trolaraeigara í felag. Ilesir 4 limirnir velja í felag fimta limin, sum ikki má vera limur í nökrum

med fradrag af, hvad der måtte være ydet i forskud.

Stk. 2. Er fangsten fra en afsluttet saltfisketur for et fiskerskib omladet i fremmed havn til transportskib, og oplosses fisken derefter i færösk havn, finder reglerne i denne paragraf, stk. 1, tilsvarende anvendelse.

Stk. 3. Såfremt en del af saltfiskefangsten omlades i transportskib i fremmed havn, og denne del af fisken derefter oplosses i færösk havn, medens resten af fangsten hjemföres af selve fiskeskibet, har fiskerne ikke krav på udbetaling af deres fortjeneste, förend al fisken er oplosset. Iövrigt finder reglerne foran tilsvarende anvendelse.

Stk. 4. Föroya Fiskasöla er forpligtet til af de lån, der ved statens og lagtingets bistand ydes denne til belåning af fisk på lager, at anvende forlods de til den kontante afregning fornödne beløb.

§ 3.

Opstaar der ved afregningen uenighed om prisen, fastsættes denne af et nævn, bestaaende af 5 medlemmer, et valgt af Föroya Skipara- og navigatörfelag, Föroya maskinistfelag og Föroya motorpassarafelag i forening og eet valgt af Föroya Fiskimannafelag og Suðuroya Fiskimannafelag i forening og to medlemmer valgt af Færöernes Rederiforening og Felag Föroyskra Trolaraeigara i forening; sammen vælger disse 4 medlemmer det femte

av teim nevndu vinnufelögunum. Um so er, at teir ikki semjast um valið av fimta liminum, verður hann uppnevndur av sorinskrivaranum. Avgerð nevndarinnar er bindandi partanna millum.

Petti 2. Reglur fyri starv nevndarinnar kunnu, um neyðugt fyriskotast av landsstýrinum.

Petti 3. Samsýningar og aðrar útreiðslur av starvi nevndarinnar fara í helvt millum l/f Föroya Fiskasölu og lönjavningargrunnin, smbr. gr. 5.

gr. 4.

Petti 1. Tá ið fiskiskip aftaná lidnan túr landar allan fongin í saltfiski beinleiðis í fremmandari söluhavn, hevur l/f Föroya Fiskasöla, fyri tann útfluttning, sum kemur undir einarætt hennara, skyldu at eftirhalda tann heimflutta sölupeningin, til manningin er avroknað. Í hesum föri skal sölupeningurin rindast inn í l/f Föroya fiskasölu. Útgerðarmaðurin hevur skyldu at avrokna manningina innan 4 vikur aftaná, at peningurin er heimkomin, og rinda — möguligt við ávísing uppá tann eftirhildna peningin — til viðkomandi fiskimannafelag við frádrátti av ti, sum latið kann vera í forskoti. Fiskimannafelagið váttar hareftir l/f Föroya Fiskasölu, at tað, sum eftir er av sölupeninginum, kann rindast viðkomandi.

Petti 2. Er fongurin frá lidnum saltfiskatúri hjá fiskiskipi umskipaður í fremmandari havn, og fiskurin hareftir verður skipaður upp frá flutningsskipi í fremmandari söluhavn, koma reglurnar frammanfyri í nýtslu tilsvarandi.

medlem, der ikke maa være medlem af nogen af de nævnte organisationer. I tilfælde af, at enighed ikke kan opnaas om valg af det femte medlem, udpeges dette af sorenskriveren. Nævnets afgörelser er bindende for parterne.

Stk. 2. Instruks om nævnets arbejde kan, om fornödent, fastsættes af landsstyret.

Stk. 3. Honorarer og andre udgifter ved nævnets arbejde afholdes med halvdelen af l/f Föroya Fiskasöla og halvdelen af lönreguleringsfonden, jfr. § 5.

§ 4.

Stk. 1. Naar fiskeskib efter afsluttet tur oplosser hele sin fangst af saltfisk direkte i fremmed markedshavn, er Föroya Fiskasöla for den eksport, der omfattes af selskabets eneret, forpligtet til at tilbageholde det hjemförte salgsprovenu, indtil afsætningen er afregnet. I dette tilfælde skal salgsprovenuet indbetales til Föroya Fiskasöla. Rederen er forpligtet til at afregne fiskerne senest 4 uger, efter at beløbet er hjemført, og — eventuelt ved anvisning paa tilbageholdte beløb — indbetale fortjenesten med fradrag af eventuelle forskud til vedkommende fiskerforening, der herefter overfor Föroya Fiskasölu bekræfter, at overskydende del af salgsprovenuet nu kan udbetales vedkommende berettigede.

Stk. 2. Er fangsten fra en afsluttet saltfisketur for et fiskeskib omladet i fremmed havn, og fisken derefter af transportskibet oplosses i fremmed markedshavn, finder reglerne foran tilsvarende anvendelse.

Petti 3. Um so er, at partur í saltfiskafongi verður umskipaður í fluttningsskip í fremmandari havn og hesin partur síðani verður uppskipaður í fremmandari söluhavn, meðan tað, sum eftir er av fonginum, komum heim í skipinum sjálvum, hevur manningin ikki krav uppá avrokning av forvimingi teirra, fyrr enn allur fiskurin er landaður. Annars koma reglurnar í hesi grein í nýtslu tilsvarandi.

Stk. 3. Saafremt en del af saltfiskefangsten omlades i transportskib i fremmed havn, og denne del derefter oplosses i fremmed markedshavn, medens resten af fangsten hjemföres af selve fiskefartöjet, har fiskerne ikke krav paa udbetaling af deres fortjeneste, förend al fisken er landet. Iövrigt finder reglerne i denne paragraf og § 2, smh. med § 3 tilsvarende anvendelse.

Bólkur 2.

Um lönjavningargrunn.

gr. 5.

Petti 1. Lönjavningargrunnur skipsfiskimanna, sum stovnaður er sambart fyrr galdandi lóggávu, fær fylgjandi inntökur:

1) 1 % av söluvirðinum av öllum saltfiski, sum útflattur verður úr Föroyum. Javnmettur við útfluttning í hesum viðfangi er saltfiskur, sum umskipaður er í fluttningsskip í fremmandari havn og skipaður uppúr tí í fremmandari söluhavn, ella at fiskiskip flytur fiskin til söluhavn.
2) 1 % av söluvirðinum av feskum fiski, sum útfluttur verður úr Föroyum. Viðvíkjandi skiljing av orðinum útfluttningur smbr. undir 1).
3) 2 % av söluvirðinum av klippfiski, sum útfluttur verður úr Föroyum.
4) 1 % av söluvirðinum av sildini, sum útflutt verður úr Föroyum.

Petti 2. Gjaldið av sild, salt- og klippfiski fellur til gjaldingar við

Kapitel II.

Om lönreguleringsfond.

§ 5.

Stk. 1. Der tillægges den i henhold til tidligere lovgivning oprettede lönreguleringsfond for skibsfiskere följende indtægter:

1) 1 % af salgsværdien af den saltfisk, der udföres fra Færöerne. Med udförsel ligestilles i denne forbindelse saltfisk omladet i transportfartöj i fremmed havn og fra dette oplosset i markedshavn, eller at fiskeskib sejler fisken til markedshavn.
2) 1 % af salgsværdien af den ferskfisk, der udföres fra Færöerne. Vedrörende definition af ordet udförsel jfr. under 1).
3) 2 % af salgsværdien af den klipfisk, der udföres fra Færöerne.
4) 1 % af salgsværdien af den sild, der udföres fra Færöerne.

Stk. 2. Afgiften forfalder for sildens, salt- og klipfiskens vedkommende ved afskibning fra færösk

avskipingini úr föroyskari havn, fyri fluttningsskip við framkomu til fyrstu söluhavn og fyri fiskiskip, sum flyta fong til söluhavn, 3 vikur aftaná at sölan er framd. Av feskfiskinum (ísfiskinum) fellur gjaldið til gjaldingar 3 vikur aftaná, at fiskurin er seldur í söluhavn.

Petti 3. Í ivamálum um stöddina av söluvirðinum verður tað fyrisett av nevndini eftir gr. 3.

Petti 4. Av fiski, sum seldur verður um l/f Föroya Fiskasölu ella verður seldur við loyvi hennara, innistendur hon fyri gjaldinum.

Petti 5. Við sölu beinleiðis frá fiskifari í útlendskari havn skal viðkomandi banki, um so er at l/f Föroya Fiskasöla ikki innistendur fyri gjaldinum eftir frammanfyri standandi reglum, við heimflytingini av söluperninginum draga gjaldið frá og halda grunninum tað til nýtslu.

Petti 6. Fallin gjöld verða at renta við 1 % fyri hvönn byrjaðan mánað; mánaðurin, tá ið gjaldið fellur er ikki viðroknaður. Gjaldið kann beinanvegin heintast inn við panting.

gr. 6.

1. petti. Mynstrað manning á fiskiskipum, sum eftir mynstringarsáttmála ikki hava tryggjaða minstulön, og útróðrarmenn til lands í Grönlandi, tá ið fardagur og afturkomudagur teirra eru prövfördir, eiga viðbót úr grunninum, um so er, at teir í álmanakkaárinum hava ikki havt eina inntöku tilsamans, sum í miðal svarar til 500 kr. um mánaðin í tí tíð, teir hava luttikið í viðkomandi fiskiskapi.

havn, for transportskibes vedkommende ved ankomst til förste markedshavn og for fiskefartöjer, der sejler fangsten til markedshavn, 3 uger efter at salget er afsluttet. For ferskfiskens (isfiskens) vedkommende forfalder afgiften 3 uger efter, at fisken er solgt i markedshavn.

Stk. 3. I tilfælde af tvivl om salgsværdiens störrelse fastsættes den af det i henhold til § 3 nedsatte nævn.

Stk. 4. For den fisk, der sælges gennem Föroya Fiskasöla eller sælges med dennes tilladelse, hæfter Fiskasölan for betalingen. Iövrigt er det ejeren af fisken, der er pligtig til at betale afgiften.

Stk. 5. Ved direkte salg fra fangstfartöj i udenlandsk havn skal vedkommende færöske bank, saafremt Föroya Fiskasöla efter foranstaaende regler ikke hæfter for belöbets betaling, ved salgshelöbets hjemförelse fratrække afgiftsbelöbet og stille dette til disposition for fonden.

Stk. 6. Forfaldne afgifter forrentes med 1 % for hver paabegyndt maaned, forfaldsmaaneden ikke medregnet, og kan straks inddrives ved udpantning.

§ 6.

Stk. 1. Paamönstret mandskab paa fiskeskibe, der ikke ifölge mönstringskontrakt faar garanteret mindstelön, samt baadfiskere i grönlandske farvande, for saa vidt disse kan dokumentere tidspunktet for afrejse og hjemkomst, tillægges der af fonden et löntilskud, for saa vidt de ikke i kalenderaaret har haft en samlet indtægt svarende til gennemsnit-

Petti 2. Viðbótin verður mett eftir miðalpartinum á viðkomandi skipi, soleiðis at miðal mannsparturin og teir mannspartar, sum liggja omanfyri hann, koma upp í 500 kr. — viðbótin uppíroknað — meðan mannspartar, sum liggja lægri um mánaðin enn miðalparturin, fáa somu viðbót sum miðalparturin, tó soleiðis, at hann, sum vegna sjúku ella vanlukku umborð hevur fingið veiðilíkindi síni ikki smávegis skerd, fær viðbót, soleiðis at inntöka hansara kemur upp í 500 kr. um mánaðin; tílík viðbót verður ikki veitt fyri lougri tíð, enn sjúkan hevur vart eftir váttan frá lækna ella skipara.

Petti 3. Sama viðbót verður veitt manni, sum eftir lógbundnari tuberklarannsókn frammanundan mynstring verður funnin at hava smittuna.

Petti 4. Undantiknir frá viðböt eru menn, sum í árinum frammanundan tí álmanakkaárið, sum rætt skuldi givið til viðbót, hevur havt í skattskyldugari inntöku yvir 6.000 kr., ella sum ikki er uppihaldari, og menn, sum ikki hava ríkisdanskan heimarætt.

gr. 7.

Manning á fiskiskipi, sum hevur ligið millum fiskitúrar, fáa viðbót fyri eina tíð, sum ikki má fara uppum 14 dagar í álmanakkaárinum.

gr. 8.

Skuldi peningur lönjavningargrunnsins ikki verið nóg mikil til tey í gr. 7 nevndu endamál, verða viðböturnar at minka lutfallsliga.

lig 500 kr. om maaneden for den tid, de har deltaget i det omhandlede fiskeri.

Stk. 2. Tilskudet beregnes efter middelparten paa det paagældende sk. saaledes at middelparten og de over denne værende mandskabsparter bringes op paa 500 kr. pr. maaned, iberegnet tilskudet, medens de under middelparten værende mandskabsparter faar tillagt samme tilskud som middelparten, dog saaledes at den, der som følge af sygdom eller ulykkestilfælde ombord har faaet sine fangstmuligheder ikke uvæsentligt reduceret, faar et tilskud, der bringer hans indtægt op på mindst 500 kr. pr. maaned; saadant tilskud ydes dog kun for den tid, sygdommen ifølge attest fra læge eller skipper har varet, og höjst for 3 maaneder.

Stk. 3. Tilsvarende tilskud ydes den, der ved den forud for paamönstringen lovpligtige tuberkulosesundersögelse findes at have tuberkulose.

Stk. 4. Undtagne fra tilskud er personer, der forud for det kalenderaar, der giver ret til tilskud, har haft en skattepligtig indtægt over 6.000 kr., eller som ikke er forsörgere, samt personer, der ikke har dansk indfödsret.

§ 7.

Mandskab paa fiskeskib, der har ligget stille mellem fisketure, faar tillagt en godtgörelse i tid herfor paa höjst 14 dage for kalenderaaret.

§ 8.

Skulle reguleringsfondens midler ikke være tilstrækkelige til de i § 7 nævnte formaal, nedsættes tilskudsbelöbene forholdsmæssigt.

gr. 9.

Umsókn um viðbót úr grunninum skal vera innkomin innan 1. marts; törvandi uppgerð yvir fiskiintöku í álmanakkaárinum frammanundan skal fylgja við smbr. gr. 6.

gr. 10.

Har serlig viðurskifti mæla til tess, kann nevndin í desember mánað rinda fyribils forskot av viðbótini, tó ikki upp um 50 % av henni.

gr. 11.

Petti 1. Grunnurin verður umsitin av eini 3mannanevnd. Í hana velja fiskimannafelögini ein, útgerðarfelögini ein og landsstýrið ein lim, sum er formaður.

Petti 2. Landsstýrið fyrisetur samsýning nevndarinnar.

Petti 3. Nevndin setur roknskaparförara og annað törvandi starvsfólk og fyrisetur lön teirra.

gr. 12.

Petti 1. Roknskaparár grunnsins er fíggjarárið. Roknskapurin verður grannskaður av teim endurlitsmonnum, sum landskassin setur til gransking av roknskapum landskassans.

Petti 2. Granskaður roknskapur og frágreiðsla nevndarinnar fyri farna árið verða í avriti send lögtingi og landsstýri innan 1. juli á hvörjum ári.

gr. 13.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1952, tó soleiðis, at tær í bólki I innihildnu greinir fáa gildi frá 1. februar 1952, og samstundis fara lögtingslógir nr. 47 frá 8. juni 1950

§ 9.

Ansögning om tilskud fra fonden skal være denne i hænde senest den 1. marts, bilagt fornöden opgörelse over det foregaaende kalenderaars fiskeriindtægt, jfr. § 6.

§ 10.

Hvor særlige forhold taler derfor, kan bestyrelsen i december maaned udbetale et forelöbigt forskud af tilskuddet, dog ikke over 50 % af dette.

§ 11.

Stk. 1. Fonden bestyres af et udvalg paa 3 medlemmer, hvoraf fiskerforeningerne vælger et medlem, rederforeningerne et medlem og landsstyret et medlem, der samtidig er formand.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter bestyrelsens honorar.

Stk. 3. Bestyrelsen ansætter regnskabsförer samt antager det fornödne personale og fastsætter disses lön.

§ 12

Stk. 1. Fondens regnskabsaar er finansaaret. Regnskabet revideres af de til revision af landskassens regnskaber antagne revisorer.

Stk. 2. Afskrift af revideret regnskab med bestyrelsens beretning for det forlöbne aar, indgives til lagting og landsstyre inden hvert aars 1. juli.

§ 13.

Denne lov træder i kraft den 1. januar 1952, dog saaledes, at de i Kapitel I indeholdte paragraffer faar gyldighed fra 1. februar 1952, og

og nr. 29 frá 17. mars 1951 úr gildi. Seinast nevnda lóg verður tó galdandi fyri saltfiskin fyri árið 1951 og januar 1952, sum kemur undir lógarinnar greinir 1 og 2.

samtidig ophæves lagtingslov nr. 47 af 8. juni 1950 og lagtingslov nr. 29 af 17. marts 1951. Sidstnævnte lov bevarer dog sin gyldighed for den saltfisk for aaret 1951 og januar maaned 1952, der omfattes af lovens paragraffer 1 og 2.

Viðmerkingar:

Eftir fyrr galdandi lóggávu er grunnur stovnaður sum skal tryggja skipsfiskimonnum ein forvinning uppá 500 kr. um mánaðin fyri fiskitíðina (seinri við lóg nr. 83 frá 12. desember 1950 víðkað til eisini at umfata útróðrarmenn til lands í Grönlandi). Eftir lóg nr. 47 frá 8. juni 1950 hevur verið roynt at tryggja fiskimonnum eina forskotsrinding innanfyri sama markið og endaliga eru reglur framdar við lögtingslóg nr. 89 frá 17. marts 1951 um afturhald av forvinningi fiskimanna í söluvirðinum av útfluttum salt- og klippfiski.

Undir umsitingini av hesum lógum eru vissir tvörleikar komnir upp, sum elvt hava til umhugsunar um fremjing av liðiligari reglum, sum íveruleikanum eru betri dánaðar at tryggja fiskimonnum teirra avrokning.

Undir teim tingingum, sum havdar hava verið av landsstýrisins ávum, hevur verið frammi at gera útvegir fyri eini finansiering av fiski á goymslu uppí 75 % av virðinum, fyri á henda hátt m. a. at gera líkindi fyri avrokning beinanvegin við landing av fiskinum. Kann tílík finansiering fremjast og í tí treysti, vil hetta útinna eitt tað största ynski fiskimanna. Skuldi so hetta tiltakið farið at gjört lógina nr. 29 frá 17. marts 1951 ónýtta eina og lógin frá 8. juni 1950 kundi tikist av. Í hesum viðfangi verður skilað til, at finansiering eftir hesi lógini ikki kann haldast samstundis sum 75 % finansiering av fiski á goymslu kann ætlast framd. Í frammanfyri nevnda lógaruppskoti hevur verið havt í hyggju at fremja kontanta avrokning og lönjavning undir einum í somu lóg.

Fyri at tryggja lönjavningargrunninum törvandi pening til sítt endamáls frama, er skotið upp, at gjaldið til grunnin verður vaksið við einum 2 % gjaldi av öllum útfluttum klippfiski. Hervið hevur verið ætlað at fremja tvinni endamál undir einum, at útvega grunninum inntökur, ^ hann kann hvíla í sær sjálvum og at tryggja fiskimonnum ein prosentvísan part í tí forvinningi, sum kemur av framleiðslu til klippfisk úr rácvainum (saltfiskinum), sum fiskimaðurin hevur veitt.

Í lógarinnar gr. 6 er lönjavningin ætlað mett eftir miðalparti til tess, at lógarinnar reglur ikki skulu hava eina linking í arbeiðshugi í vinnu við sær.

Til gr. 1. Tað hevur ikki verið neyðugt at taka onnur skip innundir enn tey skrásetingarskyldug eru, tá fiskiskapur við smærri förum vanliga fer fram soleiðis, at fiskimenninir avreiða ráfiskin og fáa kontanta avrokning.

Til gr. 2. Reglur lógarinnar um avrokning við landingini umfatar bert saltfisk. Tað hevur á hesum öki roynst manningini illa eftir lönarsáttmála at fáa teirra rættindi til avrokning framd, áðrenn fiskurin er avskipaður. Tann langa tíðin millum landingina av fiskinum, til hann aftur verður fluttur út, og teir heldur smáu forvinningar hövdu til tað almenna við sær kröv um finansiering av eini forskotsskipan, smbr. lögtingslóg nr. 47 frá 8. juni 1950. Sum greinin er orðað hevur tann mynstraða manningin ætt til at krevja teirra forvinning kontant avroknaða seinast 4 vikur aftaná landing. Krav harum skal latast inn seinast vikudagin aftaná landingina. Viðvikjandi grönlandsfiskinum er tað vanligt, at ein partur av fonginum verður umskipaður í fluttningsskip, meðan hin parturin vanliga kemur heim í fiskiskipinum sjálvum. Her vildi tað verið órimuligt at kravt sær gjalding av forvinninginum, fyrr enn allur fiskurin er landaður í Föroyum ella í söluhavn. Fyrst tá kann uppgerð yvir túrin gerast.

Tað er ætlanin, at Föroya Fiskasöla skal hava skyldu til ávegis at nýta tey lán, sum eru útvegaði alment til finansiering av avrokningum. Landskassin fær sum möguligur garantur fyri hesi lán eina risiko, sum verður störri enn fyrr, tá ið lánini ikki fóru uppum 50 % av fiskavirði á goymslu. Henda risiko eigur at fyribyrgjast so vítt gjörligt, soleiðis at Föroya Fiskasöla sum higartil fær forkeypsrætt til fiskin, áðrenn forskot verður rindað.

Til gr. 3. Fyrisetingin fyri, at kontant avrokning kann krevjast alt fyri eitt aftaná landing er, at virði á fonginum kann fyrisetast.. Hetta verður ætlað framt við seting av eini serstakari nevnd. Avgerð nevndarinnar má vera hindandi fyri báðar partar. Nevndin vil ivaleyst finna tað neyðugt, at prísurin verður settur í periodum og kanska eisini ymsar prísir fyri ymsar landingar eftir teim nýttu fiskiamboðum. Fyrisett verður eisini, at menn undir metingini av virðinum av fongi hjá tí einstaka skipinum lata fiskin skilja og meta av vrakarum undir eftirliti av vrakaraeftirlitsmonnum.

Til gr. 4. Meðan gr. 2 umfatar tey föri, tá ið fiskurin verður fluttur heim til Föroya innan útflutning, umfatar gr. 4 tey, tá ið allur fongurin verður fluttur frá fiskileið til söluhavn. Her hevur tað ikki verið hildið neyðugt at fyriseta, at manningin skal krevja avrokning innan fyrisetta tíð, men bert fyrisett, at avrokning skal latast innan 4 vikur aftaná at allur fiskurin er uppskipaður í söluhavn. Tað hevur verið hildið, at tað ber til at krevja hetta, tá sölupeningurin vanliga fellur um somu tíð, og tá flestu lönarsáttmálar innihalda reglur um, at avrokning kann krevjast til somu tíð. Tíðarfreistin uppá 4 vikur er at skilja sum hámark. Lönarsáttmálar kunnu innihalda reglur um skjótari avrokning. Fyri at tryggja manningini avrokning av forvinningi hevur tað verið hildið neyðugt at taka upp

reglur um, at sölupeningurin skal flytast heim í Föroya Fiskasölu og haldast aftur har, til avrokningin er framd.

Undir petti 3 koma tey blandaðu viðurskiftini, tá partur av fongi er heimfluttur til Föroya, men annar er fluttur beinleiðis til söluhavn.

Til gr. 5. Eftir tí, sum higartil hevur verið í nýtslu, kravdi lönjavningargrunnurin gjaldið frá viðkomandi útgerðarmanni, og gjaldið var 1 % av bruttovirðinum í fonginum, tó við frádrátti av tolli, farmagjaldi og landingarútreiðslum. Henda innkrevjingarháttin hevur tað verið ætlað umsitingarliga at gera einfaldari, tá ið gjaldið av salt- og klippfiski áliggur Föroya Fiskasölu, undantikin tey fáu föri, tá ið útfluttningur ikki kemur undir felagsins einarætt. Viðvíkjandi feskfiskinum og sildini, so áliggur gjaldið viðkomandi skipaeigara (útfluttningsmanni). Banki hevur tó skyldu at eftirhalda gjaldið grunninum til nýtslu. Gjaldið verður roknað eftir söluvirðinum, t. v. s. fobvirðinum í föroyskari havn. Hesin innkrevjingar- og metingarháttur skuldi havi umsitingarligar fyrimunir og tryggja, at gjöldini komu betri inn.

Tá ið vinningurin av klippfiskaframleiðslu hevur verið störri enn av saltfiski, og hesin er grundarlagið undir klippfiskaframleiðslumi, hevur tað verið hildið rímuligt, at klippfiskurin rindar hægri gjald.

Til gr. 6. Meðan öll skipsmanningin fyri fekk lut í lönjavningini, hevur tað nú verið hildið, at skiparin (mynstrað manning umfatar ikki hann), sum meira enn nakar annar av manningini er lykilin til fong og rakstrarúrslitið yvirhövur, ikki eigur at fáa tryggjaða lönjavning. Á henda hátt viknar ikki idni hansara eftir góðum fongi og við honum betri forvinningi.

Við fyriseting av viðbótini til miðalpartin í petti 2 sum hægstu viðbót hevur tað verið tilætlað at byrgja fyri, at ein tryggjað lönjavning kann hava við sær ein linking í arbeiðsídni.

Tá ið minstalön ætlandi er ein almannaspurningur, koma bert uppihaldarar undir hana, um teir ikki hava eina skattaskyldnga inntöku omanfyri tilskilað mark.

Til gr. 7. Tá ið fyrireikingar til fiskitúr er náttúrligur táttur í honum, er eitt viet dagatal í tí tíðini, sum er grundarlagið fyri, um manningin skal hava lönarviðbót, tikið við.

Til gr. 8. Tað hevur verið hildið rættast, at lönjavningargrunnurin við sínum skyldum og serligu inntökum verður hildin uttanfyri landskassans ábyrgd.

1. viðgerð 19. desember og 21. desember legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Álit.

Fiskivinnunevndin hevur fingið málið til umhugsunar 19. desember 1951.

Ein meiriluti (Jens Chr. Olsen, Fr. Bláhamar og S. Ellefsen) heldur, at uppskot landsstýrisins — um hægri finansiering enn higartil fæst til fisk á goymslu — veitir manningini á fiskiskipum so skjóta avrokning sum gjörligt er eins og skipanin veitir góðan tryggleika fyri, at forvinningurin verður goldin fiskimanninum. Meirilutin kann tí mæla til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum broytingum:

1) Til gr. 5, petti 1, 3: Í staðin fyri »2 %« verður sett »1½ %«.

2) Til gr. 6, 2 petti: Hetta petti gongur út og í staðin verður sett:

»Verður maður sjúkur umborð og sjúkan váttað av lækna ella skipara, eigur maðurin lönarviðbót til hann er arbeiðsförur aftur, tó í minsta lagi fyri 1 mánað og í mesta lagi fyri 3 mánaðir, um hann er sjúkur so leingi. Viðbót eftir somu reglum fær hann, sum eftir lógbundnari tuberklarannsókn framman undan mynstring verður funnin at hava smittuna.«

»Hvis en af mandskabet bliver syg ombord og sygdommen attesteres af læge eller skibsföreren, har vedkommende af landskassen ret til löntilskud til han er arbejdsdygtig igen, dog i det mindste for en maaned og höjst tre maaneder, saafremt han er syg saa længe. Tilskud efter samme regler ydes den, der ved den forud for paamönstringen lovpligtige tuberkuloseundersögelse findes at have tuberkulose.«

3) Til gr. 6, 3. petti: Gongur út.

4) gr. 6, 4. petti verður 3. petti og »árini frammanundan« »forud for« gongur út og fyri »forud for« verður sett »i«.

5) Til gr. 8: Í staðin fyri »gr. 7« verður sett »gr. 6 og 7«.

P. M. Dam og J. H. Danbjörg lögdu fram soljóðandi

Álit.

Minnilutin (P. M. Dam og J. H. Danbjörg) er av teirri áskoðan, at kr. 500,00 um mánaðin í lönviðbót er so lítið, sum tað á nakran hátt kann vera, og at ógiftir menn hava sama rætt sum giftir menn, annaðhvört teir eru familjuforsyrgjarar ella ikki.

Í lógarinnar gr. 5 er framfört fylgjandi: »Innan 1. marts á hvörjum ári skulu teir, sum halda seg hava ræt til lönviðbót úr grunninum skrivliga venda sær til grunnin og viðleggja uppgerð.«

Íletta hevur fört við sær, at fleiri menn hava mist rættin til pening, sum teir annans áttu rætt til úr grunninum.

Orsökin til, at hesir menn hava sent umsókn ov seint, er tann, at teir ikki áðrenn nevnda dag hava fingið uppgerð.

Tílíkt kunnu fiskimenn ikki straffast fyri við at missa rættin til lönviðbót.

Minnilutin skjýtur tí uppá, at stýrið fyri grunninum skal hava skyldu at viðgera allar tær umsóknir, sum inn koma, eisini aftaná nevnda dag, um tað kann prógvast, at orsökin er tann, at viðkomandi umsökjari ikki hevur fingið uppgerð áðrenn 1. marts.

Umsökjarar, sum árini frammanundan hava mist rættin til lönviðbót,s skulu hava rætt til at fáa sína minstulön goldnað, um teir kunnu prógva, at orsökin er tann, at teir ikki hövdu fingið uppgerð í rættari tíð.

Minnilutin ásannar, at skipanir, ið miða ímóti at fremja skjóta og greiða avrokning við gjaldi í hondina beinan vegin, er av stórum týdningi.

Tað lógaruppskot hesum viðvíkjandi, sum landsstýrið hevur lagt fram, vildi verðið eitt framstig fyri fiskimanna, um kravið fiskimanna til avrokningar varð sett obligatorisk, og um ikki lógin um forskotsrindan verður avtikin. Men tá ið hvörki av hesum er tilfellið, kann minnilutin ikki ganga við til lógaruppskotið soleiðis, sum tað nú fyriliggur.

Minnilutin heldur tað vera beint, um tingið samtykti uppskotið uttan at taka lógina um forskotsrindan av og broytt soleiðis viðvíkjandi avrokningini, sum er umtalað.

Minnilutin ræður so statt sterkt frá at samtykkja ta í landsstýrisins gr. 13 umtalaðu avtöku av lógunum nr. 47 frá 8. juni 1950 og nr. 29 frá 17. marts 1951.

Sambært hesum setur minnilutin fram fylgjandi:

Broytingaruppskot

til

landsstýrisins uppskot.

til lögtingslóg um avrokning og lönjavningargrunn fiskimanna frá 17. desember 1951.

Í grein 2 ganga út orðini:

»Kravið skal vera skrivligt og vera útgerðarmanninum í hendi seinast vikudagin aftaná, at landingin er liðug.«

Uppskot

til

lögtingslög um lönjavningargrunn

skipsfiskimanna

gr. 1.

Lögtingslög um lönjavningargrunn Skipsfiskimanna nr. 69 frá 21. desember 1949 (við broytingum sambært lögtingslög nr. 83 frá 21. desember 1950) verður endurnýggjað við fylgjandi broytingum:

Í gr. 5 verður uppískoytt:

Stýrið fyri grunninum skal hava skyldu til at viðgera allar tær umsóknir, sum inn koma, eisini aftaná nevnda dag, um tað kann prógvast, at orsökin er tann, at viðkomandi umsökjari ikki hevur fingið uppgerð áðrenn 1. marts.

Umsökjarar, sum árini frammanundan hava mist rættin til lönviðbót, skulu hava rætt til at fáa sína minstulön goldnað, um teir kunnu prógva, at orsökin var tann, at teir ikki hövdu fingið uppgerð í rættari tíð.

Forslag

til

lagtingslov om lönreguleringsfond

for skibsfiskere.

§ 1.

Lagtingslov om lönreguleringsfond for skibsfiskere nr. 69 af 21. december 1949 (med ændringer jfr. lagtingslov nr. 83 af 21. december 1950) fornyes med følgende ændringer:

I § 5 tilföjes:

Fondens bestyrelse har pligt til at behandle alle de ansögninger, der indkommer ogsaa efter nævnte dag, saafremt det kan bevises, at aarsagen hertil er den, at vedkommende ansöger ikke har faaet opgörelse inden 1. marts. Ansögere, som de foregaaende aar har mistet retten til löntilskud, har ret til at faa mindstelön betalt, saafremt de kan bevise, at aarsagen var den, at de ikke har modtaget opgörelse rettidigt.

2. bólkur í uppskoti landsstýrisins gongur út.

2. viðgerð 21. desember og 3. viðgerð 22. desember 1951.

Formaðurin legði fram soljóðandi

Broytingar- og undirbroytingaruppskot.

Frá S. Ellefsen og fl.

Sum nýtt punktum til gr. 6, 1. petti verður sett:

Í viðbót verður veitt so mikið, at inntökan kemur upp í 500 kr. um mánaðin, smbr. tó gr. 8.

Som löntilskud ydes så meget, at indtægten bringes op på 500 kr. pr. måned, jfr. dog § 8.

Í gr. 6. 2. petti verður sett ístaðin fyr »læknа ella skipara« »læknа og ella skipara«.

I § 6, 2. stk. ændres »læge eller skipper« til »læge og eller skipper«.

Við 2. viðgerð fall minnilutauppskotið petti 1	12—0.
og lógaruppskotið frá minnilutanum	6—0.
Broytingaruppskotið til gr. 5 samtykt	15—0.
— - gr. 6 —	14—0.
— - gr. 8 —	14—0.

Við 3. viðgerð varð lógaruppskot landsstýrisins, soleiðis sum tað varð samtykt við 2. viðgerð samtykt við 15—0.

---

51. Løgtingslóg um veð í veiðu.

1951, 17. desember legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum; d. 17. s. m.:

Lögtingslóg um veðsetan av veiði.	*Lagtingslov om pantsætning af fangst.*
gr. 1.	§ 1.
Hvör tann, sum rekur fiskiskap, kann seta í veð veiðuna í 1952 til at tryggja rindan av skuld, ið gjörd er fyri útgerð og til rakstur av fiskiförum.	Enhver, der driver fiskeri, kan give underpant i fangsten i året 1952 som sikkerhed for betaling af gæld, der er stiftet til udrustning og drift af fiskerfartöjer.
gr. 2.	§ 2.
Skuldin sambart avvarðandi veðbrævi kann innheintast við panting	Det ifölge vedkommende pantebrev skyldige belöb kan inddrives

og fellur til gjaldingar í seinasta lagi 31. desember 1952.

Veðrætturin avtapist, um krav um panting ikki er sent fútanum innan 1. februar 1953.

gr. 3.

Vöra, sum er latin til útgerð móti veð í veiði samsvarandi besi lóg, kann ikki fyri aðra skuld koma undir lógbald, úttöku ella aðra lógsókn.

gr. 4.

Tá ið februar mánaður 1953 er úti, strikar sorinskrivarin tinglisin veðbröv, uttan at neyðugt er at seta fram krav um tað.

gr. 5.

Einki gjald til ríkiskassan verður at lata fyri at tinglesa, avlesa ella strika veðbröv samsvarandi hesari lóg.

gr. 6.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

ved udpantning og forfalder til betaling senest den 31. december 1953.

Panteretten bortfalder, såfremt begæring om udpantning ikke er indgivet til fogden inden den 1. februar 1953.

§ 3.

Varer, leveret til udrustning mod pant i fangsten i henhold til denne lov, kan ikke for andre tilgodehavender göres til genstand for arrest, udlæg eller anden retsforfölgning.

§ 4.

Efter udlöbet af april måned 1953 udsletter sorenskriveren de tinglæste pantebreve, uden at fremsættelse af begæring i saa henseende er fornöden.

§ 5.

Tinglæsning og aflæsning til udslettelse, der sker i medför af denne lov, kan finde sted uden gebyr.

§ 6.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Henda lóg er ein endurnýggjan av lógum, sum hava verið galdandi síðan 1949, og sum miða ímóti at útvega útgerðarmonnum störst möguligan útgerðarkreditt til fiskiskipini.

1. viðgerð 19. desember og 21 desember legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Nevndarálit.

Fiskivinnunevndin, sum fekk málið til umhugsunar 19. desember 1951, er samd um at tilmæla tinginum at samtykkja landsstýrisins uppskot.

2. viðgerð 21. desember og 3. viðgerð 22. desember 1951.

Uppskot landsstýrisins samtykt 15—0.

---

52. Broytan í toll-lógini.

1951, 18. desember legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum; d. 18. s. m.:

Uppskot

til

lögtingslóg um broyting í innfluttningsgjöldum v. m.

gr. 1.

Í gr. 1 í lögtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 um innfluttningsgjöld v. m., soleiðis sum hon er broytt við lögtingslóg nr. 58 frá 7. september 1950, smbr. lögtingslóg nr. 66 frá 6. oktober 1950 og nr. 11 frá 6. marts 1951, verða hesar broytingar gjördar:

	VÍN		
4.	annað vín	1 litur	6,00
	SPIRITUOSA OG SPRITT		
	Brennivín og akvavit:		
5.	av 50 rúmprosent og undir	1 litur	14,00
6.	yvir 50 rúmprosent, men ikki yvir 70 rúmprosent	1 litur	20,00
7.	yvir 70 rúmprosent	1 litur	28,00
	AÐRAR VØRUR, UNDANTIKIÐ HEILT DENATURERAÐ SPIRITUS		
8.	av 50 rúmprosent og undir	1 litur	24,00
9.	yvir 50 rúmprosent, men ikki yvir 70 rúmprosent	1 litur	28,00
10.	yvir 70 rúmprosent	1 litur	40,00

SKREYTVØRUR, BIJOUTERI OG NIPSLUTIR

Undir lbnr. 17 ganga »neonrör« út, og í staðin verður sett »ljós- og neonrör«. Undir sama lbnr. verður skotið inn aftaná »óansið hvat teir eru virkaðir av«: »tó undantikið forlornar tenn og brillustengur«. Gjaldið 30 % av virðinum verður broytt til 50 av virðinum.

GLASVØRUR

Undir lbnr. 18 verður skotið inn aftaná orðinum »glóðilampur«, »brilluglös«.

KAFFI OG KAFFITILSETNINGUR

25.	Rákaffi	1 kg	0,80
26.	brent kaffi, ómalið eins og malið og kaffiúrdráttur	1 kg	1,00
27.	Sikoria og allir aðrir kaffilíkar	1 kg	0,70

KRÚT

32.	Fýrverkarílutir	av virðinum 50 %

LEIKUTOY

35. Gjaldið 30 % av virðinum verður broytt til 50 % av virðinum.

MANUFAKTURVØRUR

Lbnr. 37 verður broytt soleiðis: »av virðinum ..... 15 %« gongur út, og aftaná lbnr. verður sett.

a. av náttúr- ella kunstsilki líkamikið nögdina av silki, bert tað ávirkar útsjónd vörunar — av virðinum 30 %
b. annars — av virðinum 15 %

Lbnr. 39: Gjaldið verður sett upp frá 25 % til 30 %.

Lbnr. 40 verður broytt soleiðis: Orðini »av virðinum..... 15« fer út, og aftaná lbnr. verður sett:

a. av náttúru- ella kunstsilki líka mikið nögdina av silki, bert tað ávirkar útsjónd vörunar — av virðinum 30 %
b. annars — av virðinum 15 %

Viðmerkingin aftaná manufakturvörubólkinum verður nevnd viðm. 1, og sum nýggj viðmerking 2 verður skotið inn:

Um so er, at manufakturvörur verða fluttar inn, og tað ikki týðuliga sæst av fakturanum, um vöran er úr silki ella ikki, verður hon tollað sum silki.

METALLVØRUR

Undir lbnr. 41 verður skotið inn í framhald av orðinum »edilmetalli«: »tó brillustengur undantiknar«. Undir sama lbnr. verður gjaldið broytt frá 30 % av virðinum til 50 % av virðinum.

LUKTILSI OG FRÍÐKANARLUTIR

45. Gjaldið 50 % av virðinum verður broytt til 60 % av virðinum.

SKINN OG HÚÐIR

47. Gjaldið 30 % av virðinum verður broytt til 50 % av virðinum.

MATVØRUR

48.	Fiskakonserves, undantikið hummarar, krabbar, krebs og rejur	1 kg	0,20
48. a.	Rómi og niðursoðin mjólk, eisini í pulvuri og undir hermetiskum loki	1 kg	0,30
48. b.	alt annað konserves	1 kg	1,00

Lbnr. 48 b, kökur v. m. verður broytt til lbnr. 48 c.

TE

51.	te	1 kg	0,70

TUBBAK OG TUBBAKSVØRUR

	Cigarir til innkeypspris		
55.	yvir 50 oyru per stk., men ikki yvir 75 oyru pr. stk.	100 stk.	40,00
55 a.	yvir 75 oyru pr. stk.	100 stk.	50,00
	Cigarettir til innkeypspris		
57.	2,75 kr. per 100 stk. ella undir	100 stk	10.00
58.	yvir 2,75 kr., men ikki yvir 4,00 kr. per 100 stk.	100 stk.	12,00
59.	yvir 4,00 kr., men ikki yvir 6,00 kr. pr. 100 stk.	100 stk.	14,00
60.	yvir 6,00 kr. per 100 stk.	100 stk.	16,00
	Roykitubbak til innkeypspris		
61.	3,00 kr. per kg ella undir	1 kg	2,00
62.	yvir 3,00 kr., men ikki yvir 6,00 pr. kg	1 kg	6,00
63.	yvir 6,00 kr. pr. kg	1 kg	9,00
64.	skrátubbak og snús	1 kg	6,00
65.	cigarettpappír	1 stk.	0,01

Lbnr. 70 fer út, og ístaðin verður sett:

MØBLAR

Möblar og lutir til möblar, herundir krambúðarinnbúgv av virðinum 15 %

LITEVNI V. M.

71. Gull-, silvur-, bronze og aluminiumspulvur, pastellitir, farvelader, allir litir (prentlitir undantikið) í smásölupakningi, herundir litir, tilevnaðir sum tablettir, kúglur o. l., har aftrat tilevnaði stykki til farvelade o. l., alt fernis og polit ur og litir, sum eru tilgjördir við alkohol ella eitri (herundir zaponlakk). Allar málingavörur, sum tilgjördar eru við olju, fernis, alkohol ella líknandi (herundir bonumassi o. l.) og deiggjalitir, sum tilgjördir eru á annan hátt. Teknikol og teknikrit. Vanligir blýantar og litstiftir og tusch. Kalkerpappír og litbond. Skó- og onnur leðursverta í pakkningi, sum ikki er omanfyri 1 kg brutto.
Allur prentlitur, undantikið svartur av virðinum 5 %

gr. 2.

Frammanfyri standandi broyttu gjöld verða kravd frá og við .... av öllum vörum, sum tað tolluppkrevjandi valdið ikki hevur loyvt innflytarum til fría nýtslu (gjaldkvittan ella útflýggingarloyvið ikki givið), líka mikið um sendingin er innflutt áðrenn ..... Landsstýrinum er heimilt at geva undantaksloyvi, har serlig viðurskifti gera ta neyðugt ta fyrstu vikuna.

gr. 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Forslag

til

lagtingslov om ændring af indförselsafgifter m. v.

§ 1.

I § 1 i lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 om indförselsafgifter m. v., således som den er ændret ved lagtingslov nr. 58 af 7. september 1950, jfr. lagtingslov nr. 66 af 6. oktober 1950 og nr. 11. af 6. marts 1951, foretages fölgende ændringer:

VIN

4. anden vin 1 liter 6,00

SPIRITUOSA OG SPRIT

Brændevin og akvavit:

5.	af 50 rumprocent og derunder	1 liter	14,00
6.	over 50 rumprocent, men ikke over 70 rumprocent	1 liter	20,00
7.	over 70 rumprocent	1 liter	28,00

ANDRE VARER UNDTAGEN FULDSTÆNDIG DENATURERET SPIRITUS

8.	af 50 rumprocent og derunder	1 liter	24,00
9.	over 50 rumprocent, men ikke over 70 rumprocent	1 liter	28,00
10.	over 70 rumprocent	1 liter	40,00

GALANTERI- OG BIJOUTERIVARER SAMT NIPSSAGER

Under lbnr. 17 udgår »neonrör«, og i stedet indsættes »lysstof- og neonrör«. Under samme lbnr. indsættes efter ordene »uanset stoffets art«: »dog undtagen kunstige tænder og brillestel«.

Afgiftssatsen af værdien 30 % ændres til af værdien 50 %

GLASVARER

Under lbnr. 18 indsættes efter ordet glödelamper », brilleglas«.

KAFFE OG KAFFESURROGATER

25.	rå kaffe	1 kg	0,80
26.	brændt kaffe, såvel umalet som malet, og kaffeekstrakt	1 kg	1,00
27.	cikorie og alle andre brændte kaffesurrogater	1 kg	0,70

KRUDT

32. Fyrværkerigenstande af værdien 50 %

LEGETØJ

35. afgiftssatsen af værdien 30 % ændres til af værdien 50 %.

MANUFAKTURVARER

Lbnr. 37 ændres således: Ordene »af værdien ..... 15 %« udgår, og efter löbenummeret indsættes:

a. af natur- eller kunstsilke uanset silkens mængde, når denne blot påvirker varens udseende af værdien 30 %

b. ellers af værdien 15 %
Lbnr. 39: Afgiftssatsen forhöjes fra 25 % til 30 %.

Lbnr. 40 ændres således: Ordene »af værdien ..... 15 %« udgår, og efter löbenummeret indsættes:
a. af natur- eller kunstsilke uanset silkens mængde, når denne blot påvirker varens udseende af værdien 30 %
b. ellers af værdien 15 %

Den efter manufakturvaregruppen anförte anmærkning benævnes anm. 1, og som ny anm. 2 indsættes:
Såfremt der indföres manufakturvarer, og det ikke tydeligt fremgår af fakturaen, om varen består af silke eller ej, vil den være at fortolde som silkevarer.

METALLER
Under lbnr. 41 indsættes i fortsættelse af ordene »med ædle metaller«: », dog undtagen brillestel«.
Under samme lbnr. ændres afgiftssatsen fra af værdien 30 % til af værdien 50 %.

PARFUMER OG KOSMETISKE ARTIKLER

45.	afgiftssatsen af værdien 50 % ændres til	af værdien 60 %

SKIND OG HUDER

47.	afgiftssatsen ændres fra af værdien 30 % til	af værdien 50 %

SPISEVARER

48.	fiskekonserves, undtagen hummer, krabber, krebs, og rejer	1 kg	0,20
48 a.	flöde og kondenseret mælk, også i pulverform og under hermetisk lukke	1 kg	0,30
48 b.	al anden konserves	1 kg	1,00

Lbnr. 48 b, kager m. v., ændres til blnr. 48 c.

TE

51.	te	1 kg	0,70

TOBAK OG TOBAKSVARER
Cigarer til en indköbspris af

55.	over 50 öre pr. stk., men ikke over 75 öre pr. stk.	100 stk.	40,00

55 a.	over 75 öre pr. stk.	100 stk	50,00
	Cigaretter til en indköbspris af		
57.	2,75 kr. pr. 100 stk. eller derunder	100 stk.	10,00
58.	over 2,75 kr., men ikke over 4,00 kr. pr. 100 stk.	100 stk	12,00
59.	over 4,00 kr., men ikke over 6,00 kr. pr. 100 stk.	100 stk.	14,00
60.	over 6,00 kr. pr. 100 stk.	100 stk.	16,00
	Rögtobak til en indköbspris af		
61.	3,00 kr. pr. kg eller derunder	1 kg	2,00
62.	over 3,00 kr., men ikke over 6,00 kr. pr. kg	1 kg	6,00
63.	over 6,00 kr. pr. kg	1 kg	9,00
64.	skråtobak og snustobak	1 kg	6,00
65.	cigaretpapir	1 stk.	0,01

Lbnr. 70 udgår, og i stedet indsættes:

MØBLER

70. Möbler og möbeldele ,herunder butiksudstyr af værdien 15 %

FARVESTOFFER M. M.

71. Guld-, sölv-, bronze- og aluminiumspulver, pastelfarver, farvelader, alle farver (undtagen trykkerfarve) i detailsalgspakninger, herunder farver formede som tabletter, kugler og lign., samt formede stykker til farvelader og deslige. Alle ferniser og polit ur samt med alkohol eller æter tilberedte farver (herunder zaponlak). Alle med olie, fernis, alkohol el. lign. tilberedte malervarer (herunder bonemasse og deslige) samt på anden måde fremstillede dejgfarver. Tegnekridt og tegnekul, almindelige blyanter og favrestifter samt tusch. Kalkerpapir og farvebånd. Blank- og anden lædersværte i pakninger af ikke over 1 kg brutto. Al trykkerfarve undtagen sort af værdien 5 %.

§ 2.

Foranstående ændrede afgifter opkræves fra og med ..... af alle varer, der ikke af de afgiftsopkrævende myndigheder er tilladt udleveret indförerne til fri rådighed (afgiftskvittering eller udleveringstilladelse ikke udstedt), uanset om indförselen måtte have fundet sted inden ..... Landsstyret bemyndiges til at give dispensation, hvor særlige omstændigheder gör det nödvendigt i den förste uge.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir hesum uppskoti koma gjöldini av drekka- og tubbaksvörum næstan uppá hædd við dansku gjöldini — hetta geldur tó mïnst fyri brennivín og akvavitt (lbnr. 5—7) og reykitubbak (lbnr. 61—63) og cigarettpappír (lbnr. 65). Fyri hesa seinast nevndu vöru her ætlandi illa til at fara longur upp, tá tað kann elva smoghandil í störri mun.

Tað verður skotið upp, at gjaldið av te verður sett upp í 70 opru, sum svarar til danska gjaldið í lötuni, og kaffigjaldið uppí 80 opru og kr. 1,00 (tilsvarandi gjöldini í Danmark 87 oyru og kr. 1,07).

Skotið verður upp at seta gjöldini av öllum luksusvörum, leikum, skreytvörum, gull- og silvurvörum, luktilsi, fýrverkarí og arbeiði úr leðri og skinni upp.

Frukt-, grönt- og kjötkonserves verður her gjört tollskyldugt, herundir kemur hummari, krabbi, krebs o grejur. Skotið verður eisini upp, at litevni koma undir gjald við 5 % av virðinum.

Viðvíkjandi meturvörum (lbnr. 37 — tógv og tráður — og lbnr. 40 — serlig klædnastykki og meturvörur) er skotið upp at býta sundur, soleiðis at um vöran er úr silki, verður gjaldið 30 % av virðinum og annars 15 %.

Skotið er eisini upp at seta gjaldið av silkisokkum upp við 5 % uppí 30 % av virðinum.

Broytingaruppskot.

Til lbnr. 40 aftaná »undantak um« og frammanfyri »filt« verður sett »gummiklæði«.

Til lbnr. 40 efter ordet »undtagelse af« og foran »filt« indsættes »gummiklæder«.

1., 2. og 3. viðgerð 18. desember 1951.

Við 2. viðgerð broytingaruppskotið samtykt 17—0.

Uppskot landsstýrisins soleiðis sum tað varð broytt við 2. viðgerð samtykt 15—0.

---

53. Nationalisering av bankalagnum.

1952, 20. februar legði P. M. Dam, tingmaður fram soljóðandi skriv d. 16. november og 16. desember 1951:

Undirritaði Föroya Javnaðarflokkur loyvir sær hervið at heita á háttvirda landsstýrið og lögting við umsókn um, at málið viðvíkjandi

nationaliseran av bankalagnum

kemur til viðgerðar í hesi tingsetu.

1. viðgerð 23. februar og beint til fíggjarnevndina.

54. Nationalisering av útgerð og luksusvørum.

1952, 20. februar legði P. M. Dam, tingmaður fram soljóðandi skriv, d. 16. november og 16. desember 1951:

Undirritaði Föroya Javnaðarflokkur loyvir sær hervið at heita á háttvirda landsstýrið og lögting við umsókn um, at málið viðvíkjandi

nationaliseran av allari útgerð

eisini luksusvørum kemur til viðgerðar í hesi tingsetu.

1. viðgerð 23. februar og beint til fíggjarnevndina.

55. Kostskúli.

1952, 20. februar legði P. M. Dam, tingmaður fram soljóðandi skriv, d. 16. november og 16. desember 1951:

Undirritaði Föroya Javnaðarflokkur loyvir sær hervið at heita á háttvirda landsstýrið og lögting við umsókn um, at málið viðvíkjandi

Kostskúla

kemur til viðgerðar á lögtingi í hesi tingsetu.

Hetta mál kann ikki steðga longur.

1. viðgerð 23. februar og 3. apríl legði figgjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Fyri 30 árum síðani var standurin tann í Föroyum, at var tað barn, sum hevði gávur og ráð til annað enn at knýta lagnu sína beinleiðis at fiskiskapinum og vildi bjarga sær meira kunnleika, enn fólkaskúlin kundi veita, hevði tað ikki annað í at velja enn at fara til Danmarkar. Hetta kom hæði foreldrum og barni mangan illa við. So fingu vit realskúlar í störstu bygdunum, og var hetta okkum til stóra hjálp, tí nú kundu vit hava börnini heima til 16—17 ára aldurin; men so máttu tey avstað, sum studentsprógv vildu hava. — Kravið um at fáa studentaskúla í Havn við kostdeild til bygdanæmingar vaks so mikið í tredivunum, at lögtingið í 1937 setti á stovn studentaskeið uttan at eiga nakran skúlabyggning, men fyrireikingar til slíkan landsskúlabyggning vóru komnar væl áleiðis, tá bardagin í 1939 brast á og steðgaði at kalla öllum mentunarligum arheiði.

Kríggið kom, vit vunnu nógvan pening og lögdu nógvan pening í fiskiför og havnir, sum eisini rætt var, men ongantíð fingu vit ráð til at hugsa um landsskúlabygging.

Í 15 ár hevur hesin okkara hægsti skúlaskapur flutt frá einum ótíðarhóskandi skúlabyggningi aftur í annan — hevur verið húsvillur í 15 ár og klakt úr 150 preliminaristar og 125 studentar.

Í 15 ár hava lærararnir Th. Nygaard, Kr. Haraldsen og E. Petersen arbeitt undir sera ringum umstöðum — tolnir hava teir rökt sítt stav, og tolnir hava teir bíðað. Í tí trúgv, at landsskúlin heilt skjótt fór at vera ein

verunleiki, og realskúlin gerast undirskúli til studentaskúlan, hava teir í ár tikið sær uppá at undirvísa á realskúlanum og mugu so statt renna ímillum reaslkúlan og studentaskúlan á Skansavegnum. Lögið er tað ikki, um hesir menn, ið hava hildið skúlanum uppi, fara at halda, at myndugleikarnir ikki geva mentunarligum arbeiði gætur.

Havning, arkitektur, hevur teknað uppskot til landsskúlabyggning, ið rúma skal studentaskúla, læraraskúla, preliminerskúla, millumskúla og kostdeild, og mett útreiðslurnar til 6 mill. kr.

Í lötuni er tíverri eingin peningur tökur til landsskúlabygging, og mugu vit tí ásanna, at vit hava ligið sjóarfallið av okkum. — Men vit mugu sum skjótast seta skjötil á, tí:

1. Spreingirnar í grótbrotinum at kalla dygst undir vindeygunum fremja ikki undirvísingina.
2. Byggningurin er so trongur og í allar mátar ótíðarhóskandi sum skúlabyggningur, at tað er óforsvarligt at lata næmingarnar arbeiða har 6 timar um dagin.
3. Studentaskeiðið er ein óvanligur skúlaformur. Okkara næmingar *noyðast* at nýta hann. Teir mugu leggja so mikið fyri seg, at teir kunna taka studentsprógv uppá tvey ár. Lærdómur teirra fær ikki stundir at sodna, og verða teir tí ikki so væl fyri, tá teir á lærdum háskúlum fylgjast við næmingum, sum hava nýtt 3 ár.
4. Kostskúladeildin má reisast í Havn, tí sum nú er, hava foreldur av bygd ikki ráð til at senda börn síni til Havnar. Krevja tí nógvar störri bygdir millum- og realskúla, og tað er skeivt at játta hesum, tí tað verður alt ov dýrt og helst minni lært.

Sum áður sagt frá er í lötuni eingin tökur peningur til at byggja landsskúla fyri; men fíggjarnevndin heldur, at möguligt er at skaffa pening til skúlabygging við at leggja stempulskatt á öll skjöl, ið verða tingslisin, og virðisskjöl, sum ganga um bankar og almennar stovnar.

Minnilutin (Th. Petersen, A. Sörensen og A. Djurhuus) heldur, at vit fíggjarliga ikki orka at fara undir hesa bygging og heldur ikki, tað er rætt, tá vit steðga havnabyggingini.

Meirilutin loyvir sær at seta fram hetta

Uppskot.

Lögtingið biður landsstýrið til Ólavsöku
I. fyrireika landsskúlabyggingina.

11. seta fram lógaruppskot fyri álegging av stempulskatti uppá öll skjöl, ið tinglisin verða, og virðisskjöl, sum ganga um bankar og almennar stovnar.

2. viðgerð 4. apríl 1952.

Uppskot fíggjarnevndarinnar samtykt 13—0.

---

56. Stuðlan av ídnaðarvirkjum.

1952, 20. februar legði P. M. Dam, tingmaður fram soljóðandi skriv, d. 16. november og 16. desember 1951:

Undirritaði Föroya Javnaðarflokkur loyvir sær hervið at heita á háttvirda landsstýrið og lögting við umsókn um, at málið viðvíkjandi

stuðlan av ídnaðarvirkjum

kemur til viðgerðar í hesi tingsetu.

1. viðgerð 23. februar og beint í fíggjarnevndina.

---

57. Avtøka av tolli av neyðsynjarvørum.

1952, 20. februar legði P. M. Dam, tingmaður fram soljóðandi skriv, d. 16. november og 16. desember 1951:

Undirritaði Föroya Javnaðarflokkur loyvir sær hervið at heita á háttvirda landsstýrið og lögting við umsókn um, at málið viðvíkjandi

avtöka av tolli

á neyðsynjarvörum og mentunartólum, harundir radiotól og musikktól kemur til viðgerðar á lögtingi í hesi tingsetu.

1. viðgerð 23. februar og beint í fíggjarnevndina.

---

58. Umsókn um styrk úr landskassanum.

1952, 20. februar legði J. H. Danbjörg, tingmaður fram soljóðandi skriv, d. 8. november og 1. desember 1951:

Undirskrivaði Jens Vang, Froðbö, loyvir mær við hesum at sökja lögtingið um styrk til at liva við, tí at Föroya Vanlukkutryggingarráð hevur sett hungursband fyri meg, við tað at ráðið hevur víst burt umsókn, sum eg legði inn um viðurgjald og skaðabötur fyri eina vanlukku, sum hendi meg í kolabrotinum í Rangabotni, við tað at eg fekk lendar mínar kroystar av eiuum grótvogni, ið eg var í ferð við at koyra út úr náminum. Hetta hendi í november í fjör, og eg havi gingið lamin og óarbeiðsförur síðan og gangi solciðis enn, og havi eg ongar inntökur haft alla hesa tíð, og nú nítur hungursbandið at mær, tí eg eigi hvörki fyri mat ella klæði. Sóknarstýrið hevur noktað at lat meg fáa ein styrk úr hjálparkassanum, og eg má tí líða bæði hungur og hall, eingi klæði eigi eg nú, so at eg má ganga sum dassin. Sum hinir heiðraðu lögtingsmenn skilja, so eri eg komin illa fyri orsakað av hesi vanlukku í kolabrotinum, og er tað tí við vón um, at tingmenn á ein ella annan hátt vilja koma mær til hjálpar, so eg verði ikki at svölta, at eg vendi mær henda veg og merki

virðingarfyllst

Jens Vang.

1. viðgerð 23. februar og 26. marts legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Jens Vang, Froðbö, hevur sent umsókn til Lögtingið um styrk vegna tess, at hann er komin til skaða í kolabrotinum í Rangabotni.

Hann upplýsir, at Vanlukkutryggingarráðið hevur viðgjört málið um avlamisendurgjald, við tí úrsliti, at hann einki endurgjald kann fáa. Eisini hevur sóknarstýrið noktað at lata honum hjálp úr hjálparkassanum.

Umsóknin gevur annars ongar upplýsingar um fíggjarligu viðurskifti umsökjarans.

Lógarnevndin hevur viðgjört málið og er samd um at biðjan landsstýrið lata kannað tey fíggjarligu viðurskifti umsökjarans og um so er, at hann uppfyllir treytirnar fyri at fáa hjálp úr socialgrunninum, so lata hann fáa vanliga hjálp haðani.

Uppskot.

Tingið samtykkir at biðja landsstýrið kanna fíggjarligu viðurskifti umsökjarans, og lata hann fáa vanliga hjálp úr socialgrunninum, um so er, at hann uppfyllir treytirnar fyri at fáa tílíka hjálp.

2. viðgerð 27. mars 1952.

Uppskot nevndarinnar samtykt 19—0.

---

59. Lán til Froðbiar kommunu.

1951, 20. desember legði lögmaður fram soljóðandi framlöguskriv d. 20. desember 1951.

ambært lögtingslóg nr. 67, 21. desember 1949, varð landsstýrið heimilað at taka upp neyðturvilig lán uppá 2 mill. kr. tingsins vegna til í samráð við stýri vinnulánsgrunnsins at nýta til rakstrarhjálp og fíggjarbötur til fiskiskip.

Landsstýrið royndi at fáa tey neyðturviligi lán, men eydnaðist tað

bert at fáa lænt 1 mill. kr. við 500.000 kr. frá hvörjum av teim föroysku bankunum.

Ymsar umsóknir hava verið um lán, og hevur landsstýrið, umframt nökur einkult veðhald til rakstrarhjálp, játtað fylgjandi saneringslán: (sí skjal nr. 1)

Klakksvíkar Fiskivinnufelag	190.000 kr.
Georg Hammer, Tvöroyri	30.000 —
Júst Hansen, Toftir	46.371 —
Jens Cl. Isaksen, Klakksvík	21.780 —
Mortan Simonsen, Tórshavn	45.000 —
P/f Tór, Tórshavn	170.000 —
P/f Tyril, Götu	100.000 —
Rituvíkar Trolarafelag	112.000 —
J. M. Lamhauge, Lamha	40.310 —
P/f Logn, Vági	100.000 —
Sigurd Simonsen, Fuglafirði	23.000 —
P/f Sælingahella, Tórshavn	102.875 —
Rituvíkar Trolarafelag (útgerð)	100.000 —
	1.081.336 kr.

Síðani hava ymsar umsóknir verið frammi, men hava ikki kunnað verið játtaðar, m. a. vegna peningatrot.

Tann 7. august 1951 kom umsókn til landsstýrið frá Arbejdernes Trawlerdrift, Tvöroyri um saneringslán (sí skjal nr. 2).

Landsstýrið svaraði, aftaná at hava havt samráð við fíggjarnevndina, 10. august soleiðis:

»Vísandi til skriv felagsins, dagf. 7. august 1951, um saneringshjálp til A. T., Tvöroyri, skal landsstýrið við tí fyrivarni, sum tikið varð á felagsfundinum millum Vinnulánsgrunnsins og landsstýrið 9. august, at tað, sum í saneringsætlanini bygdi uppá ætl, fyrst má vera fast klárlagt, siga frá, at á felagsfundinum er samtykt at úttala:

Ásaunast má, at tað verður stórur skaði fyri Tvöroyri, um eitt felag sum A. T., ið er störsti arbeiðsgevari har, steðgar, uttan at nakað kemur í staðin.

So statt vil landsstýrið royna at hjálpa so langt, sum hjálpast kann undir lógligum formi. Um fíggjarnevndin og vinnulánsgrunnurin viðmæla, vil landsstýrið geva ábyrgd fyri lání, sum verður givið undir teimum treytum, sum landsstýri og fíggjarnevndin kunna góðtaka. Tó má viðmerkjast, at her er talan um blandaðan rakstur, bæði fiskivinnu- og handilsrakstur,

og má tí krevjast ikki minni, enn kravt hevur verið í öðrum förum av reinum reiðaravirkjum, at vissa fæst fyri, at tann fíggjarhjálp, sum frá almennari síðu her verður veitt, verður brúkt forsvarliga. Soleiðis sum kravt hevur verið í fleiri förum, verður eisini her neyðugt at treyta, at eftirlit verður við nýtsluni av rakstrarhjálpini, og at stýrið gevur seg undir um neyðugt at verða umskipið.«

Tann 13. oktober 1951 var málið aftur til viðgerðar í landsstýri og fíggjarnevnd, og framgongur fylgjandi av gerðabók fíggjarnevndarinnar:

1951, leygardagin 13. oktober kl. 13, helt fíggjarnevndin fund í Tinganesi. Allir limir vóru möttir. Landsstýrismenninir R. Long og H. Djurhuus vóru á fundi. Johan Djurhuus, skrívstovustjóri og L. Lützen vóru á fundi.
Til viðgerðar:

1) Ábyrgd fyri sanering og rakstrarláni til A. T., Tvöroyri.
P. M. Dam greiddi frá stöðuni í dag.
Hann segði nevndini frá, at hann hevði fingið fjarrit frá harra Kampmann, fyrrverandi fíggjarmálaráðharra, hareftir A. T. kundi fáa saneringslán uppá kr. 250.000,— úr Statsanstalten for Livsforsikring, m. a. treytað av, at Arbejdernes Landsbank lænti felagnum A. T. aðrar 250.000 kr. í rakstrarláni, alt undir landskassaábyrgd.
L. Lützen, landsrættarsakförari, segði frá úrslitinum av akkordroyndunum, har at kalla allir hövdu tikið ímóti eini 25 % akkord til fulla avgerð. Hann segði eisini frá, at p/f Tórshavnar Skipasmiðja hevur tikið konkurskrevjingina aftur og útleggshavarar síni útlegg.
Samtykt varð at fáa til vega nýggjan fíggjarstand per dato og royna at fáa eina akkord í lag við priviligeraðu kreditorarnar.

15. desember 1951 kom umsókn, dags. 13/12-1951, frá Froðbiar sóknarstýri (sí skjal nr. 3).

Tann 18.h. m. var málið til viðgerðar á einum felagsfundi millum landsstýrið og fíggjarnevndina, har m. a. varð framlagt av umsökjarunum:

1) Gevinst- og tabskonto pr. 23/7-1951 (skjal nr.4).
2) Råbalance pr. 23/10-1951 (skjal nr. 5).
3) Status pr. 23/10-1951 (skjal nr. 6).

Í hesum status er ikki tikið við, hvussu stöðan kann ætlast at verða aftaná einasanering.

Eftir áheitan frá landsstýrinum hevði formaður fyri A. T., lögtingsmaður P. M. Dam, telegraferað til lángevaramar um lánitreytimar, og fingið soljóðandi telegramm, dags. 17/12-1951:

»FORHANDLER HEROM STOP BLIVER ENS FOR LANDSBANKEN OG STATSANSTALTEN STOP FORVENTER 6,1 % OG AFDRAGSTID CIRKA 25 ÅR.«

Frá statsautoriseraðum revisor Steen Hansen fyriliggur uppskot til rekonstruktiónsstatus, dags. 2/8-1951 (sí skjal nr. 7).

Sum tað sæst av hesum skjali er eitt hall uppá kr. 590.066,97, og kemur hetta at föra við sær, at kreditorar, ið ikki eru tryggjaðir, bert fáa 28½ %, men ger revisorin annars vart við, at virðissetanin fyri ein stóran part byggir uppá ætl.

Av tí frágreiðing, sum L. Lützen, landsrættarsakförari, hevur givið í figgjarnevndini 13/10-1951, hava at kalla allir kreditorar samtykt eina akkord uppá 25 % til fult avgerð, men er ikki enn frágreitt, um allir nú hava samtykt akkordina.

Tann 13. desember 1951 hevur aðalfundur verið í felagnum. (sí skjal nr. 8).

Av hesum skjali framgongur, at ein treyt fyri tí láni uppá ½ mill. kr., sum umsökjararnir hava fingið játtað, er, at semja skal fáast í lag millum A. T., bankastjóra Kampmann og F. D. B. við direktiónsskrivara tess Ingvardsen um broytingar í felagsins lógum til umskipan av driftini, og at landsstýrið góðtekur besa broytingina.

Tað er enn eínki fyrilagt landsstýrinum um eina slíka samráðing, men framgongur av skjali nr. 9 nakað um, hvörjar broytingar verða at krevja.

Tá ið landsstýrið hevur lagt málið fyri figgjarnevndina, so er tað, tí stýrið er av tí áskoðan, at tað ikki í lögtingslóg nr. 67 frá 21. desember 1949 er heimild til at læna kommununi pening til umsökta endamál; at umsökjarin er av somu áskoðan, framgongur av, at hann nú hevur lagt málið fyri lögtingið.

Av skjali nr. 7 sæst, at A. T. hevur í skuld til tað almenna:

Landshandilin ... ... kr.	48.246,92
Vinnulánsgrunnurin ... ... —	156.836,30
Lögtingsskattur ... ... —	144.333,83
Lönjavningargrunnurin ... ... —	17.566,11
Föroya vanlukkutrygging ... ... — ...	2.611,75
Saltfiskagjald ... ... —	999,55
Gjald fyri feskfisk ... ... —	8.560,00
Bót til landskassan ... ... —	2.000,00
kr.	381.154,46

umframt fallna rentu og skatt til kommununa og havnagjald.

Av skjali nr. 3 framgongur, at sóknarstýrið fyri Froðbiar sókn hevur samtykt at taka ímóti einum láni uppá ½ mill. kr. til aftur at læna A. T. til sanering, og sökir sóknarstýrið um lánloyvi og lögtingsins ábyrgd.

Frá tveimum sóknarstýrislimum, O. Wiberg og C. Westergaard, er komið telefoniskt mótmæli ímóti lántökuni.

Froðbiar sóknarstýri hevur í lötuni fylgjandi lán við lögtingsábyrgd:

1942	170.000 kr.	kr.	136.964,70
1944	141.000 kr.	kr.	124.824,41
1946	30.000 kr.	kr.	22.500,00
1947	160.000 kr.	kr.	122.750,00
1947	225.000 kr.	kr.	191.350,00
1948	30.000 kr.	kr.	26.250,00
1948	65.000 kr.	kr.	57.875,00
1949	100.000 kr.	kr.	90.000,00
1949	50.000 kr.	kr.	48.750,00
1950	584.000 kr.	kr.	579.344,45
frá ríkiskass.			23.282,00
1951	456.000 kr.	kr.	456.000,00
	Tilsamans:	kr.	1.879.890,56

Fylgjandi studningar kunnu væntast játtaðir sóknini:

a. Marshallpeningur til el-verk	kr.	120.000,00
b. Statsstudningur til havnaverk	kr.	440.000,00
c. Rest av lögtingsstudningi til do.	kr.	456.000,00
	kr.	1.016.000,00

Eftirstöðurnar av kommunuskatti eru ógviliga stórar, og kann ein stórur partur harav væntast at verða óerhaldiligur.

Kommunan er tann triðjastörsta kommunan í Föroyum, men er í lötuni rættiliga veik fíggjarliga sæð.

Tað er av stórum týdningi fyri sóknina, at tey virki, sum har eru og rökja fiskivinnu, ikki detta niðurfyri, men mugu annaðhvört verða stimbraði, ella onnur virki sett á stovn í staðin, men óvanligt má tað tó sigast at vera, at sóknarstýri skal upptaka lán við lögtingsábyrgd til útlán til handilsskap; slíkt kann ikki sigast at vera ein vanlig kommunal uppgáva.

Málið er nú av umsökjarunum lagt fyri lögtingið, áðrenn landsstýri og fíggjarnevnd hava havt hövi til endaliga viðgerð, so landsstýrið skal í lötuni geva hesa frágreiðing, fyri at tingið kann gerast kunnugt við tey ymsu skjölini.

1. viðgerð 20. desember og 21. desember legði kommunala nevndin fram soljóðandi

Álit

Froðbiar sóknar kommuna hevur í skrivi til landsstýrið dagfest 13. desember 1951 biðið um at tingið gevur loyvi til og tekur ábyrgd fyri lántöku uppá 500.000.– kr., helvtina frá Arbejdernes Landsbank og helvtina frá Statsanstalten for Livsforsikring. Við skrivi dagfest 19. desember 1951 hava 6 tingmenn frá javnaðar- og sjálvstýrishólkinum lagt hetta mál fyri Föroya lögting.

Málið er sent til viðgerðar í tí kommunalu nevndini, og vísir nevndin til tey 14 skjöl, ið framlögd eru fyri tingið, og hevur nevndin undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og minniluta.

Meirilutin (H. Iversen, Th. Petersen og A. Sörensen) vilja sum sína stöðu framhalda fylgjandi: Tað hevur verið nógv frammi í hesi tingsetuni, hvussu döpur fíggjarstöðu landsins er, landsstýrið hevur heitt á tingið um at böta uppá hetta á ymiskan hátt. Vit vilja vísa á tingmálið um broytan í tollinum og tingmál nr. 28 um fíggjarmegi landsins og er tað tíverri soleiðis, at í gjár fullu 2 uppskot, ið miðaðu ímóti at spara árliga útreiðslur fyri umleið 700.000.— kr. Nevnast má, at teir tingmenn, ið hava lagt hetta mál fram á ting, vóru millum teir, ið ikki vóru við til at ganga ta av landsstýrinum vístu leið. Hetta ger at allir tingmenn, ið kenna sína ábyrgd, mugu í dag vera enn meira varnir fyri at taka nakra avgerð, ið kann skapa byrður fyri landið.

Nevndin ásannar, at tað er ein stór ólukka fyri Froðbiar sóknar kommunu, um tann parturin av A. T., sum viðvíkir fiskivinnuni, fellur niður fyri og einki kemur í staðin. Í tílíkum föri má tað vel umhugsast, hvussu ein frá almennari síðu kann hjálpa sum fraegast. Men samstundis má tað undirstrikast, at tað ikki verður gjörligt hjá tinginum at átaka sær ábyrgd fyri endurreising av öllum fiskivinnufelögum, sum fara á húsagang. Slíkt rökkur tingsins fíggjarmegi ikki til.

Viðvíkjandi Froðbiar sóknar kommunu, so liggja fyri tinginum ymiskar upplýsingar, um tær fíggjarligu byrður kommunan hevur átikið sær, men rætt var um kommununar roknskapur og fíggjarstandur fyri tey tvey seinastu árini, eins og fíggjarætlan fyri komandi ár vóru gjölla kannaði. Tað er munnliga á tingi frá sóknarstýrisformanninum upplýst, at umleið 430.000.— kr. eru úti standandi, og at tað ikki hevur verið pantað tey 3 seinastu árini. Meirilutin má halda tað vera neyðugt, at eisini hetta verður gjölla kannað serliga viðvíkjandi, hvussu gamlar hesar eftirstöðurnar eru.

Nevndin má ásanna, at tað má vera vandafult hjá kommununi treytaleyst, sum tað ætlandi tykist at vera, at binda seg undsr eitt slíkt lán.

Prinsipielt má tað eisini sigast at vera skeivt, at kommunan verður skotin inn sum eitt millumlið í eini slíkari lántöku, sum lögtingið, um illa skuldi gingist, kemur at hava seinastu ábyrgd fyri. Kommunan, ið er ógvuliga skuldbundin frammanundan eigur at vera hildin uttanfyri einum slíkum láni.

Froðbiar sóknarstýri er ikki fullsamt um hesa lántöku, av tí at 2 av 7 sóknarstýrislimum eru ímóti. Tá tað í kommunallógini er ásett, at lögtingið (nú landsstýrið) skal geva loyvi at kommunan upptekur lán, so er tað fyri at verja allar borgararnar í sóknini. Hetta at taka lán fyri at seta í handilsvirki, og at binda kommununa til í komandi 25 ár at seta á fíggjarætlanina fyrst 45.000,— kr. og síðani lækkandi so við og við, má meirilutin halda, er heldur enn ivingasamt, um tað ikki er í stríð við lóggávuna. Eisini tí kann takast uppaftur, sum fyrr sagt, at kommunan í hesum máli eigur at vera hildin uttanfyri.

Arbejdernes Trawlerdrift hevur havt so stóran týðning fyri bygdina, at hetta álvarsama mál má fáa ein til at leita eftir, hvat á lógligan og forsvarligan hátt kann gerast fyri at hjálpa, og tað eigur at verða gjört. Sum tað sæst í skjali til hetta mál, hevur tað almenna í öðrum förum hjálpt, har fiskivinnan er komin í trupulleika, og fyri tí parti av hesum felagsrakstri, ið nertur við fiskiskap, trolgerð, fiskaturking o. a., er tað nátúrligt, at tað almenna roynir at hjálpa. Annarsleiðis liggur tað fyri við tí óproduktiva partinum av hesum felagsskapi — krambahandlinum við neyðsynjarvörum, skreytvörum og öðrum — har má tað sigast at vilja föra tað almenna út í óföri, um nakar av tí almenna tryggjaða peningi verður nýttur. Spurningurin um, hvussu hesar báðar deildirnar kunnu avmarkast, má meirilutin halda at nýggja stýri felagsins má greiða, áðrenn nakar almennur stuðul kann gevast.

Viðvíkjandi sjálvari saneringini skal nevndin vísa á, at stöðan ikki er greið. Tann 13. oktober 1951 var skrivað í fundarbók hjá fíggjarnevndini:

»Samtykt var at fáa til vega nýggjan fíggjarstand pr. dato.«

men tað seinasta ið fram er komið er ein status eftir bókum felagsins og kann her viðmerkjast, at hesin status á ognarsíðuni hevur:

Skuldarar	kr.	1.225.485,50
(sí hjálagda skjal, ið nú er komið frá saksföraranum)		
P/f Samgongd	kr.	12.500,00
Pf Skipafelagið Tvöroyri	kr.	9.000,00

meðan rekonstruktiónsstatus pr. 23/7 1951 hevur hesi töluni:

Skuldarar settir til	kr.	148.472,83
Mk Brimnes niðurskrivað til	kr.	100.000,00
M/k Vestmanna niðurskrivað til	kr.	100.000,00

Eisini skal viðmerkjast, at P/f Rankin í status 23. oktober er settur til kr. 80.000,—, meðan hann ikki sæst at vera uppi í status pr. 23. juli. Hetta hevur meirilutin framdrigið fyri at vísa, hvussu ógreið stöðan í dag veruliga er.

Tað er fyrr á fíggjarnevndarfundi og frá landsstýrinum gjört vart við, at tað vildi verða neyðugt at síggja hvat broytan í felagsins stöðu veiðuúrslitið í ár hevur gjört.

Í öllum teimum förum, har almennur peningur er játtaður til fiskivinnuna eftir umhugsan vinnulánsgrunnsins og landsstýrisins, hava verið kravd 3 greið skjöl:

1) Fíggjarstöða við virðismetan av ognum, metan av ognarum og metan av vörum á goymslu, áðrenn saneringina.

2) Yvirlit yvir hvussu sanerigspeningurin skal nýtast. Her hevur verið kravt, at útgjaldingarlistar lógu fyri, soleiðis at tað var greitt uppá oyra, hvar peningurin skuldi fara.

3) Fíggjarstöða felagsins aftaná at saneringin var farin fram.

Hetta sama má meirilutin halda er neyðugt at skaffa til vega, áðrenn stuðul kann verða givin til hetta felagið. Viðmerkjast skal, at felagsins stöða til skipini, Brimnes, Vestmanna og Rankan, og hvat ætlanin er at gera við tey 3 felögini, eigur at verð klárlagt.

Av eini fundarsamtykt í A. T. tann 13. desember 1951 framgongur, at samráðingar skulu fara fram millum bankastjóra Kampmann, felagsskrivara Ingvartsen og A. T. um eina umskipan av A. T., og at henda umskipan skal góðtakast av landsstýrinum. Henda samráðing er ikki enn framd.

Meirilutin má halda, at tað ikki kann vera beint, at umboðsmenninir fyri lángevarnar í Danmark verða teir eina leiðandi undir samráðingunum, umskipan av felagnum og setan av reglum fyri eftiransan, men má halda, at landsstýrið umboðandi tað almenna, ið átekur sær so stóra ábyrgd, má vera tað avgerandi her.

Sjálvandi má trygd fáast fyri, at allir teir ótryggjaðu ognarnir eru gingnir við til akkord.

Meirilutin (H. Iversen, Th. Petersen og A. Sörensen) seta sostatt fram hetta

Uppskot

1) Tingið er sinnað til fiskivinnurakstur og til allan arbeiðsskapandi rakstur A. T.s at átaka sær ta ábyrgd, ið neyðug er undir álítandi umskipan av felagnum og eftiransan.

2) Vísandi til tað í álitinum framförda biður tingið landsstýrið um at fáa til vega allar tær upplýsingar, ið neyðugar eru fyri at kenna felagsins stöðu í dag, ætlanin við nýskipanini og ætlanin við framtíðarrakstrinum.

3) Tingið kann ikki, sum málið liggur fyri í dag, samtykkja lóg um ábyrgd fyri lán til Froðbiar kommunu, A. T. ella upptökn av landsláni til framlán til A. T., men roknar við at tingið verður samankallað, tá ið allar kanningar eru loknar, fyri at taka stöðu til ta neyðturvuligu lóggávu hesum viðvíkjandi.

Minnilutin (J. P. Henriksen og S. P. Zachariasen) seta fram fylgjadi uppskot:

Lögtingslóg viðvíkjandi lánloyvi og veðhaldi fyri láni til Froðbiar sóknar kommunu.

gr. 1.

Föroya lögting gevur Froðbiar sóknar kommunu loyvi til at taka lán kr. 250.000.— frá Arbejdernes Landsbank, Danmark, og kroner 250.000.— frá Statsanstalten for Livsforsikring, Danmark.

Lögtingið tekur ábyrgd fyri besum lánum.

gr. 2.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

Lagtingslov vedrörende tilladelse og garanti for optagelse af laan til Frodebö sogns kommune.

§ 1.

Færöernes lagting giver Frodebö sogns kommune tilladelse til at optage et lån stort kr. 250.000.— fra Arbejdernes Landsbank, Danmark, og et lån stort kr. 250.000.— fra Statsanstalten for Livsforsikring, Danmark.

Lagtinget garanterer for lånene.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Lánini verða at nýta til víðari lán til Arbejdernes Trawlerdrift, a. m. b. a., Tvöroyri, til sanering og endurreising av felaginum soleiðis sum kommunan, hypotekbankastjóri Kampmann, plánleggingarchefur Jacob Ingvartsen og tann nýggi stjórin í A. T. Peter Bang koma á samt um.

Ímillum reglubrot ovast á síðu 2 — »kann gevast.« og »Viðvíkjandi sjálvari saneringini, kemur soljóðandi innskot (her bls. 242 mittskeiðis):

Frá Föroya keypmannafelag og Havnar detailhandlarafelag er komið mótmæli móti at lögtingið veitir peningastuðul til samband danska brúksfelaga til at stovna deild í Föroyum. Hartil er at siga, at tá krambahandilin verður ein serdeild, ið á ongan hátt fær nakran stuðul av tí almenna pen-

inginum, sum verður veittur, um skipan fæst í lag, so kann tað almenna ikki leggja seg útí, um teir gera sáttmála um vörukeyp frá F. D. B., bert eigur at verða eftiransað, at felagið sum heild verður skattaskyldugt sum ormur handilsfelög.

2. viðgerð 21. desember og 3. viðgerð 22. desember 1951.

Uppskot meiralutans samtykt 13—0.

Skjal til A. T. sak.

Tórshavn, 21. desember 1951.

Til

kommunalu nevnd Föroya lögtings.

Viðvíkjandi Arbejdernes Trawlerdrift, Tvöroyri.

Aftaná fundin í dag ringdi eg til A. T. á Tvöroyri, har eg fekk upplýst, at aktivposturin: debitorar pr. 23. oktober í ár, ca. 1.225.000,—, kann býtast sundur í hesar hövuðspartar:

1)	»Brimnes«	kr.	278.261,68
2)	»Vestmanna«	kr.	281.537,26
3)	Fiskasölan, leypandi konto	kr.	376.298,40
4)	Fiskasölan, tiltakskonto	kr.	32.214,80
5)	Fiskasölan, serkonto...	kr.	53.265,84
6)	vanligir handilsdebitorar ... ... um	kr.	203.500,00
	tilsamans:	kr.	1.225.000,00

Eg kann viðmerkja, at »Brimnes« og »Vestmanna« hefta fyri tilsamans 100.000 kr. av skuldini til A/S Föroya Banka.

Viðvíkjandi rakstrinum av skipunum upplýsti skrivstova A. T.s, at tað enn ikki var uppgjört fyri árið, men:

»Vörðan« ætlast at liggja á jövnum fyri tíðina ultimo juli til dato, »Marité« ætlast at hava vinning fyri tíðina ulitimo juli til dato, «Brimnes« hevur verið leigað út, og »Vestmanna« hevur rakstrarhall fyri tíðina ultimo juli til dato.

Trolararnar »Leivur Óssursson« og »Rankin« hava ikki verið úti og fiskað síðan fyrst í august mánað.

sign. *L. Lützen.*

---

60. Broyting í kommunalu skattalógini.

1951, 20. desember legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 20/12—1951:

Uppskot	*Forslag*
til	til
lögtingslóg um broyting í lóg nr. 76 um kommunalan skatt frá 12. mars 1923.	*lagtingslov om ændringer i lov nr. 76 om den kommunale beskatning på Færöerne af 12. marts 1923.*
gr. 1.	§ 1.
Í 24. gr. 1. stk., 4. reglu verður strikað »for saavidt der til disse virksomheder er knyttet forretningslokaler,« og verður sett í staðin: »der ved forretningslokale, fast arbejdsplads eller paa anden lignende maade er knyttet til kommunen.«	I § 24, stk. 1, 4. linie udgår ordene: »for saavidt der til disse virksomheder er knyttet forretningslokaler.« og indsættes i stedet for: »idet ved forretningslokale, fast arbejdsplads eller på anden lignende måde er knyttet til kommunen.«
gr. 2.	§ 2.
Hendu lóg kemur í gildi beinanvegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar.

Hjá lögtinginum liggur uppskot til nýggja skattalóg fyri Föroyar, men kann henda skattalógin ikki setast í verk til komandi skattaár.

Landsstýrinum er kunnugt, at núverandi kommunuskattalógin, har hon viðger skyldu at rinda yrkisskatt (erhvervsskat), er ógvuliga snævur og ikki hevur fylgt við sonu reglum í öðrum londum.

Millum annað skal verða víst á, at treytin fyri at kunna skatta virkisfelög, er at hesi felög hava föst yrkishöli. Hetta ger, at felög, sum bert eru her styttri tíð fyri at avrika ávís arbeiði, gera hetta frá so smáum höllum og við at tað leiðandi arbeiðið og t. d. bókföring verður gjörd uttan fyri Föroyar, kanska sleppa undan skattaskyldu.

Landsstýrið vil tí halda, at tingið fyri at alls eingin ívi skal vera um skattaskylduna, beinan vegin víðkar reglurnar til ikki bert at umfata teir

við föstum yrkishöli, men eisini teir, sum hava fastan arbeiðisstað ella á annan tílíkan hátt eru bundnir til ávísa kommunu.

Fyri at fáa hesar reglur at galda fyri komandi skattaár verður neyðugt at lógarbroyting verður gjörd og kunngjörd í hesum ári og setur landsstýrið tí omanfyri standandi uppskot fram.

1. viðgerð 20/12 og 21/12 legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið, ið beint hevur tað í lógarnevndina.

Lógarnevndin hevur viðgjört málið og er samd um at biðja lögtingið samtykkja uppskot landsstýrisins til hesa broyting í kommunalu skattalógini.

Nevndin skal annars föra fram, at tað ivaleyst er möguligt eftir núgaldandi gr. 24 í skattalógini um skyldu at rinda atvinnuskatt, at skatta persónar, virki ella felög, sum bert eru her styttri tíð fyri at avrika ávís arbeiði og gera hetta frá smáum hölum.

Orðalagið í galdandi lög gevur frammanundan ivaleyst skattavaldinum rætt til at skatta, har tað er talan um fastan arbeiðsstað, ella annað tílíkt tilknýti til eina kommunu.

Nevndin heldur, at tað tó er rætt at fremja hetta lógaruppskot fyri at eingin ivi skal vera, sjálvt um tað ikki beinleiðis skuldi verið neyðugt.

Útfrá hesum viðmerkingum skal nevndin tilmæla tinginum at samtykkja uppskot landsstýrisins til lögtingslög um broyting í lög nr. 76 av 12. mars 1923 »om den kommunale beskatning.«

2. viðgerð 21/12 og 3. viðgerð 22/12—1952.

Lógaruppskotið samtykt 20—0.

---

61. Endurnýggjan av skipaflotanum.

1951, 21. desember legði lögmaður fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

Eftirsum tað er avgerandi neyðugt at fáa greiðu á, hvørji skipaslög vilja roynast hentast og mest lönandi at dríva, tá ið talað verður um keyp av nýggjum skipum, sum longu nú sæst at vera neyðugt at taka støðu til, biður landsstýrið tingið um heimild at seta niður nevnd av utlantingmonnum, sum eru kendir við nútímans skipaslög og við skiparakstur, at gera uppskot hesum viðvíkjandi.

Ein viðgerð 21. desember 1951.

Uppskotið samtykt 20—0.

62. Garanti fyri láni til P.f Færøsit,

1952, 20. februar legði H. Djurhuus, landsstýrismaðtr fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 3. januar 1952:

Uppskot

til

lögtingslóg um broyting í lögtingslóg nr. 36, 1. marts 1950, um ábyrgd fyri láni til p/f Pigment & Málingavirkið Færøsit.

gr. 1.

Í gr. 1, 3. parti í lögtingslóg nr. 36, 1. marts 1950 verða ordini »31.

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 36, 1. marts 1950 om garanti for lån til p/f Pigment og Málingavirkið Færøsit.

§ 1.

I § 1, 3. stk. i lagtingslov nr. 36, 1. marts 1950 ændres ordene »31.

desember 1950« broytt til »31. desember 1952«.

gr. 2.
Henda lóg fær gildi beinanvegin.

december 1950« til »31. december 1952«.

§ 2.
Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í lögtingssetuni 1949, smbr. Lögtingstíðindi 1949 bls. 357, samtykti lögtingið at veita landskassaábyrgd fyri kr. 50.000.— í láni til p/f Pigment & Málingavinkið »Færösit«. Lánið skuldi nýtast til bróting, sending og maling av 200 t royðugróti. Grótið verður malið hjá felagnum Norwegian Talc í Bergen. Orsökin til, at landskassaábyrgdin varð givin fyri hesum láni, var, at henda sendingin var fyrsta royndin at fáa royðuna fínmalda (mikroniserða). Lánið skuldi verða afturgoldið seinast 31. desember 1950, tíðin var tó við lögtingslóg nr. 26, 17. mars 1951 longd til 31. desember 1951, smbr. eisini Lögtingstíðindi 1950, bls. 208 (vetrartinglið).

Felagið sökir nú um, at tíðin fyri afturgjaldingini verður skotin út enn meira.

Lánið er tikið í p/f Sjóvinnubankanum, tað er pr. 13. desember í ár gjört upp til kr. 34.937,58, tað hægsta tað hevur verið uppi á er krónur 38.940,54.

Felagið upplýsir um royndina, at stutt aftaná, at royðan var komin til Bergen í fjör, fekk tað boð um at neyðugt var at seta nýggja myllu upp, síðani royðan og tað hvíta evni, teir mala, ikki kann verða malið í somu myllu. Nýggja myllan var liðug í august 1951.

Í september í ár hevur felagið fingið fyrstu betalingina fyri selt pulvur kr. 4.002,96, hesin peningur er goldin inn uppá bankalánið.

Eftirsum landskassin hevur ábyrgdina fyri láninum til tað er afturgoldið og eisini tí, at peninguriu fyri royndarsendingina eftir viðurskiftunum fyrst nú kann byrja at koma, mælir landsstýrið háttvirda lögtinginum til at samtykkja lógaruppskotið.

1. viðgerð 28. februar og 12. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit

Fíggjarnevndin hevur kannað landsstýrisins uppskot og roknskap felagsins fyri tíðarbilið 1. januar 1951 til 30. november 1951.

Eftir roknskapinum at döma er fíggjarstöða felagsins alt annað enn göð.

Felagið hevur framleitt máling til 86.683,69 kr. í virði og eru rakstrarútreiðslurnar 29.503,29 kr. Skuldin til Sjóvinnubankan er 155.242,69 kr.

Av tí at felagið hevur skift leiðslu, og tað nú verður sagt, at trujulleikarnir við maling og öðrum reyndum nú eru nógv minkandi, vil fíggjarnevndin kortini mæla tinginum til at samtykkja landsstýrisins uppskot.

2. viðgerð 12. mars og 3. viðgerð 17. mars 1952.

Lógaruppskotið samtykt 19—0.

63, Landskassagaranti fyri láni til Froðbiar sóknar kommunu,

1952, 21. februar legði lögmaður fram soljóðandi framlöguskriv, d. 19. februar við skjölum, sí skjal nr. 10:

Vísandi til lögtingsmál nr. 59/1951: Lán til Froðbiar sóknar kommunu skal landsstýrið loyva sær at leggja málið aftur fyri háttvirda lögting við hesum fylgisskjölum:

1. Brev dagfest 6. januar 1951 frá P. M. Dam til landsstýrið.
2. Oversigt over kommunens status fra 1. januar 1910 til 1. januar 1951.
3. Roknskapur fyri Froðbiar sóknar kommunu 1950 og fíggjarstandur um árslok.
4. Roknskapur fyri Froðbiar sóknar kommunu 1949 og fíggjarstandur um árslok.
5. Brev dagfest 3. januar 1952 frá Kongeriget Danmarks Hypotekbank til lögmannin.
6. Retningslinier for A. T.'s rekonstruktion, dagfestar 3. januar 1952.
7. Udkast til kontrakt.
8. Udkast til obligation for kommunelán.
9. Udkast til obligation for kommunelán.
10. Brev dagfest 12. januar 1952 frá P. Bang til lögmannin.

1. viðgerð 26. febr. og 17. mars legði kommunalnevndin fram soljóðandi

Álit

Í lögtingsmáli nr. 59/1951 samtykti tingið at biðja landsstýrið um at fáa til vegar allar tær upplýsingar, ið neyðugar eru fyri at kenna felagsins stöðu í dag, ætlanin við nýskipanini og ætlanin við framtíðarrakstrinum.

Við framlöguskrivi landsstýrisins frá 19. februar 1952 fylgdu ymisk skjöl (1–10).

Málið var til 1. viðgerðar 26. februar 1952 og beint til kommunalnevndina.

Eftir tí tilfari, sum nú liggur fyri, er málið væl greiðari, men fyri at fáa fullan klárleika yvir, hvussu lánjáttanin til akkordskipanina fer at rökka, hevur nevndin biðið stjóran kapt. P. Bang um eina útfyllandi frágreiðing. Hon er frá 5. mars og er soljóðandi:

»Under henvisning til behagelige samtaler med udvalget skal jeg på grundlag af de senest förte forhandlinger angående A. T.'s rekonstruktion klarlægge den nuværende ökonomiske situation således:
P/f »RANKIN« har været et selvstændigt selskab, men fra Föroya Fiskasöla er hævdet, at et lån på kr. 70.000.— ydet til »RANKIN« påhviler A. T. Dette medförer, at et beløb på ca. 64.000 kr., som jeg havde regnet tilkom A. T., blev nægtet udbetalt, og i stedet for har Fiskasöla et tilgodehavende på kr. 3.955,16. Ved en forhandling i dag har landsretssagförer L. Waagstein og prokurist Heini á Tröðni i en skrivelse, som er overgivet udvalget, erkendt, at dette er den eneste gæld på de under A. T. samarbejdende firmaer, og at man er villig at indstille til bestyrelsen, at dette beløb eftergives.

Til Föroya Banki skyldes på udrustningslån af	
A. T. (»Leivur Øssurssun« og »Maritó«)	66.129,03
P/f »Samgongd« (»Brimnes«)	10.866,45
P/f »Rankin«	45.548,38
ialt kr.:	122.883,86

Ved ovenstående forhandlinger deltog bankdirektör P. S. Hansen, Föroya Banki, som indgik på at forelægge for Bankens bestyrelse, at man frafaldt krav mod Fiskasöla og A. T. for ovennævnte udrustningslån ved at modtage transport i den på lager værende fisk, der som törret klipfisk ansloges til en værdi af ca.	35.000,00

samt modtog transport i det af A. T. og »Rankin« tilkommende skuldbindinger og 75 % af tiltaksgrunni, ialt ca.	43.000,00
og endvidere at man på de skyldige udrustningslån uden vederlag afskrev	50.000,00

De i min skrivelse til lagmanden af 12. januar under *ad. 2.* vedrörende selskabets tilgodehavender for og beholdninger af fisk, samt vedrörende dets gæld på forskuds- og udrustningslån udgår således, idet de ved det foranstående udlignes.

Med hensyn til benyttelse af de kr. 250.000.—, som er beregnet til afviklingen af det gamle selskab, er der hyrekrav på	64.244,14
÷ indestående på særkonto	14.032,45
kr.	50.211,69
andre priviligerede krav	6.090,67
Böde, ikke medtaget i akkorden	3.400,00
Söpantekrav, akkord ikke opnåelig	3.507,13
Löse kreditorer m. v., som skal ordnes under akkorden, er i sin tid opgjort til kr. 761.217,87, men bliver efter nærmere gennemgang og de senere tilkomne ændringer kr. 708.888,40, hvoraf 25 % udgör	177.222,10
ialt kr.:	240.431,59

Hertil skal bemærkes, at der på hyrekravene over lönudligningsfonden er modtaget transporter på over kr. 10.000.—, men disse bliver först effektive efter 31. marts.

Med hensyn til kreditorerne indenfor akkorden skal bemærkes, at kreditorer til et belöb af kr. 14.679,73 har positivt nægtet at modtage akkord, og kreditorer til et belöb af kr. 14.496,96 har ikke reageret på henvendelse. Da der til gennemförelse af en tvangsakkord kun kræves, at 75 % af kreditorerne går ind for akkorden, skulle disse ca. 29.000 kr. således ikke være nogen hindring for akkordens gennemförelse.

Af yderligere krav på selskabet forelaa ved nytår tilgodehavende lön fra personale og arbejdere på ialt kr. 41.884,93. En del af disse krav er allerede dækket ved, at der for fisk, som er törret i vinter, er indgået á conto betalinger af det derfor beregnede belöb af kr. 15.587,15, og da en del af disse krav endvidere er forældede som priviligerede krav, er parterne indforstået med, at restbelöbene afvikles ved indgåelse af forholdsvis sikre udestående fordringer på ialt kr. 40.635,40. Disse forhold hviler således i sig selv og belaster ikke

de til rådighed stillede midler, men skulle tværtimod komme til at give et overskud.

Endelig skal anföres, at A. T. har et udestående hos fiskere og arbejdere i Tverå på ialt kr. 110.113,95, som når driften fortsætter kan påregnes at indgå med ca. 50—60.000 kr., hvilket trods alt vil blive en ökonomisk stötte, og det samme må siges at være tilfældet for den andelskapital, som nytegnes i selskabet.«

Av hesi frágreiðing sæst, at tær kr. 250.000.—, sum eru ætlaðar til akkordskipanina, fara at rökka til, men stórvegis avlop verður tó ikki.

Av skuld kr. 110.113,95, sum A. T. millum fiskimenn og arbeiðarar eigur útistandandi, væntast 50—60.000 kr. at koma innaftur, um driftin kemur aftur í gongd; hesin peningur og tann lutapeningur, sum teknast skal saman við tí gamla lagninum vil verða stórur stuðul við byrjan av driftini.

At gera skipini út til fiskiskap, umvælingar og vanligar umsitingar skulu aðrar 250.000 kr. nýtast.

»Brimnes«, »Vestmanna« og »Vörðan« skulu hava vanligt botnsýn og motorsýn; haraftrat skal »Vörðan« hava hövuðssýn.

Til hesi arbeiði eru settar	15.000	
»Marité« skal hava motorsýn v. m., sum er ætlað til ...	10.000	25.000
»Leivur Øssurssøn« skal hava nakað av umvælingum sum harra Jonas hevur mett til	15.000	
Hartil koma so umvælingar og eftirsýn	10.000	25.000
Hartil kemur so sjálv útgerðin:		
»Vestmanna«, »Brimnes« og »Vörðan«	50.000	
»Marité«	40.000	
»Leivur Øssurssøn«	100.000	
Til avgreiðslur á landi	10.000	200.000
		250.000

Tær 25.000 kr., sum ætlaðar eru til umvæling og vanliga umsiting av »Brimnes«, »Vestmanna«, »Vörðuni« og »Marité«, heldur nevndin koma ikki at rökka til, men verður hetta í minsta lagi tað dupulta. Her er tó at siga, at til hesi 4 skip eru 90.000 kr. ætlaðar til útgerð, og at stjórn Föroya Banka hevur sagt við nevndarformannin, at roknast kann við at fáa útgerðarlán. Her skuldu so statt ikki verið trupulleikar av at fáa skipini út, um tann ætlaði peningurin til umvæling og umsiting skuldi verið nakað lítil.

At »Arbejdernes Trawlerdrift« hevur havt stóran týðning fyri Froðbiar

sóknar kommunu, kann eingin ivi vera um. Við at fáa driftina aftur í gongd vil arbeiði skaffast til nógvar hendur bæði á sjógvi og landi, eisini uttan fyri sóknina, og treingir hetta harðliga til í hesi tíð, tá fryktast kann kann fyri, at ein partur av okkara fiskimonnum kemur at liggja á landi, um ikki so nógv skip sum gjörligt kunnu koma aftur í veiðu.

Í uppskotinum til samtyktar fyri A. T. er í grein 11 ásett, at í nevndini vera 5 limir, harav 3 valdir av aðalfundinum, meðan tingið og Froðbiar kommuna velja hvönn sín limin, so leingi almennur peningur er í virkinum.

Ein minniluti (J. P. Henriksen og S. P. Zachariasen) taka fullt út undir við hesum uppskoti frá felagnum.

Ein meiriluti (Fr. Bláhamar, H. Iversen og A. Sörensen) vilja mela tinginum til at samtykkja, at í nevndini verða 3 limir, har aðalfundurin, Föroya Lögting og Froðbiar kommuna velja hvönn sín; tá tann almenni peningurin er afturgoldin, velur aðalfundurin alla nevndina.

Tað er ein álvarsamur spurningur at ganga við til, at Froðbiar kommuna tekur ábyrgdina fyri so stórum peningi, og er tað meirilutanum kunugt, at sóknarstýrið ikki er samt, og at aðrir borgarar í sóknini hava tikið til orða móti hesi ábyrgd. Tá stöðan er henda millum sóknarstýrið og borgarar í sóknini, er neyðugt, at skipað verður so fyri, at trygd og álit aftur kann skapast um virkið.

Meirilutin heldur tað tí vera neyðugt, at tingið samtykkir, at eingin, ið nú situr í driftsráð A. T.'s ella fyri hevur sitið har, tekur inn sum nevndarlimur í tí nýggja virkinum, so leingi sum tann almenni peningurin ikki er afturgoldin.

Uppskot.

I. Frá allari nevndini:

Lögtingslóg um ábyrgd fyrilánum til Froðbiar sóknar kommunu.	*Lagtingslov om garanti for lån til Froðbiar sogns kommune.*
gr. 1.	§ 1.
Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna at taka ábyrgd fyri lánum uppí kr. 250.000.— í Statsanstalten for Livsforsikring og uppí kr. 250.000.— í Arbejdernes Landsbank, Köbenhavn, sum kommunan tekur til endurláns til endurreising av Arbejdernes Trawlerdrift a. m. b. a., Tvöroyri.	Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån op til kr. 250.000.— i Statsanstalten for Livsforsikring og op til kr. 250.000.— i Arbejdernes Landsbank, København, som kommunen optager til grundlån til rekonstruktion af Arbejdernes Trawlerdrift a. m. b. a., Tvöroyri.

gr. 2.
Henda lög kemur í gildi beinanvegin.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks.

II. Tingið treytar sær, at allar affurrindingar av avdráltum, rentum v. m. eftir hesi lög fara um landskassan.

III. Frá meirilutanum (Fr. Bláhamar, H. Iversen og A. Sörensen):

Tingið treytar sær, at felagið verður stýrt av eini 3 mannanevnd, har aðalfundurin, Föroya lögting og Froðbiar kommuna velur hvör sín limin og at eingin av teim, sum nú sita ella fyrr hava sitið í driftsráð Arbejdernes Trawlerdrift verður valdur inn í nevndina, soleingi allur almennur peningur eftir hesi skipan ikki er afturgoldin.

IV. Frá minnilutanum (J. P. Henriksen og S. P. Zachariasen):

Tingið treytar sær, at felagið verður stýrt av eini 5 mannanevnd har aðalfundurin velur 3 limir og Föroya lögting og Froðbiar kommuna hvör sín limin, soleingi allur almennur peningur eftir hesi skipan ikki er afturgoldin.

Sama dag legði tjóðveldisflokkurin fram soljóðandi:

Landsstýrið hevur lagt fyri tingið endurreisingaretlan fyri A. T. á Tvöroyri. Tjóðveldisflokkurin mælir frá at endurreisingaretlanin verður framd í hesum líki.

Eftir tí sum upplýst er fyri tinginum, má henda fyritökan ætlast at vera komin ov langt niður til tess at henda ætlanin kann bjarga henni.

Harnæst er Froðbiar kommuna soleiðis fyrikomin fíggjarliga, at tað má haldast ov hættisligt at leggja störri byrðir á hana á økjum, sum ikki eru beinleiðis kommunal.

Væntandi er tí at henda ætlanin — um hon verður sett í verk — vil föra fólkið í bygdini og kommununa í uppaftur verri fíggjarligar umstöður enn tær, sum eru í dag.

Hinvegin er tað avgjört neyðugt at vinnulívið á Tvöroyri aftur kemur á fötur á sunnum, haldgóðum grundarlagi. Hitt almenna hevur skyldu til at gera sitt til at hetta kann eydnast.

Uppskot:

Taka einstaklingar og felög í Froðhiar sókn seg saman í felagsskap við tí endamáli at reka útgerð og aðra vinnu í sambandi við hana, og fáa teir til vega hóskandi stóran stovnpening til tess, vil tingið útvega slíkum felagsskapi 1 milj. kr av tí Marshallpeningi, ið ætlaður er til endurreisingar av vinnulívinum, eftir teim lántreytum, sum ásettar verða fyri hesi peningalán yvirhövur.

Fíggjarnevndini verður álagt beinan vegin at seta könan mann til at taka upp tingingar við avvarðandi menn og felög, að yvirhövur vera til hjálpar, so at henda ætlanin kemur í verk skjótast gjörligt.

2.viðgerð 17. mars og 3. viðgerð 18. mars 1952.

Formaðurin legði fram greint uppskot frá nevndini:

Tað er beint, at lánini, tá tey eru líknaði út eftir allari lánitíðini, eru uppá kr. 250.000,— til 6,1 % rentu p. a., men av tí at fyrst verður roknað við kursi og síðani avdráttarfrítt í eitt ár og tilskriving av rentu fyri somu tíð, verður tann peningur, sum landskassin tekur ábyrgd fyri per 1. marts tvær ferðir kr. 303.180,—.

Uppskot tjóðveldisflokksins fall 2—0.

Uppskot IV frá minnilutanum fall 7—0.

Uppskot III frá meiralutanum samtykt 16—0.

Uppskot II frá nevndini samtykt 16—0.

Lógaruppskotið 1

Greint broytingaruppskot frá nevndini samtykt 17—0.

Gr. 1 í lógaruppskotinum so broytt samtykt 17—0.

Gr. 2 í lógaruppskotinum samtykt 16—0.

Lógaruppskotið í síni heild so broytt samtykt 17—0.

22. mars valdi lögtingið Niels Niclasen, Tvöroyri til umboðsmann tingsins í stýri fyri A. T.

64. Búnaðarskúlamálið.

1952, 21. februar legði lögmaður fram frágreiðing frá milluntinganevndini viðvíkjandi búnaðarskúlamálinum við framlöguskrivi d. 20. febr. 1952:

Í lögtingsmáli nr. 4/1950 (vetrarting) bygging av búnaðarskúla varð minnilutauppskot búnaðarnevndarinnar soljóðandi samtykt, smbr. Lgt. 1950, s. 10:

Landsstýrið verður biðið um at kanna möguleikan fyri at skipa búnaðarskeið uppi á royndarstöðini í Hoyvík og ætla um, hvussu mikið eitt tílíkt fer at kosta í stovning og rakstri, og í sama viðfangi ætla um útreiðslur til stovning og rakstur av búnaðarskúla á Dalsgarði í Skálavík at leggja fyri tingið komandi Ólavsöku.

Landsstýrið samtykti so at seta nevnd til at kanna teir spurningar settir vóru, og at seta fram uppskot. Í nevndini vóru:

H. J. Jacobsen, landbúnaðarráðgevari,
Karsten Hoydal, fyristöðumaður,
Leivur Vang,
Jens í Dali, fyristöðumaður,
Jógvan Huusgaard, royndarstjóri og
Sjúrður Paturssen, seyðaráðgevari.

Frágreiðing nevndarinnar verður við hesum lögd fyri háttvirda lögting.

Frágreiðing viðvíkjandi búnaðarskúlamálinum.

Við brævi frá Föroya landsstýri, 13. marts í ár varð gjört kunnugt, at vit niðanfyrinevndu vórðu valdir í nevnd til at kanna möguleikan fyri skipan av búnaðarskeið á royndarstöðini í Hoyvík og stovnan og rakstur av búnaðarskúla á Dalsgarði í Skálavík.

Tann 29. marts hittust nevndarlimirnir til fundar og valdu H. J. Jacobsen til formann. 2. apríl var nevndin í Skálavík og hugdi at bö og bygningum á Dalsgarði. 27. apríl var nevndin á royndarstöðini í Hoyvík og kannaði eftir líkindunum har. Síðani hevur nevndin havt 3 fundir — 6. juni, 22. september og 29. september. Síðandi fundirnir vóru hevur málið verið sent til hvönn einsæran lim til kannan av formannsins uppskoti til svar.

Undir viðgerðini av málinum býtti nevndin seg í ein meiriluta — Jens í Dali, Joen Huusgaard, Karsten Hoydal, Sjúrður Paturssen og H. J. Jacobsen — og ein minniluta — Leivur Vang.

Meirilutauppskot.

A. Búnaðarskeið á royndarstöðini í Hoyvík.

Í nevndaráliti í lögtingsmáli nr. 4, vetrarsetuna 1950: Búnaðarskúli, nevnir minnilutin, 1) at tað kann vera samarbeiði millum búnaðarskeið á garðinum og royndararbeiði, og 2) at hava eitt uppískoyti til búnaðarskeiðið » í lærdómi í landmeting til frama fyri útskiftingina í landinum«.

Meirilutin heldur, at eitt sovorðið samarbeiði millum búnaðarskeið og royndarbrúk í Hoyvíksgarði kann ikki hugsast at bera til við meira enn 2 næmingum um árið. Roynd er fyri hesi áríni, ið royndarbrúkið hevur starvast, at tað ber til at hava einar tveir næmingar í royndararbeiðinum, men tá ið tað er komið til 4 næmingar, hevur tað gingið illa. Viðvíkjandi at hava uppískoyti til búnaðarskeið í landmeting er at siga, at tað er av stórum týdningi fyri næmingin, at hann fær eitt sindur at vita um landmáting — soleiðis sum vanligt er á búnaðarskúlum — og kann tá næmingurin í síni framferð sum praktiskur landbrúkari á bygdunum vera ein stuðul fyri útskiftingina í oyggjunum. Men fyri at næmingurin sjálvur skal gerast förur fyri at luttaka í útskiftingararbeiðinum er eitt sovorðið »uppískoyti« alt ov lítið. Í upplæring av landmátarum liggur hövuðstyngdin á lærugreinum sum matematik, landmáting, tóllæru, tekning, lögfröði, samanleggingarfröði, alt evni, sum lítil ella eingin áhugi verður lagdur á í einum búnaðarskúla. Bert sum eykaevni fær landmátaranæmingurin eina leiðbeining í búnaðarfröði.

Teir bygningar, sum eru á royndarbrúkinum í dag, eru allir í brúki. Um tað arbeiði, ið har fer fram, skal verða rökt sum higar til, er tí eingin húsarúmd at lata til eitt búnaðarskeið. Tessvegna má húsrúm byggjast av nýggjum. Vit hava undir hesari meting av nýbygging og öðrum roknað við seks mánaða skeiði og 10 næmingum.

Skúla- og setlhús, 33 × 11 al.	kr.	100.000,—
Goymslu- og turkihús 12 × 6 al.	—	5.000,—
Innbúgv	—	8.000,—
Hitaverk og sanitet	—	16.000,—
Vatnleiðing	—	6.000,—
Undirvísingaramboð	—	2.000,—
Stovnfæ ialt	kr.	137.000,—

Skúlastjóri	kr.	14.000,—
Tímalönt læraralhjálp	—	4.000,—

Húshjálp (1 genta 3620 — leys hjálp 380)	kr.	4.000,—
Kostarhald fyri 10 næm. ½ ár, 5 kr. á dag	—	8.000,—
Ljós	—	2.400,—
Brenni	—	3.600,—
Árligar ábötur		2.000,—
Trygging	—	300,—
Skrivstovuhald	—	1.000,—
Ymist	—	1.500,—
Reuta av stovufæ, 4 % (avrundað)	—	5.500,—
Árligur rakstur ialt	kr.	46.300,—

Vit skulu peika á, at kostnaðarætlingarnar bert eru ætlaðar og ikki útroknaðar. Tölini, ið viðvíkja bygging, eru fyrilögd Kl. Dalsgaard, timburmeistara, Tórshavn, til kanningar og hevur hann sagt tey at vera rímulig men sum sagt tey byggja ikki á útrokningar.

Víðari skulu vit nevna, at vit halda, at tað hevði fallið lættari at havt eitt eventuelt teoretiskt búnaðarskeið í Tórshavn enn í Hoyvík. Her hevði ivaleyst verið lætt at fingið innivist og lærarakreftir við at leita samarbeiði við skúlar, ið her eru. Nevndin heldur tó ikki — sum minnilutin í lögtingsnevndini tykist halda — at eitt teoretiskt búnaðarskeið eina ella aðrastaðni dugir sum reynd fyri, um föroyskir búmenn vilja vitja landbúnaðarskúla ella ei. Og ein eigur at vera varin við at gera eina sovorðna ivasama reynd í búnaðarskúlamálinum.

B. Búnaðarskúli í Dalsgarði í Skálavík.

Meirilutin heldur — eftir at hava verið á staðnum — at böurin á Dalsgarði er bæði stórur og góður og at hóskandi nýdyrkingarjörð er at fáa. Men vit halda ikki, at teir úthúsbygningar, ið eru á garðinum, eru nakað at rokna við til skúlabrúks. Hesir bygningar eru allir gamlir og á fallandi fót. Tí má roknast við, at skal skúli koma har, má ein fullfíggjaður löðu- og fjósbygningur gerast, sum í stödd hóskar til tann bö, ið garðurin hevur. Vit halda, at hesin garður er væl hóskandi fyri at rökja tann praktiska partin av búnaðarskúlastarvinum, meðan vit halda, at lærarakreftirnar til tann teoretiska partin eru dýrari her enn t. d. nærhendis Tórshavn.

Undir nevndarinnar viðgerð av kostnaðarætlan fyri búnaðarskúla í Skálavík, hevur lögtingsnevndar meirilutauppskotið verið samráðingargrundarlagið. Skulu vit tí afturgeva her uppstillingina frá hesum uppskoti

í broyttum líki, soleiðis sum vit best hava kunnað skynað á. Eftir teimum tölum, ið lögtingsnevndar meirilutin hevur í áliti sínum, kann síggjast, at ætlanin hevur verið at hava praktiskt skeið í Skálavík og ikki eitt praktiskt-teoretiskt skeið, meðan spurningurin frá landsstýrinum til nevndina snýr seg um búnaðarskúla. Ein fullfíggjaður búnaðarskúli við bygningum og útgerð kostar stórt sæð nakað tað sama hvar hann verður bygdur, tí krövini til rúm og amboð eru tey somu. Vit halda okkum ikki kunna ráða til — soleiðis sum tað stendur í lögtingsnevndaruppskotinum — at flyta bygningar av royndarbrúkinum til Skálavíkar í tí tann nytta, hesir bygningar gera sum teir standa, er meira verd enn bygningarnir, at taka niður og reisa aftur á öðrum stað. Av húsum, sum eru á Dalsgarði, eru bert eini sethús, 12 × 14 alin við hjallara, trimpli ok kvisti, sum dugir at taka í brúk undir stovnan av búnaðarskúla har á garðinum.

1. Um skeiðið bert skal vera praktiskt, heldur meirilutin at omannevnda uppstilling eigur at verða broytt til:

Bygging av sethúsum, 12 × 14 al	kr.	60.000.—
Keyp og umvælling av sethúsum, ið eru		17.000.
Löðu- og fjósbygningar	—	60.000.—
Innbúgv	—	5.000.—
Hitaverk og sanitet	—	16.000.—
El-ljós og kraftstöð	—	10.000.—
Garðsamboð	—	7.000.—
Dýr til garðsdriftina	—	2.000.—
Undirvísingaramboð	—	2.000.—
Ialt stovnfæ	kr.	179.000.—

Fyristöðumaður	kr.	12.000.-
Garðsleiðari	—	7.000.—
Dagleigarhjálp	—	5.000.—
Húshjálp	—	4.000.—
Kostarhald til 6 næmingar, 1 ár	—	10.000.—
Ljós, hiti og kraft	—	2.500.—
Árligar ábötur	—	2.000.—
Handilsfóður	—	5.000.—
Handilstöð	—	1.000.—
Trygging		300.—
Skrívstova o. l.	—	1.000.—
Ymist	—	1.500.—

Renta av stovnfæ, 4 % (avr.)	—	7.100.—
Samsýning til festaran	—	8.000.—
Árligur rakstur	kr.	66.400.—
Inntöka av garðinum	—	26.000.—
Árligur kostnaður	kr.	40.400.—

Frá garðsinntökuni, ið sett var upp á lögtingsnevndaruppskotið, eru tiknar 1000 kr., sum vit meta kann hava verið ætlað í leigu fyri Hoyvíksgarð, í tí vit halda ikki, at tað ber til, at niðurleggja royndirnar her so beinanvegin. Vit halda, at tað má ganga eitt áramál, áðrenn royndirnar av öllum verða fluttar burtur á annað stað.

Her er roknað við, at tað eru 6 næmingar og at skeiðið varar 1 ár.

2. Um skeiðið bæði skal verða teoretiskt og praktiskt krevst, at tað verður bygdur ein bygningur sum nevnt undir A, til 100.000 kr. í staðin fyri ein til 60.000 kr. Stovnfæið fer tá upp til 219.000 kr. Víðari má vera ein fastur lærari afturat við lön 12.000 kr. — hesin syrgir sær so sjálvur fyri húsum. Afturat kemur so renta av teim 40.000 kr., ið stovnfæið fer upp. Tann árligi kostnaðurin av skúlanum kemur sostatt upp á 54.000 kr.

Minnilutauppskot.

Eftir tí lögtingsáliti, vit hava fingið um búnaðarskúlamálið, er spurningurin, um hvussu tað skal verða í framtíðini við royndarbrúkinum, eisini tikin til viðgerðar, og hesir báðir spurningarnir eru í nevnda áliti so mikið fast samanknýttir, at vit í okkara áliti eiga at taka hendu spurning upp, hóast vit ikki eru heinleiðis bidnir um tað.

Tað sæst, at búnaðarnevnd lögtingsins hevur havt tvinnar áskoðanir um hesi viðurskifti. Onnur er, at niðurleggja royndarbrúkini í Hoyvík og Traðardali, og seta á stovn búnaðarskúla á Dalsgarði í Skálavík. Hin áskoðanin er at spurningurin um at seta á stovn búnaðarskúla á Heyggi í Kollafirði, sum lögtingslóg gevur heimild til, verður útsettur fyri fyrst, meðan allir prísir á byggitilfari eru so högir, og í staðin verður marlt til fyribils at seta á stovn búnaðarskeið á royndarstöðini í Hoyvík. Meðan hin fyrra áskoðanin ætlar at niðurleggja royndarbrúkið her á landi eftir figgjarætlanini at döma, so fær ein ta uppfatan, at hin seinna roknar við, at royndirnar skulu halda fram, um möguliga við vissum broytingum. Tað

er vert at leggja til merkis, at aftanfyri uppskotið um at niðurleggja royndarbrúkini standa tveir limir í Jarðarráðnum — J. P. Davidsen og A. Sörensen; og sum kunnugt er tað Jarðarráðið, sum hevur ábyrgdina av royndarbrúkinum, síðani Statens Planteavlsudvalg læt frá sær leiðsluna av royndarvirkinum her á landi. Sostatt má ásannast, at royndarstarvið her á landi er komið á fallandi fót. Nú er spurningurin, hvussu hetta ber til, og um eingin uppgáva er longur fyri royndum hjá föroyskum landbúnað. Uppgávan hjá royndarvirkinum er at fáa greiðu á spurningum, sum koma fyri hjá tí praktiska jarðarbrúkaranum, so hesin sjálvur sleppur undan at gera dýrar royndir, men í staðin kann styðja seg til tey úrslit, sum koma fram á royndarstöðini. Nú verður sagt, at tað er einki vert at hava royndarbrúkið gangandi, tí tað koma ongar frásögnir um royndarúrslitini; og tað er jú líkatil, at fær jarðabrúkarin einki at vita um úrslitini, so er arbeiðið uttan týdning fyri hann. Her er tó grund til at kanna nærri eftir, hví frásögnirnar ikki koma, og síðani gera tað sum neyðugt er, fyri at fáa hetta í rættlag. Sum fyrr nevnt, so hevur Föroya Jarðarráð ábyrgdina av royndarbrúkinum, og harav má jú fylgja, at tað er teirra ábyrgd, at eingi royndarúrslit koma fram. Við öðrum orðum, teir makta ikki uppgávuna, helst tí at teimum törvar fakligan kunnleika, og tá ið so er statt, so má tað tykjast beinast, at teir verða frítiknir fyri at hava leiðsluna av royndarstöðini, heldur enn at lata royndararbeiðini falla niður fyri. Viðvíkjandi hesum máli verður tí sett fram hetta uppskot:

Landsstýrið frítekur skjótast möguligt Jarðarráðið fyri at hava nakað við royndarbrúkini at gera. Í staðin verður sett serstök trímannanevnd, hvarav landsstýrið velur ein og Föroya Búnaðarfelag tveir menn; allir limirnir eiga at hava fakligan kunnleika í búnaðarmálum. Hlenda nevndin fær til uppgávu at endurreisa royndarvirkið. Hon skal í samráð við royndarstjóran gera kannningar yvir tey royndarúrslit, sum eru til skjals á royndarstöðini og fáa publiserað tey úrslit, sum kunnu ætlast at hava týdning fyri jarðarbrúkaran. Síðani verður ætlað um, í samráð við royndarstjóran og Föroya Búnaðarfelag, hvörjar royndir skulu gerast í framtíðini, og hvörjar royndir möguliga eiga at niðurleggjast. Viðvíkjandi starvinum fyri framtíðina so er at hava í huga, at tað er ikki bara spurningar um handilstöð og vakstrarlíkindi hjá gröðini, sum hava týdning fyri jarðarbrúkaran; tað er tvörturímóti ein mongd av spurningum, sum átti at verið kannað við royndum, sum til dömis bjarging av gröðini, spurningar viðvíkjandi neyta- og seyðarökt, nýtsla av maskinum og amboðum o. s. fr. Tá ið hesar ætlanir eru gjördar, sum sjálvandi mugu avmarkast eftir tí peninganögd, sum eru avsettar av tí almenna til royndarbrúkið, hevur nevndin at ansa eftir, at royndirnar verða gjördar eftir ætlanini, at úrslitini verða prentaði og at jarðabrúkarin fær hendur á úrslitini. Við tað at Föroya Búnaðarfelag velur tveir menn í nevndina, so er tað hervið trygd fyri, at kontakt verður millum tann praktiska jarðabrúkaran og royndarstarvið. Og uttan slíka kontakt er einki gott úrslit at væntа, sum vit eisini hava sið hesi seinastu árini, meðan Jarðarráðið hevur havt ábyrgdina av royndunum.

So kemur spurningurin um búnaðarskúlan, har vit eru bidnir um at

gera kostnaðarætlan fyri skúlaskeið í Hoyvík og fyri stovnan og rakstur av búnaðarskúla í Skálavík. Her vil minnitalið mæla til at gera stutt av og seta fram uppskot um, at lögtingsviðtökan um at seta á stovn búnaðarskúla á Heyggsgarði í Kollafirði verður standandi við makt, og tað verður tikið undir við minnilutanum í búnaðarnevndini um at útseta at fara í holt við at byggja skúlan, inntil tíðirnar verða betri her á landi. Tað verður síðani mælt til, at royndarstöðin í Hoyvík frá nú av, og inntil skúlin kemur í Kollafirði, tekur móti næmingum, sum eiga at taka lut í tí dagliga arbeiðinum á royndarstöðini og annars fáa hövi til at læra neyta- og seyðarökt og nýtslu av maskinum og amboðum. Harumframt eigur royndarstjórin — um neyðugt við eykahjálp — at geva næmingunum neyðturvuligar teoretiskar vegleiðingar. Tað verður mælt frá at sláa henda spurning um næmingar í Hoyvík so stórt upp, sum nevndin hevur gjört. Talið av næmingum, sum kann koma, eigur at verða avmarkað av tí húsarúmd, sum er á royndarstöðini — her kann eisini koma til umhugsunar at fáa næmingum innivist aðrastaðni í Hoyvík — og tí peningi, sum er avsettur til royndarstöðina í lötuni. Skuldi tað vist seg seinni, at fleiri næmingar fáa hug at koma, so kann spurningurin um húsarúmd altíð takast upp aftur. Annars verður mælt til, at nevndin, sum fær leiðsluna av royndarstarvinum, eisini skal fyrireika spurningin um næmingar nærri í samráð við royndarstjóran.

Við tað at fryktast kann fyri, at menn framvegis vilja halda lív í stríðnum um at fáa skúla í Skálavík, skal minnitalið gera nakrar fáar viðmerkingar til henda spurning, uttan tó á nakran hátt at ganga út í æsir. Her skal fyrst verða nevnt, at tað veksur ikki um álitið millum manna til lögtingið, at lögtingsmenn ferð eftir ferð royna at kollrenna eina nýliga viðtikna lögtingslög. Síðani er at nevna spurningin um kostnaðin av at seta á stovn skúla í hesum báðum plássum — Skálavík og Heyggi; at á báðum plássum er neyðugt at reisa allar bygningar av nýggjum fyri at fáa ein tíðarhóskandi skúla; og tað munnu allir menn vera samdir um, at kostnaðurin av hesum verður nakað tað sama, annaðhvört bygningarnir verða reistir í Kollafirði ella í Skálavík. Sama er at siga um amboðskeyp til skúlan. Tað skal tó sigast, at Skálavík hevur tann fyrimun at hava stóran og góðan bö, meðan böurin á Heyggsgarði er lítil, men her er at hava í huga, at dyrkilendi á Heyggsgarði er framúr gott, so tað verður skjótt at fáa velt nógv burtur úr nýggjum, samstundis sum næmingarnir á henda hátt fáa kunnleika til at velta burtur úr nýggjum á nýmótans hátt. Og við tað at hóskandi traktorur er í Norðstreymoy, so er einki at ivast í, at skúlin fekk hann til láns av og á til nýtslu á skúlanum. Annars skal tað ikki her vera komið nærri inn á hesar spurningar, tí vónandi vilja menn binda frið um skúlaspurningin á tí grundarlagi, sum lögtingssamtyktin tilsigur um skúla á Heyggi.

1. viðgerð 1. mars. 3. apríl legði búnaðarnevndin fram soljóðandi

Nevndarálit.

Frágreiðing millumtinganevndarinnar var til 1. viðgerðar 20. februar 1952 og beind í búnaðarnevndina.

Ein meirilutí í millumtinganevndini hevur gjört kostnaðarætlan yvir búnaðarskúlaskeið við royndarstöðina í Hoyvík bæði í bygging og rakstri til 10 næmingar í 6 mánaðir.

Haraftrat hevur meirilutin gjört kostnaðarætlan yvir ein búnaðarskúla í Dalsgarði í Skálavík bæði í stovning og rakstri.

Í báðum förum törva rættiliga stórar peningaveitingar.

Soleiðis sum peningavánirnar eru í lötuni, heldur nevndin seg ikki kunna mæla tinginum til at taka henda spurning til viðgerðar sum er, men heldur at steðga til tíðirnar javna seg nakað aftur og peningavánirnar verða eitt sindur rúmari, samstundis sum víst verður til tingmál nr. 71/1951: Royndarstöðirnar í Hoyvík og á Sandi.

Uppskot.

Spurningurin um byggjan av búnaðarskúla verður lagdur niður fyri fyrst.

2. viðgerð 4. apríl 1952.

Uppskot nevndarinnar samtykt 14—0.

---

65. Broytingar í løgtingslóg um avrokning og lønjavningargrunn fiskimanna.

1952, 21. februar legði lögmaður fram soljóðandi framlöguskriv, d. 20. februar 1952:

Föroya fiskimannafelag hevur saman við Suðuroya fiskimannafelag og Föroya motorpassarafelag (hetta seinasta felagið við 177 undirskriftum) heitt á landsstýrið um at leggja fyri lögtingið spurningin um Lönjavningargrunn skipsfiskimanna og forskotsrindan skipsfiskimanna, soleiðis at hesar

skipanir koma aftur í gildi nakað sum tær vóru við rætti til lönjavning og forskot til allar fiskimenn.

Sum kunnugt eru sáttmálasamráðingarnar saman við semingsmanninum millum reiðarafelögini, fiskimannafelögini og motorpassarafelagið endaðar við tí, at teir sáttmálar, sum galdandi vóru í 1951, so nær sum óbroyttir, eisini skulu galda í ár. Fiskimannafelögini og motorpassarafelagið vilja viðvíkjandi sáttmálunum við Föroya reiðarafelag tó áleggja limum sínum ikki at mynstra av nýggjum til fiskiskap við nökrum skipi fyrrenn lögtingið hevur tikið stöðu til krav teirra um, at grunnarnir (forskots- og lönjavningargrunnur) verða endurreistir. Viðvíkjandi sáttmálunum við Felag föroyskra trolaraeigara bava fiskimannafelögini sett ta treyt fyri at undirskriva sáttmálarnar, at lógirnar um lönjavningargrunn og forskotsrindan verða endurreistar í nökurlunda sama skapi sum tær vóru galdandi í 1951, harumfram vilja felögini áleggja hinum um ikki at mynstra av nýggjum til fiskiskap við nökrum skipi fyrr enn lögtingið hevur tikið stöðu til betta krav.

Viðvíkjandi forskotsrindanini skal landsstýrið viðmerkja:

Lögtingslóg nr. 47, 8. juni 1950 um forskotsrindan skipsfiskimanna umtalar í gr. 3 ymsar möguleikar fyri at reisa pening til at rökja forskotsrindanina. Árini 1950 bert frá og 1951 sum skipanin hevur verið í gildi er forskotspeningurin læntur úr socialgrunni landskassans til Föroya fiskasölu við Lönjavningargrunni skipsfiskimanna sum kautionisti.

Yvirlit yvir lántökuna:

	1950	1951
Útlænt tilsamans	kr. 138.080.—	kr. 941.605,07
Tað mesta sum hevur staðið úti ísenn	kr. 91.840.—	kr. 712.470,37

Fyri 1950 er av lánveitingini ikki enn afturgoldið í socialgrunnin kr. 5.870,70.

Skal forskotsskipanin halda fram við somu forskotum sum higartil má ivaleyst roknast við munandi meira av peningi enn seinasta ár.

Sum likviditetsstöða landskassans er í lötuni er ikki möguligt úr grunnum hansara at læna pening til hesa skipan, somuleiðis heldur landsstýrið tað ikki vera gjörligt frá aðrari föroyskari síðu at læna pening. Frá samráðingunum í Danmark nú framgongur heldur eingin möguleiki fyri lán til endamálið her.

Við hesum loyvir landsstýrið sær at leggja málið fyri háttvirda lögting.

1. viðgerð 27. februar, og 6. mars legði fiskivinnunevndin fram soljöðandi

Umhugsan.

Landsstýrið legði hetta mál fram 21. februar 1952, og 27. s. m. var málið til 1. viðgerð og beint í fiskivinnunevndina.

Síðani nógvur peningur skal til, serliga, um ein forskotsrindan skal útvegast, hevur nevndin havt samráðing við fíggjarnevndina. Fíggjarnevndin hevur sagt frá, at landskassin ikki hevur pening tökan, men semja var um at royna Kríggstryggingina fyri föroysk fiskiför, Föroya Fiskimannafelag og Föroya Fiskasölu eftir peningi.

Landsstýrið hevur síðani fingið tilsögn frá Kríggstryggingini um 900 túsund kr. í láni til 4 % rentu p. a. at afturrinda seinast 1. apríl 1953.

Í skrivi frá 5. mars til landsstýrið og kunngjört lögtinginum hevur Kríggstryggingin broytt tilsögn sína niður í 450.000.—. Skrivið er soljóðandi:

»*Lán til landskassan til forskotsrindan til fiskimenn.*

Í brævi dagsett 29. februar í ár hevur nevndin fyri Kríggstryggingini fyri föroysk fiskiför sagt frá, at hon hevur samtykt at viðmæla lán upp til kr. 900.000.— undir ymsum treytum.

Nevndin hevur nú fingið bræv frá Sjóvinnubankanum og Föroya Banka, dagsett í dag, soljóðandi:

»I anledning af at bestyrelsen har meddelt bankerne, at man har påtænkt hos bankerne at hæve op til ialt kr. 900.000,00, der påtænkes udlånt til Föroya Lögting, skal vi tillade os at göre opmærksom på, at vi på grund af den pengekuaphed, der for tiden hersker på Færöerne, vil finde det betænkeligt, at man beröver bankerne disse midler på nuværende tidspunkt.

De midler, bankerne råder over, er fuldtud udlånt til erhvervslivet, og udtræk af denne störrelse vil medföre, at bankerne vil se sig nödsaget til at kræve indfriet tilsvarende kreditter til skade for erhvervslivet.

Vi er naturligvis indforstået med, at beløb, der indestår hos bankerne, bliver opsagt og hævet, men vi må påpege de alvorlige fölger, dette kan medföre, og tillader os at henstille, at bestyrelsen påny tager sagen under overvejelse.«

Nevndin fyri Kríggstryggingini er samd um, at forútsetningarnir fyri lántilsagninum upp til kr. 900.000.— til landskassan eru brostnir eftir tí, sum fram er flutt í brævinum frá bankanum. Nevndin er eisini samd um, at tað er ógvuliga álvarsamt at veita umtalaða lán, um fylgjan verður trupulleikar fyri bankarnar at veita nóg stór útgerðarlán og annan kredit til fiskivinnuna.

Meirilutin í nevndini, sum 29. februar viðmældi lán upp til krónur 900.000.—, vil, sum málið nú liggur fyri, mæla til at veita landskassanum

lán frá Kríggstryggingini kr. 450.000.— til umsökta endamál undir treytunum, ásettum í hrævinum av 29. februar.

Minnilutin beldur, sum umstöðurnar eru, at tað ikki er beint, at veita umsökta lán hvörki alt ella ein part og harvið virka við til at nerva likviditetin hjá bankunum og gera tað meira trupult hjá bankunum at fíggja vinnulívið.«

Föroya Fiskimannafelag hevur ikki nógvan pening tökan, men heldur, at möguleiki kannska er fyri at læna 100.000. kr., um forskot verður latið til allar, eisini til ikki-uppihaldarar, og lánið verður afturgoldið fyrst. Föroya Fiskasöla sýnir málinum vælvild, men hevur ongan pening tökan í lötuni, við tað at peningurin m. a. er bundin í Suðuramerikufiski.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jens Chr. Olsen, Fr. Bláhamar og A. Sörensen) setur fram fylgjandi

Uppskot

til

broyting í lögtingslóg nr. 27 frá 22. desember 1951 um avrokning og Lönjavningargrunn fiskimanna.

gr. 1.

Til gr. 10 verður skoytt uppí:

Nevndini er eisini heimilað, so langt lönjavningargrunnurin hevur tökan pening til tess, at veita eina forskotslön til teir í gr. 6 nevndu fiskimenn, tó undantikið teir, sum eru á feskfiska- ella sildaveiðu, uppí 300 kr. um mánaðin, sum uppihaldsskylda ger tað fyri neyðini.

Forskotslönin verður rindað fyri ein mánað í senn og afturút. Forskotslönin verður latin eftir umsókn á serlig úttökublöð, sum í áriti skulu hava transport reiðarans ella fyri útróður í Grönlandi transport frá allari bátskipanini í fiskasölupeninginum fyri forskotslönina, rentu og umsitingarútreiðslur.

ændring i lov nr. 72 af 22. december 1951 om fiskernes afregning og lönreguleringsfond.

§ 1.

Til § 10 föjes:

Bestyrelsen er desuden bemyndiget til i det omfang, lönjavningargrunnsins likviditet gör det muligt, at udbetale en forskudslön til de i § 6 nævnte fiskere — dog undtaget dem, der sejler i ferskfisk eller driver sildefiskeri — af indtil 300 kr. pr. måned, gradueret efter forsörgerbehovet.

Forskudene udredes for en måned ad gangen bagud. Forskudene udbetales på grundlag af vedkommendes ansögning på dertil indrettede træksedler, forsynet med rederens transport — for bådfiskernes vedkommende hele bådbesætningens transport — i fiskesalgsprovenuet

L/f Föroya Fiskasöla hevur skyldu at notera transportarnar.

Áðrenn lönarforskot verður rindað, skal nevndin hava vissað sær trygd fyri endurrinding hennara.

Rentu- og umsitingarútreiðslurnar ber viðkomandi útgerðarmaður og fyri útróður til lands í Grönlandi viðkomandi bátskipan.

Mynstringarstjórarnir hava skyldu at geva lönjavningargrunninum avrit av manningarlistunum, hvörja ferð mynstrað verður. Við avmynstring ella deyðsfalli hevur skiparin skyldu at siga grunninum frá.

Nevnd lönjavningargrunnsins er heimilað at taka upp lán upp í kr. 500.000 til veitingar av teim í 2. petti nevndu lönarforskotum.

gr. 2.

Henda lög kemur í gildi beinanvegin.

for forskudene, rente og administrationsomkostninger.

L/f Föroya Fiskasöla er pligtig at notere transporterne.

Forinden lönforskudet udbetales, vil bestyrelsen have at påse, at sikkerhed for tilbagebetaling er tilvejebragt.

Rente- og driftsudgifter afholdes af vedkommende reder eller for dem, der driver bådfiskeri i Grönland, af bådsbesætningen.

Mönstringsbestyrerne er pligtige til at give lönjavningargrunninum afskrift for bemandingslisterne for hver udmönstring. Ved afmönstring eller dödsfald er skibsföreren pligtig at underrette lönjavningargrunnin.

Bestyrelsen for lönjavningargrunninum er bemyndiget til at optage indtil 500.000 kr. som lån til bestridelsen af de i 2. stk. nævnte lönforskud.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Sama dag legði minnilutin (P. M. Dam og J. H. Danbjörg) fram soljóðandi

Minniluta-álit.

Fiskimannafelögini og Föroya motorpassarafelag hava sum kunnugt hildið fast um bruttosáttmála, meðan útgerðarmenn hava kravt nettosáttmála. Men at enda kom so semja í um nettosáttmála,, tó við teirri avgjördu treyt, at fiskimonnum varð tryggjað ein minstalön uppá 500 kr. um mánaðin.

Henda treyt varð so lokin við lógini um lönjavning skipsfiskimanna.

Seinri tá ið fiskiháttur´in broyttist meiri yvir til saltfiskiskaps, ið saman við teimum av nettosáttmálanum standandi truplu uppgerðarviðurskiftum bar við sær, at fiskimenn fingu avrokning í úrtíð, varð forskots- ella rættari sagt á conto-rindannarskipanin samtykt fyri at tryggja fiskimanninum pening undir arbeiðinum.

Tá ið nú í fjör forskotsrindanin varð avtikin, og lönjavningarlógin munandi skerd, brotnaði grundarlagið undan nettosáttmálaskipanini. Av hesum er so komin ósemja millum veiðustættirnar öðru megin og tingið hinumegin.

Undir teimum samráðingum, sum fram eru farnar millum veiðustættirnar, hevur aftur sterkur dráttur verið um nettosáttmálar og bruttosáttmálar. Men fyri at toyggja seg so langt, sum möguligt er, til bjarging av tí so umráðandi arbeiðsfriði hava fiskimannastættirnir aftur gingið við til nettosáttmála, men avgjört treytað av, at lönjavningar- og forskotsskipanirnar vórðu settar aftur í gildi í sama skili, í hvussu er ikki verri skili, enn tær upprunaligu vóru.

Tað kann her viðmerkjast, at fyri minnilutanum er upplýst, at kravið, um minstulönina uppá 500 kr. um mánaðin og forskotsrindanarskipanina at koma aftur í gildi sum tær vóru, er bókað í semingsmannsins gerðabók og ikki mótmælt av nökrum, men tvörturímóti undirskrivað av öllum umboðsmonnunum bæði fyri fiskimenn og og reiðarar eins og av semingsmonnunum sjálvum.

Minnilutin tekur undir við kravi fiskimanna um at fáa settar aftur í gildi lógirnar um forskotsrindan og lönjavning til skipsfiskimenn, soleiðis sum tær upprunaliga vóru.

Minnilutin setur eisini uppskot um nakrar broytingar av avrokningarskipanini, ið vil gera hana greiðari og betri fyri fiskimenn, eins og uppskot um eykainnlögu til landskassan til fíggjan av forskotsskipanini.

Aftrat tí, ið longu er sagt frá viðvíkjandi tí söguligu gongdini í lönstríðnum stættanna millum, viðmerkist:

Samanborið við dýrtíðina, lönarhæddina hjá öðrum stættum og umstöðurnar hjá slitmannafjöldini í heila tikið kann av sonnum sigast, at tann treyt, ið fiskimannastætturin setur fyri at leggja aftur í havið, avgjört er minstamarkið fyri at kunna halda lívinum uppi á sjálvum sær og sínum, ið heima sita.

Tað kann ikki bera til, at menn hava ilt við at ásanna, at allir fiskimenn eiga rætt til í minsta lagi 500 kr. um mánaðin.

At veita fiskimonnum trygd fyri hesa minstulön kann gerast við teimum inntökum, lönjavningargrunninum nú eru givnar, um vit aftrat hesum innlögum áleggja t. d. Föroya Fiskasölu og Tryggingarsambandinum skyldunna av teirra árliga yvirskoti at rinda sum uppískoyti til lönjavningarrindanina eitt avgjald til landskassan inntil helmingin av yvirskotshæddini, tó ikki meir enn tað möguliga rakstrarhallið, lönjavningargrunnurin verður at standa fyri. Um hetta avgjaldið ikki skuldi verið nóg mikið til rindan av rakstrarhallinum, verður landskassin at standa til svars fyri tí, sum irestar, at lönjavningargrunnurin kann veita fiskimonnum fulla lönviðbót ella lönjavning.

Minnilutin setur tí uppskot um at broyta lönjavningarskipanina, ið nú er í gildi, soleiðis, at allir fiskimenn verða at fáa aftur rættin til lönjavning, og at áleggja Föroya Fiskasölu og Tryggingarsambandinum við sínum deildum at rinda frammanfyri umrödda avgjald til landskassan, ið so skal

hava skyldu at tryggja lönjavningargrunninum at fáa tann pening, ið honum möguliga kemur at vænta í at kunna rinda fulla lönjavning.

Okkum nýtir ikki at gera langt av fyri at ávísa, hvussu neyðug forskotsrindanin er. Tað er hvörjum manni kunnugt, familjurnar hava tað heima, meðan forsyrgjarin er burturi, um ikki forskot verður goldið, og kredittur ikki verður givin. Og umframt henda sosiala drættin í málinum loyvir minnilutin sær at strika undir, at tað er ein ókronkiligur rættur hjá einum hvörjum starvandi manni at fáa í hvussu er ein ávegispening goldnan kontant, meðan hann er í slitinum.

Peningaviðurskiftini í grunnum, ið tingið hevur ábyrgd fyri, eru so háttað, at ein forskotsrindan til skipsfiskimannin, meðan hann er burturi, lættliga kann lata seg gera í samband við skipanina um 75 % lán uppá fisk á goymslu, harav 25 % eru ætlað til rindan av parti fiskimanna.

Vit skulu nevna, at hin föroyska kríggstryggingin eigur standandi inni slakar 2 milliónir, Tryggingarsambandið Föroyar við sínum deildum eigur einar 7 milliónir, harav flestu milliónirnar eru ólæntar, og Föroya Fiskasöla eigur í eginpeningi um 1,3 milliónir, harav fiskimaðurin av röttum eigur ein stóran part. Øll hesi felögini hava fyri mesta partin fingið pening sín av fiskivinnuni, serliga tá ið eingin vandi er fyri ikki at fáa hann aftur.

Tá ið fiskur er heimkomin og lagdur á goymslu ella er seldur og beinleiðis fluttur til útheimin ella er seldur til heimakeyparar, verða 25 % av virðinum á fiskinum tök við láni ella gjaldan í hondina. Og aftaná at tey 25 % soleiðis eru vorðin tök, greiðist líggjanin av forskotsrindanini av sær sjálvum.

Men so er tað tiðin, frá tí skipini leggja í havið, til fiskurin verður falur til sölu ella komin á goymslu.

Í hesi tíð kann forskotsrindanin greiðast við:

1. Möguligu inntökum hjá lönjavningargrunninum.

2. Peningi, sum landsstýrið lænir frá:

   a. Krigsforsikringen for færöske fiskerskibe,
   b. Tryggingarsambandinum Föroyum við sínum tryggingardeildum,
   c. Föroya Fiskasölu,
   d. Lögtingsins sociala grunni,
   e. bankum og öðrum peningastovnum,
   . státi ella öðrum.

Uppskot.

I. *Broytingaruppskot*

til

lögtingslóg nr. 72, 22. desember 1951, um avrokning og lönjavningargrunn fiskimanna.

Í staðin fyri seinasta setning í fyrsta punktum í gr. 2, petti 1, verður sett

»aftaná at skipið er heimkomið.«

2. punktum í gr. 2, 1. petti fer út, og sum seinasta punktum í sama petti verður sett:

»Tað er skylda Föroya Fiskasölu við árslok at eftirrokna avrokningarnar.

Um so er, at prísurin, ið givin er manningini, liggur lægri enn puljuprísurin, ið fingin er fyri sama fisk í saltfiski ella klippfiski, tá ið arbeiðs- og aðrar útreiðslur uppá fiskin eru av, skal Föroya Fiskasöla av sölupeninginum rinda avvarandi manning munin.«

Petti 3 í gr. 6 gongur út.

Í staðin fyri gr. 8 verður sett:

»Landskassin stendur til svars fyri, at rindað verður lönarviðbót upp til 500 kr. sambært seinasta punktum í 1. petti í gr. 6.«

Ændringer

i

lagtingslov nr. 72, 22. december 1951, om afregning og lönregulerings fond.

I stedet for sidste sætning i förste punktum i § 2, 1. stk., sættes:

»efter at skibet er hjemkommet«.

§ 2, 1. stk. 2. punktum, udgår, og som sidste punktum i samme stykke sættes:

»Det er Föroya Fiskasöla's pligt, når året er afsluttet, at efterregne afregningerne.

Såfremt den pris, mandskabet er afregnet efter, ligger lavere end den puljepris, der er opnået for samme fisk i saltfisk eller klipfisk, efter at arbejds- og andre udgifter af fisken er fratrukket, skal Föroya Fiskasöla af salgsbeløbet betale mandskabet forskellen.«

§6, stk. 3, udgår.

I stedet for § 8 sættes:

»Landskassen garanterer, at der i overensstemmelse med § 6, 1. stk., sidste punktum, betales indtil 500 kr. i löntilskud.«

II. *Lögtingslóg*

um

forskotsrindan skipsfiskimanna

gr. 1

Lögtingslóg um forskotsrindan skipsfiskimanna nr. 47, 8. juni 1950, verður sett aftur í gildi.

Lagtingslov

om

forskudsbetaling for skibsfiskere.

§ 1.

Lagtingslov nr. 47 af 8. juni 1950 om forskudsbetaling til skibsfiskere får gyldighed igen.

gr. 2.
Lógin kemur í gildi beinanvegin.

§ 2.
Denne lov træder straks i kraft.

III. *Lögtingslóg*

um

um avgjald til landskassan til uppískoytis til inntökur Lönjavningargrunn Skipsfiskimanna og lán til forskotsrindan.

gr. 1.
Föroya Fiskasöla, Tryggingarsambandið Föroyar og deildir tess (Föroya Sjóvátrygging, Föroya Brunatrygging, Föroya Vanlukkutrygging, Krigsforsikringen for færöske fiskeskibe o. a.) rinda í landskassan eitt avgjald upp til helmingin av sínum rakstraravlopi, tó ikki meiri enn rakstrarhall Lönjavningargrunns Skipsfiskimanna. Tá avgjaldið er minni enn helmingurin, verður hvör at gjalda við somu procentum av sínum avlopi.

gr. 2.
Landskassin verður at nýta tað í gr. 1 nevnda avgjald sum uppískoyti til Lönjavningargrunn Skipsfiskimanna til rindan av lönarviðbót til mynstraðu manningina.

gr. 3.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán frá Föroya Fiskasölu, Tryggingarsambandinum Föroyar við deildum, peningastovnum, státi o. ö. til fíggjan av forskotsrindan skipsfiskimanna.

gr. 4.
Henda lóg fær gildi beinanvegin.

Lagtingslov

om

afgift til landskassen som tillæg til Fiskernes Lönreguleringsfonds indtægter og lån til forskudsbetaling.

§ 1.
Föroya Fiskasöla, Tryggingarsambandið Föroyar og dennes afdelinger (Föroya Sjóvátrygging, Föroya Brunatrygging, Föroya Vanlukkutrygging, Krigsforsikringen for færöske fiskeskibe o. a.) betaler en afgift til landskassen, svarende til indtil halvdelen af disses driftsoverskud dog ikke mere, end Fiskernes Lönreguleringsfonds driftsunderskud. Såfremt afgiften er mindre end halvdelen, betaler hver institution samme procentvise beløb af overskudet.

§ 2.
Landskassen anvender den i § 1 omhandlede afgift som tillæg til Fiskernes Lönreguleringsfond til betaling af lönregulering til det påmönstrede mandskab.

§ 3.
Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån fra Föroya Fiskasöla, Tryggingarsambandinum Föroyar med underafdelinger, pengeinstitutter, staten o. a. til financiering af skibsfiskernes forskudsbetaling.

§ 4.
Denne lov træder straks i kraft.

2. og 3. viðgerð 6. mars 1952.

Minniluta-uppskotið fall	10—0.
Nevndaruppskotið samtykt	14—0.

---

66. Rekonstruktión av P.f Sjóvinnubankanum.

1952, 21. februar legði lögmaður fram soljóðandi uppskot við viðmerkingum, d. 21/2-1952 við fylgiskjali:

Uppskot:

1. Lögtingið samtykkir tað í viðlagda fylgiskjali í ríkislógaruppskoti framsetta rekonstruktiónsplan fyri p/f Sjóvinnubankan.

II. Lögtingslóg um lán og ábyrgd fyri lánum til p/f Sjóvinnubankan.

gr. 1.

Til fremjingar av endurreising p/f Sjóvinnubankans er landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka upp lán og taka ábyrgd fyri láni, herundir gera avtalu um lántreytir, eftir reglum, sum niðanfyri eru fyrisettar.

gr. 2.

Tann partapeningur, sum teknaður varð av öðrum enn Tryggingarsambandinum Föroyum og l/f Föroya Fiskasölu undir fyrru endurreising bankans um heystið og veturin 1951, verður avloystur av nýggjum

II. Lagtingslov om lån og garanti for lån til p/f Sjóvinnubankan.

§ 1.

Til gennemförelse af en rekonstruktion af p/f Sjóvinnubankin bemyndiges landsstyret til på landskassens vegne at optage lån og yde garanti for lån, herunder træffe aftale om lånevilkår efter de regler som nedenfor nærmere er fastsat.

§ 2.

De af andre en Tryggingarsambandið Föroyar og l/f Föroya Fiskasöla ved bankens forrige rekonstruktion i efteråret og vinteren 1951 i banken tegnede aktier, aflöses med

partapeningi innanfyri kr. 200,000,-, soleiðis at partaeigarar, sum seta fram ynski innanfyri 6 mánaðir aftaná tann aðalfundin, sum samtykkir endurreising bankans, móti transporti til landskassan av teim fyrr teknaðu pörtum, fáa rætt til tilsvarandi virði til pari kurs í nýggjum pörtum. Um so er, at fyrr teknaður partapeningur bert er partvís inngoldin, tá ommanfyri nevnda tíðarfreist er úti, verður bert tilsvarandi minni latið út í nýggjum partapeningi.

Til fremjingar av tí í fyrra petti tilskilaða umskifti er landsstýrinum heimilað at taka upp lán uppí kr. 200.000,-.

gr. 3.

Aftrat tí ábyrgdarpeningi uppá kr. 2 mill. sum innskotin varð av landskassanum í bankan eftir lögtingslóg nr. 55 frá 20. september 1951, skrivaður niður undir endurreisingini, skjýtur landskassin inn í bankan uppí kr. 1 mill. 600 tús. í ábyrgadpeningi.

Við tí í hyggju at útvega törvandi tökan pening eftir bankalógini skjýtur landskassin kr. 1.350.000,— í bankan sum vanligt innskot.

Landsstýrinum er heimilað at taka upp törvandi lán til fremjingar av skipanini eftir 1. og 2. petti.

gr. 4.

Verður so mikið tikið út av innskotspeningi innanfyri 2 ár aftaná at henda lóg er komin í gildi, at bankin er ikki förur fyri tá at svara úttökurnar burturav rakstrarinntökum sínum ella tí hann hevur í kassanum útyvir tann pening, hann skal hava tökan eftir bankalógini, tekur landskassin ábyrgd fyri uppí kr. 5 mill., sum finansministeriið vil halda

nye aktier indenfor et beløb af kr. 200.000,—, således at disse aktionærer, der fremsender önsker herom inden 6 måneder efter den generalforsamling, hvor bankens nye rekonstruktion er vedtaget, mod transport til landskassen af de tidligere tegnede aktier, får ret til et tilsvarende beløb til pari kurs i nye aktier. Såfremt tidligere tegnede aktiebeløb kun er delvis indbetalt ved udløbet af det foran omhandlede tidsrum, udleveres kun et tilsvarende mindre beløb i nye aktier.

Til gennemförelse af den i förste stykke omhandlede ombytning bemyndiges landsstyret til at optage et lån på indtil kr. 200.000,—.

§ 3.

Udover den ved lagtingslov nr. 55, 20. september 1951 af landskassen i banken indskudte ansvarlige indskudskapital på 2 mill. kr., ved rekonstruktionen nedskrevet, indskyder landskassen et beløb på indtil kr. 1.600.000, — som ansvarlig indskudskapital for banken.

Med henblik på tilvejebringelse af de efter bankloven nödvendige likvide beholdninger for banken indskyder landskassen et beløb på kr. 1.350.000, som almindeligt indskud i banken.

Landsstyret bemyndiges til at optage de nödvendige lån til gennemförelse af ordningen i 1. og 2. stykke.

§ 2.

Sker der indenfor 2 år efter denne lovs ikrafttræden så store udtræk af bankens indskudsmidler, at denne på det pågældende tidspunkt ikke kan dække disse udtræk af sine löbende indtægter eller af, hvad den måtte have som kassebeholdning udover

bankanum til reiðar til at standa imóti möguligari úttöku við.

gr. 5.

Til kanningar av öllum viðurskiftum í sambandi við endurreisingar bankans, herundir orsakirnar til teir peningamissir, sum hava fört til afturlatingar bankans, setur lögtingið 3 mannanevnd við sorinskrivaranum sum formanni.

Tær útreiðslur sum standa av arbeiði nevndarinnar verða rindaðar úr landskassanum.

gr. 6.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

det belöb, den skal have som likvide beholdninger i henhold til bankloven, yder landskassen garanti for et belöb af indtil 5 mill. kr som banken til imödegåelse af disse udtræk måtte få stillet til disposition af finansministeriet.

§ 5.

Til undersögelse af alle forhold i forbindelse med bankens to rekonstruktioner, herunder for årsagerne til de tab, der har fört til bankens standsning, nedsætter lagtinget en kommission på 3 medlemmer med sorenskriveren som formand.

De i forbindelse med kommissionsarbejdet opståede udgifter afholdes af landskassen.

§ 6.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við lögtingssamtykt í lögtingsmáli nr. 28/1951: Kanning av fíggjarmegi Föroya, varð vald nevnd at tingast við ríkisstýrið um ymis fíggjarmál.

Nevndarlimirnir vóru:

K. Djurhuus, lögmaður,
Martin Holm, lögtingsmaður, fíggjarnevndarformaður,
Joh. M. Fr. Poulsen, lögtingsformaður, fólkatingsmaður,
P. M. Dam, lögtingsmaður, fólkatingsmaður,
J. Danielsen, postmeistari, stjóri Færö Amts Sparekasse,
P. S. Hansen, stjóri A/S Föroya Banka,
F. H. Sölvsten, stjóri Sjóvinnubankans, og
Jens Chr. Johannesen, stjóri I/f Föroya Fiskasölu.

Samráðingarnar byrjaðu í Köbenhavn 22. januar 1952.

Dagin fyri, 21. januar, varð gjört nevndini kunnugt, at p/f Sjóvinnubankin aftur var komin í figgjarligar trupulleikar.

Eftirsum báðir teir föroysku bankarnir eru neyðugur í föroyska vinnulívinum, máttu finnast útvegir fyri at fáa Sjóvinnubankan á fötur aftur.

Ríkisstýrið, eins og teir störru flokkarnir á ríkisdegi, vóru, tá ið neyðugt var við tveimum bankum, fyri at endurreisa Sjóvinnubankan.

Í gjár varð so viðlagda lógaruppskot við skjölum framlagt á ríkisdegi, og verður uppskotið allarhelst samtykt í dag.

Sum tað framgongur av lógaruppskotinum, vil ríkiskassin læna Föroya lögtingi til stimbring av bankanum:

Í ansvarligum innskotspeningi (gr. 4)	1.600.000 kr.
Í likvidum peningi (gr. 4)	1.350.000 —
og tryggja »nervös« úttrekk við	5.000.000 —
móti ábyrgd landskassans (gr. 7).	

Aftaná rekonstruktiónina í beyst hava fólk um landið teknað partapening 200.000 kr. í tí treysti, at rekonstruktiónin kom at halda. Tá meginparturin av hesum partapeninginum, eftir tí, sum upplýst er frá Sjóvinnubankanum, er teknaður í smáum, verður tað hildið rimligt, at lögtingið gevur hesum fólkum möguleika fyri at fáa henda partapeningin umbýttan við nýggjum partapeningi, sum lögtingið teknar fyri henda eldra partin, móti at lögtingið yvirtekur hann til pari kurs.

Kríggstryggingin fyri föroysk fiskiför hevur givið tilsögn um 200.000 kr. í láni til nevnda endamál.

Tekur lögtingið nevnda partin av partapeningi, samstundis sum nýggjur verður teknaðar, verður tann samlaði partapeningurin um 700.000 kr., og kann so ansvarligu innskotspeningurin samstundis minkast við 200.000 kr., sbr. viðmerkingarnar til gr. 4 í ríkislógini.

Lánið uppá 200.000 kr. eigur at verða afturrinda uppá 3 ár við skatti uppá störri inntökur.

Fyri at heimila upptöku av láni og veita ábyrgd fyri lánum sum frá, greitt, er frammanfyri standandi lógaruppskot sett fram til viðgerðar av háttvirda lögtingi.

Viðmerkjast skal, at umframt tær í ríkislógini gr. 8 nevndu 4 mill. kr. til útgerðarlán verður, uttan ábyrgd frá ríkiskassa ella landskassa, av nationalbankanum latin ein kredittur uppá 15—20 mill. kr. til föroysku bankarnar til lán til fisk á goymslu.

Tann heimild, sum givin er landsstýrinum sambart lögtingslóg nr. 77, 22. desember 1951, til at taka ábyrgd fyri láni upp til 20 mill. kr., skuldi tað soleiðis ikki verði neyðugt at nýtt.

Udkast.

Ministeriet for handel, industri
og söfart.

Forslag til lov

om

rekonstruktion af P/f Sjóvinnubankin.

§ 1.

Under de i denne lov angivne forudsætninger kan der af ministeren for handel, industri og söfart efter samråd med finansministeren ydes stötte til gennemförelse af en rekonstruktion af P/f Sjóvinnubankin som nedenfor nærmere fastsat.

§ 2.

Bankens driftsfortjeneste for året 1951 anvendes fuldtud til afskrivning på udestående fordringer.

Bankens aktiekapital, 1.500.000 kr., nedskrives med 1.485.000 kr. til 15.000 kr., således at alle aktier nedskrives forholdsmæssigt.

Bankens ansvarlige indskudskapital på 2 mill. kr. nedskrives med 800.000 kr. til 1.200.000 kr.

§ 3.

Der tegnes på Færöerne en ny aktiekapital på mindst 500.000 kr. Om tegning og kontant indbetaling af dette mindstebelöb skal der foreligge bindende tilsagn senest på dagen for den generalforsamling, på hvilken rekonstruktion i overensstemmelse med nærværende lov forelægge til godkendelse.

Uanset de i bankens nugældende vedtægter indeholdte bestemmelser om det stemmetal, der kræves til vedtægtsændringer, kan godkendelse af rekonstruktionen vedtages med simpelt stemmeflertal af de på generalforsamlingen fremmödte aktionærer.

Ved godkendelsen af rekonstruktionen træder bankens nugældende vedtægter ud af kraft, og nye vedtægter skal vedtages af de nye aktionærer og indsendes til ministeriet for handel, industri og söfart til stadfæstelse i henhold til bankloven.

§ 4.

Udover den ikke afskrevne del af den ansvarlige indskudskapital, 1.200.000 kr., indskyder Færöernes lagting et belöb på 1.600.000 kr. som ansvarlig indskudskapital for banken.

Med henblik på tilvejebringelse af de efter bankloven nödvendige lik-

vide beholdninger for banken indskyder Færöernes lagting yderligere et belöb på 1.350.000 kr. som almindeligt indskud i banken.

Om disse indskud og deres kontante indbetaling skal der foreligge bindende tilsagn senest på dagenfor den generalforsamling, på hvilken rekonstruktionen i overensstemmelse med nærværende lov forelægges til godkendelse.

De af Færöernes lagting i henhold til foranstående i banken indskudte belöb forrentes af banken med en rente, der fastsættes i bankens nye vedtægter.

§ 5.

De i § 4 nævnte belöb stilles til rådighed for Færöernes lagting som lån af den danske statskasse. Nærmere bestemmelser om disse låns forrentning og tilbagebetaling fastsættes ved aftale mellem finansministeren og Færöernes lagting.

§ 6.

I bankens nye vedtægter skal optages bestemmelser om tilbagebetalingen af bankens samlede ansvarlige indskudskapital.

Tilbagebetaling må dog ikke påbegyndes, forinden bankens lovmæssige reservefond har nået en störrelse af 100.000 kr. Til tilbagebetaling skal, medmindre ministeren for handel, industri og söfart måtte tillade afvigelser herfra, anvendes et belöb, svarende til halvdelen af bankens årsoverskud, således som dette foreligger, efter at der er foretaget de lovpligtige henlæggelser til reservefonds, og der til aktionærerne er afsat 4 pct. udbytte.

Såfremt nogen del af det til imödegåelse af tab hensatte belöb senere tages til indtægt på driftsregnskabet, skal disse tilbageförelse anvendes til tilbagebetaling af det i henhold til § 2 på den nuværende ansvarlige indskudskapital afskrevne belöb på 800.000 kr., forsåvidt bankens ökonomiske forhold efter banklovens regler iövrigt muliggör dette.

§ 7.

Sker der indenfor 2 år efter denne lovs ikrafttræden så store udtræk af bankens indskudsmidler, at denne på det pågældende tidspunkt ikke kan dække disse udtræk af sine löbende indtægter eller af, hvad den måtte have som kassebeholdning udover det belöb, den skal have som likvide beholdninger i henhold til bankloven, kan banken til imödegåelse af disse udtræk indenfor et belöb af 5 mill kr. midlertidigt trække på en af finansministeriet mod garanti af Færöernes lagting i dette öjemed oprettet konto i Danmarks Nationalbank. Om udnyttelsen af denne trækningsret træffes nærmere aftale mellem ministeren for handel, industri og söfart og Sjövinnubankin.

Forsåvidt nedgangen i bankens indskudsmidler måtte vise sig at være af varig karakter, påhviler det banken at nedbringe sine udlån, således at fornöden tilpasning mellem indskud og udlån tilvejebringes.

Belöb, som måtte blive trukket på den i 1. stykke omhandlede konto,

forrentes af banken med en rente, der fastsættes ved aftale mellem finansministeren og banken.

§ 8.

Finansministeren bemyndiges til efter samråd med ministeren for handel, industri og söfart som lån at stille indtil 4.000.000 kr. til bankens rådighed til ydelse af kortfristede udrustningslån til færöske fiskerskibe. Lånet skal tilbagebetales, efterhåndes som dette kan ske, ved realisation af skibenes fangst og saneringen af det færöske erhvervsliv.

De nærmere regler for dette indskuds anvendelse, forrentning og afvikling fastsættes af finansministeren i samråd med ministeren for handel, industri og söfart.

§ 9.

Statsministeren tilstiller inden udgangen af kalenderåret 1952 folketingets finansudvalg og Færöernes lagting en redegörelse for alle forhold i forbindelse med Sjóvinnubankens to rekonstruktioner, herunder for årsagerne tilde tab, der har fört til bankens standsning.

§ 10.

Forinden de i denne lov omhandlede rekonstruktioner af P/f Sjóvinnubankin kan træde i kraft, skal ordningen tiltrædes af Færöernes lagting.

Bemærkninger til lovforslaget.

Ved banktilsynets undersögelse af P/f Sjóvinnubankin i Thorshavn i sommeren 1951 viste det sig, at bankens tab og aktuelle tabsrisici var så store, at alle dens reserver måtte anses for tabt. Da bankens aktiekapital kun var 300.000 kr., havde banken, hvis balance var på ca. 30 mill. kr., ikke længere den i bankloven krævede egenkapital. Det blev derfor nödvendigt at tilföre banken ny kapital. På Færöerne tegnedes ny aktiekapital, således at denne bragtes op på 1,5 mill. kr., og ved hjælp af et hos staten optaget lån indsköd Færöernes lagting i banken en ansvarlig indskudskapital på 2 mill. kr. Den tidligere bestyrelse afgik, og en dansk bankmand ansattes som kommiteret i banken; den pågældende er senere ansat som administrerende direktör i banken.

Sagen gav stödet til, at Færöernes lagting anmodede den danske regering om at villa bistå lagtinget med at få foretaget en undersögelse af det færöske erhvervslivs rentabilitet m. v. Regeringen imödekom denne anmodning, og en delegation af embedsmænd udsendtes til Færöerne for i samarbejde med de færöske myndigheder at indsamle det fornödne statistiske materiale til belysning af forholdene. Om arbejdet er der afgivet en fyldig

beretning til Færöernes lagting og til regeringen. På grundlag af denne beretning optoges der forhandlinger mellem regeringen og lagtinget om, og i bekræftende fald i hvilket omfang, der herfra ville kunne ydes stötte til sanering af det færöske erhvervsliv, som beretningen havde vist nödvendigheden af. Under disse forhandlinger blev det af repræsentanterne for den danske regering stærkt understreget, at gennemförelsen af den påkrævede sanering i förste række måtte være et færösk anliggende, men at man iövrigt ikke ville stille sig afvisende overfor tanken om hjælp, såfremt der fra færösk side vistes vilje til selv at gå i spidsen med foranstaltninger til at få de ökonomiske forhold under kontrol.
Í gr. 8, 2. petti gongur út: »Um so er, at konkurranca er nóg mikil til tryggingar av fríari príslegning, verður prísur ikki hildin órímuligur,« og »Såfremt konkurrence er tilstrækkelig virksom til at sikre en fri prisdannelse, kan prisen ikke anses for urimelig.«

Í gr. 16, aftaná »5. januar 1944« verður sett: »nr. 44 frá 11. desember 1944, nr. 45 frá 11. desember 1944« og »nr. 44 af 11. december 1944, nr. 45 af 11. december 1944.«

Frá minnilutanum (J. P. Henriksen og E. Waag):

Tingið samtykkir, at prísansingin verður lögd undir landsstýrið og valutaumsitingin undir bankarnar. Minnilutin heldur ikki, at tær galdandi reglur um prísansing v. m. eiga at takast av.

2. viðgerð 2. apríl og sama dag legði tingformaðurin fram soljóðandi

Broytingaruppskot

frá P. Petersen o. fl.:

Til gr. 6, 4. petti í uppskoti landsstýrisins:

Sum nýtt punkt »i« í föroyska og danska tekstinum verður sett:
»Umboðsmanni Kvinnufelagsins, Tórshavn.«
»En repræsentant for Kvinnufelagið, Tórshavn.«

3. viðgerð 3. apríl 1952.

Minnilutauppskot (frá J. P. Henriksen og E. Waag) fall 8—0.

Broytingaruppskot (frá P. Petersen og fl.) fall 8—0.

Lógaruppskotið broytt sambart meirilutauppskotið samtykt 14—0.

71. Royndarstøðirnar í Hoyvík og á Sandi.

1952, 7. mars legði lögmaður fram soljóðandi fylgiskriv, d. 3/3—52 og skriv Föroya búnaðarfelags, d. 15. februar 1952:

Í lögtingsmáli nr. 28/1951: Kanning av fíggjarmegi Föroya hevur tingið samtykt í petti VI, at lögtingsins búnaðarnevnd skal taka upp spurningin um niðurlögu av royndarbrúkunum í Hoyvík og Traðardali.

Föroya búnaðarfelag hevur í skrivi frá 15. februar 1952 borið fram ynski um, at royndarstöðirnar ikki verða niðurlagdar, men at tær aftur fáa tey arbeiðslíkindi sum tær áður hava havt og so tá ið einaferð ein skúli kemur, at tær tá verða samskipaðar við hann.

Við hesum loyvir landsstýrið sær at leggja málið fyri tað heiðraða ting.

Tað er komið í blöðini, at uppskot er frammi um at niðurleggja royndarverkið. Tessvegna loyvir Föroya Búnaðarfelag sær hervið at biðja landsstýrið leggja hetta bræv fyri í hesum tingmáli.

Tá ið royndarstöðin í 1921 tók at starvast, var tað av búmonnum hildið vera ein stórhending, at nú skuldu föroyskir dreingir fáa næmingapláss á royndargörðunum. Tað var ýtarsta ósemja um, at Hoyvíksgarður varð valdur til hetta endamál; men um royndarstöð í Föroyum var einans semja. Nú hava royndarstöðirnar arbeitt í 31 ár. Í tí tíðini hava verið 64 næmingar har. Fleiri av teimum sita sum böndur nú, aðrir sum traðarmenn ella ognarmenn ymsastaðnis um Föroyar. Víðari eru komnar 16 frásagnir frá öllum arbeiðsárunum, uppgerð yvir allar royndar, sum gjördar hava verið. Alt hetta tilfar liggur til reiðar at prenta, um peningur fæst til vega til tess.

Tá ið nú tað sæst í blöðunum, at royndarstöðirnar hava einki nyttað, at tær hava einki gjört, at búmenn í Föroyum hava einki hoyrt frá teimum, so er hetta jú ikki beint. Tvörtur ímóti hava royndarstöðirnar skapað eitt hollt grundarlag fyri víðari arbeiði og gjögnum sítt næmingahald hava tær gjört meir enn nakað annað tiltak, at breiða kunnleika um brúksmátar og möguleikar innan fyri jarðarbrúk her. Tey fyrstu árini vórðu frásagnirnar frá royndarstöðini sendar út umkring til menn, ókeypis. Men hetta helt uppat, tí tað varð ikki tikið vara upp á tær. Síðan tá hava tær verið latnar fyri einki bæði frá royndarbrúkinum og búnaðarráðgevaranum, bæði til öll ið bóðu og til fólk sum hevur skrivað og spurt seg fyri um ting og viðurskifti, sum viðgjörd eru í royndunum.

Øll árini hevur tað verið hvörjum manni frítt at koma á royndarstöðirnar og fáa ávíst í bönum tær ymissu royndirnar, fáa svar á spurningar. Víðari hevði royndarstöðin öll tey fyrstu árini royndir úti um bygdirnar, sum vóru lagdar á bö hjá monnum, sum ynsktu tað. Og harvið eru menn

víða um oyggjarnar beinleiðis tiknir við upp í sjálvt royndararbeiðið. Á henda hátt hava royndarstöðirnar innarbeitt seg í föroyskan landbúnað, og eitt — eftir okkara viðurskiftum — stórt tal av búmonnum hava fylgt við, verið í hóslag við hetta arbeiði.

Föroya Búnaðarfelag er ikki blint fyri, at royndarstöðirnar hava ikki havt tað sama samarbeiði við næmingar og búmenn um oyggjarnar tey seinru árini sum tey fyrru, næmingar hava ikki verið í seinastuni og royndirnar úti um bygdirnar heldur ikki. Hartil eru böroyndirnar heima á royndarstöðunum fækkaðar so smátt um smátt, meðan neytatalið er ökt. Tað er afturgonga í hesum, og aftur at kemur so tað, at royndarúrslitini liggja óprenlað frá nógvum árum. Men felagið dugir ikki at síggja, at hetta afturstig skal vera orsök til at royndarbrúkið skal niðurleggjast. Hetta er væl fyrst og fremst ein peningaspurningur — og kannska ein spurningur um eftirlit við arbeiðinum. Ein peningamongd, sum rakk til í tríatiárunum til at gera tað arbeiði, sum skuldi gerast, er nú jú í dag bert laki triðingurin, og vit kunnu siga okkum sjálvum, at tað skal merkjast í arbeiðinum. Og tað er væl hetta, sum ger at partar av tí vitskapliga royndararbeiðinum er niðurlagt, meðan neytahaldið er herl uppá, fyri at bera seg frægari fíggjarliga. Og tað er væl tað sama ið ger seg galdandi við prentingini av frágreiðingum, at peningurin hevur ikki verið tökur. Aftur at hesum er tað hent síðan heimsstríðið byrjaði, at sjóvinna og lönarheiði gav so góðar inntökur, at jarðabrúk var lítisvert, menn virdu tað einki, góvu sær ikki far um tað. Tann lítli stættur av búmonnum, ið trútt og trúliga sótu eftir á sínum brúkum, kendu á mangan hátt sviðan av hesum, at ansurin fyri búnaði minkaði. Hetta gav seg til kennar t. d. í lóggávu, í prispolitikki, í peningapolitikki á ein slíkan hátt, at búnaðurin mátti kenna seg hava trongri ræsur enn aðrir stættir á fólkinum. Og afturat hámarksprísum, stoppprísum, og útfluttningsbanni kon nettupp hetta, at royndarbrúkini ikki fingu tann pening, tey hövdu fyri neyðini fyri at halda fram við tí arbeiði, tey hövdu í gongd. Og tá ið Föroya Búnaðarfelag nú fær at frætta, at tað er komið so langt, at tað er uppskot frammi um beinan vegin at taka royndarstöðirnar av; so vilja vit hervið alvorliga tala at og spyrja, um okkara háttvirda Lögting tó ikki vil vísa landbúnaðinum tær sömdir heldur at ökja studningin í tann mun, at alt arbeiði, ið fór fram á royndarbrúkunum í tríatiárunum kann koma aftur í gongd. Lat okkum fáa royndirnar úti um bygdirnar aftur, latið okkum fáa hjálparmenn og næmingar aftur til hetta arbeiði, og takið ikki hesar framtíðarstuðlar undan okkara fyrndargamla vinnuveg.

Tilsíðst skulu vit minna á, at einaferð fyrr hevur Föroya Lögting í hvussu er meðvirkað til at niðurleggja eitt líknandi tiltak í föroyskum landbúnað. Tað var skúlin, ið Jóannes Patursson stríddist við at hava í Kirkjubö, eitt tiltak, sum setti dúglig sporð í landbúnaðin víða um oyggjarnar, og hevði hann fingið tann almenna stuðul, ið törvaði, so hövdu kanska aðrir kostir verið fyri búmonnum her enn tað er í dag.

Tað er eitt fast ynski hjá öllum, ið umboða landbúnaða her, at royndar-

brúkini ikki verða niðurlögd; men at tey aftur fáa tey arbeiðskor, tey hava havt, og so tá ið einaferð ein skúli kemur, at tey tá verða samskipaði við hann.

1. viðgerð 10. mars og 4. apríl legði búnaðarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Sum tað eisini sæst av framlöguskrivi landsstýrisins hevur tingið samtykt í lögtingsmáli nr. 28/1951: Kanning av fíggjarmegi Föroya undir petti VI, at lögtingsins búnaðarnevnd skal taka upp spurningin um niðurlögu av royndarbrúkunum í Hoyvík og Traðardali.

Orsakað av hesum hevur Föroya búnaðarfelag í skrivi frá 15. februar 1952 heitt á landsstýrið við ynski um, at royndarbrúkini verða ikki niðurlögd, men at tey aftur fáa tey arbeiðskor, tey áður hava havt, og so at tá einaferð ein skúli kemur, at tey verða samskipaði við hann. Tað verður annars vist til skrivið, sum prentað sum skjal til fylgiskriv landsstýrisins.

Í skrivi frá 29. januar 1952 hevur Tórshavnar uttanbíggja kommuna vent sær til landsstýrið við áheitan um, at kommunan fær Royndarstöðina í Hoyvík til keyps ella leigu, um so verður, at hon verður yvirtikin og niðurlögd sum royndarbrúk.

Í brævinum verður skilað til, at kommunan við slíkum keypi fær tryggja monnum torvskurð og útrakstur. Hesin rættur verður best varðveittur, um kommunann sum almennur stovnur fær ræðið yvir garðinum.

Lagt verður aftrat, at ein annar spurningur er sera átroðkandi fyri kommununa, nemliga höli til skúla. Hesi viðurskifti eru vánalig í Hoyvík. Skúli verður hildin í leigaðum höli, sum er ovlítið og lærarinnan má búgva í Havn, tá eingi lærarahús eru.

Húsini á Royndarstöðini eru væl bóskandi til skúla- og lærarahús og hesin spurningur hevur so stutt stóran áhuga í kommununi.

Málið hevur síðani verið til ummælis hjá J. Hunsgaard, royndarstjóra, Hoyvík, o gí skrivi frá 24. marts 1952 hevur hann givið ummæli.

Hann sigur í ummælinum, at honum hevði dámt betur, um báðar royndarstöðirnar fingu loyvi at virka í felag, men skal onnur teirra leggjast niður, so má tað verða stöðin á Sandi, tí fíggjarliga nett hevur stöðin í Hoyvík góðan fyrimun, stuðlað av 6 mörkum uttangarðs og hartil góð likindi at sleppa av við mjólk dag og dagliga til smáuligan pris.

Hann skilar til, at frú Dahlberg í Traðardali hevur fingið skipan í lag við landsstýrið, hareftir hon hevði fingið raksturin av brúkinum hetta árið út. Soleiðis sigur hann, at brúkið í Traðardali ikki kann leggjast niður beilt. Hann skjýtur so upp, hvussu mikið hann heldur fara at törva á fíggjarlógini í 1952/52 — tilsamans kr. 15.277 ÷ kr. 1.000,— í rakstrarinntökum.

Um Hoyvík sigur hann, Um so er, at royndarstöðin aftur skal til at halda næmingar, skjýtur hann upp, at fíggjarætlanin fyri royndarstöðini 1952/53 verður soleiðis broytt:

Lön til 2 næmingar ... ... kr. 2.400,—
Kostarhald fyri teir + húshjálp ... ... — 5.840,— kr. 8.240,—.

Frá hesum kr. 8.240,— skulu so kr. 2.280,— í ætlaðari hoykonulönum og kr. 700,— í rossarökt dragast ella tilsamans kr. 2.980,—. Eftir hesum skuldi so raksturin av 2 næmingum ökt útreiðslurnar við kr. 5.260,—.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 1952/53 frá 15. juni 1951 hevur royndarstjórin skotið upp at veita stöðini í Hoyvík kr. 33.200,—. Hetta tal má so hækkast til kr. 37.460,—.

Verða so náðar kostnaðarætlaninar lagdar saman, verða útreiðslurnar:

Í Traðardali	kr. 14.277,—
Í Hoyvík	— 37.460,—
	kr. 51.737,—

Endiliga skilar royndarstjórin til, at landsstýrið er av tí áskoðan, at tær viðbötur sum játtaðar eru royndarstjóranum — tilsamans eru 50 % av bruttoinntökuni, skulu ganga av tí veitta studninginum, má studningurin hækkast við um kr. 60.000,—.

Meirilutin (J. P. Davidsen, J. Fr. Øregaard og A. Sörensen):

At seta royndarbrúkini aftur í arbeiðsstand, sum tey fyrr hava verið, og sum Búnaðarfelagið í sínum brævi til landsstýrið ynskir, skal nógvur peningur til. Har rökka ikki tey 42.000 kr. sum settar eru á fíggjarætlanina fyri 1952/53, — men tað dupulta ella trídupulta — fyri at munandi royndir kunnu verða gjördar.

Stjórin fyri royndarbrúkinum í Hoyvík hevur fyri nevndini sagt, at bert 1 ha av bönum, sum brúkið hevur, er plógjörð so har er lítið öki at hava royndir á og minni at læra næmingar at arbeiða við tíðarhóskandi amboðum. At tað hóskandi öki hevur verið so lítið at arbeiða á, kann vera ein orsök til, at royndirnar ár eftir ár eru so nógv minkaðar, við tað, at ein stórur partur ár eftir ár hava ligið í opnari veltu og harvið havt mest gamla mold til royndir. Brúkini Hoyvík og Traðardalur hava nú í nógv ár mest verið drivin sum vanlig bóndabrúk og fyri Hoyvík við tí lítla arbeiðsöki eru tað lítil líkindi til annað. Tað má tí haldast, at tað almenna ikki undir hesum umstöðum longur kann lata studning til ein 6-markagarð, sum Hoyvík, sum í sær sjálvum er eitt gott livibreyð fyri eina familju.

Tað ið jarðarbrúkinum törvar er ein búnaðarskúli, hvar næmingar kunnu læra vanligt bóndabrúk innan og uttangarðs og læra at brúka tíðarhóskandi amboð og eisini royndararbeiði kann fara fram. Til hetta krevst tó hóskandi garður. Hesum viðvíkjandi skal vísast til tingmál nr. 64/1951/52.

búnaðarskúlamálið, har nevndin heldur seg ikki, sum peningavánirnar eru nú kunna mæla tinginum til at taka henda spurning fyri, men stöðga til tíðirnar javna seg nakað aftur og fíggjarumstöðurnar verða rúmari.

Nevnast skal, at í brævinum frá royndarstjóranum til nevndina sæst, at landsstýrið hevur latið einkjuna eftir Johan Dahlberg fiogið raksturin av brúkinum í Traðardali undir hond hetta árið út, tó uttan royndir.

Tey royndarúrslit sum liggja fyri frá fleiri árum og ikki eru prentaði, verða at lata prenta og sendast út.

Av tí sum her er flutt fram kann meirilutin ikki mæla tinginum til undir hesum umstöðum at halda fram við royndarbrúkunum, men ræður til at leggja tey niður fyri fyrst, og at tey óprentaðu royndarúrslitini verða prentaði. Samsvarandi hesum setur meirilutin hetta uppskot til tingsins samtykt.

Minnilutin (S. Danielsen og P. Petersen) kann ikki mæla tinginum til at taka avgerð nú um niðurlegging av royndarbrúkunum. Sum tað sæst í álitinum er serlig skipan gjörd við frú Dalberg um nýtsluna av royndarbrúkinum í Traðardali hetta árið út.

Tað vera tí stundir til eina gjöllari umhugsan av spurninginum yvirhövur í komandi vanligu tingsetu.

Tað er stöða minnilutans, at royndarbrúk má haldast uppi og útbyggjan mest möguligt til landbúnaðarmálið er framt.

Uppskot.

Frá meirilutanum (J. P. Davidsen, J. F. Øregaard og A. Sörensen)

1) Royndarbrúkini Hoyvík og Traðardalur verða at leggja niður fyri fyrst frá 1/1 1953.
2) Tey óprentaðu royndarúrslitini verða at lata prenta og senda út.

Frá minnilutanum (S. Danielsen og P. Petersen):

Málið verður tikið upp aftur til viðgerðar á komandi ólavsökutingi.

2. viðgerð 4. apríl.

Uppskot meiralutans	p. 1)	samtykt	14—6.
— —	p. 2)	—	16—0.
— minnilutans		fall	12—0.

72. Løgtingslóg um broytingar í leigulógini.

1952, 6. marts legði H. Djurhuus, landsstýrismaður, fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum:

Uppskot	*Forslag*
til lögtingslóg um broyting í bráðfengis reglum nr. 41 frá 2. desember 1940 um leiguviðurskifti.	*til lagtingslov om ændring i midlertidige bestemmelser nr. 41 af 2. december 1940 om lejeforhold.*
gr. 1.	§ 1.
Í gr. 1, 2. petti í bráðfengisreglum nr. 41 frá 2. desember 1940 fara pettini 1 og 2 út.	I § 1, 2. stykke i midlertidige bestemmelser nr. 41 af 2. december 1940 udgår punkter 1 og 2.
gr. 2.	§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.	Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í tingmáli nr. 70/1951: um valuta og prísir hevur landsstýrið sett uppskot fram, at m. a. kunngerð nr. 6 frá 23. marts 1943 um lön- og prísstopp verður avtikin.

Eftir gr. 4 í hesi kunngerð er broyting gjörd í galdandi leigulóg nr. 41 frá 2. desember 1940, m. a. soleiðis at leigutalvur um einstök verilsi og möbleraðar íbúur ella partar av besum er undir leigulógini.

Um so verður, at tingið samtykkir uppskot landsstýrisins, verður tað neyðugt at samtykkja einsljóðandi reglu sum gr. 4, 1. petti sum uppískoyti til leigulógina.

So statt loyvir landsstýrið sær at seta fram lógaruppskot samsvarandi.

1. viðgerð 10. marts og 1. apríl legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Landsstýrið hevur í tingmáli nr. 70/1951: Um valuta og prísir sett uppskot fram í gr. 16 um at taka av ymsar kunngerðir og lögtingslógir, millum annað kunngerð nr. 6 frá 23. marts 1943 um lön- og prísstopp.

Gr. 4 í hesi kunngerð viðvíkjur leignlógini og eftir petti 1 verður gjörd tann broyting í kunngerð nr. 41 frá 2. desember 1940, at lógin eisini umfatar einstök verilsir og möbleraðar íbúir ella partar av hesum, ið vóru undantikin í kunngerðini frá 1940.

Tað verður tí neyðugt at samtykkja einsljóðandi reglu sum gr. 4, 1. petti sum uppískoyti til kunngerð nr. 41 frá 2. desember, um uppskot landsstýrisins í tingmáli nr. 70/1951 verður samtykt, og hevur landsstýrið tí sett uppskot fram samsvarandi.

Tingið hevur beint málið í lógarnevndina, ið hevur viðgjört málið.

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Í gr. 4, 3. petti í kunngerð nr. 6 frá 23. marts 1943, er fyrisett, at leigusáttmálar um hús ella húsrúm, ið ikki hava verið leigað út fyrr, skulu verða skrivligir og góðkennast av leigunevnd ella prísansingarráðnum fyri at hava gildi, og at leigarin hevur skyldu at senda sáttmálan inn til góðkenningar áðrenn 14 dagar aftaná, at sáttmálin er undirskrivaður.

Nevndin heldur, at hesar reglur eiga at setast í leigulógina frá 2. desember, tó við broytingum, at tær skulu umfata allar leigusáttmálar og at treytirnar um gildi ganga út og sektarreglur verða settar í staðin.

Samsvarandi hesum setir nevndin fram fylgjandi

Uppskot

til lögtingslóg um broyting í bráðfengis reglum nr. 41 frá 2. desember 1940 um leiguviðurskifti.

gr. 1.

Í gr. 1, 2. stk. í bráðfengis reglum nr. 41 frá 2. desember 1940 fara pettini 1 og 2 út.

gr. 2.

Í gr. 1 verður sett sum nýtt stk. 3: Sáttmálar um leigu av húsum ella húsrúmum skulu verða skrivliga uppsettir og góðkennast av leigunevndini ella prísvaldinum, har eingin leigunevnd er.

Eigarin hevur skyldu at innsenda sáttmálan til góðkenningar áðrenn 14 dagar aftaná at sáttmálin er undirskrivaður.

Brot móti hesum reglum koma undir sekt. Sektirnar fara í landskassan.

til lagtingslov om ændring i midlertidige bestemmelser nr. 41 af 2. december 1940 om lejeforhold.

§ 1.

I § 1, 2. stykke i midlertidige bestemmelser nr. 41 af 2. december 1940 udgår punkter 1 og 2.

§ 2.

I § 1 indføjes som nyt stk. 3: Kontrakter om udleje af hus eller husrum skal oprettes skriftligt og godkendes af lejenævnet eller prismyndighederne, hvor lejenævn ikke er nedsat.

Det påhviler ejeren at indsende kontrakten til godkendelse inden 14 dage efter underskriften.

Overskridelse af disse bestemmelser straffes med böder, der tilfalder landskassen.

gr. 3.

Í gr. 11, 4. stk. gongur orðið »Statskassen« út og í staðin verður sett »Landskassin«.

§ 3.

I § 11, 4 stk. udgår ordet »Statskassen« og i stedet sættes »landskassen«.

gr. 4.

Henda lög kemur í gildi beinanvegin.

§ 4.

Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 2. apríl og 3. viðgerð 3. apríl 1952.

Uppskot nevndarinnar samtykt 15—0.

---

73. Fíggjarætlan fyri fátækragrunn løgtingsins.

1952, 7. marts legði lögmaður fram soljóðandi uppskot við viðmerkingum, d. 6/3 1952:

Landsstýrið loyvir sær við hesum at leggja fram fyri lögtingið niðanfyri standandi uppskot og skal mæla til, at uppskotið verður samtykt.

Uppskot.

Fátækragrunnur Lögtingsins 1952/53.

	Roknskapur 1950/51	Fíggjarætlan 1952/53
Inntökur:		
1. Arvagjald	39.490,54	35.000,—
2. Gjöld fyri handilsloyvi v. m.	11.723,65	8.000,—
3. Sektir	4.540,00	3.000,00
		46.000,00
Útreiðslur:		
1. Styrk til kommunur		10.000,00
2. Munur		36.000,00
		46.000,00

Viðmerkingar:

Seinasta fíggjarár hevði grunnurin ongar útreiðslur, av tí at alimentatiónspeningurin, sum var tann størsta útreiðslan fyri árið 1949, kr. 13.083,21, nú sbr. lögtingslóg nr. 16, 12. januar 1950, eigur at verða goldin av landskassanum. Fyri fíggjarárið 1951/52 eru sbr. gr. 24. 3. á fíggjarlógini settar kr. 65.250,— til hetta endamál.

1. viðgerð 10 marts og 13. marts legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Alit.

Sum viðmerkingar landsstýrisins siga frá var áður alimentasjónspeningurin størsta útreiðsla grunnsins í 1949 kr. 13.083,21. Sambart lögtingslóg verður nú hesin peningur goldin úr landskassanum, og seinasta ár var eingin umsókn frá kommunum til grunnin. So statt heldur fíggjarnevndin, at grunnurin eigur at klára seg við egnum inntökum taldar í uppskotinum til 46.000 kr. og setur fram hetta

Uppskot.

Lögtingið samtykkir landsstýrisins uppskot við ta broyting, at styrkur til kommunurnar 10.000 kr. gongur út.

2. viðgerð 14. marts og 3. viðgerð 17. marts 1952.

Uppskot landsstýrisins sum broytt sambart nevndaruppskot samtykt 18—0.

---

74. Fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin.

1952, 7. marts legi lögmaður fram soljóðandi uppskot við viðmerkingum, d. 6. marts 1952:

Uppskot.

	Roknskapur 1950/51	Fíggjarætlan 1952/53
Inntökur:		
1. Endurgjald fyri Tíggjund	7.800 kr.	7.800 kr.
2. Innfluttningsgjöld	20.000 —	20.000 kr.
3. Eykastudningur úr landskassanum	25.000 —	25.000 —
4. Munur		25.269 —
		78.069 kr.
Útreiðslur:		
A. Vanligar umvælingar (*viðm.*)	23.774,33 kr.	55.500 kr.
B. Kirkjugarðar	3.275,40 —	5.000 —
C. Prestafluttningur (*viðm.*)	8.000,00 —	8.000 —
D. Ymist	2.416,52 —	1.500 —
E. Studningur til nýggjar kirkjur (*viðm.*) ...		8.069 —
		78.069 kr.

Viðmerkingar:

Ad A. Umvöling av Havnar kirkju er sett til kr. 15.500, og síðani eru 20 aðrar kirkjur, sum sbr. sýn skulu umvælast, m. a. Tvörá kirkja og Sandavágs kirkja, 4.000 kr. hvör.

Ad B. Landsverkfröðingurin upplýsur, at hann hevur í umbúnað at gera nýtt uppskot til broyting í studningarreglunum, sum ikki eru tíðarhóskandi, t. d. kann studningurin til cementgarðar verða munandi hægri enn til lagaðar garðar, og hetta hevur onganlíð verið ætlanin, at so skal vera. Eftir teim nýggju reglunum má roknast við væl hægri studningi; tí verður skotið upp 5.000 kr.

Ad E. Til Miðvágs kirkju 5.000 kr. sbr. lögtingssamtykt 15/3 1951 og til Elduvíkar kirkju kr. 3.068,81, av tí, at studningurin 10.000 kr., sum játtaður varð í 1947 var ov lítil.

1. viðgerð 10. marts og 26. marts legði kirkjunevndin fram soljóðandi

Álit.

Föroya Landsstýri hevur sent lögtinginum uppskot til fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin fyri fíggjarárið 1952/53.

Málið hevur verið til viðgerðar í kirkjunevndini.

Av uppskotinum sæst, at um grunnurin skal verða förur at gjalda tær vanligu útreiðslurnar, er neyðugt, at hann fær ein eykastudning úr landskassanum uppá ca. kr. 25.000,—. Tá er ikki roknað við nökrum stórhvalagjaldi sum innlöga. Studningur til nýggjar kirkjur er settur til kr. 8.069,— , men er hesin studningur sambart viðmerkingar bundin frammanundan til Miðvágs og Elduvíkar kirkjur, so verunliga er eingin peningur til hetta endamál. Tað skal viðmerkjast, at 21. marts í ár átti grunnurin í rokning við landskassan kr. 11.229,45.

Uppskot.

Mælt verður til at samtykkja landsstýrisins uppskot til figgjarætlan fyri kirkjugrunnin fyri figgjarárið 1952/53.

2. viðgerð 27. marts og 3. viðgerð 31. marts 1952.

Uppskot landsstýrisins samtykt 19—0.

---

75. Marshall-lán til Skipafelagið Føroyar.

1952, 15. marts lögdu tingmenninir P. M. Dam og S. P. Zachariasen fram soljóðandi skriv d. 10. marts s. á.:

Nýggja »Tjaldrið«, ið bygt verður á Aalborg Værft, kostar eftir sáttmálanum kr. 8.065.000,00. Felag okkara skuldi umframt sjálvt gjalda radar, öll radiotól, ekkolodd og alla útgerð, ið krevist til fluttning av ferðafólki og góðsi. Ætlað varð tá, at skipið kom at kosta 9 mill. kr., tá ið tað varð liðugt at sigla.

Felagið fekk tá fyrireika hesi lán:

3 mill. kr. móti 1 veðhaldi frá Ríkiskassanum í 20 ár til 4½ % rentu (árligur avdráttur kr. 230.000.00).

3 mill. kr. móti 2 veðhaldi og Lögtingsábyrgd frá Aalborg Værft í 10 ár til 6 % rentu (árligur avdráttur umleið kr. 425.000,00) og skuldi so sjálvt skaffa frestandi 3 mill. kr.

Orsakað av, at vit eftir sáttmálanum skuldu gjalda hækkandi arbeiðslönir á skipasmiðjuni og at danska skipasýnið nú krevur störri tryggjan

móti bruna umborð, kemur skipið at kosta 1 mill. kr. meira, enn upprunaliga roknað við, og um tað skal verða möguligt, at halda áfram við byggingini, verður tað neyðugt, á einhvönn hátt, at skaffa henda pening til vega, og neyðugt verður eisini, at tílíkt lán verður langfrestað, tí longu áður hevur felagið átikið sær árlig gjöld uppá umleið 650.000 kr.

Vit hava tingað við ta nevnd, ið var í Keypmannahavn fyri kortum, um hendan spurning og skotið upp, at vit annaðhvört fáa ökt um lánið frá danska ríkiskassanum, ella at vit fáa hesa milliónina av tí Marshall-hjálp, ið verður lutað Föroyum. Nevnd felagsins hevur av nýggjum umhugsað spurningin og er samd um, at felagið undir ongum umstöðum er fört fyri, at skaffa meira, enn tær upprunaligu ætlaðu 3 mill. kr.

Tekning av obligatiónsláni og partapeningi fer nú fram, men orsakað av peningaumstöðunum í lötuni kunna vit ikki rokna við stórum úrsliti og Lögtingið hevur ikki enn tikið stöðu til, um tað vil tekna sín part (280.000 kr.) av tí úthjóðaða partapeningi.

Roynt verður at selja gamla »Tjaldur«, men enn er einki fast boð, so her kunna vit ikki í lötuni rokna við tökum peningi. Eisini skal hetta nú til umvælingar, ið neyvan koma at kosta undir 200.000 kr.

Komið er so langt við byggingini í Aalborg, at avgerð má verða tikin, um haldast skal áfram og um hetta vil nevnd felagsins lata lögtingið sum största partaeigara taka avgerð. Um skjótt verður borið at, er gjörligt at selja og væl av peningi kann ivaleyst fáast burtur úr. Nevndin ræður tó frá at selja, tí gamla »Tjaldur« er gamalt og ótíðarhóskandi, dýrt í rakstri, meðan eingin ivi er í, at nýggja skipið sjálvt vil kunna gjalda öll lán aftur, áðrenn 20 ár frá í dag, sjálvt um tað kanska verður trupult tey fyrstu árini.

Skipaferðslan til og frá Föroyum er týðningarmikið lið í vinnulívinum og kann verða loyst, uttan at tað kemur at kosta tí almenna nakran heinleiðis studning. Eisini hevur Lögtingsins Fíggjarnevnd í brævi dags. 17. marts í fjör tikið ta fyribils stöðu, at hon var sinnað at fáa lögtingsábyrgd fyri láni, um felagið kundi prógva, at tað kundi fullföra nýbygningin við eini ábyrgd frá Lögtinginum uppá 1 millión kr. aftrat og vísa á, hvar hesin peningur er tökur. Vit hava sent Landsstýrinum hrævi frá Aalborg Værft, sum váttar at byggingin kann verða gjögnumförd fyri henda pening aftrat, men hava ikki kunnað ávíst, hvar peningurin er tökur.

Felagið biður tí heiðraða Lögting taka avgerð í hesum spurningum sum skjótast og er tað okkara vón, at teir verða loystir so sum vit hava skotið upp. —

Við hávirðing.
Z. Nielasen.

1. viðgerð 17. marts og 1. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Í skrivi, dagfest 10. marts 1952, sigur Skipafelagið frá, at nýbygningur felagsins á »Aalborg Værft« verður 1 mill. kr. dýrari enn ætlað, og biðnr lögtingið hjálpa sær við at fáa henda pening tilvega.

Nevndarformaðurin hevur samráðst við formannin fyri skipafelagsnevndini, harra Mitens, ið sigur soleiðis frá:

Nýbyggningurin á Aalborg Værft, ið fer úr barkastokki í juni h. á., og verður liðugur um nýársleitið, kostar:

Eftir sáttmála	8.065.000 kr.
vegna hækkaða arbeiðslön	600.000 —
Fyriskipanir móti brunavanda	435.000 —
	9.500.000 kr.

Vissað er ríkislán 1. veðhald	3 mill. kr.
lán frá Aalborg værft 2. veðhald	3 mill. kr.
Skipafelagið Föroyar hevur goldið	2 mill. kr.
	8 mill. kr.

So statt resta 1,5 mill. kr. í at fáa tilvega. Skipafelagsið heldur seg kunna fáa tilvega við tekning av obligatiónslánum her og í Danmörkini og við hækkan av partapeninginum ½ mill. kr. Gamla »Tjaldur« verður at selja, og fæst fyri tað um leið 1 mill. kr., men harav skal nýtast til avdrátt til skipasmiðjuna í Aalborg 600.000 kr. — Tað er neyðugt at vissa felagnum nýtt lán uppá 1 mill. kr.

Fíggjarnevndin er alt annað enn fús til at mæla tinginum til at átaka sær störri ábyrgd fyri Skipafelagnum, vegna tess nýbyggningurin verður at kosta 9,5 mill. kr., og farmagjaldið er nú fallandi.

Tað eru um leið 2 ár, síðan fíggjarnevnd og landsstýrið bóðu felagið fara undir at tekna nýggjan partapening, men ongantíð hava vit fingið frágreiðing um, hvussu nógvan partapening felagið hevur savnað saman. Heldur ikki í seinasta skrivi frá Mitens fáa vit at vita, hvussu stórt obligatiónslánið verður, og hvussu nógvan partapening felagið hevur teknað.

Fíggjarnevndin kann tí ikki mæla tinginum til at taka nakra avgerð, fyrrenn hesir spurningar eru greiddir.

Hin vegin heldur nevndin tað vera harmiligt at selja skrokkin. — Umhugsaði tí nevndin eitt tríbýti av milliónini millum lögtingið, felagið og statin og at tekna henda lögtingspart sum nýggjan partapening.

So statt setur meirilutin í fíggjarnevndini fram einki uppskot, men hevur valt Kallsoy, Joh. M. Fr. Poulsen og M. Holm til saman við harra Mitens at kanna möguleikarnar fyri at fáa lán úr A/S Föroya Banka, um landsstýrið og fíggjarnevnd halda tað vera ráðiligt og möguligt at fáa nevnda tríbýti í lag.

Minnilutin (Dam og Kallsoy) er samdir við meirilutan um tey í álitinum framsettu sjónarmið. Tó setur hann fram hetta

Uppskot.

Lögtingið samtykkir:

I. At seta 333.000 kr. sum nýggjan partapening í p/f Skipafelagið Föroyar.

II. At nýta 333.000 kr. av lögtingsins Marshallpeningi til hetta endamál, um hesin peningur ikki fæst tilvega á annan hátt.

2. viðgerð 3. apríl og 3. viðgerð 4. apríl 1952.

Uppskotið fall 6—0.

---

76. Broyting í reglunum um sjómarkið undir Føroyum.

1952, 19. marts legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Nevndarálit.

Klakksvíkar útróðrafelag hevur í skrivi frá 15. februar 1952 heitt á landsstýrið um at royna at stíla so fyri, at bestu gýtingargrunnar undir Föroyum verða friðaðir móti fiskiskapi við troli.

Í hesum og í skrivi frá 20. s. m. hevur felagið sent tinginum áheitan um beinanvegin at lýsa, at sjóöki undir Föroyum rökkur út til 4 fjórðingar úr ystu nesum, tongum og hólmum og at hetta verður undir jövnum eftirliti.

Í skrivi frá 5. marts 1952 hevur Skopunar útróðrafelag heitt á tingið í somu örindum.

Umsóknarnevnd tingsins hevur við áriti frá 1. mars 1952 sent fiskivinnunevndini málini til umhugsunar.

Í lögtingslóg nr. 20 frá 28. mars 1949 hevur tingið fyrisett reglur um friðing av gýtingargrunni.

Í gr. 1 stendur: »Landsstýrið verður heimilað at áseta, at havöki, avmarkað av 62° 35' n. 6° 30' v. og sjómarkinum verður friðað fyri allan fiskiskap frá Föroyum í tíðarskeiðinum 20. mars til 20. apríl treytað av, at onnur lond, ið fiska undir Föroyum, eisini friða öki.«

Hvussu henda regla hevur verið aktað av föroyingum og öðrum er ikki nevndini kunnugt.

Spurningurin um sjómarkið hevur allarstörsta áhuga ikki bert her á landi, tykist tað, men millum allar fiskivinnutjóðir yvirhövur, síðani millumlanda dómstólurin í Haag gjördi trætuna av millum Bretlands og Noregs um sjómarkið í Norður Noreg við dómi frá 18. desember 1951.

Sum vit hava sæð, liggur mesti týdningurin av hesum dómi í spurninginum um grundlinjur, t. v. s. hvussu sjómarkið hereftir skal setast. Hartil kemur so, at dómurin hevur góðkent 4 fjórðingsmarkið í öllum Noreg.

Eftir ætlan nevndinnar kann tingið ikki av eintingum lýsa broytingar í sjómarkinum kring Föroyar.

Hesar reglur um sjómarkið undir Föroyum og undir Íslandi eru bundnar av millumlandasáttmálanum frá 24. juni 1901, men nevndin heldur tað vera rætt og eisini átroðkandi neyðugt at taka upp spurningin, soleiðis at tingsins og Föroya stöða yvirhövur kann vera greið, soleiðis at sjómarkið undir Föroyum má vera tað sama sum í Noreg og mett eftir somu grundlinjum sum teim, sum fyrisettar eru av millumlanda dómstólinum í Haag 18. desember 1951 og nevndin mælir til at geva landsstýrinum upp í hendi at fyrireika málið og seta tað fram sum skjótast.

Uppskot.

Tingið biður landsstýrið fyrireika málið um broyting í reglunum um sjómarkið undir Föroyum og at reisa tað sum skjótast.

12. mars hevði tingformaðurin lagt fram og heint soljóðandi skriv frá Tjóðveldisflokkinum, d. 1. mars 1952 til fiskivinnunevndina:

Við teirri vend í huga sum komin er í altjóðarættinum um sjómarkið aftaná dómin í Haag í ósemjuni millum norðmanna og bretlendinga og við teim avleiðingum í huga sum av hesum dómi kunna koma at standast, mælir flokkurin til at allir spurningar í hesum máli sum kunna hugsast at fáa týdning fyri Föroyar og föroyska fiskiveiði serstakliga, nú beinanvegin verða tiknir upp til umhugsunnar og samráðingar við avvarandi stjórnarvöld.

2. viðgerð 19. mars 1952.

Uppskot nevndinnar samtykt 22—0.

77. Sildaveiða á firðum.

1952, 20. mars legði fiskivinnunevndin fram soljóðandi

Umhugsan.

Í tingsetuni 1950 kom áheitan til lögtingið frá 552 íbúgvarum á Skálafirði, Funningsfirði, Kaldbaksfirði, Sundalagnum og norðan fyri Streym um at friða viðkomandi firðir fyri snurpu- og ringnót.

Í februar 1951 kom mótadressa við 233 undirskriftum. Málið var viðgjört í fiskivinnunevndini, sum setti ymisk uppskot fram, sum öll vóru feld av tinginum.

Peter Chr. Jacobsen, Skipanes, hevur av nýggjum reist málið við soljóðandi skrivi til lögtingið:

»Eg loyvi mær í samband við ta áheitan, sum í vár kom til háttvirda ting og var undirskrivað av o. u. 550 monnum, um at friða viðkomandi fjarðar ímóti sildaveiðu við snurpu og ringnótum og tílíkum amboðum, ið vit meina eru meira hóskandi á víðum sjógvi enn á deyðavatni, at biðja tykkum um, vælvilligast at taka sakina upp aftur til viðgerðar í hesari setuni. Sum kunnugt vóru tær flestu undirskriftirnar av Skálafirði, tí vil eg nevna, at vit eru fornoyðaðir, um bert okkara fjörður verður friðaður, um íbúgvarnir aðrar staðir ikki ynskja friðing, vit leggja einki í um t. d. streymfirðirnir ella víkirnar ikki verða friðaðar. Tað nýtist mær ikki at nevna meira um lann stóra týdning hetta hevur fyri garnveiðuna á Skálafirði og fyri útróðurin og fiskarfið í síni heild, men eg vóni, at tit heiðraðu tingmenn taka undir við okkum við vælvild.«

Við skrivinum fylgdi soljóðandi viðmæli av 20/2 1952 frá sóknarstýrinum fyri Nes kommunu:

»Kommunustýrið hevur móttikið bræv tygara av 1. februar hetta ár viðvikjandi áheitanini í fjör frá garnafiskarunum til Föroya Lögting um at nokta fyri nýtslu av snerpinótum inni á Skálafjörðinum.

Stýrið hevur nú viðgjört málið og var har viðtikið at úttala, at av tí at sildafiskiskapurin við görnum altíð hevur havt stóran týdning fyri íbúgvarnar við Skálafjörðin, og tá ið tað — nú royndir hava verið gjördar við snerpinótum frá stórum skipum — hava verið týðulig tekin til, at garnfiskararnir fáa nógv minni av sild, vil stýrið taka undir við garnafiskarunum um at mótmæla nýtslu av slíkum fiskitólum inni á Skálafirðinum.«

Áheitanin hevur eisini fingið besta viðmæli frá kommunustýrinum í Sjóvar sókn, sum soljóðandi skriv vísir:

Sum kunnugt bleiv ein áheitan í fjör send til Lögtingið um at seta bann fyri sildaveiðu við snurpu og ringnótum á teimum trongstu firðum. Áheitanin var undirskrivað av ca. 550 monnum serstakliga av Skálafjörðinum, men fekk hon ov lítlar sömdir í tinginum. Aftur í ár havi eg royni at fáa tingið at taka sakina uppaftur, og er tað mær lovað. At nevndi veiðuháttur er skaðiligur fyri garnaveiðuna er eingin ivi í, serliga tí at tað vísir seg at sildin ræðist illa ekkolod. At málið er av största týdningi fyri bæði okkum, ið veiða við görnum og eisini og ikki minst fyri agnforsýningina og soleiðis ein landasak eru ivaleyst teir flestu einigir um. Loyvi eg mær tí at spyrja tykkum heiðraða sóknarstýri á Strondum um tit vilja gera okkum garnafiskarum á Skálafirðinum tann stóra beina at geva áheitanini tykkara viðmæli. Eg vóni at vit eisini fáa viðmæli frá Nes sóknarstýri.

Virðingarmest
Peter Jacobsen, Skipanes.

Sjóvar sóknar kommunustýri gevur hesi áheitan sitt allarbesta viðmæli.

Sjóvar sóknar kommunustýri
Strendur,
P. J. Simonsen.«

Umsóknarnevndin hevur 18. februar 1952 beint málið í fiskivinnuevnd lögtingsins. Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (P. M. Dam, I. H. Danbjörg og Jens Chr. Olsen) förir fram, at nýtsla av ringnót og snurpunót ætlast at styggja sildina í firðunum í Föroyum, og tekin eru til, at tann gamla garnadriftin er tarnað í stórum síðsta ár.

Í 1950 varð eksporterað 10.000 tunnur av saltsild, mest alt fangað við görnum á firðunum, og í sama ári varð sum vanligt seld nógv agnsild til heimaútróðurin. Her kann leggjast aftrat, at um marknaðarviðurskiftini vóru lögd betri til rættis, bæði innan- og uttanlanda, og við hjálp av nútímans frystihúsum gjört tað möguligt altíð at kunna sloppið frá veiðuni, og til ein hóskandi prís, kundi nógvar ferðir meira verið veitt.

Hesin gamli veiðuháttur er nógv stimbraður í seinastuni við tað, at tað nú verða brúktir stórir maskinbátar, ið kunna rökja hesa drift í öllum veðri.

Haraftrat kemur, at garndriftin er býtt sundur á nógvar hendur, hjá mongum manni er hendan vinna hövuðsvinna, hjá öðrum ein eykainntöka, teir ikki tola at missa.

Skal nú tann nýggjari veiðuhátturin á firðunum við snurpu og ringnót, so sum tekin eru til, föra við sær, at tann royndu garndriftin verður gjörd til einkis, er nógv mist fyri samfelagið sum heild.

Meirilutin heldur tí, at forboð eigur at verða sett móti nýtslu av ringnót og snurpunót á teimum föroysku firðunum, og setur uppskot fram samsvarandi hesum.

Minnilutin (Fr. Bláhamar og S. Ellefsen) er av tí áskoðan, at á teintum stöðum, har íbúgvarnir ynskja eitt ávíst öki friðað fyri snurpu- og ringnót, eigur hetta at verða avgjört við grannastevniviðtöku.

Minnilutin heldur tó, at eitt slíkt bann við grannastevniviðtöku eigur at kunna útinnast, tá minst ein helvt av veljarunum á avvarandi stað eru fyri tí, og ikki sum nú 2/3.

Minnilutin setur tí uppskot fram um broyting í lógini, samsvarandi hesum.

Frá meirilutanum (Dam, Danbjörg og Jens Chr. Olsen): Meirilutin setur fram fylgjandi

uppskot

til

lögtingslög um broyting í kunngerð nr. 36, 24. november 1942, smbr. lögtingslög nr. 5, 31. desember 1948 og lögtingslög nr. 62, 2. desember 1949, um fiskivinnu innan fyri sjómark.

gr. 1.

Í gr. 4 í kunngerð nr. 36, 24. november 1942 verður sett aftaná »snurruváð og flóttrol« »ringnót og snurpunót.«

gr. 2.

Henda lög kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring i bekendtgörelse nr. 36 af 24. november 1942, jfr. lagtingslov nr. 5, af 31. december 1948 og lagtingslov nr. 62 af 2. december 1949 om fiskeri indenfor söterritoriet.

§ 1.

I § 4 i midlertidig bestemmelse nr 36 af 24 november 1942 indföjes efter »snurrevod og flydetrawl« »ringvod og snurpevod.«

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Frá minnilutanum (Bláhamar og Ellefsen):

Uppskot

til

broytingar í fiskarilög fyri Föroyar nr. 95, 14. april 1893.

gr. 1.

Í gr. 12, 2. stk. næstseinasta punktum verður í staðin fyri »2/3« sett »1/2«.

gr. 2.

Henda lög kemur í gildi beinanvegin.

ændringer i fiskerilov for Færöerne nr. 95, 14. april 1893.

§ 1.

I § 12, 2. stk. næstsidste pkt. ændres »2/3« til »1/2«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

1. *Fylgiskjal* p. t. Tórshavn 25/3-1952.

Av tí at »umhugsan í tingmáli nr. 77/1951: Sildaveiða á firðum við uppskoti« fyrst nú er mær kunnug, (eg havi verið sjúkur í seinastuni) loyvi eg mær at koma við hesi áheitan, áðrenn lögtingið tekur endiliga avgerð í hesum týdningarmikla máli.

Fyrst skal eg vísa á tað, sum fyriliggur í hesum máli frá árunum frammanundan. Hetta vísir, at menn kunnu vera ymiskir á máli um veiðuhættir, hvönn týdning teir hava, hvat gagn ella skaða teir kunnu orsaka, úrslit í mun til fíggjarílegging o. s. fr.

Í hesum viðfangi vera ikki stundir at útvega viðmæli til hesa áheitan, men havi eg tað álit á tingmonnum, at teir við at leggja reint sakligar upplýsingar til grund undir viðgerðini ikki broyta eina galdandi lóg, uttan hon er fullt upplýst frá öllum pörtum, ið reka hesa vinnuna.

Hetta tykir mær ikki vera gjört í tí, sum enn fyriliggur. Til dömis hava teir, sum seinasta ár vildu gera driftina tíðarhóskandi, einki ummæli í málinum í ár. Heldur ikki sæst, hvussu líknandi vinna er skipað í okkara grannalondum Íslandi, Noregi og Danmark.

Burtursæð frá at garnaveiðuháttinum ikki krevur so stórar fíggjarligar íleggingar sum nútímans veiðuháttur við ringnót og öðrum nótum, so eru ongar sakligar grundir fyri at geva görnunum nakran fyrimun á firðunum. At ringnót ella aðrar nótir skulu styggja sildina meira enn görn, eru eingi prógv fyri. Tvörtur ímóti, so styggist sildin meira av tí sild, sum stendur deyð út á dagin í görnum enn av nótum, ið verða læstar frá grunninum, so tann sild, sum innanfyri er, kann ikki gera skaða. Hvat viðvíkir oyðing ella minking av sildini á firðunum, so hevur tað vist seg, at árini kunnu hava verið ymisk til sild, eisini tá garnaveiðan var einsamöll. Royndirnar hava víst, at sildin á firðunum — burtursæð frá tí stuttu gýtingartíðini — ikki er stöðusild, t. v. s. hon ferðast út og inn.

Um nakað munandi skal fáast burtur úr sildaveiðu hjá föroyingum, kann lóggávan ikki fara at leggja meinbogar fyri einum útviklingi á hesum öki. Garnaveiðan hevur ikki einsamöll möguleikar at veita landinum tær innlögur, ið kunnu fáast úr sildini, men kann hon rekast uttan at tarna ella verða tarnað av öðrum veiðuhættum. Her kunnu bert reglur setast fyri, á hvörji tíð á samdögurinum ávarandi veiðuháttur skal royna. T. d. görnini 12 tímar (náttina), hinir 12 tímar (um dagin) ella eftir umstöðum og árstíð.

Tað, sum serliga er at hefta seg við, er, et teir menn og fyritökur, sum hava gjört seg út til nýggjar veiðuhættir, annaðhvört hetta er við ringnót ella öðrum nótum, hava lagt og eru í ferð við at seta stóran pening í hesa vinnu, sjálvandi í tí treysti, at lóggávan ikki undan bestu veiðutíð fór at forða hesum við eini knappligari lógarbroyting, so ikki bert hesir missa útvegaðan reiðskap fyri hundraðtalstúsund krónur, men verður missurin nógvar ferðir störri fyri landið, ið ikki fær sildina, so eisini við teimum peningaligu íleggingum, sum á landi eru fyrireikaðar til sama endamál og sum standa í milliónum krónum. Sildaveiðan á fjarðunum í störri nögd er avgerandi fyri framhaldi og um fyritökurnar skulu kunna bera seg. Her

er ikki bert hugsað um agnsild, sum tá sjálvandi hava ríviligari nögdir til eftirspurningin, men eisini til feskan útflutning, v. m.

Fyri at henda áheitan ikki skal misfatast, verður uppafturtikið, at garnaveiðan, sum eisini er hövuðstáttur í sildaveiðuni, væl kann rekast ótarnað av nótaveiðu á somu firðum, um menn kunnu skilja, at tað er misjavnin í úrtökuni, sum man vera största atvoldin til andstöðu og meinhogar. Hetta hevur einki við rovdrift at gera, tí hon kann sanniliga eisini verða framd við görnum. At sild ræðist meira ekkolodd enn onnur lodd, t. d. handlodd, sum nú garnamenninir sjálvir nýta eftir meg, skuldi verið óneyðugt at avsanna, tí sild ræðist alt, herundir árar og grót.

Tær tíðir kunnu koma aftur sum hava verið, tá firðirnir stóðu fullir av sild og bert ein partur av tí, ið fekkst við görnum, kundi seljast sum agn- og saltsild. Tað er óneyðugt at vísa á, hvönn týdning nútímans veiðuhættir tá hava til at útvega landinum virðir úr hesum ríkidömi, sum annars fór aftur í havið.

Tað er tí mítt ynski við hesi áheitan, at tingið ístaðinfyri fyriliggjandi uppskot kannar málið gjöllari og fyriskipar fastar reglur sum í öðrum londum, so hvört kann reka sítt slag av vinnu sær til fyrisettar tíðir á dögninum, t. v. s. görn sær og nótir við ella uttan lási sær til aðra tíð. Verður hetta framt, verður misskiljingin avmarkað til bert at umfata eina sunna kapping innan hvönn veiðuháttin sær eins og alla aðrastaðni.

Virðingarmest

Andreas Poulsen.

---

2)

p.t. Tórshavn 25/3—1952.

Undirritaði Jesper Olaf Tausen, Rúnavík, loyvi mær hervið at heita á okkara háttvirda Lögting um at taka málið viðvíkjandi sildavinnu inni á okkara firðum undir nýggja umhugsan. Í hesum sambandi skal eg vísa til skriv dagsett 25. í h. m. frá Andreas Poulsen, Skipanes, og taki eg fult undir við teim sjónarmiðum hann dregur fram.

Í februar 1950 keypti eg mær tann gamla doktarabátin ex. Medicus, nú »Orion«, og var hugsan mín tá at reka farmasigling og ferðamannasigling millum Havn og Skálafjörðin, men sum Lögtinginum kunnugt, fekk eg ikki loyvi til tað, av tí onnur fyritöka hevur fingið einkarrætt til hesa vinnu.

Eg eri nú farin undir at fyrireika umbyggjan av bátinum til sildavinnu við nót, og havi eg longu keypt nótina fyri umleið kr. 27.000.— og bleiv eg tí ovfarin, tá eg nú henda dagin las í Blöðunum, at ein meiriluti av okkara lögtingsmonnum hövdu tikið undir við eini áheitan frá harra P. C. Jacobsen, Skipanesi, um at stongja okkara firðir fyri allari nótadrift. Tað

eru mangir við mær, sum hetta kom dátt við, sum eins og eg hava sæð nótavinnu inni á firðinum sum eina framtíð og stóran framburð innan fiskivinnu okkara. Tað verður eitt stórt vónbrot og peningatap fyri meg, um Lögtingið ger hesa áheitan frá harra P. C. Joensen til lóg.

Virðingarmest

Jasper Tausen.

---

2. viðgerð 20. mars og 3. viðgerð 3. apríl 1952.

Formaðurin framlegði soljóðandi subsidiert broytingaruppskot til meirilutauppskotið d. 25. mars 1952; frá fiskivinnunevndini:

Vísandi til tað í álitinum framförda ynski frá Peter Chr. Jacobsen, Skipanes, við áteknaðum viðmæli frá sóknarstýrinum fyri Nes og Sjóvar kommunum og áheitan til tingsetuna 1950 frá íbúgvum á Skálafirði v. fl. um friðan av sild á firðum seta vit fram fylgjandi

Uppskot	*Forslag*
til	*til*
lögtingslóg um broyting í kunngerð nr. 36, 24. november 1942, sbr. lögtingslóg nr. 5, 31. desember 1948 og lögtingslóg nr. 62, 2. desember 1949, um fiskivinnu innan fyri sjómark.	*lagtingslov om ændring i kundgörelse nr. 36 af 24. november 1942 jfr. lagtingslov nr. 5 af 31. december 1948 og lagtingslov nr. 62 af 2. december 1949 om fiskeri inde på söterritoriet.*
gr. 1.	§ 1.
Í gr. 4 í kunngerð nr. 36, 24. november 1942, verður sett aftaná »snurrváð og flótitrol« »ringnót og snurpunót innan fyri eina beina linju úr Eystnesi í Hvítanes og úr Torvanesi í Uppsalanes.«	I § 4 i kundgörelse nr. 36 af 24. november 1942 indsættes efter »snurrevod og flydetrawl« »ringnot og snurrenot indenfor en lige linie fra Eystnes til Hvítanes og fra Torvanesi til Uppsalanes.«
gr. 2.	§ 2.
Henda lóg fær gildi beinanvegin.	Denne lov træder straks i kraft.

Uppskot minnihlutans fall 8—0.

Uppskot meirilutans fall 7—0.

Subsidiert broytingaruppskot varð sett undir atkvöðu við navnakalli:

Ja atkvöddu: J. H. Danhjörg, J. Chr. Olsen, S. P. Zachariasen, J. F. Øregaard, Johan Kallsoy, Tr. Samuelsen, Johan Poulsen, O. F. Joensen, A. Djurhuus, J. P. Davidsen, Hans Iversen, S. Danielsen og H. Djurhuus.

Atkvöddu ikki: P. Petersen, M. Holm, S. Ellefsen, Henriksen, Bláhamar og H. við Högadalsá.

Burtur: P. M. Dam, E. Waag, A. Sörensen, R. Long, Th. Petersen og D. P. Danielsen.

Uppskotið samtykt 13—0.

---

78. Hækking av vrakaragjøldum.

1952, 22. mars legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 21. mars s. á.:

Uppskot

til

I. *broyting í lögtingslóg nr. 12, 12. januar 1950 um fiskavraking.*	*ændring i lagtingslov nr. 12, af 12. januar 1950 om fiskevragning.*
gr. 1.	§ 1.
Í gr. 6 í lögtingslóg nr. 12, 12. januar 1950 verða tölini »10« og »5« broytt til »20« og »10«.	I § 6 i lagtingslov nr. 12 af 12. nuar 1950 ændres tallene »10« og »5« til »20« og »10«.
gr. 2.	§ 2.
Henda lóg fær gildi frá 1. apríl 1952.	Denne lov træder i kraft fra 1. april 1952.

Uppskot

til

11. *broyting í lögtingslóg nr. 20, 27. januar 1950 um sildavraking.*

gr. 1.

I gr. 9 í lögtingslóg nr. 20, 27. januar 1950 verða orðini »1 oyra pr. kg (1 kr. pr. tunna á 100 kg sild)« broytt til »2 oyra pr. kg (2 kr. pr. tunna á 100 kg sild)«.

gr. 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. april 1952.

ændring i lagtingslov nr. 20 af 27. januar 1950 om sildevragning.

§ 1.

I § 9 i lagtingslov nr. 20 af 27. januar 1950 ændres ordene »1 öre pr. kg (1 kr. pr. tönde á 100 kg sild« til »2 öre pr. kg (2 kr. pr. tönde á 100 kg sild)«.

§ 2.

Denne lov træder i kraft fra 1. april 1952.

Sambart gr. 6 petti 1 í lögtingslóg nr. 12, 12. januar 1950 um fiskavraking verða útreiðslur landskassans til lönir yvirvrakara og vrakieftirlitsmanna, dagpeningur teirra og ferða-kostnaður sum part goldnar við tað at hann, sum vrakað er fyri, skal lata í avgjaldi 10 oyru av hvörjum pakka (50 kg) av klippfiski og 5 oyru av hvörjum 100 kg av saltfiski.

Hetta avgjaldið er sambart gr. 9 í lögtingslóg nr. 20, 27. januar 1950 um sildavraking 1 oyra pr. kg av sild (1 kr. pr. tunnu á 100 kg sild).

Eftir upplýsingum frá Föroya gjaldstovu eru hesi avgjöldini til landskassan pr. 29/2 1952 frá 1. april 1951, kr. 38.100.—, tó hava sýslurnar ikki enn avroknað fyri februar.

Sjálvt um sorinskrivarin ikki hevur avroknað fyri mars og sýslurnar ikki fyri februar og mars, so koma inntökurnar fyri fíggjarárið neyvan upp um kr. 42.000.—, meðan útreiðslurnar verða um kr. 84.000.—.

Fyri at nevnda inntöka í komandi fíggjarári kann vega nakað móti útreiðslunum, skal landsstýrið mæla háttvirda lögtingi at samtykkja uppskotið frammanfyri til lógarbroytingar.

1. viðgerð 25. mars, 2. viðgerð 31. mars og 3. viðgerð 1. april 1952.

I. lógaruppskot samtykt 16—0.

II. lógaruppskot samtykt 17—0.

79. Uppískoyti til lóg um brandverkið í Tórshavn.

1952, 28. mars legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 24. mars s. á.:

Uppskot

til

lögtingslóg um uppískoyti til »lov angående brandvæsenet i Thorshavn på Færöerne« fra 28. januar 1856.

gr. 1.

Til gr. 1 í lóg, 28. januar 1856 »angående brandvæsenet i Thorshavn på Færöerne« verður aftaná orðini »6 alen« skoytt uppí:

»uttan so at skjöldurin móti grannanum verður gjördur sum brandmúrur, í hesum föri kann skjöldurin verða settur í mark.«

lagtingslov med tilföjelse til lov angående brandvæsenet i Thorshavn på Færöerne« fra 28. januar 1856.

§ 1.

Efter ordene »6 alen« i § 1 i lov af 28. januar 1856 angående brandvæsenet i Thorshavn på Færöerne tilföjes:

»medmindre gavlen mod naboen opföres som brandmur; i dette tilfælde kan bygningen opföres i skel.«

Viðmerkingar:

Tórshavnar byggineynd hevur í skrivi dagfest 12. desember 1951 heitt á landsstýrið um at útvega lógarheimild til uppískoyti til lóg um brandverkið í Tórshavn frá 28. januar 1856 so sum omanfyri er skotið upp.

Við hesum uppískoyti til nevndu lóg, er eingin verulig broyting í teim vanligu byggireglunum tilætlað, men at lógarfesta ein byggipraksis, sum hevur verið galdandi longri tíð fyri Tórshavn, kanska 25—30 ár.

Í lögtingsmáli nr. 38/1951: lögtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir kann ein tílík broyting í byggireglunum, sum skotið eru upp, verða gjörd við byggisamtykt, sí gr. 5, 3. petti 13) í hesum uppskoti.

Eftir sum tað kann koma at ganga upp í 3 ár, áðrenn lógin kemur at virka, aftaná at hon er komin í gildi, skal landsstýrið loyva sær at marka háttvirda lögtinginum til at samtykkja frammanfyri setta uppskot, eisini tí at nevnda lógarfesting ætlandi kann koma at minka um byggiósemjur hesum regluni viðvíkjandi.

1. viðgerð 28. mars, 2. viðgerð 31. mars og 3. viðgerð 1. apríl 1952.

Lógaruppskotið samtykt 19—0.

---

80. Landsskattur 1952.

1952, 24. mars legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 24. mars s. á.:

Uppskot

til

Løgtingslóg um skatt til landskassan.

gr. 1.

Inntökuskatturin til landskassan verður útskrivaður eftir teimum reglum, ið standa í lóg nr. 202 frá 15. maí 1939 við niðan fyri ásettu broytingum.

gr. 2.

gr. 2 í lóg nr. 202 frá 15. maí 1939 verður orðað soleiðis:

Pt. 1: Tann í 1. gr.nevndi skattur verður latin eftir hesum reglum:

Er skattainntøkan minni enn 2.000 kr., verður eingin skattur latin.

Er inntøkan kr.	men minni enn kr.	verður goldið kr.	av	og av hinum
2.000	3.000	20	2.000	3 %
3.000	4.000	50	3.000	4 %
4.000	5.000	90	4.000	5 %
5.000	6.000	140	5.000	6 %
6.000	7.000	200	6.000	7½ %
7.000	8.000	275	7.000	9 %
8.000	10.000	365	8.000	10 %

Er inntøkan kr.	men minni enn kr.	verður goldið kr.	av	og av hinum
10.000	15.000	565	10.000	12 %
15.000	20.000	1.165	15.000	20 %
20.000	30.000	2.165	20.000	25 %
30.000	40.000	4.665	30.000	31 %
40.000	50.000	7.765	40.000	44 %
50.000	75.000	12.165	50.000	47 %
75.000	100.000	23.915	75.000	50 %
100.000	200.000	36.415	100.000	52 %
200.000	400.000	88.415	200.000	54 %
meira enn	400.000	196.415	400.000	56 %

Pt. 2: Í tí eftir framman fyri standandi reglum útroknaða skatti verður, har inntøkan er minni enn 7.000 kr., givin ein frádráttur uppá 35 kr., og har inntøkan er 7.000 kr. ella meira, givin ein frádráttur uppá 25 kr. fyri hvørt barn (tað er hjúnarbandsbarn, barn uttan hjúnarbands, tá ið móðirin er skattgjaldari, stjúkbarn, ættleitt barn og fosturbarn, sum ikki er latið støðugt fosturviðurgjald fyri), sum við árs byrjan er yngri enn 15 ár, og sum ikki sjálvt hevur evni til at kosta uppihald sítt.

gr. 3.

Fyri skattaárið 1952/53 verður álagdur øllum, sum sambart lóg nr. 202 frá 15. mai 1939 hava skyldu at rinda skatt til landskassan og sum hava eina skattleggjandi inntøku, ið er 5.000 kr. ella meira, ein eykaskattur, sum er 30 % av teirri hædd, tey eftir 2. gr. í hesari lóg hava skyldu at rinda.

Hesin eykaskattur fellur til gjaldingar saman við vanliga landsskattinum.

gr. 4.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

Forslag

til

lagtingslov om skat til landskassen.

§ 1.

Indkomstskatten til landskassen udskrives efter de regler, som indeholdes i lov nr. 202 af 15. maj 1939 med nedennævnte ændringer.

§ 2 i lov nr. 202 af 15. maj 1939 affattes således:

Pkt. 1: Den i § 1 omhandlede skat erlægges efter fölgende skala:

Er indtægten under 2.000 kr., svares ingen skat.

Er indtægten kr.	men under kr.	svares kr.	af kr.	og af resten
2.000	3.000	20	2.000	3 %
3.000	4.000	50	3.000	4 %
4.000	5.000	90	4.000	5 %
5.000	6.000	140	5.000	6 %
6.000	7.000	200	6.000	7½ %
7.000	8.000	275	7.000	9 %
8.000	10.000	365	8.000	10 %
10.000	15.000	565	10.000	12 %
15.000	20.000	1.165	15.000	20 %
20.000	30.000	2.165	20.000	25 %
30.000	40.000	4.665	30.000	31 %
40.000	50.000	7.765	40.000	44 %
50.000	75.000	12.165	50.000	47 %
75.000	100.000	23.915	75.000	47 %
100.000	200.000	36.415	100.000	52 %
200.000	400.000	88.415	200.000	54 %
over	400.000	196.415	400.000	56 %

Stk. 2: I det efter foranstående regler udregnede skattebelöb gives der, når indtægten er under 7.000 kr., et fradrag på 35 kr., og når indtægten er 7.000 kr. eller derover et fradrag på 25 kr. for hvert barn (det er ægtebarn, barn udenfor ægteskab, for moderens vedkommende såfremt hun er skatteyder, stifbarn, adoptivbarn og plejebarn, for hvis pleje der ikke ydes vedvarende vederlag), som ved begyndelsen af kalenderåret er under 15 år, og som ikke har midler til at bekoste sit eget underhold.

§ 3.

For skatteåret 1952/53 erlægges af alle, som i henhold til lov nr. 202 af 15. maj 1939 er pligtige at svare indkomstskat til landskassen, og som har en skattepligtig indtægt på 5.000 kr. eller derover, en ekstraskat, som udgör 30 % af det skattebelöb, der pålignes efter reglerne i § 2 i nærværende lov.

Ekstraskatten forfalder til betaling samtidig med den ordinære landsskat.

§ 4.

Denne lov træder i kraft straks.

Eftir fíggjarlógini fyri fíggjarárið 1952/53 verður roknað við at inntökan av landsskatti skal vera 2.912.000 kr.

Tá inntökurnar eru munandi minkaðar frá seinasta ári verður neyðugt at broyta landsskattastigini og umfram krevja ein eykaskatt av öllum inntökum, ið eru 5.000 kr. ella meira.

Eftir samráð við fíggjarnevndina verður her sent lögtinginum uppskot til nýggja landsskattalóg fyri fíggjarárið 1952/53.

1. viðgerð 25. mars, 27. mars legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Aftaná at landsstýrið og fíggjarnevnd av nýggjum hövdu kannað útreiðslur og inntökumöguleikar landskassans komandi fíggjarár, kom nevndarmeirilutin á sami um, at einasti möguleikin fyri at fáa javnvág var at seta fram uppskot um hækkan av beinleiðis skatti uppá inntökur uppá krónur 5.000.— og meira, og mælir meirilutin so statt lögtinginum til at samtykkja landsstýrisins uppskot.

Minnilutin (Kallsoy og Dam) skoytir uppi, at prinsipielt er hann fyri einum progressivum skattamáta og ásannar, at sum tíðirnar eru, skylda menn og felög við góðum inntökum at rinda eykaskatt, men rátt verður til, at barnafrádrátturin fyri menn við inntökum undir kr. 7.000.— verður hækkaður frá 35.— — 50 kr. fyri hvört barnið, og at eykahækkingin byrjar frá inntökum uppá kr. 7.000.

Samsvarandi hesum setur minnilutin fram hetta

Broytingaruppskot

Í föroyska og í danska tekstinum verða hesar broytingar gjördar:
Í gr. 2 verða »35 kr.« broyttar til »50 kr.«
Í gr. 3 verða »5.000 kr.« broyttar til »7.000 kr.«

2. viðgerð 27. mars og 3. viðgerð 28. mars 1952.

Uppskot landsstýrisins samtykt	17—0.
Uppskot minnilutans til gr. 2 fall	7—0.
Uppskot minnilutans til gr. 3 fall	6—0.

81. Umsókn um studning til nýggja kirkju í Rituvík.

1952, 26. mars legði kirkjunevndin fram soljóðandi

Álit.

Bygginevndin fyri Rytuvíkar nýggju kirkju hevur við skrivi dagsett 7. november 1951 umsókt tingið um studning uppá kr. 81.000.—. Nevndin, ið varð sett 12/1 1949, hevur síðan tá arbeitt ávegis við málinum, og hevur tað eydnast hemi at savna saman kr. 39.000.—. Av hesum peningi hava íbúgvarnir sjálvir givið kr. 7.000. . Bygdafólkið er sera nærlagt og íðið í arbeiðinum og kann soleiðis nevnast, at kvinnurnar í bygdini gjögnum lann farna veturin fleiri ferðir um vikuna eru komnar saman at töta og gera ymiskar lutir, og er tað á henda hátt við gávum frá ymiskum stöðum eydnast at fáa ein hóp av lutum, ið ætlanin er at selja við basar í summar. Peningurin, ið kemur inn, skal nýtast til ymiskt útstýr í kirkjuni. Nevnast kann eisini, at Rytuvíkskingar eru farnir undir at grava grundina, og verður hetta arbeiðið ætlandi eisini gjört ókeypis. Rytuvíkar bygd, ið varð grundað fyri ca. 75 árum síðan, hevur nú um 250 íbúgvarar og er í stöðugum vökstri. Vegurin til næstu kirkju, Clyvra kirkju, er 9½ km, nakað tað sama til Nes kirkju, um gingið verður beinan vegin um »Ytra hals«, men verður leiðin lögd um Rúnavík, hvat er tað vanliga, er longdin 15½ km. Við umsóknini fylgja tvey eintök av tekningini til kirkjuna eftir H. C. W. Tórgarð, arkitekti, og kostnaðarætlan. Kirkjan er ætlað bygd úr viði, sett á undirlendi av beton, tekjan verður rukkujarn ella helst donsk Eternit, um slíkt tilfar fæst. Kirkjan, ið er 21 m long og 8,8 m breið, er ætlað málað innan og uttan. Eisini er ætlað sett hitaverk í kirkjuna við radiatorum ella rípurörum. Kostnaðurin fyri kirkjuna fullfíggjaða er mettur til kr. 120.000.—.

Málið er beint til viðgerðar í kirkjunevndina.

Øll nevndin er á einum máli um, at tekningin sýnir eina prýðiliga og sera snotiliga kirkju; men samstundis er nevndin á einum máli um, at kirkjan er í störra lagi til eina bygd sum Rytuvík, tí umstöðurnar har mugu ætlast at seta mark fyri munandi vökstri av bygdini. Rytuvík verður ætlandi ongantið stórbygd. Brimpláss er og bygdarinnar framtíðarvökstur má tí ætlast at verða betingaður av nögdini av dyrkilendi ella við öðrum orðum av möguleikanum fyri innlegg av træðum. Menn seta seg neyvan niður á berar steinar í Rytuvík. Til sammetingar kann nevnast, at Stranda kirkja er 24 alin long og 12 alin breið, Nes kirkja er okkurt um tað sama, meðan Rytuvíkar kirkja sambart tekningina er ca. 33½ alin long og ca. 14 alin breið. Nevndin má halda, at Rytuvík má vera hjálpt við eina kirkju av somu stödd sum Nes ella Stranda kirkja. Stranda bygd hevur millum 5 og 600 íbúgvarar.

Nevndin má tí tilráða byggineund eins væl og íbúgvarunum at umhugsa einaferð enn, um tað ikki er beint at minka hana hóskandi. Tað er dýrt at byggja og innlögur kirkjugrunnsins eru ikki stórar, og sum fíggjarstöðan er í dag, er lítið útlit fyri, at tingið í bræði verður fört fyri at veita munandi studning. Vit hava nú eftir umstöðunum nógvar kirkjur í Föroyum, og er umvæling og viðlíkahald av hesum kirkjum vorðin ein so stór fíggjarlig byrða, at lítið og einki verður eftir hjá kirkjugrunninum til nýbygningar.

Nevndin ásannar, at Rytuvík törvar eina kirkju og vildi eisini fegin hjálpt við studningi, um möguleiki var fyri tí. Sum er stendur Miðvágs nýggja kirkja í gerð og verður ætlandi liðug nú í summar; bon má tí fyrst fáast frá hondini, áðrenn hugsast kann um at veita studning til aðra kirkju. Nevndin fer tí sum statt er biðja Rytuvíkskingar um framvegis sum higartil at arbeiða trúliga við málinum og kann nevndin lova, at tingið so skjótt, sum tað er fört, vil veita teimum peningaligan studning, eins og hon kann úttala, at Rytuvíkar kirkja vil verða tann, sum liggur fyrst fyri at fáa studning, tá ið Miðvágs kirkja er greidd frá hondini. Mælt kann verða byggineundini til at arbeiða víðari við málinum og til komandi Ólavsöku endurnýggja umsóknina um studning og senda tinginum eina frágreiðing um stöðuna til ta tíð:

1) um nögdina av innsavnaðum peningi, um mögulig onnur arbeiðir, ið eru gjörd,

2) Um möguligar broytingar í teknningini viðvíkjandi stödd o. a.

3) Greinlig kostnaðarætlan má eisini sendast tinginum.

Tá alt hetta fyriliggur, má tingið taka málið upp aftur til umhugsunar.

Uppskot.

Eitt eintak av álitinum verður sent byggineundini fyri Rytuvíkar nýggju kirkju.

2. viðgerð 27. mars 1952.

Uppskot nevndarinnar samtykt 16—0.

82. Umsókn um nýggjan studning til Miðvágs kirkju.

1956, 26. mars legði kirkjunevndin fram soljóðandi

Álit.

J. H. Samuelsen, lærari, og Johs. Follend, prestur, hin fyrri vegna meinigheitsráðið, hin seinni vegna bygginevnd kirkjunar, hava í skrivi til Føroya lögting dagsett 4. desember 1951 biðið um eykastudning til ta nýggju kirkjuna í Miðvági kr. 16.670.— Sambart kostnaðarætlan av 28. november 1951 frá Heini Joensen, byggimeistara, Miðvági, eru tey arbeiðir og tað tilfar, ið törvar til at gera kirkjuna lidna, mett at kosta ..... kr. 23.670.—
Harumframt er skuld til Heina Joensen ..... kr. 7.000.—
Tann samlaða peninganögd, ið krevst fyri at gera kirkjuna lidna, er soleiðis ..... kr. 30.670.—

Av ognum og tökum peningi hava umsøkjararnir:

1) ta gomlu kirkjuna ..... kr. 7.000.—
2) Eftir av ógoldnum lögtingsstudningi ..... kr. 5.000.—
3) Afturgoldið farmagjald ..... kr. 2.000.—

kr. 14.000.—

Munin kr. 16.670.— biðja umsökjararnir so statt um at fáa sum studning frá lögtinginum.

Málið er beint í kirkjunevndina til viðgerðar, og skal nevndin loyva sær at seta fram hesar viðmerkingar:

Sambart kostnaðarætlan av 6. august 1946 varð tann samlaði kostnaðurin við at gera kirkjuna lidna mettur til kr. 97.364,40.

Sambart kostnaðarætlan, umroknað eftir prísum pr. 18. januar 1951, er kirkjan mett at kosta kr. 175.919,86.

Í lögtingssetuni 1947 játtaði tingið kr. 70.000,— sum studning til ta nýggju kirkjuna í Miðvági. Í setuni 1950 veitti tingið kirkjuni nýggjan studning uppá kr. 20.000,—, soleiðis at rinda, at kr. 15.000,— verða goldnar í fíggjarárinum 1951/52 og kr. 5.000,— í 1952/53.

Tann samlaði studningur, ið higartil er veittur, er soleiðis kr. 90.000,—. Heraftur at kann leggjast kr. 7.000,—, ið er tann peninganögd, menn rokna við at fáa fyri ta gomlu kirkjuna. Men enn fresta, sum framman undan er greitt frá kr. 16.670,—.

Sagt er fyri nevndini, at biskoppur okkara, Fuglsang-Damgaard, kemur á viljunarferð til Föroya í summar, og hövdu Miðvingar tí ógvuliga fegin havt teirra nýggju kirkju lidna til ta tíð, möguliga soleiðis, at hon kundi verið vígd av biskoppinum. Av tí, at fíggjarstöðan hjá kirkjugrunninum er so vánalig, at tað verður neyðugt, at grunnurin fyri fíggjarárið 1952/53 fær ein eykastudning uppá kr. 25.000,— um tað skal verða javnvág á fíggjarætlanini, og tá er hert kr. 8.000,— settar sum studningur til nýggjar kirkjur, men er hesin studningur játtaður frammanundan, so verunliga er eingin peningur á fíggjarætlanini til studningar.

So statt er tað ógjörligt at koma umsóknini á möti og veita studning í komandi fíggjarári. Nevndin skal tó, av tí hon fegin vil hjálpa umsökjarunum við at fáa kirkjuna frá hondini, mæla tinginum til at veita ein eykastudning uppá kr. 12.000,—, soleiðis at hann verður at rinda við kr. 4.000,— árliga í 3 ár, fyrstu ferð í fíggjarárinum 1953/54.

Við eini tílíkari studningsveitan frá tinginum er tað kanska ikki óhugsandi, at tað kann eydnast bygginevndini at fáa tann neyðturviliga pening, ið skal til at fáa arbeiðið liðugt.

Uppskot.

Mælt verður tinginum til at veita Miðvágs nýggju kirkju ein eykastudning upp til kr. 12.000,—. Studningurin verður at veita í fíggjarárinum 1953/54, 1954/55 og 1955/56 við kr. 4.000,— hvört árið.

2. viðgerð 27. marts og 3. viðgerð 31. marts 1952.

Uppskot nevndinnar samtykt 19—0.

---

83. Lønjavning og forskotsrindan.

1952, 28. marts legði lögmaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum og fylgiskjölum, d. 28. marts 1952:

Uppskot

[i]

broytingar í lögtingslóg nr. 72, 22. december 1951, um avrokning og lönjavningargrunn fiskimanna sum broytt við lögtingslóg nr. 11, 7. marts 1952.

Í lögtingslóg nr. 72, 22. december 1951, um avrokning og lönjavningargrunn fiskimanna sum broytt við lögtingslóg nr. 11, 7. marts 1952, verða gjördar fylgjandi broytingar og uppiskoyti:

1) Sum nýtt petti 7 til gr. 5 verður sett:

Gjöld latin av fiskiskapi, har manningin eftir teim reglum, sum grunnurin fyriskipar, ikki hevur rætt til lönarviðbót, kunnu krevjast aftur, tá ið viðkomandi fyri grunninum prógvar, at gjald er latið og hvussu nógv av slíkum fiskiskapi.

2) gr. 6—11 ganga út.

3) Sum nýggj gr. 6 verður sett:

Petti 1. Umsitingin av grunninum verður yvirtikin av sjóvinnufelögunum: Föroya Útgerðarmannafelag (Færöernes Rederiforening og Felag Föroyskra Trolaraeigara) Föroya Fiskimannafelag, Suðuroyar Fiskimannafelag, Föroya Skipara- og Navigatörfelag og Föroya Motorpassarafelag.

Petti 2. At stýra grunninum verður sett 3-mannanevnd, har Föroya lögting velur ein, Föroya Útgerðarmannafelag (Færöernes Rederiforening

ændringer i lagtingslov nr. 72, 22. december 1951, om fiskernes afregning og lönreguleringsfond, som ændret ved lagtingslov nr. 11, 7. marts 1952.

I lagtingslov nr. 72, 22. december 1951, om fiskernes afrening og lönreguleringsfond, som ændret ved lagtingslov nr. 11, 7. marts 1952, foretages följende ændringer og tilföjelser:

1) Som nyt stk. 7 til § 5:

Afgift betalt af fiskeri, ved hvilket mandskabet efter de regler, som fonden foreskriver, ikke har ret til löntilskud, kan kræves tilbagebetalt, såfremt vedkommende overfor fonden kan bevise, at der af det omhandlede fiskeri er betalt afgift og hvor meget.

2) Paragr. 6—11 udgår.

3) Som ny § 6:

Stk. 1. Administrationen af fonden overtages af fiskeriorganisationerne: Föroya Útgerðarmannafelag, (Færöernes Rederiforening og Felag Föroyskra Trolaraeigara) Föroya Fiskimannafelag, Suðuroyar Fiskimannafelag, Föroya Skipara- og Navigatörfelag og Föroya Motorpassarafelag.

Stk. 2. For fonden vælges en bestyrelse, således at Færöernes lagting udpeger et medlem, Föroya Útgerðarmannafelag (Færöernes Rederi-

og Felag Föroyskra Trolaraeigara) velur ein og Föroya Skipara- og Navigatörfelag, Föroya Fiskimannafelag, Suðuroyar Fiskimannafelag og Föroya Motorpassarafelag velja ein.

4) Sum nýggj gr. 7 verður sett:

Grunnurin hevur til endamáls at tryggja manningini á föroyskum fiskiskipum ella útróðramonnum til lands í Grönlandi, tá ið fardagur og afturkomudagur teirra er prövfördur, eina minstuinntöku av fiskiskapi, eins og grunnurin hevur rætt til at veita teimum forskot uppá forvinning ella lönjavning. Um tær gjöllari reglur, hvörjir skulu hava lönjavning ella forskot og hvussu nógv, eins og um umsitingarreglurnar yvirhövur taka sjóvinnufelögini avgerð.

5) Sum nýggj gr. 8 verður sett:

Petti 1. Fyri at veita lönarforskot hevur grunnurin myndugleika til at nýta eginpening ella taka upp neyðug lán.

Petti 2. Rentu- og umsitingarútreiðslur av forskotsskipanini ber tann útgerðarmaður, hvörs manning hevur fingið forskot, og fyri útróður til lands í Grönlandi viðkomandi bátsskipan.

Petti 3. L/f Föroya Fiskasöla hevur skyldu at notera transportar fyri forskot, rentu- og umsitingarútreiðslur.

Petti 4. Mynstringarstjóranir hava skyldu at geva lönjavningargrunninum avrit av manningarlistunum, hvörja ferð mynstrað verður. Við avmynstring ella deyðsfalli hevur skiparin skyldu at siga grunninum frá.

forening og Felag Föroyskra Trolaraeigara) et medlem og Föroya Skipara- og Navigatörfelag, Föroya Fiskimannafelag, Suðuroyar Fiskimannafelag og Föroya Motorpassarafelag et medlem.

4) Som ny § 7.

Fonden har til formål at sikre mandskabet på færöske fiskeskibe eller bådfiskere i grönlandske farvande, for så vidt disse kan dokumentere tidspunktet for afrejse og hjemkomst, en mindsteindtægt ved fiskeri ligesom fonden er bemyndiget til at yde de omhandlede forskud på fortjeneste eller lönudjævning. Fiskeriorganisationerne fastsætter de nærmere regler for hvem, der skal have lönudjævning eller forskud og hvor meget, ligesom organisationerne fastsætter de nærmere administrative bestemmelser.

5) Som ny § 8:

Stk. 1. Med det formål at yde lönforskud har fonden bemyndigelse til at anvende egenkapitalen eller optage lån.

Stk. 2. Den reder, hvis mandskab har fået forskud og for bådfiskerne i grönlandske farvande, bådsbesætningen, afholdes rente- og administrationsomkostninger.

Stk. 3. L/f Föroya Fiskasöla er pligtig at notere transporter for forskud, rente- og administrationsomkostninger.

Stk. 4. Mönstringsbestyrerne er pligtige til at give lönreguleringsfonden afskrift af bemandingslisterne for hver udmönstring. Ved afmönstring eller ved dödsfald er skibsföreren pligtig at underrette fonden.

6) gr. 12 verður gr. 9.
7) gr. 13 verður gr. 10.

6) Paragr. 12 ændres til paragr. 9.
7) Paragr. 13 ændres til paragr. 10.

Viðmerkingar:

Sum heiðraða lögtinginum kunnugt sendi Föroya Skipara- og Navigatörfelag, Föroya Fiskimannafelag, Föroya Motorpassarafelag og Suðuroyar Fiskimannafelag inn skriv til lögting og landsstýri, dagfest 13. marts 1952 um broytingar í galdandi lóggávu um lönjavningar- og forskotsskipanina. Felögini kravdu, at lönjavningin bleiv skipað umaftur, soleiðis sum hon var, áðrenn lögtingslögin av 22. desember 1951 við lönjavning til allar fiskimenn og ikki bert til uppihaldarar; tó skuldi grunnurin hava tey hægri gjöldini, sum lógfest vóru við nevndu lögtingslóg. — Somuleiðis kravdu felögini, at forskot bleiv veitt eisini til teir, sum ikki eru uppihaldarar, tó við einum lægri forskoti enn til uppihaldararnar. Uppá hesi kröv eftirlíkaðu felögini, at skipini fóru, men álagt varð limum felaganna ikki at mynstra til Grönlands, fyrrenn krövini vóru eftirlíkaði, og somuleiðis varð avgjört, at skip, sum koma av vártúrunum, verða lögd og menninir avmynstraðir, um krövini ikki vóru eftirlíkaði. Skip, sum ikki eru farin 1. apríl 1952, fáa ikki loyvi at mynstra ella sigla, og öll skip, sum koma heim aftaná 1. apríl 1952, verða lögd.

Undir hesum umstöðum varð so heitt á semingsmannin at royna at finna útvegir fyri,at verkfall ikki bleiv. Úrslitið av semingsroyndum hansara er so viðlagdi sáttmáli frá 26. marts 1952.

Partarnir eru eftir sáttmálanum samdir um, at sjóvinnufelögini yvirtaka umsitingina av lönjavningar- og forskotsskipanini stýrd av 3-mannanevnd, har lögtingið velur ein lim, útgerðarmannafelögini ein lim og veiðumannafelögini ein. Inntökur lönjavningargrunnsins verða tær í frammanfyri nevndu lögtingslóg fyriskipaðu, og neyðug lán til forskot fær nevndin rætt at útvega. Rætt til lönjavning og forskot eiga allir, sum mynstraðir eru, og útróðrarmenn til lands í Grönlandi. Fyri 1952 verður lönjavningin eins fyri upphaldarar, og teir sum ikki eru uppihaldarar, meðan forskotini inntil 1. juli verða ávikavíst upp til 400 kr. og 200 kr. um mánaðin og aftaná 1. juli ávikavíst upp til 400 kr. og 300 kr. Frá veiðumannafelögunum er serligur dentur lagdur á, at forskotsskipanin verður framd eftir hesum sjónarmiðum, sbr. gr. 7 og 3.

Sáttmálin krevur broytingar í lóggávuni.

Landsstýrið heldur, at tey sjónarmið, sum sáttmálin inniber, at lönjavningar- og forskotsskipanin er upptikin sum lið í sáttmálanum partanna millum, föra beina leið. Landskassin er nú leysur av tí líggjarligu ábyrgðini fyri lönjavningini; uppgáva lögtingsins eigur tí at kunna avmarkast til at skapa grunninum tær inntökur, honum eru neyðugar, men ikki at geva gjöllari reglur fyri sjálvari lönjavningini, og í samband við hana forskotsrindan. Sjóvinnufelögini mugu sjálvi bera ábyrgðina fyri hesum.

Frammanfyri standandi lógaruppskot er uppsett eftir nevndu sjónar-

miðum: At tryggja grunninum inntökur, at geva sjóvinnufelögunum umsitingina og at skapa tryggleika fyri, at forskot verða aftur gjoldin grunninum.

Viðvíkjandi peningi til forskotsrindan hevur landsstýrið frá Tryggingarsambandinum Föroyar fingið bindandi tilsögn um, at kríggstryggingin lænir lönjavningargrunninum 450.000 kr.

Verkfall verður so ikki.

Viðmerkingar til lógartekstina:

ad 1) Nýtt petti 7 til gr. 5:

Eftir lögarinnar gr. 5, petti 1, skal gjald latast av öllum fiski, eisini sild, sum útflutt verður. Ætlanin er, at teir, sum rógva út í smábátum, og sum veiða sild á firðunum ikki skulu eiga rætt til lönjavning. Umsitingarliga er illt at skilja ímillum fiskin, tá hann verður útfluttur, um hann t. d. er fiskaður við smábátum; kunnu viðkomandi prógva hetta, t. d. við vrakaraváttan, er tað rímiligt, at teir fáa gjaldið aftur, nú teir ikki hava rætt til lönjavning.

ad 2) gr. 6—11 ganga út.

Hesar paragraffir fyriskipa hvörjir hava rætt til lönjavning, hvussu nógv teir skulu hava og reglur um umsiting. Alt hetta verður nú latið sjóvinnufelögunum upp í hendi.

ad 4) Nýggj gr. 7.

Í lógini eigur nú bert at standa, hvörji endamál grunnurin skal arbeiða fyri: At tryggja mannningum á fiskiskipum eina minstuinntöku og forskot.

Sáttmáli

um

nýskipan Lönjavningar- og forskotsgrunnin.

gr. 1.

Sjóvinnufelögini, Föroya útgerðarmannafelag(Færöernes Rederiforening og Felag Föroyskra Trolaraeigara) Föroya Fiskimannafelag, Suðuroyar Fiskimannafelag, Föroya Skipara- og Navigatörfelag, Föroya Motorpassarafelag, yvirtaka umsitingina av ti higartil verandi lönjavningar- og forskotsgrunni.

gr. 2.

Tær inntökur, ið nýtast skulu til hesar grunnar eru útvegaðar, við lögtingslóg, sum eisini ásetur reglur viðvíkjandi panting fyri gjald til grunnin og eftirhalding hjá I/f Föroya Fiskasölu av gjaldi.

gr. 3.

Um útgerðarmaður fær lán frá I/f Föroya Fiskasölu 50 + 25 %, tá ið fiskur er landaður, men ikki avskipaður, verður ein eventuell forskotsrindan úr grunninum til ávarandi manning at halda aftur av nevndu 25 % og beinleiðis at rinda aftur til forskotsgrunnin.

Forskotsgrunnurin hevur skyldu so við og við at senda inn til Föroya Fiskasölu yvirlit yvir alla forskotsrindan, ið latin er.

gr. 4.

Rætt til lönjavning og forskotsrindan eiga föroyingar, sum hava verið mynstraðir við föroyskum fiskiskipi eftir sáttmála, sum er í gildi millum ella góðkendur av omanfyri nevndu felögum, tá ið skipið sambært lögtingslóg hevur skyldu til at gjalda til grunnin eins og föroyskir útróðrarmenn til lands í Grönlandi, tá ið fardagur og afturkomudagur eru prövfördir, uttanso at útróðrarmenninir á ein ella annan hátt eru í tænastu hjá útlendskum felagi.

Undantikið hesi grein eru menn á ísfiskaveiðu viðvíkjandi forskotsrindan.

gr. 5.

Gjald til grunnin verður ikki latið av veiðu, tá ið veiðumenninir ikki hava rætt til viðbót úr grunninum.

Eftir galdandi lóg skal gjaldast av öllum fiski eisini sild, sum útfluttur verður úr Föroyum og Föroya Fiskasöla hevur skyldu til at halda gjaldið eftir.

Fiskasölan skal framvegis eftirhalda gjaldið av öllum útfluttningi, men avgjald, sum er tikið av útróðrarfiski, heimaveiddari sild ella öðrum fiskiskapi, har fiskimenninir ikki hava krav til grunnin, kann krevjast aftur frá grunninum.

gr. 6.

Grunnurin verður stýrdur av eini 3-mannanevnd, har Föroya útgerðarmannafelag velur ein, Föroya Skipara- og Navigatörfelag, Föroya Fiskimannafelag, Suðuroyar Fiskimannafelag og Föroya Motorpassarafelag velja ein og Föroya Lögting velur ein.

Nevndin setur stjóra og annað starvsfólk at hava ta dagligu leiðsluna í homlum.

Nevndin skal so skjótt sum til ber gera uppskot til eina greinliga starvsreglugerð fyri starv grunnsins, og henda reglugerð skal góðtakast av öllum felögum.

Til henda reglugerð er gjörd og viðtikin, verður stýrið at fylgja teim reglum, ið hava verið higartil, uttanso at tær stríða ímóti hesum sáttmála.

gr. 7.

Stýri grunnsins hevur skyldu sambært reglugerðina at býta tann pening, grunnurin hevur um hendi millum fiskimenn, sum hava rætt til lönarviðbót og forskotsrindan.

Fyri árið 1952 er skipanin tann, at lönjavning er eins fyri uppihaldarar og teir, sum ikki eru uppihaldarar, og at forskot verður latið, tá ið maður er mynstraður og farin avstað upp til kr. 400,00 um mánaðin til uppihaldara og upp til kr. 200,00 til hinar, hetta til 1. juli.

Aftaná 1. juli verður latið forskot upp til kr. 400,00 til uppihaldarar og upp til kr. 300,00 til teir, sum ikki eru uppihaldarar.

gr. 8.

Skuldi tað gjörst neyðugt at útvega meira pening til forskotsrindan enn tökur er hjá grunninum, hevur stýri grunnsins rætt og skyldu til at lána meira pening, og skal sökja Föroya lögting um at heimila Föroya landsstýri at útvega lánið.

gr. 9.

Henda sáttmála kann ein og hvör av pörtunum siga upp við 2 mánaðar ávaring til ein fyrsta januar.

gr. 10.

Skuldi grunnurin verið avtikin og tá átt pening, skal hann, uttanso at partarnir einmælt samtykkja annað, falla til grunnin fyri óarbeiðsförar fiskimenn.

Tórshavn, tann 26. marts 1952.

Fyri Föroya útgerðarmannafelag:
S. P. Petersen.

fyri Föroya Fiskimannafelag:
Daniel Klein. Ingvard Jacobsen.

Fyri Suðuroyar Fiskimannafelag:
J. H. Danbjörg.

fyri Föroya motorpassarafelag:
Johan Peter Jacobsen.

fyri Föroya Skipara- og Navigatörfelag:
Debes Christiansen.

1., 2. og 3. viðgerð 28. marts 1952.

Uppskot landsstýrisins samtykt 17—0.

84. Prístalsnevndin.

1952, 3. april legði H. Djurhuus, landsstýrismaður fram soljóðandi lógaruppskot við viðmerkingum, d. 2. april s. á.:

Uppskot

til

lögtingslóg um prístal.

gr. 1.

Valuta- og Prísansingarráðið, viðkað við 5 limum, harav: 1 verður valdur av Föroya Arbeiðarafelag, 1 av Havnar Arbeiðsmannafelag, 1 av Föroya Fiskimannafelag, Suðuroyar Fiskimannafelag, Föroya Skipara- og Navigatörfelag og Föroya Motorpassarafelag, 1 av Föroya Arbeiðsgavarafelag og Handilsfelögunum og 1 av Föroya Búnaðarfelag, roknar út og kunngerð per 1. juli 1952 og hareftir pr. 1. í hvörjum fjerðingsári eitt prístal eftir prísunum pr. 10. í mánaðinum frammaundan á teim vörunögdum, sum til einahvörja tíð eru löggildar sum prístalsgrundarlag.

gr. 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fara úr gildi gr. 1 í kunngerð nr. 40 frá 11. december 1942 og gr. 2 í kunngerð nr. 16 frá 21. april 1947.

lagtingslov om pristal.

§ 1.

Valuta- og Priskontrolrådet, udvidet med 5 medlemmer, hvoraf 1 medlem vælges af Föroya Arbeiðarafelag, 1 af Havnar Arbeiðsmannafelag, 1 medlem af Föroya Fiskimannafelag, Suðuroyar Fiskimannafelag, Föroya Skipara- og Navigatörfelag og Föroya Motorpassarafelag, 1 medlem af Föroya Arbeiðsgevarafelag og de handlendes foreuing og 1 medlem af Föroya Búnaðarfelag udarbejder og offentliggör et pristal per 1. juli 1952 og derefter per 1. i hvert kvartal et pristal på grundlag af priserne per 10. i forudgående måned for de varemængder, der indgår i det til enhver til autoriserede pristalsbudget.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks. Samtidig ophæves § 1 i kundgörelse nr. 40 af 11. december 1942 og § 2 i kundgörelse nr. 16 af 21. april 1947.

Viðmerkingar:

Umboðsmenn í nevndini, sum roknar prístalið út sambart kunngerð nr. 40 frá 11. december 1942 mæla til at broyta ásetingina viðvíkjandi prísuppgávudegnum 15. í mánaðinum frammaundan hvörjum prístali til at

vera tann 10. Tað hevur vist, at tíðin frá tí, at prísuppgávurnar kunnu verða inni og til útrokningin skal verða frá hondini er so tepur nú, síðan tað nýggja rúgvismiklara grundarlagið er tikið í brúk (sambart kunngerð nr. 16 frá 21. apríl 1947), at tað gerst neyðugt at rúmka hetta millumbilið og seta prísuppgávudagin fram til tann 10. í mánaðinum. Hetta hevur serligan týdning fyri at nevndin eisini kann fáa stundir til at katna uppgivnar óvanligar prísir, so hesir möguliga av misgávum uppgivnu prísir ikki koma at ávirka prístalið, hvönn vegin tað so er.

Nú uppskot liggur fyri um nýggja valuta- og prísráðið, vildi tað verið hentast, at kunngerðin nr. 40 frá 11 desember 1942 er uppískoyti til upprunaligu prislógina nr. 59, frá 9. december 1941, verður endurnýggjað sum serlig lóg, ið bert umfatar fyriskipan um samansetingina av nevndini og útrokningina av prístalinum.

1. viðgerð 3. apríl, 2. og 3. viðgerð 4. apríl 1952.

Uppskot landsstýrisins samtykt 18—0.

---

85. Útvarp.

1952, 1. apríl legði R. Long, landsstýrismaður fram soljóðandi uppskot við viðmerkingum, d. 30. marts 1952:

Hetta mál er seinast viðgjört á tingi ífjör, og verður vist til tingtíðindi 1951, har eisini er greitt frá gongdini í tingviðgerðum besum viðvíkjandi í árunum 1943—49.

1951 samtykti tingið at heita á ríkisstýrið, at radioútvarp, sum nú fellur undir tey mál, sum nevnd eru í deild B eftir heimastýrislógini, hereftir verður föroyskt sermál, og at heimila landsstýrið at nýta peningin í útvarpsgrunninum (60.000 kr.) saman við tveimum ára játtaninum uppá 12.000 kr. til útvarpsroyndir, til at seta útvarp á stovn við leigaðum sendara. Kostnaðurin var ætlaður til o. u. 80.000 kr.

Síðan hava farið víðari samráðingar fram við statsráðdeildina, ráðdeildina fyri almenn arbeiði og ketslumálaráðdeildina um ta gjöllari tilrættaleggjan av framtíðarskipanini av útvarpi í Föroyum. Sum skilað var til í landsstýrisins frágreiðing til tingið ífjör, fæst semja um, at Föroyar taka undir sítt ræði útvarpingina, tó so, at aðalstjórnin fyri post og telegraf

hevur ta teknisku ábyrgdina bæði viðvíkjandi bygging av stöð og öllum hartil hoyrandi og viðvíkjandi útvarpingini teknisk sæð.

29. marts í ár hevur landsstýrið fingið endaliga uppgávu av kostnaðinum av at seta á stovn eitt útvarp uppá 1,5 kw, sum skuldi kunna hoyrst um allar Föroyar. Um stöðin verður bygd á tí lendi, har sendarin til ta tilætlaðu radiotelefonstöð verður settur, verður, um lendið fæst frítt, kostnaðurin 150.000 kr. Árligar tekniskar rakstrarútreiðslur ætlast at verða o. u. 2600 kr., um útvarpið verður 1 tíma dagliga, um útvapið verður longri tíð, ökist útreiðslan tilsvarandi.

Stovnkostnaðurin kann verða afturrindaður aðaltelegrafstjörnini útfrá einari árligari avskriving uppá 6,75 % og renting av restpeninginum til eina hvörja tíð.

Um útvarpið verður o. u. 3 timar dagliga, verður samlaður tekniskur kostnaður (harundir afturrindan av byggikostnaðinum) o. u. 27.000 kr. árliga fyri fyrst.

Stöðin kann vera klár til nýtslu o. u. 6 mánaðir eftir tað, semja er gjörd millum aðaltelegrafstjórnina og landsstýri, lögtingsins vegna.

Av hesum sæst, at stöðin fæst bygd uttan beinleiðis útreiðslur fyri Föroyar og undir lagaligum afturrindingartreytum.

Tær inntökur, sum mugu fáust til hesa afturrinding og til tað neyðturviliga fólkið og annað, sum má til fyri at gera útvarpingina so fjölbroytta og dygdargóða, at tað verður forsvarligt at halda henni uppi, verða at fáa við lurtaragjaldi, sum heimild verður at áleggja. Í Danmark er lurtaragjaldið 15 kr. árliga, men verður nú hækkað til 20 kr. Í Föroyum ætlast at vera ið hvussu so er 4000 lurtingatól og skuldi eftir tí ætlan, sum kann gerast út frá teim royndum, sum nú hava farið fram í 3 mánaðir, eitt lurtaragjald uppá 15 kr. verið nóg mikið til tær frammanundan nevndu útreiðslur til tekniska drift og afturrindan av stovnkostnaði, eins væl og til tann mentunarliga partin av útvarpingini.

Í 3 mánaðir hava farið fram royndarútvarpingar mest til at fáa hylling á, hvat eitt útvarp í Föroyum kann rokna við at kunna bjóða lurtarunum. Tey 6 fólkini, sum uttan nakra samsýning hava lagt doyin á at gera útvarpætlaðu radiotelefonstöð verður settur, verður, um lendið fæst frítt, kostnaðurin fjölbroyttar og so góðar, sum tær hava fingist við tí ófullkomna sendaranum, ið enn er, eiga tökk uppiborna, tí óivað hava royndarútvarpingarnar, har sum tær hava hoyrst, fingið fólk at fata týðningin av, at vit föroyingar eiga okkara egna útvarp.

Landsstýrið mælir tinginum til at samtykkja at seta útvarp á stovn út frá tí í hesi frágreiðing framförda. Tær beinleiðis útreiðslur landskassin kann fáa av stovnanini verða so smáar, at tann játtan, sum er sett á fíggjarlógina til útvarpsroyndir, mátti verið ivaleys. Av tí at ynski er sett fram um at fáa fyrilagt greidliga uppgerð yvir möguligar inntökur og útreiðslur av útvarpingini, áðrenn endanlig stöða verður tikin, biður landsstýrið hesa ferð bert um tingsins viðmæli til at föra samráðingarnar við telegrafaðalstjórnina á enda og leggja fullfíggjað uppskot fyri tingið á ólavsöku.

Uppskot.

Tingið biður landsstýrið fyrireika málið út frá tí í frágreiðingini framfirda og leggja endanligt uppskot fram á ólavsöku.

1. viðgerð 2. apríl, 2. viðgerð 3. og 3. viðgerð 4. apríl 1952.

Uppskot landsstýrisins samtykt 15—0.

---

86. Barnaheim.

1952, 31. marts legði R. Long, landsstýrismaður fram soljóðandi framlöguskriv, d. 31. marts 1952:

Málið hevur fyrstu ferð verið til viðgerðar á tingi í 1939 (tingtíðindi bls. 217) og seinni í 1946 (tingtíðindi bls. 233). Samtykt varð tá, at veita í byggistudningi 30.000 kr., at rinda í 5 ár, 6.000 kr. árliga.

Barnaheimið, sum nú er í Vestmanna, er nógv ov lítið og virkiskorini har út av lagi ring, er vandi fyri, at fyristöðufólkini, harra J. H. Simonsen og frú Nicolina Simonsen, mugu gevast, og tað so sera umráðandi samfelagsstarvið, tey í næstan 25 ár undir trongum líkindum hava útint, verður at falla burtur. Meir enn nakrantíð er törvur á barnaheimi, og ikki man sleppast undan almennum stuðli til rakstur tess. Í lötuni er lögtingsins peningastuðul til barnaheimið o. u. 20.000 kr. árliga.

Nevndin fyri barnaheimið hevur hesi árini starvast til at útvega pening til bygging av nýggjum barnaheimi í Tórshavn. Grundöki er keypt, og í Föroyum eru innkomnar 80.000 kr., sum eru tökar til byggingina. Havning, byggimeistari í Keypmannahavn, hevur gjört tekning og kostnaðarætlan, sum ífjör varð lögd fyri landsstýrið, men vóru tá ikki útvegir til at fáa til vegir tann stóra byggipeningin, sum er mettur til 750.000 kr. Heimið er ætlað til 35 börn.

29. marts í ár fekk landsstýrið nýggja peninguíleggingarætlan frá ríkisumboðnum og hevði sama dag fund við barnaheimsnevndina.

Byggipeningurin ætlast nú at vera fingið til vegar á henda hátt:

Lán frá »Bikuben« í Keypmannahavn við ríkisábyrgd fyri lán og avdrátt, tó so at landskassi Föroya tekur sær uppá at rinda rentu og avdrátt av helvtini		200.000 kr.
Peningur innsavnaður í Föroyum	80.000 kr.	
Felagið »Red Barnet«	100.000 -	
»Reyði Krossur« í Föroyum	17.500 —	
Tórshavnar býráð	10.000 —	
Aðrar kommunur í Föroyum	37.500 —	
Lögtingið	30.000 —	275.000 kr.
Statslán, sum verður rentað og avdrigið uttan útreiðslur fyri Föroyar		275.000 kr.
		750.000 kr.

Ríkisumboðið greiðir frá, at arbeiðs- og almannaráðdeildin vil sökja ríkisdagin um ta neyðturviligu peningajáttan til frammanundan nevndu byggistuðningar eins væl og til árligar rakstrarútreiðslur í sama mun, sum lögtingið letur.

Rakstrarætlan fyri eitt ár sær soleiðis út:

Rakstrarútreiðslur:

Lönir	36.500 kr.
Kostútreiðslur...	31.000 kr.
Brennl og ljós	10.000 —
Klædnaútreiðslur	10.500 —
Búnyttir	5.000 —
Vask og reingerð	5.000 —
Skrivstovuhald	1.500 —
Umsiting av húsi og grund	14.000 —
Skatttur og trygging	2.000
Sjúkraútreiðslur	3.500 —
Skúlaamboð	500 —
Útreiðslur av næmingum	2.500 —
Rentur og avdráttur av 200.000 kr. (helvt til landskassan) ...	15.000 —
Annað	2.000 —
	139.000 kr.

Inntøkur:

Barnagjald: 36 børn á kr. 4,40 dgl.	56.000 kr.
Landskassin	41.500 —
Staturin	41.500 —
	139.000 kr.

Uppi í teim 41.500 kr., sum er ætlað landskassanum at skula gjalda, eru 7.500 kr. (helvt av 15.000 kr.), sum eru rentur og avdráttur av helvtini av láninum uppá 200.000 kr. í »Bikuben«.

Sum tað sæst, kann byggingin fara fram uttan beinleiðis útreiðslur fyri landskassan, og má her sigast, at tann vælvild, sum frá ríkisins síðu er víst í hesum máli, er so nógvar ferðir størri, enn nakar kundi hugsað sær. Tað, sum er ivasamt í hesum máli, eru tær árligu útreiðslurnar í framtíðini. Um so er, at kostnaðarætlanin heldur, meinar landsstýrið at kunna viðmæla, at landskassans útreiðslur til barnaheim verða hækkaðar frá o. u. 20.000 kr. til 45.500 kr., men vissa má fáast fyri, at landskassin fær onga ábyrgd av tí parti, kommunurnar eru ætlaðar at skula gjalda (56.000 kr.). Av tí at byggingin fer at taka eitt ár, fær ein mögulig játtan onga ávirkan á fíggjarætlanina 1952/53.

Við hesum leggur landsstýrið málið fyri tingið.

1. viðgerð 31. marts og 1. apríl legði fíggjarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Av tí at barnaheimið í Vestmanna í mong ár hevur verið ov lítið, hevur nevndin fyri heiminum tey seinastu 15 árini arbeitt fyri nýggjum húsum og sökir nú lögtingið um studning.

Tað hús, sum Havning, arkitektur, hevur teknað, verður mett at kosta 750.000 kr. og skal rúma 36 börnum.

Í 1946 játtaði tingið at veita studning uppá 30.000 kr., goldnan í 5 ár við 6.000 kr. um árið. Nevndin er á ymiskan háti eydnast at savna saman 80.000 kr. í Føroyum.

Annars ætlast byggipeningurin at verða fingin til vega á henda háti:

Lán frá »Bikuben«	200.000 kr.
Innsavnað í Føroyum	80.000 —
Felagið »Red Barnet«	100.000 —
Felagið »Reyði Krossur« í Føroyum	17.500 —
Tórshavnar býráð	10.000 —
Aðrar kommunur í Føroyum	37.500 —
Lögtingið	30.000 —
Statslán	275.000 —
Tilsamans:	750.000 kr.

Lánið frá »Bikuben« er fingið við ríkisábyrgd fyri láni og avdrátti, tó so at landskassi Föroya tekur sær uppá at rinda helvtina av rentu og avdrátti, falt 7.500 kr.

Statslánið er uttan útreiðslur fyri Föroyar, og ríkisumboðið greiðir frá, at arbeiðs- og almannaráðdeildin vil sökja ríkisdagin um ta neyðturviligu peningajáttan til byggistudning eins væl og til árligar rakstrarútreiðslur í sama mun, sum lögtingið letur.

Árligu rakstrarútreiðslurnar, sum nevndin fyri barnaheiminum hevur sett upp, ætlast at verða 139.000 kr. og inntökurnar *56.000 kr.* Hetta er barnagjald fyri 36 börn á kr. 4,40 um dagin. — Eftir at gjalda til raksturin, um hesi töl halda, eru 83.000 kr., sum eftir barnaheims-nevndarinnar uppskoti verða at skifta í helvt millum stát og lögting.

Nú veitir lögtingið barnaheiminum 20.000 kr. í studningi um árið. Eftir hesum ætlanum skuldi lögtingið hækka studningin til 41.500 kr., um tað gekk umsóknini á möti. — Tá málið var til 1. viðgerð, mæltu allir röðarar til at taka væl undir við umsóknini, og útreiðslur fyri landskassan verða ongar í ár, sum ikki eru játtaðar á fíggjarlógini. So statt loyvir fíggjarnevndin sær at seta fram hetta

Uppskot.

Lögtingið samtykkir at hækka studningin til barnaheimið upp til 45.000 kr., treytað av, at fíggjarætlan og roknskapur á hvörjum ári verður lagdur fyri fíggjarnevnd og landsstýri, og kommununurnar gjalda teirra part.

2. viðgerð 3. apríl og 3. viðgerð 4. apríl 1952.

Formaðurin legði fram soljóðandi broytingaruppskot frá Martin Holm:

Nevndarinnar uppskot verður orðað soleiðis:
Lögtingið samtykkir at hækka studningin til barnaheimið upp til 45.000 kr. um árið treytað av:

I landsstýrið góðtekur reglugerð, sum lýsin m. a. ognarskipan barnaheimssins.

II fíggjarætlan og roknskapur verður lagdur fyri landsstýri og fíggjarnevnd.

III eingin bygging verður framd fyrr enn landsstýrið hevur góðtikið byggtilboðini.

IV kommununurnar gjalda teirra part.

Broytingaruppskotið fall 11—0.

Uppskot nevndarinnar samtykt 20—0.

87. Broytingar í lógini um motorakfør.

1952, 1. apríl legði lögmaður fram soljóðani lógaruppskot við viðmerkingum, d. 1. apríl 1952:

Uppskot

til

lögtingslóg um broyting í lóg nr. 73, 19. marts 1930 um motorakför o. a.

Í lóg nr. 73, 19. marts 1930 um motorakför o. a. smbr. kunngerð nr. 321, 29. november 1930 verða hesar broytingar gjördar.

gr. 1.

Í lóginnar gr. 3, 4. petti, sum seinast broytt við lögtingslóg nr. 24, 31. marts 1949, verða orðini »rutebiler og omnibusser« broytt til »rutibilar, bussar og burðavognar til serliga nýtslu.«

gr. 2.

Í lóginnar gr. 4 nr. 2 ganga út orðini »motorcykler med et bremseapparat med tilsvarende bremseevne« og í staðin verður sett aftaná »motorvogne« í fyrstu reglu »og motorsyklur.«

Aftrat gr. 4 nr. 4 verður sett sum trý nýggj petti:

c. Allir í Föroyum skrásettir persóns-, vöru- ella burðavognar skulu hava tveir *leiðbísarar*, ið skulu verða settir, ein hvörju megin vognin, soleiðis at förarin úr sessi sínum annaðhvört beinleiðis ella óbeinleiðis

lagtingslov om ændringer i lov nr. 73, 19. marts 1930 om motorkøretøjer m. v.:

I lov nr. 73, 19. marts 1930 om motorkøretøjer m. v., jfr. bekendtgørelse nr. 321, 29. november 1930, foretages disse ændringer.

§ 1.

I lovens § 3, 4 stykke, som den senest er ændret ved lagtingslov nr. 24, 31. marts 1949, ændres ordene »rutebiler og omnibusser« til »rutebiler, omnibusser og lastvogne til særlig brug.«

§ 2.

I lovens § 4 nr. 2 udgår ordene »motorcykler med et bremseapparat med tilsvarende bremseevne«, og i stedet sættes efter »motorvogn« i første linie: »og motorcykler.«

Efter 4. stykke i § 4 sættes som nye stykker:

c. Ethvert på Færöerne indregistreret person-, vare- eller lastautomobil skal være forsynet med *to retningsvisere*, der skal være anbragt een på hver side af köretöjet og således, at föreren fra sit sæde enten direkte eller indirekte kan påse, at de vir-

kann vita um teir eru í lagi. Teir skulu hava skapilsi sum ein vongur ella pílur, sum kann svingast úr, og vera settur solciðis, at hann, tá ið hann stendur út og inn, burturfrá er sjónskur út av vognhúsinum ella burðinum, bæði aftan og frammanífrá. Lætt skal vera at handfara leiðvísararnar úr förarasessinum, og teir skulu hava uppi í sær elektriskt ljós, í reyðligum ella appelsingulum liti, sum tendrar av sær sjálvum, tá ið teir verða nýttir.

d. Allir í Föroyum skrásettir persóns-, vöru- ella burðavognar skulu hava elektriskt steggingarljós. Tað skal vera sett aftantil á vogninum, og skal vera soleiðis gjört, at tað við at nýta fótbremsuna tendrar av sær sjálvum í reyðligum ella appelsingulum liti í nóg góðari tíð frammanundan týðuliga vísir teimum, sum koma aftanífrá, at ætlan er at stegga vogninum ella minka ferðina munandi ella knappliga.

e. Förari á öllum í Föroyum skrásettum persóns-, vöru- ella burðavognum skal, tá ið hann undir koyring ætlar at snara á ella steðga, frammanundan gera tekn um hetta öðrum vegfarandi til leiðbeiningar. Áðrenn snarað verður, skal förarin vissa sær, at hetta kann verða gjört uttan vanda fyri aðra ferðslu. Teknið skal vera týðiligt og verða gjört í góðari tíð frammanundan og halda á, til byrjað er at snarað á ella steðgað er.

Teir undir c og d fyrisettu leiðvísarar og steggingarljós skulu verða nýtt til ta her umröddu teknqeving.

ker. De skal have form af en vinge eller pil, der kan slås ud, og være anbragt således, at den i udslået tilstand på afstand kan ses tydeligt udenfor karosseri eller last såvel forfra som bagfra. Retningsviserne skal være lette at betjene fra förersædet og være monteret med elektrisk lys i rödlig eller orangegul farve, der automatisk tændes ved brugen.

d. Ethvert på Færöerne indregistreret person-, vare- eller lastautomobil skal være forsynet med en *elektrisk stoplygte*. Denne skal være anbragt bag på vognen, og skal være således indrettet, at den ved brug af fodbremsen automatisk tændes i rödlig eller orangegul farve og derved i betimelig tid forud tydeligt ungiver for de bagfra kommende, at vognen agtes standset eller hastigheden agtes nedsat væsentlig eller brat.

e. Föreren af ethvert på Færöerne indregistreret person-, vare- eller lastautomobil skal, såfremt han under körsel agter at skifte færdselsretning eller standse, forud give tegn herom til underretning for andre vejfarende. Forinden færdselsretning skiftes, skal föreren overtyde sig om, at dette kan ske uden fare for den övrige færdsel. Tegnet skal være tydeligt og gives i god til i forvejen samt vedvare, indtil svingningen er begyndt, eller standsninger er sket.

De ovenfor under c og d foreskrevne retningsvisere og stoplygte skal benyttes til den her omtalte tegngivning.

gr. 3.

Lógarinnar gr. 9, 6. punktum gongur út og í staðin verður sett sum nýtt 6. punktum:

»Útreiðslur av nevndu eftirkannan má viðkomandi gjalda eftir landsstýrisins nærri tilskilan.«

§ 3.

Lovens § 9, 6. punktum udgår og i stedet sættes som nyt 6. punktum:

»De med den omtalte undersögelse forbundne udgifter udredes af den pågældende efter landsstyrets nærmere bestemmelse.«

gr. 4.

Í lóginnar gr. 15, 5. punktum verður millum orðini »föres« og »af« sett »ella royni at fört.«

§ 4.

I lovens § 15, 5. punktum sættes mellem ordene »föres« og »af« »eller forsöges fört«.

gr. 5.

Í lógarinnar gr. 28 verða orðini »for motorcykler stor 10.000 kr.« for motorvogne stor 20.000 kr.« broytt til »fyri motorsyklur og motorvognar stór 40.000 kr.«

§ 5.

I lovens § 28 ændres ordene »for motorcykler stor 10.000 kr. og for motorvogne stor 20.000 kr.« til »for motorcykler og motorvogne stor 40.000 kr.«.

gr. 6.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 6.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Til tær ymisku broytingarnar skal landsstýrið viðmerkja fylgjandi:

ad gr. 1. Broytingina heldur landsstýrið vera neyðuga fyri at burðavognar, ið nýtast skulu til serstakt brúk t. d. renovatión, kunnu verða skrásettir.

Í nevnda dömi vil eginvektin vanliga vera ov hög yvir 2500 kg til at akfarið kann verða skrásett uttan landsstýrisins loyvi, meðan akfarið við fullum farmi ikki altíð kemur upp um tað loyvda markið, 4500 kg.

ad gr. 2. Broytingina hevur landfútin mælt til at verða gjörda, so at tær internationalu treytir, at automobilar og motorsyklur skulu hava tvær bremsur, sum ikki standa í samband við hvörja aðra, kunna verða loknar.

Uppískoyti til lóginnar gr. 4 nr. 4 er gjört orsakað av lögtingsmáli nr. 29/vetrasetan 1950: *Heimssáttmáli um ferðslu.*

Við teim broytingum sum her eru gjördar heldur landfútin, at ferðslureglurnar í Europa eru loknar.

ad gr. 3. Av praktiskum grundum heldur landsstýrið, at tey gjöld, sum

viðkomandi skal lata fyri skrásetingarsýn av motorakförum, verða fyrisett av landsstýrinum, so hesi gjöld skulu kunna broytast uttan lógarbroyting.

Um uppskotið í gr. 3 verður samtykt, er tað landsstýrisins ætlan, eftirsum aðrar broytingar skulu gerast í kunngerð nr. 321, 29. november 1930 at seta hetta gjald upp við 50 % fyri motorvognar frá 8 kr. til 12 kr. og fyri motorsyklur frá 4 kr. til 6 kr. orsakað av príshækkingini, síðan tey vórðu fyrisett. Ein tílík hækking er farin fram í hinum partinum av ríkinum við kunngerð frá 30/6 1950.

ad gr. 4. Eftir gr. 21, 3. petti í núgaldandi straffilóg falla brotsroyndir bert undir straff, um tyngri straffur enn helti er fyrisettur fyri sjálvt lógarbrotið.

Fyri brot móti lógini um motorakför o. a. er straffimarkið ikki út yvir hefti, sjálvt um tað í lóginnar gr. 30 stendur »fængsel (almindelig borgerlig straffelov § 25)«, tí hetta er tað sama sum núgaldandi beftistraffur smbr. gr. 7 í lóg nr. 127, 15. apríl 1930.

Brotsroyndir móti nevndu lóg kunnu tí eftir galdandi reglum ikki straffast.

Fyri at fáa heimild til at straffa tílíkar brotsroyndir heldur landsstýrið at broytingin í gr. 4 í uppskotinum, sum landfútin hevur tilmælt, er neyðug.

ad gr. 5. Til gr. 5 í uppskotinum kann viðmerkjast, at tað eru yvir 20 ár síðani, at 10.000 kr. og 20.000 kr. vórðu fyrisett sum minstamark í ábyrgdartryggingarhædd, ávikavíst fyri motorsyklur og motorvognar.

Hesar reglur kunnu ikki longri roknast tíðarhóskandi.

Tað hevur eisini víst seg at hava týðning, at tað er so stórur munur á hesum minsta marki í Föroyum og Danmark, hvar markið eftir núgaldandi reglum er sett til 60.000 kr. bæði fyri motorsyklur og motorvognar.

Dansk forening for international motorköretöjsforsikring hevur kravt, at Tryggingarsambandið Föroyar tekur ábyrgd fyri, tá ið motorvognar ella syklur, sum tryggjaðar eru í felagnum og skrásettar í Föroyum, valda skaða í Danmark ella hinum Norðanlondum.

Eftir tí Tryggingarsambandið hevur upplýst, kemur hækkingin av minstamarkinum fyri ábyrgdartryggingarhæddini til 40.000 kr. at föra við sær, at tryggingargjaldið verður hækkað, og kann henda hækking roknast árliga at verða:

Fyri skúlavognar	frá kr. 102,85	til kr. 138,15
Fyri privatkoyring	frá kr. 66,55	til kr. 96,80
Fyri persónkoyring	frá kr. 169,40	til kr. 211,75
Fyri vöru og lastkoyring	frá kr. 108,90	til kr. 142,78

Henda hækking átti ikki at vera líggjarliga nervandi, hvörki fyri privat ella vinnukoyrsil sammett við tær stóru kostnaðarútreiðslur at halda motorvogn ella motorsyklu.

Eftir sum skaðin kann verða tann sami, antin motorsykla ella motor-

vognur hevur verið atvoldin til hansara, er minimumsmarkið fyri ábyrgdartryggingarhæddini sama fyri motorsyklur og motorvognar.

I. viðgerð 2. apríl og 3. apríl legði lógarnevndin fram soljóðandi

Álit.

Landsstýrið hevur lagt fram uppskot til lögtingslóg um broyting í lóg nr. 73 frá 19. mars 1930 um motorakför v. m.

Broytingarnar viðvíkja:

1. Skráseting av burðavognum til serstaka nýtslu, t. d. renovatiónsvognar.
2. Setan í gildi av teim internationalu reglum um bremsur fyri automobilar og motorsyklur.
3. Setan í gildi av teim internationalu reglum fyri persón-, vöru- og burðavognum um leiðvísarar, steðgingarljós og tøkngeving við steðging og vending.
I. Saafremt aarslönnen beregnes efter de foreslaaede regler med 5.000 kr. som maksimum, og erstatningsniveauet ændres som foreslaaet fra 3/5 til 2/3, for dagpengenes vedkommende til 3/4 af daglönnen, vil det medföre

1) for söfartens og fiskeriets medhjælpere en förögelse af udgifterne med med ca. 200 pCt., d.v.s. at udgifterne vil stige til ca. 3 gange de nuværende,

2) for haandværkere, industriens og handelens medhjælpere en förögelse med henimod ca. 200 pCt., d.v.s. at udgifterne vil stige til ca. 3 gange de nuværende — dog i mindre grad, for saa vidt angaar lærlinge og huslig medhjælp,

3) for landbrugets medhjælp en betydelig mindre förögelse af udgiferne end for de under 1) og 2) nævnte,

4) for de efter anordningens §§ 55, 58 og 73 forsikrede selvstændige erhvervsdrivende en förögelse med ca. 50 pCt., d.v.s. at udgifterne vil stige til 1½ gange de nuværende for saa vidt angaar de frivilligt forsikrede dog kun, for saa vidt de forsikrer sig efter det höjeste tilladte belöb, 2.400 kr.

II. Saafremt aarslönnen beregnes efter de foreslaaede regler med 3.600 kr. som maksimum, og erstatningsniveauet ændres som nævnt under I, vil udgiftsförögelsen andrage: for de under I punkt 1) nævnte ca. 130 pCt. — d.v.s. at udgifterne stiger til ca. 2,3 gange de nuværende —, for de under I punkt 2) nævnte lidt mindre end 130 pCt. —, d.v.s. at udgifterne stiger til noget mindre end 2,3 gange de nuværende —, for de under I punkt 3) nævnte betydeligt mindre end 130 pCt. —, d.v.s. at udgifterne stiger til en del mindre end 2,3 gange de nuværende —, og for de under I punkt 4) nævnte ca. 50 pCt., idet lönnen for de sidstnævnte antages at blive det i ændringerne til anordningen foreslaaede belöb paa 2.400 kr.

III. Den foreslaaede forkortelse af karenstiden for dagpengene antages at ville medföre en udgiftsförögelse paa ca. 60 pCt. for de under I punkt 1) og punkt 4) nævnte — for de forsikrede selvstændige erhvervsdrivende dog kun under forudsætning af, at de benytter sig af adgangen til at sikre sig dagpenge fra den 7ende dag efter ulykkestilfældets indtræden. For de under I punkt 2) nævnte vil udgiftsförögelsen blive betydeligt större, i særlige tilfælde helt op til 100 pCt. större; endelig vil udgiftsförögelsen for de under I punkt nævnte 3) nævnte kun undtagelsesvis andrage mere end ca. 60 pCt.

IV. Saafremt karenstiden nedsættes som foreslaaet, og saafremt erstatningsniveauet ændres som foreslaaet, og aarslönnen beregnes efter de foreslaaede regler med henholdsvis 5.000 kr. (A) og 3.600 kr. (B) som maksimum, og aarslönnen for de forsikrede selvstændige sættes til maksimalt 2.400 kr., vil udgiftsförögelsen andrage: for de under I punkt 1) nævnte: A. ca. 380 pct., B. ca. 270 pct., for de under I punkt 2) nævnte: A. ca. 500 pct., B. ca. 360 pct., for de under I punkt 3) nævnte: A. undtagelsesvis mere end ca. 380 pct., B. undtagelsesvis mere end ca. 270 pct., og for de under I punkt 4) nævnte: A. ca. 140 pct., B. ca. 140

pct. Udgifterne vil med andre ord stige til A. ca. 4,8 gange, B. ca. 3,7 gange de nuværende udgifter for de under 1 punkt 1) nævnte, A. ca. 6 gange, B. ca. 4,6 gange de nuværende udgifter for de under 1 punkt 2) nævnte, A. undtagelsesvis mere end ca. 4,8 gange, B. undtagelsesvis mere end ca. 3,7 gange de nuværende udgifter for de under 1 punkt 3) nævnte, og A. og B. ca. 2,1 gange de nuværende udgifter for de under 1 punkt 4) nævnte.

Det er muligt, at *præmierne* ikke vil stige fuldt saa meget, som udgiftsforögelserne andrager, idet ændringerne i erstatningsniveau og forhöjelsen af aarslönnen ikke kan antages at medföre nogen betydelig forögelse af administrationsudgifterne. Paa den anden side vil som anfört i bemærkningerne til § 3 den her foreslaaede ændring ogsaa medförr en mindre forhöjelse af udgifterne.

Nýtsla av Marshallpeningi til útbyggjan av telefonverkinum

FØROYA LANDSSTÝRI

Tórshavn, tann 9. august 1951

Til Föroya lögting

Í tingsetuni 1947 (tingtíðindi bls. 48—50) varð uppskot sett fram soljóðandi:

1) telefonlinjan Tórshavn—Klakksvík eigur at verða nýlögd við jarðkaðali gjögnum Eysturoyima; hetta er ætlað at kosta 420.000 kr.
2) nýtt telefonhús eigur at verða bygt í Havn, sum er ætlað at kosta 250.000 kr., her er at viðmerkja, at ætlaninar viðvíkjandi innrættningi av stöðini eru sendar L. M. Eriksson til at eftirhyggja og gera viðmæli sítt, um ætlanirnar hóska til nýtslu av automattelefon,
3) tráðleys telefon eigur at verða gjörd til Suðuroyar; firma M. P. Petersen er umbiðið at gera ætlanir til hetta; tær kunna væntast aftur heilt skjótt.

Samtykt varð:

1) Lögtingið gevur telefonverkinum loyvi til at taka upp lán inntil 1.500.000 kr. at nýta til útbyggjan av telefonverkinum (serstakliga til tey undir 1—3 í álitinum nevnda öki). Tingið tekur ábyrgd fyri hesum láni. Peningurin verður at nýta, so hvört sum arbeiðið fer fram.
2) Samtalutakstirnir vórðu hækkaðir við 50 % frá 1. jan. 1948 og felaggjaldið varð hækkað við 10 kr. frá 1. apríl 1948.

Hetta varð gjört fyri at ökja um inntökur telefonverksins og hevði til fylgis, at inntökan frá 623.180 kr. í 1947 vaks til 801.434 kr. í 1948, og rakstrarhallið, sum í 1947 var 57.930 kr. í 1948 broyttist til rakstraravlop uppá 67.302 kr.

Í marts 1948 varð automattelefon bílögd í Svøríki at sela upp her 1. okt. 1951. Annars var einki útint av samtyktini í 1947. Tá ið L. Zachariasen í apríl 1948 fór í landsstýrið, varð Eskild Christiansen stjóri og var tað til jan. 1951.

Í 1949 samtykti tingið

1) at biðja landsstýrið skunda undir, at útbyggingarætlanin av 1947 var útförd,

2) heimila landsstýrinum tingsins vegna at geva ábyrgd fyri láni til keyp av tólum til radiotelefonsamband á ultrastuttum bylgjum Tórshavn—Klakksvík og Tórshavn—Sandoy,

3) geva landsstýrinum heimild at gera sáttmála um uppsetan av ultrastuttum telefonsambandi Tórshavn—Suðuroy, Tórshavn—Sandoy og Tórshavn—Klakksvík við tað felag, sum eftir 3 mánaða ókeypis royndartíð kundi geva sámiligasta prístilboð.

Eskild Christiansen táverandi stjóri hevði samráðingar við Store Nordiske Telegrafselskab og fekk lyfti um lán frá teimum, stórt 1 millión kr.

Við brævi, dagsett 30. marts 1950, gav landsstýrið soljóðandi fyribils láni-loyvi:

»Í brævi 14. hs. hevur telefonverkið vent sær til landsstýrið um at fáa loyvi til í teimum föroysku hankunum at upptaka ein kassakreditt uppá kr. 200.000. Endamálið við láninum er at víðka um og umvöla linjurnar, m. a. við at leggja kaðalar í ymsum bygdum, víðka um stöðirnar og fáa telefon til 500—600 nýggjar felagar. Telefonverkið mælir til, at láuið verður skipað við einum kassakreditti í p/f Sjóvinnubankanum upp til kr. 100.000, og at tann núverandi kassakredittur í Föroya Banka verður hækkaður frá kr. 50.000 til kr. 150.000.

Fyri at lýsa málið og fíggjarstöðu verksins er sent lansstýrinum rakstrarroknskapur fyri árið 1948 og fíggjarstandur pr. 31. decbr. s. á. saman við leysligum yvirliti yvir fíggjarstandin pr. 31. decbr. 1949.

Av rakstrarroknskapinum fyri árið 1948 framgongur, at verkið aftaná avskrivingar kr. 36.423,74 hevur givið í vinningi kr. 67.302,44 Av yvirlitinum pr. 31. decbr. 1948 sæst, at skuldin er um 853.000 kr. Heldur stór skuld í mun til nettovinningin, men er ætlandi útlit fyri, at inntökur verksins skuldi verið vaksandi og útreiðslurnar til umvæling fallandi, nú tá ið fleiri felagar koma aftrat, og linjurnar verða umvældar.

Landsstýrið kann ávísandi lögtingssamtykt í lögtingsmáli IV—2 í lögtingssetuni 1947—48 ganga við til, at verkið tekur upp nevnda kassakredit við kr. 100.000,— í Sjóvinnubankanum og kr. 100.000,— í Föroya Banka. Av omanfyri givna lánloyvi er so brúkt tilsamans kr. 393.000,—, jbr. bræv hiðani 26. september ífjór.

Tað er treyt fyri lánloyvinum, *at* serligur roknskapur verður fördur fyri lán sbr. lögtingsviðtökuni, *at* hesin roknskapur verður sendur landsstýrinum seinast 1. februar fyri árið, ið fór, og *at* kassakredittin kr. 200.000,—, tá ið víðkanin og umvælanin er liðug, verður avloystur við föstum láni.

Við lögtingslóg nr. 57, 5. september 1950, er landsstýrið heimilað at geva loyvi til og veðbalda fyri láni til Telefonverk Föroya lögtings til fylgjandi endamál:

1. Gerð av telefonsambandi á ultrastuttum bylgjum Tórshavn—Suðuroy, Tórshavn—Sandoy og Tórshavn—Klakksvík.
2. Keyp av jarðkaðali til og útbygging av telefonini í Eysturoy.
3. Bygging av nýggjari telefonstöð í Tórshavn og keyp og íseting av automattelefon sama stað.

Tann 21. september 1950 hevur landsstýrið sambært nevndu lög undirskrivað skuldarbrøv til »Store Nordiske«, stórt 1.000.000 kr.

Við skrivi, dags. 9. februar 1951, sigur L. Zachariasen verkstjóri frá, at telefonverkið er í peninganeyð, og ynskir hann at fáa aftur tann pening, sum lögtingið í 1930—40 trekti út av telefonverkinum, út við 70.000 kr., og roknar verkstjórin hetta úttrekk til eitt virði í dag uppá o. u. 200.000 kr., sum hann biður um at fáa útgoldið.

Við brævi 28. februar 1951 minnir verkstjórin aftur um tær 200.000 kr., sum hann kravdi í brævi 9. febr.

Verkstjórin klagaði um, at ið hvussu er 300.000 kr. av tí peningi, sum ætlað var til nýbygging, vóru brúktar til driftina, so nú var ikki peningur til at fullföra ætlanarnar. Eisini vísti hann á, at talið á fólki, sum tók daglön, var vaksið við næstan 100 %, so lönarútreiðslurnar vóru öktar so munandi, at ikki vóru vónir til, at endarnir fóru at rökka saman. Hann visti tá ikki enn, um arbeiði var til alt hetta fólkið.

Eskild Christiansen, ið kom til telefonverkið sum roknskaparstjóri 1. august 1947 og var bráðfengis telefonstjóri frá 1. april 1948 til 6. jan. 1951, greiðir frá, »at hann í hesum starvi tí tekniska viðvíkjandi mátti halda seg til teir tríggjar bröðurnar Poulsen, sum av L. Zachariasen í mai 1947 vóru settir sum meistarar og fyristöðumenn fyri arbeiði, hvör á sínum öki.

Viðvíkjandi punkt 1 av tingsamtyktini í 1947 upplýsir Eskild Christiansen, at tað datt niður fyri, tí kraruperaðir kaðalar, sum L. Zachariasen landsstýrisins vegna kravdi til hetta endamál, vóru ikki til at fáa og kundu ikki fáast gjördir fyrr enn 1952 og vildu tá kosta nógv meir enn ætlað.

Automattelefonin var bílögd í mars 1948 og varð tá triðingurin av keypipeninginum, 220,000 kr. goldin. Peningurin varð læntur í sparikassanum. Nú mátti fyrireikingar til, at taka móti automattelefonini, sum í fyrstani skal hava 1500 nummar, men seinni skal kunna víðkast til 4000. Bíleggjast mállu tí kaðalar við neyðturviligum innanbiggja leidningum. Allir höfuskaðlarnir eru lagdir niður, 2000 dupultir leidningar allar vegir. Kaðal-

arnin vórðu keyptir fyri pening, sum læntur var í sparikassanum, 198.000 kr. Landsstýrið hevði biðið um lánið og lögtingsformaðurin skrivaði undir.

Kaðalir eru lagdir innanbíggja í Kollafirði, millum Tórshavn og Hvítanes, innanbýggja á Toftum, Saltangará, Götunum, Strondum sum útgreiningar av nýlinjum eftir Eysturoynni — landsstýrið er gjört kunnugt við betta samstundis sum við arbeiðinum í Havnartúnum.«

Á fundi í landsstýrinum 21. marts í ár við telefonstjóran og skrivstovustjóra telefonverksins varð upplýst, at telefonverkið mátti ætlast at skula gjalda fram til 1. august í ár henda pening:

Ognarar uttan fyri Föroyar	kr. 258.000
hús til tráðleysa telefon á Brúnaskarði	- 24.000
telefonlinja upp á Nakk	- 8.000
renta til sparikassan	- 15.000
telefonhúsið	- 400.000
radiotelefonina	- 231.000
	936.000

Th. Petersen hevði lagt peningatrot telefonverksins fyri fíggjarnevndina og fingið loyvi, bráðfengis at lata úr landskassanum sum lán tann neyðturviliga pening til at halda fram við teim arbeiðum, sum byrjað vóru.

Tann 23. apríl 1951 sendi telefonstjórin fylgjandi uppgerð yvir skuld telefonverksins pr. 15. apríl 1951:

SKULD pr. 15. apríl 1951:

P. E Bording, København	158,00	
Chr. Boldsens Eftf., Kbh.	7.435,87	
L. M. Ericsson, Kbh.	9.061,98	
Ericsson, London	62.980,36	
Föroya Banki, Tórshavn		215.615,59
J. Jörgensen & Co., Kbh.	279,55	
Kristian Kirk, Horsens	12.152,99	
Københavns Cykle-Lakereri	542,84	
Nord. Kabel & Traadfabriker	132.311,78	
Store Nord. Telegrafselskab		700.000,00
Sjóvinnubankin		96.961,72
Sparikassin, Tórshavn		630.512,69
Skipafelagið Föroyar, Tórshavn	5.335,23	
Storno, Kbh.	16.241,00	
Tórshavnar el.verk	22.702,58	
Statsfængslet, Vridslöselille	6.285,40	
J. F. Kjölbro, Klakksvík	22.987,83	
Neutrofon Radio, Kbh.	469,50	
	289.944,81	1.643.090,00
Telegrafstöðin o. a.	33.000,00	
	331.944,81	1.643.090,00

Síðani hevur landsstýrið áteknað eitt skuldarbrævv, stórt 300.000 kr. til Færö Amts Sparekasse.

Sambart frágreiðing frá telefonverksstjóranum 23. apríl 1951 verður hetta lánið at nýta soleiðis:

Avdrátt til Föroya Banka	um	65.000	kr.
Avdrátt og rentur til Sparikassan	-	79.000	-
Eftir til ymsar leverandörar	-	135.000	-
		300.000	kr.

Í frágreiðing 9. mai 1951 sigur telefonstjórin frá:

»Eftir at gjalda L. M. Ericsson fyri automatikstöðina sambart sáttmála er í hvussu er kr. 331.000 föroyskar, aftrat hesum kemur o. u. 200.000 kr. fyri innsetingarnar av stöðini. At gjalda aftrat fyri stöðarhúsini í Havn verður ætlandi um 400.000 kr. til at gera húsini heilt liðug.«

og biður telefonstjórin um eitt lán aftrat uppá í minsta lagi 1.000.000 kr.

Viðmerkjast skal, at telefonhúsið roknast nú at koma at kosta upp ímóti 750.000 kr.

Eisini hevur telefonstjórin sagt frá, at tað í komandi árum verður neyðugt hjá tinginum at játta telefonverkinum ein árligan studning uppá 200.000 kr. til raksturin.

Landsstýrið hevur kravt telefonstjóran eftir eini fíggjarætlan, sum gjölla vísir, hvat raksturin krevur í komandi árum, eins og lista yvir útistaandandi pening, men vóru hesi skjöl ikki komin landsstýrinum í hendi

---

Í juni mánaði helt landsstýrið seg noyðast at leggja alt málið aftur fyri fíggjarnevndina og varð tað gjört 11. juni og í skrivligari frágreiðing greitt frá meginpartinum av tí, sum har er framlagt. Frágreiðingin endar soleiðis:

Atvoldin til, at telefonverkið er komið í so stórar trupulleikar, er í fyrstu syftu tann, at tað er sett í verk ymis stórarbeiði, sum koma at kosta nógv meira enn av fyrstan tíð ætlað. Tann fyrsta ætlanin hevur verið ov leys.

Ein onnur atvoldin er tann, at tað gjögnum longri tíð tykist at hava verið eitt vánaligt samarbeiði millum teir ymsu menn, ið settir eru til at rökja telefonverkið, og tá so hartil kemur, at neyðturviligur fakligur kunnleiki tykist at tvörra — um hetta sigur telefonstjórin í skrivi, dags. 6. h. m.: »Fyri at koma aftur á rætt-kjöl noyðist verkið at krevja í framtíðini av sínum arbeiðarum störri fakligan kunnleika. Tað er ikki mánaðlönin ella tímalönir til hin einstaka, ið gevur verkinum tær stóru útreiðslurnar, men spill av arbeiðstíð vegna ókunnleika, er största útreiðslan« — so má tað standa öllum greitt, at skilið rakstrarliga sæð má verða meira enn vánaligt.

Í fjör varð harra Bögeskov settur sum tekniskur hjálparmaður hjá

telofonstjóranum, men hevur hann nú sagt seg leysan frá starvinum, serstakliga, tí hann sigur seg ikki fáa möguleika til at fremja tey teknisku arbeiðini, soleiðis sum hann heldur vera best.

Telefonstjórin hevur biðið um loyvi til at lýsa eftir einum öðrum tekniskum hjálparmanni, men hevur landsstýrið ta stöðu, at nú má fara fram ein gjölla kanman av teim teknisku, rakstrarligu eins væl og teim fíggjarligu viðurskiftum telefonverksins, áðrenn tekniskur hjálparmaður verður settur av nýggjum.

Telefonstjórin hevur fingið hetta at vita og fingið loyvi at samráðast við harra Bögeskov um at virka sum hansara tekniski hjálparmaður, inntil kanningarnar eru komnar at enda.

Tær fíggjarligu kanningarnar eru givnar »Forvaltnings- og Revisionsinstituttet«, í Keypmannahavn, sum nú senda ein serfröðing til hetta, meðan tær teknisku og rakstrarligu kanningarnar skulu gerast av einum verkfröðingi frá »Köbenhavns Telefonaktieselskab«.

Tað er eyðvitað, at allar hesar kanningar koma at kosta nógvan pening, men vil slíkur peningur eftir landsstýrisins ætlan vera væl nýttur.

Tá ið nú landsstýrið leggur hesa frágreiðing fyri fíggjarnevndina, se er tað fyri tað fyrsta fyri at gera fíggjarnevndina kunnuga við stöðuna og fyri tað annað fyri at fáa eina samráðing um, hvussu tann törvandi peningurin skal lænast.

At fáa banka- ella sparikassalán í lötuni er neyvan möguligt. Eftir er so at læna pening úr landskassanum, um likviditeturin tolir hetta.

Á fundinum var L. Zachariasen til stöðar og legði fram yvirlit yvir ætlaðar inntökur og útreiðslur telefonverksins frá 1. juni 1951 til 31. dec. 1951, og fyri fíggaráarið 1952. Yvirlitini við viðmerkingum hansara eru prentað her:

YVIRLIT

yvir ætlaðar inntökur og útreiðslur TELEFONVERK FØROYA LØGTINGS frá 1. juni til 31. dec. 1951.

INNTØKUR:

1. Telefonfelagagjald	145.800,00	
2. Inntöka av samtalum	341.300,00	
3. Avgift av telegrammum	15.000,00	
		502.100,00
4. Flytan av telefon, postgjald o. a.	18.700,00	
5. Ymsar inntökur	9.000,00	
		27.700,00
Peningur, ið má fáast til vegar		1.806.700,00
		2.336.600,00

ÚTREIÐSLUR:

6. Stjórnarútreiðslur	99.200,00	
7. Rakstur stöðanna	208.800,00	
8. Umvöling og eftirsýning:		
Arbeiðslönir	134.200,00	
Tilfar	58.300,00	
		500.500,00
9. Serlig nýbygging:		
Nýggja telefonhúsið	400.000,00	
Automattelefonin	330.000,00	
Installatiónin	200.000,00	
Radiotelefonin:		
Tórshavn	14.000,00	
Klakksvík	20.000,00	
Tvöroyri	12.000,00	
Sandur	10.000,00	
		986.000,00
10. Vanlig nýbygging:		
Arbeiðslönir	75.800,00	
Tilfar	87.500,00	
		163.300,00
11. Ymsar útreiðslur		11.700,00
12. Rentur og avdráttur	200.000,00	
13. Bankaskuld	250.000,00	
14. Leys skuld	225.000,00	
		675.000,00
		2.336.500,00

TELEFONVERK FØROYA LØGTINGS

Tórshavn, tann 11. juni 1951.

Viðmerkingar
til
yvirlit yvir ætlaðar inntökur og útreiðslur Telefonverks Föroya Lögtings
frá 1. juni—31. des. 1951.

Post 1. Roknað er við inntökum í 1950 upp á 239.000,00 kr. Lagt er so aftrat 11.000,00 kr., sum svarar til o. u. 110 nýggjar telefonfelagar í árinum 1951.

Post 2. Inntöka av samtalum og telefontelegrammum hevur verið um leið 573.000 kr. í 1950. Hesin postur er fyri 1951 mettur at geva 585.000 kr. Fullgerau av radiotelefonstöðunum á ultrastuttum bylgjum kann ikki væntast liðug fyrr enn móti endanum av árinum 1951.

Post 3. Avgift av telegrammum er tikin eftir inntökuni í 1950. Hesin postur hevur ikki víst seg vaksandi tey seinastu árini.

Post 4. Flytan av telefon, postgjald o. a. er tikin eftir árinum 1950. Hann vil sjálvsagt skifta ár eftir ár nakað, men fær ongan heilt avgerandi týdning fyri roknskapin. Tó er at viðmerkja, at flytingar fyri el-verk linjum í HHavn fyri 1951 kunnu seta postin nakað upp.

Post 5. Ymsar inntökur. Hesin postur, hvar ið inganga inntökur av lýsingum í telefonbókini 1950, má heldur væntast minni av tí, at eingin bók enn er prentað fyri 1951, av teimum grundum, at talan kundi vera um takkstbroyting.

Post 6. Stjórnarútreiðslur. Posturin er tikin eftir 1950, sum er kr.152.100 Hann er so hækkaður við kr. 179.000,00, hvat ið heldur má ætlast at vera í minna lagi.

Post 7. Rakstur stöðanna var í 1950 o. u. kr. 350.000 kr., og er soleiðis hækkaður við kr. 8.000,00.

Post 8. Umvöling og eftirsýni fyri 1950 verður o. u. 320.000 kr., og er soleiðis hækkaður við kr. 10.000,00. Tað verður óivað ikki möguligt at fáa henda postin lægri fyri 1951.

Post 9. *Serlig nýbygging.* Byggingin av tí nýggja telefonhúsinum er ætlað til at geva kr. 400 000,00 eftir at gjalda frá 1. juni 1951 (Húskostnaður tá um kr. 700.000,00).
Automatikin er uppförd við tí, sum er eftir at gjalda út frá núverandi kursi á svenskum krónum.
Installatión er gjörd eftir meting. Viðvíkjandi radiotelefonini er bert kostnaður av niðurlegging av telefonkaðalum:
Tórshavn—Böllureyn, Klakksvík—Brúnaskarð við innrætting av telefonhúsinum á Skarðinum, Tvöroyri—Nakkur, og ymsar útreiðslur viðvíkjandi fyriskipanini av radiostöðini á Sandi.

Post 10. Vanlig bygging. Posturin er tikin eftir 1950, sum er o. u. 280.000

YVIRLIT

yvir ætlaðan rakstrarroknskap

TELEFONVERK FØROYA LØGTINGS 1952

1.	Telefonfelagagjald	290.000,00	
2.	Inntöka av samtalum o. ö.	650.000,00	
3.	Avgift av telegrammum	25.000,00	
			965.000,00
4.	Flytan av telefon, postgjald o. a.	35.000,00	
5.	Ymsar inntökur	15.000,00	
			50.000,00
	Rakstrartap		288.000,00
			1.303.000,00

6.	Stjórnarútreiðslur	175.000,00	
7.	Rakstur stöðunna	383.000,00	
8.	Umvöling og eftirsýni	330.000,00	
			888.000,00
9.	Rentan av skuld		185.000,00
10.	Ymsar útreiðslur		20.000,00
	Avskriving: 7 pct. av 3.000.000,00		210.000,00
			1.303.000,00

TELEFONVERK FØROYA LØGTINGS

Tórshavn, tann 11. juni 1951.

Viðmerkingar

til

yvirlit til ætlaðan rakstrarroknskap Telefonverks Föroya Lögtings 1952.

Post 9. Undir hesum posti eru bert uppfördar rentur av skuld. Skal verkið í öllum av sínum peningaliga virki vera rikið óheft, eigur tað eisini at vera fört fyri at gjalda avdráttur av láni, sum er árliga um 115.000,00 kr.

Vanlig nýbygging er 70.000 kr. meiri enn avskrivingin. Skal verkið hvíla í sær sjálvum við vanligari nýbygging aftrat rakstrinum, eigur raksturin at kasta hesar 70.000,00 kr. av sær, fyri at verkið kann rekast óheft.

Fíggjarnevndin játtaði, at landsstýrið skuldi royna av landskassans peningi at greiða so mikið til ólavsöku, sum kravdist at halda fram við teimum arbeiðum, sum eru sett í verk av telefonverkinum.

---

19. apríl hevði landsstýrið vent sær til generaldirektoratet for Post- og Telegrafvæsenet og biðið teir verið Föroyum til hjálpar við könnum manni at kanna telefonviðurskiftini her og gera uppskot til framtíðar skipan. Við vælvild frá Irming, stjóranum í K. T. A. S., Keypmannahavn, hevur landsstýrið fingið frá hesum felag loyvi at fáa higar ein av teirra dugnaligastu yngri monnum, J. Christiansen telefonverkfröðing, sum frá felagnum fyri 4 árum síðani fekk álagt tað starvið at umleggja og nýskipa telefonina á Bornholm, sum K. T. A. S. tá tók undir seg. Hanra Christiansen tók við hesum starvi og kom higar 25. juni. Hann hevur eftir landsstýrisins áheitan givið hesa fyribils frágreiðing:

J. CHRISTIANSEN
Telefoningeniör

Tórshavn, 12. juli 1951.

Til Föroya Landsstýri.

Vedr.: Undersögelse af Telefonverk Föroya Lögtings'linienet med henblik på installation af en automatisk telefoncentral i Tórshavn.

Efter en mundtlig forhandling med Landsstyret, under hvilken undertegnede gjorde landsstyret bekendt med de overvejelser — i såvel teknisk som ökonomisk henseende — man havde at fremföre efter en foreläbig undersögelse som ovenfor anfört, skal jeg på given foranledning tillade mig kort at rekapitulere disse overvejelser.

Der opstår mange tekniske problemer i forbindelse med overgang fra manuel til automatisk telefonekspedition. Bl. a. stilles der endog ganske store krav til det linienet, der skal tilsluttes automatcentralen. Efter i store træk at have gennemgået det bestående linienet i Tórshavn, kan jeg allerede på nærværende tidspunkt oplyse, at en ganske gennemgribende sanering og udbygning af dette vil være absolut påkrævet, hvis man vil göre sig häb om, at automatcentralen skal kunne fungere uden alt for mange afbrydelser.

Vedrörende den ökonomiske side af sagen kan oplyses, at selve automatcentralen i köreklar stand vil stå telefonværket i ca. 1,1 million kr. og bygningen i fuldt færdig og monteret stand i ca. 900.000 kr. Hertil kommer investeringen under det daglige arbejde indenfor telefonverket; belöbet hertil kan dog ikke opgives, men det kan anföres, at arbejdslönnen alene ved nybygning i året 1950 har andraget ca. 150.000 kr. Skönsmæssigt vil jeg anslå, at udgifterne til sanering og udbygning af linienettet i Tórshavn — på grund af den forestående installation af automatcentralen — vil andrage ca. 200.000 kr. Sluttelig skal anföres, at udgifterne til multi-kanal udstyret, der bliver leveret til efteråret, vil andrage mindst 500.000 kr. incl. kabelforbindelser til de respektive cetraler. Der skal således i löbet af 1 år investeres mindst 3 millioner kr., og forrentning og afskrivning af dette belöb vil naturligvis i årene fremover belaste driftsregnskabet ret væsentligt.

Såfremt man mener, det ikki kan forsvares at bruge så stort et belöb til dette specielle formål, kan jeg ikke se anden udvej, end at man forsöger at få ordrene på automatcentralen og multi-kanal udstyret annuleret, og i stedet for förstnævnte installerer en manuel central af nyere type, og istedet for multi-kanal udstyret efterhånden indköbe de af hinanden uafhængige VHF anlæg, som trafikken fremover kræver, og af samme type som de nuværende.

Såfremt ovennævnte ordreannulleringer bliver accepteret, indebærer dette den meget store fordel, at man selv bestemmer tempoet i anlægsvirksomheden, således at man i årene fremover kan sanere og udbygge anlæggene i det omfang, de tekniske forhold kræver, og de ökonomiske forhold tillader.

Jeg har i ovenstående betragtninger ikke berört anlæggene udenfor Tórshavn, men jeg vil dog ikke undlade at anföre, at der her — om i endnu

höjere grad end i Tórshavn — tiltrænges en gennemgribende sanering og udbygning af centraler og hovedlinier.

Jeg står naturligvis gerne til tjeneste med yderligere oplysninger, såfremt dette skulle være önskeligt.

Ærbödigst

J. Christiansen.

J. CHRISTIANSEN
Telefoningeniör

Til Föroya Landsstýri.

I henhold til mundtlig aftale med landsstyret og i tilslutning til min beretning af d. d. vedrörende undersögelse af telefonlinjenettet i Tórshavn, skal jeg herved tillade mig at anföre nedenstående specifikation over de i beretningen anförte summer.

		Anlægssum	Betalt
Firma Storno (Radioanlæg).			
Tilbudssum	270.000 kr.		92.000 kr.
Dyrtidstillæg ca. 15 pCt.	40.000 kr.		
Bygninger, kabelanlæg, lys og kraft	215.000 kr.		
		525.000 kr.	
			120.000 kr.
			212.000 kr.
Nybygninger:			
Fuldendelse og indretning af kontorer m. v.		900.000 kr.	350.000 kr.
Firma L. M. Ericsson: (Automatcentral)			
Tilbudssum	660.000 kr.		220.000 kr.
Dyrtidstillæg 25 pCt.	17.0000 kr.		
1 montagsleder i 9 måneder à kr. 4000 kr.	36.000 kr.		
6 montörer à 3000 kr.	162.000 kr.		
4 lokale montörer à 700 kr.	25.000 kr.		
Diverse ekstrahjælp + materialer	37.000 kr.		
		1.100.000 kr.	
Sanering af linjeanlægget i Tórshavn		200.000 kr.	
Sideløbende anlægsarbejder		300.000 kr.	
		3.015.000 kr.	782.000 kr.

Eftir harra J. Christiansens fyribils uppgerð krevjast altso fyri at fullföra ta nýgerð, sum farið er undir, o. u. 2,2 milliónir krónur. Eftir L. Zachariasens uppgerð (1/6—31/12—51) krevjast 1,8 millión krónur. Tá ið telefonstjórin nú upplýsir, at raksturin gevur so munandi ball,at hann má skjóta upp beinanvegin at hækka allar takstar bráðfengis við 50 %, heldur landsstýrið tað vera óráð at rokna við eini minni beinleiðis peningaílegging til telefonverkið enn 2 milliónir kr. Í vár bað telefonstjórin landsstýrið útvega telefonverkinum 1 millión kr. av Marshallpeninginum. Tá hevði tingið beint frammanundan havt býtið av Marshallpeninginum til viðgerðar, og landsstýrið helt seg ikki tá kunna biðja tingið beinan vegin umstoyta eina nýtikna avgerð og vildi tí heldur royna at fáa fíggjarnevndina um neyðugt at játta bráðfengis peningaútlegg úr landskassanum, til tingið kom saman aftur. Tá vóru peningavánir landsins øðrvísi enn í dag. Sum nú er vorðið, sær landsstýrið ongan annan útveg til at fáa fullfört nýgerðir telefonverksins enn at taka av tí parti av Marshallpeninginum, sum ætlaður var at nýta til vinnulívsins uppbyggjan við at minka um tingsins peningaílegging til havnagerðir. So statt setir landsstýrið fram hetta

uppskot:

Tingið samtykkir, at 2 milliónir kr. av teim fýra, sum ætlaðar vóru til havnargerðir, verða at nýta til útbyggjan telefonverksins eftir landsstýrisins tilskilan.

LANDSPRENTSMIÐJAN

FÖROYA LANDSSTÝRI **SKJAL NR. 6.**

Tórshavn, 20. desember 1951.

Frágreiðing

í

lögtingsmáli nr. 59 1951: Lán til Froðbiar sóknar kommunu.

Sambæt lögtingslóg nr. 67, 21. desember 1949, varð landsstýrið heimilað at taka upp neyðturvilig lán uppá 2 mill. kr. tingsins vegna til í samráð við stýri vinnulánsgrunnsins at nýta til rakstrarhjálp og figgjarbótur til fiskiskip.

Landsstýrið royndi at fáa tey neyðturviligu lán, men eydnaðist tað bert at fáa lent 1 mill. kr. við 500.000 kr. frá hvørjum av teim føroysku bankunum.

Ymsar umsóknir hava verið um lán, og hevur landsstýrið, umfram nøkur einkult veðhald til rakstrarhjálp, játtað fylgjandi saneringsplán: (sí skjal nr. 1)

	kr.
Klakksvíkar Fiskivinnufelag	190.000
Georg Hammer, Tvøroyri	30.000
Júst Hansen, Toftir	16.371
Jens Cl. Isaksen, Klakksvík	21.780
Mortan Simonsen, Tórshavn	15.000
P/f Tór, Tórshavn	170.000
P/f Tyril, Götu	100.000
Rituvíkar Trolarafelag	112.000
J. M. Lambhauge, Lamba	40.310
P/f Logn, Vági	100.000
Sigurd Simonsen, Fuglafirði	23.000
P/f Sælingahella, Tórshavn	102.875
Rituvíkar Trolarafelag (útgerð)	100.000
	kr. 1.081.336

Síðani hava ymsar umsóknir verið frammi, men hava ikki kunnað verið játtaðar, m.a. vegna peningatrot.

Tann 7. august 1951 kom umsókn til landsstýrið frá Arbejdernes Trawlerdrift, Tvøroyri, um saneringslán *(sí skjal nr. 2)*.

Landsstýrið svaraði, aftaná at hava havt samráð við figgjarnevndina, 10. august soleiðis:

„Vísandi til skriv felagsins, dagf. 7. august 1951, um saneringshjálp til A.T., Tvøroyri, skal landsstýrið við tí fyrivarni, sum tikið varð á felagsfundinum millum stýri Vinnulánsgrunnsins og lands-

stýrið 9. august, at tað, sum í saneringsætlanini bygdi uppá ætl, fyrst má vera fast klárlagt, siga frá, at á felagsfundinum er samtykt at útfala:

Ásannast má, at tað verður stórur skaði fyri Tvöroyri, um eitt felag sum A.T., ið er störsti arbeiðsgevari har, steðgar, utan at nakað kemur í staðin.

So statt vil landsstýrið royna at hjálpa so langt, sum hjálpast kann undir lógligum formi. Um figgjarnevndin og vinnulánsgrunnurin viðmæla, vil landsstýrið geva ábyrgd fyri láni, sum verður givið undir treytum, sum landsstýrið og figgjarnevndin kunna góðtaka. Tó má viðmerkjast, at her er talan um blandaðan rekstur, bæði fiskivinnu og handilsrekstur, og má tí krevjast ikki minni, enn kravt hevur verið í öðrum förum av reinum reiðaravirkjum, at vissa fæst fyri, at tann figgjarhjálp, sum frá almennari síðu her verður veitt, verður brúkt forsvarligu. Soleiðis sum kravt hevur verið í fleiri förum, verður eisini her neyðugt at treyta, at eftirlit verður við nýtsluni av rekstrarhjálpini, og at stýrið gevur seg undir um neyðugt at verða umskipað."

Tann 13. oktober 1951 var málið aftur til viðgerðar í landsstýri og figgjarnevnd, og framgongur fylgjandi av gerðabók figgjarnevndarinnar:

1951, leygardagin 13. oktober kl. 13. hevl figgjarnevndin fund í Tinganesi. Allir limir vóru möttir. Landsstýrismennirnir R. Long og H. Djurhuus vóru á fundi. Johan Djurhuus skrivstovustjóri og L. Lützen vóru á fundi.

Til viðgerðar:

1) Ábyrgd fyri sanering og rekstrarlán til A.T., Tvöroyri. P. M. Dam greiddi frá stöðuni í dag. Hann segði nevndini frá, at hann hevði fingið fjarrit frá barra Kampmann, fyrverandi figgjarmálaráðharra, hvarfir A.T. kundi fáa saneringslán uppá kr. 250.000,— úr Statsanstalten for Livsforsikring, m.a. treytað av, at Arbejdernes Landsbank lenti felagnum A.T. aðrar 250.000 kr. í rekstrarláni, alt undir landskassaábyrgd.

L. Lützen, landsrættarsakförari, segði frá úrslitinum av akkordroyndunum, har at kalla allir lövalu tikið ímóti eini 25 pst. akkord til fulla avgerð. Hann segði eisini frá, at P/f Vörðhavnar Skipasmiðju hevur tikið konkurskrevjingina aftur og útleggshavarar sínir útlegg.

Samtykt varð at fáa til vega nýggjan figgjarstand per dato og royna at fáa eina akkord í lag við priviligeraðu kreditorarnar.

15. desember 1951 kom kunngerð, dags. 13/12 1951, frá Froðbiar sókuarstýri *(sí skjal nr. 3)*.

Tann 18. h.m. var málið til viðgerðar á einum felagsfundi millum landsstýrið og figgjarnevndina, har m.a. varð framlagt av umsökjarunum:

1) Gevinst- og talskonto pr. 23/7 1951 *(skjal nr. 4)*.
2) Raabalance pr. 23/10 - 1951 *(skjal nr. 5)*.
3) Status pr. 23/10 1951 *(skjal nr. 6)*.

Í hesum status er ikki tikið við, hvussu stóðan kann ætlast at verða aftaná eina samering.

Eftir áheitan frá landsstýrinum hevði formaður fyri A.T., löglingsmaður P. M. Dam, telegraferað til lángevararnar um lánitreytirnar og fingið soljóðandi telegramm, dags. 17/12 1951:

„FORHANDLER HEROM STOP BLIVER ENS FOR LANDSBANKEN OG STATSANSTALTEN STOP FORVENTER 6,1 pCt. OG AFDRAGSTID CIRKA 25 AAR."

Frá statsautoriseraðum revisor Steen Hansen fyriliggur uppskot til rekonstruktiónsstatus, dag. 2/8 1951 *(sí skjal nr. 7)*.

Sum tað sæst av hesum skjali er eitt hall uppá kr. 590.066,97, og kemur betta at föra við sær, at kreditorar, ið ikki eru tryggjaðir, bert fáa 28½ pst., men ger revisorin annars vart við, at virðissetanin fyri eina stóran part byggir uppá ætl.

Av tí frágreiðing, sum L. Lützen, landsrettarsakförari, hevur givið í figgjarnevndini 13/10 1951, hava at kalla allir kreditorar samtykt eina akkord uppá 25 pst. til fulla avgerð, men er ikki enn frágreitt, um allir nú hava samtykt akkordina.

Tann 13. desember 1951 hevur aðalfundur verið í felagnum. *(sí skjal nr. 8)*.

Av hesum skjali framgongur, at ein treyt fyri tí lánni uppá ½ mill. kr., sum umsökjararnir hava fingið játtað, er, at semja skal fáast í lag millum A.T., bankastjóra Kampmann og F.D.B. við direktiónsskrivara tess Ingvardsen um broytingar í felagsins lógum til umskipan av driftini, og at landsstýrið góðtekur hesa broytingina.

Tað er enn einki fyrilagt landsstýrinum um eina slíka samráðing, men framgongur av *skjali nr.* 9 nakað um, hvörjar broytingar verða at krevja.

Tá landsstýrið hevur lagt málið fyri figgjarnevndina, so er tað, tí stýrið er av tí áskoðan, at tað ikki í löglingslóg nr. 67 frá 21. desember 1949 er heimild til at lena kommununi pening til umsökta endamál, at umsökjarin er av sonnu áskoðan, framgongur av, at hann nú hevur lagt málið fyri löglingið.

Av skjali nr. 7 sæst, at A.T. hevur í skuld til tað almenna:

	kr.
Landshandilin	48.246,92
Vinnulánsgrunnurin	156.836,30
Löglingsskattur	111.333,83
Lönjavningargrunnurin	17.566,11
Föroya Vanlukkutrygging	2.611,75
Saltfiskagjald	999,55
Gjald fyri feskfisk	8.560,00
Bót til landskassan	2.000,00
kr.	381.154,15

umfram falna rentu og skatt til kommununa og havnagjald.

Av skjali nr 3 framgongur, at sóknarstýrið fyri Froðbiur sókn

hevur samlykt at taka ímóti einum láni uppá ½ mill. kr. til aftur at fanna A.T. til sanering, og sókir sóknarstýrið um lánloyvi og lögtingsins ábyrgd.

Frá tveimum sóknarstýrislimum, O. Wilberg og G Vestergaard, er komið telefonisk mótmæli ímóti lántökuni.

Fróðbiar sóknarstýri hevur í lötuni fylgjandi lán við lögtingsábyrgd:

Ár:	*Upprunaliga:*		*Rest:*
1942	170.000 kr.	kr.	136.961,70
1944	141.000 kr.	kr.	121.821,11
1946	30.000 kr.	kr.	22.500,00
1947	160.000 kr.	kr.	122.750,00
1947	225.000 kr.	kr.	191.350,00
1948	30.000 kr.	kr.	26.250,00
1948	65.000 kr.	kr.	57.875,00
1949	100.000 kr.	kr.	90.000,00
1949	50.000 kr.	kr.	48.750,00
1950	584.000 kr.	kr.	579.311,15
frá ríkiskass.		kr.	23.282,00
1951	156.000 kr.	kr.	456.000,00
		Tilsamans: kr.	1.879.890,56

Fylgjandi stuðningar kunnu vænlast játtaðir sóknini:

a. Marshallpeningur til el-verk ..... kr. 120.000,00
b. Statsstuðningur til havnaverk ..... kr. 440.000,00
c. Rest av lögtingsstuðningi til do. ..... kr. 456.000,00

Eftirstöðurnar av kommunuskatti eru ógviliga stórar, og kann ein stórur partur barav vænlast at verða óerhaldiligur.

Kommunan er tann triðjastörsta kommunan í Föroyum, men er í löturni rætiliga veik figgjarliga sæð.

Tað er av stórum týðningi fyri sóknina, at tey virki, sum har eru og rökja fiskivinnu, ikki delta niðurfyri, men mugu annaðhvört verða stimbraði, ella onnur virki sett á stovn í staðin, men óvanligt má hað tó sigast at vera, at sóknarstýri skal upptaka lán við lögtingsábyrgd til útlán til handilsskap; slikt kann ikki sigast at vera ein vanlig kommunal uppgáva.

Málið er nú av umsökjaranum lagt fyri lögtingið, áðrenn landsstýri og figgjarnevnd hava havt hövi til endaliga viðgerð, so landsstýrið skal í lötuni geva hesa frágreiðing, fyri at tingið kann gerast kunnugt við tey ymsu skjölini.

K. Djurhuus.
Lögmaður.

/ J. Djurhuus.

VINNULÁNSGRUNNUR
FØROYA LØGTINGS

SKJAL 1.

Tórshavn, 19. desember 1951.

Landsstýrið hevur 10. hs. biðið um eitt yvirlit yvir sanneringslán, og skal grunnurin tí upplýsa fylgjandi:

Láncakari	Lániár	Uppr. stódd	renta	resthóvuðsstólur	afturgold.
Klakksvíkar Fiskivinnuf.	1950	140.000	6 pst.	140.000,00	
	1950	50.000	5½ pst.	50.000,00	
Georg Hammer	1950	30.000	6 pst.	21.750,00	8,250.00
Just Hansen	1950	46.731.16	6 pst.	46,371,16	
Jens Cl. Isaksen	1951	21,780	6 pst.	18.171,78	3,608,22
Mortan Simonsen	1950	45.000	6 pst.	45.000,00	
Tór	1950 51	170.000	6 pst.	170,000,00	
Tyril	1950	100.000	6 pst.	100.000,00	
Rituvíkar Trolarafelag..	1951	112.000	6 pst.	112.000,00	
Lambhauge	1951	10,310	6 pst.	40,310,00	
Logn	1951	100.000	6 pst.	100.000,00	
Sigurd Simonsen	1951	23.000	6 pst.	23.000,00	
Sælingahella	1951	102,875	6 pst.	102,875,00	
Rituvíkar Trolaraf. útgerð	1951	um 100,000	6 pst.	100.000.00	
		1.081.336,16		1,069,477,94	11.858,22

V. v.
(sign). *I. E. Fosaa.*

VINNULÁNSGRUNNUR
FØROYA LØGTINGS

SANERINGSLÁN

Tórshavn, 19. desember 1951.

	goldnar renturr	eftirst. renturr	goldin avdr.
Klakksvíkar Fiskivinnufelag ..	0	8,050,28	0
Simon Hammer	1.298,09	810,00	8,250,00
Just Hansen	0	1,271,01	0
Jens Cl. Isaksen	566,28	515,07	2,608,22
Mortan Simonsen	1.102,50	3,150,80	0
Tór	0	6,307,51	0
Tyril	0	6,324,31	0
Rituvíkar Trolarafelag	einki tilskrivað, hopleysi.		
Lambhauge	0	1,660,53	0
Logn	0	3,500,00	0
Sigurd Simonsen	einki forfallið enn.		
Sælingahella	einki tilskrivað, báturin liggur		

V. v.
(sign.) *E. Fosaa.*

Til Føroya landsstýri og
stýrið fyri Vinnulánsgrunn Føroya lögtings,
Tórshavn.

SKJAL 2

Komið í gjaldtrot av áleikandi vinnukreppu loyvir undirritaða felag sær at venda sær til heiðraða landsstýrið og stýrið fyri Vinnulánsgrunn Føroya lögtings um skilabótalán og gjaldfreist.

A. T. varð á sinni stovnað sum ein hissinnisroynd at fáa nakað aftur á föðir av tí,ið av táveerandi kreppu varð reint um koll í Froðbiar sóknar kommunu.

Hvöm týðning A. T. hevur havt og hevur fyri kommunu sína er öllum monnum, ið kenna viðurskiftini í Froðbiar sókn, kunnugt. Og hvussu lemjandi tað vil verða fyri sonn sókn, um tað verður at fara um koll, halda uppat við virki sínum, er eisini hvörjum skilamanni greitt.

Og sum statt er, er vandi fyri, at A. T. ikki lýður bötur, um ikki serlig hjálp verður veitt tí.

Men fær felagið ta neyðuga hjálp, kann tað væl lofta sær og vinna á trupulleikunum. Og hendu hjálp kann ikki sigast at vera serliga kravmikil í mun til virkisins stödd og samfelagsliga týðning.

Tað, ið serliga hevur rakt og löstað A. T., eru tey stóru löp, ið stóðust av:

1: Hini kröppu vend í feskfiskaprísunum, ið elvdu felaginum ovurstór undirskot uppá túr aftaná tír, bóast veiðinögdin tá ikki var at fílast at.

2: Saltfiskafarmunum, ið fóru fyri skeytið av tí spilta saltinum.

3: Hini ovurstrongu vrakingini í fjör ella av einum út av lagi ringum fiski 2. og 3. flokks ið skipini komu heim við.

4: Einum óvanliga litlum fiskiskapi.

Tey undir 2 4 nevndu óhapp seinasta ár elvdu virkinum eitt samtað hall í driftini uppá yvir hálva milliónina.

Seinasta vár var A. T. eins og flestu driftum miseydnað og hevur ikki veitt tökan pening.

Úrslitið er, at kreditorar hava lopið á, gjört „arrest" og „útlegg". Hond er lögd á felagsins debitorar.

Um ikki felaginum verða veiltar skilabötur akkord við teir leysu kreditorarnar og gjaldfreist hjá tí almenna eins og tilfelli hevur verið hjá so mongum, ið hava verið verri fyri, verður tað sum sagt at fara niður fyri, ið vil verða ólívssár fyri Froðbiar sókn, ið er 3. största sókn í Föroyum.

Stöðan er tann, at um felaginum verður givin gjaldfreist og lent verður tí pening til eina akkordskipan við teir leysu kreditorarnar, hevur tað allan mögulleika at koma fyri seg aftur. Tað liggur sera vel fyri hjá tí viðvikjandi arbeiðsumboðum bæði á sjógv og landi. Tess virkishús og arbeiðsöki liggja tætt við eina av teimum bestu havnum í Föroyum, og vel ber til *at rationalisera og nútímansgera arbeiðshátturin við flytibondum og öðrum hentleikum, ið hetta um virkisútreiðslurnar.*

Felagið hevur av arbeiðsumboðum, virkis- og handilshúsum og arbeiðslendi:

1: Leivur Óssursson, trolari, mettur til 300.000 kr. av hr. Jónasi,

2: Maritá, skonnert, gott grönlandsfar.
3: Vörðan, trol- og línuskip, nútímansgjört við sterkum motori.
4: Vestmanna, smurruváðsskip, kann verða frálikt línuskip til grönlandsveiðu, nú landast kann hartuppi.
5: Brimnes, trolskip og kann verða frálikt línuskip til grönlandsfiskiskip. Bæði seinastu nevndu skipini eru óför til sildaveiðu. Brimnes roynir sildveiðu í ár og fraettist um gott úrslit.
5: 1/2 Rankin, trolari, metur til 100.000 av harra Jónasi álitismanni Vinnulánsgrunnsins og Tryggingarsambandsins.
6: Neptun, motorbátur uppá 7 tons við sterkum motori, frálikur sum fjarða- og örindabátur hjá einum stórum handils- og reiðaravirki.
7: *Turkilag*, nýstani *nútímansgjört* og fört fyri at turka eina rúgvu av fiski.
8: Stórt fiskaturkistykki.
9: Nógv stór handils- og vöru- og fiskagoymslubús, sí hjálögdu metingar-, sýnis- og virðisskjal.
Stimbrað og endurreist vil A.T. so statt verða ein ómetaligur stuðul á plássinum.

Samráðingar eru farnar fram við sukfóruna, ið hava teir flestu krediloranar at umboða, og halda teir, at möguleiki er fyri at fáa eina akkord við krediloranar, um kontantur peningur kann fáast at bjóða teimum. Ein tílík akkord vil eisini av sonnum vera mikið betri fyri krediloranar, enn um felagið noyðist á húsagang og ognir less undir hamarin. Tí lá er útlit fyri verri úrtaki. Húsagangsuppsöla vil sum oftast ikki geva öðrum enn teimum, ið eiga 1. veðraett í felagsins ognum.

Áttað er at rekonstruera felagið á hendo hátt:

1: Fáa akkord við krediloran - geva 20 - 30 pst.
2: Skilabóluláu frá landsstýrinum.
3: Moratorium við Vinnulánsgrunnin Föroya Löglings.
4: Virkispening við at selja av aktivunum.

Akkord:

Leysir krediloran:	28 pst. av kr.	527.607,78	kr. 147.730,18
Landsskattur:	28 pst. av kr.	141.333,83	kr. 39.413,47
Saltfiskagjöld:	28 pst. av kr.	999,55	kr. -279,87
Lönjavningsgr.:	28 pst. av kr.	17.566,11	kr. 4.918,51
			kr. 192.312,03

Prioliteraað, ið má verða rindað nú:

Arbeiðslön	kr. 4.560,18
Sjópantiraettindaði kröv	kr. 69.608,62
Vörur tiknar uttan innloysing	kr. 14.444,19
Bötur til landskassan	kr. 3.000,00
Millumrokning við „Trekroner"	kr. 303,59
Afturhildin -heimapremia	kr. 2.611,75
	kr. 286.867,76

Herafturat má leggjast:
Akkordkostnaðurin, mettur til.....kr. 25.000,00

kr. 311.867,76

Skilabótalán:

Henda pening verður háttvirda landsstýrið biðið um at lena felaginum sambart tess heimild til at veita skilabótalán.

I aðru syftu um landsstýrið ikki kann fáa peningin tökan verður biðið landsstýrið um veðhald fyri einum skilabótaláni av sonnu stødd. Tað skal kortini verða sagt, at í lötuni veil felagið sær onga vissu fyri at fáa eitt tilikt lán. Men allir vegir til bjargingar av virkinum megu verða royndir.

Moratorium:

Felagið skildar Vinnulánsgrunni Föroya löglings:
Við veð í Vörðuni..... kr. 65.365,50 (var yvir 80.000,)
Við veð í Leivuri Óssursyni ..... kr. 91.179,80 (var yvir 150.000,)

kr. 156.836,30

Felagið loyvir sær at biðja um gjaldsfreist fyri helmingin av hesum peningi til sonnu treytir, sum givnar eru öðrum, ið hava fingið eina moratoruskipan við Vinnulánsgrunnin.

Virkispeningur:

Fyri at fáa virkispening er ætlanin at selja t. d. Leivur Óssurssoni soleiðis, at sölupeningurin kann verða brúktur í virkinum.

Felagið loyvir sær tí at sökja um söluloyvi og um, at Vinnulánsgrunnsins og landskassans veð í skipinum verður frigivið við nevnda endamáli.

Av talligum viðmerkingum eru at gera:

Munurin millum 825.351 kr. í akkordstatusinum og tein ber tikin leysu kreditorar stavar frá, at í akkordstattsinum eru tikin við Vinnulánsgrunns lánini og ca. 153.000 kr. av lánunum frá Föroya Fiskasölu.

Vinnulánsgrunnurin verður biðin um eina serliga skipan, og Föroya Fiskasöla verðnr ætlandi full goldin av veiðuni í ár.

Debitorarnir eru teir, ið eftiri eru, tá ið teir ivasonu eru burtnurúrskornir við ca. 74.000,00 kr.

Butikkin við kr. 150.936,25 av vörum á goymslu er tað, ið eftiri er, tá ið 15 pst. í vinningi og stummastaðni, hvr ið talan er um minni kurantar vörur, meiri avskarvað fyrst og síðani eykaavskarvað 100.000 kr.

Leivur Óssurssonur er settur í 175.000 kr., men álitismaður Vinnulánsgrunnsins og Tryggingarsambandsins hevur hann sum sagt til 300.000 kr.

„Etablissementet" er sett til 175.000 kr., meðan metingarmennirnir J. P. Mortensen og Th. M. Ström, byggimeistari, hava mett tað við búsum og uttanumstykkjum til 554.726 kr.

Bátuverkstaðurin er settur til kr. 8.795,26, meðan bara ein umvöling kostaði um 25.000 kr.

Alt tað, sum A. T. hevur havt til góða hjá felaginum „Samgongd" og „Tvørøyrar skipafelag" er avskrivað, og hevur A. T. yvirtikið skipini Brimnes og Vestmanna og sett tey hvørt til eitt virði av kr. 100.000.0.

Felagið loyvir sær at biðja um at fáa málið viðgjört sum allarskjótast, tí sum nú liggur er steðgur í durinum.

p. t. Tórshavn, tann 7. august 1951.

Arbeiðarafelag trolaradrift, a. v. a. á.

F. v.
P. M. Dam.

FRODBIAR SÓKNAR
KOMMUNA

Tvöroyri, hin 13. december 1951.

Til Föroya landsstýris,
Tórshavn.

Sum landsstýrinum kunnugt er Arbejdernes Fraveerdrift, a.m.b.a., Tvöroyri, komin so fyri, at tað, fyri at kunna halda fram virki sítt, má hava eitt lán upp á kr. 500.000.

Sum landið nú liggur peningaliga, er tað ikki möguligt hjá felagnum at fáa henda pening uttan íggjögnum kommunulán við lögtingsgaranti. Okkum er kunnugt av leinnum skjölum, sum hava liggið frammi í kommununni, at landsstýrið við viðmæli frá figgjarnevndini og stýrinum í Vinnulánsgrunninum hevur givið lyti um at garantera A.T. fyri tí möguliga láninum.

Av hjálagda avriti av fjarriti til statsministara Erik Eriksen sæst, hvönn týðning sóknarstýrið — uttan mun til partar — leggur í, at A.T.-virkið ikki fer niður fyri.

Kommunan hevur boð um við fjarriti frá fyrrv. fjggjarmálaráðherra bankastjóra Kampmann, at hon til viðari lán til A. T. og inníti lögtingsins veðhaldi kann fáa í lánti 1/1 millión frá Arbejdernes Landsbank og 1/4 millión frá Statsanstalten for Livsforsikring.

Á fundi í dag er samtykt fylgjandi tippskot:

„Vísandi til kommununnar fjarrit til statsministara Erik Eriksen viðvikjandi týðningunni fyri kommununa, at A.T. heldur fram sitt stóra virki, og til kommununnar samtykt av 16. oktober í ár um í Statsanstalten for Livsforsikring at taka eitt lán til A.T. til less endurreising *samtykkir sóknarstýrið at taka tað í omanfyri nevnda fjarrit umræddu lán frá Arbejdernes Landsbank upp á 1/4 millión til at lena viðari til A. T.* við leirri treyt, at A. T. góðtekur lánn av F. D. B. ávísta driftsleiðara (kaptajn Bang) og kemur ásamt við driftsleiðaran (Bang) og bankastjóra Kampmann um eina driftsskipan fyri A.T. (harav standandi mögudigar lógbroytingar) og bindur seg til at gera neyðugar broytingar, ið mega fara fram fyri íggjögnumföring av hesi skipan.

Sóknarstýrið sökir landsstýrið (lögtingið) um lánloyvi og tingsins veðhald fyri lánunum, tilsamans *500.000 kr., til viðari lán til A.T.*

Kommunan loyvir sær hervið at sökja háttvirda landsstýrið (lögtingið) um lánloyvi og lögtingsveðhald fyri lánunum.

FRODBIAR SÓKNARSTÝRI

S. v.
P. M. Dam.

ARBEIDERNES TRAWLERDRIFT, TVERAA

Status pr. 23. oktober 1951, ifølge hovedbog.

Aktiver.			
Debitorer			1.225.485,50
Kassebeholdning			651,85
Etablissementet			146.028,33
Sjóvinnubankin		418,57	
Skagens Bank		11,39	450,16
P/f Samgongd		12.500,00	
P/f Skipafelagið Tvöroyri		9.000,00	
P/f Rankin		80.000,00	
P/f Trolkol		5.000,00	106.500,00
Værdikonto:			
S/t Leivur Óssursson		252.822,66	
M/s Marite		122.646,65	
M/k Vörðan		305.441,93	
M/b Neptun		5.300,00	
Motorbaadebeddingen		10.235,40	
Bilen		10.250,00	
Landingsspillet		6.085,40	713.582,64
Inventar			7.458,25
Beholdninger:			
S/t Leivur Óssursson auslaaet		16.785,00	
M/s Marite auslaaet		70.977,20	
M/k Vörðan		1.766,20	
Netaslovan		11.737,00	
Fiskeforhandling		150.042,50	
Motorbaadeværkstedet		2.073,80	
	238.344,70		
Butiken ÷	35.751,25	202.590,15	
Tranöndekonto		1.358,00	160.330,15
Föroya Banki S. Afd. (Hyrekrav Rankin)			13.175,15
			2.673.970,06
Anslaaet post:			
Underskud			102.197,09
			2.776.167,15

Passiver:

A/S Föroya Banki		518.082,07
Vinnulánsgrunnurin m/k Vörðan	65.356,50	
Vinnulánsgr. Leivur Óssursson & Marite	91.179,80	156.536,30
Kreditorar		1.375.385,29
Sikringsfond m/k Brimnes & Vestmanna		20.000,00
Fiskepigernes Fagforening	7.000,00	
Arbejderforeningen Fylking	3.500,00	10.500,00

Afskrivninger:

S/t Leivur Óssursson	152.382,78	
M/k Vörðan	146.564,67	
M/s Marite	28.880,07	
Etablissementet	25.577,10	
M/b Neptun	4.770,54	
Motorbaadebeddingen	1.410,00	
Bilen	6.150,00	
Landingsspillet	2.754,16	368.519,32
Gevinst & Tabs Konto fra forrige Aar		226.210,48
		2.673.533,46

Anslaaede poster:

Anslaaet hyrer m/k Vörðan	24.103,29	
Anslaaet hyrer m/s Mirite	54.095,49	78.198,69
A/S Föroya Banki S. Afd. opgivet rente til 23/10		24.135,00
		2.776.167,15

Tvöroyri, 23. oktober 1951

Arbejdernes Trawlerdrift, Tveraa

Hans Jacobsen.

Raabalance pr. 23. oktober 1951.

Kassekonto	651,85
S/t Leivur Óssurssons drift	18.253,59
Restkonto	1.227.130,65
P/f Sjóvinnubankin	148,57
P/f Rankin	80.000,00
Ejendomskonto	146.028,33
Inventarkonto	7.158,28
Fiskeforhandlingskonto	18.926,93
M/s Marité	32.275,65
S/t Leivur Óssurssons værdikonto	252.822,66
M/s Marite værdikonto	122.646,65
M/b Neptun værdikonto	5.300,60
P/f Samgongd	12.500,00
M/k Vörðan værdikonto	305.441,93
Motorbaadebeddingen	10.235,40
Bageriet	1.100,63
P/f Skipafelagið Tvöroyri	9.000,00
Omkostningskonto	168.476,32
M/k Vörðan drift	25.228,24
M/k Róin drift	4.424,75
M/b Neptun drift	816,91
Motorbaadebeddingens drift	2.950,69
P/f Trolkol	5.000,00
Bilens værdikonto	10.250,00
Landingsspillet værdikonto	6.885,10
Varekonto	160.830,80
Skagens Bank	11,59
Landingsspillets drift	270,57
A/S Föroya Banki (Hyrekrav Rankin)	13.473,15
	2.682.140,17

Reskontro	1.373.385,29
Netustovan	207,62
M/s Marite afskrivning	28.880,07
Sikringsfond M/k Brimnes og Vestmanna	20.000,00
Vinnulánsgrunnurin M/k Vörðan	65.356,50
Fiskepigernes fagforening	7.000,00
Arbejdsforeningen Fylking	3.500,00
S/t Leivur Óssursson afskrivning	152.382,78
Etablissementet afskrivning	25.577,10
